*Løgtingsins umboðsmaður*
*Ársfrágreiðingin 2003*

# *LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR*

# *Ársfrágreiðingin 2003*

Tórshavn 2004

Løgtingsins umboðsmaður
Ársfrágreiðingin 2003
© 2004, Løgtingsins umboðsmaður
Umbróting, prent og innbinding: Hestprent

ISBN 99918-969-2-9

# Innihaldsyvirlit


I. Um embætið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 8

II. Gongdin í 2003 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 10

III. Hagtøl . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 12

IV. Álit og aðrar niðurstøður hjá umboðsmanninum í málum avgreidd í 2003 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 23

***10. Málsviðgerðartíð* . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 23**

10.1. Viðgerðartíðin hjá ALS og Kærunevndini hjá ALS . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 23

10.2. Málsviðgerðin hjá Fiskimálaráðnum av fiskiloyvi . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 34

10.3. Viðgerðartíðin hjá Hjálpartólamiðstøðini í einum bilmáli . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 48

10.4. Viðgerðartíðin hjá Fíggjarmálaráðnum í lønarmáli . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 49

***11. Innlit* . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 67**

11.1. Vantandi svar frá Fiskimálaráðnum uppá umbøn um innlit . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 67

***20. Almannamál* . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 73**

20.1. Stuðul til at vera heima og ansa brekaðum barni . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 73

***21. Kommunu-, umhvørvis- og byggimál v.m.* . . . . . . . . . . . . 78**

21.1. Mannagongd í sambandi við ognartøku av lendi til veg . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 78

21.2. Handfaringin av máli um breiðkan av vegi . . . . . . . 99

***25. Persóns-, familju- og arvamál*** . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . ***125***
25.1. Noktan av navnauppkalling . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 125

***27. Undirvísing, gransking og mentan v.m.*** . . . . . . . . . . . . . . ***157***
27.1. Heimild fyri hækkan av sjónvarpsgjaldi . . . . . . . . . . 157

***28. Starvsfólka- og arbeiðsmarknaðarmál v.m.*** . . . . . . . . . . . ***162***
28.1. Setan av útoyggjafulltrúa á Løgmansskrivstovuni . . 162
28.2. Ræturin til frítíðarløn av barsilsendurgjaldi . . . . . . 172
28.3. Setan av landsfornfrøðingi . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 194

V. Skjøl . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 333
***1. Umboðsmanslógin*** . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . ***333***
***2. Vegleiðingin um Løgtingsins umboðsmann*** . . . . . . . . . . . . ***337***

Lógaryvirlit . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 340

Leitorð . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 347

# *Til Løgtingið*

Vísandi til § 11, stk. 1 í løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000 um Løgtingsins umboðsmann lati eg av hondum hesa frágreiðing um virksemi mítt í 2003. Ársfrágreiðingin skal sambært nevndu grein verða almannakunngjørd áðrenn 1. juli 2004.

Frágreiðingin er býtt upp soleiðis:

I. Um embætið
II. Gongdin í 2003
III. Hagtøl
IV. Álit og aðrar niðurstøður hjá umboðsmanninum í málum avgreidd í 2003
V. Skjøl:
   1. Umboðsmanslógin
   2. Vegleiðingin um Løgtingsins umboðsmann

Tórshavn, mai 2004

*Joen H. Andreassen*

# I. Um embætið

Sambært løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000 um Løgtingsins umboðsmann velur Løgtingið fyri eitt 5-ára skeið ein uttantingsmann at hava innlit við fyrisiting heimastýrisins (§ 1). Við løgtingslóg kunnu verða gjørdar almennar reglur fyri virksemi umboðsmansins, sum annars í sínum starvi er óheftur av Løgtinginum (§ 3).

Virksemi umboðsmansins fevnir um alla fyrisiting heimastýrisins, t.e. bæði landsins og ta kommunalu (§ 4, stk. 1). Eisini feløg, stovnar, felagsskapir v.m., ið verða roknað við til almennu fyrisitingina sambært fyrisitingarlógini, eru fevndir av virksemi umboðsmansins (§ 4, stk. 2). Harumframt eru interkommunalir felagsskapir undirlagdir virksemi umboðsmansins (§ 4, stk. 4). Harafturímóti fevnir virksemi hansara ikki um ríkismyndugleikar, Løgtingið og stovnar undir Løgtinginum(§ 4, stk. 5 ).

Umboðsmaðurin hevur eftirlit við, at tær umsitingareindir, sum eru fevndar av virksemi hansara, ikki gera mistøk ella vanrøkja skyldur sínar, og at almenna umsitingin ikki fremur órætt móti borgaranum (§ 5).

Ein og hvør kann senda umboðsmanninum klagu um tær í § 4 nevndu umsitingareindir, sum eru fevndar av virksemi hansara (§ 6, stk. 1). Klagarin skal navngeva seg í klaguni, og skal hon vera umboðsmanninum í hendi í seinasta lagi eitt ár eftir, at tey viðurskifti, ið klagað verður um, áttu sær stað (§ 6, stk. 2). Er talan um avgerðir, sum kunnu leggjast fyri hægri umsitingarmyndugleika, skal hesin møguleiki vera royndur fyrst, áðrenn klagað verður til umboðsmannin (§ 6, stk. 3). Eru hesar treytir loknar, tekur umboðsmaðurin støðu til, um grundarlag er fyri víðari kanningum í tí máli, ið klagað verður um (§ 6, stk. 4).

Umboðsmaðurin kann eisini sjálvur av sínum eintingum taka eitt mál til viðgerðar og fremja neyðugar kanningar í hesum sambandi (§ 6, stk. 5).

Tær í § 4 nevndu umsitingar hava skyldu at geva umboðsmanninum tær upplýsingar og at leggja fram øll tey skjøl, sum hesin embætisins vegna krevur at fáa fyrilagt. Umboðsmaðurin hevur rætt

til at vitja støð, ið kannað verða, og hann hevur fría atgongd til at gera kanningar í øllum neyðugum hølum. Hann kann eisini stevna fólki í rættin at vitna um viðurskifti, ið eru avgerandi í kanningararbeiðinum (§ 8).

Tá umboðsmaðurin er liðugur við sínar kanningar, ger hann sína niðurstøðu, og metir hann at álvarsligt mistak ella vatnsketni er framt, skal hann boða formansskapi Løgtingsins, løgmanni og viðkomandi landsstýrismanni og/ella kommunustýri frá hesum. Hann hevur rætt til alment at finnast at, koma við tilmælum og á annan hátt gera vart við meting sína av einum máli, hann hevur kannað. Hann kann eisini mæla viðkomandi myndugleikum til, at fríur rættargangur verður givin (§ 10).

Rakar umboðsmaðurin við lýti í galdandi lógum, fyriskipanum ella umsitingarligum avgerðum skal hann boða Løgtingi og viðkomandi landsstýrismanni frá hesum, og er talan um kommunal ella interkommunal viðurskifti, skal hann eisini boða viðkomandi kommunustýri frá (§ 12).

Lógin og ein vegleiðing um, hvussu ein kann klaga til Løgtingsins umboðsmann, eru viðheft ársfrágreiðingini sum skjøl.

Eg varð tann 2. november 2000 av Føroya Løgtingi valdur sum tann fyrsti Løgtingsins umboðsmaður fyri tíðarskeiðið 1. januar 2001 til 31. desember 2005, men við tað, at eg tá sat í øðrum embæti, bar mær ikki til at taka við starvinum fyrr enn 1. mai 2001.

Skrivstovuhølini eru á 2. hædd í bygninginum Niels Finsensgøta 39, sum Føroya Realkredittstovnur eigur. Umframt meg sjálvan húsast her løgfrøðiligi medarbeiðari mín Johnhard Klettheyggj, ráðgevi, og Laila Egholm, skrivstovufulltrúi.

Adressan er Niels Finsensgøta 39, Postsmoga 1339, FO 110 Tórshavn, og teldupostadressan er lum@lum.fo.

Heimasíða umboðsmansins eitur www.lum.fo.

# *II. Gongdin í 2003*

Sum nevnt tók eg við starvinum sum Løgtingsins umboðsmaður tann 1. mai 2001. Í 2001 fekk eg tilsamans 39 klagur, harav 25 vóru endaliga avgreiddar í 2001. Hinar 14 vóru allar avgreiddar, tá eg í endanum av juni 2002 lat ársfrágreiðingina fyri 2001 úr hondum.

Í 2002 fekk eg tilsamans 45 klagur. Av teimum vóru 38 endaliga avgreiddar í 2002 eins og tær 14 óavgreiddu klagurnar frá 2001. Samanlagt vóru sostatt avgreiddar 52 klagur í 2002.

Í 2003 havi eg upprættað 63 mál, sum innihildu tilsamans 93 klagur. Talan er sostatt um ein vøkstur í talinum av klagum uppá 107% í mun til 2002 og 138% í mun til 2001.

Av klagunum, sum eru móttiknar í 2003 (tilsamans 93) eru 78 endaliga avgreiddar umframt 6 klagur, ið stóðu eftir frá 2002. Tilsamans eru sostatt avgreiddar 84 klagur í 2003.

Av hesum 84 klagunum eru 63 avvístar svarandi til 75%. Hetta tal kann tykjast høgt, men tað liggur á sama støði sum hjá t.d. danska umboðsmanninum. Til samanberingar kann nevnast, at tølini hjá mær fyri 2001 og 2002 vóru ávikavist 72% og 58%.

Miðalviðgerðartíðin í 2003 av øllum klagum, tað veri seg viðgjørdum sum avvístum, var aftaná partshoyring 15 dagar og samlaða miðalviðgerðartíðin 1 mðr. 24 dagar. Hetta er samanumtikið heldur styttri enn í 2001 og 2002, tá tølini vóru ávikavist 17 dagar og 2 mðr. 9 dagar í 2001 og ávikavist 20 dagar og 2 mðr. 29 dagar í 2002.

Í 18 av teimum avgreiddu málunum eru 13 álit skrivað, og eru tey øll løgd út á heimasíðu mína í anonymiseraðum líki. Tey eru tikin við í hesa ársfrágreiðing, flestu teirra í fullum, men anonymiseraðum líki.

Umboðsmenninir í Noregi, Danmark, Íslandi, Grønlandi og Føroyum koma regluliga saman til fundar eina ella tvær ferðir um árið, har evni av felags áhuga koma til viðgerðar. Í mai 2003 skipaði eg fyri einum slíkum fundi her í Tórhavn, og ein fundur var í desember 2003 í Keypmannahavn.

Eisini umboðsmenninir í øllum Norðanlondunum halda regluligar fundir umleið annaðhvørt ár. Ein slíkur fundur var í Helsinki í

Finlandi í september 2003. Eg og Johnhard Klettheyggj, ráðgevi luttóku á hesum fundi.

Nordisk Administrativt Forbund hevði í august 2003 ráðstevnu á Selfoss í Íslandi, og luttóku Johnhard Klettheyggj og eg báðir í hesi ráðstevnu.

# *III. Hagtøl*

**Klagur innkomnar í 2003 býttar á myndugleikar**

Í 2003 blivu upprættaði 63 mál, sum innihildu 93 sjálvstøðugar klagur. Hesar klagurnar vóru býttar soleiðis millum ymsu myndugleikarnar:

(Talva 1)

| ***Myndugleiki:*** | ***Klagur:*** |
|---|---|
| Løgmansskrivstovan | 5 |
| Løgmálaráðið | 4 |
| Fíggjarmálaráðið | 1 |
| Vinnumálaráðið | 5 |
| Fiskimálaráðið | 9 |
| Oljumálaráðið | 2 |
| Mentamálaráðið | 10 |
| Almannastovan | 7 |
| Hjálpartólamiðstøðin | 1 |
| Kærunevndin í almannamálum | 2 |
| Kommunur | 9 |
| Skúlastýri | 1 |
| Toll og Skatt, Stýrið | 2 |
| Skatta- og avgjaldskærunevndin | 2 |
| Strandfaraskip Landsins | 7 |
| Landsverkfrøðingurin | 2 |
| Útvarp Føroya | 1 |
| Sjónvarp Føroya | 1 |
| Barnaverndarnevndin | 1 |
| Landssjúkrahúsið | 2 |
| Fróðskaparsetur Føroya | 1 |
| Studentaskúlar | 5 |
| Elnevndin | 1 |
| Metingarnevndin | 1 |
| Føroya Jarðarráð | 9 |
| Føroya Sparikassi | 1 |
| Advokatar | 1 |
| **Tilsamans** | **93** |

**Innkomnar klagur í 2003 býttar á málsøki og klaguinnihald**
Klagurnar, sum komu inn í 2003 kunnu býtast upp eftir málsøki og innihaldi, sum gjørt er niðanfyri:

(Talva 2)

| *Málsøki* | *Tal av klagum* | *Klagur um avgerðir* | *Klagur um málsviðgerð* | *Klagur um atburð v.m.* |
|---|---|---|---|---|
| Starvsfólkamál | 21 | 11 | 5 | 5 |
| Fiskivinnumál | 7 | 2 | 5 | |
| Almannamál | 10 | 3 | 6 | 1 |
| Skattur v.m. | 6 | 6 | | |
| Undirvísing | 3 | 2 | 1 | |
| Byggimál/leigumál | 16 | 10 | 6 | |
| Innlit | 9 | 5 | 4 | |
| Ognartøka | 4 | 1 | 3 | |
| Persónsmál | 4 | 3 | | 1 |
| Arbeiðsmarknaðarmál | 2 | | 2 | |
| Samferðsla v.m. | 6 | 6 | | |
| Ymiskt | 5 | 1 | 2 | 2 |
| **Tilsamans** | **93** | **50** | **34** | **9** |

**Klagur endaliga avgreiddar í 2003**

Av teimum 93 klagunum, sum komu inn í 2003 vóru 78 endaliga avgreiddar innan 31. des. 2003. Harumframt vóru avgreiddar 6 klagur, sum vóru innkomnar (men ikki avgreiddar) í 2002. Úrslitið av viðgerðini var hetta (býtt upp eftir myndugleika):

(Talva 3)

| *Myndugleiki* | *Klagur* | *Avvístar* | *Viðgjørdar* | *Viðgjørdar uttan átalu/ tilmæli* | *Viðgjørdar átala/tilmæli givið* |
|---|---|---|---|---|---|
| Løgmansskrivstovan | 5 | 3 | 2 | 1 | 1 |
| Løgmálaráðið | 3 | | 3 | 2 | 1 |
| Fíggjarmálaráðið | 2 | 1 | 1 | | 1 |
| Vinnumálaráðið | 3 | 1 | 2 | 1 | 1 |
| Fiskimálaráðið | 5 | 2 | 3 | | 3 |
| Oljumálaráðið | 2 | 2 | | | |
| Mentamálaráðið | 9 | 7 | 2 | 1 | 1 |
| Almannastovan | 7 | 6 | 1 | | 1 |
| Hjálpartólamiðstøðin | 2 | 1 | 1 | | 1 |
| Kærun. í alm.málum | 3 | 2 | 1 | 1 | |
| Kommunur | 6 | 5 | 1 | | 1 |
| Skúlastýri | 1 | 1 | | | |
| Toll&Skatt, Stýrið | 2 | 2 | | | |
| Skatta- og avgj.kærun. | 2 | 2 | | | |
| Strandfaraskip Landsins | 5 | 5 | | | |
| Landsverkfrøðingurin | 2 | 1 | 1 | 1 | |
| Bileftirlitið | 1 | 1 | | | |
| Útvarp Føroya | 1 | 1 | | | |
| Sjónvarp Føroya | 1 | 1 | | | |
| ALS og kærunevndin | 2 | | 2 | 2 | |
| Barnaverndarnevndir | 1 | 1 | | | |
| Landssjúkrahúsið | 2 | 2 | | | |
| Fróðskaparsetur Føroya | 1 | | 1 | | 1 |
| Studentaskúlar | 5 | 5 | | | |
| Metingarnevndin | 1 | 1 | | | |
| Føroya Jarðarráð | 8 | 8 | | | |
| Føroya Sparikassi | 1 | 1 | | | |
| Advokatar | 1 | 1 | | | |
| **Tilsamans** | **84** | **63** | **21** | **9** | **12** |

Av teimum 15 ikki-avgreiddu klagunum eru 9 endaliga avgreiddar pr. 1. mars 2004. Hinar 6 (harav 5 eru innkomnar seinast í sept. ella seinni) eru framvegis til viðgerðar.

**Klagur avvístar í 2003**

Í 2003 blivu 63 klagur avvístar av ymiskum orsøkum. Býtið teirra millum sæst niðanfyri:

(Talva 4)

| ***Avvísingarorsøk*** | ***Klagur*** |
|---|---|
| Innkomin ov seint; § 6, stk. 2 | 18 |
| Kærumøguleiki ikki troyttur; § 6, stk. 3 | 8 |
| Ikki grundarlag fyri víðari kanningum; § 6, stk. 4 | 31 |
| Uttanfyri heimildarøki; § 4 | 3 |
| Afturkallað | 3 |
| **Tilsamans** | **63** |

**Viðgjørdar klagur í 2003 býttar á málsøki**

Tey málini, sum blivu endaliga viðgjørd í 2003, kunnu býtast upp eftir málsøki á hendan hátt:

(Talva 5)

| ***Málsøki*** | ***Klagur*** |
|---|---|
| Starvsfólkamál | 4 |
| Fiskivinnumál | 2 |
| Almannamál | 3 |
| Arbeiðsmarknaðarmál | 3 |
| Undirvísing | 1 |
| Ognartøka | 3 |
| Innlit | 1 |
| Persónsmál | 2 |
| Skattur v.m. | 1 |
| Byggimál/leigumál | 1 |
| **Tilsamans** | **21** |

**Málsviðgerðartíðin hjá umboðsmanninum av viðgjørdum klagum**
Í teimum 21 endaliga viðgjørdu klagunum hevur viðgerðartíðin verið hendan: (Roknað er við 30 døgum pr. mánað)

(Talva 6)

| *Klaga innkomin* | *Partshoyring liðug* | *Klaga avgreidd* | *Viðgerðartíð aftaná parts-hoyring* | *Viðgerðartíð tilsamans* |
|---|---|---|---|---|
| 16.09.02 | 14.02.03 | 21.03.03 | 1 mðr. 7 dg. | 6 mðr. 5 dg. |
| 16.09.02 | 14.02.03 | 21.03.03 | 1 mðr. 7 dg. | 6 mðr. 5 dg. |
| 12.11.02 | 21.02.03 | 01.04.03 | 1 mðr. 11 dg. | 4 mðr. 20 dg. |
| 25.11.02 | 25.04.03 | 06.06.03 | 1 mðr. 12 dg. | 6 mðr. 12 dg. |
| 06.01.03 | 02.10.03 | 07.10.03 | 5 dg. | 9 mðr. 1 dg. |
| 10.01.03 | 20.01.03 | 21.01.03 | 1 dg. | 11 dg. |
| 17.01.03 | 31.03.03 | 30.05.03 | 2 mðr. | 4 mðr. 13 dg. |
| 17.01.03 | 31.03.03 | 30.05.03 | 2 mðr. | 4 mðr. 13 dg. |
| 17.01.03 | 16.06.03 | 25.07.03 | 1 mðr. 9 dg. | 6 mðr. 8 dg. |
| 12.02.03 | 05.05.03 | 01.07.03 | 1 mðr. 26 dg. | 4 mðr. 19 dg. |
| 13.02.03 | 17.03.03 | 20.06.03 | 3 mðr. 3 dg. | 4 mðr. 7 dg. |
| 19.02.03 | 18.09.03 | 01.10.03 | 13 dg. | 7 mðr. 12 dg. |
| 21.02.03 | 15.09.03 | 03.10.03 | 18 dg. | 7 mðr. 12 dg. |
| 21.02.03 | 15.09.03 | 03.10.03 | 18 dg. | 7 mðr. 12 dg. |
| 17.03.03 | 03.04.03 | 07.07.03 | 3 mðr. 4 dg. | 3 mðr. 20 dg. |
| 31.03.03 | 16.10.03 | 17.12.03 | 2 mðr. 1 dg. | 8 mðr. 17 dg. |
| 31.03.03 | 16.10.03 | 17.12.03 | 2 mðr. 1 dg. | 8 mðr. 17 dg. |
| 23.05.03 | 22.07.03 | 23.07.03 | 1 dg. | 2 mðr. |
| 10.06.03 | | 17.06.03 | 7 dg. | 7 dg. |
| 13.06.03 | | 26.06.03 | 13 dg. | 13 dg. |
| 01.09.03 | 02.10.03 | 28.10.03 | 26 dg. | 1 mðr. 27 dg. |
| **Viðgerðartíð í miðal:** | | | **1 mðr. 7 dg.** | **5 mðr. 2 dg.** |

**Málsviðgerðartíðin hjá umboðsmanninum av avvístum klagum:**
Í teimum 63 avvístu klagunum hevur viðgerðartíðin verið hendan:
(Roknað er við 30 døgum pr. mánað)

(Talva 7)

| *Klaga innkomin* | *Partshoyring liðug* | *Klaga avgreidd* | *Viðgerðartíð aftaná partshoyring* | *Viðgerðartíð tilsamans* |
|---|---|---|---|---|
| 17.12.02 | | 06.01.03 | 20 dg. | 20 dg. |
| 23.12.02 | 13.01.03 | 13.01.03 | 0 dg. | 21 dg. |
| 23.01.03 | | 24.01.03 | 1 dg. | 1 dg. |
| 23.01.03 | | 24.01.03 | 1 dg. | 1 dg. |
| 19.02.03 | 24.02.03 | 25.03.03 | 1 mðr. 1 dg. | 1 mðr. 6 dg. |
| 19.02.03 | 24.02.03 | 25.03.03 | 1 mðr. 1 dg. | 1 mðr. 6 dg. |
| 25.02.03 | 15.04.03 | 19.05.03 | 1 mðr. 4 dg. | 2 mðr. 24 dg. |
| 06.03.03 | | 07.03.03 | 1 dg. | 1 dg. |
| 06.03.03 | | 07.03.03 | 1 dg. | 1 dg. |
| 26.03.03 | 07.04.03 | 11.04.03 | 4 dg. | 16 dg. |
| 26.03.03 | 12.06.03 | 23.06.03 | 11 dg. | 2 mðr. 28 dg. |
| 26.03.03 | 12.06.03 | 23.06.03 | 11 dg. | 2 mðr. 28 dg. |
| 26.03.03 | 12.06.03 | 23.06.03 | 11 dg. | 2 mðr. 28 dg. |
| 26.03.03 | 12.06.03 | 23.06.03 | 11 dg. | 2 mðr. 28 dg. |
| 31.03.03 | | 02.04.03 | 2 dg. | 2 dg. |
| 04.04.03 | 07.05.03 | 21.05.03 | 14 dg. | 1 mðr. 17 dg. |
| 10.04.03 | 02.05.03 | 02.05.03 | 0 dg. | 22 dg. |
| 15.04.03 | | 15.04.03 | 0 dg. | 0 dg. |
| 05.05.03 | 07.05.03 | 20.05.03 | 13 dg. | 15 dg. |
| 12.05.03 | 21.05.03 | 30.05.03 | 9 dg. | 18 dg. |
| 21.05.03 | 23.06.03 | 03.07.03 | 10 dg. | 1 mðr. 12 dg. |
| 06.06.03 | 18.06.03 | 24.06.03 | 6 dg. | 18 dg. |
| 10.06.03 | | 17.06.03 | 7 dg. | 7 dg. |
| 10.06.03 | 27.07.03 | 27.08.03 | 1 mðr. | 2 mðr. 17 dg. |
| 10.06.03 | 27.07.03 | 27.08.03 | 1 mðr. | 2 mðr. 17 dg. |
| 13.06.03 | 08.07.03 | 08.07.03 | 0 dg. | 25 dg. |
| 13.06.03 | | 26.06.03 | 13 dg. | 13 dg. |
| 16.06.03 | | 24.06.03 | 8 dg. | 8 dg. |

*(Framhald)*

*(Framhald)*

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 16.06.03 | | 24.06.03 | 8 dg. | 8 dg. |
| 01.07.03 | 08.07.03 | 10.07.03 | 2 dg. | 9 dg. |
| 01.07.03 | 08.07.03 | 10.07.03 | 2 dg. | 9 dg. |
| 01.07.03 | 08.07.03 | 10.07.03 | 2 dg. | 9 dg. |
| 04.07.03 | | 07.07.03 | 3 dg. | 3 dg. |
| 16.07.03 | | 25.07.03 | 9 dg. | 9 dg. |
| 16.07.03 | | 25.07.03 | 9 dg. | 9 dg. |
| 16.07.03 | | 25.07.03 | 9 dg. | 9 dg. |
| 24.07.03 | | 24.07.03 | 0 dg. | 0 dg. |
| 14.08.03 | 13.10.03 | 21.10.03 | 8 dg. | 2 mðr. 17 dg. |
| 20.08.03 | | 26.08.03 | 6 dg. | 6 dg. |
| 22.08.03 | | 27.08.03 | 5 dg. | 5 dg. |
| 22.08.03 | | 27.08.03 | 5 dg. | 5 dg. |
| 22.08.03 | | 27.08.03 | 5 dg. | 5 dg. |
| 22.08.03 | | 27.08.03 | 5 dg. | 5 dg. |
| 22.08.03 | | 27.08.03 | 5 dg. | 5 dg. |
| 22.08.03 | | 27.08.03 | 5 dg. | 5 dg. |
| 08.09.03 | 02.10.03 | 21.10.03 | 19 dg. | 1 mðr. 13 dg. |
| 15.09.03 | 13.10.03 | 21.10.03 | 8 dg. | 1 mðr. 6 dg. |
| 15.09.03 | | 19.09.03 | 4 dg. | 4 dg. |
| 15.09.03 | | 19.09.03 | 4 dg. | 4 dg. |
| 06.10.03 | 20.11.03 | 09.12.03 | 19 dg. | 2 mðr. 3 dg. |
| 07.10.03 | 07.10.03 | 07.10.03 | 0 dg. | 0 dg. |
| 13.10.03 | | 21.10.03 | 8 dg. | 8 dg. |
| 13.10.03 | | 21.10.03 | 8 dg. | 8 dg. |
| 29.10.03 | | 31.10.03 | 2 dg. | 2 dg. |
| 31.10.03 | 24.11.03 | 26.11.03 | 2 dg. | 26 dg. |
| 31.10.03 | | 03.11.03 | 3 dg. | 3 dg. |
| 04.11.03 | 11.11.03 | 11.11.03 | 0 dg. | 7 dg. |
| 06.11.03 | | 11.11.03 | 5 dg. | 5 dg. |
| 13.11.03 | | 26.11.03 | 13 dg. | 13 dg. |
| 18.11.03 | | 19.11.03 | 1 dg. | 1 dg. |
| 06.11.03 | 17.12.03 | 23.12.03 | 6 dg. | 1 mðr. 17 dg. |
| 05.12.03 | | 08.12.03 | 3 dg. | 3 dg. |
| 16.12.03 | | 18.12.03 | 2 dg. | 2 dg. |
| **Viðgerðartíð í miðal:** | | | **8 dg.** | **21 dg.** |

**Málsviðgerðartíðin hjá umboðsmanninum av bæði viðgjørdum og avvístum klagum:**
Fyri allar klagurnar, tvs. bæði avvístar og endaliga viðgjørdar klagur, hevur málsviðgerðartíðin verið hendan:
(Roknað er við 30 døgum pr. mánað)

(Talva 8)

| *Klagur* | *Viðgerðartíð aftaná partshoyring* | *Viðgerðartíð tilsamans* |
|---|---|---|
| Viðgerðartíð í miðal: | 15 dg. | 1 mðr. 24 dg. |

**Klagur innkomnar í 2003 býttar á myndugleikar**



**Klagur innkomnar í 2003
býttar á málsøki**




**Klagur innkomnar í 2003
býttar eftir klaguinnihaldi**



**Klagur endaliga avgreiddar í 2003**




**Klagur avvístar í 2003**
**býttar eftir avvísingarorsøk**



## Klagur viðgjørdar í 2003 býttar á málsøki




## Innkomnu klagurnar býttar eftir innkomumánaði



# *IV. Álit og aðrar niðurstøður hjá umboðsmanninum í málum avgreidd í 2003*

## 10. Málsviðgerðartíð

### 10.1. Klaga um málsviðgerðartíð hjá ALS og Kærunevndini hjá ALS

*A hevði sent umboðsmanninum eina klagu um viðgerðartíðina hjá Arbeiðsloysisskipanini og Kærunevndini hjá Arbeiðsloysisskipanini av umsókn hennara um arbeiðsloysisstuðul. Arbeiðsloysisskipanin hevði nýtt 48 dagar til viðgerðina í fyrru atløgu, harav ein fyrireikandi fundur við A varð útsettur í 22 dagar eftir ynski frá A. A kærdi noktandi avgerðina hjá Arbeiðsloysisskipanini til Kærunevndina, og viðgerðin av kæruni tók uml. 3 mðr. Kærunevndin gjørdi av at vísa málið aftur til nýggja viðgerð hjá Arbeiðsloysisskipanini, og tók hendan seinna viðgerðin uml. 5 vikur. Umboðsmaðurin helt hvørki grundarlag vera fyri at fýlast á viðgerðartíðina hjá Arbeiðsloysisskipanini ella Kærunevndini í hesum málinum. Hann vísti tó á, at tað hevði verið ynskiligt, um avgerðin hjá Kærunevndini hevði verið fráboðað A heldur skjótari aftaná, at avgerðin varð tikin. Umboðsmaðurin helt tað tó vera átaluvert, at tað tók Kærunevndini næstan 4 mðr. at lata umboðsmanninum eitt ummæli av hesari klaguni. (J.nr. 200200044).*

#### Klagan

A hevur sent umboðsmanninum eina klagu, dagfest 13. sept. 2002 um viðgerðartíðina hjá Arbeiðsloysisskipanini og Kærunevndini hjá Arbeiðsloysisskipanini av máli hennara. Klagan er soljóðandi:

> „Nú er nokk! Eg klagi hervið uppá tað kraftigasta um ta longu tíð, eg havi biðað eftir einari avgerð.

Tað snýr seg um hetta:

Eg arbeiddi sum vikar á … til 28. februar 2002, tá starvið skuldi enda. Síðan vendi eg mær til ALS, tí onkrastaðni má man hava eina inntøku. Her bleiv eg avvíst við tí grundgeving, at eg tók ímóti undirvísing á … skúla 3 tímar hvønn fríggjadag.

So var einki annað at gera enn at fara til Almu. Har helt saksbehandlarin, at eg skuldi fyrst og fremst klaga til Kærustovnin hjá ALS um avgerðina, tí onkuntíð kann man sleppa at taka ímóti undirvísing hóast man fær pengar frá ALS. Eg so gjørdi. Og so havi eg bíðið eftir svari.

Og bíðað.

Og bíðað.

Og bíðað.

So endiliga einaferð aftaná ólavsøku, (also umleið 3 mánaðar seinni ella meir) kom svarið frá Kærustovninum: ALS skal endurviðgera sakina. Okey, jamen gerið tit so tað meðni. Og enn er einki svar komið. Eg haldi tað er for galið! Serliga tá tað snýr seg um her og nú yvirlivilsispengar! Tað hevur stutt sagt tikið alt alt ov langa tíð hjá Kærustovninum at viðgera mína sak. Eg ringdi ofta, men fekk ferð aftaná ferð svarið, at tey noyðast at bíða til fleiri sakir eru. Tey kunnu ikki hava fund hvørja ferð ein nýggj sak er. Alla hesa tíðina havi eg tvær ferðir fingið pengar frá Almannastovuni, pengar sum eg skal gjalda aftur til tey. Eg haldi, tað er eymýkjandi at skylda pengar – í so langa tíð.

Kann tað vera rætt, at fyrisitingin arbeiðir so seint í mínum føri, har eg standi púra á berum?“

## Partshoyringin

Eftir at hava tikið støðu til spurningin um, hvørt Arbeiðsloysisskipanin er at meta sum ein partur av almennu fyrisitingini undir heimastýrinum, og harvið fevnd av virksemi umboðsmansins, varð klagan 21. okt. 2002 send Arbeiðsloysisskipanini og Kærunevndini hjá Arbeiðsloysisskipanini til ummælis, eins og biðið varð um avrit av øllum skjølunum viðvíkjandi hesum málinum innan 4 vikur.

Við skrivi, dagfest 23. okt. 2002 hevur skrivarin hjá Kærunevndini sent umboðsmanninum avrit av skjølunum viðvíkjandi hesum málinum. Boðað verður frá, at skriv umboðsmansins verður lagt fyri

nevndina, og at eitt ummæli av hesari klaguni verður sent umboðsmanninum so skjótt, sum nevndin hevur havt høvi til at koma saman.

Við skrivi, dagfest 14. nov. 2002 sendi Arbeiðsloysisskipanin umboðsmanninum avrit av skjølunum í málinum og eitt ummæli av klaguni frá A. Skrivið er soljóðandi:

> „Arbeiðsloysisskipanin hevur tann 22. oktober 2002 móttikið kæru (skjal 1) frá A, ið hon hevur sent til Løgtingsins Umboðsmann. Kært verður um viðgerðartíðina hjá Arbeiðsloysisskipanini.
>
> Umboðsmaðurin biður Arbeiðsloysisskipanina um kæruummæli av málinum, við serligum atliti til viðgerðartíðina.
>
> Niðanfyri lýsir Arbeiðsloysisskipanin málið og viðgerðartíðina, ið Arbeiðsloysisskipanin hevur nýtt. Í okkara ummæli taka vit støði í, at Kærunevndin fyri Arbeiðsloysisskipanini, somuleiðis er biðin um at lýsa sín part av málinum.
>
> **Kæran og ummælið**
>
> Í sambandi við viðgerðartíðina av sjálvari umsóknini av arbeiðsloysisstuðuli frá 28. februar 2002, verður víst til Kæruummælið til Kærunevndina hjá Arbeiðsloysisskipanina dagfest 23. mai 2002 (skjal 2). Sum sæst av hesum, hevur Arbeiðsloysisskipanin tann 28. februar 2002 móttikið fráboðan frá A um, at hon er tøk á arbeiðsmarknaðinum. Í brævi frá Arbeiðsloysisskipanini dagfest 7. mars 2002, verður hon biðin um at møta til samrøðu á skrivstovuni hjá Arbeiðsloysisskipanini 20. mars 2002, men eftir ynski frá henni, verður samrøðan flutt til 11. apríl 2002, og er bræv sent henni hesum viðvíkjandi dagfest 26. mars 2002. Málið verður síðani viðgjørt, og tann 17. apríl 2002 sendir Arbeiðsloysisskipanin henni bræv um niðurstøðuna.
>
> Tann 24. apríl 2002 hevur Arbeiðsloysisskipanin móttikið kæru frá Kærunevndini, viðvíkjandi avgerðini, Arbeiðsloysisskipanin tók í málinum hjá A. Kæran er dagfest 22. apríl 2002, og sendir Arbeiðsloysisskipanin kæruummælið til Kærunevndina tann 23. mai 2002.

**Nýggj umsókn**

Tann 20. juni 2002 hevur Arbeiðsloysisskipanin móttikið fráboðan frá A um, at hon er tøk á arbeiðsmarknaðinum frá 18. juni 2002. Hendan fráboðanin hevur gildiskomu frá 18. juni 2002.

Arbeiðsloysisskipanin sendir henni síðani bræv dagfest 20. juni 2002, har hon verður biðin um, innan 14 dagar at senda Arbeiðsloysisskipanini váttan frá skúlanum um nær útbúgving hennara er endað. Tann 23. juli 2002 hevur Arbeiðsloysisskipanin móttikið avrit av prógvinum hjá A (skjal 3), og er prógvið dagfest 21. juni 2002.

Nú neyðugu skjalprógvini eru í málinum, verður málið avgreitt, og sendur Arbeiðsloysisskipanin henni játtan av umsóknini dagfest tann 26. juli 2002.

**Avgerð frá Kærunevndini**

Tann 30. juli 2002 hevur Arbeiðsloysisskipanin móttikið avgerðina frá Kærunevndini dagfest 26. juli 2002 (skjal 4), og hevði Kærunevndin avgjørt at heimvísa málið til nýggja viðgerð hjá Arbeiðsloysisskipanini.

Kærunevndin viðmerkti, at sum útgangsstøði mátti leggjast til grund, at A vegna undirvísingina ikki er før fyri at átaka sær eitt fulldagsstarv, og tí heldur ikki kann sigast lúka krøvini í ALS-lógini hesum viðvíkjandi.

Tó vildi Kærunevndin ikki útihýsa, at A møguliga kundi lúka undantaksregluna í § 2, stk. 7 í Kunngerð um útgjald v. m. av arbeiðsloysisstuðuli, um lagt varð til grund, at:

- A ikki hevði møguleikan at fylgja tónleikaundirvísingini uttanfyri „normalarbeiðstíð“ (t.v.s. eftir kl. 15:00 á degi).
- A ikki fekk útbúgvingarstuðul, jvb. kravi í § 2, stk. 5 nr. 3 í Kunngerð um útgjald v. m. av arbeiðsloysisstuðuli.
- tónleikaundirvísingin er ein liður í útbúgvingini hjá A, og sostatt ein fortreyt fyri, at A kundi fáa prógv sum lærari.
- kravið um „styttri tíðarskeið“ uppá í mesta lagi 3 mánaðir í hvørjum álmanakkaári, jvb. §2, stk. 7 í Kunngerð um útgjald v.m. av arbeiðsloysisstuðli, er lokið.

Arbeiðsloysisskipanin tók síðani málið upp til nýggja viðgerð, við støðutakan út frá hesum, og fekk staðfest:

- sambært telefonsamrøðu við skrivstovuna á læraraskúlanum fekk Arbeiðsloysisskipanin upplýst, at tað bert er møguligt at fylgja undirvísingini í vanligu skúlagongdini t.v.s. í dagtímunum.
- sambært upplýsingum frá Toll- og Skattstovu Føroya, at A ikki hevur móttikið útbúgvingarstuðul.
- í sambandi við at A hevur søkt um arbeiðsloysisstuðul eftir lokna útbúgving, hevur Arbeiðsloysisskipanin móttikið avrit av læraraprógvi hennara, har váttað verður, at hon í juni 2002 hevur lokið lærarаútbúgving sína. Tá A hevur fingið prógv sítt, eftir at hon hevur staðið royndina í tónleiki, má leggjast til grund, at hetta er ein liður í útbúgving hennara.
- sambært telefonsamrøðu við A, at hon byrjaði tónleikaundirvísingina í oktober/november 2001, so út frá hesum upplýsingum, og avritinum av prógvi hennara, kann staðfestast, at hon hevur luttikið í undirvísingini í eitt longri tíðarskeið enn 3 mánaðir.

Arbeiðsloysisskipanin metti og tók ta niðurstøðu, at A ikki hevur lokið treytirnar í undantaksregluni í § 2, stk. 7 í Kunngerð um útgjald v.m. av arbeiðsloysisstuðli frá 26. november 1999, við seinni broytingum, og varð avgerðin frá 17. apríl 2002 tí endurstaðfest. Tann 19. september 2002 er bræv sent A hesum viðvíkjandi (skjal 5). Orsøkin til, at viðgerðartíðin av hesum er nakað longri enn vanligt er, at hetta er mitt í feriutíðini. Hetta er júst meðan vit hava stongt vegna feriu, og verður nýggja viðgerðin av málinum tikin upp eftir feriuna.

**Viðgerðartíðin av kæruni**

- 28. februar 2002 hevur Arbeiðsloysisskipanin móttikið fráboðan frá A um, at hon er tøk á arbeiðsmarknaðinum.
- 7. mars 2002 hevur Arbeiðsloysisskipanin sent A bræv um at møta til samrøðu 20. mars 2002.
- 26. mars 2002 hevur Arbeiðsloysisskipanin sent A nýtt bræv um at møta til samrøðu 11. apríl 2002.

- 11. apríl 2002 var A til samrøðu hjá Arbeiðsloysisskipanini.
- 17. apríl hevur Arbeiðsloysisskipanin sent A bræv um niðurstøðuna.
- 22. apríl 2002 hevur A sent kæru til Kærunevndina hjá Arbeiðsloysisskipanini.
- 24. apríl 2002 hevur Arbeiðsloysisskipanini móttikið áheitan frá Kærunevndini hjá Arbeiðsloysisskipanini um at geva kæruummælið.
- 23. mai 2002 sendi Arbeiðsloysisskipanin kæruummæli til Kærunevndina.
- 20. juni 2002 hevur Arbeiðsloysisskipanin móttikið fráboðan frá A um, at hon er tøk á arbeiðsmarknaðinum.
- 20. juni 2002 hevur Arbeiðsloysisskipanin sent A áheitan um váttan frá skúla.
- 23. juli 2002 hevur Arbeiðsloysisskipanin móttikið avrit av prógvinum.
- 26. juli 2002 hevur Arbeiðsloysisskipanin sent A játtan av umsókníni.
- 30. juli 2002 hevur Arbeiðsloysisskipanini móttikið avgerðin frá Kærunevndini.
- 19. september 2002 verður bræv viðvíkjandi niðurstøðuni sent A.

> Samlaða tíðarskeiðið, ið Kærunevndin og Arbeiðsloysisskipanin hava nýtt til viðgerð av umsókn, kæru, nýggjari umsókn og kærunevndarniðurstøðu, er sostatt knappar 5 mánaðir."

Við skrivi, dagfest 29. nov. 2002 havi eg mint Kærunevndina hjá Arbeiðsloysisskipanini á málið, og biðið hana lata mær eitt ummæli av klaguni beinanvegin.

Við skrivi, dagfest 3. jan. 2003 havi eg enn einaferð mint nevndina á málið, og biðið nevndina um at lata mær umbidna ummælið beinanvegin. Samstundis varð klagarin kunnaður um málsgongdina. Í telefonsamrøðu 16. jan. 2003 hevur skrivarin hjá Kærunevndini greitt umboðsmanninum frá, at orsøkin til at umboðsmaðurin framvegis ikki hevði fingið nakað ummælið var tann, at nevndin framvegis ikki hevði havt nakran fund, tí at einki hevði verið at hava

fund um. Hann greiddi frá, at fundur varð ásettur til at vera síðst í viku 4, har m.a. hetta málið var á skránni.

Við skrivi, dagfest 4. febr. (móttikið 14. febr. 2003) hevur Kærunevndin hjá Arbeiðsloysisskipanini latið umboðsmanninum eitt soljóðandi ummæli:

> „Við skrivi dagfest 21. oktober 2002, hevur Umboðsmaðurin biðið um at fáa sendandi avrit av skjølunum, og eitt ummæli í sambandi við klaguna frá omanfyri nevndu.
>
> Tað skal verða boðað frá, at Kærunevndin ikki hevur nakrar serstakar viðmerkingar til málsgongdina í hesum máli, og skal vísa til tey framsendu skjølini.
>
> Vanliga mannagongdin í øllum kærumálum er, at beinanveg ein kæra er móttikin, verður send ein váttan til kæraran um móttøku. Kæran, umframt møgulig skjøl, verður send til ummælis hjá ALS, sum fær eina freist uppá 4 vikur til at gera viðmerkingar til málið, umframt at senda Kærunevndini skjølini í málinum. Beinanveg ummæli er komið frá ALS, verður hetta sent aftur til kæraran til ummælis. Tá ið málið er fult upplýst, fyrireikar skrivstovan hjá Kærunevndini eitt ummæli til Kærunevndina at taka støðu út frá, og málið verður sett á fyrstkomandi fund hjá Kærunevndini.
>
> Tá ið Kærunevndin hevur tikið avgerð í málinum, verða bæði kærarin og ALS kunnað um hesa við skrivi undirskrivaðu av skrivstovuni og formanninum. Vanliga vilja ganga minst 3-4 mánaðir frá at ein kæra er innkomin til avgerð er tikin í málinum.
>
> Í tí ítøkiliga málinum sæst at Kærunevndin tann 22. apríl 2002 hevur móttikið kæru í málinum, og kærarin, í skrivi dagfest 26. juli 2002 er kunnað um avgerðina hjá Kærunevndini.
>
> Kærunevndin metur generelt at viðgerðartíðin av kærum er hóskandi, og ikki verður mett at viðgerðartíðin av hesari ítøkiligu kæruni hevði kunnað verið styttri.“

Við skrivi, dagfest 19. febr. 2003 vóru viðmerkingarnar frá Arbeiðsloysisskipanini og Kærunevndini hjá Arbeiðsloysisskipanini sendar A til ummælis. Í skrivinum boðaði umboðsmaðurin frá, at klagan bleiv tikin upp til endaliga viðgerð, um umboðsmaðurin einki hevði frætt aftur frá klagaranum innan 14 dagar.

## *Niðurstøða*

*Sum nevnt frammanfyri havi eg við skrivi, dagfest 21. oktober 2002 staðfest, at Arbeiðsloysisskipanin er at meta sum partur av almennu fyristingini undir heimastýrinum og harvið eisini fevnd av virksemi umboðsmansins; men við tað at tað undir málsviðgerðini er komið fram, at Arbeiðsloysisskipanin í einum máli í 1998 viðvíkjandi innlitslóggávuni hevur givið úttrykk fyri, at hon ikki metti seg vera fevnda av hesi, skal eg koma við grundgevingum fyri tí støðu, sum eg havi tikið í nevnda skrivi frá 21. oktober 2002.*

*Talan er um ein stovn, sum er stovnsettur sambært løgtingslóg nr. 17 frá 10. mars 1992, og virksemi hjá stovninum er í dag ásett í løgtingslóg nr. 113 frá 13. juni 1997 um Arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing, sum broytt við løgtingslóg nr. 12 frá 9. febr. 2001.*

*Sambært § 1 í lógini er endamálið hjá Arbeiðsloysisskipanini:*

- *at veita fíggjarligan stuðul til arbeiðsleys,*
- *at virka fyri bøttum møguleikum hjá arbeiðsleysum at fáa arbeiði, og*
- *at umsita arbeiðsávísingina fyri føroyska arbeiðsmarknaðin.*

*Talan er sostatt um ein stovn, sum við lóggávu er settur at røkja nakrar ávísar uppgávur viðvíkjandi arbeiðsmarknaðinum. Ovasta leiðslan fyri hendan stovnin er eitt stýri, sum verður valt av landsstýrismanninum í arbeiðsmarknaðarmálum m.a. eftir tilmæli frá áhugafeløgum. Landsstýrismaðurin velur somuleiðis Kærunevndina hjá Arbeiðsloysisskipanini.*

*Í lógaruppskotinum til 1997-lógina, sum er at finna í Løgtingstíðindum fyri 1996, sæst á s. 664, at ætlanin við lógini hevur verið at gera eitt greitt býti um ábyrgdina millum landsstýrismannin í arbeiðsmarknaðarmálum og stýrið fyri ALS. Stýrið hevur í lógini m.a. fingið heimild til at áseta neyvari reglur í kunngerð.*

*Somuleiðis hevur ætlanin verið at gera eitt greitt ábyrgdarbýti millum landsstýrismannin og Kærunevndina hjá Arbeiðsloysisskipanini, soleiðis at avgerðirnar hjá nevndini ikki kunnu kærast til landsstýrismannin, sí Løgtingstíðindi 1996, s. 674. § 26, stk. 1, 2. pkt. í lógini kom tí at ljóða:*

> *„…Avgerðir hjá Kærunevndini kunnu ikki kærast til annan fyrisitingarligan myndugleika.“*

*Arbeiðsloysisskipanin er ein tvungin skipan, sum allir løntakarar og løngjaldarar eru noyddir at rinda til. Í § 7 í lógini er ásett, at øll sum móttaka ella rinda A-inntøku hava skyldu til at gjalda til Arbeiðsloysisskipanina.*

*Grundað á:*

- *at Arbeiðsloysisskipanin er sett á stovn við lóggávu,*
- *at hon røkir eina lógarfesta uppgávu,*
- *at stýrið við lógini hevur fingið heimild til at áseta reglur í kunngerð, og*
- *at talan er um eina skipan, sum allir løntakarar og løngjaldarar eru tvungnir at rinda til,*

*haldi eg ongan iva vera um, at talan er um ein fyrisitingarmyndugleika, sum er fevndur av Fyrisitingarlógini og Innlitslógini, og harvið eisini av virksemi mínum.*

*Tað broytir ikki hesa støðuna, at Arbeiðsloysisskipanin harumframt umsitur eina sjálvbodnað tryggingarskipan fyri sjálvstøðug vinnurekandi. Hetta ger Almannastovan t.d. eisini í Dagpeningaskipanini, men hetta virksemi broytir kortini ikki støðu hennara í mun til Fyrisitingarlógina og Innlitslógina.*

***Málsviðgerðartíðin***

*Klagan fevnir bæði um viðgerðartíðina hjá Arbeiðsloysisskipanini í fyrstu atløgu, síðani um viðgerðartíðina hjá Kærunevndini hjá Arbeiðsloysisskipanini, og at enda aftur um viðgerðartíðina hjá Arbeiðsloysisskipanini, aftaná at Kærunevndin hevði víst málið til nýggja viðgerð hjá Arbeiðsloysisskipanini.*

*Sambært teimum skjølunum og upplýsingum annars, sum umboðsmaðurin hevur fingið frá Arbeiðsloysisskipanini hevur gongdin í málinum í fyrstu atløgu verið hendan:*

- *28. febr. 2002 letur A Arbeiðsloysisskipanini ALS-kort sítt.*
- *7. mars 2002 sendir Arbeiðsloysisskipanin A eitt skriv, har hon verður biðin um at koma á fund á Arbeiðsloysisskipanini 20. mars kl. 10.*
- *Eftir ynski frá A varð hesin fundurin fluttur til 11. apríl.*
- *11. apríl møtti A á fundi á Arbeiðsloysisskipanini, og*
- *17. apríl varð avgerðin hjá Arbeiðsloysisskipanini send A.*

*Sum tað framgongur av hesum yvirlitinum, hevur viðgerðin av umsóknini tikið 48 dagar tilsamans. Tað skal tó í hesum sambandi havast í huga, at fundurin millum A og Arbeiðsloysisskipanina, sum varð útsettur eftir ynski frá A, seinkar málinum í 22 dagar. Arbeiðsloysiskipanin hevur sostatt havt 26 dagar til at viðgera hetta málið í fyrstu atløgu. Hesari viðgerðartíðini haldi eg ikki orsøk vera til at finnast at.*

*Sambært skjølunum frá Kærunevndini hjá Arbeiðsloysisskipanini og upplýsingunum í málinum annars, hevur gongdin í kærumálinum verið hendan:*

- *22. apríl sendi A Kærunevndini hjá Arbeiðsloysisskipanini eina kæru um avgerðina.*
- *23. apríl sendi Kærunevndin hjá Arbeiðsloysisskipanini A eina móttøkuváttan. Sama dag varð Arbeiðsloysisskipanin biðin um skjótast gjørligt og innan 4 vikur at lata Kærunevndini skjølini í málinum og evt. viðmerkingar.*
- *23. mai sendi Arbeiðsloysisskipanin kæruummæli og skjølini til Kærunevndina hjá Arbeiðsloysisskipanini.*
- *24. mai sendi Kærunevndin hetta tilfarið til A til ummælis. Í skrivinum verður sagt, at um Kærunevndin einki hevur frætt frá kæraranum innan 14 dagar, verður kæran viðgjørd út frá verandi grundarlagi.*
- *Á fundi 11. juli tók Kærunevndin avgerð um at vísa málið til nýggja viðgerð hjá Arbeiðsloysisskipanini.*
- *Avgerðin varð fráboðað A við skrivi, dagfest 26. juli og er móttikin á Arbeiðsloysisskipanini 30. juli.*
- *Arbeiðsloysisskipanin viðger umsóknina av nýggjum samsvarandi kærunevndaravgerðini, og verður avgerð hennara fráboðað A við skrivi, dagfest 19. sept. 2002.*

*Sum tað sæst av hesum yvirlitinum, hevur Kærunevndin hjá Arbeiðsloysisskipanini beinanvegin sett gongd á málið við at biðja um skjøl v.m. og at senda kæraranum hesi til ummælis. Sostatt er einki at siga til málsfyrireikingina hjá nevndini av hesum málinum. Ummælisfreistin varð úti eina góða viku inni í juni-mánaði, og avgerðin er tikin 11. juli og fráboðað klagaranum 26. juli. Eg haldi ikki, at fýlast kann á hesa viðgerðartíðina, men tað kundi kanska verið ynskiligt, um avgerðin varð fráboðað kæraranum heldur skjótari aftaná, at avgerðin varð tikin.*

*Arbeiðsloysisskipanin fær síðani málið til viðgerðar av nýggjum. Hendan viðgerðin sæst at hava tikið 1½-2 mánaðir, men sum Arbeiðsloysisskipanin hevur ført fram, so hevur stovnurin í hesum tíðarskeiðnum havt stongt vegna summarfrí. Umboðsmaðurin hevur umvegis telefonina fingið upplýst frá Arbeiðsloysisskipanini, at skrivstovan var stongd í vikunum 30-32, tvs. frá 22. juli til 11. aug. 2002. Veruliga viðgerðin av hesum málinum í aðru atløgu hevur sostatt tikið uml. 5 vikur. Eg haldi ikki, at orsøk er til at fýlast á hesa viðgerðartíðina.*

*Hóast tað samanlagt kann tykjast drúgt hjá klagaranum at bíða eftir endaligu avgerðini uppá umsókn hennara, so skerst tað ikki burtur, at tað tekur drúgva tíð, tá eitt mál eins og í hesum førinum í veruleikanum skal ígjøgnum 3 viðgerðir. Eg haldi tí einki grundarlag vera fyri at finnast at málsviðgerðartíðini hjá Arbeiðsloysisskipanini og Kærunevndini hjá Arbeiðsloysisskipanini í hesum málinum.*

***Umboðsmansviðgerðin***

*Sum nevnt frammanfyri bað eg longu við skrivi, dagfest 21. oktober 2002 Kærunevndina hjá Arbeiðsloysisskipanini um skjølini og eitt ummæli av klaguni. Skjølini fekk eg beinanvegin, og í fylgiskrivinum var boðað frá, at eg fór at fáa eitt ummæli, so skjótt nevndin hevði havt høvi til at koma saman. Hóast hetta og tvinni áminningarskriv fekk eg ikki ummælið fyrr enn 14. februar 2003, tvs. næstan 4 mánaðir seinni. Hetta haldi eg vera átaluvert. Tað er ikki nøktandi, at mál skulu liggja og bíða í longri tíð, tí at nevndin ikki hevur havt nakran fund.*

## 10.2. Klaga um málsviðgerðina hjá Fiskimálaráðnum av spurningi um fiskiloyvi

*A hevur sent umboðsmanninum eina klagu um málsviðgerðina hjá Fiskimálaráðnum, tí Fiskimálaráðið ikki hevði svarað fyrispurningi hansara skrivliga, um hvør átti rættin til fiskiloyvi aftaná, at bátur hansara varð seldur, nær loyvið varð flutt øðrum eigara, og hvør hevði flutt hetta loyvið. Umboðsmaðurin gav Fiskimálaráðnum eina átalu fyri ikki at hava svarað fyrispurninginum skrivliga, eins og hann mælti til, at hetta bleiv gjørt beinanvegin. Somuleiðis gav hann Fiskimálaráðnum eina átalu fyri ikki at halda notatskylduna. ( J.nr. 200300013).*

### Klagan

A hevur við skrivi dagfest 19. februar 2003 latið umboðsmanninum eina klagu móti Fiskimálaráðnum í sambandi við eitt fiskiloyvi til bátin B1…, sum hann sigur seg hava selt øðrum manni, men uttan at fiskiloyvið fylgdi við søluni.

Klagan er soljóðandi:

**„Klaga viðvíkjandi fiskivinnuloyvi**
Undirritaði A, vil við hesum klaga Fiskimálaráðið í sambandi við málsviðgerðina av fiskiloyvinum hjá undirritaða.

Málið byrjaði á sumri 2001, tá eg gjørdi munnliga avtalu við B, um at hann skuldi keypa bát mín B1 (Tíggjumannafarð við nummarinum …). Avtalað varð, at báturin skuldi seljast uttan fiskiloyvi.

Eingin skrivlig avtala er okkara millum – heldur ikki um, at báturin er seldur honum.

Í januar 2002 hevur B fingið flutt bátin yvir í hansara navn.

Í november 2002 frætti eg, at umframt bátin, var eisini fiskivinnuloyvið hjá bátinum flutt yvir til B. Eg var tá suðuri í Fiskimálaráðnum, og fekk váttað munnliga, at so var.

Tann 28. november sendi eg hjálagda bræv til Fiskimálaráðið, har eg bað um at fáa váttað skrivliga, at fiskiloyvið framvegis stóð í mínum navni. Um tað ikki bar til, vildi eg hava at vita, hvør ið stóð fyri fiskiloyvinum, og nær loyvið møguliga er flutt yvir í

annað navn. Eisini bað eg um at fáa at vita, hvør møguliga hevði váttað, at loyvið skuldi flytast?

Biðið varð um svar í seinasta lagi 14 dagar eftir móttøku av brævinum.

Síðani tá er javnan rykt eftir svari, bæði yvir telefon og eisini hevur fólk verið fyri meg inni á Fiskimálaráðnum, men framvegis er einki svar komið.

Av Sýsluskrivstovuni havi eg (umvegis annan persón) fingið tvær mótsigandi munnligar frágreiðingar viðvíkjandi sølu av bátum. Í øðrum svarinum varð sagt, at Sýsluskrivstovan var farin yvir til at krevja váttan frá seljaranum, tá bátar vórðu seldir, tí nógvir trupulleikar høvdu verið í sambandi við fiskiloyvir. Men hin persónurin, sum tosað varð við, segði seg einki kenna til nakra broytta mannagongd.

Frá Fiskimálaráðnum havi eg fingið at vita (eisini munnliga umvegis annan persón), at tá ein persónur kemur til teirra við eini váttan frá Sýsluskrivstovuni, sum sigur, at hann hevur keypt ein bát, og einki er viðmerkt um, at tað er uttan fiskiloyvi, so ganga tey út frá, at nýggi eigarin skal hava fiskivinnuloyvið.

Sostatt ber í prinsippinum til at keypa bæði bát og fiskiloyvi, uttan at seljarin er eftirspurdur. Hetta tykist mær at vera ein sera løgin mannagongd.

Eg vil tí við hesum klaga Fiskimálaráðið fyri eina, eftir mínum tykki, alt ov langa málsviðgerð, vísandi til, at so leingi, sum eg ikki havi fingið váttanina, kann eg ikki fara víðari við málinum.

Restin av málinum verður at bíða, til eg havi fingið skrivligt svar frá Fiskimálaráðnum.“

Skrivið frá A til Fiskimálaráðið, dagfest 28. november 2002, sum víst verður til í klaguni, er soljóðandi:

**„Viðvíkjandi fiskivinnuloyvinum hjá undirritaða**
Eg vil hervið biðja um skrivliga váttan fyri, at fiskiloyvi hjá B1 – fyrr B2 (…) framvegis stendur í navninum hjá undirritaða.

Um ikki, vil eg hava at vita, hvør stendur fyri fiskiloyvinum, og nær loyvið møguliga er flutt yvir í annað navn. Eisini vil eg hava at vita, hvør hevur váttað, (undirskrivað) at loyvið verður flutt?

Biðið verður um svar í seinasta lagi 14 dagar eftir móttøku av hesum brævi.“

**Partshoyringin**

Við skrivi, dagfest 21. februar 2003 bað umboðsmaðurin Fiskimálaráðið greiða sær nærri frá málinum, herundir hví A ikki hevur fingið svar uppá skriv sítt, dagfest 28. november 2002. Fiskimálaráðið varð samstundis biðið um at lata umboðsmanninum til láns avrit av øllum skjølunum í hesum málinum.

Við skrivi, dagfest 3. apríl 2003 hevur Fiskimálaráðið sent umboðsmanninum hesar viðmerkingar:

> **„Viðvíkjandi klagu frá A**
>
> Víst verður til skriv tykkara, dagfest 21. februar 2003, og áminning dagfest 31. mars 2003, viðvíkjandi klagu frá A um málsviðgerðina hjá Fiskimálaráðnum, har heitt verður á okkum um at lata umboðsmanninum viðmerkingar og skjøl í málinum.
>
> Hjálagt verður notat, sum fulltrúi á Fiskivinnustovuni hevur gjørt í málinum, sent tykkum til kunningar saman við viðkomandi skjølum.
>
> Vit biðja orsaka, at vit ikki svara fyrr enn nú."

Notatið, sum víst verður til í skrivinum frá Fiskimálaráðnum, er soljóðandi:

> **„Viðv. klagu frá A … um málsviðgerð av fiskiloyvi**
>
> Fiskimálaráðið móttók 2. desember 2002 skriv frá A …, dagfest 28. november 2002, har m.a. spurt verður um, hvør stendur fyri fiskiloyvinum hjá fyrrverandi B1, nú B3, …
>
> Nevnda skriv er ikki svarað skrivliga.
>
> Klagan frá A vísir problemi í hesum máli, nevniliga munnligar avtalur. Seljari og keypari í hesum máli eru ikki samdir um, hvat avtalað varð.
>
> Fiskimálaráðið hevur munnliga svarað fyrispurninginum, sum A hevur sett fram bæði munnliga og skrivliga.
>
> Boðað varð A frá, at fiskiloyvi varð útskrivað B3, … v/B, … B segði seg hava rætt til loyvið, og vit í Fiskimálaráðnum kendu tá einki sum segði ímóti hesum pástandi, hvørki munnligt ella skrivligt. Fiskiloyvi varð tí útskrivað B. (Skjal 1)
>
> Tá A so gjørdi vart við seg, persónliga ella í telefon varð spurt, um hann hevði skjalprógv sum vísti, at báturin var seldur uttan

fiskiloyvi. Tílíkt skjalprógv hevði hann ikki. Vit ráddu A til at fáa sølu-/keypsavtaluna við B festa á pappír. Tílíkt skjalprógv er tó higartil ikki komið Fiskimálaráðnum í hendi. Tvørturímóti hevur B í februar 2003 søkt um nýtt fiskiloyvi til B3, … fyri fiskidagatíðarskeiðið 1. mars 2003 til 31. august 2003 og fingið fiskiloyvi útskrivað 6. mars 2003. (Skjal 2) *(umsóknin liggur í journalini skrátal 1000-1265)*

Spurningurin um, hvør eigur rættin til fiskiloyvi, er ein spurningur millum keypara og seljara. Kunnu keypari og seljari ikki semjast um, hvat varð avtalað, er hettar ein spurningur fyri dómsvaldið at taka avgerð um.

Fiskimálaráðið hevur í málum sum hesum valt at trúgva, at keyparin eigur rættin til fiskiloyvið. Smb. § 31. stk. 2 í lógini um vinnuligan fiskiskap kann fiskiloyvi útskrivast B3, …

Alt hettar er fráboðað A munnliga.

**Gongdin í málinum:**

Tað fyrsta vit í Fiskimálaráðnum kenna til B1, … var 18. februar 2002, tá C í telefon søkti um fiskiloyvi til bátin. (Skjal 3) Fiskiloyvi varð ikki útskrivað, tí B longu tá hevði skrásett bátin sum m/b B3, … (Skjal 4) og harvið varð skrásetingin av B1,… v/A frá 7. mai 1984 strikað. (Skjal 5).

2. mai 2002 søkti B um fiskiloyvi til bátin. (Skjal 6) Fiskiloyvi varð ikki útskrivað tí bland kom í. B hevði 5. apríl skrásett ein annan m/b B3, … sum, tað vit vita, longu tá var fyribeindur.

9. oktober 2002 søkti B um fiskiloyvi til bátin (Skjal 8) og (Skjal 1).

2. desember 2002 varð skrivið frá A, dagfest 28. november 2002, skrásett í journalini.“

Við skrivi, dagfest 10. apríl 2003 vórðu viðmerkingarnar frá Fiskimálaráðnum sendar A til ummælis. Við skrivi, dagfest 27. apríl 2003 hevur A gjørt hesar viðmerkingarnar til skrivið og notatið frá Fiskimálaráðnum:

„Vísandi til bræv tykkara dagfest 10. apríl 2003, har spurt verður, um eg havi nakrar viðmerkingar til skrivið frá fiskimálaráðnum, skal verða sagt frá, at eg havi hesar viðmerkingar:

Fiskimálaráðið sigur í notatinum, at ráðið hevur munnliga svarað spurningunum, sum eg setti skrivliga. Hetta er ikki heilt rætt. Í sambandi við at rykt hevur verið fleiri ferðir eftir svari uppá spurningarnar, hava partarnir sjálvsagt tosað í telefonini um trupulleikan, og í tí sambandi eru nakrir av spurningunum svaraðir munnliga. Men tá tað í seinastu telefonsamrøðuni partana millum varð heitt á málsviðgerðan hjá Fiskimálaráðnum um at senda mær tað skrivliga, sum hann hevði svarað munnliga, segði hann, at tað bar ikki til, tí eitt var, hvat ein kundi siga í telefon, men tá svarið skuldi gevast skrivliga, mátti tað kannast nærri fyrst (ella við øðrum orðum: tað munnliga svarið var hvørki endaliga eftirfarandi, ella bindandi fyri Fiskimálaráðið). Sostatt kann eg ikki brúka tey svarini til nakað sum helst. Millum annað tí havi eg hildið fast við kravið um, at svarið skal vera skrivligt. Lovað varð í seinastu telefonsamrøðuni, at skrivligt svar skuldi koma, men heldur ikki ta ferðina kom nakað svar, og tí vendi eg mær til Løgtingsins umboðsmann við málinum.

Tað er heldur ikki rætt, tá Fiskimálaráðið sigur, at C tann 18. februar 2002 í telefon søkti um fiskiloyvi til m/b B1, … C ringdi vegna undirritaða til Fiskimálaráðið, fyri at gera vart við, at báturin var seldur, men at fiskiloyvi fylgdi ikki við í søluni. Tað einasta Fiskimálaráðið segði um hetta, var, at ráðið so skuldi hava at vita, hvønn bát loyvið skuldi flytast til. Síðani hoyrdu vit einki aftur frá Fiskimálaráðnum. Tí livdi eg í teirri góðu trúgv, at fiskiloyvið framvegis stóð í mínum navni, líka til eg í november 2002 frætti, at nýggi eigarin hevði fingið loyvið, sum eg átti.

Eg skilji ikki, hvussu Fiskimálaráðið kann skriva í sínum notati (eg endurgevi): „*B segði seg hava rætt til loyvið, og vit í Fiskimálaráðnum* *<u>kendu tá einki sum segði ímóti hesum pástandi, hvørki munnligt ella skrivligi</u>. Fiskiloyvi varð tí útskrivað B*“ (endurgeving enda). Hetta var sambært Fiskimálaráðnum 2. mai 2002, tað vil siga 2 1/2 mánað eftir, at C, vegna undirritaða hevdi ringt til Fiskimálaráðið, fyri at gera vart við, at fiskiloyvið ikki fylgdi við í søluni, Tað er tí beinleiðis ósatt, tá sagt verður, at tey í Fiskimálaráðnum einki kendu, sum segði ímóti pástandinum hjá B um at hann hevði rætt til loyvið. Tað at Fiskimálaráðið meira enn eitt ár seinni kann vísa á, hvønn dato samrøðan var gjørd, má vera prógv um, at telefonsamrøðan er niðurskrivað onkrastaðni hjá ráðnum.

Líkamikið um Fiskimálaráðið skilti samrøðuna við C sum eina umsókn um at fáa fiskiloyvi til bátin, ella tað var skilt sum ein viðmerking um, at loyvið ikki fylgdi við í søluni, so átti ráðið í báðum førðum at vita, at eg ikki vildi av við fiskiloyvið, og tí átti ráðið at boðað mær frá, áðrenn loyvið varð latið øðrum. Men undirritaði varð ikki spurdur og fekk heldur onga fráboðan um at fiskiloyvið varð útskrivað nýggja eigaranum.

Fiskimálaráðið hevur mælt til, at sølu-/keypsavtalan verður fest á pappír, og at tað har verður tilskilað, at báturin er seldur uttan fiskiloyvi. Tað havi eg ikki vilja gjørt, tí eg havi hildið tað verið nyttuleyst at fáa gjørt tílíka avtalu við ein mann, sum eftir øllum at døma alla tíðina hevur ætlað at snýtt meg.

Fyri nýggja eigaran má keypið sigast at vera sera gott, um hann eisini skal hava rættin til fiskiloyvið. Motorurin var ikki í bátinum tá sølan fór fram, so hann fekk bátin fyri kr. 1.000,- og motorin fyri kr. 20.000,-.

Til seinast vil eg siga, at tað undrar meg ógvuliga nógv, at brævið sum eg sendi til Fiskimálaráðið í november, ikki er svarað enn, tá nýggi eigarin sambært notatinum frá Fiskimálaráðnum søkti um nýtt fiskiloyvi í februar 2003, og fekk tað útskrivað longu 6. mars. 2003. Her sær út til, at ikki øll verða avgreidd líka skjótt.“

Við skrivi, dagfest 29. apríl 2003 vórðu hesar viðmerkingarnar sendar Fiskimálaráðnum til ummælis, og hevur Fiskimálaráðið við skrivi, dagfest 13. mai 2003 latið umboðsmanninum hesar viðmerkingar til skrivið frá A:

**„Viðvíkjandi klaguni frá A**

Bæði í klaguni 19. februar 2003 og í viðmerkingunum frá 27. apríl 2003 um notatið frá Fiskimálaráðnum verður kært um, at skrivið frá A, dagfest 28. november 2002, ikki er svarað skrivliga, og spurningur verður settur við, hvør ið hevur rætt til fiskiloyvið.

**Viðv. skrivligum svari**

Í notatinum frá 2. apríl 2003 varð sagt frá, at skrivið frá A, dagfest 28. november 2002, ikki er svarað skrivliga. Ætlanin var/er at

svara skrivliga, eins og tað munnliga varð fráboðað A, men hettar er tó ikki gjørt.

Hinvegin vísa bæði klagan frá 19. februar 2003 og viðmerkingarnar frá 27. apríl 2003, at A hevur fingið munnligt svar. A metir tó ikki, at eitt munnligt svar er nøktandi.

Viðv. rættinum til fiskiloyvi

Fiskiloyvi varð útskrivað B3, … v/B, … hin 20. november 2002, eins og víst verður á í notatinum frá 2. apríl 2003. B segði seg hava rætt til loyvið, og vit í Fiskimálaráðnum kendu tá einki sum segði ímóti hesum pástandi, hvørki munnligt ella skrivligt.

B stendur sum eigari av báti, sum smb. § 31. stk. 2 í lógini um vinnuligan fiskiskap kann fáa fiskiloyvi útskrivað. Tað er vanlig mannagongd á Fiskivinnustovuni at skriva eigara av fiskifari fiskiloyvi, um ikki annað er, sum tilskilar, at eigarin ikki hevur rætt til fiskiloyvi. Í hesum føri fyriliggur tilmelding til bátayvirlitið, sum vísir, at B eigur nevnda fiskifar.

Í viðmerkingum sínum frá 27. apríl 2003 sigur A, at C hin 18. februar 2002 ikki bað um fiskiloyvi til m/b B1, …, men at hann boðaði frá, at báturin var seldur, og at fiskiloyvið ikki fylgdi við í søluni. D, fulltrúi, sigur, at C hin 18. februar 2002 bað um fiskiloyvi til bátin. C nevndi onki um, at báturin var seldur yvirhøvur.

A stendur uttan skjalprógv um, at hann hevur selt bátin uttan fiskiloyvi, og seljari og keypari eru ikki samdir um, hvat ið munnliga varð avtalað.

Fiskimálaráðið fylgir tí mannagongd í førum sum hesum, har eingin skrivlig avtala er, ella eingin munnlig semja er millum seljara og keypara, at eigarin av fiskifarinum hevur rættin til fiskiloyvið. Samsvarandi hesum er fiskiloyvi skrivað B til bátin m/b B3, …“

Við skrivi, dagfest 15. mai 2003 vórðu viðmerkingarnar frá Fiskimálaráðnum sendar klagaranum til ummælis. A hevur við skrivi, dagfest 22. mai 2003 latið umboðsmanninum hesar viðmerkingarnar til skrivið:

„Vísandi til bræv tykkara dagfest 15. mai 2003 (J.Nr.:200300013 / 13), har spurt verður, um eg havi nakrar viðmerkingar til skrivið

frá fiskimálaráðnum ella til málið annars, skal verða sagt frá, at eg havi hesar viðmerkingar:

Sum áður greitt frá, so ringdi C vegna undirritaða tann 18. februar 2002 til Fiskimálaráðið, fyri at gera vart við, at báturin m/b B1, … var seldur, men at fiskiloyvið fylgdi ikki við í søluni. Men Fiskimálaráðið heldur fast við pástandin um, at C ringdi til teirra, fyri at biðja um fiskiloyvi til m/b B1, og at hann nevndi einki um, at báturin var seldur.

Eg dugi satt at siga ikki at síggja nakran logikk í hesum, tí hví skuldi eg biðji um fiskiloyvi til ein bát, sum eg júst tá hevði selt? – Hvat skuldi eg brúkt eitt tílíkt loyvið til? Og hví svaraði D aftur í telefonini, at hann mátti hava at vita, hvønn bát loyvið skuldi flytast til? Tað skuldi ikki verið neyðugt, um telefonsamrøðan hevði til endamáls at søkja um loyvi til m/b B1.

<u>Viðvíkjandi skrivligum svari</u>
Fiskimálaráðið vísir enn einaferð á, at spurningarnir sum eg setti ráðnum eru svaraðir munnliga. Men júst tað, ið verður sagt munnliga er sjálv kjarnan í øllum hesum málinum. Trupulleikin hjá mær er, at eg havi gjørt eina munnliga avtalu viðvíkjandi sølu av einum báti, men aftaná verður ivi sáddur um, hvat ið avtalað var. Eisini telefonsamrøðuna, sum C vegna undirritaða hevði við Fiskimálaráðið, roynir Fiskimálaráðið nú at broyta innihaldið í. Eg kann tí ikki góðtaka fleiri munnlig svar frá Fiskimálaráðnum. Tað sum Fiskimálaráðið svarar, skal kunna standa óbroytt, um farið verður víðari við málinum."

Viðmerkingarnar frá A vórðu sendar Fiskimálaráðnum til ummælis við skrivi, dagfest 26. mai 2003. Við skrivi, dagfest 6. juni 2003 hevur Fiskimálaráðið latið umboðsmanninum hesar viðmerkingar aftrat:

**„Viðvíkjandi klaguni frá A**
Í sambandi við viðmerkingarnar hjá A, dagfestar 22. mai 2003, er bara at siga, at Fiskimálaráðið hevur noterað sær orðingina „Eisini telefonsamrøðuna, sum C, vegna undirritaða, hevði við Fiskimálaráðið, roynir Fiskimálaráðið nú at broyta innihaldið í."

Við skrivi, dagfest 12. juni 2003 boðaði eg pørtunum frá, at eg nú fór undir endaligu viðgerðina av hesum máli.

Tann 14. juli 2003 havi eg umvegis telefon spurt meg fyri hjá sýsluskrivstovuni í Runavík um mannagongdina viðvíkjandi tilmelding av eigaraskiftum til farskránna. Sýsluskrivstovan upplýsti, at áður kravdist bert fráboðan frá keypara. Trupulleikar høvdu staðist av hesum, og hevði sýsluskrivstovan tí broytt mannagongd, soleiðis at nú eisini krevst váttan frá seljara. Henda broyting av mannagongdini var framd fyri millum hálvum og einum ári síðani. Sýsluskrivstovan upplýsti eisini, at fráboðanin av eigaraskifti av bátinum, sum nú eitur B3, fór fram 21. januar 2002, og var hetta frammanundan, at mannagongdin bleiv broytt.

Tann 15. juli 2003 sendi eg Fiskimálaráðnum soljóðandi skriv:

> **„Viðvíkjandi klaguni frá A, dagfest 19. febr. 2003**
> Eins og fráboðað tykkum í skrivi mínum, dagfest 12. juni 2003, eri eg farin undir endaligu viðgerðina av omanfyri nevndu klaguni. Undir hesari viðgerðini eri eg komin fram á nøkur ting, sum tykjast mær eitt sindur ógreið, og fari eg tí at biðja Fiskimálaráðið um at greiða mær nærri frá hesum.
>
> Í skrivi sínum, dagfest 28. nov. 2002 biður A Fiskimálaráðið um skrivligt svar; antin eina váttan um, at hann stendur fyri fiskiloyvinum ella eina frágreiðing um, hvør stendur fyri hesum, og nær loyvið er flutt.
>
> Í notatinum, sum D hevur skrivað, og sum varð viðlagt skrivi tykkara, dagfest 3. apríl 2003, verður greitt frá, at hetta skrivið frá A er ikki svarað skrivliga, men at Fiskimálaráðið hevur svarað fyrispurningi hansara munnliga.
>
> Eg havi fingið skjølini í málum tykkara, J.nr. 1000-1265 og 20020313. Sambært hesum skjalatilfarinum og journalyvirlitinum yvir málið 20020313 dugi eg ikki at síggja nakra dokumentatión fyri, at hesin fyrispurningurin er svaraður.
>
> Eg fari tí at biðja Fiskimálaráðið greiða mær frá, um tað er rætt skilt, at Fiskimálaráðið hevur svarað skrivinum frá A munnliga, uttan at gera nakað notat frá hesari samrøðuni?

Eg fari somuleiðis at biðja Fiskimálaráðið greiða mær frá, hví hesin fyrispurningurin frá A ikki er svaraður skrivliga, tá hann beinleiðis hevur biðið um skrivligt svar?

Eisini fari eg at biðja Fiskimálaráðið greiða mær frá, hví eingi notat eru gjørd frá teimum mongu samrøðunum, sum eftir øllum at døma, hava verið millum A og Fiskimálaráðið?

Eg skal í hesum sambandi vísa Fiskimálaráðnum á notatskylduna í § 6 í Lógini um innlit í fyrisitingina og á ta ikkilógarfestu notatskylduna, sum ein myndugleiki harumframt hevur, tá týðandi stig verða tikin í einum máli, eitt nú tá avgerðir verða tiknar, uttan at hesar verða fráboðaðar skrivliga.

Fiskimálaráðið verður biðið um at svara hesum spurningum innan 4 vikur."

Tann 8. september 2003 rykti eg skrivliga Fiskimálaráðið eftir svari. Fiskimálaráðið hevur svarað mær við soljóðandi skrivi, dagfest 12. september 2003:

„Víst verður til skriv tykkara frá 15. juli 2003 og seinni aftur frá 8. september 2003 um klagu, sum A, … hevur sett fram ímóti Fiskimálaráðnum í sambandi við málsviðgerð av máli um fiskiloyvi hjá bátinum m/b B1.

Í skrivi tykkara verða tríggir spurningar settir Fiskimálaráðnum viðvíkjandi sjálvari avgreiðsluni av hesum málinum í ráðnum.

Sum sagt verður í notati hjá Fiskimálaráðnum viðlagt skrivi okkara dagfest 3. apríl 2003, hevur Fiskimálaráðið svarað fyrispurninginum frá A munnliga. Á henda hátt hevur ráðið kunnað hann um, hvørja støðu ráðið hevur til málið. Tað finst tó onki notat í málinum, sum staðfestir, nær A fyrstu ferð er kunnaður um støðu Fiskimálaráðsins í málinum.

Tá málið verður kært til løgtingsins umboðsmann, og hann tekur málið til viðgerðar, steðgar málsviðgerðin av sjálvum málinum millum A og Fiskimálaráðið upp. Tá málsviðgerðin steðgar, verður tað umbidna svarið heldur ikki avgreitt, hóast skrivlig áheitan um skrivligt svar er sett fram.

Tað hava verið nógvar telefonsamrøður millum starvsfólk í Fiskimálaráðnum og A ella annan í hansara stað. Fiskimálaráðið hevur tó ikki fest innihaldið í samrøðunum niður í notat.

Orsøkin til tess er at finna, at mannagongdin við noteringum í sambandi við telefonsamrøður ikki er konsekvent gjøgnumførd í Fiskimálaráðnum.“

## *Niðurstøða*

*Viðgerð mín av hesari klaguni er avmarkað til málsviðgerðina hjá Fiskimálaráðnum. Spurningurin um, hvørt seljarin ella keyparin av bátinum eigur rættin til fiskiloyvi er ein spurningur, sum partarnir mugu avgreiða sínamillum, evt. í einum rættarmáli.*

*Við skrivinum, dagfest 28. nov. 2002 setti A Fiskimálaráðnum fýra spurningar. Hann bað Fiskimálaráðið um skriviliga at:*

- *vátta, at hann framvegis stóð fyri umrødda fiskiloyvinum,*
- *upplýsa hvør stóð fyri hesum loyvi, um tað ikki var hann sjálvur,*
- *upplýsa, nær hetta loyvið varð flutt øðrum persóni, og*
- *upplýsa, hvør hevði undirskrivað eina møguliga avgerð um at flyta loyvið til annan persón.*

*A hevur sambært Fiskimálaráðnum ongantíð fingið nakað skrivligt svar hesum viðvíkjandi, men í notatinum, dagfest 2. apríl 2003, og sum var hjálagt skrivi Fiskimálaráðsins til mín, dagfest 3. apríl 2003 sigur ráðið seg munnliga at hava greitt honum frá, at loyvið var útskrivað B3, … v/B. Í viðmerkingum sínum, dagfestar 27. apríl 2003 sigur A seg lutvíst hava fingið munnligt svar, men at hann ikki kann nýta hetta til nakað, og at hann tí hevur kravt at fáa skrivligt svar uppá spurningar sínar. Hann sigur, at Fiskimálaráðið í seinastu telefonsamrøðuni teirra millum skal hava lovað honum skrivligt svar, men at einki slíkt svar er komið. Í viðmerkingunum, dagfestar 13. mai 2003 sigur Fiskimálaráðið, at ætlanin var/er at svara A skrivliga, men at hetta ikki er gjørt.*

*Tað má leggjast til grund:*

- *at klagarin A hevur gjørt eina munnliga avtalu við B, … um sølu av báti klagarans m/b B1 (…) til B, men*
- *at ósemja er millum seljara og keypara, um fiskiloyvið fylgdi við í søluni ella ikki,*
- *at báturin síðani er skrásettur í farskránni í navni B’s, uttan at klagarin hevur átt nakran lut í hesi skráseting, og*
- *at Fiskimálaráðið hevur útskrivað fiskiloyvi til … B3 (áður B1) v/ B.*

*Klagarin A má tí metast at vera partur í málinum um at útskriva fiskiloyvi til B3. Tá hann so við skrivinum, dagfest 28. november 2002 vendir sær til Fiskimálaráðið og biður um at fáa eitt skrivligt svar, hevur ráðið skyldu til at svara honum skrivliga. Henda skylda ger seg serliga galdandi her, har umbidna svarið minnir ikki sørt um eina avgerð, nevniliga hvat er hent við fiskiloyvinum, sum A átti.*

*Viðvíkjandi spurningi klagarans um, hvør hevur undirskrivað eina møguliga váttan um at flyta fiskiloyvið hansara til annan persón er at siga, at hesin fyrispurningur er at meta sum ein umbøn um innlit í málið, sum hann er partur í. Áheitanin átti tí sambært § 16 í Fyrisitingarlógini at verið avgreidd innan 10 dagar, ella í hvussu er átti klagarin at fingið eini frágreiðing um, hví hetta ikki lat seg gera. Áheitanin kundi t.d. verið avgreidd við at sent honum fotoprent av fiskiloyvinum til B3, dagfest 20.11.2002.*

*Í sambandi við viðgerð mína av hesum máli, havi eg fingið fotoprent av hesum fiskiloyvinum og einum seinni útskrivaðum fiskiloyvi, dagfest 06.03.2003. Eg havi lagt til merkis, at undirskriftin, serliga á tí eina fiskiloyvinum, er torfør at lesa. Eg skal tí gera vart við, at tað hoyrir til góðan fyrisitingarsið at endurtaka undirskriftir við prentaðum stavum ella stempli, í øllum førum, har undirskriftin ikki er lætt lesilig. Eg skal í hesum sambandi vísa til Forvaltningsloven med kommentarer v/John Vogter, 3. útgávu, bls. 23.*

*Tað er átaluvert, at Fiskimálaráðið hóast sera greiðu áheitanina frá A um at fáa skrivligt svar uppá skriv hansara, meira enn 9 mðr. seinni framvegis ikki hevur givið honum umbidna svarið skrivliga.*

*Í skrivinum til mín, dagfest 12. sept. 2003 sigur Fiskimálaráðið, at málsviðgerðin steðgaði upp, tá hetta málið bleiv klagað til mín, og at umbidna skrivliga svarið tí heldur ikki er sent A. Hesa undanførsluna skilji eg als ikki. At klaga er latin umboðsmanninum forðar ikki Fiskimálaráðnum at halda fram við málsviðgerðini. Klagan átti heldur tvørturímóti at havt skundað undir málsviðgerðina. Eg kann tí als ikki góðtaka hesa umbering.*

*Eg fari tí at geva Fiskimálaráðnum eina átalu fyri ikki at hava svarað skrivinum frá A skrivliga, og samstundis fari eg at mæla Fiskimálaráðnum til beinanvegin, um hetta ikki longu er gjørt, at svara honum skrivliga.*

*Eg kann av góðum grundum ikki taka støðu til, hvat er umrøtt í*

*teimum telefonsamrøðunum, sum hava verið millum Fiskimálaráðið og ávikavist A og C, tí einki skrivligt tilfar finst frá hesum samrøðum. Fiskimálaráðið hevur tó gjørt eitt notat frá einari samrøðu við C 18. febr. 2002. Hetta telefonnotatið er gjørt á eina fortrykta skabelón, sum hevur heitið: Umsókn um Fiskiloyvi (Bólkur 5), Telefonupprit. Men umframt fortryktu yvirskriftina sigur uppritið als einki um, hvat er umrøtt í samrøðuni, men einans hvønn tosað er við, og nær samrøðan hevur verið.*

*Eg skal í hesum sambandi gera vart við, at Fiskimálaráðið sambært § 6 í løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina, í málum, har ein avgerð fer at verða tikin, hevur skyldu til at skriva upp innihaldið á teimum upplýsingum, sum myndugleikin móttekur munnliga ella á annan hátt gerst kunnigur við, um hesir hava týdning fyri avgerðina í málinum, og ikki eru at finna har frammanundan.*

*Aftrat hesari lógaráløgdu notatskylduni, hevur ein fyrisitingarmyndugleiki harumframt eisini eina víðkaða notatskyldu, sum byggir á eina ikki-lógarfesta fyrisitingarliga meginreglu. Hendan skyldan fevnir um at skriva upp innihaldið á øllum upplýsingum, sum hava týdning fyri málsviðgerðina og málsgongdina. Sum eitt dømi um hesa ikki-lógarfestu notatskylduna, kann verða víst til eina niðurstøðu í ársfrágreiðingini fyri 1998 frá Folketingets Ombudsmand, bls. 138 ff., har tað á bls. 140 stendur soleiðis:*

> *„Bestemmelsen i offentlighedslovens § 6, stk. 1, må efter min opfattelse ses som udslag af en almindelig retsgrundsætning om, at offentlige myndigheder har pligt til at gøre notat om alle væsentlige ekspeditioner i en sag, herunder telefonsamtaler, som ikke fremgår af brevvekslingen i sagen eller af sagens dokumenter i øvrigt.*
>
> *En sådan notatpligt vil ikke blot være en forudsætning for gennemførelse af retten til aktindsigt, men vil normalt også være en forudsætning for, at det efterfølgende kan klarlægges, hvad der er sket i en sag og herved også give mulighed for en effektiv kontrol med, om myndigheden har handlet korrekt.“*

*Hesum sjónarmiði taki eg fult undir við. Í hesum konkreta málinum átti Fiskimálaráðið tí at havt gjørt telefonupprit frá samrøðunum, sum hava verið millum partarnar, t.d. um hvat, A er vorðin kunnaður um*

*í hesum samrøðum. Eg haldi tað vera átaluvert, at slík telefonupprit ikki eru gjørd. Í skrivinum til mín, dagfest 12. sept. 2003 sigur Fiskimálaráðið, at slík notat ikki eru gjørd, tí at mannagongdin við noteringum í sambandi við telefonsamrøður ikki er konsekvent gjøgnumførd í Fiskimálaráðnum. Hesa undanførsluna kann eg als ikki góðtaka. Lógin um innlit í fyrisitingina kom í gildi 1. januar 1994, og hevur sostatt skjótt 10 ár á baki. Fiskimálaráðið hevur sostatt havt ríkiliga tíð til at laga seg eftir reglunum í hesi lóg.*

*Umframt, at geva Fiskimálaráðnum átalu fyri ikki at hava givið A skrivligt svar innan fyri eina rímiliga tíð og fyri ikki at hava yvirhildið notatskylduna, geri eg ikki meira við málið.*

## 10.3. Málsviðgerðartíðin hjá Hjálpartólamiðstøðini í einum bilmáli

*Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu frá einari kvinnu um málsviðgerðartíðina hjá HTM í sambandi við, at hon hevði søkt um at fáa avlamisbil sín skiftan út. Umsóknin varð grundað á, at fortreytir hennara vóru broyttar, tí hon var mamma at tveimum smáum børnum, og at henni tí tørvaði ein avlamisbil, sum kundi rúma tveimum barnavognum.*

*Ríkissjúkrahúsið sendi vegna mammuna í juni 2001 HTM eina umsókn um útskiftan av verandi avlamisbili. HTM skrásetti hetta skrivið sum eitt kunningarskriv, og tí var hetta als ikki viðgjørt, tá mamman í jan. 2002 rykti HTM eftir svari. HTM sendi mammuni eina fyribilsjáttan í febr. 2002, men viðgjørdi framhaldandi málið. Endalig játtan var ikki send mammuni fyrr enn í des. 2002, men kortini var málið ikki endaliga avgreitt fyrr enn í juli 2003.*

*Umboðsmaðurin vísti á, at mamman frammanundan hevði ein avlamisbil, og at hetta málið tí snúði seg um, hvørt mamman hevði rætt til at fáa skift bil sín út í úrtíð, og síðani at finna rætta bilin til hennara. Hann hevur givið Almannastovuni/HTM eina átalu fyri viðgerðartíðina í hesum málinum, og hevur samstundis mælt til, at viðgerðarmannagongdirnar í slíkum málum verða tiknar til umhugsunar, soleiðis at hetta ikki hendir aftur.*

*Í einum notati í málinum hevur málsviðgerðin m.a. greitt frá, at ein bíðitíð uppá 6-8 mðr. frá tí, at umsóknin er móttikin, til málsviðgerðin fer í gongd, ikki er óvanlig vegna nógvar arbeiðsuppgávur. Umboðsmaðurin hevur víst á, at hendan støðan als ikki er nøktandi, og hevur biðið Almannastovuna/HTM lata seg frætta, hvat víðari hendir í málinum. (J.nr. 200300001 – Álitið er ikki tikið við í ársfrágreiðingina)*

Eg havi einki frætt aftur frá Almannastovuni og Hjálpartólamiðstøðini, men fari í næstum at fylgja hesum málinum upp.

## 10.4. Klaga um drúgva málsviðgerðartíð hjá Fíggjarmálaráðnum

*Fróðskaparsetur Føroya hevur sent umboðsmanninum eina klagu um drúgvu viðgerðartíðina hjá Fíggjarmálaráðnum í málinum um ásetanina av lønini í setursskrivarastarvinum. Eftir, at málið varð avgreitt í Fíggjarmálaráðnum í 2000, vendi Fróðskaparsetrið sær aftur í jan. 2001 til Fíggjarmálaráðið og vísti á, at fortreytirnar fyri starvinum vóru broyttar. Hóast enn eina áheitan í des. 2001 og fleiri rykkjarar í 2002, hevði Fíggjarmálaráðið framvegis ikki svarað Fróðskaparsetrinum, tá klagan varð send umboðsmanninum í nov. 2002. Fíggjarmálaráðið avgreiddi málið við skrivi til Mentamálaráðið, dagfest 20. des. 2002. Umboðsmaðurin helt ikki grundarlag vera fyri at finnast at avgerðini hjá Fíggjarmálaráðnum, men gav ráðnum eina átalu fyri, at tað hevði tikið so drúgva tíð at viðgera hetta málið, eins og at Fíggjarmálaráðið ikki hevði svarað teimum mongu skrivunum frá Fróðskaparsetrinum.*
*( J.nr. 200200051).*

### Klagan

Við skrivi, dagfest 22. nov. 2002 hevur Fróðskaparsetur Føroya sent umboðsmanninum soljóðandi klagu:

„Klaga viðvíkjandi drúgvari málsviðgerð og vantandi avgerð í setursskrivaramálinum

Vegna Fróðskaparsetur Føroya vil eg herviðbera fram klagu um sera drúgva málsviðgerð og vantandi avgerð í málinum um lønaráseting í setursskrivaramálinum. Málið liggur óavgreitt á 5. ári hjá Lønardeildini í Fíggjarmálaráðnum og hóast óteljandi fyrispurningar, áminningar og rykkjarar er enn ongin endalig avgerð komin í málinum. Heitt verður á tygum um at kanna málið. Niðanfyri og í hjáløgdum avritum verður okkara fatan av málinum lýst.

**Lýsing av gongdini í málinum:**

Fróðskaparsetrið valdi í 1997 at umskipa setursskrivarastarvið og seta ein akademikara at hava dagligu ábyrgdina av fyrisiting

stovnsins galdandi frá 1. januar 1998. Tann 3. desember 1997 sendi táverandi rektarin skriv til Lønardeildina um málið og bað um at fáa løn ásetta fyri starvið. Fylgjandi árið er samskifti millum partarnar, men ongin semja gjørd. Partarnir eru bæði ósamdir um starvsheitið og um lønarásetingina.

Í tíðarskeiðnum juni 1998 til januar 1999 var setursskrivarin í barnsburðarfarloyvi og avloysari settur fyri hana. Setursskrivarin valdi aftaná eitt gott ár at siga seg úr starvi, m.a. orsakað av ógreiðu starvsviðurskiftunum. Heitt varð á barnsburðaravloysaran um at halda fram í starvinum til málið varð endaliga avgreitt og lýst kundi verða eftir fólki, og hesum játtaði hon. At tað skuldi ganga so long tíð, hevði ongin roknað við.

Støðan í dag er, at setursskrivarin enn bara er sett, tvs. ikki hevur fingið eitt endaligt setanarskriv við lønaráseting frá Fróðskaparsetrinum. Nú skal hon í barnsburðarfarloyvi fyrst í februar, og vit hava brúk fyri at søkja eftir avloysara. Her renna vit okkum aftur í trupulleikan við ikki at kunna lýsa starvið. Magistarafelagið góðkennir ikki uppskot okkara til lýsing við tí lønaráseting, sum Lønardeildin hevur mælt til.

Seinasta árið hevur Fróðskaparsetrið rykt fyrst Lønardeildina, síðani aðalstjóran í Fíggjarmálaráðnum skrivliga 6 ferðir. Afturat hesum koma fleiri telefonsamrøður og teldupostar um málið.

Vit hava í seinasta skrivinum til aðalstjóran í Fíggjarmálaráðnum boðað frá, at um svar ikki var komið 15. november varð málið sent Løgtingsins umboðsmanni. 15. november ringdi skrivarin hjá Lønardeildini við boðum frá aðalstjóranum, at svar fór at koma í hesi vikuni. Nú er vikan farin og onki svar er komið.

Umframt ótryggu og óvirðiligu umstøðurnar fyri setta setursskrivaran, er tað ótolandi fyri Fróðskaparsetur Føroya sum stovn, at viðurskiftini viðvíkjandi setursskrivarastarvinum ikki eru greið. Vit kunnu ikki bjóða okkara starvsfólkum slíkar umstøður. Tað er eisini beinleiðis í stríð við sáttmálarnar millum fakfeløgini og Fíggjarmálastýrið, sum áseta at øll hava rætt til setanarskriv innan 14 dagar frá starvssetan. Tað er avgerandi fyri stovnsleiðsluna at hava ein setursskrivara, sum kann átaka sær ábyrgdina av dagligu fyrisiting stovnsins, sum gerst alt meira fjøltáttað og umfatandi. Afturfyri mugu vit sum minstamát kunna bjóða greið og virðilig starvsviðurskifti.

Hjáløgd eru skjøl, sum lýsa samskifti Fróðskaparsetursins við Lønardeildina, Mentamálaráðið og avvarandi fakfeløg í málinum. Eisini eru skjøl, sum lýsa støðu setta setursskrivarans til vantandi avklároing av setanarviðurskiftunum.

Vit eru altíð fús at greiða nærri frá málinum, um okkurt er ógreitt ella um tilfar vantar."

## Málsgongdin

Sambært skjølunum frá Fróðskaparsetrinum, Mentamálaráðnum og Fíggjarmálaráðnum hevur gongdin í málinum verið hendan:

- 3. des. 1997 sendir Fróðskaparsetrið (A, rektari) skriv til Lønardeildina við áheitan um at taka upp samráðingar við BLF um lønina hjá B, seturskrivara – mælt verður til, at talan verður um løn svarandi til 36. flokk hjá tænastumonnunum.
- 23. febr. 1998 heitir Fróðskaparsetrið (B) á aðalstjóran í Mentamálaráðnum um at koma uppí hetta málið, tí at Lønardeildin sýtir fyri at realitetsviðgera málið.
- 31. mars 1998 sendir Mentamálaráðið skriv til Lønardeildina, har mælt verður til, at starvið verður lønt sum tænastumannastarv í 35. flokki.
- 20. apr. 1998 sendir Lønardeildin skriv til Mentamálaráðið, har biðið verður um eina starvslýsing av setursskrivarastarvinum og eina frágreiðing um, hvussu viðurskiftini vóru frammanundan, at B varð sett í starvið. Hetta tilfarið skal nýtast til viðgerðina av málinum.
- 4. mai 1998 sendir Fróðskaparsetrið Mentamálaráðnum eina starvslýsing og eina frágreiðing um viðurskiftini frammanundan.
- 12. okt. 1998 sendir Fróðskaparsetrið (C, rektari) Mentamálaráðnum skriv, har mælt verður til eina løn ájavnt við 36. flokk hjá tænastumonnunum.
- 28. jan. 1999 sendir Mentamálaráðið skriv til Lønardeildina, har sagt verður, at málið er viðgjørt av nýggjum, og at Mentamálaráðið er komið til somu niðurstøðu sum í skrivinum 31. mars 1998, nevniliga at talan skal vera um 35. flokk hjá tænastumonnunum.

- 2. febr. 1999 biður Lønardeildin aftur Mentamálaráðið um at útvega teimum eina starvslýsing og at greiða frá viðurskiftunum frammanundan setanini av B.
- 2. febr. 1999 sendir Fróðskaparsetrið (D, rektari) skriv til Mentamálaráðið, har biðið verður um, at hesin lønarspurningurin verður avgreiddur, áðrenn starvið skal lýsast leyst aftur.
- 2. febr. 1999 sendir Mentamálaráðið (E) skriv til Lønardeildina, har mælt verður til, at starvið verður lønt í 36. flokki. (Við hond er noterað á eintakið hjá Lønardeildini, at E hevur ringt 4. febr. og biðið Lønardeildina um at síggja burtur frá hesum skrivinum)
- 12. mars 1999 sendir Fróðskaparsetrið skriv til Mentamálaráðið, har greitt verður frá, hvussu innihaldið í starvinum sum setursskrivari er broytt seinnu árini.
- 18. mars 1999 sendir Mentamálaráðið hesa frágreiðingina til Lønardeildina. Víst verður eisini til skrivið frá Mentamálaráðnum 28. jan. 1999, og vónar Mentamálaráðið, at Lønardeildin út frá hesum tilfari kann taka avgerð í málinum.
- 9. juni 1999 skrivar Fróðskaparsetrið (D, rektari) til Mentamálaráðið fyri at fáa ein fund í lag við Lønardeildina um lønarspurningin. (Hesin fundur varð hildin 9. juli 1999)
- 12. juli 1999 sendir Lønardeildin skriv til Fróðskaparasetrið (avrit til Mentamálaráðið) um, at starvið skal lønast sum deildarleiðarastarv eftir ávikavist Verkfrøðingafelags-, Magistarafelags- ella BLF-sáttmálanum.
- 23. aug. 1999 boðar Fróðskaparsetrið (D, rektari) Lønardeildini frá, at hvørki BLF ella Magistarafelagið góðtaka hesa flokkingina.
- 23. aug. 1999 spyr Fróðskaparsetrið (F) Lønardeildina, hvussu B skal lønast fyri ta tíðina, tá hon røkti starvið.
- 21. sept. 1999 boðar Lønardeildin Fróðskaparsetrinum frá, at tað heldur fast við, at starvið skal lønast sum deildarleiðarastarv.
- 29. sept. 1999 sendir Fróðskaparsetrið (D, rektari) ein teldupost til G, aðalstjóra í Mentamálaráðnum, har hon spyr, um tey ikki kunnu hittast at tosa um hetta málið.
- 7. okt. 1999 boðar Mentamálaráðið Fróðskaparsetrinum frá, at Mentamálaráðið tekur undir við uppskotinum frá Lønardeildini.
- 20. okt. 1999 skrivar Fróðskaparsetrið (D, rektari) til Lønar-

deildina og Mentamálaráðið, at talan ikki er um eitt deildarleiðarastarv, men um ein fyrisitingarstjóra, sum skal lønast samsvarandi.

- 27. okt. 1999 svarar Mentamálaráðið Fróðskaparsetrinum, at ráðið hevur mett málið av nýggjum, men at tað ikki heldur nakað nýtt vera komið fram. Mentamálaráðið heldur tí fast við støðu sína í skrivinum frá 7. okt. 1999, og metir málið sum avgreitt frá teirra síðu.
- 5. nov. 1999 sigur H, løgfr. í Mentamálaráðnum í einum innanhýsis notati, at hetta málið er avgreitt, og hann mælir frá at gera meira við tað. Hann er samdur við niðurstøðuni frá Lønardeildini.
- 8. des. 1999 svarar Lønardeildin Fróðskaparsetrinum, at B skal lønast samsvarandi skrivinum frá 12. juli 1999.
- 17. des. 1999 heita BLF og Magistarafelagið á Mentamálaráðið um at stuðla einari flokking av starvinum svarandi til í minsta lagi 36. flokk hjá tænastumonnunum.
- 17. febr. 2000 svarar Mentamálaráðið BLF og Magistarafelagnum, at tað ikki heldur seg kunna gera meira við hetta málið.
- 14. juni 2000 sendir Magistarafelagið Mentamálaráðnum eitt uppskot til loysn, har mælt verður til, at eyka lønaraldur verður givin starvinum.
- 28. juni 2000 tekur Mentamálaráðið undir við hesum uppskotinum, og sendir tað til Lønardeildina.
- 13. juli 2000 svarar Lønardeildin Mentamálaráðnum, at hægri starvsaldur bert kann vera givin einum starvsfólki, men ikki einum starvi sum so.
- 21. aug. 2000 sendir Mentamálaráðið Magistarafelagnum avrit av skrivunum frá 28. juni og 13. juli til kunningar.
- 1. nov. 2000 boðar Mentamálaráðið Fróðskaparsetrinum frá, at ráðið er samt við niðurstøðuna hjá Lønardeildini, og at málið er endaliga avgreitt úr Mentamálaráðnum.
- 19. jan. 2001 vendir Fróðskaparsetrið (D, rektari) sær aftur á Lønardeildina í sambandi við flokkingina av starvinum. Víst verður á, hvussu nógv fortreytirnar fyri starvinum eru broyttar orsakað av nýggju roknskaparreglugerðunum.
- 23. nov. 2001 sendir Magistarafelagið Lønardeildini eitt skriv, har mælt verður til løn ájavnt m.a. deildarstjórunum í aðal-

stýrunum. Felagið hóttir samstundis við at fara til fjølmiðlarnar við málinum.

- 12. des. 2001 heitir Fróðskaparsetrið (D, rektari) aftur inniliga á Lønardeildina um at finna eina semju við Magistarafelagið, soleiðis at starvið kann vera lýst leyst.
- 18. jan. 2002 heitir Magistarafelagið á Lønardeildina um at fáa ein fund, so ein loysn kann finnast á ósemjuni. Felagið setir Lønardeildini eina freist til 25. jan., annars verður farið til fjølmiðlarnar eins og víst var á í skrivinum 23. nov. 2001.
- 24. jan. 2002 leggur Lønardeildin í einum notati spurningin um flokkingina fyri I, landsstýrismann, sum góðkennir, at starvið verður flokkað í 36. flokki. (Hendan avgerðin sæst tó ikki at verða førd út í lívið)
- 7. mars 2002 heitir Fróðskaparsetrið (D, rektari) á Lønardeildina um at fáa setursskrivarastarvið flokkað sum eitt stjórastarv.
- 17. apríl 2002 minnir Fróðskaparsetrið (D, rektari) Lønardeildina á skrivið 7. mars 2002.
- 23. mai 2002 ringdi D til J, aðalstjóra fyri at minna á skrivið 17. apríl. J segði, at Lønardeildin hevði havt sera nógv at gera, men at svar fór at koma heilt skjótt.
- 21. aug. 2002 rykkir Fróðskaparsetrið (D, rektari) Fíggjarmálaráðið (J, aðalstjóra) eftir svari uppá skriv teirra.
- 20. sept. 2002 rykkir Fróðskaparsetrið (D, rektari) aftur Fíggjarmálaráðið (J, aðalstjóra) eftir svari uppá skriv teirra.
- 23. okt. 2002 rykkir Fróðskaparsetrið (D, rektari) aftur Fíggjarmálaráðið (J, aðalstjóra) eftir svari uppá skriv teirra. Hótt verður við at fara til umboðsmannin, um svar ikki er komið 15. nov. 2002.
- 15. nov. 2002 ringdi eitt starvsfólk á Lønardeildini til Fróðskaparsetrið við boðum frá aðalstjóranum, at tað ikki hevði borið til at svarað Fróðskaparsetrinum, tí at ein fulltrúi hevði verið sjúkur ta vikuna. Sagt varð, at svar fór at koma í næstu viku.
- 20. des. 2002 sendir Lønardeildin Mentamálaráðnum og Magistarafelagnum fráboðan um, at hildið verður fast við avgerðina frá 12. juli 1999.

## Partshoyringin

Við skrivi, dagfest 29. nov. 2002 bað umboðsmaðurin Fíggjarmálaráðið um at greiða honum frá, hví viðgerðin av hesum málinum hevði tikið so drúgva tíð.

Við skrivi, dagfest 20. des. 2002 hevur Fíggjarmálaráðið svarað umboðsmanninum soleiðis:

> „Umboðsmaðurin hevur í skrivi dagfest 29. november í 2002 sent Fíggjarmálaráðnum mál um klagu frá Fróðskaparsetri Føroya. Klagað er um viðgerðartíðina hjá Fíggjarmálaráðnum (Lønardeildini) í málinum um at áseta lønina í setursskrivarastarvinum.
>
> **Mannagongd, tá ið starv verður flokkað**
>
> Í 1997 varð mannagongdin í sambandi við at seta fólk í starv og geva boð um at gjalda løn broytt nógv. Stovnurin setur sjálvur sáttmálasettu størvini og avgreiðir fastar gjaldsordrar. Eisini skipanin við at normera størv á fíggjarlógini varð avtikin.
>
> Hereftir kann stovnurin sjálvur seta vanlig størv, sum eru „reint eftir sáttmála", men størv sum skulu verða flokkað ella sum krevja serliga innplasering, skal Fíggjarmálaráðið góðkenna. Hetta er ásett í skrivum frá 31.07.96 og 20.12.96.
>
> Harumframt er normeringsskipanin galdandi fyri tænastumannastørvini og øll størv, har lønin samsvarar við 36. lønarflokk hjá tænastumonnum ella hægri. Tað er tó ikki løgtingið, men Fíggjarmálaráðið, sambært játtanarskipanini (pkt. 5.2.1.1), sum skal normera hesi størv.
>
> Viðv. størvum í 36. lønarflokki ella hægri, skal harumframt Løgmansskrivstovan góðkenna normeringina.
>
> Harumframt er ein meiri almenn vegleiðing um flokkingar og umflokkingar, *LD Vegleiðing 1999-7 um flokkingar og umflokkingar.* Í henni er ásett, at tá ið eitt nýtt starv á einum stovni skal verða flokkað ella eitt starv skal verða umflokkað, sendir stovnurin umsókn til aðalráðið, ið stovnurin hoyrir til. Heldur aðalráðið grundarlag vera fyri umsóknini, sendir aðalráðið umsóknina og eitt tilmæli til Lønardeildina í Fíggjarmálastýrinum. Lønardeildin viðger síðani umsóknina, og setir seg í samband við viðkomandi

fakfelag fyri at áseta endaligu flokkingina. Flokkingarspurningurin verður vanliga viðgjørdur millum Fíggjarmálaráðið og fakfelagið. Tá ið støða verður tikin til flokkingina, verður hugt at starvsinnihaldinum og ikki at eginleikunum hjá starvfólkinum, sum evt. skal røkja starvið. Einstaka starvsfólkið er ikki partur í viðgerðini í Fíggjarmálaráðnum.

Verður ikki semja um flokkingina, verður í flestu førum ásetingin hjá Fíggjarmálaráðnum galdandi. Er hitt aðalstýrið ósamt í ásetingini hjá Fíggjarmálaráðnum, kann spurningurin verða tikin upp millum landsstýrismenninar, sum vara av økinum, eins og í øðrum málum, har ósemja er millum myndugleikarnar.

Tá ið akademisk deildarleiðarastarv verða flokkað, verður fyrst staðfest, um talan er um leiðarastarv. Ávís leiðsla kann vera í fulltrúastarvi, og talan er kortini ikki um deildarleiðarastarv. Staðfest verður eisini, hvussu stórur partur av arbeiðstíðini fer til at leiða. Tað verður gjørt, áðrenn støða verður tikin til, hvussu starvið skal verða flokkað.

Fyri akademisk deildarleiðarastørv verður samanborið við líknandi størv. Tá verður í høvuðsheitum hugt at størvum, sum eru lønt eftir Magistarafelag Føroya, Føroya Verkfrøðingafelag, Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya og tænastumonnum landsins.

**Gongdin í málinum um setursskrivaran**

Málið varð reist fyrstu ferð síðst í 1997. A, rektari, boðaði frá, at setursráðið hevði samtykt, at varasetursskrivarin tekur við sum setursskrivari, t.e. fyrisitingarstjóri á stovninum. Hann tekur undir við, at starvið verður flokkað í 36. lønarflokki.

Mentamálastýrið tók ikki undir við tí, men mælti til 35. lønarflokk.

Fyri at flokka starvið, bað Lønardeildin 20. apríl í 1998 Undirvísingar- og Mentamálastýrið um starvslýsing. Spurt varð eisini, hvussu uppgávurnar vórðu loystar, áðrenn seinastu starvssetan í 1997. Í tíðini, meðan bíðað varð eftir tí, sendi C, sum nú var vorðin rektari, skriv dagfest 12. oktober í 1998, har mælt verður til, at starvið verður flokkað í 36. lønarflokki.

Fróðskaparsetur Føroya sendir 29. oktober í 1998 Gjaldstovuni

boð um at rinda setursskrivaranum løn samsvarandi 36. lønarflokki hjá tænastumonnum landsins. Tað skuldi hava gildi frá 1. januar í 1998. Hetta varð steðgað, áðrenn goldið varð.

28. januar í 1999 sendir Undirvísingar- og Mentamálastýrið Fíggjarmálastýrinum skriv, har hildið verður til 35. lønarflokk. Ynskið hjá setursskrivaranum og stovninum um setan í 36. ella 37. lønarflokki kann ikki verða góðtikin. Grundgevingarnar eru, at talan er ikki um nýtt starv, starvið er undir rektaraembætinum og kann tí ikki roknast sum stjórastarv við fullari ábyrgd, innihaldið er ikki mundandi broytt samanborið við fyrru setanina og fíggjarliga ábyrgdin talar ikki fyri hægri normering.

2. februar í 1999 biður Lønardeildin Undirvísingar- og Mentamálaráðið aftur um starvslýsing og hvussu uppgávurnar fyrr eru loystar.

18. mars í 1999 sendir Undirvísingar- og Mentamálastýrinum starvslýsing.

12. juli í 1999 sendir Lønardeildin Fróðskaparsetur Føroya og Undirvísingar- og Mentamálastýrinum skriv, har ásett er, at starvið skal verða flokkað sum deildarleiðarastarv eftir viðkomandi sáttmála. Verður magistari settur, skal starvið verða lønt sum deildarleiðari á Fróðskaparsetri Føroya (t.e. uml. 1200 kr. meiri enn vanligur deildarleiðari). Verður BLF'ari settur, skal starvið verða flokkað sum deildarleiðari I. Tað skal tó verða gjørt í samráði við felagið. Verður verkfrøðingur settur, skal viðbótin vera á sama stigi.

23. august í 1999 sendir Fróðskaparsetur Føroya Lønardeildini uppskot til lýsing eftir fyrisitingarstjóra. Í lýsingini stendur, at starvið verður lønt eftir sáttmála við avvarandi felag.

21. september í 1999 skrivar Lønardeildin til Fróðskaparsetur Føroya, at starvsheitið skal ikki vera fyrisitingarstjóri, men setursskrivari.

20. oktober í 1999 skrivar Fróðskaparsetur Føroya, at setursskrivarin er umsitingarligur stovnsleiðari. Í lógini stendur, at „rektaranum til handar er fyrisiting við setursskrivara á odda“, so setursskrivarin er leiðari. Tá ið K sat í starvinum, var hon flokkað sum stovnsleiðari í Starvsmannafelagnum. Verður starvið nú deildarleiðari, er talan um degradering. Deildarleiðari er ikki røtt

innskipan. Setursskrivstovan er ikki deild, men miðfyrisiting á Fróðskaparsetrinum. Starvið er leiðslustarv og skal verða lønt hareftir.

10. desember í 1999 sendir Fróðskaparsetur Føroya gjaldsordra til Gjaldstovuna, at gjalda 30.000 kr. aconto til setursskrivaran.

15. desember í 1999 skrivar Lønardeildin til Fróðskaparsetur Føroya, at sjálvt um felagið ikki hevur góðkent flokkingina, skal acontogjald ikki verða goldið. Viðmerkt er eisini, at acontogjald má ongantíð vera hægri enn tann lønarflokking, ið Fíggjarmálastýrið hevur góðkent, í hesum førinum sum deildarleiðari samb. Magistarasáttmálanum.

17. desember í 1999 skriva Magistarafelagið og BLF til Undirvísingar- og Mentamálastýrið, at starvið skal í minsta lagi verða samsvarandi deildarleiðara II í BLF ella í Magistarasáttmálanum eftir 36. lønarflokki.

Í juni í 2000 sendir Magistarafelagið Undirvísingar- og Mentamálastýrinum skriv, har sagt verður, at felagið góðtekur, at starvið verður flokkað sum deildarleiðari á Fróðskaparsetri Føroya, men lønin skal byrja á minst 10. stigi.

28. juni í 2000 tekur Mentamálastýrið undir við tí.

13. juli í 2000 svarar Lønardeildin Mentamálastýrinum, at sáttmálin gevur heimild at geva eyka starvsaldur. Tað er tó ikki starv, sum fær eyka starvsaldur, men fólk. At flokka eitt starv við hægri starvsaldri, verður ikki tikið undir við.

19. januar í 2001 skrivar rektarin, D, enn einaferð, at talan er um fyrisitingarstjórastarv. Ikki minni, nú nýggjar roknskaparreglugerðir verða settar í verk, har stovnsleiðarar fáa enn størri ábyrgd í sambandi við fíggjarstýring og eftirlit. Rektarin er, umframt stovnsleiðari, eisini vísindastarvsfólk. Fyri at røkja tær skyldurnar er neyðugt, at setursskrivarin fær heimild til nýggju uppgávurnar. Tað ber bara til, um starvið verður lønt samsvarandi, t.e. sum fyrisitingarstjóri.

23. november í 2001 skrivar Magistarafelagið, at sum felagið og Fróðskaparsetur Føroya fleiri ferðir hava víst á, er talan um stjórastarv. Felagið kann ikki góðtaka, at tað ikki verður lønt samsvarandi deildarstjórastørvunum í aðalstýrunum ella stjórunum á Landsbókasavninum, Fjarskiftiseftirlitinum og Bileftirlitinum. Tað

vísir vantandi innlit og vantandi virðing fyri eini framtíðar menning av føroyska granskingarumhvørvinum. Starvið skal verða flokkað sum stovnsleiðararnir á Náttúrugripasavninum, Landsskjalasavninum og Fornminnissavninum. Tað svarar til 37. lønarflokk hjá tænastumonnum landsins.

12. desember í 2001 biður rektarin partarnar vísa setrinum ta virðing, at fáa málið loyst sum allar skjótast. Rektarin tekur fult undir við tilmælinum hjá fyrra rektaranum. Fyrru rektararnir hava mælt til 36. lønarflokk.

Fróðskaparsetur Føroya hevur síðani í apríl í 2002 fleiri ferðir víst á, at setursráðið, sum er ovasti myndugleiki á Fróðskaparsetrinum, hevur staðfest, at tað er neyðugt at hava ein fyrisitingarstjóra við akademiskari útbúgving undir liðini á rektaranum. Sagt hevur eisini verið, at tað er ilt at skilja, hví henda avgerð hjá ovasta myndugleika á setrinum ikki kann verða fylgd, soleiðis, at starvið verður skipað samsvarandi.

Tað seinasta, sum er farið fram í málinum, er at Fíggjarmálaráðið í skrivi dagfest 20. desember í 2002 hevur boðað Magistarafelagnum frá, at hildið verður fast við, at starvið verður flokkað sum deildarleiðari á Setrinum.

**Niðurstøða**

Fíggjarmálaráðið hevur tikið avgerð í málinum. Tá ið starvslýsing og aðrir viðkomandi upplýsingar vórðu fingin til vega, ásetti Fíggjarmálaráðið í skrivi dagfest 12. juli í 1999, at starvið skal verða flokkað sum deildarleiðari eftir viðkomandi sáttmála.

Mentamálaráðið hevur tá mælt til, at starvið verður flokkað í 35. lønarflokki hjá tænastumonnum landsins. Fíggjarmálaráðið hevur ikki tikið undir við tí, tí endalønin hjá akademiskum deildarleiðara er væl hægri enn endaløn í 35. lønarflokki. Hetta er ikki í tráð við teir relevantu sáttmálarnar og hildið hevur eisini verið, at rættari er at halda fast við flokkingarskipanina, sum er í sáttmálanum og ikki fara yvir í flokkingarskipanina hjá tænastumonnum landsins.

Fíggjarmálaráðið hevur endurtikið flokkingina í skrivi dagfest 13. juli í 2000, tá ið sagt verður, at tikið verður ikki undir við, at sjálvt starvið verður flokkað við eyka starvsaldri. Flokkingin er enn einaferð endurtikin í skrivi dagfest 20. desember 2002.“

Við skrivum, dagfest 13. jan. 2003 bað umboðsmaðurin Fíggjarmálaráðið og Mentamálaráðið um at lata honum til láns øll skjølini viðvíkjandi hesum málinum. Samstundis vóru viðmerkingarnar frá Fíggjarmálaráðnum sendar Fróðskaparsetrinum til ummælis.

Umboðsmaðurin móttók skjølini frá ávikavist Fíggjarmálaráðnum og Mentamálaráðnum tann 27. og 30. jan. 2003.

Við skrivi, dagfest 29. jan. 2003 hevur Fróðskaparsetur Føroya sent umboðsmanninum hesar viðmerkingarnar til málið:

„Vísandi til bræv tykkara dagfest 13. januar 2003, vil eg vegna Fróðskaparsetrið gera nakrar viðmerkingar til skrivið frá Fíggjarmálaráðnum, sum var hjálagt.

Lýsingina av gongdini í málinum hava vit ongar viðmerkingar til, men vísa til skjølini, sum vit sendu við okkara kæru.

Tað, sum vit hefta okkum við í lýsingini frá Fíggjarmálaráðnum, eru staðfestingarnar av, at Lønardeildin í fleiri umførum sigst hava ásett, hvussu starvið skal flokkast, og harvið avgreitt málið, sí m.a. s. *4,* næstseinasta reglubrot. Á s. 2, r. 4 verður beinleiðis sagt, at: *„Verður ikki semja um flokkingina, verður í flestu førum ásetingin hjá Fíggjarmálaráðnum galdandi“* Tað er júst henda fatan av málinum, sum eftir okkara tykki er trupulleikin. Tað eru tveir partar í málinum og hin parturin í málinum, sum er fakfeløgini Magistarafelag Føroya og Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya, hevur alla tíðina verið ósamdur við Lønardeildini um hvussu starvið skal flokkast. Feløgini hava skrivliga boðað Fróðskaparsetrinum frá, at flokkingin ikki kann góðkennast. Úrslitið hevur verið, at vit ikki hava kunna lýst starvið leyst, tíansheldur sett eitt fólk formliga í starv.

Eftir at hava rykt Fíggjarmálaráðið, sum er kærumyndugleiki hjá Lønardeildini, hava vit ikki sæð okkum annan møguleika enn at kæra til Løgtingsins umboðsmann. Tað er sera harmiligt at tað ikki ber til hjá sáttmálapørtunum at finna eina semju um málið, sum hevur verið til viðgerðar millum partarnar fleiri ferðir. Vit halda hetta málið undirstrika, at tað er stórur tørvur á einum organi, sum kann skera ígjøgnum í slíkum málum, sum eru so týðandi fyri møguleikan hjá almennu stovnunum at fáa skikkað starvsfólk og bjóða teimum virðilig kor.

> V.v. hvørja hugsan leiðslan á Fróðskaparsetrinum hevur til flokking av starvinum, skal verða gjørt vart við, at vit eru fullgreið um, at vit ongan myndugleika hava at flokka størv. Hinvegin halda vit, at vit hava skyldu til at kunna um okkara meting av starvinum. Leiðslan hevur fleiri ferðir gjørt partarnar varar við, at hon metir starvið vera eitt leiðarastarv og ikki deildarleiðarastarv, og at hon tí ynskir, at tað skal verða flokkað sum eitt leiðarastarv. Avgera partarnir nakað annað, taka vit hetta sjálvandi til eftirtektar."

Í skrivum til Fróðskaparsetur Føroya og Fíggjarmálaráðið, dagfest 12. febr. 2003 boðaði umboðsmaðurin frá, at hann vísandi til § 6, stk. 2 í Umboðsmanslógini ikki kundi viðgera klaguna við atliti at viðurskiftunum, sum lógu frammanundan 1. jan. 2001, tí at hesi viðurskiftini vóru avgreidd við ávegis tiknum avgerðum frá Fíggjarmálaráðnum. Umboðsmaðurin er tí avskorðin frá at viðgera hetta tíðarskeiðið. Umboðsmaðurin boðaði samstundis frá, at hann fór at viðgera klaguna við atliti at gongdini frá tí, at Fróðskaparsetrið vendi sær til Fíggjarmálaráðið við skrivi, dagfest 19. jan. 2001.

Í skrivinum frá umboðsmanninum til Fíggjarmálaráðið stendur m.a.:

> „Eg fari tí at biðja Fíggjarmálaráðið um at gera viðmerkingar til hendan partin av málsviðgerðini og viðgerðartíðini. Eg fari í hesum sambandi at biðja Fíggjarmálaráðið greiða mær frá, hví Fíggjarmálaráðið hóast:
> - skrivini frá Fróðskaparsetrinum, dagfest ávikavist 19. jan. 2001, 12. des. 2001, 7. mars 2002, 14. apríl 2002 og
> - áminningarnar, dagfestar 23. mai, 21. aug., 20. sept. og 23. okt. 2002, umframt
> - skrivini frá Magistarafelagnum, dagfest 23. nov. 2001 og 18. jan. 2002 ikki svarar hesum, fyrr enn við skrivunum til Mentamálaráðið og Magistarafelagið, dagfest 20. des. 2002."

Viðmerkingarnar frá Fróðskaparsetrinum vórðu samstundis sendar Fíggjarmálaráðnum til ummælis.

Við skrivi, dagfest 12. mars 2003 hevur Fíggjarmálaráðið latið umboðsmanninum hesar viðmerkingarnar:

„Løgtingsins Umboðsmaður hevur í skrivi dagfest 12. februar 2003 biðið um viðmerkingar frá Fíggjarmálaráðnum viðvíkjandi málsgongdini í málinum um at flokka setursskrivarastarvið.

Fíggjarmálaráðið hevur sæð málið sum avgreitt, bæði mótvegis Mentamálaráðnum og felagnum. Viðmerkjast skal eisini, at sáttmálarnir við Magistarafelagið og BLF longu hava ásetingar um deildarleiðarastørv, og tí skal ikki gerast serstøk semja, hvørjaferð eitt nýtt deildarleiðarastarv verður skipað. Um feløgini er ónøgd við hvussu deildarleiðarastørv eru flokkaði, hoyrir tílíkt undir vanligar sáttmálasamráðingar. Fíggjarmálaráðið hevur heldur ikki fingið nakra formliga fráboðan frá nøkrum fakfelag um at tað blokerar setursskrivarastarvið, og dugir heldur ikki at síggja, at feløgini lógliga kunnu skipað tílíka blokadu.

Fíggjarmálaráðið samskiftir vanliga ikki við stovnin sjálvan, tá ið starv verður flokkað ella umflokkað. Í vegleiðingini um flokkingar og umflokkingar, dagfest 16. juli í 1999, stendur m.a. í pkt. 3 „at umsókn um flokking/umflokking skal verða send til aðalráðið, ið stovnurin hoyrir til". Heldur aðalráðið grundarlag vera fyri umsóknini, sendir aðalráðið umsóknina og eitt tilmæli til Lønardeildina í Fíggjarmálaráðnum.

Um stovnurin er ónøgdur við eina umflokking sum Fíggjarmálaráðið hevur ásett, er vanliga mannagongdin, at stovnurin vendir sær til sítt aðalráð, sum í øðrum málum, tá ósemjur eru millum stovnar, og kann í síðsta umfari endað við at verða tikið upp av landsstýrismonnunum.

Felagið vendir sær til Fíggjarmálaráðið í eini tíð, har arbeiðstrýstið er stórt og meginparturin av arbeiðsmegini á Lønardeildini verður brúktur til sáttmálasamráðingar. Tá er neyðugt at raðfesta málini, og summi mál bíða longri. Mál, sum Fíggjarmálaráðið longu hevur avgreitt einaferð, eru tey, sum oftast verða raðfest seinast, um einki nýtt er í málinum.

Fróðskaparsetríð átti tó at hava fingið eina fráboðan um, at tað skuldi venda sær til sítt aðalráð við málinum beinanvegin. At ein tílík fráboðan ikki varð send, er harmuligt. Innanhýsis mannagongdir eru nú broyttar, so tílíkt vónandi ikki kemur fyri aftur."

Við skrivi, dagfest 17. mars 2003 vórðu viðmerkingarnar frá Fíggjarmálaráðnum sendar Fróðskaparsetri Føroya til ummælis.

Við skrivi, dagfest 2. apríl 2003 hevur Fróðskaparsetur Føroya sent umboðsmanninum hesar viðmerkingarnar:

> „Tann 19. mars í ár hava vit fingið viðmerkingar frá Fíggjarmálaráðnum til málið um flokking av seturskrivarastarvinum.
>
> Okkara viðmerkingar eru hesar:
> Fróðskaparsetrið hevur fleiri ferðir gjørt vart við, at málið snýr seg um eitt stjórastarv, ikki eitt deildarleiðarastarv.
>
> Trupulleikin hjá Fróðskaparsetrinum er, at semja er ikki um flokkingina. Hóast Fíggjarmálaráðið metir seg hava viðgjørt málið til fulnar, kann Fróðskaparsetrið ikki lýsa starvið leyst, tí Magistarafelagið góðtekur ikki, at starvið verður flokkað sum eitt deildarleiðarastarv. Magistarafelagið hevur gjørt Lønardeildina vart við hetta í brævi dagfest 23. november 2001, sum er lagt við her.
>
> Harafturat hevur landsgrannskoðarin átalað, at starvið ikki er sett.“

Við skrivi, dagfest 3. apríl 2003 vórðu viðmerkingarnar frá Fróðskaparsetri Føroya sendar Fíggjarmálaráðnum til ummælis.

Við skrivi, dagfest 16. apríl 2003 hevur Fíggjarmálaráðið sent umboðsmanninum hesar viðmerkingarnar:

> „Løgtingsins Umboðsmaður hevur í skrivi dagfest 3. apríl í 2003 sent Fíggjarmálaráðnum skriv frá Fróðskaparsetri Føroya at ummæla.
>
> Fróðskaparsetur Føroya vísir á, at tað fleiri ferðir hevur gjørt vart við, at málið snýr seg um eitt stjórastarv, ikki eitt deildarleiðarastarv. Í skrivinum, Fíggjarmálaráðið sendi Umboðsmanninum 20. desember í 2002 er víst á undir gongdini í málinum, at Undirvísingar- og Mentamálaráðið hevur víst hesum aftur í skrivi dagfest 28. januar í 1999. Talan er ikki um nýtt starv, starvið er undir rektaraembætinum og kann tí ikki verða roknað sum stjórastarv við fullari ábyrgd, innihaldið er ikki mundandi broytt samanborið við fyrru setanina og fíggjarliga ábyrgdin talar ikki fyri hægri normering.

Fíggjarmálaráðið hevur í skrivi dagfest 12. juli í 1999 flokkað starvið sum deildarleiðarastarv. Fíggjarmálaráðið hevur seinast, í skrivi dagfest 20. desember í 2002, boðað frá, at hildið verður fast við, at starvið verður flokkað sum deildarleiðarastarv. Grundgevingin í skrivinum frá Fíggjarmálaráðnum er, at setursskrivarin er deildarleiðari á setursskrivstovuni. Rektarin hevur eisini í skrivi dagfest 19. januar í 2001 gjørt vart við, at tað er rektarin, og ikki setursskrivarin, sum er stovnsleiðari. Setursskrivarin hevur sostatt ein stovnsleiðara yvir sær. Hann kann tí ikki verða roknaður sum stjóri við fullari ábyrgd og kann tí heldur ikki verða samanborin við stovnsleiðarar eftir sáttmálanum við Magistarafelagið. Tá ið hugt verður at leiðsluni, verður hugt at størvum, sum beinleiðis hava við sjálva arbeiðsleiðsluna at gera, og sum eru ájavnt við viðkomandi leiðara. Fíggjarmálaráðið hevur víst á, at tað heldur ikki, at talan er um fakliga so tunga leiðslu, at tað er grundarlag fyri at flokka starvið annaðleiðis enn sum deildarleiðara.

Setrið vísir eisini á, at tað kann ikki lýsa starvið leyst, tí Magistarafelagið góðtekur ikki, at starvið verður flokkað sum eitt deildarleiðarastarv. Í sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðíð og Magistarafelagið er ikki ásett, at sáttmálapartarnir skulu góðtaka lýsingar. Í § 2, stk. 2 er ásett, at leys størv, sum sett skulu verða eftir sáttmálanum, skulu verða lýst leys alment. Tilskilað skal verða, hvat starvið fatar um, hvør útbúgving krevst og hvør lønin er. Tað stendur ikki, at partarnir skulu góðtaka lýsingina, so starvið kundi verið lýst leyst. Deildarleiðarastørv eru eisini longu flokkað í sáttmálanum og tí er ikki neyðugt við nýggjari semju við Magistarafelagið hvørja ferð eitt deildarleiðarastarv verður skipað.“

Við skrivi, dagfest 29. apríl 2003 boðaði umboðsmaðurin pørtunum frá, at klagan nú bleiv tikin upp til endaliga viðgerð. Samstundis vórðu seinastu viðmerkingarnar frá Fíggjarmálaráðnum sendar Fróðskaparsetri Føroya til kunningar.

## *Niðurstøða*

*Umboðsmanslógin fekk gildi 1. januar 2001, og sambært § 6, stk. 2 í lógini kann umboðsmaðurin ikki viðgera viðurskifti, sum hava átt sær*

*stað meira enn 1 ár frammanundan, at klagað verður um tey. Er talan um avgerðir, verður hendan freistin roknað frá tí degi, avgerðin er tikin.*

*Eins og fráboðað pørtunum í skrivi, dagfest 12. febr. 2003, fari eg tí bert at viðgera málsgongdina frá tí, at Fróðskaparsetrið í skrivinum, dagfest 19. januar 2001 heitti á Fíggjarmálaráðið um at taka málið til nýggja viðgerð. Fróðskaparsetrið fær einki aftursvar uppá skrivið, og slakar 11 mðr. seinni, 12. des. 2001 sendir Fróðskaparsetrið enn eina áheitan á Fíggjarmálaráðið um at finna eina loysn á málinum. Ein áheitan, sum ikki verður svarað fyrr enn við skrivinum til Mentamálaráðið tann 20. des. 2002, tvs. aftaná, at eg eri komin inn í málið. Av skjølunum í málinum framgongur, at Lønardeildin viðger málið av nýggjum í jan. 2002. Av einum innanhýsis notati, dagfest 24. jan. 2002 framgongur, at spurningurin er lagdur fyri landsstýrismannin til støðutakan. Sambært notatinum hevur hesin góðkent, at starvið verður flokkað í 36. flokki, men avgerð hansara sæst ikki at verða førd út í lívið.*

*7. mars 2002 heitti Fróðskaparsetrið aftur á Fíggjarmálaráðið um at fáa starvið flokkað sum stjórastarv. Tá einki frættist, minti Fróðskaparsetrið aftur á málið 17. apríl 2002, men til fánýtis.*

*23. mai 2002 ringdi rektarin til aðalstjóran, sum greiddi frá, at Lønardeildin hevði havt sera nógv at gera, men at svar fór at koma heilt skjótt. Hetta lyfti aðalstjórans verður tó ikki hildið. Fróðskaparsetrið rykkir tí aftur í trimum umførum, ávikavist 21. aug., 20. sept. og 23. okt. 2002. Í seinasta skrivinum krevur Fróðskaparsetrið at fáa svar innan 15. nov., men hetta eydnast heldur ikki. Eitt starvsfólk á Lønardeildini hevur hendan dagin ringt til Fróðskaparsetrið og boðað frá, at tað ikki hevur verið møguligt at svarað Fróðskaparsetrinum, tí at ein fulltrúi hevur verið sjúkur ta vikuna. Lovað verður, at svar kemur í næstu vikuni, men ikki fyrr enn við skrivi, dagfest 20. des. 2002 boðaði Lønardeildin Mentamálaráðnum og Magistarafelagnum frá, at hildið varð fast við avgerðina frá 12. juli 1999.*

*Viðvíkjandi málsviðgerðartíðini, haldi eg tað vera átaluvert, at tað hevur tikið 1 ár 11 mánaðar at avgreiða umsóknina frá 19. januar 2001, serliga tá hugsað verður um, at málið hevur verið viðgjørt fyrr. Tað átti ikki at tikið so langa tíð at mett um tær broyttu fortreytirnar fyri hesari umsóknini, sum Fróðskaparsetrið hevur víst á. Tað er tí ikki nøktandi og átaluvert, at umsóknin frá 19. jan. 2001 ikki verður avgreidd fyrr enn 20. des. 2002.*

*Harumframt haldi eg tað vera átaluvert, at Fróðskaparsetrið ikki fær svar uppá skrivini í mars og apríl 2002, serliga tá havt verður í huga, at aðalstjórin í mai 2002 lovar Fróðskaparsetrinum svar, men at hetta ongantíð verður sent teimum, heldur ikki aftaná øll áminningarskrivini á sumri/heysti 2002.*

*Tað er óivað rætt, tá Fíggjarmálaráðið sendir Mentamálaráðnum avgerðina, tá hendan umsíðir kemur. Men havandi í huga øll áminningarskrivini, og at umsóknin kemur frá Fróðskaparsetrinum og ikki Mentamálaráðnum, er tað als ikki nøktandi, at Fróðskaparsetrið ikki fær svar frá Fíggjarmálaráðnum. Tað ger í hesum sambandi ongan mun, at mannagongdin, eins og Fíggjarmálaráðið hevur víst á, vanliga er tann, at stovnurin sendir umsókn til avvarðandi aðalráð, sum síðani vendir sær til Fíggjarmálaráðið. Hóast umsóknin eins og í hesum førinum kemur frá stovninum, skal hendan svarast.*

*Í skrivinum til mín, dagfest 12. mars 2003 sigur Fíggjarmálaráðið, at innanhýsis mannagongdirnar nú eru broyttar soleiðis, at tílíkt vónandi ikki kemur fyri aftur. Hesum kann eg ikki annað enn taka undir við.*

*Viðvíkjandi innihaldinum í avgerðini frá Fíggjarmálaráðnum havi eg einki at finnast at, serliga tá avvarðandi aðalráð, Mentamálaráðið heldur ikki tekur undir við nýggju áheitanini frá Fróðskaparsetrinum um at løna starvið í 36. flokki.*

*Burtursæð frá at geva Fíggjarmálaráðnum átalur fyri ikki at svara umsóknunum og áminningunum frá Fróðskaparsetrinum, geri eg ikki meira við hetta málið.*

# 11. Innlit

## 11.1. Klaga um vantandi svar frá Fiskimálaráðnum uppá umsókn um alment innlit

*Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu frá A um eina innlitsumbøn, sum hann hevði sent Fiskimálaráðnum. Umsóknin var móttikin í Fiskimálaráðnum 7. mars 2003, og 19. mars boðaði Fiskimálaráðið A frá, at hann fór at fáa innlit í málið, men síðani hendi ikki meira. A rykti eftir málinum 29. apríl og 26. mai, men hóast hetta, vóru skjølini ikki send honum fyrr enn 2. okt. 2003.*

*Umboðsmaðurin hevur givið Fiskimálaráðnum eina átalu fyri ikki at hava hildið ásetingarnar í § 16, stk. 2 í Innlitslógini, tá svar varð sent A 19. mars. Somuleiðis hevur umboðsmaðurin givið Fiskimálaráðnum eina álvarsliga átalu fyri tað eftirfylgjandi handfaringina av hesum málinum. (J.nr. 200300059)*

### Klagan

A hevur sent umboðsmanninum eina klagu í sambandi við eina umsókn um alment innlit, sum hann hevði sent Fiskimálaráðnum, men sum framvegis ikki var avgreidd, tá klagan bleiv send umboðsmanninum. Klagan, sum er dagfest 28. aug. 2003, er soljóðandi:

> „Undirritaði vil við hesum klaga um tað viðgerð ein umsókn til Fiskimálaráðið um alment innlit í fyrisitingina hevur fingið.
>
> **Gongdin í málinum er henda:**
>
> Tann 5. mars 2003 søkti eg um innlit í tilfar, sum eftir øllum at døma kann hava havt stóran týdning fyri avgerðir, sum tiknar eru í Fiskimálaráðnum, og harvið eisini stóran týdning fyri tær politisku avleiðingar, hesar avgerðir seinni fingu. (Sí skjal 1).
>
> Eg hoyrdi ikki aftur frá Fiskimálaráðnum áðrenn freistin at svara tílíkari umsókn var farin.
>
> Men 19. mars fekk eg svar gjøgnum teldupost. B, fulltrúi, boðaði tá frá, at eg skuldi fáa innlit í málið, sum eg bað um, men at svarið var eitt sindur seinkað. (Sí skjal 2).

Tann 29. apríl hevði eg framvegis einki tilfar fingið. Eg minti tí B á mína umsókn, og heitti á hann um at avgreiða málið sum skjótast (Sí skjal 3).

B svaraði dagin eftir (30. apríl), at hann skuldi viðgera mína umsókn skjótast gjørligt (Sí skjal 4).

26. mai hevði eg framvegis einki svar fingið, og bað tí enn eina ferð um at fáa svar beinan vegin. Eg læt í tí sambandi B vita, at eg hugsaði um at lata Umboðsmannin meta um málið. (Sí skjal 5). Dagin eftir fekk eg aftur tað svar, at umsóknin skuldi viðgerast beinan vegin, og at eg skuldi fáa svar „í seinasta lagi hósdagin". (Sí skjal 6)

Nú er 28. august, og eg havi framvegis einki svar fingið.

Tað eru trý viðurskifti, eg við hesum vil klaga um:

1) Eg haldi ikki, at fyristingin hevur hildið tær tíðarfreistir fyri svari, sum hon skal halda.
2) Eg haldi tað ikki vera rætt, at fyrisitingin fleiri ferðir lovar mær at fáa tilfar, sum eg ikki fái kortini.
3) Eg haldi tað ikki vera rætt, at eg ikki fái innlit í tilfarið, sum eg havi søkt um innlit í. At hetta tilfar er umrøtt í eini almennari frágreiðing hjá einum kanningarstjóra, settum av Landsstýrismálanevndini, meti eg ger, at eg havi rætt til innlit. At tilfarið eftir mongum at døma hevur havt týdning fyri eina málsviðgerð í Fiskimálaráðnum, sum fekk álvarsamar politiskar avleiðingar, meti eg styrkir mín rætt til innlit. Og at Fiskimálaráðið í svari til mín 19. mars 2003 (skjal 2) sigur, at eg skal fáa innlit í málið, haldi eg styrkir enn meira um mín rætt til innlit.

Eg fari at heita á Umboðsmannin um at meta um alt hetta, og at taka tey stig, hann heldur vera neyðug."

Innlitsumbønin frá A er soljóðandi:

**„Umsókn um alment innlit í fyrisitingina**

Í 13. desember 2002 læt C løgtinginum kanningina „Hevur fyrisitingin við umlegging av lánum v.m. hjá fjarfiskiflotanum

eftir løgtingslóg nr. 26 frá 14. mars 1997 verið útint á lógligan hátt?“, har advokaturin svaraði átta spurningum, settum av løgtingsformanninum.

Í einum broti úr svarinum uppá spurning nr. 8 í sambandi við Høgafoss (síða 24 í kanningini), skrivar kanningarstjórin soleiðis:

> „Landsstýrismaðurin hevur evstu ábyrgdina av umsitingini. Í hesum máli hevur landsstýrismaðurin eisini váttað, at hann var vitandi um hesa avgerð. Trýstið á landsstýrið var stórt, framgongur í hesum máli, sum gjørdist sera drúgt. Umsóknin var frá 1. apríl 1998, men endaliga tilsøgnin varð ikki givin fyrrenn 7. febr. 2000. Nógv brævaskifti hevur verið, herundir eisini brøv, stílað beinleiðis til ovastu leiðsluna í Fiskimálaráðnum og til landsstýrismannin sjálvan.“
>
> Sambært tí, ið fram er komið, kann nevnda brævaskiftið hava havt týdning fyri tær avgerðir, sum tiknar vórðu, og sostatt eisini týdning fyri tær politisku avleiðingar, hetta mál fekk.
>
> Brævaskiftið hevur sostatt almennan áhuga.
>
> Vísandi til lógina um alment innlit í fyrisitingina, vil undirritaði, sum starvast sum blaðmaður á …, við hesum søkja um innlit í nevnda brævaskifti.
>
> Brævaskifti skal sendast til hesa adressu: …“

## Partshoyring

Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna hesa klaguna nærri. Við skrivi, dagfest 1. sept. 2003, varð klagan send Fiskimálaráðnum til ummælis, eins og umboðsmaðurin bað um at fáa øll skjølini í málinum til láns.

Við skrivi, dagfest 2. okt. 2003, hevur Fiskimálaráðið sent umboðsmanninum skjølini í málinum og eitt soljóðandi ummælisskriv:

> „Í sambandi við eina umbøn um alment innlit frá A verður víst til eitt reglubrot á síðu 24 í drúgvari kanning hjá C, adv., har tað verður sagt: „Landsstýrismaðurin hevur evstu ábyrgdina av umsitingini. Í hesum máli hevur landsstýrismaðurin

eisini váttað, at hann var vitandi um hesa avgerð. Trýstið á landsstýrið var stórt, framgongur í hesum máli, sum gjørdist sera drúgt. Umsóknin var frá 1. apríl 1998, men endaliga tilsøgnin varð ikki givin fyrrenn 7. februar 2000. Nógv brævaskifti hevur verið, herundir eisini brøv, stílað beinleiðis til ovastu leiðsluna í Fiskimálaráðnum og til landsstýrismannin sjálvan."

Viðkomandi blaðmaður søkjur um alment innlit í brævaskifti, sum her verður sipað til. Fiskimálaráðið hevur fyribils hesar viðmerkingar til málið:

Tað er rætt, at fyrisitingin ikki hevur hildið tær tíðarfreistir, sum løgtingslóg um alment innlit setur. Hóast tað av misgáum ikki varð svarað rættstundis uppá tað fyrstu umbønina, so átti Fiskimálaráðið at hava avgreitt umbønina, tá blaðmaðurin rykkir eftir svari.

Fiskimálaráðið hevur enn einaferð gjøgnumgingið tey skjøl, sum hava samband við tað samskifti, sum blaðmaðurin sipar til. Innlit er nú latið í hesi skjøl, og eru avrit send A í dag. Somuleiðis eru avrit skjølunum løgd saman við hesum ummæli.

Fiskimálaráðið metir tí nú sjálva umbønina frá A sum avgreidda."

Við skrivi, dagfest 9. okt. 2003 boðaði umboðsmaðurin pørtunum frá, at hann ikki helt framhaldandi partshoyringar vera neyðugar í hesum málinum, og at málið tí fór at verða tikið upp til endaliga viðgerð.

## *Niðurstøða*

*Reglurnar um alment innlit eru at finna í løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina við seinni broytingum (hereftir nevnd Innlitslógin).*

*Sambært § 4, stk. 1 í Innlitslógini kann ein og hvør við teimum undantøkum, sum ásett eru í §§ 7-14, krevja at fáa høvi til at gera seg kunnugan við skjøl, sum ein myndugleiki hevur gjørt ella móttikið sum liður í fyrisitingarligari saksviðgerð í sambandi við virksemi myndug-*

*leikans. Sambært § 4, stk. 3 í lógini skal ein innlitsáheitan skila til tey skjøl ella tað mál, sum viðkomandi ynskir at gera seg kunnugan við.*

*Sambært § 16, stk. 1 í Innlitslógini skal viðkomandi myndugleiki sum skjótast gera av, um ein innlitsáheitan kann verða gingin á møti. Um umbønin ikki er eftirlíkað ella noktað innan 10 dagar aftaná móttøkuna, skal myndugleikin sambært § 16, stk. 2 boða viðkomandi frá, um orsøkina til hetta, og nær ein avgerð væntandi verður til skjals.*

*Umsóknin frá A er sambært skjølunum í málinum móttikin í Fiskimálaráðnum 7. mars 2003. Við teldubrævi, sent 19. mars 2003, boðar Fiskimálaráðið A frá, at: „tygum fáa innlit í málið, sum biðið verður um, men at svarið tíverri er eitt sindur seinkað".*

*Hendan fráboðanin er sostatt ikki rættstundis, og lýkur hon heldur ikki í aðrar mátar treytirnar í § 16, stk. 2 í Innlitslógini, við tað at hon hvørki nevnir orsøkina til, at umbønin ikki er avgreidd innan 10 dagar, ella nær ein avgerð væntandi var til skjals. Fiskimálaráðið hevur viðurkent, at freistin ikki er hildin.*

*Eg fari í hesum sambandi at geva Fiskimálaráðnum eina átalu fyri ikki at hava hildið § 16, stk. 2 í Innlitslógini.*

*Við teldubrævi, sent 29. apr. 2003, rykkir A Fiskimálaráðið eftir málinum.*

*Við teldubrævi, sent 30. apríl 2003, svarar Fiskimálaráðið honum aftur. Málsviðgerðin biður orsaka, og sigur seg fara at viðgera umbønina skjótast gjørligt.*

*Hóast hetta, hendir framvegis einki í málinum, og er hetta á ongan hátt nøktandi. Fiskimálaráðið viðurkennir eisini í ummælinum, at umbønin átti at havt verið avgreidd, tá rykt varð eftir svari.*

*Við teldubrævi, sent 26. mai 2003, minnir A enn einaferð málsviðgerðan á málið, og at hann framvegis ikki hevur fingið tilfarið, sum honum er lovað.*

*Við teldubrævi, sent 27. mai 2003, svarar Fiskimálaráðið A. Málsviðgerðin biður enn einaferð orsaka, og at hann helt málið vera avgreitt. Hann lovar at viðgera hetta málið beinanvegin og at senda A tey skjølini, sum hann kann fáa innlit í, í seinasta lagi hósdagin, tvs. 29. mai 2003.*

*Men heldur ikki hesaferð hendi meira í málinum. Skjølini, sum A hevur biðið um innlit í, verða ikki send honum fyrr enn 2. okt. 2003, tvs. sama dagin, sum klaguummælið er sent mær.*

*Hendan framferðin hjá Fiskimálaráðnum kann als ikki góðtakast, serstakliga tá havt verður í huga, at Fiskimálaráðið tann 17. mai 2003 boðaði A frá, at hann fór at fáa innlit í málið. Eg gevi tí Fiskimálaráðnum eina álvarsliga átalu fyri handfaringina av hesum málinum.*

*Av tí, at eg meti talan vera um eitt álvarsligt brot á lóggávuna, havi eg samsvarandi ásetingini í § 10, stk. 1 í Umboðsmanslógini sent formansskapinum í Løgtinginum, løgmanni og landsstýrismanninum eitt avrit av hesum álitinum.*

*Av tí, at Fiskimálaráðið síðani hevur givið A innlit í skjølini, sum hann hevði biðið um, geri eg ikki meira við hetta málið.*

# 20. Almannamál

## 20.1. Klaga viðvíkjandi § 17 í Forsorgarlógini

*Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um eina avgerð hjá Kærunevndini í almannamálum í einum kærumáli viðvíkjandi avgerð hjá Almannastovuni um ikki at játta umsókn frá einari mammu um stuðul fyri at verða heima og ansa brekaðum barni. Umboðsmaðurin helt ikki grundarlag vera fyri at fýlast á avgerðina hjá Kærunevndini. Umboðsmaðurin ivaðist tó í, um heimild er fyri at veita slíkan stuðul sambært § 17 í Forsorgarlógini, og tí sendi hann, vísandi til § 12 í Umboðsmanslógini, Løgtinginum og landsstýrismanninum í almannamálum eitt skriv um hetta.*

*Í klaguni vórðu eisini settar fram ymiskar atfinningar viðvíkjandi málsviðgerðini; men umboðsmaðurin helt ikki grundarlag vera fyri at finnast at málsviðgerðini.*

*Úr álitinum verður bert endurgivið, tað sum er ført fram viðvíkjandi § 17 í forsorgarlógini. (J.nr.200200050)*

Í niðurstøðuni verður viðvíkjandi § 17 í forsorgarlógini ført fram:

*„Avgerðin hjá Kærunevndini eru tikin við støði í § 17 í Forsorgarlógini, ið er soljóðandi:*

*„Personer, der i hjemmet forsørger et barn med en fysisk eller psykisk lidelse, som medfører særlige udgifter ved forsørgelsen, har ret til at få dækket sådanne nødvendige merudgifter, såfremt de ikke kan dækkes gennem særforsorgens hjælpeforanstaltninger. Hjælpen er betinget af, at lægelige anvisninger med hensyn til barnets pasning m.v. følges.“*

*Eftir mínum tykki er tað sera ivasamt, um henda lógargrein heimilar at veita stuðul fyri vantandi arbeiðsmøguleikar, tí at foreldur at brekaðum barni noyðast at vera heima og passa barnið. Hinvegin er beinleiðis heimild fyri hesum í § 9 í Forsorgarlógini, sum Kærunevndin vísir til umframt § 17. Munurin á hesum greinum er tann, at tað eftir § 9 m.a. er ein treyt, at familjan vegna vantandi arbeiðsmøguleikar er avskorin frá at vinna sær nokk til lívsins uppihald. § 9 í Forsorgarlógini er soljóðandi:*

*„Når en person på grund af sygdom, svangerskab og fødsel, ophør af samlivet med ægtefællen, væntandi arbeiðsmøguleikar (ingen dansk tekst) eller andre ændringer i sine forhold i en begrænset tid er afskåret fra at skaffe det fornødne til sit eget eller familiens underhold, og udgifterne hertil ikke dækkes gennem dagpenge eller pensionsydelser, kan der ydes en sådan hjælp af det offentlige, at det modvirkes, at pågældendes og familiens hidtidige levevilkår i væsentlig grad forringes.*

*Stk. 2. Sum hjálp til uppihald verður sambært stk. 1 vanliga útgoldið í mesta lagi ein upphædd samsvarandi við fólkapensións grundupphæddina við einum ískoyti fyri hvørt barnið, samsvarandi barnaviðbótini eftir løgtingslóg um almannapensjónir. Við ásetan av hjálp má annars takast fyrilit fyri tílíkum føstum útreiðslum, sum grundaðar á livikorini higartil kunnu metast at vera rímiligar, og leggjast dentur á livikorini frameftir, sum kunnu gerast ein fylgja av tí broyting, sum er hend í støðuni hjá viðkomandi ella familjuni. Tann samlaða veitingin kann ikki fara upp um ta upphædd, sum verður útgoldin til persónar, ið fáa dagpening eftir hægsta satsi, og sum ikki hava aðrar inntøkur. Tó kann samlaði stuðulin, ið verður útgoldin persónum í sambandi við vantandi arbeiðsmøguleikar, ikki vera hægri enn hægsta gjaldið frá ALS, og viðkomandi skal ikki hava aðrar inntøkur.*

*Stk. 3. Til personer, hvis forhold er særlig vanskelige på grund af usædvanlig store forsørgerbyrder eller høje boligudgifter, kan der undtagelsesvis ydes hjælp ud over det i stk. 2 angivne beløb."*

*Eg havi í telefon umrøtt heimildarspurningin við stjóran á Kærustovninum, …, sum váttaði, at Kærunevndin hevur staðfest avgerðir um at játta stuðul eftir § 17 í Forsorgarlógini vegna vantandi arbeiðsmøguleikar, tí at tað mátti metast at vera siðvenja fyri hesum. Hon upplýsti tó eisini, at landsgrannskoðarin hevur víst á, at heimildin fyri hesum má metast at vera ivasom.*

*Eg havi síðan tosað við landsgrannskoðaran, …, sum váttaði, at hann hevur víst á sín iva um heimildina í § 17 í Forsorgarlógini í einari frágreiðing frá februar 2002. Í hesi frágreiðing stendur m.a.:*

*„7.5.6 **Veitingar sambært § 17***
*Eingin heimild er í forsorgarlógini til at áseta neyvari reglur um meirútreiðslur. Almanna- og Heilsumálastýrið hevur ikki gjørt vegleiðing fyri, hvat kemur undir meirútreiðslur sambært § 17. Almannastovan hevur innanhýsis vegleiðandi reglur, ið fyri ein stóran part eru frá 1991.*

*Ivasom heimild til endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku.*
*Ein stórur partur av útreiðslunum undir § 17 er endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku. Viðvíkjandi heimildini at endurrinda foreldrum inntøkumiss fyri at ansa brekaðum børnum heima, hevur Kærunevndin í almannamálum í fleiri førum víst á, at § 17 í forsorgarlógini, sum er galdandi í Føroyum, svarar til § 48 í donsku „bistandsloven", sum kom í gildi 1. apríl 1976. § 48, stk. 1, er orðað soleiðis:*

*„Personer, der i hjemmet forsørger et barn under 18 år med et fysisk eller psykisk handicap, kan få dækket de nødvendige merudgifter ved forsørgelsen, der er en følge af handicappet."*

*Kærunevndin hevur víst á avgerðir, sum „Den Sociale Ankestyrelse" hevur tikið. „Den Sociale Ankestyrelse" gjørdi 3. juni 1977 av, at ein kommuna hevði skyldu smb. § 48 í „bistandsloven" at veita endurgjald fyri inntøkumiss til eina kvinnu, sum síðan 1972 hevði fingið endurgjald eftir § 73 í táverandi donsku forsorgarlógini. Víst kann verða á fleiri avgerðir frá „Den Sociale Ankestyrelse", ið staðfesta, at endurgjald fyri inntøkumiss kann verða veitt smb. § 48 í „bistandsloven".*

*Vit hava í hesum sambandi víst á, at § 48 í „bistandsloven" samsvarar ikki § 17 í forsorgarlógini, sum er orðað soleiðis:*

*„Personer, der i hjemmet forsørger et barn med en fysisk eller psykisk lidelse, som medfører særlige udgifter ved forsørgelsen, har ret til at få dækket sådanne nødvendige merudgifter, såfremt de ikke kan dækkes gennem særforsorgens hjælpeforanstaltninger. Hjælpen er betinget af, at lægelige anvisninger med hensyn til barnets pasning m.v. følges."*

*§ 17 var upprunaliga § 14 A, í „lov nr. 224 fra 17. maj 1970". Í „lov nr. 246 fra 3. juni 1983" bleiv § 14A til § 17. Í viðmerkingunum til uppskotið í „lov nr. 224/1970" varð m.a. ført fram:*

*„Forslaget om at optage en regel om, at den, der i hjemmet forsørger et handicappet barn, har ret til – uden hensyn til trang – at få dækket nødvendige udgifter ved barnets forsørgelse, svarer til en nylig gennemført bestemmelse i den danske lov om offentlige forsorg. Det er ønskeligt, at et barn kan blive i sit hjem, og det er derfor rimeligt, at der kan ydes hjemmet dækning for merudgifter ved forsørgelsen.“*

*§ 17 í forsorgarlógini var orðað sum § 73 í táverandi donsku forsorgarlógini. Tað hevur helst ongantíð verið ætlanin við hesi grein, at hon skuldi fevna um endurgjald fyri inntøkumiss. Víst kann verða til fráboðan og rundskriv frá „Socialministeriet“ í 1971 og 1972:*

*„Der kunne ikke til en gift kvinde, som med henblik på pasning af en 2-årig hørehandicappet søn overgik til deltidsbeskæftigelse, ydes hjælp til dækning af indtægtsnedgang. Der kan ydes husmoderafløsning (hjemmehjælp) til lejligheds afløsning af personer, der i hjemmet passer et barn med en fysisk eller psykisk lidelse.“*

*Í frágreiðingini til „Socialministeriet“ í februar 1993 vístu vit á, soleiðis sum § 17 í forsorgarlógini var orðað, varð hildið, at siðvenjan hjá Almannastovuni at veita endurgjald fyri inntøkumiss og at løna stuðulsfólki, var ikki í tráð við lógina.“*

*Eg kann bert taka undir við sjónarmiðunum hjá landsgrannskoðaranum. Eg skal harumframt vísa á, at tað í § 9 eru greiðar reglur um upphæddirnar, sum eiga at verða útgoldnar, meðan ongar reglur hesum viðvíkjandi eru í § 17. Eftir § 17 tykist ikki at vera nakað mark fyri, hvussu stórar upphæddir kunnu latast í stuðuli fyri vantandi arbeiðsmøguleikar. Tað er sjálvandi ein politiskur spurningur, um tað er rætt og rímiligt at rinda fyri mistar arbeiðsmøguleikar sambært § 17, uttan mun til fíggjarligu viðurskiftini hjá viðkomandi. Verður hetta hildið at vera rætt, átti tað eftir mínum tykki at staðið beinleiðis í lógini.*

*Eg skal tí sambært § 12 í Umboðsmanslógini mæla Løgtinginum og avvarandi landsstýrismanni til at taka til umhugsunar eina greiðari orðing av § 17 í Forsorgarlógini, soleiðis at eingin ivi skal vera um, hvørt tað er heimild sambært hesari grein at veita stuðul fyri væntandi arbeiðsmøguleikar ella ikki.“*

*Eg skal hervið boða landsstýrismanninum í almannamálum frá niðurstøðu mínari um hesa ásetingina í Forsorgarlógini, og mæla til at lóggávan verður gjørd greiðari. Einsljóðandi skriv er sent Løgtinginum.*

Landsstýrismaðurin tók beinanvegin stig til at fáa broytt lóggávuna á hesum økinum, og við løgtingslóg nr. 82 frá 8. mai 2003 um broyting í lóg um almenna forsorg, er heimildin nú gjørd greið.

# 21. Kommunu-, umhvørvis-, byggi-/leigumál v.m.

## 21.1. Klaga um nýttu mannagongdina hjá Landsverkfrøðinginum og Vinnumálaráðnum í sambandi við ognartøku av lendi til landsveg

*A sendi í jan. 2003 umboðsmanninum eina klagu um mannagongdina hjá Landsverkfrøðinginum og Vinnumálaráðnum, tá hesir í sambandi við landsvegagerð framdu ognartøku av lendi hansara. A vísti á, at mannagongdin ikki var í samsvari við ognartøkulógina frá 1881 og Fyrisitingarlógina, m.a. tí at hann ikki í neyðugan mun var blivin kunnaður um ætlanina frammanundan ognartøkuni.*

*Umboðsmaðurin helt ikki grundarlag vera fyri at finnast at framferðini hjá Landsverkfrøðinginum og Vinnumálaráðnum í hesum málinum. ( J.nr. 200300003).*

### Klagan

A hevur sent umboðsmanninum eina klagu um mannagongdina hjá Landsverkfrøðinginum og Vinnumálaráðnum, tá ognartøka varð framd av lendi hansara til gerð av landsvegnum Lopra-Akrar. Klagan, sum er dagfest 13. jan. 2003, er soljóðandi:

„Vísandi til hjáløgdu skjøl, sum er samskifti millum undirritaða og Landsverkfrøðingin/Vinnumálaráðið, verður mannagongdin hjá fyrisitingarmynduleikanum, Landsverkfrøðinginum/Vinnumálaráðnum, í samb. við ognartøku av lendi, matr.nr. … í Sumbiar sókn, tilhoyrandi undirritaða, hervið kærd til Løgtingsins umboðsmann.

Undirritaði metir, at mannagongdin hjá Landsverkfrøðinginum/Vinnumálaráðnum ikki er í trá við Fyrisitingarlógina og ásetingarnar í lóg nr. 89 frá 7. mai 1881.

Undirritaði bleiv ikki, í neyðugan mun, kunnaður um ætlanina hjá Landsverkfrøðinginum, og fekk ikki møguleika at kæra avgerðina, so sum lógin annars ásetur.

Fyrst í november 2002 fór Landsverkfrøðingurin inn á lendið hjá undirritaða. Undirritaði hevði ikki orku til at fara til dómstólin við málinum, og bleiv stórur partur av lendinum lagdur undir grót.

Undirritaði følir seg illa viðfarnan av Landsverkfrøðinginum og Vinnumálaráðnum, og vil frá Løgtingsins umboðsmanni hava at vita, um røtt mannagongd er nýtt í hesum máli."

## Málsgongdin

Sambært skjølunum frá Landsverkfrøðinginum og Vinnumálaráðnum hevur tann málsgongdin, sum hevur týdning fyri viðgerðina av hesari klaguni, verið hendan:

- Á vári 2001 vóru ávísar fyrireikingar gjørdar til breiðking av Akravegnum. Í einum notati, dagfest 24. februar 2003 frá Landsverkfrøðinginum, deildini í Øravík stendur um gongdina at útvega lendi til vegbreiðkanina m.a.:

„31/5-2001 gav B okkum boð um at fara at tosa við eigararnar, og at gera avtalu um lendi.

19/6-2001 varð tosað við C, borgarstjóra, um ognina hjá pápabeiggja hansara, A, matr. nr. … (C brúkar sjálvur ognina).

C segði, at kann kundi svara fyri A, at teir vóru ímóti at lata lendi niðanfyri vegin til vegabreiðking, men kundi evt. lendi verið latið at breiðka niðaneftir.

C segði eisini, at hann sum borgarstjóri kundi svara fyri kommununa, at hon var ímóti at breiðka omaneftir."

- Við skrivum, dagfest 10. juli og 17. sept. 2001 heitti Sumbiar Kommuna á ávikavist Landsverkfrøðingin og Vinnumálaráðið um at broyta verkætlanina soleiðis, at vegurin ikki varð breiðkaður omaneftir, men niðaneftir.
- Við skrivi, dagfest 18. sept. 2001 heitti Landsverkfrøðingurin á Vinnumálaráðið um at ognartaka lendi til hesa vegbreiðkingina, tí at semja ikki fekst við eigararnar.
- Við skrivi, dagfest 1. oktober 2001 boðaði Vinnumálaráðið Landsverkfrøðinginum frá, at landsstýrismaðurin hevði tikið avgerð um at ognartaka øki til vegbreiðkanina. Í skrivinum stendur m.a.:

„Tey øki, ið koma undir ognartøku, eru:

Innangarðs: burturav matr.nr. …"

Hendan ognartøkuavgerðin sæst tó ikki at vera sett í verk.

- Við skrivi, dagfest 18. okt. 2001 boðaði Vinnumálaráðið Sumbiar Kommunu og Landsverkfrøðinginum frá, at vegurin ikki skuldi breiðkast niðaneftir, eins og kommunan hevði ynskt, men omaneftir, eins og Landsverkfrøðingurin hevði ætlað. Vinnumálaráðið vónaði at ein samráðingarloysn um endurgjaldsspurningin fekst við eigararnar sum skjótast.
- Við skrivi, dagfest 21. juni 2002 vendi Vinnumálaráðið sær til Landsverkfrøðingin. Skrivið er soljóðandi:

„Í sambandi við, at peningur varð játtaður á Løgtingsfíggjarlógini fyri 2001 til breiðking av Akrarvegnum, boðaði Landsverkfrøðingsstovnurin frá, at neyðugt var at ognartaka lendi, tí tað vísti seg at vera trupult at fáa semju í lag við summar jarðareigarar.

Í skrivi dagfest 18. oktober 2001 fekk Sumbiar kommuna boð um, at vegurin varð ikki breiðkaður niðaneftir, soleiðis sum kommunan ynskti. Landsstýrismaðurin boðaði samstundis frá, at hann vónaði, at tað sum skjótast fór at bera til at finna eina samráðingarloysn um kompensatión til jarðareigararnar, so tað var gjørligt at breiðka vegin omaneftir í 2001. Vinnumálaráðið fekk einki svar uppá brævið frá kommunu ella jarðareigarum, og tað eydnaðist ikki at fara undir arbeiðið í fjør. Á løgtingsfíggjarlógini fyri 2002 varð peningur aftur játtaður til endamálið.

Síðani tá hevur málið ligið stilt, og eingi atlit tykjast verða fyri, at semja fekst í lag. Fyri at tryggja, at arbeiðið kann byrja í ár, verður tí heitt á LV um at boða jarðareigarunum frá, at um semja ikki er fingin í lag innan eina ávísa freist, t.d. 4 vikur, hevur landsstýrismaðurin avgjørt at fremja neyðugu ognartøkuna.“

- Við skrivi, dagfest 10. juli 2002 boðaði Landsverkfrøðingurin A frá ætlaðu ognartøkuni, eins og eitt uppskot til semju varð sent honum. Skrivið er soljóðandi:

**„Viðv. Breiðking av vegnum á Akrar.**

Sum tygum óivað kunnugt, var ætlanin at breiðka Akravegin í fjør; men tað slapst ikki í gongd, tí tað vísti seg ikki at bera til at fáa semju við onkran av eigarunum um endurgjaldið fyri lendið.

Peningur er aftur játtaður í ár til sama endamál, og er ætlanin at fara undir hesa breiðking beint eftir summarfrítíðina, t.e. síðst í august ella fyrst í september.

Vit hava í hesum sambandi biðið landsstýrið ognartaka neyðuga lendið; men verður hildið rættast, at eigararnir enn einaferð skulu hava møguleikan at gera semju við Landsverkfrøðingin um endurgjaldsspurningin.

Tað, sum latið hevur verið í endurgjaldi seinastu árini, tá ið talan hevur verið um landbúnaðarjørð innangarðs, hevur verið 22,- kr. fyri $m^2$, umframt 2,80 kr. til hagan, sum missir grasrættindi. Hetta líkist t.d. úrskurðinum hjá landsrættinum í 1996, ið var staðfest av Hægstarætti í 1998, viðv. endurgjaldinum fyri lendið í sambandi við landsvegin Vági – Sumba.

Sostatt verður við hesum enn einaferð heitt á tygum at undirskriva hjáløgdu semju og senda okkum hana aftur í hjálagda brævbjálva. Síðan senda vit tygum peningin.

Um eitthvørt ivamál skuldi verið, kunnu tygum venda tygum til D, her á stovninum, í næstu viku (viku 29).

Um so er, at vit ikki hava fingið skjalið aftur undirskrivað ella hoyrt frá tygum innan 4 vikur frá dagfestingini av hesum skrivi, verður neyðugt at fremja nevndu ognartøku, um hetta vegastrekkið skal breiðkast í ár.“

- Við skrivi, dagfest 15. juli 2002 sendi Landsverkfrøðingurin A eina tekning yvir vegin og tað lendi, sum ætlandi skuldi ognartakast. Hetta skrivið er soljóðandi:

**„Viðv. breiðking av vegnum út á Akrar.**

Víst verður til skrivið, vit sendu tygum í síðstu viku.

Av misgávum fylgdi ongin tekning við semjuni, og verður hon tí send við hesum.

Orsakið mistakið.“

• Við skrivi til Landsverkfrøðingin, dagfest 11. sept. 2002 tók Vinnumálaráðið avgerð um at ognartaka lendið til umrødda vegin. Skrivið er soljóðandi:

**„Viðv. ognartøku av lendi til landsveg í Sumbiar Kommunu (Akrarvegin)**
Við heimild í løgtingslóg nr. 51 frá 25 juli 1973 um landsvegir og sambært lóg nr. 89 frá 7. mai 1881 um skyldu at lata grund til almennar vegir, havnir, lendingar v.m. í Føroyum við seinni broytingum, hevur landsstýrismaðurin avgjørt at ognartaka í Sumbiar bygd tað til breiðking, trygging og hald av landsvegnum út á Akrar neyðuga lendi og tilfar.

Tað lendi, ið ognartikið verður, er grundin undir vegbreyt og gongubreytum, vegakslum, vendi-og møtiplássum, bilstøðum, vegskráum, veitum, bakkum og øðrum tílíkum. Harafturat verður ognartikið 1,0 m breið ál framvið fóti á vegskráa og bakkatrom tó soleiðis, at markið altíð verður í minsta lagi 3 m. frá vegjaðara.

Tey øki, ið koma undir ognartøku, eru:

Innangarðs: Burtur av matr. nr. …"

- Við skrivi, dagfest 19. sept. 2002 sendi Landsverkfrøðingurin A avgerðina um ognartøkuna.
- Við skrivi, dagfest 1. okt. 2002 boðaði A Landsverkfrøðinginum frá, at hann ikki frammanundan varð kunnaður um málið, og at hann ynskti at sleppa at nýta sín lógarásetta kærumøguleika. Skrivið er soljóðandi:

**„Viðvíkjandi fráboðan um ognartøku av lendi til landsvegin Akrar-Lopra.**
Vísandi til fráboðan frá Landsverkfrøðinginum, dagfest 19. september 2002, og avrit av skrivi frá Vinnumálaráðnum, dagfest 11. september 2002, skal verða sagt frá, at undirritaði ikki áður hevur verið kunnaður um málið.

Undirritaði er greiður yvir, at Landsverkfrøðingurin/Vinnumálaráðið kunnu ognartaka lendi til landsveg v.m., sambært lóg nr. 89 frá 7. mai 1881, við seinri broytingum, men kann ikki góðtaka, at ásetingarnar í somu lóg um kærumøguleikar, ikki verða hildnar.

Undirritaði kann tí bert takað nevndu skriv sum fráboðan um, at ætlanin er at ognartaka lendið, og tilskilar sær rætt til at nýta kærumøguleikarnar, sum lógin fyriskrivar.

Undirritaði fer ikki at góðtaka, at landsverkfrøðingurin fer inn á ogn mína, matr.nr. …, fyrrenn málið er endaliga viðgjørt.

Vónandi verður ikki neyðugt at fara í rættin fyri at tryggja, at lógarásett rættindir verða hildin."

- Tann 21. oktober 2002 sendi Advokatskrivstovan vegna Landsverkfrøðingin Vinnumálaráðnum soljóðandi skriv:

„Vegna Landsverkfrøðingin skal eg við hesum venda mær til Vinnumálaráðið.

Við skrivi frá 11. september 2002 hevur Vinnumálaráðið gjørt av at ognartaka í Sumbiar bygd tað til breiðking, trygging og hald av landsvegnum út á Akrar neyðuga lendi og tilfar. Nevnda avgerð er send A við skrivi frá Landsverkfrøðinginum, dagfest 19. september 2002, sum verður lagt við.

Við skrivi frá 1. oktober 2002 frá A til Landsverkfrøðingin, og sum eg eisini leggi við, sigur A m.a., at hann ikki kann góðtaka, at ásetingarnar í lógini frá 1881 um kærumøguleikar ikki verða hildnar. Samstundis tilskilar hann sær rætt at nýta kærumøguleikarnar, sum lógin fyriskrivar.

Tá tað er alt avgerandi fyri Landsverkfrøðingin, at arbeiðið verður gjørt í ár, verður málið við hesum latið Vinnumálaráðnum (landsstýrinum) sum eitt kærumál til støðutakan. Biðið verður um, landsstýrið tekur støðu sum allar skjótast. A er einsamallur eigari av nevndu ogn matr. nr. …, og tí eru tað ikki aðrir møguligir kærarar viðvíkjandi hesi ogn.

Hjálagt avrit av skrivi frá Landsverkfrøðinginum til A í dag."

- Sama dag sendi Advokatskrivan A soljóðandi skriv:

„Vegna Landsverkfrøðingin skal eg við hesum venda mær til tygara í sambandi við bræv tygara frá 1. oktober 2002.

Tygum upplýsa, at tygum ikki áður hava verið kunnaður um málið. Tað er ikki rætt, tí sambært avriti av skrivi frá Landsverkfrøðinginum tann 10. juli 2002 til tygara, sum verður lagt við enn einaferð, boðar Landsverkfrøðingurin frá, at teir hava biðið landsstýrið ognartaka neyðuga lendið, men verður hildið rættast, at

eigararnir enn einaferð skulu hava møguleikan at gera semju við Landsverkfrøðingin um endurgjaldsspurningin. Síðani verður enn einaferð heitt á tygum um at undirskrivað eina viðlagda semju og senda hana aftur til Landsverkfrøðingin í einum hjáløgdum brævbjálva, og at peningurin síðani verður sendur tygum.

Í brævi tygara frá 1. oktober 2002 er tilskilaður rættur at nýta kærumøguleikarnar, sum lógin fyriskrivar, og tygum hava tí fullan kunnleika til reglurnar hesum viðvíkjandi.

Fyri góðan ordans skuld, og fyri at eingin misskiljing skal vera, havi eg í dag vegna Landsverkfrøðingin sent nevnda skriv tygara frá 1. oktober 2002 til landsstýrið sum eitt kærumál til støðutakan."

- A sendi 24. okt. 2002 advokatinum svar, har hann gjørdi greitt, at hann er ónøgdur við, at skriv hansara (1. okt.) er sent Vinnumálaráðnum, eins og hann vísti á, at hann ikki er kunnaður um ætlanina fyrr enn við móttøkuna av skrivinum, dagfest 19. sept. 2002.
- Við skrivi, dagfest 28. okt. 2002 boðar Vinnumálaráðið A frá, at hann ikki hevur nakran kærumøguleika, tí at tað er landsstýrið sum hægsti fyrisitingarmyndugleiki, ið er ognartakandi myndugleikin. Kortini hevur Vinnumálaráðið gjørt av at viðgera málið av nýggjum, og boðar honum frá, at avgerðin um ognartøku stendur við. Skrivið er soljóðandi:

„Tygum hava í skrivi til Landsverkfrøðingsstovnin dagfest 1. oktober 2002 boðað stovninum frá, at tygum ikki meta, at tygum á rættan hátt eru kunnaður um, at ogn tygara, matr. nr. …, fór at verða ognartikin, og at tygum tí einans taka fráboðan frá Landsverkfrøðingsstovninum til tygara um ognartøku, dagfest 19. september 2002, sum eina fráboðan um, at ætlanin er at ognartaka lendið, og at tygum tilskila tygum rættin til at nýta teir kærumøguleikar, ið lóg nr. 89 frá 7. mai 1881 heimilar. Eisini boða tygum frá, at tygum ikki góðtaka, at Landsverkfrøðingsstovnurin fer inn á ogn tygara fyrr enn málið er endaliga viðgjørt.

Í ognartøkulógini frá 1881 er m.a. ásett, at ein ætlan um at ognartaka skal fráboðast jarðareigara, sum so hevur 3 mánaðar til

at kæra málið til Løgtingið, um Tórshavnar kommuna hevur tikið avgerðina, og til Justitsminiteriet, um onnur kommuna hevur tikið avgerðina. „Løgtingið“ ávíkavist „Justitsministeriet“ mugu lesast sum „Landsstýrismaðurin“, tí Løgtingið sbrt. stýrisskipanarlógini í fyrsta føri burturav er lóggevandi vald, og tað tí ikki ber til at kæra mál til Løgtingið, og tí talan í øðrum føri er um yvirtikið málsøki.

Hendan ásetingin um kærumøguleika skal tó ikki lesast á sama hátt, tá landsstýrismaðurin sjálvur tekur ognartøkuavgerðina. Landsstýrismaðurin er hægsti fyrisitingarligi myndugleiki á sínum málsøki, og tí ber ikki til at kæra avgerðir, sum landsstýrismaðurin tekur til hægri fyrisitingarligan myndugleika. Hetta merkir, at verður jørð ognartikin av landsstýrismanninum til landsvegagerð ella -hald, er eingin fyrisitingarligur kærumøguleiki hjá jarðareigara.

Landsstýrismaðurin í samferðslumálum, E hevur við skrivi frá 11. september 2002 gjørt av at ognartaka í Sumba tað til breiðking, trygging og hald av landsvegnum út á Akrar neyðuga lendið og tilfar. Nevnda avgerð er sambært upplýsingum frá Landsverkfrøðingsstovninum send tygum við skrivi frá Landsverkfrøðingsstovninum, dagfest 19. september 2002.

Sostatt hava tygum sambært lógini ikki møguleika fyri at kæra málið fyri hægri fyrisitingarligan myndugleika við tað at landsstýrismaðurin, ið hevur tikið avgerðina um ognartøku, samstundis er hægsti fyrisitingarmyndugleiki á økinum.

Havandi hetta í huga, hevur Vinnumálaráðið, hóast tað ikki er kravt í nøkrum lógarásetingum, valt at viðgera sakina av nýggjum, soleiðis at tikið verður hædd fyri rættartrygd tygara í mest møguligan mun. Skriv tygara frá 1. oktober 2002 hevur sostatt verið viðgjørt, sum um kært var.

Nýggja viðgerðin hevur tó ikki ført upplýsingar við sær, sum kunnu føra til, at avgerð Vinnumálaráðsins, um at ognartaka lendi tygara, ikki framvegis skal metast sum galdandi.

Vinnumálaráðið er harafturímóti av tí fatan, at tygum í skrivi frá Landsverkfrøðingsstovninum dagfest 10. juli 2002 eru vorðin kunnaður um, at ætlanin var at ognartaka lendið, at heitt hevur verið á tygum frá Landverkfrøðingsstovnsins síðu um at undir-

skriva eina semju um endurgjaldsspurningin og senda hana aftur, og at tygum við skrivi frá Landsverkfrøðingsstovninum, dagfest 19. september 2002 eru vorðin kunnaður um endaligu avgerð landsstýrismansins um at ognartaka.

Sostatt metir Vinnumálaráðið, at tygum eru vorðin kunnaður nóg væl og á rættan hátt um málið, og at Landsverkfrøðingsstovnurin annars ikki hevur borið seg skeivt at sambært ognartøkulógini frá 1881 ella fyrisitingarlógini.

Samanumtikið sær Vinnumálaráðið sostatt onga grund til at broyta tiknu avgerðina um ognartøku.

Til ber ikki at kæra hesa avgerð til hægri fyrisitingarligan myndugleika. Tó ber altíð til at leggja eina avgerð frá miðfyrisitingini fyri dómstólarnar til avgerðar."

- Tann 1. nov. 2002 sendi A Vinnumálaráðnum soljóðandi skriv:

„Vísandi til bræv frá Vinnumálaráðnum, dagfest 28. oktober 2002, skal verða sagt frá, at undirritaði ikki fer at leggja avgerðina frá Vinnumálaráðnum um ognartøku, fyri dómstólarnar, men ætlar at kæra mannagongdina hjá fyrisitingarmynduleikanum til Løgtingsins Umboðsmann.

Sum eg segði frá í fyrsta brævi mínum, hevur mynduleikin, Landsverkfrøðingurin/Vinnumálaráðið, rætt til at ognartaka lendi til landsveg, men lóg nr. 89 frá 7. mai 1881 ikki bert heimilar mynduleikanum at ognartaka, men gevur eisini tí, hvørs lendi verður ognartikið, rætt til at gera vart við seg, áðrenn ognartøkan kann verða framd.

Nú er undirritaði ikki løgfrøðingur, men yvist eg tó í, at niðurstøðan frá Vinnumálaráðnum, við F, fulltrúa, um, at landsstýrismaðurin, uttan fráboðan, kann ognartaka lendi, er røtt.

Eisini fyrisitingarlógin hevur ásetingar um, hvussu borgarin eigur at verða kunnaður, áðrenn tíðandi avgerðir verða tiknar ímóti honum, eins og hann eigur at verða hoyrdur, og hava møguleika at koma við viðmerkingum/kærum.

Tað gevur onga meining, at Vinnumálaráðið nú, eftir at hava tikið avgerð í málinum 11. september 2002, viðgerð málið av nýggjum, áðrenn undirritaði hevur havt stundir at kæra avgerðina. Hetta hevur onki við rættartrygd at gera, tvørturímóti.

Orðingin „at ognartaka í Sumba tað til breiðking, trygging og hald av landsvegnum út á Akrar neyðuga lendið og tilfar er rættuliga ókonkret. Undirritaði fer tí at krevja, at mynduleikin, Vinnumálastýrið ella Landsverkfrøðingurin, nágreinuliga ásetur, hvat lendi verður ognartikið, so undirritaði hevur nakað at halda seg til.

Undirritaði er í ferð við at orða eina kæru, har sagt skal verða frá hvat undirritaði metir er neyðugt at gera, fyri at lendið framvið Akravegnum, harímillum mítt lendi, verður nýtuligt í framtíðini."

- Við skrivi, dagfest 6. nov. 2002 svarar Vinnumálaráðið A soleiðis:

„Tygum hava í brævi dagfest 1. november 2002 vent tygum til Vinnumálaráðið, har tygum m.a. gera vart við, at tygum halda fæst við rættin, ið tygum meta tygum hava, til at kæra avgerðina hjá E, landsstýrismanni í vinnumálum frá 11. september 2002, um at ognartaka part av lendi tygara til Landsvegin Akrar – Lopra.

Í hesum sambandi skal Vinnumálaráðið enn einaferð staðfesta, at tygum sum so ikki hava nakran kærumøguleika, og heldur ikki hava havt tað. Avgerðin um ognartøku er tikin av hægsta fyrisitingarliga myndugleikanum á økinum, nevniliga landsstýrismanninum í vinnumálum. Tískil kann avgerðin ikki kærast til hægri fyrisitingarligan myndugleika.

Eisini vísa tygum í brævi tygara á, at tygum ivast í, um niðurstøða Vinnumálaráðsins, um at landsstýrismaðurin uttan fráboðan kann ognartaka lendið, er røtt. Hertil er at viðmerkja, at lóg um ognartøku frá 1881 ikki nevnir nakað um, at eigari av lendi skal kunnast um, at ætlanir eru um at ognartaka. Harafturímóti krevur lógin, at eigarin verður kunnaður um sjálva *ognartøkuavgerðina.*

Tað eru tygum í skrivi frá Landsverkfrøðingsstovninum dagfest 19. september 2002.

Sostatt eru tygum eftir Vinnumálaráðsins uppfatan kunnaður á rætta hátt um málið.

Í brævi tygara krevja tygum eisini, at nærri verður lýst, hvat lendi verður ognartikið, so at tygum hava nakað at halda tygum til. Her skal Vinnumálaráðið vísa til tekning, sum bleiv send

tygum 15. juli 2002, og sum annars vísti til fráboðanarskriv frá Landsverkfrøðingsstovninum frá 10. juli 2002. Eisini skal Vinnumálaráðið vísa til avgerðina um ognartøku, ið sambært Landsverkfrøðingsstovninum er send tygum 19. september 2002. Í avgerðini stendur, at „tað lendi, ið ognartikið verður, er grundin undir vegbreyt og gongubreytum, vegakslum, vendi- og møtiplássum, bilstøðum, vegskráum, veitum, bakkum og øðrum tílíkum. Harafturat verður ognartikið 1,0 m breið ál framvið fóti á vegskráa og bakkatrom tó soleiðis, at markið altíð verður í minsta lagi 3 m frá vegjaðara."

Vinnumálaráðið metir hervið, at lendi, sum verður ognartikið er lýst nóg væl.

At enda skal Vinnumálaráðið boða frá, at ráðið metir málið at vera endaliga avgreitt, og at meira ikki verður gjørt við málið."

- Við skrivi, dagfest 12. nov. 2002 heitti Advokatskrivstovan vegna Landsverkfrøðingin á Føroya Rætt um at tilnevna 2 metingarmenn til at meta um lendið, sum er tikið burturav Matr. nr. …
- Við skrivi, dagfest 15. nov. 2002 til Føroya Rætt boðaði Advokatskrivstovan frá, at áheitanin um at tilnevna metingarmenn eisini fevndi um hinar ognirnar, sum vóru fevndar av ognartøkuni.
- Á rættarfundi 25. nov. 2002 vórðu metingarmenn útnevndir.
- Við skrivi, dagfest 10. jan. 2003 boðaði Advokatskrivstovan vegna Landsverkfrøðingin metingarmonnunum frá tilnevningini. Í skrivinum stendur eisini m.a.:

„Áðrenn tit fara á staðið, skulu tit boða øllum eigarum frá og somuleiðis undirritaða vegna Landsverkfrøðingin, soleiðis at allir partar fáa høvi at vera til staðar.

Avrit av hesum skrivi er sent øllum eigarunum umframt Landsverkfrøðinginum."

## Partshoyringin

Eftir at hava fingið skjølini frá Landsverkfrøðinginum og Vinnumálaráðnum í ognartøkumálinum viðvíkjandi Akravegnum, boðaði umboðsmaðurin tann 7. februar 2003 teimum og klagaranum frá, at hann fór at kanna klaguna nærri.

Í skrivunum frá umboðsmanninum til Landsverkfrøðingin og Vinnumálaráðið stendur m.a.:

> „Eg skal í hesum sambandi gera vart við, at ein ognartøka er at meta sum ein fyrisitingarlig avgerð, sum er fevnd av Fyrisitingarlógini jbr. §§ 1 og 2.
>
> Tað er í hesum sambandi serliga spurningurin um § 18, tvs. hvørt A frammanundan hevur verið kunnaður í nøktandi mun um ætlanirnar, og um hann hevur fingið høvi at koma til orðanna, áðrenn avgerðin um ognartøku er tikin."

Í skrivinum til A varð hesin biðin um at greiða frá, um hann hevði móttikið skrivini frá Landsverkfrøðinginum, dagfest ávikavist 10. og 15. juli 2001. A svaraði umboðsmanninum soleiðis aftur við skrivi, dagfest 13. februar 2003:

> „Vísandi til skriv tygara, dagfest 7. februar 2003, skal verða sagt frá, at undirritaði móttók nevndu skriv, ella rættari avrit av skrivunum, tann 21. oktober 2002."

Við skrivi, dagfest 4. mars 2003 hevur Landsverkfrøðingurin latið umboðsmanninum hetta ummælið av klaguni:

> „Vísandi til skriv tygara frá 7. februar 2003, j.nr. 200300003/9, har biðið verður LV um at ummæla klaguna frá A í sambandi við ognartøku av lendi burtur av ogn hansara, matr.nr. ..., Lopra, til breiðking av Akravegnum, verður við hesum greitt frá niðanfyri, hvussu farið var fram í hesum máli.
>
> Tann 31. mai 2001 fekk vegaskrivstovan hjá LV í Øravík til uppgávu at tosa við eigararnar av lendinum, sum ætlanin var at útvega til breiðkingina av landsvegnum út á Akrar.
>
> Tað fór økisleiðari okkara har suðuri síðan í holt við, og 19. juni 2001 tosaði hann við C um ognina hjá pápabeiggja hansara, A, matr. nr. ..., og segði honum um ætlanina at taka neyðugt lendi av hesi ogn til breiðkanina av landsvegnum. C brúkar sjálvur hesa ognina at hava seyð á. Hann segði seg kunna svara fyri pápabeiggjan, at hann var ímóti at lata lendi niðanfyri vegin til

vegabreiðking; men kundi evt. lendi verið latið at breiðka niðaneftir. C segði eisini, at hann sum borgarstjóri kundi svara fyri kommununa, at hon var ímóti at breiðka omaneftir (sí hjálagda notat frá nevnda økisleiðara, dagf. 24.02.2003 (skjal 1)).

Tá ið tað á henda hátt vísti seg at verða trupult at gera semjur við nakrar av lendiseigarunum, og tað ráddi um at koma í gongd við breiðkingini sum skjótast, um hesin teinurin kundi verða liðugur í 2001, heittu vit á Vinnumálastýrið við skrivi 18. september 2001 at fremja ognartøkuna (skjal 2).

Komið var ongantíð í gongd við breiðkingina í 2001; men játtaður var aftur peningur til endamálið á fíggjarlógini fyri 2002, og eftir áheitan frá Vinnumálaráðnum (sí hjálagda skjal 3) sendu vit eigarunum boð um hetta og søgdu frá, at um semja ikki fekst í lag um endurgjaldið fyri lendið innan ávísa tíðarfreist, varð neyðugt at biðja landsstýrismannin ognartaka neyðuga lendið.

Hesa fráboðan sendu vit A tann 10. juli 2002 við hjálagdari semju til at undirskriva (sí hjalagda skjal 4). Av misgávum fylgdi ongin tekning við semjuni og var hendan tí send við skrivi 15. juli 2002 og vístu samstundis til skrivið, vit høvdu sent 10. juli (sí skjal 5).

Tá ið vit ikki fingu svar ella viðmerkingar til hesa hoyringina og sostatt ikki fingu semju í lag við eigararnar um endurgjaldið, avgjørdi landsstýrismaðurin at ognartaka lendið, og var tað fráboðað LV við hjálagda skrivi frá 11. september 2002 (sí skjal 6).

Henda avgerð um ognartøku var síðan fráboðað eigarunum tann 19. september 2002 (sí hjálagda skriv til A (skjal 7)).

Hesa fráboðan vísir A til í skrivi til LV 1. oktober 2002 og sigur samstundis frá, at hann ikki áður hevur verið kunnaður um málið (sí skjal 8).

Vit settu okkum í samband við okkara sakførara, og sendi hann okkara vegna hjálagda skriv til A, dagf. 21.10.2002, har hann m.a. segði frá, at hann hevði sent skrivið frá A til landsstýrið sum eitt kærumál til støðutakan (sí skjal 9 og 10).

Tann 29.10.2002 svaraði Vinnumálaráðið A og viðgjørdu skriv hansara frá 1. oktober 2002 sum eitt kæruskriv, har niðurstøðan var m.a., at avgerð Vinnumálaráðsins um at ognartaka lendið, framvegis skuldi metast sum galdandi, og at tá ið landsstýris-

maðurin er hægsti fyrisitingarligi myndugleiki á sínum málsøki, ber ikki til at kæra avgerðir, sum landsstýrismaðurin tekur, til hægri fyrisitingarligan myndugleika (sí skjal 11).

Við omanfyri nevndu niðurstøðu Vinnumálaráðsins avgjørdu vit at fara inn á ognina hjá A tann 5. november 2002 at fullføra breiðkingina av hesum landsvegateininum.

Í telefonsamrøðu við sakførara okkara áðrenn 5. november ráðgav hann okkum, at onki skuldi verið til hindurs fyri, at arbeiðið fór í gongd, við støði í skrivinum frá VMR, dagfest 29.10.2002, og var hetta staðfest í skrivi frá sakføraranum dagfest 7. november 2002 (sí skjal 12).

Um so er, at tygum tørva fleiri upplýsingar um eitthvørt hesum máli viðvíkjandi, eru vit altíð til reiðar at rógva afturáaftur.“

Við skrivi, dagfest 7. mars 2003 hevur Vinnumálaráðið latið umboðsmanninum hesar viðmerkingarnar til klaguna:

„Løgtingsins umboðsmaður hevur í skrivi dagfest 7. februar 2003 sent Vinnumálaráðnum klagu frá A um ognartøku av lendi til landsveg í Sumbiar kommunu til ummælis.

Hervið verða viðmerkingar Vinnumálaráðsins sendar Løgtingsins umboðsmanni.

**Málsgongd**

Eftir at áheitan var komin frá Sumbiar kommunu síðst í 2000 um at fáa Akrarvegin í betri stand, fór Landsverkfrøðingsstovnurin at arbeiða við ætlanum um at breiðka vegin. Ætlanirnar innibóru, at hetta skuldi gerast við at breiðka hann omaneftir. Sumbiar kommuna fekk hesa ætlan til ummælis og mótmælti henni harðliga og mælti í staðin til at breiðka vegin niðaneftir. Landsverkfrøðingsstovnurin metti tó ikki, at grundgevingarnar fyri hesum vóru eins góðar og tær grundgevingar, ið stovnurin hevði, fyri at breiðka vegin omaneftir, og stóð tí fast við ætlan sína at breiðka vegin omaneftir.

Í hesum sambandi gjørdist greitt, at neyðugt varð at útvega lendi fram við vegnum. Farið varð tískil undir samráðingar við eigararnar av hesum lendi um endurgjald fyri lendið. Hetta var

m.a. gjørt við at økisleiðarin hjá Landsverkfrøðingsstovninum fór runt til lendiseigararnar fyri at royna semju. Tað vísti seg tó, at ávísir eigarir ikki vóru sinnaðir at gera semju um endurgjald fyri lendið.

Landsverkfrøðingsstovnurin heitti tí eftir eina tíð á landsstýrismannin í samferðslumálum um at ognartaka tað lendið, sum semja ikki kundi fáast um. Landsstýrismaðurin helt tó, at rættast var at royna semju við eigararnar enn einaferð, og samstundis geva eigarunum eina hóskandi freist fyri at undirskriva semjuna, og boðaði hann Landsverkfrøðingsstovninum frá hesum í skrivi dagfest 21.06.2002, har heitt varð á stovnin um at royna semju enn einaferð.

Hetta varð m.a. gjørt við skrivi frá Landsverkfrøðingsstovninum dagfest 10. juli 2002 (15. juli 2002 varð eisini annað skriv sent), har eigararnir av lendinum fram við vegnum vórðu bidnir um at undirskriva eina semju, fyri afturfyri at fáa eitt endurgjald útgoldið beinanvegin.

Hetta førdi tó ikki annað úrslit við sær. Avgjørt varð tískil at ognartaka neyðuga lendið, og varð Landsverkfrøðingsstovnurin fráboðaður um hetta í skrivi dagfest 11. september 2002 frá Vinnumálaráðnum. Avgerðin er sambært Landsverkfrøðingsstovninum send A í skrivi dagfest 19. september 2002.

Í november 2002 fór Landsverkfrøðingsstovnurin so í gongd við arbeiðið inni á lendinum hjá A.

### Grundarlag fyri avgerð Vinnumálaráðsins

Avgerðin um at ognartaka lendið við Akrarvegin er tikin við heimild í løgtingslóg um landsvegir nr. 51 frá 25. juli 1972 og í lóg nr. 89 frá 7. mai 1881 um skyldu at lata grund til almennar vegir, havnir, lendingar v.m., ið heimila landsstýrinum at ognartaka lendi til vegir o.a.

A hevur gjørt vart við, at hann ikki er vorðin kunnaður um ætlanir landsstýrismansins um at ognartaka lendið hjá sær, og tí ikki hevur fingið høvi til at koma til orðanna hesum viðvíkjandi. Løgtingsins umboðsmaður hevur víst á, at ein ognartøkuavgerð er at meta sum ein fyrisitingarlig viðgerð, ið er fevnd av fyrisitingarlógini jbr. §§ 1 og 2. Kravið hjá A um at verða hoyrdur í

sambandi við ognartøkætlanirnar er tí grundað á vanlig krøv í fyrisitingarlógini.

Grein 18 í fyrisitingarlógini ásetir, at

„Má tað haldast, at ein partur í einum máli ikki er kunnigur við, at myndugleikin hevur ávísar upplýsingar viðvíkjandi teim veruligu umstøðunum, kann avgerð ikki verða tikin, fyrr enn myndugleikin hevur gjørt partin kunnugan við upplýsingarnar og hann hevur fingið høvi til at koma við einum ummæli. Hetta er tó bert galdandi, um upplýsingarnar ikki eru til fyrimuns fyri viðkomandi part, og hava stóran týdning fyri avgerðina í málinum.“

Hetta krav metir Vinnumálaráðið seg hava lokið við, at Landsverkfrøðingsstovnurin hevur roynt at fáa semju í lag við partarnar, herundir við A, um endurgjald fyri tað lendi, ið skuldi nýtast til vegagerðina. Hetta varð fyrst gjørt við at munnlig semja varð roynd við eigararnar og síðani við skrivi til eigararnar dagfest 10. juli 2002 og eisini við skrivi dagfest 15. juli 2002. Í seinna førinum er talan um, at fyrra skrivið frá 10. juli 2002 er sent eina ferð afturat, tí ongin tekning fylgdi við hesum skrivi. Bæði hesi skjøl eru skrásett sum send í journalskipanini hjá Landsverkfrøðingsstovninum, og Landsverkfrøðingsstovnurin hevur ikki fingið boð um, at hinir eigararnir, ið semjan eisini varð send til, ikki hava fingið hesi brøv.

Í hesum skjølum verður greitt eigarunum frá, hvussu málið er háttað, og hvussu langt tað er komið um hetta mundið, eins og greitt verður frá, at Landsverkfrøðingsstovnurin hevur biðið landsstýrismannin í samferðslumálum um at ognartaka neyðuga lendið. Eisini verður greitt frá, at hildið hevur verið rættast, at eigararnir fáa enn ein møguleika fyri at royna semju um málið við Landsverkfrøðingsstovnin. Síðani verður gjøgnumgingið, hvussu fram er komið til gjaldið í semjuuppskotinum. Samstundis verður boðað frá, at eigararnir fáa eina freist upp á 4 vikur til at undirskriva semjuna, og um hetta ikki verður gjørt, so verður neyðuga lendið ognartikið. At enda verður eitt kort yvir tey matrikulnummur, ið málið snýr seg um, sent við.

Tá brøv verða send innlendis í Føroyum, má við verandi postgongd takast sum givið, at tey koma fram. Tískil mugu

journaliseraðu skrivini hjá Landsverkfrøðingsstovninum tæna sum haldgóð prógv fyri, at Vinnumálaráðið/Landsverkfrøðingsstovnurin hevur kunnað eigararnar nóg væl um ætlanirnar í málinum.

Við hesum metir Vinnumálaráðið, at eigararnir eru kunnaðir um málið og hava fingið høvi til at gera vart við seg, til tess at krøvini í § 18 í fyrisitingarlógini um partshoyring eru lokin.

Um Løgtingsins umboðsmaður hevur spurningar hesum viðvíkjandi er Vinnumálaráðið sjálvsagt til reiðar at royna at svara hesum."

Við skrivum, dagfest 17. mars 2003 vórðu ymsu ummælini send ávikavist A, Landsverkfrøðinginum og Vinnumálaráðnum til kunningar. Sagt varð í skrivinum, at umboðsmaðurin nú ætlaði sær undir endaligu viðgerðina av klaguni, og at um partarnir ætlaðu sær at gera fleiri viðmerkingar til hetta málið, skuldu hesar sendast umboðsmanninum innan 14 dagar.

Við skrivi, dagfest 21. mars 2003 hevur Vinnumálaráðið boðað umboðsmanninum frá, at ráðið á verandi grundarlagi ikki hevur fleiri viðmerkingar til hetta málið.

Við skrivi, dagfest 28. mars 2003 hevur Landsverkfrøðingurin boðað umboðsmanninum frá, at stovnurin ikki hevur fleiri viðmerkingar til málið.

Umboðsmaðurin hevur einki frætt aftur frá A, og er klagan tí tikin upp til endaliga viðgerð.

## *Niðurstøða*

*Klagan hevur sín uppruna í einari ognartøku, sum Vinnumálaráðið hevur framt eftir áheitan frá Landsverkfrøðinginum í sambandi við breiðkanina av landsvegnum millum Lopra og Akrar.*

*Í klaguni vísir A á, at:*

- *hann ikki frammanundan er kunnaður um ætlanirnar, og at*
- *hann ikki hevur fingið høvi at nýta sín kærumøguleika sambært lógini.*

*Í § 5 í løgtingslóg nr. 51 frá 25. juli 1972 um landsvegir við seinni broytingum stendur:*

> *„Lóg nr. 69 frá 7. mai 1881 „om forpligtelse til jords afgivelse til offentlige veje, havne og landingssteder samt til offentlige skoler på Færøerne“ við seinri uppískoytum verður at galda eisini í førum, har ið landsstýrið hevur fyri neyðini at ogna sær bygt sum óbygt lendi ella tilfar í sambandi við landsvegagerð og -hald…“*

*Ognartøka til breiðkan av landsvegi verður samsvarandi hesum framd eftir reglunum í lóg nr. 69 frá 7. mai 1881, Lov om forpligtelse til jords afgivelse til offentlige veje, havne og landingssteder samt til offentlige skoler på Færøerne við seinni broytingum (hereftir nevnd 1881-lógin). § 2 í hesari lógini er soljóðandi:*

> *„Kommunalbestyrelsen skal underrette de vedkommende Eiere og Brugere af den Jord, som herefter agtes indtagen til Veien, om den tagne Beslutning, og skulle disse være beføiede til, inden 3 Maaneder efter, at de bevisligen have modtaget denne Underretning, at paaklage samme, hvis det er en Landkommunes Forstanderstab, der har taget Beslutningen, gjennem dette til Lagthinget, og hvis det er Thorshavns Kommunalbestyrelse, gjennem Amtet til Justitsministeriet, hvilke hver især endelig have at afgjøre, om den tagne Beslutning kan anses lovhjemlet. Oversiddes denne Frist, bliver Beslutningen bindende for de paagjældende Grundbesiddere…“*

*1881-lógin viðvíkur ognartøkum, sum kommunustýri fremja. Eigarar og brúkarar av jørð, sum verður ognartikin, hava sambært § 2 í lógini rætt til at kæra eina ognartøkuavgerð til ávikavist Løgtingið og danska Løgmáláráðið. Men við tað, at málsøkið er yvirtikið sum sermál, er kærumyndugleikin nú Føroya Landsstýri. Eftir galdandi stýrisskipanarlóg merkir hetta viðkomandi landsstýrismaður, sum í løtuni er landsstýrismaðurin í vinnumálum.*

*Í hesum málinum er talan um eina ognartøku til landsveg, og var tað sambært § 5 í Landsvegalógini landsstýrið sjálvt, tvs. landsstýrismaðurin í vinnumálum, sum var ognartøkumyndugleikin. Tað var tí eingin myndugleiki, sum avgerðin um ognartøku av lendi til Akravegin kundi kærast til.*

*Tað er tí einki grundarlag fyri hesum partinum av klaguni frá A.*

*Vinnumálaráðið hevur boðað umboðsmanninum frá, at mannagongdin eftirfylgjandi er broytt í ognartøkumálum, har tað er landsstýrið sjálvt, sum sambært lógini er ognartøkumyndugleiki. Hetta er gjørt á tann hátt, at hesin myndugleiki nú er delegeraður til Landsverkfrøðingin, hvørs avgerðir síðani kunnu kærast til Vinnumálaráðið. Hetta havi eg einki at siga til, men hetta hevur ongan týdning fyri hesa ognartøkuna.*

*Eftir Landsvegalógini og 1881-lógini er einki krav um, at viðkomandi skal verða kunnaður frammanundan um eina komandi ognartøku, men bert eitt krav um, at hann skal kunnast um ognartøkuavgerðina, tá hendan er tikin.*

*A er í skrivinum frá Landsverkfrøðinginum, dagfest 19. sept. 2002, kunnaður um hesa avgerðina, sum ásett í § 2 í 1881-lógini.*

*Tað er tí einki grundarlag fyri uppáhaldinum hjá A um, at mannagongdin hjá Landsverkfrøðinginum/Vinnumálaráðnum ikki er í trá við ásetingarnar í 1881-lógini.*

*Spurningurin er tí, um Vinnumálaráðið/Landsverkfrøðingurin sambært aðrari lóggávu hevði skyldu til at kunna A um tær ítøkiligu ætlanirnar fyri ognartøkuna, áðrenn avgerð um hesa varð tikin.*

*Sum nevnt frammanfyri er ein ognartøka ein avgerð, sum er fevnd av Fyrisitingarlógini. Tað eru serliga reglurnar um partshoyring, sum kunnu koma uppá tal í hesum føri. Hesar reglurnar eru at finna í § 18, stk. 1, ið er soljóðandi:*

> *„Má tað haldast, at ein partur í einum máli ikki er kunnigur við, at myndugleikin hevur ávísar upplýsingar viðvíkjandi teim veruligu umstøðunum, kann avgerð ikki verða tikin, fyrr enn myndugleikin hevur gjørt partin kunnugan við upplýsingarnar, og hann hevur fingið høvi til at koma við einum ummæli. Hetta er tó bert galdandi, um upplýsingarnar ikki eru til fyrimuns fyri viðkomandi part, og hava stóran týdning fyri avgerðina í málinum. Myndugleikin kann áseta eina freist fyri, nær ummælið skal verða givið."*

*Skyldan sambært Fyrisitingarlógini til at geva partinum høvi at geva eitt ummæli, fevnir einans um tær faktisku umstøðurnar, sum eru grundarlagi undir einari avgerð, sum fer at verða tikin, og ikki um sjálva avgerðina sum so.*

*Endamálið, við at kunna partin um eina ætlan og at geva honum høvi til at koma við einum ummæli, er, at hesin skal hava høvi til at siga sína hugsan, herundir at koma við uppskotum um evt. broytingar í ætlanini.*

*Tá tað eins og í hesum førinum snýr seg um breiðkan av einum vegastrekki, sum gongur ígjøgnum eina ogn, gerst talan um at breiðka vegin til aðra ella til hina síðuna. Tað er óivað viðkomandi fyri eigaran, á hvønn hátt hetta verður gjørt.*

*Sambært skrivinum frá Landsverkfrøðinginum til mín, dagfest 4. mars 2003, hevur ætlanin um at breiðka vegin omaneftir verið umrødd munnliga við bróðurson eigaran, C. Hetta var í juni 2001. Hesin skal vegna pápabeiggjan hava boðað Landsverkfrøðinginum frá, at A var ímóti at lata lendi niðanfyri vegin. Hesir upplýsingarnir eru sendir A til ummælis, og hevur hann ikki afturvíst teimum.*

*Tað má eisini leggjast til grund, at Landsverkfrøðingurin hevur sent A tvey skriv um ætlaðu ognartøkuna, dagfest ávikavist 10. og 15. juli 2002. Við seinna skrivinum fylgdi eitt kort, sum vísti lendið, sum ætlanin var at ognartaka til vegbreiðkanina. Tað er helst sjáldsamt, at skriv, sum verða send við postinum, ikki koma fram, og tað má haldast at vera sera sjáldsamt, at hvørki av omanfyri nevndu skrivunum eru komin fram til móttakaran. Tað er tó ikki nakað haldgott prógv fyri, at A hevur móttikið nevndu skriv.*

*Spurningurin er tó, um tað hevur verið nøkur skylda at partshoyra A í hesum førinum.*

*Spurningurin um hesa ognartøkuna varð longu reistur í 2001, og tá hevur kommunustýrið sett fram ynski mótvegis bæði Landsverkfrøðinginum og Vinnumálaráðnum um ístaðin at breiðka vegin niðaneftir. Hendan áheitanin er viðgjørd av Vinnumálaráðnum, sum við skrivinum, dagfest 18. okt. 2001, hevur tikið avgerð um, at breiðkanin skal vera framd omaneftir, eins og Landsverkfrøðingurin hevur mælt til.*

*Av tí, at hesin spurningurin er viðgjørdur tá, haldi eg ikki, at ein partshoyring av A kundi ført til, at ætlanin fyri vegagerðina hevði verið broytt. Vinnumálaráðið kundi tí fremja hesa ognartøkuna á einum tryggum og haldgóðum grundarlagi, uttan mun til um A varð partshoyrdur um ætlanina ella ikki.*

*Her skal verða víst til Fyrisitingarlógina, § 18, stk. 2, nr. 1, ið er soljóðandi:*

*„Stk. 2. Ásetingin í stk. 1 er ikki galdandi, um so er, at tað, soleiðis sum upplýsingarnar og málið er háttað, ikki kann metast at vera ivingarsamt, at taka avgerð í málinum á verandi grundarlag,“*

*Vísandi til hesa regluna haldi eg tí ikki, at Vinnumálaráðið hevur havt skyldu til at partshoyra A um ætlanirnar fyri hesa ognartøkuna.*

*Eg haldi tí einki grundarlag vera fyri uppáhaldinum hjá A um, at mannagongdin hjá Landsverkfrøðinginum/Vinnumálaráðnum ikki hevur verið í trá við Fyrisitingarlógina.*

*Við tað, at ognarrætturin fer frá eigaranum yvir til ognartakandi myndugleikan, tá ognartøkuavgerðin verður sett í verk, dugi eg einki skeivt at síggja í tí, at Landsverkfrøðingurin í nov. 2002 er farin inn á ognartikna lendið.*

*Eg geri ikki meira við hesa klaguna.*

## 21.2. Klaga um handfaringina hjá Tórshavnar kommunu av málinum um breiðkan av Marknagilsvegnum

*A sendi umboðsmanninum eina klagu um handfaringina hjá Tórshavnar kommunu av málinum um breiðkan av Marknagilsvegnum fram við ognini hjá A. Klagan innihelt fleiri viðurskifti, sum umboðsmaðurin avvísti, m.a. tí at nøkur teirra liggja meira enn 1 ár frammanundan klaguni, onnur ikki lata seg kanna innan karmarnar á einari umboðsmanskanning, og uppaftur onnur, sum umboðsmaðurin ikki helt grundarlag vera fyri at gera meira við. Umboðsmaðurin gav kommununi eina átalu fyri als ikki at hava svarað einum fyrispurningi frá A, hóast kommunan hevði lovað at venda aftur við einum svari.*

*A hevði aftaná ein innlitsfund biðið kommununa um innlit í journalyvirlitini yvir skjølini í málunum, sum biðið var um innlit í. Advokatur kommununar bað í hesum sambandi A útgreina, hvørji skjøl, A vildi hava journalyvirlit yvir. Umboðsmaðurin vísti á, at journalyvirlitini eru beinleiðis fevnd av innlitsrættinum, og at umbønin frá A var nóg neyvt útgreinað. Hann átalaði tí svarið frá kommununi og mælti kommununi til at viðgera hesa innlitsumbønina av nýggjum (J.nr. 200300004).*

### Klagan

A hevur við skrivi, dagfest 17. jan. 2003 sent umboðsmanninum soljóðandi klagu:

**„Viðvíkjandi: Kæra av Tórshavnar kommunu um handfaringina av málinum um breiðkan av Marknagilsvegnum**

Við hesum fara vit sum eigarar av matr.nr. … í Tórshavn við ástandandi virkisbygningi, á Marknagilsvegi …, at heita á Løgtingsins umboðsmann um at viðgera handfaringina hjá Tórshavnar kommunu av breiðkanini av Marknagilsvegnum.

Málið ið byrjaði 1997 og átti at verið enda tá, er enn ikki loyst, orsaka av vánaligu handfaringini av málinum í umsitingini hjá Tórshavnar kommunu.

Vit meta at viðgerðin av málinum, hevur verið okkum til órímiliga stóran bága, og meta vit, at Tórshavnar kommuna

tilvitað, og av vánaligari fyrisiting, hevur mótarbeitt einari loysn á málinum.

Gongdin í málinum er í stuttum hendan:
Á sumri 1997 var arbeiðið, ið Tórshavnar kommuna (TK) farin í gongd við at breiðka Marknagilsvegin komið fram til ogn okkara. Hetta arbeiðið umfataði ytra partin av Marknagilsvegnum, og var arbeiðstøkumarkið fyri arbeiðið frá og við ogn okkara, fram við Handilsskúlanum og víðari suðureftir. Til ognina vóru áður (áðrenn 1997) tveir atkomuvegir til gl. Marknagilsvegin, ein norðanfyri virkisbygningin á ognini og ein sunnanfyri.

Í sambandi við at tað á sumri 1997, varð komið fram við ogn okkara, varð farið í gongd við at grava burtur báðar atkomuvegirnar. Tað eydnaðist okkum tó í síðstu løtu, áðrenn báðir vegirnir vóru avgrivnir og virksemi ið var í virkisbygninginum steðgaði upp, at fáa Tórshavnar kommunu at gera ein fyribilsveg í sunnara enda á ognini. Grivið varð fram við ogn okkara og varð hesin partur av Marknagilsvegnum gjørdur liðugur í 1998. Arbeiðið steðgaði tá, uttan at tað økið ið var grivið fram við ogn okkara var fingið ið nýtiligan stand, soleiðis at tann parturin av ognini ið vendur oman móti Marknagilsvegnum var gjørdur stórt sæð ónýtiligur, tí inngongdin til hendan partin av bygninginum lá oman móti Marknagilsvegnum. Hesi viðurskifti standa enn við.

Í desember 1997 varð á ástaðarfundi við umboð fyri Tórshavnar kommunu og Landsbyggifelagnum, ið hevði eftirlitið við arbeiðinum, gjørd avtala um hvussu viðurskiftini móti Marknagilsvegnum skuldu fáast í rættlag. Hendan avtala varð, sambært skrivi frá Tórshavnar kommunu, síðani viðtikin í Tórshavnar kommunu.

Hóast nevndu avtalu hevur Tórshavnar kommuna síðani tá, sent okkum ikki færri enn 6 næstan einsljóðandi avtalur til undirskrivingar. Vit hava ikki vilja undirskriva hesar avtalur, tí vit í fyrsta umfari longu høvdu eina avtalu, í øðrum umfari avskóru hesar avtalur okkum frá at krevja endurgjald fyri mista leiguinntøku. Eftir at vit fingu 5 avtaluna frá TK, gjørdu vit eina roynd at gera eina avtalu sjálvir, har vit ikki avskóru okkum frá møguleikanum møguliga at kunna krevja endurgjald, men annars var avtalan stórt sæð einsljóðandi teimum ið TK var komin við. Vit hava aldrin fingið svar frá TK viðvíkjandi hesari avtaluni.

Viðmerkjast skal, at vit fleiri ferðir hava biðið TK um eina frágreiðing um hví arbeiðið ikki verður gjørt liðugt, men enn hava vit ikki fingið nakað svar, enn tað frá borgarstjóranum 5. juni 2002 „rópt verður frá øllum síðum“ og „vit liva í eini agurkutíð“.

**Fyribilsatkomuvegurin**

Ein annar spurningur ið ósemja hevur verið um ið sambandi við málið er „fyribilsatkomuvegurin“ ið varð gjørdur til ognina sunnanfyri í 1997. Viðmerkjast skal, at vegurin er kommunalur. Hesin varð, sum nevnt omanfyri, gjørdur sum ein fyribilsloysn, og vit vildu tí hava við í avtaluna, at hesin varð gjørdur soleiðis at hann nøktaði tann tørv í virksemi á ognini krevur.

Vit hava víst á at vegurin var smalur og krókutur, og harafturat var vandamikil, serliga í kava. Vit vildu tí hava, at vegur varð breiðkaður har hann fer um ánna, tí stórur vandi var fyri at bilar kundu enda í ánni. Á fundi við umsitingina í kommunu tann 25. september 2002, fasthelt tekniski stjórin hjá TK, at tey krøv vit settu um at breiðka vegin um ánna vóru púrasta órímilig og fóru at vera ov kostnaðarmikil fyri TK. Avtalað varð tó at halda ein fund á staðnum sama dag. Á nevnda ástaðarfundi, har tekniski stjórin ikki luttók, varð staðfest, at vegur uttan stórvegis trupulleikar kundi gerast um ánna, tí nógv av tí arbeiðinum í tekniski stjórin metti vóru neyðug at gera fyri at gera breiðkanina longu vóru gjørd.

Vit meta tí, at TK hóast málið hevði vart í meira enn 5 ár ikki hevði ómakað sær at kanna viðurskiftini. Harafturat meta vit, at TK hevur loyvt sær, og væntandi framhaldandi fer, at nýta hugtakið „fyribils“ út um hvat kann haldast at vera rætt og rímiligt. Somuleiðis halda vit tað vera sera hugstoytt, at umboðið fyri Tórshavnar kommunu B, á fundi hin 16. desember 2002, gav til kennar at hugtakið fyribils kundi roknast sum relativt. Nevnast kann í hesum sambandi, at TK ongantíð hevur víst á nakra varandi loyst fyri atkomuvegin. Vegurin ið TK hevur skotið upp, lýkur ikki krøvini til vegir, sambært almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Hin 22. desember 2002 fingu vit bræv frá B, at TK ikki vildi breiðka nevnda vegin um Markná, orsaka av ókendum faktorum.

Tað má sigast at vera løgið, at umsitingin í Tórshavnar kommunu tekur eina avgerð út frá viðurskiftum ið eru ókend. Sigast skal harafturat, at vit hin 17. desember 2002 bóðu um partshoyring, og at avgerðin varð útsett, um nevndu vegføring til Dánjalstrøð. Vit hava enn einki hoyrt hesum viðvíkjandi, annað enn at avgerð er tikin ið gongur okkum ímóti.

**Viðurskiftini viðvíkjandi keyp av lendi afturat ogn okkara (…)**
Í sambandi við at C 1988 seldi Tórshavnar kommunu eitt øki yviri við Strond, varð semja gjørd um, at C skuldi fáa til keyps tað økið ið natúrliga kundi leggjast afturat ognini (sí TK J.nr 16/76 1973 skriv dagf. 23. august 1985 og 4. maj 1988).

Í skrivi okkara til TK 8. januar 1998 verður skotið upp, at TK sum endurgjald fyri m.a. ognartøku og teir ampar ið broytta vegføringin hevur við sær, letur A v/ C eitt øki vestanfyri ognina. Hin 19. januar 98 boðar TK frá, at til ber ikki at lata felagnum ókeypis øki. Hin 17. september 1998 senda vit aftur TK bræv, har víst verður til avtaluna frá 4. maj 1988. Hetta stendur ósvarað.

Hin 22.09.1999 sendir D vegna A TK bræv um ynski at keypa 6200 $m^2$ av lendi afturat matr. …, víst verður til tilsøgnina frá TK 23.08.1985 og 04.05.1988. (sí omanfyri). Hin 03.11.99 svarar TK, at til ber ikki at selja lendi tí viðurskiftini við Marknagilsvegin ikki eru fullkannaði viðvíkjandi stikkvegum v.m.

Í skrivi dagf. 12. februar 2001 boðar B vegna TK, at kommunan ikki er sinnað at lata virkinum meira lendi vestanfyri ognina vegna framtíðarætlanir fyri Dánjalstrøð. Í skrivi okkara til TK hin 17. apríl 2001 verður biðið um innlit í framtíðarætlaninirnar fyri vegføringina á Dánjalstrøð. Í brævi okkara dagf. 7. august 2001, verður rykt eftir svari uppá ynski um innlit í framtíðarætlanirnar fyri vegføring á Dánjalstrøð. Hin 9. august 2001 boðar B til fundar við býarverkfrøðingin 15. august 2001. Á hesum fundi hevði býarverkfrøðingurin eina tekning ið vísir ein møguligan íbindingarveg omanfyri ogn okkara, til ognirnar fram við Marknagilsvegnum. Tekniski stjórin undirstrikaði, at talan bert var um eitt uppskot til linjuføring, og at hetta ikki var viðgjørt politiskt.

Allar ognirnar ið liggja fram við Marknagilsvegnum hava í dag íbinding til Marknagilsvegin, annaðhvørt beinleiðis ella umvegis aðrar vegir. Soleiðis má sigast, at viðurskiftini við Marknagilsvegin

viðvíkjandi stikkvegum v.m. eru loyst. Tað er okkum óskiljandi, at TK nýtir viðurskiftini við Dánjalstrøð sum undanførslu fyri ikki at halda eina avtalu ið er gjørd við okkum.

Lítil dugur er í at gera avtalur, har fyrilit ið ikki eru nevnd í avtaluni verða nýtt sum undanførsla fyri ikki at vilja halda avtaluna (eins og avtaluna um at gera grótlaðingina fram við Marknagilsvegnum 1997).

Fyri okkum er tað ikki greitt hví TK ikki hevur fingið viðurskiftini í sambandi við ogn okkara liðugt, men vit hava okkara tankar.

1. At eigarin av ognini C áður hevur havt ósemjur í sambandi við sølu av grundøki Yviri við Strond har hann áður hevði jarnstoypivirki.
2. At TK áður hevur sett forboð móti at sproytiverkstað til bilar í virkisbygninginum. Hetta forboð varð tó seinni undirkent av Landsstýrinum.
3. At TK í sambandi við breiðkan av ytra (sunnara) partinum av Marknagilsvegnum ikki hevði fíggjarliga orku at gera arbeiðið liðugt, og síðan ikki hevur raðfest arbeiðið.
4. At TK, fyri at sleppa undan møguligum endurgjaldskravi hevur drigið málið út, so vit at enda vórðu noyddir at skriva undir avtaluna ið TK kom við, og harvið fráskriva okkum rættin til møguligt endurgjald. (tvs. hevur vilja gjørt okkum moyrar)
5. …

Viðvíkjandi okkara pástandi í pkt. 1 og 2, hava vit hoyrt sum ryktir um, at tað í Tórshavnar kommunu hava verið røddir frammi ið eru negtivar mótvegis virksemi okkara, og tí kunna haldast at vilja gera sum mest fyri at leggja fót fyri virksemi okkara.

Av øðrum viðurskiftum enn teimum ið longu eru nevnd, og sum hava gjørt umstøðurnar hjá okkum sum virki sera truplar at virka síðani 1997, eru annað viðvíkjandi umsitingini hjá Tórshavnar kommunu (TK) av málinum:

- TK hevur í tí samskiftinum vit hava havt við hana, sum vit duga at síggja, havt 8 ymisk journal nr., umframt tað ið sakførari

kommununar hevur. (sí. skriv okkara um partsinnlit dagf. 26. november 2002)

- at TK ikki hevur havt 6 mánaðir at svara umbønum okkara um partsinnlit. (sí skriv frá B dagf. 9. august 2001)
- at TK bert lutvís hevur vilja svara spurningum okkara viðvíkjandi málinum, (sí spurningar okkara og svar frá TK, um teldupost dagf. 5. nov. 2002). Og tá ið svarað hevur verið, hevur verið, hevur talan bert verið um uttanumtos (sí. svar frá E, teldupostur dagf. 5. juli 2002)
- at TK ikki hevur gjørt fundarfrásagnir frá fundum okkara millum, eisini tá ið biðið hevur verið um hetta. (sí spurningar okkara og svar frá TK, um teldupost dagf. 5. nov. 2002. Og frágreiðing okkara frá fundi við TK um partsinnlit dagf. 28. des. 2002 pkt. 11)
- at innlit ikki er fingið í mál/skjøl í sambandi við partshoyring, hóast hetta hevur verið lovað á fundi. (sí frágreiðing okkara frá fundi við TK um partsinnlit dagf. 28. des. 2002 )
- at TK ikki svarar umbøn um partshoyring (sí. teldupostur dagf. 7. januar 2003)
- at TK ikki er komin við skjalayvirlit yvir aktir í málum, ið biðið er um. (sí. teldupostur dagf. 7. januar 2003)
- at TK hevur viðgjørt okkum verri enn aðrar borgarar við Marknagilsvegin, tí TK hevur tikið øll onnur arbeiði fram um okkara.
- at TK hevur nýtt ódokumenteraðar, og eftir okkara tykki ósannar pástandir, fyri ikki at gera arbeiðið við grótlagingini fram við ogn okkara liðugt (sí. svar frá B dagf. 12. febr. 2001 og svar okkara 7. apríl 2001)

Av tí at málið er vorðið drúgvt og fløkt, hava vit gjørt ein samandrátt av brævarskiftini vit hava havt við TK og umboð fyri hesa. Somuleiðis verður sent Løgtingsins Umboðsmanni avrit av teimum skjølum vit hava til taks.

Møguliga eru viðurskifti ið vit ikki hava fingið við í hesi gjøgnumgongdini, í samandráttinum av samskiftinum við TK ella í teimum skjølunum vit hava tiltaks ella skjøl ið eru burturblivin. Vit hava roynt at lýsa málið so væl sum tað okkum til ber, og fara

tí at heita á Løgtingsins umboðsmann at hyggja at øðrum viðurskiftum í málinum ið ikki hava fingið ta viðgerð ið tey áttu.

Vit fara soleiðis at heita á Løgtingsins Umboðsmann um at viðgera málið."

## Partshoyringin

Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna hesa klaguna nærri. Av tí, at tað av viðløgdu skjølunum framgekk, at kommunan hevði biðið Metingarnevndina um at avgreiða m.a. hetta málið, gjørdi umboðsmaðurin av fyrst at venda sær til Metingarnevndina fyri at vita, um nevndin hevði viðgjørt hetta málið. Í skrivinum, sum er dagfest 22. jan. 2003, setti umboðsmaðurin Metingarnevndini hesar spurningar:

Hevur Metingarnevndin viðgjørt málið viðv. Matr.nr. …?
Um Metingarnevndin ikki hevur viðgjørt hetta málið, hvør er so orsøkin til tess?
Um Metingarnevndin er í holt við at viðgera hetta málið, verður nevndin biðin um at greiða mær frá, hvussu gongst við hesari viðgerðini?

Við skrivi, dagfest 28. jan. 2003 hevur Metingarnevndin svarað mær soleiðis:

„Í skrivi dagfest 22. januar 2003 hevur umboðsmaðurin biðið Metingarnevndina um eina frágreiðing, hvørt Metingarnevndin hevur viðgjørt málið viðvíkjandi matr. nr. … Tórshavn, sum er økið hjá A við Marknagilsvegin.

Eisini er víst á, at advokaturin B vegna Tórshavnar kommunu, tann 23. apríl 2001 hevur rykt Metingarnevndina eftir 5 ymiskum málum.

Fyrst skal sigast frá, at metingarviðgerðirnar fram við Marknagilsvegnum hava gingið seint av tí orsøk, at kommunan lutvíst ikki hevur havt tekningar klárar, sum vísa hvat tikið verður, og hvussu hvørt stykki sær verður frágingið. Eisini er upp í saman komið fyri, at kommunan hevur sent okkum broytingar av vegagerðini og íbindingum og tílíkum, sum hevur ávirkan á, hvussu

viðurskiftini fyri tey ymsu økini fóru at verða frágingin og hvussu tey skuldu metast.

Av tí at kommunan, sum nevnt, fleiri ferðir hevur broytt vegaprosjektið og harvið fortreytirnar fyri málum, sum hava verið viðgjørd á einum fundi, er nevndin fleiri ferðir komin í ta støðu, at skula viðgera somu mál umaftur.

Her kann nevnast, at 4 av teimum 5 málunum, sum advokaturin nevndi, vóru avgreidd seinasta summar, og so hvørt sum nevndin hevði fingið greiðu á, hvussu tey ymsu stykkini fóru at verða frágingin.

Økið hjá A var tó framvegis trupult hjá okkum at meta um, orsakað av broytingum í prosjektinum og tí økið ikki var liðugt umbygt. Nevndin hevur fleiri ferðir síðani í summar verið á staðnum, fyri at kunna seg um, hvussu økið endaliga fór at verða frágingið.

Sum svar uppá spurning tygara skal sigast frá, at nú er málið komið hartil, at Metingarnevndin kom saman tann 23. januar 2003 og tók tá endaliga støðu í málinum um A, sum tað seinasta viðvíkjandi Marknagilsvegnum.

Sostatt er málið endaliga avgreitt og niðurstøðan hjá nevndini er send kommununi, sum verður biðin um at lata A okkara niðurstøðu.“

Saman við hesum svarinum frá Metingarnevndini, varð klagan við skrivi, dagfest 5. febr. 2003 send Tórshavnar Kommunu til ummælis, eins og biðið varð um skjølini í málinum.

Við skrivi, dagfest 19. febr. 2003 sendi A umboðsmanninum avrit av tí samskiftinum, sum A hevði havt við Tórshavnar kommunu og advokat hennara, síðani klagan varð latin umboðsmanninum.

Í skrivi, dagfest 19. mars 2003 rykti umboðsmaðurin Tórshavnar kommunu eftir umbidna ummælinum og skjølunum.

Við skrivi, dagfest 31. mars 2003 hevur Tórshavnar kommuna sent umboðsmanninum umbidnu skjølini og hesar viðmerkingarnar:

„Tað verður afturvíst, at Tórshavnar kommuna tilvitað hevur seinkað málið, men arbeiðið við gerð av Marknagilsvegnum er eitt stórt vegaprosjekt, sum eyðsæð altíð vil taka langa tíð.

**ad gongdin í málinum**

Tórshavnar kommuna hevur hesar viðmerkingar til arbeiðsgongdina um gerð av Marknagilsvegnum.

Vegastrekkið úr Landavegnum í arbeiðstøkumarkið, niðan fyri A, stóð í gerð frá 1996-1998. Neyðugt var at grava fram við A, fyri at fáa bogan á Ringvegnum í verandi Marknagilsveg, fyri at ferðslan kundi leiðast víðari á ein nøktandi hátt. Henda umskaringin millum Ringvegin og táverandi Marknagilsveg var við eysturmarkið á ognini hjá A. Sjálvur bogin byrjar við eystara endan av verandi bygningi hjá A og endar áraka verandi busslumma í ovara borði við Skúlaheimið.

Á vári 2000 var endalig støða tikin til, at atkomuviðurskiftini til traðirnar oman fyri Marknagilsvegin skuldi verða úr framtíðarvegnum úr Dánjalstrøð. Hæddin á vegastrekkinum eystan fyri A kundi nú ásetast, tá ið atkomuviðurskiftini til traðirnar vóru loyst við vegnum úr Dánjalstrøð.

Tað vóru sostatt tekniskir spurningar sum gjørdu, at strekkið fram við ognini hjá A ikki kundi gerast beinanvegin, men mátti loysast í sambandi við liðugtgerð av vegastrekkinum eystan fyri ognina, og ikki fíggjarlig viðurskifti hjá Tórshavnar kommunu.

Viðmerkjast skal, at fyribilsvegurin til ognina hjá A er tann gamli Marknagilsvegurin við tillagingum.

Á ástaðarfundi hin 02.12.1997, fundarfrásøgn hjáløgd, skjal 1, har umboð fyri eigararnar av matr.nr. …, Tórshavn, Tórshavnar kommunu og Landsbyggifelagið luttóku, var greitt eigarunum frá ringvegagerðini fram við ognini, og um ætlaða fyribils íbindingarvegin frá Ytra Ringvegi, og gera avtalu um hvussu byggjast skuldi upp móti beninum millum vegin og túnið/lendið omanfyri.

Tað sum gerast skuldi, var sett upp í 9 punktum.

Á fundi hin 21. november 2001, fundarfrágreiðing hjáløgd, skjal 2, var semja um, at nýtt uppskot til avtalu skuldi leggjast fyri A, sum bygdi á fundarfrásøgnina frá 02.12.1997, tí tað var staðiliga frá Tórshavnar kommunu hildið, at fundarfrásøgnin tann 02.12.1997 skuldi verða grundarlag fyri avtaluni og ikki sjálv ein bindandi avtala.

Síðani hevur Tórshavnar kommuna sent, sum klagarin eisini vísir á, 6 uppskot til avtalu, men A hevur ikki vilja góðtikið

avtalurnar. Fyrsta uppskotið var sent 19. apríl 2001, og seinasta uppskotið er sent 20. august 2002. (málsmappa hjáløgd, skjal 3). Samsvarandi avtalur eru gjørdar við allar íbúgvarnar fram við Marknagilsvegnum, hvussu arbeiðið skuldi gerast, og at spurningurin um endurgjald skuldi leggjast fyri metingarnevndina til støðutakan.

Avtalurnar eru sendar metingarnevndini, fyri at kunna hana við hvat partarnir vóru samdir um, alternativt hvussu Tórshavnar kommuna hevði gjørt arbeiðið. (in casu eru allar avtalurnar sendar metingini til kunningar).

Orsøkin til at arbeiðið ikki er liðugtgjørt er, at tað hevur enn ikki eydnast at komið ásamt við A um eina avtalu, hóast uppskotini hava verið mong.

**ad fyribilsatkomuvegin**

Viðvíkjandi atkomuvegnum er at siga, at hesin er fyribils, sum eisini varð greitt frá í desember 1997, av tí at hesin verður niðurlagdur í sambandi við ætlaða vegin úr Dánjalstrøð eystur móti Kongsgili. Við skrivi, dagfest 22. september 2000, hevur A fingið kunningarskriv og tekning av ætlaðu vegaføringini. (skjal 4). Biðið var um viðmerkingar, men A hevur ikki svarað.

Eingin støða er enn tikin til hetta mál hjá Tórshavnar kommunu, tí endaliga avgerðin um vegaføringina liggur hjá traðareigarunum heimanfyri. Kunnandi fundir hava verið við traðareigararnar í býráðssalinum. Hesir hava enn ikki tikið støðu í málinum. Serstøk byggisamtykt skal gerast, tá ið traðirnar heimanfyri so ella so verða útstykkjaðar, tí útstykkjararnir sjálvir gjalda fyri byggibúning av økinum.

Viðvíkjandi ástaðarfundi hin 25. september 2002 er at siga, at A var umboðað av C, F, adv. D og fyri Tórshavnar kommunu G og fyri Landsbyggifelagið H. Á staðnum vóru umstøðurnar visuelt kannaðar og uppmátingar gjørdar. Avtalað var á staðnum, at P/F Landsbyggifelagið skuldi gera eina tekning og kostnaðarmeting, útfrá teimum visuellu eygleiðingunum/ uppmátingum, av breiðkan av vegnum um ánna, at framleggja fyri Tórshavnar kommunu til støðutakan um fyribilsvegurin skuldi breiðkast. Støðutakanin til breiðkanina var send A við skrivi frá B tann 22. (dat. 17.) desember 2002. (skjal 5)

Víst verður til áðurnevnda um Dánjalstrøð, tá ið A biður um partshoyring hin 17.12.2002. Sum áður nevnt er ongin avgerð tikin viðvíkjandi vegnum úr Dánjalstrøð.

Tá ið vegurin úr Dánjalstrøð er endaliga fastlagdur, verður støða tikin til tann endaliga atkomuvegin til matr.nr. …, Tórshavn.

**ad keyp av lendi**

Um keyp viðv. lendi verður víst til skrivið dagfest 4.5.1988 til C har stendur:

"d) Um tað vísir seg seinri, tá viðurskiftini úti við Marknagilsvegin eru komin í rættlag, at meira øki natúrliga kann leggjast aftrat ogn tygara, skal kommunan selja virkinum hetta". (skjal 6)

Áheitan um keyp er svarað við skrivi, dagfest 12. februar 2001, (skjal 7) har boðað verður frá, „at kommunan ikki er sinnað at lata virkinum meira lendi vestan fyri ognina vegna framtíðarætlanir fyri Dánjalstrøð". Svarið er sostatt í samsvari við treytina í skrivinum, dagfest 04.05.1988. Viðmerkjast skal eisini, at Tórshavnar kommuna sambært kommunustýrislógini hevur ávísar reglur at halda seg til við sølu av kommunalari ogn.

Í viðkomandi avtalum við íbúgvar við Marknagilsvegin um vegaatgongd til Marknagilsvegin, er fyrivarni tikið um at vegaatgongdin verður niðurløgd, tá ið vegurin frá Dánjalstrøð verður gjørdur.

**ad síða 4 og 5**

Tað er heldur ringt hjá Tórshavnar kommunu at gera viðmerkingar til møgulig rykti/gitingar, og mett verður at pástandirnir í punktunum ikki eru av týdningi fyri málsviðgerðina.

Tað verður afturvíst, at Tórshavnar kommuna ikki hevur viðgjørt umbønir hjá A. A hevur havt møguleika at síggja málini og fáa ynskt avrit av skjølunum. Tórshavnar kommuna hevur viðgjørt A á sama hátt sum aðrar íbúgvar fram við Marknagilsvegnum.

At enda skal viðmerkjast, at arbeiðið viðvíkjandi breiðkan av Marknagilsvegnum hevur verið drúgt og torført og hevur mangan havt við sær, vegna óvæntaðar umstøður, at planir hava verið broyttir uttan at hetta kann leggjast nøkrum til last.

At enda skal viðmerkjast viðvíkjandi tí fyrisitingarligu málsgongdini í málinum. Roynt hevur verið at gjørt semjur við

íbúgvarnar fram við Marknagilsvegnum fyri í minst møguligan mun at órógva teir, hóast stóra vegarbeiði. Í flestum førum er eydnast at gera avtalur. Hesar avtalur eru lagdar fyri metingarnevndina so hvørt sum tær eru gjørdar, hetta eftir ynski frá metingarnevndini, fyri at hon kundi fylgja við hvussu arbeiðið gekk. Avtalurnar vóru ein liður í grundarlagnum hjá Metingarnevndini, fyri at hon kundi kunna seg um, hvussu Tórshavnar kommuna gekk frá arbeiðinum. Í teimum førum har semja, sum í hesum føri, ikki fekst við eigaran, vóru uppskotini eisini løgd fyri Metingarnevndina av somu orsøk sum fyrr nevnt, at metingarnevndin staðiliga var kunnað um málsgongdina.

Í hesum máli er tikin avgerð tann 23. januar 2003, har lagt er til grund arbeiði, sum Tórshavnar kommuna hevur gjørt og harumframt, at Tórshavnar kommuna skal rinda kr. 150.000,00 í virðisniðurgongd á ognini. Ongin grundgeving er fyri avgerðini, og Tórshavnar kommuna er ikki kunnað um annað tilfar enn tað sum kommunan hevur sent metingarnevndini er lagt til grund fyri avgerðini.

Tessvegna er henda avgerð kærd fyri Føroya Rætt.

Sambært avtalu við umboðsmannin, verða allar viðkomandi saksmappur lántar umboðsmanninum vegna tað annars rúgvismikla tilfar at kopiera."

Við skrivi, dagfest 11. apríl 2003 vóru viðmerkingarnar frá Tórshavnar kommunu sendar A til ummælis.

Við skrivi, dagfest 30. apríl 2003 hevur A latið umboðsmanninum hesar viðmerkingar:

„Víst verður til viðmerkingar frá Tórshavnar kommunu (TK) dagf. 310303. TK J.nr 200300329-3-SG.

Vit skula við hesum gera okkara viðmerkingar til nevnda svarskrivið frá TK. Í høvðusheitum framganga okkara viðmerkingar longu av tí tilfarinum vit hava sent Løgtingsins Umboðsmanni, men eftir okkara fatan eru tó fleiri viðurskifti í svarinum, ið eru ógvuliga merkt av eftirrationalisering, sjálvmótsøgnum og beinleiðis villum.

Vit eru samd við TK í, at eitt tílíkt stórt vegaprojekt eyðsæð

tekur langa tíð. Skula vit ganga út frá tí, hava vit enn logri bíðitíð í væntu, tí okkum kunnugt skal ringvegurin leiðast út á Hamaran á Argjum. Hin vegin hevur TK aldrin givið til kennar, at arbeiðið í sambandi við ogn okkara skuldi bíðja til alt annað viðvíkjandi ringvegnum var liðugtgjørt, hinvegin segði I ið umboðaði TK á ástaðafundi 02.12.1997 at arbeiðini í tá vórðu avtalað hægst fóru at taka ein mánaða, ið eisini má sigast at vera realistiskt í mun til støddina á arbeiðinum.

**ad gongdin í málinum**

Sagt verður, at tað í sambandi við arbeiðið, ið gekk fyri seg niðanfyri hjá A í tíðarskeiðinum frá 1996 til 1998, var neyðugt at avskera atkomuvegirnar til ogn okkara fyri at fáa ein boga í vegin. Til hetta er at siga, TK tá í minsta lagi kundi havt kunna okkum um nevnda trupulleika, og so hevði bíðja við at grivið burtur atkomuvegir okkara. Í skrivi frá B dagf. (27.) 12. februar 2001 verður sagt, at veghæddin til tá ikki varð kend. Hesin pástandur verður afturvístur í skrivi okkara til TK dagf. 7. apríl 2001. Harafturat vísa byggifundarfrágreiðingar í A hevur fingið frá TK, tað ið avtalað varð á byggifundi 15.07.1997, tá varð avtalað at grótlaðing skuldi gerast á strekkinum fram við ogn okkara. (víst verður til kunnandi skriv okkara til Løgtingsins Umboðsmann dagf. 19. februar 2003). Pástandurin hjá TK má tí sigast at vera ódokumenteraður, og eftir okkara fatan ósannur.

Sagt verður, at á vári 2000 varð endaliga støða tikin til, at atkomuviðurskiftini til træðirnar omanfyri Marknagilsvegin skuldu ganga úr framtíðarvegin úr Dánjalstrøð. Aftur her vilja vit vísa til okkara kunnandi skriv til Løgtingsins Umboðsmann dagf. 19. februar 2003. Aftur her er pástandurin frá TK tikin úr leysum lofti.

Tað má sigast at vera sera hugsstoyt, at TK nú eftir 6 ár sigur at tað eru tekniskir spurningar ið gera at arbeiðið ikki er liðugtgjørt, tá ið TK ikki áður hevur kunnað givið eina líkinda frágreiðing. Tað er eftir okkara meting ikki verið nakar vilji at loysa málið.

TK vísir til avtalu ið varð gjørd á ástaðarfundi hin 02.12.1997, og hevur A, eins og TK eisini ger, hildið seg til hesa avtaluna. Sagt verður at TK staðiliga varð hildið, at fundarfrágreiðingin skuldi

bert vera grundarlag fyri avtaluni og ikki sjálv ein bindandi avtala. Hetta er ikki okkara uppfatan av málinum, tí í skrivi frá TK dagf. 19. januar 1998 (J. nr. 15/27. 1997) verður sagt „… *Ein ástaðarfundur hevur verið 2. desember 1997, og hevur kommunan góðtikið tey tiltøk sum har eru avtalað …*“ Annars er at siga, at fyrsta avtalan frá TK er frá 19. apríl 2001, tvs. uml 2½ ár eftir at fundur hevði verið fyrstu ferð.

Sagt verður, sum rætt er, at TK hevur sent okkum 6 avtalur til undirskrivingar, ið vit ikki hava vilja góðtikið. Somuleiðis verður sagt, at líknandi avtala er gjørd við allar íbúgvar fram við Marknagilsvegnum. Arbeiðið er soleiðis ikki liðugtgjørt tí vit ikki hava vilja skriva undir uppá avtaluna.

At TK hevur sent okkum 6 næstan einsljóðandi avtalur til undirskrivingar, er púrasta rætt. Orsøkin til at vit ikki hava vilja skrivað undir, og sum TK eisini áhaldandi er gjørd vart við, eru serstakliga tvey viðurskifti, umframt at vit alla tíðini hava hildið fast um tí gjørdu avtaluna frá 02.12.1997.

Tað eina er, at vit mettu avtaluna avskera okkum frá møguleikanum at krevja TK eftir endurgjaldi fyri mista leiguinntøku. Tí loyvdu vit okkum í skrivi dagf. 19. mars 2002 at senda TK okkara egna uppskot til avtalu, har tann einasta broytingin í mun til avtaluna frá TK var orðingin „*Henda avtalan er endalig fyri nevndu viðurskifti …*“ TK hevur ikki svara okkum viðvíkjandi hesi avtaluni.

Hitt er, at atkomuvegurin frá Dánjalstrøð, sambært uppskotinum frá TK var, og framvegis er ónýtiligur í mun til tann tørvin virksemið á ognini krevur. Okkara krav hevur verið, at vegurin skuldi gerast permanentur, og ikki sum fyribilsvegur. Uppskot við atliti at eini varandi loysn aldrin eru komin frá TK, hóast biðið er um hetta. Orsøkin til at TK helst ikki hevur vilja havt at vegurin skuldi gerast permanentur, man helst vera, at tað uppskotið til veg ið TK er komin við, ikki lýkur krøvini í Almennu byggisamtyktini til tílíkar (hjálagt brot úr byggisamtyktini um vegir). Okkara krav til ein veg, hevur soleiðis alla tíðina verið, at hann skal halda somu krøv ið TK sjálv setur til tílíkar vegir. Tað vil sjálvsagt altíð vera upp til TK at taka avgerð um broytingar í vegakervinum í kommununi, og soleiðis eisini atkomuviðurskift-

unum til ogn okkara í framtíðini. Á teimum fundum vit hava havt við TK, hevur orðingin „fyribils“ soleiðis eisini verið at skilja soleiðis, at vit ikki skuldu vænta okkum eina aðra loysn, og hevur TK heldur ikki verið før fyri at vísa okkum á eina tílíka. Víst verður til skriv okkara til TK. og LU, dagf. 19. februar 2003.

Tað mest áhugaverda í hesum svarinum er tó, at TK fyri fyrstu ferð sigur hví arbeiðið ikki er liðugtgjørt, nemliga tí vit ikki hava vilja skrivað undir tær avtalur í TK er komin við. Umframt nógvu fyrispurningarnir hesum viðvíkjandi, er serliga ein fyrispurningur frá okkum og svar frá TK umvegis teldupost dagf. hin 5. november 2002. Har spyrja vit beinleiðis, um orsøkin til at arbeiðið ikki verður liðugt gjørt er, at vit ikki hava skrivað undir avtaluna við TK, undirforstaðið at TK royndi at avpressa okkum at skriva undir. TK svaraði ikki fyrispurninginum.

Viðvíkjandi viðgerðini og leiklutinum hjá Metingarnevndini, verður víst til okkara kæruskriv dagf. 4. mars 2003 (tykkara málnr. 200300022) og hjálagda svarskrivi frá nevndini dagf. 6. apríl 2003. Út frá svarinum frá Metingarnevndini er okkara niðurstøða, at TK hevur latið Metingarnevnda skilja, at talan er um eina endaliga avgerð viðvíkjandi atkomuvegnum. Hetta má sigast at vera sera álvarsligt, tí vit í telduposti dagf. 17. desember 2002 hava biðið um partshoyring viðvíkjandi vegnum og at avgerðin hjá TK tí skuldi frestast. (soleiðis hava vit enn ikki havt høvi at kunna ella koma við ummæli til nevdu avgerð)

**ad fyribilsatkomuvegin**

Víst verður til skriv okkara til TK, og LU, dagf. 19. februar 2003. Tað einasta vit hava at viðmerkja, umframt tað ið annars liggur í málinum og omanfyristandandi er, at TK okkum kunnugt ikki ger atkomuvegir til privatar útstykkingar. Sum tað eisini framgongur av svarinum frá TK, kunna vit tí ikki at vænta, at nakar vegur fer at verða gjørdur til okkara haðani, sum eisini er víst á áður í hesum skrivi.

Víst verður á støðutakan hjá TK um breiðkan av atkomuvegnum frá Dánjalstrøð samsvarandi skriv frá B dagf. 17. des. 2002, og at avgerð ikki er tikin um vegin. Her hongur also einki saman, sambært nevnda skriv stendur júst, at TK hevur tikið

avgerð um at vegurin verður gjørdur samsvarandi tí tekning, ið fylgdi við avtaluni í skrivi frá Advokatvirkinum dagf. 20. aug. 2002. A hevur framvegis einki hoyrt frá TK viðvíkjandi umbønini um partshoyring frá 17.12.2002.

**ad keyp av lendi**

Víst verður til skriv frá 4.5.1988 til C, har TK játtar at selja virkinum meira øki afturat ognin tá viðurskiftini við Marknagilsvegin eru fullkannað. Somuleiðis verður víst til skriv frá TK dagf. 12. febr. 2001, har TK gongur frá sínum liftum orsaka av framtíðarætlanunum fyri Dánjalstrøð. TK sigur seg hava ávísar reglur sambært kommunustýrislógini at halda seg til. Harumframt verður sagt, at í viðkomandi avtalur við íbúgvar við Marknagilsvegin um vegaatgongd til Marknagilvegin er fyrivarni tikið fyri, at vegaatgongdin verður niðurløgd, tá ið vegurin frá Dánjalstrøð verður gjørdur.

Eftir okkara fatan er hetta bert ein hentur máti hjá TK at sleppa uttan um tí avtalu ið er gjørd við okkum. Hvørjar reglur TK hevur at ganga eftir í mun til kommunustýrislógina hevur TK so ongatíð áður kunnað okkum um. Hin vegin hava vit biðið um partsinnlit í tí avtalu ið varð gjørd við J, eigara av matr. nr. 882a, í hevði gjørt gerabýti við TK í sambandi við at hesin hevði latið lendi í sambandi við breiðkanina av Marknagilsvegnum. Á fundinum um partsinnlit hin 16. desember 2002 (sí okkara notat frá fundinum dagf. 28. des. 2002) noktaði annað umboðið fyri TK okkum innlit í nevndu avtalu, ið tey annars høvdu við á fundin. Lovað varð tó at hendan skuldi verða framsend okkum seinni, men hava vit so ikki móttikið hana enn. Somuleiðis halda vit, at TK tekur fram nýggj atlit í mun til upprunaligu avtaluna, ið viðvíkti Marknagilsvegnum og ikki øðrum viðurskiftum, so sum Dánjalstrøð. Samstundis stendur hetta púrasta í ansøgn við tað í er nevnt áður, um at traðareigarnir sjálvir skula gjalda fyri byggibúning av traðunum heimanfyri Dánjalstrøð. Nevnda ætlaða serliga byggisamtyktini, vildu sjálvsagt eisini verið galdandi fyri okkum, og skuldi soleiðis ikki verið til hindurs fyri at TK seldi okkum lendi sum avtalað.

**ad síða 4 og 5**

Viðvíkjandi viðmerkingunum frá TK, fara vit at lata tær standa fyri teirra egnu rokning, og fara soleiðis ikki at bidraga víðari við øðrum, enn tí í nú liggur í málinum.

At enda skal vera sagt, at hetta málið fyri okkum hevur kravt óneyðuga nógva orku, bæði fíggjarlig og persónliga. Vit kunna soleiðis ásanna, at TK ikki hevur hildið seg til sína uppgávu at tæna borgaranum, heldur tvørtur ímóti.

Ásannandi, at óansæð hvørja niðurstøðu Løgtingsins Umboðsmaður fer at hava í málinum, fer hetta sum so ikki at geva okkum nakran vinning, ella gottgera missin vit hava havt. Hinvegin er tað okkara vón, at Tórshavnar kommuna í framtíðini lærir at virða rættindini hjá borgarunum í kommununi.“

Við skrivi, dagfest 5. mai 2003 vóru viðmerkingarnar frá A sendar Tórshavnar kommunu til ummælis.

3. juni 2003 bað B, adv. um at fáa longt ummælisfreistina í eina viku, og varð hetta játtað henni.

Við skrivi, dagfest 12. juni 2003 boðaði umboðsmaðurin Tórshavnar kommunu og A frá, at av tí, at ummælisfreistin hjá Tórshavnar kommunu var farin og hann einki hevði frætt frá kommununi, bleiv hendan klagan nú tikin upp til endaliga viðgerð.

Við skrivi, dagfest 12. juni 2003 (móttikið 16. juni) hevur Tórshavnar kommuna sent umboðsmanninum hesar viðmerkingarnar:

**„Við skrivi, dagfest 5. mai í ár, biður Umboðsmaðurin um viðmerkingar til viðmerkingar frá A, dagfestar 30. apríl, til klagu frá sama um handfaringina hjá Tórshavnar kommunu av málinum um breiðkan av Marknagilsvegnum fram við ognini, matr.nr. …, Tórshavn.**

**ad gongdin í málinum**

Um kunning í málinum verður víst til ástaðarfundin 02.12.97, har stendur: „Ætlanin við fundinum var, at greiða eigaranum frá Ringvegagerðini fram við ogn hansara, um ætlaða fyribilsíbindingarvegin frá Ytra Ringvegi, og annars at gera avtalu við hann um, hvussu bygt verður upp móti bakkanum/beninum millum vegin og túnið/lendið omanfyri.

Víst verður til áður givna frágreiðing um, hví vegurin ikki kundi gerast liðugur, nevniliga at atkomuviðurskiftini hjá ognunum oman/heiman fyri A skuldi loysast við nýggjum vegi oman fyri ognirnar, og tí kundi hæddin á Marknagilsvegnum nú endaliga setast. Avgerð um gerð av grótlaðing kundi takast, men ikki útinnast fyrr enn hæddin var sett.

Víst verður eisini til byggifundarfrágreiðing, dagfest 28.04.1998, viðvíkjandi øðrum ognara, har víst verður til, at hansara garður ikki kann gerast liðugur, av tí at hæddin á Marknagilsvegnum ikki er endaliga fastløgd.

Tað sum støða er tikin til er, at Marknagilsvegurin skuldi verða so fasaduleysur sum gjørligt. Hetta førir við sær, at framtíðarútstykkingar av traðum heiman fyri A verða íbundnar framtíðarveg úr Dánjalstrøð. Endalig støða til hvussu hesin vegur fysiskt kemur at ganga gjøgnum traðirnar er ikki tikin, tí traðareigararnir hava ikki tikið endaliga støðu sjálvir. Kommununar ynski er, at tá afturmelding er komin frá traðareigarunum, verður lýstur lokalplanur.

Tað verður tí afturvíst, at pástandurin hjá kommununi er ódokumenteraður og ósannur viðv. hæddini á vegnum.

Viðvíkjandi ástaðarfundinum hin 02.12.1997 og støði av honum verður víst til skriv býráðsins hin 31.03.2003.

Viðvíkjandi teimum 6 uppskotunum til avtalu er at viðmerkja, at tær umrøða tað, sum metingarnevndin skal taka støðu til: ognartøkuspurningin, og ikki pástandin um mistar leiguinntøkur, og verður í hesum sambandi víst til skriv dagfest 6. apríl 2003 (hjáløgd frá Umboðsmanninum) frá metingarnevndini til A um heimildina frá metingarnevndini.

Viðvíkjandi atkomuvegnum, verður hesin fyribils vegna ætlanir hjá Tórshavnar kommunu/traðareigarunum sum varandi loysn í sambandi við útstykking av traðunum. Sambært uppskoti til avtalu verður verandi vegur beinkaður, asfalteraður, gøtuljós og bilverjur verða sett upp, sum ger at ferðslan verður tryggjað um áirnar.

Viðvíkjandi undirskrift á avtalu er nýtt sama mannagongd sum aðrar avtalur, at arbeiðið er farið í gongd, tá ið avtalan er undirskrivað.

Viðv. mannagongdini mótvegis metingarnevndini og kunning til hennara verður víst til áður givna frágreiðing.

**ad fyribils atkomuvegur**

Víst verður til skriv, dagfest 19.02.2003, frá A til B viðvíkjandi partshoyring hvat viðvíkur íbindarvegi í Dánjalstrøð: „í brævi tygara siga tygum, at tað má vera talan um eina misskiljing, tá ið vit biðja um partshoyring viðvíkjandi íbindarvegnum í Dánjalstrøð.

Til hetta er at siga, at tá ið vit biðja um partshoyring um íbindarvegin í Dánjalstrøð, so meina vit við íbindarvegin, og ikki framtíðarvegin oman fyri Marknagilsvegin, íbinding í Dánjalstrøð."

Nógvir fundir hava verið hildnir um atkomuvegin til ognina hjá A, sum hevur ført við sær eina broytta avtalu. Hetta hevur verið málsgongdin, har A og advokatur teirra hava verið við í málsgongdini alla tíðina og hava komið við teirra viðmerkingum til avtaluna, sum so aftur hevur havt ávirkan á orðingina í avtaluni.

**ad keyp av lendi**

Víst verður til áður givnu viðmerkingarnar hjá kommununi.

Viðvíkjandi innlit í avtaluna hjá J. Avtalan hjáløgd til kunningar. At enda skal viðmerkjast, at eisini fyri Tórshavnar kommunu hevur málsviðgerðin mótvegis A verið sera tíðarkrevjandi, og stendst hetta mest av, at A hevur tulkað ástaðarfundin hin 02.12.1997 sum eina avtalu og ikki sum uppskot til avtalu um arbeiðir í sambandi við ognartøku."

Við skrivi, dagfest 17. juni 2003 vóru hesar viðmerkingarnar sendar A til kunningar.

## *Niðurstøða*

*Klagan frá A snýr seg um handfaringina hjá Tórshavnar kommunu av málinum um breiðkan av Marknagilsvegnum fram við ogn klagarans. Klagan verður viðgjørd við støði í teimum punktunum, sum eru sett upp í klaguni.*

*Í klaguni greiðir A frá, at málið byrjaði í 1997, men framvegis ikki er avgreitt, tá klagan varð send umboðsmanninum í jan. 2003.*

*Eg skal í hesum sambandi vísa til § 18, stk. 1 í Umboðsmanslógini, har ásett er, at lógin kemur í gildi 1. jan. 2001, og at eg tí eri avskorin frá at taka støðu til tey viðurskiftini, sum liggja frammanundan hesum degi.*

*Á síðu 3 í klaguni vísir A á, at Tórshavnar kommuna hevur noktað at lata/selja A lendi aftrat Matr.nr. … Spurningurin, um hvørt A kan stuðla nakran rætt uppá skrivið, dagfest 4. mai 1988 ella á øðrum grundarlagi krevur eina próvførslu, sum liggur uttan fyri karmarnar av eini umboðsmanskanning. Eg geri tí ikki meira við henda spurning.*

*A hevur í klaguni víst á, at kommunan í samskiftinum teirra millum hevur havt 8 ymisk journalnummar, og at hetta hevur gjørt umstøðurnar hjá virkinum sera truplar. Eg dugi ikki rættiliga at síggja trupulleikan í hesum, tí journalskipanin skal einans hjálpa myndugleikanum at halda skil á málunum, og hetta eigur tí als ikki at nerva borgaran yvirhøvur. A vísir í hesum sambandi til ein fyrispurning um skjalainnlit. Eg skal her viðmerkja, at tað ongan týdning hevur fyri rættin hjá borgaranum til innlit, hvussu nógv ymisk journalnummar ein myndugleiki nýtir í einum og sama máli. Hann, ið biður um innlit, skal kunna vísa til málið ella skjalið, sum hann ynskir innlit í. Hetta merkir ikki, at viðkomandi skal kunna vísa til journalnummarið, men einans, at hann skal kunna vísa á málið á ein slíkan hátt, at tað gerst møguligt hjá myndugleikanum at finna málið/skjølini. Í tann mun eitt og sama mál er at finna í fleiri journalnummarum, er tað uppgávan hjá myndugleikanum at finna skjølini fram, sum biðið verður um innlit í.*

*A hevur somuleiðis víst á, at kommunan hevur havt 6 mðr. um at svara einari umbøn um partsinnlit. A vísir í hesum sambandi til svarið frá B, adv., dagfest 9. aug. 2001. Av tí, at talan her er um viðurskifti, sum liggja meira enn eitt ár frammanundan, at klagan er latin mær, kann eg vísandi til § 6, stk. 2 í Umboðsmanslógini ikki viðgera hendan partin av klaguni.*

*A hevur eisini víst á, at Tórhavnar kommuna bert lutvíst hevur viljað svarað fyrispurningum teirra. Sum dømi um hetta verður víst til ein fyrispurning frá A og svarið frá borgarstjóranum í teldubrævi, dagfest 5. juli 2002 og ein annan fyrispurning og svarið frá kommununi í teldubrævi 5. nov. 2002.*

*Fyrispurningurin frá 5. juli er soljóðandi:*

> *„Nú veit eg skjótt ikki hvat er rættast at gera. Nú eru fleiri enn 5 ár farin síðani breiðkanin av Marknagilsvegnum fór fram við bygninginum hjá A og hevur bygningurin hesa tíðina ligið við ónøktandi til og frákomingarviðurskiftum. Síðani tá eru ein ørgrinna av einsljóðandi avtalum komnar frá kommununi/B, hóast vit á nógvum fundum hava avtalað nakað annað. Vit hava sjálvir (D) sent kommununi eina avtalu, ið er í samsvari við tað ið er avtalað, men einki svar er enn komið. Havi fingið at vita, at onnur ið búgva fram við Marknagilsvegnum hava veri fyri somu forháling? kanska kundi tað veri uppá pláss við eini forkláring!*
>
> *Hin 15. januar 2002 fekk eg so teldupost frá H (niðast á hesi síðuni) um at nú var arbeiðið at laga fram við bygninginum fari í gongd. Eg helt, at nú mundi so endiliga endi vera fingin á marruni, ið okkum hevði verið fyri seinastu nógvu árini. Men nei, fyri nøkrum mánaðum síðani steðgaði so arbeiðið aftur, og er nú als ikki komandi fram við bygninginum niðanfyri. Týðiligt er, at arbeiðið er næstan liðugt, og er tað mær púrasta óskilligt hví snøklarnir og trappan oman á Marknagilsvegin ið eru eftir, skulu bíða til allar aðrar grótlaðingar á Marknagilsvegnum eru lidnar.*
>
> *Kunna tit siga mær hvat liggur aftanfyri?*
>
> *Nær arbeiðið verður liðugt?*
>
> *Annars var eisini gjørd ein avtala um at vegurin til bygningin, ið gongur frá Dánjalstrøð, skuldi „beinkast“ so tað kann koyrast vandaleysari til og frá bygninginum. Hvat verður av hesum?*
>
> *Eg gangi út frá at Tórshavnar kommuna fer at standa við tær avtalur ið eru gjørdar við A?“*

*Svarið frá borgarstjóranum er soljóðandi:*

> *„Sjálvsagt vilja vit standa inni fyri teimum avtalum vit hava gjørt. Akkurát hví arbeiðið „dregur út“ veit eg ikki rættuliga, men tað verður rópt frá øllum síðum, um at fáa tey ymisku økini gjørd liðug. Sum eg havi skilt, er trupult at fáa laðingina av gróti at ganga skjótari. Men nógv er at laða og tað tekur tíð. Hinvegin kunnu vit vera samdir um, at tit hava bíða ríkiliga leingi. Vónandi fáa vit gjørt laðingina móti Marknagilsvegnum endaliga lidna skjótt.*

*„Beinkanin“ av vegnum til bygningin var eisini avtalað og at gøta skuldi gerast út til busskýlið (1-2 m.) Hvønn tíðarhorisont vit tosa um veit eg ikki rættuliga, men havast má í huga, at vit liva í eini „agurkutíð“ har trupult er at fáa arbeiðsmegi nokk.*

*Tolin trívst, sigur orðatakið, men máti skal vera við toli.“*

*Viðvíkjandi fyrispurninginum og svarinum frá borgarstjóranum er at siga, hetta svarið er sent 20 minuttir aftaná, at fyrispurningurin er móttikin. Hesin fyrispurningur er tí svaraður sera skjótt, men havandi í huga, at tað tá eru liðin 5 ár síðani arbeiðið fór í gongd, er tað ikki nøktandi, at kommunan, tá biðið verður um hetta, ikki kann geva A eina neyvari frágreiðing um, hví arbeiðið framvegis ikki er liðugt. Eg haldi ikki, at tað í hesum førinum er nøktandi at svara, at orsøkin er, at „tað verður rópt frá øllum síðum“.*

*Fyrispurningurin frá A 5. nov. 2002 er soljóðandi:*

*„Nú er nakað long tíð umliðin síðani tit høvdu ástaðarfund við C og D um tilkomuvegin um Markná, tvs. frá Dánjalstrøð til bygningin á …, umframt ein fund fyrr sama dag. Eg undrist á, hví vit ikki hoyra nakað frá tykkum.*

*Ert tú tann rætti at spyrja, og um ikki hvønn skal eg so venda mær til?*

*Hvør hevur í heila tikið málið hjá kommununi?*

*Staðfestu tit á fundinum at tað lættliga/neyvan/ómøguliga letur seg gera at breiðka vegin har træbrúgvin er?*

*Hava tit gjørt nakrar ætlanir viðvíkjandi vegnum?*

*Nær verður vegur, um hann í heila tikið verður gjørdur, liðugur?*

*Koma fundarfrágreiðingar frá fundunum?*

*Ætla tit í gongd aftur at gera arbeiðið við grótlaðingini móti Marknagilsvegnum liðugt og nær?*

*Skuldi eg skilja teg rætt, tá íð tú fyri nøkrum mánaðum segði mær, at øll tey ið høvdu skrivað undir avtaluna við TK høvdu fingið gjørt síni arbeiði, undirforstaðið at skrivaðu vit ikki undir so verður arbeiðið ikki gjørt liðugt?*

*Vit hava tosað við grótlaðararnar, teir siga at teir eru givnir við arbeiðinum, tí teir ongar tekningar hava at arbeiða eftir. Kanst tú siga mær hví hetta er so, og hvør hevur ábyrgdina av tí?*

*Óneyðugt hjá mær skuldi veri at sagt, at tit (TK) nú eru við at vera dekan og grovir. Nú eru also skjótt 6 ár síðani TK fór í gongd við hetta málið og vit eru ikki komin til nakra nýtiliga loysn. Hetta er stór skomm!!"*

*Svarið frá kommununi er soljóðandi:*

*„Undirritaði hevur málið Marknagilsvegurin, so alt samskifti skal stílast til …@torshavn.fo*

*Umsitingin hevur biðið LBF um eina kostnaðarmeting og eina plantekning. Hetta verður lagt fram og viðgjørt á mikudagsfundi í morgin.*

*Tá fundurin hevur verið, skriva vit eina frágreiðing og senda tær hana via e-mail."*

*Í teldubrævinum til kommununa 5. nov. 2002 verða settir fleiri nágreiniligir spurningar um arbeiðið. Í svarinum, sum verður sent A uml. 2 tímar seinni, verða hesir spurningarnir ikki svaraðir, men sagt verður, at málið verður viðgjørt á fundi dagin eftir, og at ein frágreiðing fer at verða gjørd frá hesum fundinum og send A við teldubrævi.*

*A endurtekur í ummælisskrivinum, dagfest 30. apríl 2003, at kommunan ikki hevur svarað settu spurningunum. Tórshavnar kommuna hevur ikki afturvíst hesum, og einki er í skjølunum frá kommununi, sum vísir, hvørki at spurningurin er settur ella, at hann er svaraður.*

*Hetta er als ikki nøktandi. Tað er í lagi, at ein myndugleiki ikki kann svara partinum uppá standandi fót uppá settar spurningar, og at tað eins og í hesum førinum verður lovað at venda aftur við einum svari. Men tað er als ikki í lagi, at parturin síðani einki hoyrir aftur. Eg fari tí at geva kommununi eina átalu fyri hesa mannagongdina.*

*A hevur klagað um, at kommunan ikki hevur gjørt frágreiðingar frá fundi teirra millum, heldur ikki tá biðið hevur verið um tað. Til hetta er at siga, at tað er vanligt at myndugleikar gera frágreiðingar frá fundum, eisini í málum, har teir ikki hava skyldu til tess. Eg skal eisini vísa til § 6 í lógini um innlit í fyrisitingina, har ásett er, at myndugleikin í málum, har avgerð fer at verða tikin, hevur skyldu til at skriva upp*

*innihaldið á upplýsingum, ið hava týdning fyri avgerðina í málinum, sum hesin munnliga ella á annan hátt fær kunnleika til, um hesir upplýsingar ikki annars síggjast í skjølunum í málinum.*

*Tað stendur mær ikki heilt greitt, hvat hevur verið umrøtt á hesum fundum, so tí kann eg ikki taka støðu til, um frágreiðing skuldi havt verið gjørd.*

*A hevur eisini klagað um, at felagið ikki í nøktandi mun hevur fingið innlit í tey skjøl/mál, sum biðið er um innlit í. Víst verður til fundarfrágreiðing, sum A hevur gjørt frá innlitsfundinum tann 16. desember 2002 millum A og Tórshavnar kommunu.*

*Í ummælisskrivinum, dagfest 31. mars 2003 afturvísir Tórshavnar kommuna hesum pástandi, og sigur at A hevur havt høvi til at síggja málini og at fáa ynskt avrit av skjølunum.*

*Av tí, at semja ikki er millum partarnar, um hvat er farið fram á fundinum teirra millum 16. des. 2002, kann eg ikki taka støðu til, um klagarin hevur fingið innlit í nøktandi mun. Eg geri tí ikki meira við hendan partin av klaguni. Tað er tó einki, ið forðar A í at biðja um innlit av nýggjum.*

*A hevur klagað um, at Tórshavnar kommuna ikki hevur svarað umbøn teirra um partshoyring í sambandi við gerð av íbindingarvegi millum Matr.nr. … og Dánjalstrøð, sum var sett fram í teldubrævi 17. des. 2002 og í einari áminning í teldubræv frá 7. jan. 2003.*

*Í ummælisskrivinum, dagfest 31. mars 2003 sigur Tórshavnar kommuna, at eingin avgerð er tikin hesum viðvíkjandi. Eg haldi tí einki grundarlag vera fyri at gera meira við hendan partin av klaguni.*

*A hevur klagað um, at Tórshavnar kommuna ikki hevur latið teimum eitt skjalayvirlit yvir skjølini í málinum, eins og umbiðið í teldubrævi 7. jan. 2003, ið er ein áminning á teldubræv frá 17. des. 2002. Umbønin er soljóðandi:*

> *„Vísandi til fundin í gjár um innlit í málið, og samsvarandi § 10, 1. stk. 2), fari eg at biðja um yvirlit yvir allar aktirnar í teimum einstøku málunum t.e. skjalayvirlit“*
>
> *B, adv. svarar hesum fyrispurningi soleiðis í skrivi, dagfest 26. jan. 2003:*
>
> *„Tygum nevna harumframt „eisini fari eg at biðja um yvirlit yvir aktirnar í teimum einstøku málunum“.*

*Gerið so væl at útgreina fyri G, hvørjar aktir tygum biðja um yvirlit yvir."*

*Hetta svarið kann als ikki sigast at vera nøktandi. A vísir beinleiðis til fundin dagin fyri, har givið var teimum innlit í málini viðv. breiðkanini av Marknagilsvegnum fram við ogn teirra. Tað er eingin ivi um, at tað er eitt skjalayvirlit yvir skjølini í hesum somu málum, sum A biður um. Eins og A vísir á, eru slík journalyvirlit beinleiðis fevnd av rættinum til innlit, bæði partsinnliti sambært Fyrisitingarlógini og almennum innliti sambært Innlitslógini.*

*Umframt at geva Tórshavnar kommunu eina átalu fyri málsviðgerðina í hesum sambandi, fari eg at mæla kommununi til, um hetta ikki longu er gjørt, at taka hesa innlitsumbønina frá A uppaftur til viðgerðar.*

*A hevur klagað um, at Tórshavnar kommuna hevur viðgjørt teir verri enn aðrar borgarar í økinum, tí kommunan hevur tikið øll onnur arbeiði framum hetta. A hevur tó einki prógv ført fyri hesum pástandi teirra. Eg haldi tí ikki grundarlag vera fyri at gera meira við hendan partin av klaguni.*

*A hevur eisini klagað um, at Tórshavnar kommuna hevur nýtt ódokumenteraðar pástandir, fyri ikki at gera grótlaðingararbeiði fram við ogn teirra liðugt. Víst verður í hesum sambandi til svarið frá advokatinum 12. febr. 2001 og aftursvar frá A 7. apríl 2001.*

*Av tí, at talan er um viðurskiftir sum liggja meira enn 1 ár frammanundan, at klagan var latin mær, kann eg vísandi til § 6, stk. 2 í Umboðsmanslógini ikki viðgera hendan partin av klaguni.*

*At enda í klaguskrivinum heitir A á umboðsmannin um eisini at hyggja at øðrum viðurskiftum í málinum enn teimum, sum eru nevnd í klaguskrivinum. Eg skal í hesum sambandi vísa á § 6, stk. 1 í Umboðsmanslógini, har ásett er, at ein og hvør kann senda umboðsmanninum klagu um tær í § 4 nevndu umsitingareindir. Fyri at talan kann vera um eina klagu, krevst at viðkomandi í klaguni sigur, hvønn myndugleika og hvat tað er, sum viðkomandi ynskir at klaga um. Umboðsmaðurin viðger tí ikki ikki-útgreinaðar áheitanir sum hesa.*

Eg mælti, sum nevnt kommununi til, um hetta ikki longu var gjørt, at taka innlitsumbønina frá A uppaftur til viðgerðar við atliti at skjalayvirlitunum í málinum. Hvørgin parturin hevur síðani gjørt vart við seg, og rokni eg tí við, at hesi viðurskiftini eru komin í rættlag.

# 25. Persóns-, familju- og arvamál

## 25.1. Klaga um noktan av navnauppkalling

*Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eitt navnamál, har Navnanevndin hevði noktað foreldrunum at navngeva dóttir teirra Victoria eftir abbanum Victor. Í avgerðini, sum seinni er staðfest av Løgmálaráðnum, sigur nevndin, at umrødda navn í góðkenda fólkanavnalistanum er stavsett Viktoria, at talan ikki er um beinleiðis uppkalling, eins og ásett er í Kunngerð nr. 71 frá 29. juni 2002, og at nevndin tí ikki kann játta umsóknini.Umboðsmaðurin kom til ta niðurstøðu, at kunngerðin ikki er í samsvari við Navnalógina, tí at hvørki lógin ella viðmerkingarnar siga nakað um, at undantak frá málreglunum er avmarkað til beinleiðis uppkalling. Umboðsmaðurin hevur tí mælt Løgmálaráðnum til at viðgera umsóknina av nýggjum sambært galdandi reglunum í lógini, og at broyta kunngerðina, soleiðis at hendan verður samsvarandi lógini. ( J.nr. 200300009).*

### Klagan

A hevur vegna B og C sent umboðsmanninum eina klagu í sambandi við, at Løgmálaráðið hevur staðfest eina avgerð hjá Navnanevndini um at nokta teimum at navngeva dóttrina Victoria. Klagan er soljóðandi:

„Vegna hjúnini B og C, … loyvi eg mær at kæra eina avgerð tikna av Navnanevndini og staðfesta av Løgmansskrivstovuni (Løgmálaráðnum), sambært hvørjari kærararnir ikki fingu loyvi at navngeva dóttur teirra, fødd …, Victoria.

Heitt verður á umboðsmannin, um so er, at viðgerðin av kæruni gevur grund til tess, at biðja Løgmálaráðið taka málið til nýggja viðgerð við atliti til at veita nevnda loyvi.

### Gongdin í málinum

Við brævi, dagfestum 5. august 2002, sendu kærararnir umsókn til Navnanevndina um loyvi til uppkalling eftir tí nýggju navnalóggávuni. Tey ynsktu at nevna dóttrina Victoria eftir abbanum, Victor … Umsóknin verður viðløgd hesi kæru sum skjal 1.

Navnanevndin svaraði aftur við brævi, dagfestum 19. august 2002, og boðaði frá, at nevndin ikki hevði lógarheimild til at játta navnasniðið Victoria. Brævið frá Navnanevndini verður lagt við sum skjal 2.

Tann 26. september 2002 skrivaðu kærararnir til D, løgmálaráðharra, við kæru um avgerðina hjá Navnanevndini. Kæruskriv teirra verður lagt við sum skjal 3.

Løgmansskrivstovan svaraði aftur tann 5. november 2002. Kærararnir fingu ikki viðhald í kæruni, og verður brævið lagt við sum skjal 4.

Tann 25. november 2002 skrivaðu kærararnir av nýggjum til landsstýrismannin. Brævið verður lagt við sum skjal 5. Løgmálaráðið svaraði aftur tann 12. desember 2002, men heldur ikki hesa ferð eydnaðist kærarunum at fáa viðhald í kæruni. Brævið frá Løgmálaráðnum verður lagt við sum skjal 6.

**Lógargrundarlagið**

Fyrsta føroyska navnalógin var løgtingslóg nr. 142 frá 8. oktober 1992.

Sambært § 1, stk. 3, í hesi lógini varð ásett at „navnið skal vera í samljóði við føroyskar málreglur. Gjørdur verður listi við viðurkendum nøvnum."

Í november 1999 setti landsstýrismaðurin í lógarmálum eina nevnd at endurskoða navnalógina. Frágreiðingin frá hesi nevndini, ið varð latin í juni 2001, er til skjals sum skjal 1 til uppskotið til løgtingslóg um fólkanøvn, ið varð lagt fram á tingi tann 16. oktober 2001 av landsstýrinum (løgtingsmál nr. 13/2001).

Sambært frágreiðingini frá nevndini hevur ein av uppgávunum verið at umhugsa, um reglurnar um fornøvn eiga at verða broyttar soleiðis, at eisini onnur fyrilit, enn bert tey málfrøðiligu, skulu havast í huga, tá ið avgerð um góðkenning av nøvnum verður tikin. Nevndin sigur, at „hesi fyrilit kunnu t.d. vera, at nøvn, hóast tey ikki lúka reglurnar um upprunastavseting, hava vunnið hevd við siðvenju gjøgnum fleiri ættarlið, og soleiðis kunnu sigast at vera ein siðsøguligur partur av føroysku mentanini."

Tá kemur til gjøllari viðgerð av spurninginum um reglur fyri fornøvnum, kundi nevndin ikki semjast. Nevndarlimirnir, ið vóru 6

í tali, býttu seg sundur í tveir eins stórar partar, harav annar parturin vildi hava reglurnar stórtsæð óbroyttar, og endin var, at nevndin kom við tveimum alternativum uppskotum til orðingar av nýggjari § 2, stk. 4, í lógaruppskotinum. Annars verður víst til nevndarfrágreiðingina, serliga pkt. 5.2.1, ið viðger innihaldslig krøv til fornøvn. Nevndin tykist kortini at vera samd um eina eyglýsing av hugtakinum um, at navn skal vera í samljóði við málreglurnar og sigur um hendan spurning:

> „Kravið um at navnið skal vera í samljóði við málreglurnar, sipar sostatt til at navnið – uttan at skula passa sum fótur í hosu til málreglurnar – skal kunna bendast, stavsetast og sigast á føroyskum."

Tað er serliga spurningurin um frávik frá kravinum um málreglur í sambandi við uppkalling, ið verður viðgjørdur av nevndini undir pkt. 5.2.2.1. Nevndin sigur um hendan spurning m.a. „at uppkalling má sigast at vera ein partur av okkara navnamentan, og at ein ítøkilig ónøgd er millum fólk viðvíkjandi galdandi lóg, ið ikki kann sigast at loyva uppkalling, um navnið ikki er í samljóð við málreglurnar, og um navnið ikki finst í føroyskum sniði." Viðvíkjandi uppkalling í ættini leggur nevndin til grund, at hetta í ein ávísan mun er vanligur siður. Semja er lutvíst í nevndini um, at undantak tí kann verða loyvt frá kravinum um, at navnið skal vera í samljóð við málreglurnar, tá talan er um uppkalling. Í uppskotinum til nýggja navnalóg, sum nevndin lat frá sær, var úrslitið viðvíkjandi fornøvnum, at nevndin, sum nevnt, býtti seg í 2 partar, tá tað kom til orðing av § 2, stk. 4, í lógini.

Fyrra uppskotið ljóðar soleiðis:

Stk. 4: „Navnanevndin kann eftir umsókn gera undantak frá ásetingini í § 1, stk. 2, 1. pkt., viðvíkjandi fornøvnum. Á sama hátt kann undantak gerast frá stk. 2 (kravið um samljóð við føroyskar málreglur). Um undantak verður gjørt eftir 1. ella 2. pkt., er tað ein treyt, at navnið ikki finst í føroyskum sniði frammanundan."

Hitt uppskotið var soljóðandi:

Stk. 4: „Navnanevndin kann eftir umsókn gera undantak frá ásetingini í § 1, stk. 2, 1. pkt., viðvíkjandi fornøvnum. Á sama hátt kann undantak gerast frá stk. 2."

Tá nýggja uppskotið til navnalóg varð lagt fram á tingi tann 16. oktober 2001, var tað stórt sæð uppskotið frá nevndini, ið lagt varð til grund. Viðvíkjandi orðingini av § 2, stk. 4, varð tann fyrri møguleikin frá nevndini valdur, og skuldi tað sostatt verið ein treyt fyri møguligum undantaki at navnið ikki fanst í føroyskum sniði frammanundan.

Galdandi navnalóg er løgtingslóg nr. 41 frá 26. mars 2002, og er tað serliga hesar reglur, ið hava týdning:

§ 2, stk. 2: „Navnið skal vera í samljóð við føroyskar málreglur."

§ 2, stk. 4: „Navnanevndin kann eftir umsókn gera undantak frá stk. 2, tá ið uppkallað verður eftir fólki í ættini. Landsstýrismaðurin ásetir í kunngerð nærri reglur um undantøk."

§ 21, stk. 2: „Navnanevndin tekur avgerð í málum, ið løgd verða fyri hana eftir § 2, stk. 3 og 4."

§ 21, stk, 3: „Avgerðir hjá navnanevndini eftir stk. 2 kunnu kærast til landsstýrismannin."

**Forsøgan til galdandi navnalóg**

Viðgerðin á løgtingi av lógaruppskotinum er til skjals í tveimum tingmálum: Tingmál nr. 13/2001 og tingmál nr. 86/2001. Uppskotið til nýggja løgtingslóg um fólkanøvn varð, sum frammanfyri nevnt, lagt fram av D, landsstýrismanni, vegna landsstýrið tann 16. oktober 2001. Orðaljóðið í uppskotinum til orðing av § 2, stk. 4, var einsljóðandi og „trengra" orðaljóðið, sum nevndin hevði sett fram. Tað var sostatt, sambært uppskotinum, ein treyt fyri at loyva undantaki, at navnið ikki fanst í føroyskum sniði frammanundan.

Úr viðmerkingunum til uppskotið skal verða nevnt, at í almennu viðmerkingunum, verður endurtikið, at „ávíst kjak og ávís ónøgd støðugt hevur verið, serliga viðvíkjandi ásetingunum í lógini um fornøvn og verður mett, at tíðin nú er komin til, at lógin verður endurskoðað við atliti at broytingum."

Víðari verður sagt, at tann nevndin, ið sett varð av landsstýrismanninum at endurskoða lógina, m.a. hevði fingið til uppgávu at umhugsa, um reglurnar um fornøvn áttu at verða broyttar soleiðis, at onnur fyrilit, enn bert tey málfrøðiligu, skuldu havast í huga. Víðari verður sagt í almennu viðmerkingunum, at uppskotið til nýggja navnalóg byggir á frágreiðingar og uppskot nevndarinnar, tó

verður lagt afturat, at „grundað á tey ummæli, landsstýrismaðurin hevur fingið, viðvíkjandi ætlaðu broytingunum, serliga viðvíkjandi fornøvnum, er tann minni viðgongda orðingin av § 2, stk. 4, sum nevndin hevur skotið upp, sett í uppskotið (frá landsstýrinum)."

Í viðmerkingunum til § 2, stk. 2, (um føroysku málreglurnar) sigur landsstýrismaðurin, at „orðingin er einsljóðandi við § 1, stk. 3, 1. pkt., í galdandi lóg. Ásetingarnar um, at navnið skal vera í samljóði við málreglurnar, sipa m.a. til, at navnið skal kunna bendast, stavsetast og sigast á føroyskum. Við tað, at mett verður, at tað ikki ber til at áseta alment, nær nøvn eru í samsvari við málreglurnar, er orðingin „í samljóði við" meira hóskandi. Henda orðingin gevur samstundis Navnanevndini eitt ávíst rásarúm, tá ið avgerð skal takast sambært stk. 3 og 4."

Í viðmerkingunum til stk. 4 verður sagt:

> „Undantaksreglan í stk. 4 er nýggj. Her verður m.a. hugsað um uppkalling í ættini og onnur føri, har vanligt er at kalla upp. Dømi um hetta er uppkalling av nærskyldum ella vinfólki í sambandi við deyða orsakað av sjúku ella vanlukku… sambært 2. pkt. kann eisini gerast undantak frá málreglum… ásetingin er sostatt ikki ætlað at vera serliga víðfevnd. T.d. kann navnið Leif ikki loyvast, tí Leivur er rætta føroyska sniðið. Heldur ikki kann Christian kallast upp bókstavarætt við tað, at rætti stavsetingarhátturin er Kristian, og Finn kann ikki loyvast, tí Finnur er rætta føroyska sniðið."

Fyrsta viðgerð av uppskotinum var tann 6. november 2001, og málið varð beint í rættarnevndina, sum legði álit fram tann 11. mars 2002. Í álitinum verður m.a. sagt:

> „Landsstýrismaðurin í lógarmálum hevur 26. november 2001 sent nevndini skriv, har hann heitir á rættarnevndina um at gera eitt broytingaruppskot til uppskotið til nýggja navnalóg, soleiðis at landsstýrismaðurin fær heimild at gera reglugerð fyri navnanevndina. Hesum uppskoti tekur samd nevnd undir við.
>
> Grundgeving landsstýrismansins fyri at leggja uppskot til løgtingslóg um fólkanøvn fram er m.a., at tað hevur verið ávíst kjak

og ónøgd, serliga viðvíkjandi ásetingum í verandi lóggávu, sum kom í gildi, tí navnalóggávan var yvirtikin sum føroyskt sermál í 1990 og navnalógin staðfest og kunngjørd í 1992. Serliga er tað spurningurin um fornøvn, sum hevur elvt til kjak og misnøgd… staðfestast kann, at nevndin, sum varð sett at endurskoða navnalógina ikki er samd um tilmæli viðvíkjandi fornøvnum. Í hesum spurningi hevur nevndin býtt seg í tveir líka stórar partar. Annar parturin meinar soleiðis, sum landsstýrið hevur sett fram í uppskotinum § 2, stk. 4, at loyvi skal ikki gevast til undantak, um so er, at navnið frammanundan finst í føroyskum sniði… Hin parturin meinar, at navnanevndin eigur at hava eina generella heimild at geva undantak frá ásetingini um, at „navnið skal vera í samljóð við føroyskar málreglur."

Grundgevingin hjá tí partinum, ið er sinnaður at linka krøvini til navnalógina, er m.a., „at við tað, at „óføroysk" nøvn ikki koma á navnalistan, og við tað, at undantøkini skulu viðgerast sambært umsókn, so verður tað avmarkað, hvussu nógv nøvn verða loyvd sambært umsókn. Ein annar fyrimunur er, at summi fornøvn sum frá líður kunnu fáast í samljóð við føroyskar reglur við – umvegis navnalistan – at ávirka áskoðanina hjá fólki og eggja fólki til, heldur enn at banna ávísum navnasiðum og loyva øðrum."

Ein samd rættarnevnd skeyt upp, at sum nýtt stk. 4 til § 2 skuldi setast soljóðandi:

„Landsstýrismaðurin ger reglugerð fyri navnanevndina."

Rættarnevndin býtti seg í ein meiriluta við 5 limum, ið m.a. førdu fram:

„Bæði í álitinum um endurskoðan av navnalógini og í viðmerkingunum til § 2 í lógaruppskotinum verður gjørt vart við, at heimildin at gera undantak í sambandi við fornøvn skal brúkast í sambandi við uppkalling.

Ein meiriluti í rættarnevndini heldur ikki, at heimildin at gera undantak í sambandi við uppkalling skal vera avmarkað, og setur meirilutin fram broytingaruppskot, sum gevur Navnanevndini

heimild at gera undantak frá føroyskum málreglum í sambandi við uppkalling.

Í sambandi við hetta broytingaruppskotið hevur meirilutin tikið viðmerkingarnar hjá navnanevndini til eftirtektar um at Navnanevndin skal hava greiðar reglur at miða seg eftir, tá ið Navnanevndin skal taka støðu til at geva undantak frá megin-regluni um, at navnið skal vera í samljóði við føroyskar málreglur."

Samsvarandi hesum setti meirilutin fram broytingaruppskot til § 2 soljóðandi:

§ 2, stk. 4, 3. pkt.: „Um undantak verður gjørt eftir 2. pkt, er tað ein treyt, at navnið ikki finst í føroyskum sniði frammanundan uttan í førum, tá uppkallað verður eftir fólki í ættini." (Undirstrikað her, A). Ein minniluti í rættarnevndini uppá 2 limir førdi fram, at navnalógin, ið hevur verið galdandi síðani 1992 hevur roynst væl, og tí skuldi verið óneyðugt at framt broytingar. Minnilutin tók undir við uppskoti landsstýrismansins og harmaðist um, at meirilutin í løgtingsins rættarnevnd mælir til broyting, ið ber í sær eina slaking á lóggávuøkinum, ið ber í sær, at tað, sum er bygt upp síðani galdandi lóg kom í gildi, fer fyri skeyti. Minnilutin vendi sær í sambandi við viðgerðina til Navnanevndina og bað hana siga sína hugsan skrivliga um uppskot meirilutans. Skrivið frá Navnanevndini, sum er dagfest 9. mars 2002, varð lagt við sum nevndarskjal í málinum.

Í nevnda skrivi gongur Navnanevndin ímóti meirilutauppskotinum og førir m.a. fram, at uppskotið frá meirilutanum fer at verða torførari at umsita, enn núgaldandi lóg, sum bert við einstøkum smábroytingum hevur verið fullkomin at kalla. Víðari førir Navnanevndin fram í skrivinum, at „Navnanevndin tekur als ikki undir við hesi orðing (meirilutauppskotinum), tí her verður munur gjørdur á fólki, so tað munar, og har afturat verður tað ógvuliga torført hjá Navnanevndini at umsita hesa lógarregluna." Tí hvat er uppkalling í ættini? Er tað beinleiðis ella er tað eisini síðugreinir? Og hvussu langt aftur? Er tað alt navnið, partur av navninum ella bert einstakur bókstavur? Og hví skal mannamunur gerast?" At enda verður ført fram í skrivinum frá Navnanevndini, at „navnanevndin hevur m.a. lagt doyin á,

at nøvn av norrønum uppruna skulu verða stavsett sambært okkara upprunastavseting."

Onnur viðgerð var í løgtinginum tann 13. mars 2002, og varð broytingaruppskot frá meirilutanum samtykt av løgtinginum við 16 atkvøðum fyri og 8 ímóti, meðan 3 ikki greiddu atkvøðu. Uppskotið varð síðani beint til 3. viðgerð, men áðrenn 3. viðgerð var, boðaði D, landsstýrismaður, frá á tingfundi tann 15. mars 2002, at hann tók málið aftur.

Tað sær út til, at ávísir løgtingsmenn hava havt varhugan av, at hetta fór at henda, tí tann 4. mars 2002 løgdu 3 tingmenn (hesir vóru 3 av meirilutalimunum í rættarnevndini) uppskot fram á ting (tingmál nr. 86/2001) til løgtingslóg um fólkanøvn.

Hetta uppskotið var einsljóðandi orðað sum uppskot landsstýrismansins í løgtingsmáli nr. 13/2001, tó við teimum broytingum innskrivaðum, sum ein meiriluti í Navnanevndini mælir til, og sum varð samtykt við 2. viðgerð í tinginum. Í viðmerking til uppskotini siga teir m.a., at „nú vísir tað seg, at nevndin, undantikið tey bæði tjóðveldisumboðini, mælir til broytingar í uppskotinum hjá landsstýrismanninum. Men vandi er fyri, at landsstýrismaðurin bara tekur uppskotið aftur fyri at hindra at broytingarnar verða samtyktar av tinginum. Fyrr var tingskipanin § 58 orðað soleiðis, at varð uppskot afturtikið, kundi ein og hvør tingmaður taka tað upp aftur á sama viðgerðarstigi, men reglan varð broytt við seinastu tingskipanarbroyting soleiðis, at hetta ikki longur ber til."

Uppskotsetararnir halda, at tað er ódemokratiskt um landsstýrismaðurin, umboðandi ein minniluta í tinginum, skal hava møguleika fyri at hindra at uppskotið verður framt í hesi tingsetu við at taka tað aftur.

Av teirri grund verður sett fram einsljóðandi uppskot og uppskotið í løgtingsmáli nr. 13/2001 við teimum broytingum innskrivaðum, sum ein meiriluti í rættarnevndini mælir til."

Eftir at hetta uppskotið hevði fingið 1. viðgerð tann 8. mars 2002, varð tað beint í rættarnevndina, sum legði álit fram tann 15. mars 2002, t.v.s. sama dag, sum boðað varð frá av løgtingsformanninum, at landsstýrismaðurin hevði tikið fyrra uppskotið aftur.

Nú varð soljóðandi broytingaruppskot sett fram til § 2:

§ 2, stk, 4: „Navnanevndin kann eftir umsókn gera undantak frá

stk. 2, tá ið uppkallað verður eftir fólki í ættini. Landsstýrismaðurin ásetur í kunngerð nærri reglur um undantøk."

Hetta uppskotið varð við 3. viðgerð tann 15. mars 2002 samtykt av løgtinginum við 21 atkvøðum fyri, 9 ímóti og 0, sum ikki atkvøddu. Navnalógin varð sostatt endaliga samtykt av løgtinginum við teirri orðing, sum fylgdi av uppskotinum í løgtingsmáli nr. 86/2001, og kunngjørd sum løgtingslóg nr. 41 frá 26. mars 2002 um fólkanøvn, ið er tann lóg, ið galdandi er í dag.

Við heimild í § 2, stk. 4, í lógini varð kunngerð nr. 71 frá 29. juni 2002 um undantak til navnauppkalling lýst.

Sambært § 1 í hesi kunngerð kann navnanevndin eftir umsókn loyva einum navni, hóast tað ikki er í samsvar við § 2, stk. 2, í lógini, tá ið tað er „beinleiðis uppkalling eftir foreldrum og ommum ella abbum barnsins. Navnanevndin kann eisini í serligum føri gera undantak til uppkalling av systkjum hjá barni ella systkjum hjá foreldrum, ið lata lív undir óvanligum umstøðum."

Sambært § 2 í kunngerðini skal umsókn um undantaksloyvi sendast Navnanevndini skrivliga, og skjalprógv um navnið á viðkomandi ættarfólki og sambandi tess við barnið skal leggjast við umsóknini.

**Kærumálsgrundir**

Gjørt verður í fyrsta lagi galdandi, at navnið Victoria er í samljóð við føroyskar málreglur og sostatt lýkur treytirnar í § 2, stk. 2, í lógini, og tí krevst ikki loyvi til at navngeva eitt barn við hesum navninum.

Til stuðuls fyri hesum sjónarmiði verður ført fram:

Sum frammanfyri greitt frá, førdi tann serkøna nevndin, ið sett varð av landsstýrismanninum til endurskoðan av navnalógini, og sum gav álit frá sær í juni 2001, fram, at eitt navn er í samljóð við málreglurnar, hóast tað ikki „passar sum fótur í hosu til málreglurnar" bert tað kann bendast, stavsetast og sigast á føroyskum. (Sí síðu 24 í álitinum).

Landsstýrismaðurin tekur undir við hesari eyglýsing av samsvari við føroysku málreglurnar í viðmerkingum sínum til § 2, stk. 2, í uppskotinum til nýggja navnalóg, har hann endurtekur omanfyri nevndum útsøgn frá serkønu nevndini orðarætt.

Tað má sostatt leggjast til grund, at bæði mál- og navnaserfrøðin og politiski myndugleikin góðkenna hesa eyglýsing.

Í svarinum frá Navnanevndini til umsókn kæraranna (skjal 2) skrivar nevndin m.a. at navnið Victoria ikki stendur á tí góðkenda fólkanavnalistanum, meðan navnið Viktoria stendur á listanum, og sostatt er í samráð við málreglurnar.

Navnið Victoria kann bæði bendast og sigast á sama hátt, sum navnið Viktoria. Sambært føroysku orðabókini, ið kom út í 1998 (móðurmálsorðabókin), er bókstavurin c tikin við sum leitorð (fyrra bind síðu 176). Sostatt má eisini verða lagt til grund, at bókstavurin c er viðurkendur at kunna verða nýttur í føroyskum skriftmáli. Hetta kann bert føra til ta niðurstøðu, at navnið Victoria bæði kann skrivast, sigast og bendast eftir føroyskum málreglum og sostatt lýkur treytirnar fyri at verða nýtt sum fornavn sambært § 2, stk. 2, í navnalógini. Víðari verður gjørt galdandi, at kunngerð nr. 71 frá 29. juni 2002 fer út um tær heimildir, landsstýrismaður fekk í § 2, stk. 4, við navnalógini, um at áseta nærri reglur um undantøk.

Meðan navnalógin (§ 2, stk. 4) loyvir undantak frá kravinum í § 2, stk. 2, „tá ið uppkallað verður eftir fólki í ættini," krevur kunngerðin, at „tað er beinleiðis uppkalling eftir foreldrum, ommum ella abbum barnsins."

Her verður eitt nýtt krav, sum eitur „beinleiðis uppkalling" innført í kunngerðini, hóast heimild ikki er undir hesum kravinum í lógini. Har afturat kemur at landsstýrismaðurin eftir øllum at døma nýtir hugtakið „beinleiðis uppkalling" øðrvísi enn vanligt, sí í hesum sambandi tað, sum nevnt er frammanfyri um brævið frá Navnanevndini til minnilutan í rættarnevnd løgtingsins, har navnanevndin tekur soleiðis til: „Tí hvat er uppkalling í ættini? Er tað beinleiðis, ella er tað eisini síðugreinir?" Her skynar Navnanevndin, sum eisini er vanligt málbrúk, millum beinleiðis uppkalling, t.v.s. uppkalling í upp og niðurgangandi greinini, og uppkalling í síðugreinini.

Tað sær út sum Navnanevndin, eftir at kunngerðin er komin, hevur gloymt, hvussu hon eyglýsti hugtakið „beinleiðis uppkalling" í mars 2002, tá hon skrivaði til minnilutan í rættarnevndini, tí í svarinum til kærararnar, (skjal 2), sigur Navnanevndin, at „Victoria er ikki beinleiðis uppkalling av navninum Victor – beinleiðis uppkallingin er Victor." Navnanevndin leggur afturat, at nevndin tískil ikki hevur lógarheimild til at játta navnasniðið Victoria.

Tað sær út til, at Navnanevndin á ein ella annan hátt hevur fingið hesa uppfatan frá landsstýrismanninum/Løgmansskrivstovuni, sum

í brævinum, dagfest 5. november 2002, til kæraran (skjal 4) tekur soleiðis til: „Beinleiðis uppkalling eftir persóni, ið eitur Victor, kann sambært orðarættari tulking bert vera sama navnið Victor. At navngeva gentu Victoria eftir abbanum Victor, er tí ikki beinleiðis uppkalling.“ Lagt verður aftur at í brævinum, at „longu av hesi orsøk kunnu tygum ikki fáa viðhald í at Navnanevndin ikki hevði heimild at nokta navnið Victoria.“

Her tykist sum ein nýggj eyglýsing av hugtakinum uppkalling verður sett fram, nevniliga at gentur bert kunnu kallast eftir ommuni og dreingir bert eftir abbanum. Hetta er púra í stríð við alla vanliga uppfatan av fyribrigdinum uppkalling.

Aftur at hesum kemur, at meðan lógin bert tosar um „uppkalling í ættini,“ avmarkar kunngerðin møguleika fyri uppkalling í beinleiðis legg til ikki at kunna vera longur aftur enn eftir ommum og abbum. Hvaðani landsstýrismaðurin søkir sær heimild til hesa avmarking av lógini, er ilt at síggja. Hetta fær kortini ikki týdning í hesum málinum. Í brævinum frá Løgmansskrivstovuni/Løgmálaráðnum til kærararnar, dagfest 5. november 2002, (skjal 4), verður reiðiliga nógv gjørt burtur úr at tulka tingsins vilja í sambandi við málið.

Niðurstøðan í brævinum er tann, at „tað er sjálvsagt, at hann (landsstýrismaðurin) hevur heimildir at seta mørk, m.a. avgera, hvat í lógarinnar høpi skal skiljast við uppkalling, og hvussu langt aftur, ið kann verða farið.“

Hesum eru kærararnir tó ikki samdir í.

Verður hugt at viðmerkingunum hjá meirilutanum í rættarnevndini, verður fyrst sagt: „Grundsjónarmiðið má vera, at øll nøvn, sum føroyingar bera, eru góð nøvn, men tað, sum skal til, er eitt miðvíst arbeiði at greiða foreldrum frá, hvussu summi nøvn eru betur í samsvari við føroyskan málsið og navnasið.“

Víðari verður ført fram av meirilutanum í rættarnevndini, at heimildin at gera undantøk, sum skotið upp av meirilutanum, skal brúkast í sambandi við uppkalling. Víðari sigur meirilutin, at „meirilutin í rættarnevndini heldur ikki, at heimildin at gera undantak í sambandi við uppkalling skal vera avmarkað, og setur meirilutin fram broytingaruppskot, sum gevur navnanevndini heimild at gera undantak frá føroyskum málreglum í sambandi við uppkalling.“ Tað uppskotið var sum kunnugt at loyvast skuldu frávik „tá ið uppkallað verður eftir fólki í ættini.“

Hetta eru sostatt tær avmarkingar, ið meirilutin í rættarnevndini vil seta í lógina í samband við frávik frá kravinum um, at navn skal vera í samljóð við føroyskar málreglur, og hesum eiga Navnanevndin og landsstýrismaðurin at rætta seg eftir.

Tað, at landsstýrismaðurin fær heimild at áseta nærri reglur um undantøk í eini kunngerð, kann ikki loyva honum at avmarka møguleikarnar so nógv, sum gjørt er í kunngerðini, og enntá áseta eina higartil heilt ókenda eyglýsing av hugtakinum „beinleiðis uppkalling" í kunngerðini.

Havast má eisini í huga gongdina í sambandi við viðgerð av málinum í løgtinginum. Tá tað vísti seg, at ein stórur meiriluti í løgtinginum góðkendi uppskotið hjá meirilutanum í rættarnevndini til broytingar, tók landsstýrismaðurin málið aftur úr tinginum fyri at forða fyri, at tann broytta lógin varð samtykt. Løgtingið hevði kortini so stóran áhuga í málinum, at hetta miseydnaðist við tað, at nýtt lógaruppskot varð sett fram, áðrenn hitt varð tikið endaliga aftur, soleiðis sum greitt er frá frammanfyri.

Tað má sostatt haldast, at løgtingið hevur lagt stóran dent á at lógin varð samtykt í tí broytta líkinum. Hetta sæst eisini av, at lógin varð endaliga samtykt av løgtinginum við 19 atkvøðum fyri.

Tað verður eisini ført fram av Løgmáláraráðnum (sí skjal 4), at neyðugt var í kunngerðini at áseta greiðar reglur til Navnanevndina at hava at miða seg eftir. Hetta tykist at vera høvuðsgrundin til tær avmarkingar, ið ásettar eru í kunngerðini um uppkalling í ættini og nýggja hugtakið um „beinleiðis uppkalling," ið kunngerðin ásetir.

Hendan trongdin til at bøta um lóggávustarv løgtingsins kemur eisini til sjóndar í einum svari frá landsstýrismanninum til ein fyrispurning í løgtinginum (løgtingsmál nr. 100-13/2002). Her tekur landsstýrismaðurin m.a. soleiðis til:

> „Verður undantakið strekt enn longur út í ættina, og kravið í kunngerðini um beinleiðis uppkalling slept, soleiðis at loyvi verður givið til at uppkalla uppá tvørs av kynum eins og í dømi 3 [tað er Victoria eftir Victor] hjá spyrjaranum, ber ikki longur til á greiðan hátt at kanna eftir, um tað snýr seg um uppkalling. Avleiðingin hevði verið, at nærum ongin regulering var eftir á økinum, og tá vildi undantak blivið meginregla, og kunngerðin hevði eisini ligið

> uttan fyri heimildarásetingina, tá henda má haldast saman við meginregluna í lógini.“

Hertil er at viðmerkja, at lógin heilt greitt loyvir undantak frá málsliga kravinum við uppkalling í ættini. Tað er tað, sum Navnanevndin hevur at miða seg eftir, tá hon skal taka støðu til umsóknir um tílík undantøk. Navnanevndin skal við øðrum orðum gera av, 1) um tað snýr seg um uppkalling og 2) um hendan uppkallingin er í ættini. Tað kann ikki vera serliga torført hjá einari sakkønari navnanevnd at taka støðu til, tí bæði heitini „uppkalling“ og „ættin“ eru væl lýst í føroyskari traditión. Navnanevndin skal við øðrum orðum í hvørjum einstøkum føri taka støðu til, um hesar báðar treytirnar eru loknar. At tað so í einkulta førinum verður úrslitið, at tað ikki snýr seg um uppkalling, ella at uppkallingin fer út um ættina, er ein spurningur, sum nevndin má taka støðu til í sambandi við viðgerð av umsóknini.

Tað verður ført fram av landsstýrismanninum, at tað er neyðugt við hesum avmarkingum í kunngerðini út um tað, sum lógin ásetir, fyri at nevndin skal hava greiðar reglur at halda seg til.

Her tykist endamálið hjá landsstýrismanninum um greidleika ikki at vera fylgt til fulnar, tá hann í kunngerðini leggur afturat, at tað skal vera loyvt at kalla upp ávís fólk í ættini, „ið lata lív undir óvanligum umstøðum.“ Tað má vera munandi torførari hjá eini navnanevnd at taka støðu til hesa treytina enn tær báðar fyrru, sum lógin ásetur.

Tað verður annars ikki hildin at vera góður umsitingarligur siður, at seta so neyvar reglur upp í einum føri, har ein myndugleiki hevur heimild (og skyldu) til at viðgera eitt mál eftir meting. Í tílíkum førum er ikki loyvt at seta hesa meting undir reglur, sum í roynd og veru skerja møguleikarnar til at meta í hvørjum einstøkum føri.“

## Málsgongdin

Við skrivi, dagfest 5. aug. 2002 søktu B og C Navnanevndina um loyvi at kalla dóttur teirra Victoriu. Skrivið er soljóðandi:

> „Vit loyva okkum hervið at søkja um uppkalling eftir tí nýggju navnalógini.
>
> Vit fingu ein dóttur … Vit ynskja, at hon skal eita Victoria. Vit ynskja at uppkalla hana eftir abba hennara, sum eitur Victor …
>
> Hansara føði- og navnsbræv er viðlagt umsóknini.

Navnið gongur langt aftur í familjuni. Victor … var abbi Victor …

Vit eiga tvær gentir. Uppkalling hevur stóran týðning fyri okkum, tí hin dótturin er eisini uppkallað.

Við vón um at umsókn okkara verður játtað."

Navnanevndin viðgjørdi málið á fundi 16. aug. 2002. Í fundarfrásøgnini stendur soleiðis:

„B og C søkja um navnið *Victoria*. Hetta navn stendur á tí góðkenda fólkanavnalistanum stavsett *Viktoria*. Tey nevna í umsókníni, at tað er uppkalling eftir abbanum í faðirætt, sum sambært navnsbrævi hansara er skrivaður *Victor* … Hetta er ikki beinleiðis uppkalling, bæði tí at nøvnini eru stavað ymist, *Victor* -> *Victoria*, og at her snýr tað seg um uppkalling tvørs av kynjunum báðum. Tí varð samtykt at nokta umsókníni."

Navnanevndin svaraði umsókníni í skrivi, dagfest 19. aug. 2002. Skrivið er soljóðandi:

**„Viðvíkjandi umsókn um navnaloyvi**
Sambært brævi tykkara dagfestum 5. august 2002 søkja tit um loyvi til at geva dóttur tykkara navnið Victoria, sum ikki stendur á tí góðkenda fólkanavnalistanum. Á listanum stendur *Viktoria*. Nevnt verður, at tað er uppkalling eftir abbanum, sum eitur Victor.

1. juli í ár kom nýggj navnalóg, løgtingslóg nr. 41 frá 26. mars 2002 um fólkanøvn, í gildi í Føroyum. Í § 2, stk. 4, stendur: „Navnanevndin kann eftir umsókn gera undantak frá stk. 2 [t.e. at navnið skal vera í samljóði við føroyskar málreglur], tá ið uppkalla verður eftir fólki í ættini. Landsstýrismaðurin ásetur í kunngerð nærri reglur um undantøk". Í kunngerð nr. 71 frá 29. juni 2002 nevndari „Kunngerð um undantak til navnauppkalling" stendur í § 1: „Er navn ikki í samsvari við § 2, stk. 2 í lógini, kann navnanevndin eftir umsókn í sambandi við navnagávu kortini loyva navnið, tá ið tað er beinleiðis uppkalling eftir foreldrum, ommum ella abbum barnsins". Og í § 2, stk. 2, í somu kunngerð stendur: „Umsøkjarin skal veita navnanevndini skjalprógv um navnið á viðkomandi ættarfólki og sambandi tess við barnið".

Kunngerð nr. 71 frá 29. juni 2002 ásetur, at tað skal vera beinleiðis uppkalling, og *Victoria* er ikki beinleiðis uppkalling av navninum *Victor* – beinleiðis uppkallingin er *Victor*. Navnanevndin hevur tískil ikki lógarheimild til at játta navnasniðið *Victoria*."

Við skrivi, dagfest 26. sept. 2002 kærdu foreldrini hesa avgerðina til Løgmálaráðið. Skrivið er soljóðandi:

„**Kæra smb. Navnalógina § 21 stk. 3.**

Lítla Victoria

Vit fingu eina dóttur … . Vit ynskja, at hon skal eita Victoria eftir abba sínum, sum eitur Victor … .

Vit vóru fegin, tá nýggj navnalóg varð viðtikin – Løgtingslóg nr. 41 frá 26. mars 2002 um fólkanøvn, tí í § 2 stk. 4 stendur, at „Navnanevndin kann eftir umsókn gera undantak frá stk. 2, tá ið uppkallað verður eftir fólki í ættini." Navnanevdin kann sostatt gera undantak smb. § 4 stk. 2 at „Navnið skal vera í samljóði við føroyskar málreglur".

**Nokta fyri uppkalling**

Vit sendu eina umsókn til navnanevndina tann 5. august 2002, har søkt varð um uppkalling eftir tí nýggju lógini, so dóttur okkara kundi fáa navnið Victoria eftir abba sínum Victor. Bræv kom frá navnanevndini tann 19. august 2002, sum svarar, at navnanevdin ikki hevur lógarheimild at játta navnið Victoria, tí tað ikki er uppkalling smb. kunngerð nr. 71 frá 29. juni 2002. Bæði brøvini eru viðløgd kæruna.

**Kæra okkara – Victoria eftir Victor**

Vit vilja kæra avgerðina hjá navnanevndina við at vísa til navnalógini, tí í henni stendur, at tað er loyvi at uppkalla eftir fólki í ættini, og tað kann gevast undantak frá, at navnið skal vera í samljóð við føroyskar málreglur. Vit ynskja at uppkalla dóttur okkara eftir abba sínum, sostatt kunnu vit ikki velja navnið Victor men Victoria.

**Ólóglig, avmarkandi og byrðandi tulking**

At siga, at navnanevndin ikki hevur heimild at loyva okkara uppkalling er skeiv og avmarkandi tulking. Tá kunngerðin sigur, at loyvd er „uppkalling eftir foreldrum, ommum ella abbum barnsins" má hetta takast bókstaviliga. Abbi barnins eitur Victor. Uppkalling av gentu eftir Victor er Victoria. Talan er sostatt ikki um manglandi heimild. Talan er um, at navnanevndin ikki vil lata okkum kalla gentuna upp við ynsktu stavsetingini, og at nevndin velur eina avmarkandi tulking. Tey seks fólkini (foreldrini bæði, ommurnar báðar og abbarnir báðir) gerast nú einans trý í tali. Stavrøtt uppkalling er nú bert gjørligt, tá talan er um gentu, eftir „mammu og ommum barnsins.„ Sostatt er talan um eina sera byrðufulla, avmarkandi tulking, sum tí er ólóglig og ógyldug.

Serliga er henda avmarkandi tulking ólóglig, tá hon verður samanhildin við, at kunngerðin í sjálvum sær avmarkar lógina, sum meirilutin á tingi ynskti skuldi loyva siðbundnari stavrættari uppkalling. Tá løgtingið vildi loyva uppkalling av fólki í ættini, er Victoria eftir Victor ikki bert eitt loyvi, sum navnanevndin hevur heimild til at geva loyvi til, men beinleiðis eitt rættarkrav hjá foreldrunum at sleppa at brúka. Tí hevur nevndin bæði heimild og skyldu at loyva uppkallingini.

**Fordømi**

Navnið Victoria er nógv brúkt í ættini. Victor … er oldurabbi dóttur okkara. Hann kallaði upp eina dóttur hjá sær Victoria. Umframt hetta hevur ein abbadóttur og ein langaabbadóttur hjá Victor … eisini fingið navnið Victoria. Victor er brúkt tvær ferðir í familjuni, umframt Victor …, sum er abbasonur Victor …, so er eisini ein annar abbasonur kallaður Victor.

**Viljin á tingi**

Í broytingaruppskotinum sett fram av Helenu Dam á Neystabø, Hans Pauli Strøm, Alfred Olsen, Rúnu Sivertsen og Eyðun Viderø til uppskotið til løgtingslóg um fólkanøvn, sum D legði fram 16. oktober 2001 stendur, at „ein meiriluti í rættarnevndini heldur ikki, at heimildin at gera undantak í sambandi við uppkalling skal vera avmarkað, og setir meirilutin fram broytingaruppskot, sum gevur navnanevndini heimild at gera undantak frá føroyskum málreglum í sambandi við uppkalling".

### Uppskotini

Uppskotið til løgtingslóg um fólkanøvn og sostatt eisini broytingaruppskotið hjá meirilutanum hjá rættarnevndini var tikið aftur tann 15. mars 2002 av D, landsstýrismann.

Nýtt uppskot til navnalóg varð lagt fram og endaliga samtykt tann 15. mars 2002 við 21 ja-atkvøðum og 9 nei-atkvøðum, sostatt ein stórur meiriluti.

### Uppkallingin vann

Sambært álitið til „13 Uppskot til løgtingslóg um fólkanøvn" stendur, at nevndin sum varð sett at endurskoða navnalógina, ikki er samd um tilmælið viðvíkjandi fornøvnum. Nevndin býtti seg í tveir líka stórar partar. Annar parturin meinar, „at navnanevndin eigur at hava eina generella heimild at geva undantak frá ásetingini um, at „navnið skal vera í samljóð við føroyskar málreglur". Grundgevingin hjá tí partinum, ið er sinnaður at linka krøvini til navnalógina, er m.a., „at við tað, at „óføroysk" nøvn ikki koma á navnalistan, og við tað, at undantøkini skulu viðgerast sambært umsókn, so verður tað avmarkað, hvussu nógv nøvn verða loyvd eftir umsókn".

Hetta verður skrivað fyri at vísa á, at tað hava verið tveir partar í stríðnum um hvussu navnalógin skuldi orðast. Tann parturin, sum ynskti, at føroyingar aftur skuldi fáa loyvi at uppkalla, sum siður er í Føroyum, fekk eina lóg ígjøgnum við stórum meiriluta í tinginum. Tó fekk landsstýrismaðurin ein møguleika at gera eina kunngerð smb. § 2 stk. 4 í navnalógini „Landsstýrismaðurin ásetur í kunngerð nærri reglur um undantøk". Landsstýrismaðurin gjørdi eina kunngerð um undantøk til navnauppkalling, sum navnanevndin setti seg føran fyri at umsita, men sum forðar fyri ásetingina í navnalógini, sum gevur loyvi til uppkalling eftir fólki í ættini.

### Kunngerðin er ikki í samsvar við lógina

Kunngerðin er sostatt ikki í samsvar við lógini, men avmarkar hugtakið „í ættini" óneyðuga nógv. Ikki minst, um kunngerðin skal skiljast sum navnanevndin ger tað sum einans trý ávís nøvn til hvørt barnið, er kunngerðin ein byrðandi avmarkandi tulking av lógini, ið má metast vera í stríð við heimildarregluna, legalitets-

prinsippið. Landstýrismaðurin hevur ikki heimild at avmarka uppkallingina so nógv sum hann ger.

**Umbønin**

Vit vilja tí hervið søkja um at fáa loyvið til kalla dóttur okkara Victoria. Hetta skuldi verið loyvi til sambært lógini har tað stendur, at undantak kann gevast, tá talan er um uppkalling í ættini. Eg havi víst á, at navnið Victor og Victoria hevur verið nógv brúkt í familjuni. Kunngerðin hevur tó sera neyvar ásetingar um, hvat verður meint við uppkalling. Vísast skal á, at uppkalling í Føroyum ikki bara hevur verið at uppkalla eina ommudóttur eftir einari ommu, men eisini at uppkalla eina abbadóttur eftir abba sínum. Uppkalling hevur stóran týdning fyri okkum, tí hin dótturin hjá okkum er eisini uppkallað."

Við skrivi, dagfest 5. nov. 2002 svaraði Løgmálaráðið kæruni frá foreldrunum. Skrivið er soljóðandi:

**„Viðvíkjandi kæru um kunngerð um uppkalling**

Løgmálaráðið fekk tann 27. oktober sendandi skriv, dagfest 26. oktober, har tygum kæra í sambandi við, at navnanevndin, vísandi til kunngerð nr. 71 frá 29. juni 2002 ikki kundi geva tygum loyvi til at navngeva dóttur tygara „Victoria" sum uppkalling eftir abba sín „Victor".

Í fyrsta lagi verður kært um, at navnanevndin ikki hevði heimild at nokta navninum Victoria. Sagt verður, at tað er skeiv og avmarkandi tulking av kunngerðini, tá Victoria ikki verður loyvd sum uppkalling eftir Victor. Í øðrum lagi verður ført fram, at tulkingin hjá navnanevndini serliga er í stríð við lógina, tá hon verður samanhildin við, at kunngerðin í sjálvum sær avmarkar lógina, sum meirilutin á tingi vildi skuldi loyva siðbundnari stavrættari uppkalling.

Viðvíkjandi kæruni um, at navnanevndin ikki hevði heimild at nokta navninum Victoria, er at siga, at kunngerðin um navnauppkalling ger undantak til regluna í § 2, stk. 2 í navnalógini, tá tað er beinleiðis uppkalling eftir foreldrum, ommum ella abbum barnsins. Beinleiðis uppkalling eftir persóni, ið eitur Victor kann sambært orðarættari tulking bert vera sama navnið Victor. At navngeva gentu

Victoria eftir abbanum Victor er tí ikki beinleiðis uppkalling. Longu av hesi orsøk kunnu tygum ikki fáa viðhald í, at navnanevndin ikki hevði heimild at nokta navninum Victoria.

Viðvíkjandi tingsins vilja er ivasamt, um tað við rímiligari vissu kann verða víst á, at tingið hevði nakra ávísa støðu til spurningin um avmarking av undantakinum til uppkalling. Í kæruni endurgeva tygum viðmerkingarnar frá rættarnevndini til broytingaruppskotið til nýggju navnalógina, har m.a. verður sagt: „Ein meiriluti í rættarnevndini heldur ikki, at heimildin at gera undantak í sambandi við uppkalling skal vera avmarkað, og setir meirilutin fram broytingaruppskot, sum gevur navnanevndini heimild at gera undantak frá føroyskum málreglum í sambandi við uppkalling.“ Henda viðmerking kann verða fatað so, at als ongar avmarkingar vóru ætlaðar at vera, tá talan er um uppkalling í ættini. Tó er ikki sannlíkt, at hetta var tingsins vilji. Nevnda brot má verða lisið í størri høpi. Í endurgivna brotinum frá rættarnevndini verður sagt víðari: „Í sambandi við hetta broytingaruppskotið hevur meirilutin tikið viðmerkingarnar hjá navnanevndini til eftirtektar um, at navnanevndin skal hava greiðar reglur at miða seg eftir, tá ið navnanevndin skal taka støðu til at geva undantak frá meginregluni um, at navnið skal vera í samljóði við føroyskar málreglur.“

Sum seinast endurgivnu viðmerkingarnar frá rættarnevndini benda á, hevði nevndin ta fatan, at navnanevndin skuldi hava greiðar reglur at miða seg eftir. Sagt verður eisini, at talan er um undantak frá meginregluni um, at navnið skal vera í samljóði við føroyskar málreglur. Onki er her, ið bendir á, at tingsins vilji var, at ongar avmarkingar skuldu vera í sambandi við uppkalling í ættini. Í tí føri var ongin orsøk til yvirhøvur at geva landsstýrismanninum heimild at áseta nærri reglur um undantøk.

Heldur ikki viðkomandi áseting í § 2, stk. 4 í løgtingslóg nr. 41 frá 26. mars 2002 um fólkanøvn bendir á, at ætlanin var, at ongar avmarkingar skuldu vera í sambandi við uppkalling. Ásetingin ljóðar: „Navnanevndin kann eftir umsókn gera undantak frá stk. 2, tá ið uppkallað verður eftir fólki í ættini. Landsstýrismaðurin ásetur í kunngerð nærri reglur um undantøk.“ Tá ásetingin er orðað so, at landsstýrismanninum verður heimilað at gera reglur um undantøk, so er sjálvsagt, at hann hevur heimildir at seta mørk, m.a. avgera,

hvat í lógarinnar høpi skal skiljast við uppkalling og hvussu langt aftur, ið kann verða farið.

Í sambandi við spurningin, um landsstýrismaðurin hevur brotið lógina við teimum avmarkingum, ið ásettar eru í kunngerð nr. 71 frá 29. juni 2002, kann aftur verða víst til omanfyri endurgivnu viðmerkingar frá rættarnevndini. Har verður dentur lagdur á, at navnanevndin skal hava greiðar reglur at miða seg eftir, tá undantøk verða gjørd. Reglan í kunngerð nr. 71 frá 29. juni 2002 um *beinleiðis* uppkalling er júst ætlað til at gera arbeiðið hjá navnanevndini at geva undantøk so greitt sum gjørligt. Uttan slíka reglu, hevði navnanevndin sum fyrisitingarligur myndugleiki neyvan sæð seg føra fyri at tikið dagar í millum, hvat ið skal roknast sum uppkalling og ikki.

Samanumtikið verður ikki hildið, at landsstýrismaðurin hevur skrivað eina avmarkandi kunngerð ímóti tingsins vilja. Tí fáa tygum heldur ikki viðhald í hesum parti av kæruni.

Gjøllari frágreiðing um, hvørji atlit eru tikin í sambandi við kunngerð um navnauppkalling er at finna í svari frá D, landsstýrismanni, til fyrispurning frá Jógvan á Lakjuni, løgtingsmanni. Serliga fyrri parturin av fyrispurninginum frá tingmanninum, sum væntandi verður svaraður 6. november 2002, líkist í innihaldi nógv tygara kæru, og verður svarið tí viðlagt til tygara kunnleika."

Við skrivi, dagfest 25. nov. 2002 heita foreldrini á landstýrismannin um at taka málið uppaftur til nýggja viðgerð. Skrivið er soljóðandi:

> „Takk fyri svar tygara móttikið tann 6. november 2002.
>
> Vit kunnu tó ikki góðtaka svar tygara uppá kæruna og gera tí eina roynd afturat at skriva til tygara um at fáa loyvi at uppkalla dóttur okkara Victoria eftir abba sínum Victor. Biðið verður tí um, at løgmálaráðið tekur málið uppaftur.
>
> Hetta mál hevur upptikið okkum ómetaliga nógv, tí tað er eitt inniligt og sterkt ynski hjá okkum, at dóttur okkara skal stavast Victoria og ikki Viktoria. Fyri okkum er tað ein stórur munur á hesum báðum stavsetingunum. Tað er óskilligt fyri okkum, tá navnalógin loyvir uppkalling í ættini, at tað verður noktað okkum.
>
> Í løgtingsmálið 100-13/2002 svarar D, landstýrismaður einum fyrispurningi viðvíkjandi navnalógini og kunngerðini um uppkalling.

> Í svarinum til spurning 1 stendur „Verður undantakið strekt enn longur út í ættina, og kravið í kunngerðini um beinleiðis uppkalling slept, soleiðis at loyvi verður givið til at uppkalla uppá tvørs av kynum eins og í dømi 3 [tað er Victoria eftir Victor] hjá spyrjaranum, ber ikki longur til á greiðan hátt at kanna eftir, um tað snýr seg um uppkalling. Avleiðingin hevði verið, at nærum ongin regulering var eftir á økinum, og tá vildi undantak blivið meginregla, og kunngerðin hevði eisini ligið uttan fyri heimildarásetingina, tá henda má haldast saman við meginregluna í lógini."

Omanfyri sæst, at tað verður ført fram í svarinum, at tað ber ikki longur til á greiðan hátt at kanna eftir, um tað snýr seg um uppkalling verður loyvi givið til at uppkalla uppá tvørs av kynum. Hetta skilja vit als ikki í okkara føri, tí Victoria eftir Victor er uppkalling og tað ber til at eftirkanna.

Victoria er gentunavnið avleidd av mannfólkanavninum Victor.

V I C T O R
**V I C T O R I A**

Vit førdu eisini fram í tí fyrra brævinum, at í ættini kemur navnið Victoria tríggjar ferðir fyri og navnið Victor kemur tvær ferðir fyri og hevur uppruna frá Victor … sála. Umframt eru eisini aðrar gentur uppkallaðar Victoria eftir Victor … sála.

Í samband við omanfyri nevnda fyrispurning í løgtinginum, var Rúna Sivertsen á røðarapallinum. Rúna Sivertsen var uppskotsstillari til navnalógini og var við til at viðtaka navnalógina. Hon var tvær ferðir á pallinum. Niðanfyri er endurtikið ein partur av hvat Rúna Sivertsen segði á røðarapallinum. Tað er skrivað niður við at lurta á internetinum við RealPlayer á heimasíðuni hjá løgtinginum.

Fyrru ferð segði hon:

- „Alfred Olsen, Hans Pauli Strøm og Rúna Sivertsen løgdu eitt uppskot fram við tí broyting,sum løgtingið ynskti og sum so týðliga kom fram í tí álitinum, sum var skrivað at man ynskti eina broyting, sum gjørdi undantak, soleiðis at fólk kundi hava loyvi til at uppkalla"
- „Tað var ein breiður meiriluti, 21 fyri og 9 ímóti"

- „Breiður meiriluti sum ynskti hesa broyting“
- „og landsstýrismaðurin hevur nú við síni kunngerð gjørt meiningina og ynski hjá løgtinginum til einkis“
- „landsstýrismaðurin við síni restriktivu kunngerð hevur sett viljan hjá løgtinginum úr gildið um at fólk skulla hava loyvi at kalla upp og hava loyvi at geva børnum nøvn við loyvi um undantak. Tað verður ikki gjørt nú og tað ber ikki til nú uttan so at navnið er nøjagtiga stava á sama hátt sum tann sum verður uppkallaður og hann skal vera í beinleiðis ætt ella systkjum. Tað var ikki tað sum vit ynskti, sum gjørdi hesa broyting og tað kemur týðuliga fram í álitinum.“

Aðru ferð segði hon hetta um kunngerðina:
- „Tá ið vit settu inn í lógina, at landsstýrismaðurin skuldi gera kunngerð um uppkalling, so var tað meint fyri at fólk ikki skuldi fara at geva børnum garvill nøvn – útlendsk nøvn, sum vit slett ikki kunnu identificera okkum við í Føroyum. Tað var tað landsstýrismaðurin skuldi gera eina kunngerð um og ikki gera eina so restriktiva, sum hann jú vísti at hann vildi hava lógina, tá hann slett ikki kundi góðtaka tað, at løgtingið gjørdi ein broyting í lógini sum var framløgd. Eg haldi at landsstýrismaðurin hevur týðuliga víst, at hann ætlaði ikki at gera sum løgtingið segði, og tað sýnist nú, sum hann hevur fingið sín vilja.“

Tí skilja vit ikki orðingina í brævið tygara til okkara har tað stendur:

„Viðvíkjandi tingins vilja er ivasamt, um tað við rímiligari vissu kann verða víst á, at tingið hevði nakra ávísa støðu til spurningin um avmarking av undantakinum til uppkalling.“

„Samanumtikið verður ikki hildið, at landsstýrismaðurin hevur skrivað eina avmarkandi kunngerð ímóti tingsins vilja. Tí fáa tygum heldur ikki viðhald í hesum parti av kæruni.“

Í svarinum til løgtingsmál 100-13/2002 verður eisini ført fram, at kunngerðin er gjørd fyri at rættartrygdin hjá borgaranum gerst betri. „Annars verður tað bert tilvildin, ið ræður, og tey, sum hava mest orku til at grundgeva fyri undantøkum, kunnu fáa ein

fyrimun mótvegis øðrum“. Vit skilja ikki hví vit foreldur skulu stríðast fyri nakað, sum er staðfest í navnalógini, tí hon loyvir uppkalling eftir fólki í ættini. Vit hava brúkt nógva orku uppá hetta mál, tí tað hevur upptikið okkara sál og sinn dagliga. Eisini hava vit havt útreiðslur til løgfrøðing í samband við ráðgeving.

Aftaná at hava fingið noktandi svar frá tygum, hava vit aftur søkt ráðgeving um hetta mál. Vit hava tosa við tveir løgfrøðingar, sum vísa á heimastýrislógina § 11 „Føroyskt verður viðurkent sum høvuðsmál, men danskt skal lærast væl og virðiliga, og danskt kann eins væl og føroyskt nýtast í almennum viðurskiftum.“ Navngeving er eitt alment viðurskifti. Navnið Victoria finst á tí góðkenda navnalistanum hjá Kirkeministeriet, sum finst á heimasíðuna hjá kirkeministeriet (www.km.dk) – Eftir hesum tulka teir, at vit hava rætt til at geva dóttur okkara navnið Victoria.

Tað er, sum nevnt omanfyri, eitt sterkt og inniligt ynski hjá okkum, at dóttur okkara fær navnið Victoria, tí vit ynskja at uppkalla hana eftir abba hennara. Við skrivan av hesum brævi vóna vit at tygum taka mál okkara uppaftur og viðgera umsókn okkara av nýggjum. Vit vóna at fáa eitt játtandi svar, soleiðis at vit kunnu geva dóttur okkara navnið Victoria.

Vit bíða eftir svarinum frá tygum. Verður tað eitt noktandi svar, mugu vit umhugsa støðuna. Løgfrøðingar hava greitt okkum frá, at vit hava møguleika at fara til løgtingsins umboðsmann við málinum. Tann næsti møguleikin hjá okkum er at koyra málið í rættin, men har verður tað eisini ein fíggjarligur spurningur, um vit hava ráð til at koyra eitt mál, tí tað viðførir nógvar útreiðslur til advokatar.

Við vón um eitt játtandi svar.“

Við skrivi, dagfest 12. des. 2002 svaraði Løgmálaráðið foreldrunum soleiðis:

**„Viðvíkjandi kæru um navnið Victoria**

Víst verður til skriv, dagfest 25. november 2002, har tygum heita á Løgmálaráðið um at taka málið um navnið „Victoria“ upp aftur, í nevnda skrivi halda tygum fast við, at tygum hava rætt til at kalla dóttur tykkara Victocia.

Løgmálaráðið metir ikki, at nakrir nýggar upplýsingar um veruligu umstøðurnar eru í skrivi tygara, og sum heild eru heldur ikki nýggjar upplýsingar av løgfrøðiligum slag, ið verða mettir at hava týdning fyri málið.

Í skrivi tygara verður tó víst til § 11 í heimastýrislógini. Ført verður fram, at sambært § 11 skulu nøvn, sum eru góðkend í Danmark, verða loyvd í Føroyum, tí § 11 gevur donskum eins góðan rætt og føroyskum í almennum viðurskiftum.

Tá ið § 11 vísir til, at danskt eins væl og føroyskt kann verða nýtt í almennum viðurskiftum, má fyribrigdið *mál* hesum sambandi verða skilt sum ein *samskiftismiðil*. Løgmálaráðið metir tí ikki, at fólkanøvn eru fevnd av fyribrigdinum *mál* í § 11 í heimastýrislógini. Tí leggur § 11 í heimastýrislógini ikki nøkur bond á politisku myndugleikarnar í sambandi við lóggávu um málslig krøv til fólkanøvn. Løgmálaráðið metir tí ikki, at § 11 í heimastýrislógini er viðkomandi fyri hetta mál. Ein avleiðing av hesum er, at góðkendi navnalistin hjá „Kirkeministeriet" heldur ikki hevur týdning fyri føroyska navnagávu.

Vísandi til omanfyristandandi og til grundgevingarnar í upprunaligu avgerðini frá Løgmálaráðnum til tygum, dagfest 5. november 2002, verður sagt frá, at Løgmálaráðið stendur við sína upprunaligu avgerð, og at málið tí ikki verður tikið uppaftur.

At enda skal verða gjørt vart við, at foreldrini sambært § 1, stk. 3 í navnalógini hava skyldu til at boða skrásetingarmyndugleikanum fra navni barnsins, áðrenn barnið er 6 mánaðir gamalt. Brot á hesa reglu verður sambært § 23, stk. 3 í somu lóg revsað við bót."

## Partshoyringin

Við skrivi, dagfest 13. febr. 2003 varð klagan send Løgmálaráðnum til ummælis, eins og biðið varð um skjølini.

Við skrivi, dagfest 17. mars 2003 hevur Løgmálaráðið sent umboðsmanninum skjølini í málinum. Skrivið er soljóðandi:

„Vísandi til skriv umboðsmansins, dagfest 13. februar 2003, viðvíkjandi klaguni frá B og C um navnið „Victoria", verða hjáløgd send øll skjølini í málinum, okkara j. nr. 2008-0005/2003 (áður j.nr. 507-0202/2002).

Løgmálaráðið metir, at tað, sum kærarin førir fram, er viðgjørt í skjølunum, sum eru í málinum, álitinum frá juni 2001 frá nevndini, sum endurskoðaði navnalógina (finst sum skjal til løgtingsmál nr. 13 frá 2001), uppskotinum til nýggja navnalóg, løgtingsmál nr. 13 frá 2001 og løgtingsfyrispurningi nr. 100-13 frá 2002 til D, landsstýrismann, viðvíkjandi navnalógini og kunngerð um uppkalling.

Løgmálaráðið hevur tí sum er ikki fleiri viðmerkingar til kæruna."

Við skrivi, dagfest 20. mars 2003 boðaði umboðsmaðurin pørtunum frá, at hann ikki helt orsøk vera til at halda fram við partshoyringini, og at hendan klagan nú bleiv tikin upp til endaliga viðgerð.

## *Niðurstøða*

*Við kgl. fyriskipan nr. 136 frá 25. februar 2000 er Europeiski mannarættindasáttmálin settur í gildi fyri Føroyar frá 1. mai 2000 at rokna. Art. 8 í hesum sáttmála er soljóðandi:*

*„Stk. 1. Enhver har ret til respekt for sit privatliv og familieliv, sit hjem og sin korrespondance.*

*Stk. 2. Ingen offentlig myndighed må gøre indgreb i udøvelsen af denne ret, medmindre det sker i overensstemmelse med loven og er nødvendigt i et demokratisk samfund af hensyn til den nationale sikkerhed, den offentlige tryghed eller landets økonomiske velfærd, for at forebygge uro eller forbrydelse, for at beskytte sundheden eller sædeligheden eller for at beskytte andres rettigheder og friheder."*

*Í 2. útgávuni av „Den Europæiske Menneskeretskonvention" við kommentarum frá Peer Lorenzen, Lars Adam Rehof, Tyge Trier, Nina Holst-Christensen og Jens Vedsted-Hansen stendur m.a. um artikul 8 á bls. 390:*

*„Navne anses for at udgøre elementer i den personlige identitet, som kan være omfattet af art 8, selvom EMRK til forskel fra bl.a. CPR art 24 ikke rummer nogen udtrykkelig bestemmelse vedrørende navne.*

*Som følge af personnavnets typiske tilknytning til familien er navnespørgsmål normalt blevet henført til privat- og familieliv under ét som et "means of personal identification and of linking to a family". Dette udelukkes ikke af, at samfundet og staten har en interesse i at regulere brugen af navne, da disse offentligretlige aspekter er forenelige med privatlivsbegrebet som omfattende en vis ret til at etablere og udvikle forbindelser med andre mennesker, herunder i professionelle og forretningsmæssige sammenhænge, jfr. Burghartz 22/2 1994 pr 24. Se tilsvarende Stjerna 25/11 1994 og Guillot 24/10 1996, hvor det i pr 22 anføres, at forældres valg af et barns fornavn er et personligt, emotionelt anliggende og derfor falder inden for deres private sfære. I de to sidstnævnte sager fandtes art 8 ikke krænket, hvorimod der i Burghartz på grund af en kønsbetinget forskel i navnelovgivningen blev statueret krænkelse af art 14 i forening med art 8."*

*Eftir at málsøkið navnalóggáva var yvirtikið sum føroyskt sermál, samtykti Løgtingið tann 8. oktober 1992 løgtingslóg nr. 142 um fólkanøvn. § 1, stk. 3 í hesi lóg var soljóðandi:*

*„Navnið skal vera í samljóði við føroyskar málreglur. Gjørdur verður navnalisti við viðurkendum nøvnum."*

§ 2, stk. 2 var soljóðandi:

*„Er fráboðaða navnið ikki á navnalistanum, verður málið skotið til navnanevndina, ið sett er sambært § 15, smbr. tó § 1, stk. 4. Navnanevndin ger av, um navnið kann koma á listan, ið nevndur er í § 1, stk. 3."*

*Í 1999 setti landsstýrismaðurin í lógarmálum eina nevnd at endurskoða løgtingslóg nr. 142 frá 8. oktober 1992 um fólkanøvn. Tann 1. juni 2001 lat nevndin frá sær álit og uppskot til nýggja løgtingslóg um fólkanøvn. Við støði í uppskotinum frá nevndini legði landsstýrismaðurin í lógarmálum tann 16. oktober 2001 fram uppskot til nýggja navnalóg (Løgtingsmál nr. 13/2001). § 2 í uppskotinum var soljóðandi:*

*„Sum fornøvn verða ikki viðurkend nøvn, sum ikki av røttum eru fornøvn, og onnur nøvn, ið kunnu haldast at verða fólki til ampa. Stk. 2. Navnið skal vera í samljóði við føroyskar málreglur.*

*Stk. 3. Navn, sum ikki er á navnalistanum, kunnu foreldur ella tann, sum foreldramyndug-leikan hevur, leggja fyri navnanevndina, sbr. § 21, stk. 1, ið ger av, um navnið kann verða givið.*

*Stk. 4. Navnanevndin kann eftir umsókn gera undantak frá ásetingini í § 1, stk. 2, 1. pkt. viðvíkjandi fornøvnum. Á sama hátt kann undantak gerast frá stk. 2. Um undantak verður gjørt eftir 1. ella 2. pkt., der tað ein treyt, at navnið ikki finst í føroyskum sniði frammanundan.“*

*Í viðmerkingunum til lógaruppskotið stendur m.a.:*

***„Almennar viðmerkingar***

***Broytingar í mun til galdandi lóg***
*Viðvíkjandi galdandi lóggávu er stutt at viðmerkja, at tær atfinningar, ið hava verið móti henni í stóran mun viðvíkja reglunum um fornøvn. Funnist hevur serliga verið at, at tað t.d. ikki er heimild til at gera undantak frá regluni um, at fornøvn skulu vera í samljóði við málreglurnar.*

*3. Ásetingarnar viðvíkjandi fornøvnum eru broyttar soleiðis, at heimild verður til at gera undantak í sambandi við uppkalling, um navnið ikki finst í føroyskum sniði frammanundan.*

***Ummælir***
*Tær viðmerkingar, ið eru komnar til uppskotið, eru eina mest um ásetingarnar um fornøvn. Serliga verður gjørt vart við, at einari undantaksreglu viðvíkjandi uppkalling, har tað ikki í minsta lagi er eitt krav, at fornavnið ikki finst í føroyskum sniði frammanundan, kann ikki verða tikið undir við, orsakað av tí stóra afturstigi, ið ein tílík regla hevði havt við sær.*

*Viðmerkingar til tær einstøku greinarnar*
***Til § 2***

***Til stk. 2.***
*Orðingin er einsljóðandi við § 1, stk. 3, 1. pkt. í galdandi lóg. Ásetingarnar um, at navnið skal vera í samljóði við málreglurnar, sipa m.a. til, at navnið skal kunna bendast, stavsetast og sigast á føroyskum. Við tað at mett verður, at tað ikki ber til at áseta alment, nær nøvn eru í samsvari við málreglurnar, er orðingin „í samljóði við" meira hóskandi. Henda orðing gevur samstundis navnanevndini eitt ávíst rásarúm, tá ið avgerð skal takast sambært stk. 3 og 4."*

*Uppskotið varð eftir 1. viðgerð í Løgtinginum beint í rættarnevndina, og varð álit frá rættarnevndini lagt fram í tinginum tann 16. oktober 2001. Tað var ikki ein samd rættarnevnd, sum stóð aftanfyri álitið. Eftir at Løgtingið tann 13. mars 2002 við 2. viðgerð hevði samtykt broytingaruppskotið frá meirilutanum í nevndini til §§ 1, 2 og 21, boðaði landsstýrismaðurin í lógarmálum tann 15. mars 2002 tinginum frá, at hann tók lógaruppskotið aftur.*

*Frammanundan høvdu 3 av tingmonnunum, sum mannaðu meirilutan í rættarnevndini, lagt fram nýtt lógaruppskot (Løgtingsmál nr. 86/2001) samsvarandi tí upprunaliga uppskotinum frá landsstýrismanninum, men við teimum broytingum, sum meirilutin hevði samtykt.*

*Eftir 1. viðgerð tann 8. mars 2002 varð eisini hetta uppskot beint í rættarnevndina, sum legði fram álit tann 15. mars 2002. Í álitinum tekur sami meiriluti, sum viðgjørdi uppskotið frá landsstýrinum, undir við uppskotinum frá teimum trimum tingmonnunum, men við hesum broytingaruppskoti:*

*„§ 2, stk. 4 verður orðað soleiðis.*
*Stk. 4: Navnanevndin kann eftir umsókn gera undantøk frá stk. 2, tá ið uppkallað verður eftir fólki í ættini. Landsstýrismaðurin ásetur í kunngerð nærri reglur um undantøk."*

*Meirilutin hevur ongar serligar viðmerkingar til hesa broyting, men vísir til viðmerkingar sínar í løgtingsmáli nr. 13/2001.*

*Ein minniluti (2 limir) tók ikki undir við uppskotinum og mælti Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.*

*Tann 15. mars 2002 varð lógaruppskotið við broytingum samtykt við 21 atkvøðum fyri og 9 ímóti, og er lógin staðfest tann 26. mars 2002 sum løgtingslóg nr. 41 frá 26. mars 2002 um fólkanøvn.*

*Vísandi til § 2, stk. 4 í lógini hevur landsstýrismaðurin í lógarmálum gjørt eina kunngerð, Kunngerð nr. 71 frá 29. juni 2002 um undantøk til navnauppkalling. Kunngerðin er soljóðandi:*

> *„Við heimild í § 2, stk. 4 í løgtingslóg nr. 41 frá 26. mars 2002 um fólkanøvn verður ásett:*
>
> *§ 1. Er navn ikki í samsvari við § 2, stk. 2 í lógini, kann navnanevndin eftir umsókn í sambandi við navnagávu kortini loyva navnið, tá ið tað er beinleiðis uppkalling eftir foreldrum, ommum ella abbum barnsins. Navnanevndin kann eisini í serligum føri gera undantak til uppkalling av systkjum hjá barni ella systkjum hjá foreldrum, ið lata lív undir óvanligum umstøðum.*
>
> *§ 2. Umsókn um undantaksloyvi til uppkalling, sum nevnt í § 1, skal verða send navnanevndini skrivliga.*
>
> *Stk. 2. Umsøkjarin skal veita navnanevndini skjalprógv um navnið á viðkomandi ættarfólki og sambandi tess við barnið.*
>
> *§ 3. Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.“*

*Rættur foreldranna at geva børnum sínum navn er ein grundleggjandi rættur. Sum nevnt frammanfyri er hesin rættur fevndur av Europeiska mannarættindasáttmálanum, sum eisini er galdandi í Føroyum. Avmarkingar í hesum rætti krevja tí greiða lógarheimild.*

*Eftir galdandi lóg skulu fornøvn vera í samljóði við føroyskar málreglur, men navnanevndin hevur sambært § 2, stk. 4 heimild til at víkja frá hesum kravinum, tá ið uppkallað verður eftir fólki í ættini. Hugtakið „fólk í ættini“ er hvørki greinað í lógini ella í viðmerkingunum.*

*Hvørki galdandi lóg, viðmerkingarnar ella upprunaliga uppskotið frá landsstýrismanninum (løgtingsmál nr. 13/2001) nevna orðið „beinleiðis“ í sambandi við uppkalling. Uppskotið frá landsstýrismanninum hevði í staðin eina aðra avmarking, nevniliga at tað var ein treyt fyri frávikinum frá kravinum um samljóð við føroyskar málreglur, at navnið*

*ikki fanst í føroyskum sniði frammanundan. Hendan treyt varð strikað av meirilutanum í rættarnevndini, og er hetta helst grundin til ella ein av grundunum til, at landsstýrismaðurin valdi at taka lógaruppskotið aftur.*

*Viðmerkingarnar og gongdin í málinum vísa greitt, at endamálið við lógaruppskotinum m.a. var at linka málsligu avmarkingarnar hjá foreldrum at velja nøvn til teirra børn, serliga tá tað snúði seg um uppkalling. Uppskotið hjá landsstýrismanninum hevði sum nevnt ta avmarking, at undantak ikki kundi gevast í sambandi við uppkalling, um navnið frammanundan fanst í føroyskum sniði. Løgtingsmeirilutin ynskti tó at ganga longur á liberaliseringsleið, soleiðis at henda avmarkingin ikki bleiv tikin við í lógina.*

*Í staðin setti Løgtingsmeirilutin eitt nýtt pkt. í § 2, stk. 4 um, at landsstýrismaðurin ásetur í kunngerð nærri reglur um undantøk. Hesa heimildina hevur landsstýrismaðurin við kunngerð nr. 71 frá 29. juni 2002 nýtt til at skerja undantaksregluna í § 2, stk. 4 í lógini. Hetta er gjørt á tann hátt, at tað í kunngerðini verður kravt, at talan skal vera um „beinleiðis“ uppkalling. Um ætlanin hjá løgtingsmeirilutanum var at avmarka undantøkini til „beinleiðis“ uppkalling, hevði tað ikki verið serliga tyngjandi at sett hesa avmarkingina inn í sjálvan lógartekstin.*

*Eftir mínari meting er landsstýrismaðurin farin út um sína heimild, tá undantaksreglan í § 2, stk. 4 verður avmarkað eins og gjørt í § 1, 1. pkt. í kunngerðini.*

*Avgerðirnar hjá navnanevndini og Løgmálaráðnum, sum eru bygdar á kunngerðina, eru sostatt tiknar á skeivum grundarlagi, og skal eg tí mæla Løgmálaráðnum til at taka málið til nýggja viðgerð við støði í galdandi regluni í § 2, stk. 4 í lógini.*

*Klagan gongur út uppá, at foreldrini ynskja at sleppa at kalla dóttrina upp eftir abbanum Victor og geva henni navnið Victoria. Uttan at vera serkønur í føroyskum máli er tað fyri mær eingin ivi um, at talan er um uppkalling.*

*Um talan er um beinleiðis uppkalling ella bert uppkalling, skal eg ikki gera meg klókan uppá. Tað er rætt, sum advokaturin hjá klagarunum førir fram, at „Victoria“ kann bendast og sigast eins væl og „Viktoria“ á føroyskum. Um stavsetingin svarar til føroyskar málreglur, er meira ivasamt. Bókstavurin c verður ikki nýttur í orðasavninum, sum er knýtt at Færøsk Anthologi ella í orðabókini, sum M. A. Jacobsen*

*og Chr. Matras góvu út á sinni. Bókstavurin er heldur ikki nevndur í uppreksingini av føroyskum bókstavum á bls. 1443 í stóru Móðurmáls-orðabókini. Harafturímóti er hann nevndur á bls. 176 í sambandi við nøkur fá leitorð. Har verður eisini sagt: „stavur vanl. ikki nýttur í føroyskum".*

*Kvinnunavnið „Victoria" finst ikki í navnalistanum. Sambært § 2, stk. 3 í navnalógini skulu nøvn, sum ikki eru á navnalistanum leggjast fyri navnanevndina, og er hetta eisini galdandi, um talan er um beinleiðis uppkalling. Eg geri tí ikki meira við hendan spurningin.*

*Vísandi til tað, sum eg havi ført fram um Kunngerð nr. 71 frá 29. juni 2002 um undantøk til navnauppkalling, skal eg vísandi til § 12 í Umboðsmanslógini mæla landsstýrismanninum í lógarmálum til at broyta kunngerðina, soleiðis at hendan verður í samsvar við lógina. Eg havi samstundis boðað Løgtinginum frá hesari áheitan míni.*

*Við skrivi, dagfest 13. aug. 2003, hevur Løgmálaráðið sent mær so-ljóðandi fráboðan:*

*„Vísandi til skriv tygara, dagfest 20. juni 2003, og álit, dagfest sama dag, viðvíkjandi klaguni frá … um avgerðina hjá Løgmálaráðnum í málinum um navnið „Victoria" verður hjálagt sent avrit av skrivum til ávikavist advokatin hjá klagaranum, … og navnanevndina, dagfest 13. aug. 2003.*

*Eins og í skrivinum til navnanevndina skal Løgmálaráðið kunna um, at arbeitt verður við at broyta kunngerð nr. 71 frá 29. juni 2002 um undantak til navnauppkalling. Somuleiðis verður arbeitt við at gera uppskot til broyting í navnalógini at leggja fyri løgtingið, soleiðis at sleppast kann undan tí tulkingariva, sum hevur staðist av møgu-leikanum fyri at gera undantak, tá tað snýr seg um at kalla upp fólk í ættini."*

*Í umrødda skrivinum til advokatin og navnanevndina stendur m.a. soleiðis:*

> *„Umboðsmaðurin er í áliti frá 20. juni 2003 komin til ta niðurstøðu, at avgerðirnar hjá navnanevndini og Løgmálaráðnum um ikki at loyva navninum „Victoria" ikki eru í samsvari við lógina.*

*Viðmerkjast skal, at Løgmálaráðið hevur tikið hesa niðurstøðu umboðsmansins til eftirtektar og gjørt av at viðgera málið av nýggjum.*

*Løgmálaráðið skal í hesum sambandi boða frá, at vísandi til § 2, stk. 4 í navnalógini, løgtingslóg nr. 41 frá 26. mars 2002 um fólkanøvn verður givið loyvi til, at dóttir … kann fáa fornavnið „Victoria“ grundað á uppkalling eftir abbanum „Victor“.“*

*Eg havi síðani við skrivi, dagfest 18. aug. 2003, boðað Løgmálaráðnum frá, at eg ikki geri meira við hetta málið.*

# 27. Undirvísing, gransking, kirkja og mentan

## 27.1. Klaga um hækkan av sjónvarpsgjaldi

*Ein sjónvarpshyggjari hevur sent umboðsmanninum eina klagu um, at landsstýrismaðurin í mentamálum skuldi hava hækkað sjónvarpsgjaldið fyri 2003 í heimildarloysi. Umboðsmaðurin kannaði hetta málið, men kom til ta niðurstøðu, at einki grundarlag var fyri hesari klaguni. ( J.nr. 200300018)*

### Klagan

A hevur sent umboðsmanninum eina klagu í sambandi við hækkingina av sjónvarpsgjaldinum fyri 2003. Klagan, sum er dagfest 4. febr. og móttikin á skrivstovu mínari 17. mars 2003 er soljóðandi:

„Kæra viðvíkjandi áseting av sjónvarpsgjaldi

Kært verður um, at landsstýrismaðurin í mentamálum hevur hækkað sjónvarpsgjaldið uttan heimild í lóg.

Við § 1 í kunngerð nr. 103 frá 20.12.2002 hevur landsstýrismaðurin í mentamálum broytt kunngerð nr. 110 frá 23.12.1999 soleiðis, at gjaldið fyri ein vanligan sjónvarpsmóttakara verður hækkað úr kr. 1.200,- + MVG til kr. 1.600,- + MVG.

Sjónvarpsgjald verður ásett við heimild í § 20 stk. 2 í ll.nr. 22 frá 20.02.1998 um kringvarp (kringvarpslógin), sum m.a. sigur:

*„Landsstýrismaðurin í loftmiðlamálum ásetur sjónvarpsgjaldið fyri eitt ella fleiri ár í senn eftir tilráðing frá Sjónvarpi Føroya“ (mín undirstriking).*

Í sambandi við, at kunngerð nr. 103/20.12.2002 varð lýst, kom fram í fjølmiðlunum, at landsstýrismaðurin í mentamálum, av sínum eintingum, hevði avgjørt at hækka sjónvarpsgjaldið. Stjórin í Sjónvarpi Føroya greiddi í fjølmiðlunum frá, at hann *ikki* var tikin uppá ráð í sambandi við avgerð landsstýrismansins um at hækka sjónvarpsgjaldið. Av samrøðum við sjónvarpsstjóran kom enntá fram, at stjórin var ivasamur um tað skilagóða í hækkingini. Samanumtikið gav tað, sum kom fram í fjølmiðlunum, ábending um, at sjónvarpsgjaldið varð hækkað *uttan* tilráðing frá Sjónvarpi Føroya. Um so er, kann hækkingin ikki verða framd við heimild

í § 20 stk. 2 í kringvarpslógini, sum jú ásetir, at sjónvarpsgjaldið skal ásetast *eftir* tilráðing frá Sjónvarpi Føroya. Spurningurin er so, um hækkingin av sjónvarpsgjaldinum beint fyri jól í 2002 varð framd í heimildarloysi. Og um so er, kann hækkingin so hava gildið sambært løgtingslóg um kringvarp?

Við vón um at umboðsmaðurin vil greiða hetta málið."

## Partshoyring

Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna hetta málið nærri. Við skrivi, dagfest 17. mars 2003 varð klagan tí send Mentamálaráðnum til ummælis, eins og biðið varð um tey skjølini, sum høvdu ligið til grund fyri hækkingini av sjónvarpsgjaldinum.

Við skrivi, dagfest 1. apríl 2003 hevur Mentamálaráðið sent umboðsmanninum skjølini og eitt ummæli av klaguni. Skrivið er soljóðandi:

**„Ummæli av klagu viðv. hækkan av sjónvarpsgjaldi**

Mentamálaráðið skal við hesum ummæla klagu til løgtingsins umboðsmann um hækkingina av sjónvarpsgjaldinum fyri 2003. Mentamálaráðið fer tó ikki ikki at taka støðu til, hvat sagt er í fjølmiðlunum um hækkingina av sjónvarpsgjaldinum, og hvussu útsagnir frá ávikavist landsstýrismanni og sjónvarpsstjóra hesum viðvíkjandi kunnu tulkast.

Klagarin heldur uppá, at landsstýrismaðurin í mentamálum hevur hækkað sjónvarpsgjaldið uttan tilráðing frá Sjónvarpi Føroya, og at hækkingin tí er farin fram í heimildarloysi. Niðanfyri er málsgongdin í stuttum lýst vísandi til skjølini í málunum. Niðurstøðan er, at hækkingin av sjónvarpsgjaldinum fyri 2003 er farin fram samsvarandi heimildini í lógini.

Longu í juni 2002 í sambandi við fíggjarlógarviðgerðina fyri 2003 boðaði sjónvarpsstjórin frá, at SvF tørvaði eina serstaka rakstrarjáttan uppá kr. 5 mió (020708-1) umframt eina íløgujáttan uppá kr. 8,45 mió (020708-2). Mentamáladeildin mælti til, at málið varð tikið upp í politiskum høpi (020708-3), og sjónvarpsstjórin var boðin til fund um málið (020708-4). Í august sendir sjónvarpsstjórin Mentamálaráðnum eitt visionert skjal um SvF sum meginsjónvarp og meting av kostnaðin av slíkum (020862-

1). Fundur varð hildin 8. august 2002 í Mentamálaráðnum um uppleggið (020862-2). Hin 9. september 2002 sendir sjónvarpsstjórin Mentamálaráðnum nýtt tilfar (í alt 48 síður) við atgerðarætlan fyri virksemi 2003-2006 umframt programmpolitiska stevnu, fígging v.m. (020708-7).

Ásannandi broyttu fjølmiðlastøðuna arbeiddi Mentamálaráðið við broytingum í kringvarpslógini m.a. til tess at fáa til vega meira fígging til almennu loftmiðlarnar. Eitt uppskot var at avtaka útvarps- og sjónvarpsgjaldið og ístaðin seta eitt kringvarpsgjald, sum varð kravt inn um skattin. Málið varð tikið upp á landsstýrisfundi og við mentanarnevnd løgtingsins (020862-3/4/5/6/7/8/9/10). Politisk undirtøka fekst ikki fyri hesum og heldur ikki, at SvF fekk serstaka rakstrarjáttan á fíggjarlógini, og vórðu ætlanirnar tí sleptar. Skuldi SvF verða fáa meiri fígging kundi hetta bert gerast við hægri sjónvarpsgjaldi.

Sjónvarpsstjórin sendi somuleiðis hin 4. oktober 2002 Mentamálaráðnum bræv um, at verður játtanin ikki økt fær tað álvarsligar avleiðingar fyri stovnin og virksemi stovnsins (020708-9). Eisini henda áheitan verður viðgjørd (020708-11/12). Í notati, dagfest 5. desember 2002, verður staðfest, at landsstýrismaðurin vil hækkað sjónvarpsgjaldið fyri 2003 (020708-13).

Sum lýsingin av málsgongdini vísir, so hevur landsstýrismaðurin allatíðina arbeitt eftir tilráðing frá SvF um at útvega stovninum størri fígging. Mentamálaráðið metir tí einki grundarlag vera fyri klaguni.

Tey omanfyri nevndu skjøl eru løgd við hesum brævi í teirri røð, tey eru nevnd.“

Við skrivi, dagfest 10. apríl 2003 boðaði umboðsmaðurin pørtunum frá, at hann ikki helt grundarlag vera fyri framhaldandi partshoyring í hesum málinum, sum nú fór at verða tikið til viðgerðar.

Við skrivi, dagfest 25. juni 2003 boðaði umboðsmaðurin pørtunum frá, at hetta málið av ymiskum orsøkum framvegis ikki varð avgreitt, men at tað væntandi fór at verða avgreitt innan summarfrítíðina.

## *Niðurstøða*

*Í uppskotinum til fíggjarlóg fyri 2003, sum Sjónvarpið sendi landsstýrismanninum 19. juni 2002, verður biðið um eina rakstrarjáttan áljóðandi 5 mió. kr.*

*Sambært skjølunum hevur landsstýrismaðurin arbeitt við einari ætlan um at skapa Sjónvarpinum og Útvarpinum størri inntøkur við at innføra eitt sokallað kringvarpsgjald í staðin fyri sjónvarps- og útvarpsgjaldið. Hendan ætlanin vann ikki frama politiskt, eins og tað heldur ikki bleiv tikið undir við, at játta Sjónvarpinum neyðuga peningin á fíggjarlógini fyri 2003.*

*Hetta førdi til, at sjónvarpsstjórin í skrivi, dagfest 4. okt. 2002, eins og Mentamálaráðið hevur greitt frá, kunnaði landsstýrismannin um avleiðingarnar av, at játtanin ikki bleiv økt. Í hesum skrivinum vísti sjónvarpsstjórin eisini á møguleikan fyri at hækka sjónvarpsgjaldið fyri at útvega sjónvarpinum øktar inntøkur. Í skrivinum verður ført fram hesum viðvíkjandi:*

> *„Sjónvarp Føroya vil í hesum sambandi vísa á, at Mentamálaráðið hevur møguleika fyri sjálvt at útvega stovninum øktar inntøkur í 2003 við at hækka hyggjaragjaldið.“*

*Tað sum sjónvarpsstjórin sipar til, er § 20, stk. 2 í Kringvarslógini, sum er soljóðandi:*

> *„Landsstýrismaðurin í loftmiðlamálum ásetur sjónvarpsgjaldið fyri eitt ella fleiri ár í senn eftir tilráðing frá Sjónvarpi Føroya og ásetur nærri reglur um gjaldsskyldu, innheinting av gjøldum, avgreiðslugjald, og eykagjald fyri ov seint goldið sjónvarpsgjald og ásetur somuleiðis støddina á hesum gjøldum.“*

*Landsstýrismaðurin gjørdi av at hækka sjónvarpsgjaldið fyri 2003. Í einum notati hesum viðvíkjandi, dagfest 5. des. 2002 verður sagt, at hendan hækkingin fer at geva Sjónvarpinum einar 5-6 mió. kr. í meirinntøkum.*

*Tað er tí mín fatan, at hækkanin av sjónvarpsgjaldinum er framd eftir tilráðing frá sjónvarpsstjóranum og sostatt í samsvari við áseting-*

*ina í § 20, stk. 2 í Kringvarpslógini. Eg haldi tí als einki grundarlag vera fyri klaguni frá A um, at sjónvarpsgjaldið er hækkað í heimildarloysi.*

*Eg geri tí ikki meira við hetta málið.*

# 28. Starvsfólka- og arbeiðsmarknaðarmál v.m.

## 28.1. Klaga um setan av útoyggjafulltrúa á Løgmansskrivstovuni

*A klagaði um, at starvið sum útoyggjafulltrúi á Løgmansskrivstovuni, aftaná at vera lýst leyst, kortini ikki bleiv sett við teirri grundgeving, at løgtingsval stóð fyri durum. A vísti á, at avgerðin kundi vera politiskt grundað, tí at A stillaði upp til løgtingsvalið fyri ávísan flokk.. Umboðsmaðurin helt tað ikki vera prógvað, at avgerðin um ikki at seta starvið var politiskt grundað. Hann helt tað tó vera minni heppið, at starvið bleiv lýst leyst so stutt frammanundan valinum fyri síðani ikki at verða sett. Umboðsmaðurin gav eisini Løgmansskrivstovuni eina átalu fyri, at umsøkjararnir ikki fyrr enn góðar 3 mðr. aftaná, at samgongan varð skipað, vóru kunnaðir um, at málsøkið bleiv flutt til Oljumálaráðið, og at starvið tí ikki fór at vera sett á Løgmansskrivstovuni. ( J.nr.200300008).*

### Klagan

A hevur sent umboðsmanninum eina klagu um málið um ætlaðu setanina av einum fulltrúa til økismenning og útoyggjamál á Løgmansskrivstovuni. Klagan, ið er dagfest 10. og latin umboðsmanninum 12. februar 2003, er soljóðandi:

**„Viðvíkjandi: Málsviðgerð í Løgmansskrivstovuni av starvsetan.**

**Áheitan**

Eg vil við hesum heita á Løgtingsins Umboðsmann um at kanna og gera sína niðurstøðu, um rætt er farið fram av Løgmansskrivstovuni í hesum málið.

**Stutt lýsing av málinum**

Í byrjanini av 2002 søkir Løgmansskrivstovan eftir fulltrúa til økismenning og útoyggjamál (sí hjáløgdu lýsing) Umsóknarfreistin er sett til 14.02.02.

Undirritaða søkir starvið og fær í brævið frá Løgmansskrivstovuni dagfest 14.02.02. (sí hjálagda skriv) at vita at umsóknin er

móttikin og ætlanin er at hava setanarsamrøður í viku 9. Undirritaða var til setanarsamrøðu.

Í skrivið frá Løgmansskrivstovuni dagfest 25.03.02 (sí hjálagda skriv) verði eg kunna um at avgerðin um setanina er útsett vegna løgtingsval og til ein nýggj samgonga er skipa.

Síðani frætti eg einki aftur, hóast eg spyrji á Løgmansskrivstovuni nakrar ferðir, fyrr enn eg í skrivið frá Løgmansskrivstovuni dagfest tann 16.09.02. fái at vita at eingin starvssetan verður, at málsøki er flutt úr Løgmansskrivstovuni yvir í Oljumálaráðið, og at eg verði noydd at søkja av nýggjum um eg framvegis ynski starvið.

### Trupulleika orðing

Eg meti tað ikki vera haldgóða grundgeving fyri ikki at seta starvið, at løgtingsval skuldi verað. Løgtingsvalið var eitt regluligt val og Løgmaður visti nær valið skuldi vera, tí hann útskrivaði tað sjálvur. Hartil meti eg ikki at góð siðvenja og vanligur setanarpolitikkur er fylgdur í hesum málið.

Avgerðin ikki at seta starvið kann verða grunda á politiska støðutakan, tí undirritaða stillaði upp, sum valevni hjá Tjóðveldisflokkinum í …, til løgtingsvalið 2002. Hetta greiddi eg annars setanarnevndini frá og segði at tað ikki kom at forða mær í at átaka mær starvið, um avgjørt var at eg skuldi setast."

## Málsgongdin

Løgmansskrivstovan hevur 23. jan. 2002 sent Dimmalætting og Sosialinum eina lýsing eftir fulltrúa til økismenning og útoyggjamál. Lýsingin, sum skuldi standa í bløðunum 25. jan., 29. jan. og 9. febr., var soljóðandi:

### „FULLTRÚI til økismenning og útoyggjamál

Við hesum verður eitt starv sum fulltrúi á Løgmansskrivstovuni lýst leyst at søkja.

### Uppgávur

Høvuðsuppgávan verður at samskipa útoyggjaøkismenningarpolitikk landsstýrisins og at arbeiða víðari við eitt nú teimum tilmælum, ið vóru løgd fram í Økismenningarálitinum og Út-

oyggjaálitinum. Harumframt skal fulltrúin eisini luttaka í øðrum arbeiði, sum eru í sambandi við kommunumál. Talan er um eitt fjølbroytt og krevjandi starv við nógvum avbjóðingum.

**Faklig førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava viðkomandi útbúgving frá hægri lærustovni og helst eisini hava royndir, ið kunnu vera at gagni í starvinum.

**Persónlig førleikakrøv**
Umsøkjarar eiga at hava góð samstarvsevni, vera áhitnir, kunna arbeiða sjálvstøðugt, og vera til reiðar at ganga nýggjar leiðir.

**Løn og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um Løgmansskrivstovuna við tilhoyrandi stovnum og aðalstýrini. Tann, ið settur verður, má tola møguligar bygnaðarligar broytingar.

**Nærri upplýsingar um starvið**
Møguligir umsøkjarar eru vælkomnir at seta seg í samband við …, deildarleiðara, tlf. 351010, fyri at hoyra meira um starvið.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, c.v. og møguligum viðmælum skulu sendast

Løgmansskrivstovuni
Postsmogu 64
110 Tórshavn

Umsóknir skulu vera á Løgmansskrivstovuni í seinasta lagi 14. februar 2002 kl. 12.00.
Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði."

Við skrivi, dagfest 12. febr. og móttikið á Løgmansskrivstovuni 14. febr. 2002 søkti A hetta starvið.

Við skrivi, dagfest 14. febr. 2002 hevur Løgmansskrivstovan sent henni og hinum umsøkjarunum soljóðandi móttøkuváttan:

> „Løgmansskrivstovan hevur móttikið umsókn tygara um starv sum fulltrúi í økismenningar- og útoyggjamálum.
>
> Umsóknin er til viðgerar og ætlanin er at hava samrøður við umsøkjarar í viku 9.“

11. mars 2002 hevur setanarbólkurin gjørt soljóðandi tilmæli í sambandi við ætlaðu setanina:

> **„Tilmæli í sambandi við Fulltrúa í økismenning og útoyggjamálum.**
>
> 4 umsóknir vóru til starvið, setanarnevndin gjørdi ein setanarprofil áðrenn umsóknirnar vóru gjøgnumgingnar.
>
> Nevndin var samd um at dentur skuldi leggjast á, at tann setti skuldi: „verða diplomatiskur, samstarvsfúsur, skuldi duga at gera nakað tá onki fordømi fanst, hava hugflog at evna nýggj hugskot, duga at fara við fremmandafólki, verða sjálvsikkur og duga at málbera seg, tola avbrot og broytingar í arbeiðsgongd, kunna mæli ímóti atfinningum og hava hugflog um framtíðarætlanir.“
>
> Aftaná at hava gjøgnumgingið umsóknirnar, var semja um at kalla … og A inn til samtalu, henda avgerð var grunda á at tey bæði høvdu mest viðkomandi útbúgving og royndir.
>
> Eftir samrøðurnar er setanarnevndin samd um at innstilla A til at verða setta í starvið, hetta tí at nevndin metir at hon við síni útbúgving og royndum er best egnað, umframt at hon tikist at samsvara væl við profilin, ið gjørdur var.“

19. mars 2002 hevur løgmansstjórin gjørt soljóðandi upprit um málið:

> **„Viðvíkjandi setan av fulltrúa í økismenning og útoyggjamálum.**
> Víst verður til, at setanarnevndin mælir til at seta A í starvið sum fulltrúi í økismenning og útoyggjamálum. Undirritaða tekur undir við metan setanarnevndarinnar um, at A er best skikkaði umsøkjari til hetta starv.

Málið er í dag umrøtt við løgmann. Støða løgmans er, at starvið ikki verður at seta, nú val er útskrivað.

Hetta er serliga grundað á, at talan er um eitt nýtt starv á nýggjum atgerðarøki innan kommunumál, ið helst verður skipað av nýggjum eftir komandi val.

Sum kunnugt avgjørdi løgmaður ikki at seta løgmálastýrið á stovn, júst tí at so langt var útligið móti vali. Hesar metingar løgmans skulu eisini síggjast í hesum samanhangi.

Avgjørt er tí at bíða við at taka avgerð í málinum til eftir at nýggj samgonga er skipað."

25. mars 2002 sendi Løgmansskrivstovan umsøkjarunum soljóðandi skriv:

„Vísandi til umsókn tygara um starv sum fulltrúi í økismenning og úroyggjamál, skal vera sagt frá, at avgjørt er at bíða við at taka avgerð í málinum til eftir løgtingsvalið og at nýggj samgonga er skipað.

Hetta er serliga grundað á, at tað snýr seg um eitt nýtt starv á nýggjum atgerðarøki innan kommunumál, ið helst verður skipað av nýggjum eftir løgtingsvalið."

14. sept. 2002 var nýggj lýsing at síggja í Sosialinum. Hesaferð var tað Oljumálaráðið sum lýsti starvið leyst. Lýsingin var soljóðandi:

**„Fulltrúi til útjaðaramál og lendisskipan**
Við hesum verður eitt starv sum fulltrúi í Oljumálaráðnum lýst leyst at søkja. Gjørt verður vart við, at líknandi starv varð lýst leyst á Løgmansskrivstovuni í vetur. Umsøkjarar, ið lótu inn umsókn til tað starvið, mugu søkja av nýggjum, tí starvsuppgávurnar eru broyttar nakað, eftir at útjaðaramál vórðu flutt til Oljumálaráðið at umsita.

**Uppgávur**
Høvuðsuppgávan verður at samskipa útjaðarapolitikk landsstýrisins og at arbeiða víðari við eitt nú teimum tilmælum, ið vóru løgd fram í Økismenningarálitinum og Útoyggjaálitinum. Harumframt

skal fulltrúin taka sær av málsviðgerð á byggi- og býarskipanarøkinum umframt at taka lut í arbeiðinum at dagføra lóggávuna á hesum øki.

Talan er um eitt fjølbroytt og krevjandi starv við nógvum avbjóðingum.

**Faklig førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava viðkomandi útbúgving. Umsøkjarar við royndum á starvsøkjunum kunnu hava fyrimun.

**Persónlig førleikakrøv**
Umsøkjarar eiga at hava góð samstarvsevni, vera fyritakssamir, kunna arbeiða sjálvstøðugt, og vera til reiðar at ganga nýggjar leiðir.

**Løn og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um Oljumálaráðið við tilhoyrandi stovnum og miðfyrisitingina.

**Nærri upplýsingar um starvið**
Umsøkjarar eru vælkomnir at seta seg í samband við Oljumálaráðið á tlf. 357070 og tosa við …, deildarleiðara fyri at hoyra meira um starvið.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, C.V. og møguligum viðmælum skulu sendast til:

Oljumálaráðið
Postsmoga 3059
FO-110 Tórshavn

Umsóknarfreistin er 11. oktober 2002. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Starvið verður sett skjótast til ber.“

16. sept. sendi Løgmansskrivstovan umsøkjarunum soljóðandi skriv:

**„Viðvíkjandi fulltrúa í økismenning og útoyggjamálum**
Tygum vóru ein av umsøkjarunum í februar 2002 til starvið sum fulltrúi í økismenning og útoyggjamálum. Av givnum orsøkum varð starvið ikki sett tá.

Málsøkið er síðani flutt frá Løgmansskrivstovuni til Oljumálaráðið, sum hevur avgjørt at lýsa av nýggjum eftir „fulltrúa til útjaðaramál og lendisskipan". Starvsinnihaldið er, sum sæst í viðløgdu lýsing, nakað broytt.

Um tygum framvegis hava áhuga í starvinum, er neyðugt at senda nýggja umsókn til nú lýsta starvið.

Vit harmast um at hava órógva tygum óneyðugt."

## Partshoyring

Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna hesa klaguna nærri, og varð hon tí við skrivi, dagfest 12. febr. 2003 send Løgmansskrivstovuni til ummælis, eins og biðið varð um skjølini í málinum.

Við skrivi, dagfest 10. mars 2003 hevur Løgmansskrivstovan latið umboðsmanninum skjølini og hesar viðmerkingarnar:

„Víst verður til bræv tykkara dagfest 10. februar 2003, har Løgmansskrivstovan verður biðin um at ummæla og at lata skjøl í málinum um at seta fulltrúa til økismenning.

Við støði í hjáløgdum brævi frá A hevur Løgmansskrivstovan hesar viðmerkingar.

Avgerðin um at seta fulltrúa til útoyggjamál varð tikin longu á vári 2001 í kjalavørrinum av, at arbeiðsbólkur lat løgmanni álit um útoyggjamenning, og aðalorðaskifti um álitið hevði verið í Løgtinginum.

Løgmansskrivstovan lat síðani Fíggjarmálaráðnum uppskot til eykajáttan, ið skuldi leggjast fyri Løgtingið í september 2001. Tilgongdin viðvíkjandi eykajáttanarlógini dróg tó so mikið langt út, at uppskotið varð ikki samtykt í Løgtinginum fyrr enn í november 2001.

Síðani varð lýsing orðað og send føroysku bløðunum 23. januar 2002.

Sostatt gekk lutfalsliga long tíð frá tí, at politisk avgerð varð tikin og til, at lýsingin varð latin bløðunum 23. januar 2002. Løgmansskrivstovan gáaði tó ikki um, at tað, at tíðin styttist til valið, kundi gerast ein trupulleiki í hesum sambandi.

Tilgongdin viðvíkjandi viðgerðini av umsóknunum gekk fyri seg sum vanligt og gongur fram av skjølunum. Tilmæli um at seta starvið varð evnað til og latið undirritaðu.

Sum vanligt er á Løgmansskrivstovuni umrøddi undirritaða málið við løgmann, áðrenn setanin varð staðfest. Úrslitið av hesi umrøðu sæst í skjølunum í málinum.

Í tíðini frá tí at avgerð varð tikin um at seta fulltrúa í útoyggjamálum og til, at málið var klárt at taka endaliga støðu til, vórðu ymiskar broytingar umhugsaðar á politiskum stigi. Løgmansskrivsstovan knýtti ikki hesi viðurskifti saman við tilgongdini at seta fulltrúa í útoyggjamálum.

Serligan týdning í hesum sambandi hevði spurningurin um at seta á stovn Løgmálaráð, ið eisini skuldi vera innlendisráð. Ætlanin var, at hetta skuldi setast á stovn á heysti 2001. Avgerðin varð síðani útsett til eftir fólkatingsvalið 20. november 2001. Síðani var spurningurin tikin upp aftur, so at stovnsetanin kundi gerast áðrenn valið. Men tíðin gekk, og tað endaði við, at avgerðin varð útsett til eftir løgtingsvalið.

Avgerðin um at útseta setanina av fulltrúa var ikki knýtt at teimum persónum, ið høvdu søkt starvið, men av tí veruleika, at væntað varð, at kommunu- og útoyggjaøkið fór at verða skipað av nýggjum eftir valið. Hetta gjørdist veruleiki. Umsøkjararnir fingu skrivlig boð um hetta.

Nýggj samgonga varð skipað 6. juni 2002. Fyrsta tíðin eftir hetta varð nýtt til at umskipa ymisk viðurskifti sum at seta á stovn Løgmálaráð og at flyta byggimál og økismenningarmál til Oljumálaráðið, meðan kommunumál vóru verandi á Løgmálaráðnum.

Skjølini í málinum og skjalayvirlit er hjálagt."

Við skrivi, dagfest 17. mars 2003 vóru hesar viðmerkingarnar sendar A til ummælis við einari ummælisfreist uppá 3 vikur. Í skrivinum boðaði umboðsmaðurin frá, at um hann einki hevði frætt, tá ásetta freistin var farin, bleiv málið tikið upp til endaliga viðgerð.

7. apríl 2003 bað Advokatvirkið vegna A um at fáa hesa freistina longda eina viku afturat. Hesum játtaði umboðsmaðurin.

Tá umboðsmaðurin framvegis einki hevði frætt frá A, boðaði hann við skrivi, dagfest 5. mai 2003 bæði henni og Løgmansskrivstovuni frá, at málið bleiv tikið upp til endaliga viðgerð.

## *Niðurstøða*

*Klagarin hevur ført fram, at orsøkin til, at hon ikki varð sett í lýsta starvið, kann hava verið politisk, tí hon stillaði upp fyri Tjóðveldisflokkin í … til løgtingsvalið í 2002.*

*Løgmansskrivstovan hevur ført fram, at avgerðin um at útseta setanina av fulltrúa ikki var knýtt at teimum persónum, ið høvdu søkt starvið, men at tí veruleika, at roknað varð við, at kommunu- og útoyggjaøkið fór at verða skipað av nýggjum eftir valið.*

*Hóast klagarin 11. mars 2002 var einmælt innstillað til starvið av setanarnevndini, og hóast løgmansstjórin tók undir við hesi innstilling, er tað hvørki hervið ella annars ført prógv fyri, at avgerð løgmans um ikki at seta klagaran í starvið var politisk og ikki saklig. Havt eigur at vera í huga, at ein umsøkjari til leyst starv ikki hevur krav uppá starvið, hóast viðkomandi er væl skikkaður til tað. Við tað, at tað stundaði til løgtingsval, og at broytingar viðvíkjandi umsitingini av málsøkjum kundu koma uppá tal, um nýtt landsstýri skuldi skipast, var tað helst skilagott at bíða við at seta starvið, til eitt møguligt nýtt landsstýri var skipað.*

*Hinvegin er at siga, at undanfarna løgtingsval var tann 30. apríl 1998. Tað kundi tí ikki koma óvart á Løgmansskrivstovuna, at løgtingsval skuldi verða aftur í seinasta lagi 30. apríl 2002. Kortini varð starvið lýst leyst bert umleið 3 mánaðir undan evsta degi fyri komandi løgtingsvali. Hóast avgerðin um at seta ein fulltrúa í útoyggjamálum sambært Løgmansskrivstovuni varð tikin longu á vári 2001, hevði tað, nú so stutt var eftir til løgtingsvalið, verið skilabetri at bíða við at lýst starvið leyst til aftaná løgtingsvalið, og eitt møguligt nýtt landsstýri var skipað. Harvið høvdu klagarin og hinir umsøkjararnir sloppið undan at sent inn umsóknir til fánýtis.*

*Eg haldi tí, at handfaringin hjá Løgmansskrivstovuni av hesum partinum av málinum hevur verið minni heppin.*

*Nýtt landsstýrið varð skipað 6. juni 2002, og samstundis varð málsøkið útoyggjamál, ið hevði ligið undir Løgmansskrivstovuni, lagt undir Oljumálaráðið.*

*Klagarin hevur ført fram, at hon aftaná skrivið frá Løgmansskrivstovuni, dagfest 25. mars 2002, um at setanin var útsett til eftir løgtingsvalið, einki frætti aftur, fyrr enn hon fekk skrivið, dagfest 16. september 2002. Hetta hóast hon hevði spurt seg fyri á Løgmansskrivstovuni nakrar ferðir.*

*Hóast tað má leggjast til grund, at Løgmansskrivstovan hevði úr at gera í sambandi við skipanina av nýggjum landsstýri og teimum broytingum, sum hetta førdi við sær, hevði tað ikki verið serliga tíðarkrevjandi at sett saman eitt skriv svarandi til tað, sum varð sent klagaranum tann 16. september 2002. Serliga tá málsgondin viðvíkjandi lýsing av starvinum og avgerðin um at bíða við at seta starvið verður havd í huga, átti Løgmansskrivstovan beinanvegin at havt boðað klagaranum frá, at málsøkið var flutt til Oljumálaráðið. Eg haldi tað vera átaluvert og ikki samsvarandi góðum fyrisitingarsiði, at umsøkjararnir ikki fáa skriv um hetta fyrr enn meira enn 3 mánaðar aftaná, at málsøkið verður flutt til Oljumálaráðið, og enntá aftaná, at Oljumálaráðið hevur lýst starvið leyst av nýggjum.*

*Burtursæð frá at geva Løgmansskrivstovuni eina átalu fyri vánaligu kunningina av klagaranum geri eg ikki meira við málið.*

## 28.2. Klaga um málsviðgerðina og avgerð hjá Vinnumálaráðnum um rættin til frítíðarløn av barsilsendurgjaldi

*A hevur sent umboðsmanninum eina klagu um málsviðgerðartíðina og avgerðina hjá Vinnumálaráðnum av einari kæru. Kæran snúði seg um, hvørt B hevði rætt til frítíðarløn av barsilspeninginum frá Barsilsskipanini.Umboðsmaðurin gav Vinnumálaráðnum eina átalu fyri ikki at hava kunnað A um málsgongdina. Umboðsmaðurin helt, at Barsilsskipanin hevði havt skyldu at rinda frítíðarløn av barsilspeninginum, og hann mælti tí Vinnumálaráðnum til at taka kærumálið uppaftur til viðgerðar við atliti at hesum spurninginum. Somuleiðis bað hann Vinnumálaráðið lata seg frætta, hvørja niðurstøðu ráðið kom til hesum viðvíkjandi. ( J.nr. 200300010)*

### Klagan

Við skrivi, dagfest 14. febr. 2003 hevur A, advokatur sent umboðsmanninum soljóðandi klagu:

> „Sum advokatur fyri Starvsmannafelagið skal eg við hesum klaga Vinnumálastýrið fyri ikki at hava svarað brøvum mínum frá 4. juni 2002 og 19. november 2002, sum eg leggi við í avriti.
>
> Málið snýr seg um, at eg sum advokatur fyri Starvsmannafelagið havi kært eina avgerð hjá einum av limum tess, B, um frítíðarløn í sambandi við barsil eftir lóg um Barsilsskipan.
>
> Nevndi limur Starvsmannafelagsins hevur sjálvandi langt síðani hildið feriu og er farin til arbeiðis aftur, uttan at Vinnumálastýrið (sum ávístur kærumyndugleiki sambært avgerðarbræv Barsilskipaninar) yvirhøvur hevur latið við seg koma – heldur ikki eftir mítt seinna bræv, har eg biði um at fáa eina váttan um móttøku, um ikki annað.“

### Málsgongdin

B fekk við skrivi frá Barsilsskipanini, dagfest 12. september 2001 játtað barsilspening fyri tíðarskeiðið 8. september 2001 til 22. mars 2002.

Við teldubrævi 23. jan. 2002 sendi arbeiðsgevarin Barsilsskipanini ein fyrispurning um, hvørt frítíðarløn verður goldin í grunn av barsilsendurgjaldi, og hvør støðan hjá B var í hesum sambandi.

Í teldubrævi 4. febr. 2002 svaraði Barsilsskipanin, at frítíðarløn ikki verður goldin í grunn av barsilspeninginum. Víst varð til § 12 í Barsilsskipanarlógini, og greitt var frá, at frítíðarløn er íroknað útrokningargrundarlagnum undir barsilspeninginum. Teldubrævið bleiv eisini sent B, sum svaraði Barsilsskipanini aftur, at hon ikki skilti avgerðina. Hon spurdi samstundis, um hon fór at fáa feriu við løn ella ikki.

Við skrivi, dagfest 8. febr. 2002 svaraði Barsilsskipanin henni soleiðis:

**„Viðvíkjandi frítíðarløn**

Barsilsskipanin váttar við hesum at hava móttikið fyrispurning tygara viðv. frítíðarløn gjøgnum E-mail tann 4. februar 2002, har tygum spyrja, um tygum hava rætt til feriu við løn ella ikki.

Barsilsskipanin hevur áður víst tygum á, at frítíðarløn verður ikki goldin í grunn av barsilspeninginum.

Viðvíkjandi frítíðarløn verður víst til § 5 og 12 í Løgtingslóg um Barsilsskipan frá 3. apríl 2001, har ásett er, at:

*„§ 12. Grundarlagið fyri útrokningini av barsilspeningi er móttikna miðal mánaðarliga gjaldskylduga A-inntøkan eftir § 18, seinastu 12 mánaðirnar áðrenn fráveruna. Hægsta móttikna miðal mánaðarliga gjaldskylduga A-inntøkan eftir § 18 í einum samanhangandi 6 mánaða skeiði innanfyri seinastu 12 mánaðarnar áðrenn fráveruna verður tó nýtt sum grundarlag, um hendan er hægri enn inntøkan sambært 1. pkt. Ger viðkomandi av bert partvís at fara frá arbeiðið, verður grundarlagið fyri útrokningini av barsilspeningi lækkað samsvarandi hesum.*

*Stk. 2. Hevur viðkomandi beint undan fráveruni verið á arbeiðsmarknaðinum í eitt styttri tíðarskeið enn tað, nevnt í stk. 1, 1.pkt., verður barsilspeningurin útroknaður við grundarlagi í miðal móttiknu gjaldsskyldugu A-inntøkuni eftir § 18 hetta styttra tíðarskeiðið, jbr. tó stk. 1, 2. pkt.“*

Sum omanfyri nevnt, er frítíðarløn íroknað í útrokningargrundarlagnum/útgjaldinum.

Um tygum hava rætt til feriu við løn, verður víst til § 5:
*„§ 5. Tað tíðarskeið, løntakari er í barsilsfarloyvi eftir §§ 1 og 2, verður roknað sum vanlig arbeiðstíð, tá starvsaldur, eftirlønaraldur, rættindi eftir frítíðarlógini o.o. rættindi skulu roknast“*

T.v.s. at tygum hava rætt til feriu, men um tað er við løn ella ikki, verður víst til tygara sáttmála á arbeiðsmarknaðinum ella avtalu við arbeiðsgevara…“

Við skrivi, dagfest 20. febr. 2002 sendi A, adv. Barsilsskipanini soljóðandi fyrispurning:

„Eg vendi mær til tykkara sum advokatur fyri Starvsmannafelagið í sambandi við bræv tykkara til B, dagfest 08.02.

Starvsmannafelagið er yrkisfelag hjá B.

Í nevnda brævi tykkara verður ført fram, at frítíðarlønin er íroknað útgjaldinum í sambandi við barsil.

Eg dugi einki at síggja í lógini, sum heimilar Barsilsskipanini at gjalda frítíðarløn út, tí hetta er beinleiðis bannað eftir løgtingslóg um frítíð við løn og frítíðarløn.

Sambært § 5 í lógini um barsilsskipan er ásett, at tað tíðarskeið, sum løntakari er í barsilsfarloyvi, verður roknað sum vanlig arbeiðstíð tá rættindi eftir frítíðarlógini skulu roknast út.

Hetta merkir sjálvandi, at kvinnur í barsilsskipanini skulu hava frítíðarløn. Mær er ikki greitt, um hetta er frá Barsilsskipanini, men í frítíðarlógini er ásett, at frítíðarløn skal gjaldast av øllum A-skattskyldugum útgjøldum.

Í frítíðarlógini er eisini ásett, at tíðin, sum kvinna er í barsilsfarloyvi, skal ikki dragast frá, tá rættur hennara til frítíð skal roknast. Hesin rættur til frítíð er uttan iva rættur til frítíð við løn, tí rætt til frítíð uttan løn hava allir løntakarar, hóast teir ikki hava innvunnið sær rætt til frítíð við løn.

Spurningurin er tískil bert, um Barsilsskipanin skal gjalda frítíðarløn til frítíðargrunnin, ella arbeiðsgevarin skal gera hetta. Eg fari at biðja um tykkara áskoðan og tykkara støðutakan til hetta mál beinanvegin, tí hetta tykist rættiliga prinsipielt, og sum tit leggja tað upp í brævinum til limir starvsmannafelagsins, kann tað í hvussu so er ikki vera rætt.“

Við skrivi, dagfest 12. mars 2002 svaraði Barsilsskipanin advokatinum soleiðis:

**„Viðvíkjandi fyrispurningi um rættin til feriuløn**
Barsilsskipanin hevur tann 20. februar 2002 móttikið fyrispurning tygara viðvíkjandi máli hjá B, og snýr fyrispurningurin seg um, hvørt Barsilsskipanin skal gjalda frítíðarløn til frítíðargrunnin, ella arbeiðsgevarin skal gera hetta.

Í sambandi við at løgtingslóg um barsilsskipan frá 3. apríl 2001 kom í gildi 1. juni 2001, fór úr gildi løgtingslóg nr. 37 frá 23. apríl 1999 um foreldrafráveru, orsakað av barnsburði, føðing og ættleiðing.

Tann almenni parturin um Barsilsskipanina er nevndur í Partur I í Løgtingslóg um barsilsskipan frá 3. apríl 2001, hesin umfatar § 1 til og við § 7. Sambært § 5 verður tað tíðarskeið, løntakari er í barsilsfarloyvi eftir §§ 1 og 2, at rokna sum vanlig arbeiðstíð, tá t.d. starvsaldur, eftirlønaraldur, og rættindi eftir frítíðarlógini skulu roknast.

Barsilsskipanin umsitur Part II í Løgtingslóg um barsilsskipan frá 3. apríl 2001. Sambært § 8 verður barsilspeningur veittur í sambandi við viðgongu, barnsburð og ættleiðing. Í § 18 verður nevnt, at gjaldið verður kravt av øllum A-inntøkum, sum tey gjaldsskyldugu fáa ella rinda. Somuleiðis verður nevnt í § 12, at grundarlagið fyri útrokningini av barsilspeningi er móttikna miðal mánaðarliga gjaldsskylduga A-inntøkan eftir § 18.

Tá frítíðarløn verður útgoldin sum A-inntøka í tíðarskeiði, ið er grundarlag fyri útrokningini av barsilspeningi, verður frítíðarlønin íroknað útrokningargrundarlagnum, og verður barsilspeningur í hesum føri tí veittur íroknað hesa frítíðarløn, sí § 12, stk. 1 í løgtingslóg um barsilsskipan.

Sambært omanfyri standandi veitir Barsilsskipanin barsilspening grundað á móttikna A-inntøku, og hetta fyri tíðarskeiðið viðkomandi er í barsilsfarloyvi. Barsilsskipanin veitir ikki barsilspening í sambandi við feriu og setur heldur ikki pening í frítíðargrunn.

Hava tygum viðmerkingar hesum viðvíkjandi, verða tygum biðin um at seta tygum í samband við okkum innan 14 dagar.“

Advokaturin vendi sær aftur til Barsilsskipanina við skrivi, dagfest 14. apr. 2002. Skrivið er soljóðandi:

„Eg vísi til svarbræv tykkara til mín, dagfest 13.03.2002.

Eg skilji svarið soleiðis, at tit ikki gjalda frítíðarløn í grunn í sambandi við útgjald av barsilspengum, og at tit heldur ikki gjalda frítíðarískoyti.

At frítíðarløn og frítíðarískoyti við hvørt kunnu vera við í útrokningini av barsilspengum, tí útgoldið verður í mun til vanliga A-inntøku eftir § 18, er annar spurningur, sum fyri so vítt einki hevur við spurningin um útgjald av feriuløn og frítíðarískoyti eftir løgtingslóg um frítíð við løn.

Eftir § 15, stk. 2 er ásett, at Barsilsskipanin skal endurrinda arbeiðsgevarum fyri løn, frítíðarløn, frítíðarískoyti og onnur arbeiðsmarknaðargjøld, sum hesin rindar barnakonu í farloyvistíðarskeiðnum. Út frá hesum haldi eg meg duga at lesa, at tá arbeiðsgevari ikki rindar løn, frítíðarløn o.a.l., eigur Barsilsskipanin at gera tað.

Mín áskoðan er tí, at í tann mun, arbeiðsgevari ikki eigur at rinda løn undir barsilsfarloyvi, eigur Barsilsskipanin at rinda løn eftir § 12 – umframt at gjalda frítíðarløn í grunn av útgoldnari upphædd.

Hetta geri eg galdandi mótvegis tykkum.

Eg fari at biðja tykkum svara, um tit vísa kravinum aftur ella ikki, so vit um neyðugt kunnu fáa spurningin loystan á annan hátt.“

Í skrivi, dagfest 15. mai 2002 svarar Barsilsskipanin advokatinum soleiðis:

„Í skrivi tygara, ið er móttikið 15. apríl 2002, verður heitt á Barsilsskipanina um at svara, um Barsilsskipanin vísir aftur kravinum um, at í tann mun arbeiðsgevari ikki eigur at rinda løn undir barsilsfarloyvi, eigur Barsilsskipanin at rinda løn eftir § 12 – umframt at gjalda frítíðarløn í grunn av útgoldnari upphædd.

Sum áður umrøtt í skrivi til tygara, dagfest 12. mars, skulu vit gera vart við, at vit ikki meta, at tað finst nøkur heimild í

Løgtingslóg nr. 48, frá 3. apríl 2001 um barsilsskipan fyri at gjalda frítíðarløn í grunn av útgoldnum barsilspeningi. Víst skal annars verða til nærri umrøðu í skrivi okkara, dagfest 12. mars 2002. Sum nevnt í skrivi tygara, eru hinvegin beinleiðis ásetingar í § 15, stk. 2 um, undir ávísum treytum, at endurrinda arbeiðsgevaranum útgoldna frítíðarløn og frítíðariskoyti.

Sum víst á í skrivi til B, dagfest 8. februar 2002, hevur B, sambært § 25, stk. 3, møguleika fyri at kæra avgerðir, sum Barsilsskipanin tekur til landsstýrismannin innan 4 vikur eftir, at viðkomandi hevur fingið fráboðan um avgerðina. Møgulig kæra skal stílast til Vinnumálastýrið, Postsmoga 377, 110 Tórshavn."

Við skrivi, dagfest 4. juni 2002 kærir advokaturin avgerðina hjá Barsilsskipanini til Vinnumálaráðið. Skrivið er soljóðandi:

**„Kæra um avgerð hjá Barsilsskipanini.**
Vegna B og verkafelag hennara Starvsmannafelagið skal eg við hesum kæra eina avgerð, sum stýrið fyri Barsilsskipanina hevur tikið, og sum framgongur av viðløgdu skjølum.

Málið snýr seg um frítíðarløn hjá teimum kvinnum sum fara í barsil eftir Barsilsskipanini.

Eftir øllum at døma fáa hesar ikki frítíðarløn av útgjøldunum frá Barsilsskipanini og ei heldur frá arbeiðsgevaranum.

Hetta kann ikki vera rætt, og er neyvan í samsvari við ætlanina við Barsilsskipanini.

Eg leggi við fylgjandi skjøl:
- bræv frá Barsilsskipanini til B 28.02.02
- telefax frá undirritaða til Barsilsskipanina 20.02.02
- telefax frá undirritaða til Barsilsskipanina 14.04.02
- bræv frá Barsilsskipanini/ALS til undirritaða 15.05.02.

Málið verður við hesum latið landsstýrismanninum sum kæra."

Við skrivi, dagfest 19. nov. 2002 minti advokaturin Vinnumálaráðið á málið. Skrivið er soljóðandi:

> **„Viðv. kæru um avgerð hjá Barsilskipanini (B)**
> Nú fer at verða eitt hálvt ár síðan eg sendi kæru mína tann 04.06.02, men eg havi framvegis onki frætt frá tykkum.
> vEg fari at biðja tykkum um ikki annað so at siga mær frá, um tit hava móttikið kæruna, og nær eg kann rokna við einum svari.“

Við skrivi, dagfest 27. febr. 2003, ella umleið 1 viku aftaná, at umboðsmaðurin hevði sent Vinnumálaráðnum hesa klaguna til ummælis, sendi Vinnumálaráðið advokatinum avgerðina í kærumálinum. Skrivið er soljóðandi:

> „Í skrivi, dagfest 4. juni 2002, hava tygum vegna B kært avgerð hjá Barsilsskipanini viðvíkjandi umsókn um barsilspening.
>
> **Kæran:**
> Kært verður um, at Barisilsskipanin hevur sýtt at rinda frítíðarløn í grunn.
> Gjørt verður galdandi, at í tann mun arbeiðsgevari ikki rindar løn undir barsilsfarloyvi, skal Barsilsskipanin av útgoldnu upphæddini rinda frítíðarløn í grunn.
> Hetta verður grundgivið við, at tað av § 5 og § 15, stk. 2 í løgtingslógini um barsil gongur fram, at í førum, tá løntakarar ikki fáa løn frá arbeiðsgevara í sambandi við barsilsfarloyvi, skal Barsilsskipanin av útgoldnari upphædd rinda frítíðarløn í grunn, umframt at hetta eisini gongur fram av § 5 í løgtingslógini um frítíð við løn.
>
> **Avgerð:**
> Sagt verður frá, at kæran ikki verður komin á møti.
>
> **Grundgeving:**
> Eftir 10, stk. 2 í løgtingslóg nr. 30 frá 7. apríl 1986 um frítíð við løn skal arbeiðsgevarin, tá hann rindar løntakara løn, samstundis rinda frítíðarløn til viðkomandi løntakarafelag, ella, um einki

umboðandi løntakarafelag finst, Frítíðargrunninum í varveitslu, til frítíðin skal haldast. Barsilspeningur er endurgjald fyri lønarmiss í sambandi við barsilsfarloyvi, og er tí ikki umfataður av løgtingslógini um frítíð við løn, og einki er ásett í frítíðarlógini ella í løgtingslógini um barsil, hvørki í § 5 ella § 15, stk. 2, at Barsilsskipanin hevur eina tilsvarandi skyldu sum arbeiðsgevarin í førum, tá arbeiðsgevarin ikki rindar løn í sambandi við barsilsfarloyvi. Tað kann tí ikki gevast viðhald í, at Barsilsskipanin hevur skyldu at rinda frítíðarløn til frítíðarkonto ella til Frítíðargrunnin. Avrit av hesum skrivi er sent Barsilsskipanini.

Vinnumálaráðið harmast um ta longu tíð, sum er gingin, áðrenn kæran varð svarað."

## Partshoyringin

Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna hesa klaguna nærri, og varð hon tí send Vinnumálaráðnum til ummælis, eins og biðið varð um skjølini í málinum. Í skrivinum til Vinnumálaráðið, sum er dagfest 19. febr. 2003 stóð m.a. soleiðis:

„Eg fari í hesum sambandi at biðja Vinnumálaráðið greiða mær nærri frá hesum málinum, herundir:

- nær Vinnumálaráðið hevur móttikið kæruna frá advokatinum,
- hvat síðani er hent í málinum, og
- hvør orsøkin er til, at advokaturin einki hevur frætt aftur frá Vinnumálaráðnum, nú meira enn 8 mðr. eru lidnir, síðani kæran varð send Vinnumálaráðnum, og nærum 3 mðr. eru lidnir, síðani advokaturin rykti eftir svari."

Við skrivi, dagfest 28. febr. 2003, hevur Vinnumálaráðið latið mær hesar viðmerkingarnar:

„Víst verður til nevnda mál, og verða øll skjøl í málinum hjá Vinnumálaráðnum løgd við.

**Frágreiðing um hvat er hent í málinum:**

Kæran er móttikin í Vinnumálaráðnum tann 5. juli 2002, og tann 19. november 2002 hevur adv. mint á málið.

Tá Vinnumálaráðið fekk kæruna, varð kæran, sum øll onnur mál, sum koma til ráðið, skrásett í skrásetingar- og málsviðgerðarskipanini (docu-live) hjá ráðnum, og varð málið síðani um interna netið í elektroniskum formi lagt til málsviðgerðan, men m.a. av orsøkum, sum nærri er greitt frá niðanfyri, hevur kærarin ikki fingið svar enn.

**Frágreiðing um orsøkina til seinu málsviðgerðina:**
Løgtingslóg um barsilsskipan kom í gildi 1. juni 2001, og varð umsitingin av skipanini løgd til ALS, sum tekur avgerðir viðvíkjandi umsóknum um barsilspening sum 1. instansur við kærurætti til landsstýrismannin í arbeiðsmarknaðarmálum. Síðani skipanin kom í gildi hava verið 27 kærir. Av hesum eru 15 avgreiddar og 12 óavgreiddar. Umframt kærumálsviðgerð krevur skipanin lutfalsliga nógva orku til málsviðgerð í Vinnumálaráðnum m.a. at svara fyrispurningum frá ALS viðvíkjandi tulking av lóggávuni, fyrispurningum frá borgarunum og gerð av kunngerðum. Hetta hevur havt við sær, at talið á málum á hesum økinum hevur verið stórt og kravt nógva umsitingarliga orku. M.a. hesi viðurskiftini hava havt við sær langa málsviðgerðartíð, og í hesum førinum ov langa viðgerðartíð.

Harmast verður um longu viðgerðatíðina í hesum málinum.

Málið, sum kærumálið hjá Starvsmannafelagnum snýr seg um, er avgreitt, og stig eru tikin, at tílík mál verða svaraði innan rímiliga freist, umframt at arbeitt verður við við at leggja kærumyndugleikan til annan myndugleika, sum heimild er til eftir løgtingslógini um barsilsskipan.“

Við skrivi, dagfest 3. mars 2003 vórðu viðmerkingarnar frá Vinnumálaráðnum sendar advokatinum til ummælis.

Við skrivi, dagfest 11. apríl 2003 hevur advokaturin boðað umboðsmanninum frá, at hann ynskti at víðka klaguna til eisini at fevna um kæruavgerðina, dagfest 27. febr. 2003. Skrivið er soljóðandi:

„Eg vísi til skriv tykkara 03.03.03 og skal siga frá, at mín klientur hevur ongar aðrar viðmerkingar til málið viðvíkjandi viðgerðartíðini, sum klagað varð um.

Hinvegin skal eg loyva mær sum advokatur fyri Starvsmannafelagið at reisa tann materiella spurningin í hesum málið og kæra um avgerð Vinnumálaráðsins dagfest 27.02.03, sum eg leggi við í avriti.

**FAKTUM:**

Tá arbeiðgevari rindar starvskvinnu løn undir barsli, fær arbeiðsgevarin hetta endurrindað.

Endurrindað verður sjálv lønin, umframt frítíðarløn og onnur gjøld, sum arbeiðsgevarin skal gjalda í vanligari tænastu.

Hetta hevur við sær, at tá starvskvinnan kemur aftur til arbeiðis, verður hon hvat frítíð viðvíkur viðgjørd eins og hon hevði verið til arbeiðis. Hetta merkir at hon t.d. fær fulla frítíð við løn, um so er, at hon uppfyllir treytirnar fyri hesum annars.

Í teimum førum, tá kvinna undir barsli, ikki fær løn frá arbeiðsgevara, men í staðin fær gjald frá barsilsskipanini, í tí tíðarskeiðnum, hon er burtur frá arbeiðnum, vinnur hon sær ikki rætt til frítíð við løn ella frítíðarløn frá arbeiðsgevaranum.

Eg kann viðmerkja, at tað tykiskt vera heilt vanligt, at eisini privatir arbeiðsgevarar, sum ikki sambært sáttmála ella lóg hava skyldu at gjalda løn í barsilsstíðini, gera hetta, og fáa síðani alt endurgoldið aftur frá barsilsskipanini.

Hetta er ongin missur fyri arbeiðsgevaran, og kontinuiteturin í arbeiði og frítíð hjá kvinnuni heldur fram, sum var hon alla tíðina til arbeiðis.

Eftir stendur so spurningurin, um kvinna, sum hevur arbeiðsgevara, sum ikki vil gjalda henni løn í barsilstíðini, skal verða verri fyri, og um heimild er í lóg fyri at lata vera við at gjalda slíkari kvinnu frítíðarløn ella frítíð við løn, ella um heimild er fyri, at frítíðarlønin møguliga verður útgoldin saman við gjøldunum, sum kvinnan fær frá barsilsskipanini.

**GRUNDGEVINGAR:**

Eg geri galdandi at kvinna, sum er í barsli sambært galdandi lóg, ikki skal vera verri fyri hvat viðvíkur frítíð ella frítíðarløn, enn ásett í løgtingslóg um frítíð við løn.

Eg geri galdandi, at avgerðin hjá Vinnumálastýrinum er skeiv,

tí sum eg lesi hana, sigur hon at kvinna í barsli eftir galdandi reglum, ikki hevur rætt til frítíðarløn ella frítíð við løn.

Eg geri galdandi, at avgerðin hjá barsilsskipanini er skeiv, tí sum eg lesi hana, sigur hon, at frítíðarlønin verður útgoldin saman við teimum føstu gjøldunum frá barsilsskipanini.

Eg geri galdandi, at eftir galdandi lóg um barsilsskipan eigur starvskvinna ikki at vera verri fyri viðvíkjandi frítíð við løn ella frítíðarløn.

Eg geri galdandi, at sambært forrarbeiðunum til løgtingslóg um frítíð við løn, og tilsvarandi danska lóg, er høvuðsendamálið við lógini at laga viðurskiftini soleiðis, at løntakarin altíð skal hava ráð til at fara í feriu, og at feriulønin tí ongantíð skal útgjaldast saman við lønini, men skal útgjaldast, tá fari verður í feriu.

Fyri mánaðarlønt er galdandi, at tey hava rætt til frítíð við løn.

Samanumtikið gerið eg galdandi, at barsilsskipanin antin skal veita feriu við løn, lutfalsliga í mun til tað, sum kvinna hevur fingið útgoldið við barsilspengum, ella skal veita leypandi frítíðarløn av teimum gjøldum, sum verða útgoldin. (Hetta er sjálvandi galdandi í teimum førum, tá arbeiðsgevarin ikki rindar, men barsilsskipanin rindar beinleiðis).

**SKJØL:**

Eg leggi við
- bræv frá barsilsskipanini til B 08.02.02
- bræv frá barsilsskipanini til Advokatvirkið 13.03.02
- bræv frá Vinnumálaráðnum til Advokatvirkið 27.02.03

Eg skal heita á løgtingsins Umboðsmann um at taka málið til viðgerðar."

Við skrivi, dagfest 14. apríl 2003 varð hendan víðkaða klagan send Vinnumálaráðnum til ummælis við einari ummælisfreist uppá 3 vikur.

Tá umboðsmaðurin einki hevði frætt aftur frá Vinnumálaráðnum, boðaði hann við skrivi, dagfest 19. mai 2003, pørtunum frá, at hendan klagan nú fór at verða tikin upp til viðgerðar. Víst varð á, at viðgerðartíðin kundi fara at gerast 1-2 mðr.

Barsilsskipanin hevur aftaná eftir áheitan sent umboðsmanninum eitt upprit um útrokningargrundarlagið fyri barsilspeninginum hjá B. Uppritið, ið er dagfest 18. juli 2003 er soljóðandi:

**„Útrokningargrundarlagið hjá B, f. 15. januar 1975**
Eftir áheitan frá Jonhard Klettheyggj, starvsfólk hjá Løgtingsins umboðsmanni, verður hervið sent eitt yvirlit yvir, hvussu útrokningargrundarlagið hjá B er roknað.

B hevur fingið játtað barsilspening frá Barsilsskipanini frá 8. septembur 2001.

Útgjaldið er roknað við støði í § 12, stk. 1 í Løgtingslóg um Barsilsskipan frá 3. apríl 2001.

Fyrst verður A-inntøkan seinastu 12 mánaðirnar áðrenn fráveruna kannað samb. upplýsingum frá Toll- og Skattstovu Føroya fyri tíðarskeiðið 8. septembur 2000 til og við 7. septembur 2001. Sí kontuavrit niðanfyri:

***KONTOAVRIT FRA LØNARSKRÁNNI***
***08.09.2000-07.09.2001*** ***18.07.2003*** ***SIÐA: 1***

| ***DAGF:*** | ***A-INNTØKA*** | ***FORV. UPPH.*** | ***VIÐMERKING*** |
|---|---:|---:|---|
| 28.09.00 | 0,00 | 182,65 | Frítíðarløn |
| 28.09.00 | 10.845,36 | 15.994,06 | |
| 30.10.00 | 11.762,07 | 17.291,76 | |
| 30.10.00 | 0,00 | 234,23 | Frítíðarløn |
| 23.11.00 | 0,00 | 137,88 | Frítíðarløn |
| 23.11.00 | 7.815,90 | 11.517,03 | |
| 21.12.00 | 10.609,94 | 15.127,54 | |
| 21.12.00 | 0,00 | 173,24 | Frítíðarløn |
| 25.01.01 | 11.853,32 | 16.925,17 | |
| 25.01.01 | 0,00 | 170,96 | Frítíðarløn |
| 23.02.01 | 0,00 | 148,66 | Frítíðarløn |
| 23.02.01 | 10.307,23 | 14.717,54 | |
| 23.03.01 | 13.268,43 | 18.748,88 | |
| 23.03.01 | 0,00 | 370,37 | Frítíðarløn |
| 24.04.01 | 0,00 | 330,93 | Frítíðarløn |
| 24.04.01 | 12.861,67 | 18.205,01 | |
| 23.05.01 | 18.922,18 | 18.110,16 | |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 23.05.01 | 0,00 | 323,15 | Frítíðarløn |
| 31.05.01 | 0,00 | 2.000 | |
| 22.06.01 | 5.355,01 | 14.491,15 | |
| 22.06.01 | 0,00 | 84,04 | Frítíðarløn |
| 25.07.01 | 0,00 | 178,64 | Frítíðarløn |
| 25.07.01 | 10.881,49 | 15.630,52 | |
| 24.08.01 | 7.787,96 | 11.202,49 | |
| 24.08.01 | 0,00 | 115,09 | Frítíðarløn |
| | **132.270,56** | **192.411,15** | |

***ARBEIÐSGEVARI: …***

| | | | |
|---|---|---|---|
| 29.08.01 | 1.162,00 | 1.037,00 | |
| 29.08.01 | 0,00 | 125,00 | Frítíðarløn |
| 05.09.01 | 0,00 | 312,00 | Frítíðarløn |
| 05.09.01 | 2.906,00 | 2.594,00 | |
| | 4.068,00 | 4.068,00 | |
| **TILSAMANS** | **136.338,56** | **196.479,15** | |

T.v.s. miðal A-inntøkan seinastu 12 mánaðirnar er kr. 136.338,56/ 12 mdr. = **kr. 11.361,55/mdr.**

Síðani verður kannað, við støði í ásetingunum í § 12, stk. 1, 2. pkt, um eitt 6 mðr. samanhangandi tíðarskeið gevur eina hægri miðal A-inntøku, samb. upplýsingum frá Toll- og Skattstovu Føroya. Samb. útrokningum er besta 6 mánaða tíðarskeiðið frá 30. oktobur 2000 til og við 29. apríl 2001, og eru inntøkurnar í hesum tíðarskeiðnum hægri í miðal, enn 12 mánaða skeiðið omanfyri. Sí kontoavrit niðanfyri:

***KONTOAVRIT FRÁ LØNARSKRÁNNI***
***30.10.2000-29.04.2001 18.07.2003 SÍÐA:1***

| ***DAGF.*** | ***A-INNTØKA*** | ***FORV.UPPH.*** | ***VIÐMERKING*** |
|---|---|---|---|
| 30.10.00 | 11.762,07 | 17.291,76 | |
| 30.10.00 | 0,00 | 234,23 | Frítíðarløn |
| 23.11.00 | 0,00 | 137,88 | Frítíðarløn |
| 23.11.00 | 7.815,90 | 11.517,03 | |
| 21.12.00 | 10.609,94 | 15.127,54 | |
| 21.12.00 | 0,00 | 173,24 | Frítíðarløn |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 25.01.01 | 11.853,32 | 16.925,17 | |
| 25.01.01 | 0,00 | 170,96 | Frítíðarløn |
| 23.02.01 | 0,00 | 148,66 | Frítíðarløn |
| 23.02.01 | 10.307,23 | 14.717,54 | |
| 23.03.01 | 13.268,43 | 18.748,88 | |
| 23.03.01 | 0,00 | 370,37 | Frítíðarløn |
| 24.04.01 | 0,00 | 330,93 | Frítíðarløn |
| 24.04.01 | 12.861,67 | 18.205,01 | |
| | **78.478,56** | **114.099,20** | |

> T.v.s. miðal A-inntøkan fyri eitt 6 mánaða samanhangandi tíðarskeið er kr. 78.478,56/6 mdr. = **kr. 13.079,76/mdr.**
>
> Útrokningargrundarlagið hjá B í sambandi við barsilsfarloyvi frá 8. septembur 2001 til og við 13. mars 2002 gjørdist tí kr. 13.079,76/mdr.
>
> Sum vit síggja omanfyri, verður øll A-inntøka í einum 12 mánaða skeiði beint undan barsilsfarloyvinum nýtt í útrokningargrundarlagnum; møgulig frítíðarløn og frítíðarískoyti, sum verða útgoldin sum A-inntøka, verða íroknað. 6 mánaða skeiðið hjá B rakar ikki á mai mánað, men í eitt tíðarskeið, har 7 mánaðarlønir eru útgoldnar í einum 6 mánaða tíðarskeiði. Í lógarbroytingini, ið kom í gildi frá 1. januar 2003, verður útrokningargrundarlagi nú bert roknað við støði í miðal A-inntøkuni seinastu 12 mánaðirnar áðrenn fráveruna."

Umboðsmaðurin hevur tann 18. september 2003 havt ein fund við umboð fyri Vinnumálaráðið (VMR) og Barsilsskipanina. Beint aftaná fundin hevur Johnhard Klettheyggj, ráðgevi gjørt hesa fundarfrágreiðing:

> „Í sambandi við viðgerðina av hesari klaguni hevur umboðsmaðurin boðsent VMR at koma á fund at greiða frá umsitingini av barsilsskipanini við atliti at klaguni í hesum konkreta málinum. VMR varð biðið um at hava umboð fyri Barsilsskipanina við á fundin.
>
> Fundurin varð hildin á skrivstovu okkara, kl. 13.
>
> Fyri VMR var møttur: C, fulltrúi

| | |
|---|---|
| Fyri Barsilsskipanina vóru møtt: | D, stjóri og E, deildarleiðari |
| Fyri LUM vóru møttir: | Joen H. Andreassen, umbm. og Johnhard Klettheyggj, ráðgevi |

JHA beyð vælkomin og greiddi frá klaguni – at hendan snúði seg um, hvørt Barsilsskipanin hevði skyldu til at rinda frítíðarløn í grunn av barsilsgjaldi, sum er goldið ikki-fastløntum starvsfólki.

JHA greiddi frá frítíðarlógini, sum er ein minimumslóg og ásetur, at løntakari, sum ikki hevur rætt til frítíð við løn, skal hava goldið 12% í frítíðarløn av løn sínari – antin til fakfelagið ella í Frítíðargrunnin.

Tosað varð um útrokningargrundarlagið undir barsilsútgjaldinum í tí konkreta málinum. JHA vísti á, at tað ikki kundi vera rætt, tá 7 mánaðarlønir blivu býttar út á 6 mánaðir, bert tí at tað av tilvild var soleiðis, at hesar vóru útgoldnar innanfyri eitt 6-mánaðar tíðarskeið. Uppá fyrispurning frá JK greiddi D frá, at tað eftir tágaldandi lóg eisini kundi koma fyri, at 7 mánaðarlønir umframt frítíðarlønin kundu verða útgoldnar innanfyri 6 mðr. Somuleiðis váttaði D, at tað enn kundi gerast talan um 13 mánaðarlønir innanfyri eitt 1-ára skeið. JK vísti á, at hetta kundi ikki vera rætt umsitið, tí so skuldi tað eisini kunna ført við sær, at um bert 11 lønir vóru útgoldnar seinasta árið, skuldu hesar verið býttar við 12.

JHA greiddi frá, at hann fataði Barsilsskipanina at koma í staðin fyri arbeiðsgevaran undir barsilsfráveruni, og at skipanin tí átti at rinda frítíðarløn av barsilspeninginum.

C vísti á, at VMR ikki fataði barsilspeningin sum løn, og at frítíðarløn tí ikki skuldi gjaldast av barsilspeningi. Hann vildi soleiðis tulka arbeiðsgevarahugtakið strangt.

D vísti á, at arbeiðsmarknaðurin hevði fatað Barsilslógina soleiðis, at 1. partur bert snúði seg um fráverurætt, meðan 2. partur snúði seg um fráverugjald.

JHA vísti á, at Frítíðarlógin gav øllum løntakarum rætt til frítíð við løn ella frítíðarløn. Hann vísti eisini til § 5 í Barsilslógini, har tað er ásett, at viðkomandi varðveitir rættindi síni eftir frítíðarlógini – víst varð til viðmerkingarnar til lógaruppskotið. JHA helt

tí, at tað fylgdi av hesari ásetingini, at Barsilsskipanin átti at rinda frítíðarpening í grunn. JHA helt hinvegin ikki, at útgoldin frítíðarløn átti at vera tikin við í útrokningargrundarlagið.

Umboðini fyri Barsilsskipanina nevndu, at ein slík tulking fór at geva skipanini nakrar praktiskar umsitingartrupulleikar. Fundurin endaði uml. kl. 14.20.“

## *Niðurstøða*

*Upprunaliga snúði hendan klagan seg einans um málsviðgerðartíðina hjá Vinnumálaráðnum av kærumálinum um avgerðina hjá Barsilsskipanini. Eftir at Vinnumálaráðið hevði tikið avgerð í kærumálinum, er klagan víðkað til eisini at umfata hesa avgerðina. Í sambandi við viðgerðina av hesum málinum hevur spurningurin um inntøkugrundarlagið fyri útrokningini av barsilspeningi eisini verið frammi, og skal eg tí eisini koma inn á hendan spurningin.*

***<u>Málsviðgerðartíðin hjá Vinnumálaráðnum</u>***

*Avgerðin hjá Barsilsskipanini varð kærd til Vinnumálaráðið 4. juni 2002. Hóast advokaturin í áminningarskrivi, dagfest 19. nov. 2002, hevði mint á málið og biðið um eina váttan fyri móttøkuna av kæruni, frætti hann einki aftur frá Vinnumálaráðnum, fyrr enn fráboðan um avgerðina varð send honum við skrivi Vinnumálaráðsins, dagfest 27. febr. 2003, tvs. uml. eina viku aftaná, at eg var komin inn í málið.*

*Vinnumálaráðið hevur í ummælisskrivi sínum víst á, hví hendan viðgerðin bleiv so drúgv. Til hetta er at siga, at tað í øllum førum hoyrir til góðan fyrisitingarsið at senda eina móttøkuváttan, tá ein umsókn, kæra o.t. verður móttikin, uttanso at málið kann avgreiðast beinanvegin ella eftir heilt stuttari tíð.*

*Tað er átaluvert, at klagarin einki svar fekk uppá áminningarskriv sítt, dagfest 19. november 2002. Sambært góðum fyrisitingarsiði átti Vinnumálaráðið at havt svarað áminningarskrivinum beinanvegin og at havt kunnað advokatin um gongdina í málinum. Eg gevi tí Vinnumálaráðnum eina átalu fyri hesa málsgongdina.*

*Viðvíkjandi avgreiðsluni av kæruni annars má havast í huga, at løgtingslógin um barsilsskipanina kom í gildi 1. juni 2001, og at skipanin sosatt bert hevði virkað í umleið eitt ár, tá umrødda klaga varð latin*

*Vinnumálaráðnum. Vísandi til tað, sum ráðið hevur ført fram um orsøkirnar til drúgvu málsviðgerðartíðina, havi eg ikki grundarlag fyri at fílast á sjálva viðgerðartíðina av kæruni. Hetta hóast ein málsviðgerðartíð uppá 9 mánaðir kann tykjast long, serstakliga tá tað ikki sær út til at vera hent nakað í málinum í tíðarskeiðinum frá tí, at kæran var latin inn, til avgerðin hjá Vinnumálaráðnum fyrilá.*

***Avgerðin um frítíðarpening av barsilspeningi***

*Sambært § 1 í løgtingslóg nr. 30 frá 7. apríl 1986 um frítíð við løn við seinni broytingum eiga løntakarar í almennum og privatum starvi rætt til frítíð og frítíðarløn, sum ásett í Frítíðarlógini. § 10 í lógini er soljóðandi:*

> *„§ 10. Arbeiðsgevarin veitir løntakaranum frítíðarløn, ið er 12 % av vunnari løn.*
>
> *2. stk. Frítíðarlønin fellur til gjaldingar samstundis við lønini og verður goldin viðkomandi løntakarafelag ella, um einki umboðandi løntakarafelag finst, Frítíðargrunninum í varðveitslu, til frítíðin skal haldast, jbr. § 7. Landsstýrinum er heimilað at fyriseta nærri reglur fyri skipanina."*

*Við heimild í § 10, 2. stk., seinasta petti hevur landsstýrið ásett nærri reglur um frítíðarløn við kunngerð nr. 14 frá 16. februar 1987 sum broytt við kunngerð nr. 100 frá 12. august 1988. Í § 3, 1. stk., 1. petti í hesi kunngerð stendur, at frítíðarløn fyri undanfarna innvinningarárið verður útgoldin frá og við 2. mai á hvørjum ári.*

*Høvuðssjónarmiðið undir skipanini við frítíðarløn er at tryggja løntakarum møguleika at halda frí við løn. Tað er tí ikki loyvt arbeiðsgevarum at rinda frítíðarløn beinleiðis til løntakarar saman við lønini. Verður hetta gjørt kortini, kann viðkomandi arbeiðsgevari koma í ta støðu, at noyðast at gjalda frítíðarløn eina ferð aftrat. Hetta er staðfest í fleiri dómum. Eg skal í hesum sambandi vísa til E. Dreyer og T. Haarløv í Feriloven, 1945, bls. 91-93 og Lisbeth Lollike, Ferieloven med kommentarer, 6. útgáva, 1984, bls. 169-170. Um arbeiðsgevari í slíkum førum kann krevja ta ov nógv goldnu lønina aftur, er ein annar spurningur, sum dómstólarnir mugu taka støðu til í hvørjum einstøkum føri, og sum eg tí ikki skal gera meira við her.*

*Orðingin av § 5 í upprunaliga uppskotinum til løgtingslóg um barsilsskipan var soljóðandi:*

> *„Tað tíðarskeið, løntakari er í barsilsfarloyvi eftir §§ 1 og 2, verður roknað sum vanlig arbeiðstíð, tá starvsaldur skal roknast.“*

*Undir viðgerðini í Løgtinginum varð § 5 broytt, soleiðis at endaliga orðingin kom at ljóða:*

> *„Tað tíðarskeið, løntakari er í barsilsfarloyvi eftir §§ 1 og 2, verður roknað sum vanlig arbeiðstíð, tá starvsaldur, eftirlønaraldur, rættindi eftir frítíðarlógini o.o. rættindi skulu roknast.“*

*Í álitinum frá Vinnunevndini stendur um broytingaruppskotið m.a.:*

> *„Sambært viðmerkingunum frá Vinnumálastýrinum, er eitt av endamálunum við lógaruppskotinum, at allir løntakarar í mest møguligan mun fáa endurgjald fyri lønarmiss í sambandi við barnsburð. Skal hetta endamálið verða rokkið er neyðugt eisini at taka rættindi eftir frítíðarlógini við…“*

*Í skrivi, dagfest 8. februar 2002 til B sigur Barsilsskipanin m.a., at hon hevði rætt til feriu, men um hetta var við løn ella ikki, varð víst til sáttmála á arbeiðsmarknaðinum ella avtalu við arbeiðsgevara.*

*Eg skilji als ikki hetta sjónarmiðið, tí sum ávíst frammanfyri hava allir løntakarar sambært § 1 í Frítíðarlógini rætt til frítíð og frítíðarløn samsvarandi reglunum í lógini (mín undirstriking), og er hetta galdandi uttan mun til, um nakar sáttmáli er hesum viðvíkjandi ella ikki.*

*Barsilsskipanin hevur eisini í skrivi, dagfest 13. mars 2002 til A, advokat ført fram, at hon bert umsitur part II í Barsilsskipanarlógini og ikki part I, ið umfatar §§ 1-7.*

*Hetta sjónarmiðið skilji eg heldur ikki, tí sambært § 25 í Barsilsskipanarlógini kann landsstýrismaðurin við kunngerð leggja umsitingina av lógini til Arbeiðsloysisskipanina eftir avtalu við Arbeiðsloysisskipanina, ella til annan fyrisitingarligan myndugleika. Vinnumálaráðið hevur við kunngerð nr. 91 frá 31. mai 2001 gjørt slíkar reglur um umsiting av barsilsskipanini. § 6 í hesari kunngerðini er soljóðandi:*

*„§ 6. Viðgerð og avgerð av umsóknum um barsilspening frá Barsilsskipanini verður løgd til umsiting hjá Arbeiðsloysisskipanini, og heimildirnar, sum landsstýrismaðurin hevur eftir lógini og Barsilsskipanin eftir hesi kunngerð at taka avgerð um barsilspening og at útgjalda barsilspening og í tí sambandinum at krevja upplýsingar, verða latnar Arbeiðsloysisskipanini.“*

*Heimildin hjá Arbeiðsloysisskipanini er sostatt ikki avmarkað til ávísar partar av lógini.*

*Í skrivinum frá 27. februar 2003 førir Vinnumálaráðið fram, at barsilspeningur er endurgjald fyri lønarmiss í sambandi við barsilsfarloyvi, og er tí ikki umfataður av løgtingslógini um frítíð við løn, og er einki ásett í frítíðarlógini ella løgtingslógini um barsil, hvørki í § 5 ella § 15, stk. 2, um at Barsilsskipanin hevur eina tilsvarandi skyldu sum arbeiðsgevarin í førum, tá arbeiðsgevarin ikki rindar løn í sambandi við barsilsfarloyvi. Á fundinum 18. september 2003 førdi umboðið fyri Vinnumálaráðið fram, at Vinnumálaráðið ikki fataði barsilspeningin sum løn, og at frítíðarløn ikki skuldi gjaldast av barsilspeningi. Hann vildi eisini tulka arbeiðsgevarahugtakið strangt.*

*Eg eri ikki samdur við tulkingina hjá Barsilsskipanini og Vinnumálaráðnum um, at løntakari, sum er í barsilsfarloyvi, ikki hevur rætt til frítíðarpening av barsilsendurgjaldinum. Eftir mínum tykki framgongur tað beinleiðis av § 5 í Barsilsskipanarlógini, at viðkomandi løntakari hevur henda rætt, tí annars gevur tilvísingin til „rættindi eftir frítíðarlógini“ í § 5 eftir mínum tykki onga meining.*

*Eftir míni áskoðan átti B tí rætt til frítíðarpening av barsilspeninginum.*

*Eftir stendur spurningurin um, Barsilsskipanin hevði nakra skyldu til at rinda frítíðarpeningin til viðkomandi løntakarafelag ella Frítíðargrunnin.*

*Soleiðis sum eg havi skilt málið, so hevði arbeiðsgevarin hjá B ikki skyldu til at rinda henni løn undir barsilsfarloyvi og harvið heldur ikki nakra skyldu til at rinda henni frítíðarløn í hesum tíðarskeiði.*

*Sambært § 10 í frítíðarlógini, sum er endurgivin frammanfyri, veitir arbeiðsgevarin løntakaranum frítíðarløn, og sambært stk. 2 skal frítíðarlønin rindast viðkomandi løntakarafelag ella Frítíðargrunninum í varðveitslu.*

*Tað er fyri mær eingin ivi um, at barsilspeningurin, sum er grundaður á lønarinntøkuna frammanundan fráveruni, og sum kemur í staðin fyri lønarinntøkuna undir farloyvistíðarskeiðinum, er at javnmeta við vanliga løn.*

*Við tað, at Barsilsskipanin kemur í arbeiðsgevarans stað og rindar løntakaranum løn í farloyvistíðini, er ta mín fatan, at Barsilsskipanin eisini hevur skylduna at rinda løntakaranum frítíðarlønina, sum hesin hevur rætt til, jbr. § 5 í Barsilsskipanarlógini, antin til viðkomandi løntakarafelag ella í Frítíðargrunnin.*

***Inntøkugrundarlagið fyri útrokning av barsilsgjaldinum.***
*Í skrivinum frá 13. mars 2002 til A, advokat sigur Barsilsskipanin, at tá frítíðarløn verður útgoldin sum A-inntøka í tí tíðarskeiði, ið er grundarlag undir útrokningini av barsilspeningi, verður frítíðarlønin íroknað útrokningargrundarlagið.*

*Á fundinum við umboð fyri Vinnumálaráðið og Barsilsskipanina tann 18. september 2003 gav eg úttrykk fyri, at útgoldin frítíðarløn ikki átti at verða tikin við í útrokningargrundarlagið. Hesa uppfatan bygdi eg á § 12 í Frítíðarlógini, sum sigur, at við útrokning av frítíðarløn og frítíðaríškoyti verður ikki tald løn, sum er útgoldin í frítíðini, veitt frítíðarløn ella útgoldið frítíðaríškoyti.*

*Eftir at hava umhugsað henda spurning nærri havi eg skift áskoðan hesum viðvíkjandi, og er hetta grundað á § 12 í Barsilsskipanarlógini, sum sigur at grundarlagið, sum barsilspeningurin verður roknaður eftir, er móttikna miðal mánaðarliga gjaldskylduga A-inntøkan eftir § 18 seinastu 12 mánaðarnar fyri fráveruna. Útgoldin frítíðarløn má í hesum sambandi metast sum gjaldskyldug A-inntøka.*

*Útfrá sjónarmiðunum um lex specialis haldi eg, at reglurnar í Barsilsskipanarlógini viðvíkjandi útrokningargrundarlagnum eiga at galda framum reglurnar í Frítíðarlógini, tá talan er um frítíðarløn av barsilspeningi. Eg havi tí onga viðmerking til, at møgulig útgoldin frítíðarløn verður tikin við í útrokningargrundarlagið fyri barsilspeningin, og at frítíðarløn sostatt eisini verður goldin av hesum.*

*Tá Barsilsskipanin viðgjørdi málið viðvíkjandi B, var tað møguligt, í staðin fyri at nýta eitt 12-mánaða tíðarskeið sum grundarlag, at nýta hægstu mánaðarligu miðalinntøkuna í einum samanhangandi 6-mánaða skeiði innan fyri seinastu 12 mánaðarnar áðrenn fráveruna.*

*Hetta varð broytt við løgtingslóg nr. 110 frá 20. desember 2002, t.v.s. aftaná at barsilspeningurin til B gjørdist aktuellur.*

*Sambært uppritinum frá Barsilsskipanini, sum er endurgivið frammanfyri, er roknað við 7 mánaðarlønum, sum av tilvild eru útgoldnar innan fyri eitt 6-mánaða skeið. Hetta kann eftir mínum tykki ikki vera rætt. Tað má vera samsvar millum lønarútgjaldingarnar og lønarskeiðið, tí annars ber valla til at tosa um miðalinntøku, eins og ásett er í § 12 í Barsilsskipanarlógini. Útrokningargrundarlagið fyri barsilsendurgjaldinum til B var sostatt eftir mínum tykki ikki í samsvar við lógina, men átti antin at verið grundað á 6 ella 12 mánaðarlønir, samsvarandi tágaldandi lóg.*

*Hóast tað eftir, at hendan lógarbroytingin er framd, ikki longur ber til at nýta teir 6 samanhangandi bestu mánaðarnar sum grundarlag, men at tað nú altíð verður roknað við 12 mánaðum, kann nýtta mannagongdin hjá Barsilsskipanini hava við sær, at sami feilur kann koma fyri enn. Hetta kann henda, um tað av tilvild verða útgoldnar ávikavist 13 ella 11 mánaðarlønir í seinasta 12-mánaða skeiðinum undan fráveruni.*

*Umframt at geva Vinnumálaráðnum eina átalu fyri vantandi kunning av klagaranum um málsviðgerðina, fari eg at mæla ráðnum til at taka viðgerðina av hesum kærumálinum uppaftur við atliti at rættinum til frítíðarløn av barsilspeningi. Eg fari samstundis at biðja Vinnumálaráðið lata meg frætta, hvørja niðurstøðu ráðið kemur til í hesum málinum.*

Vinnumálaráðið hevur við telefaksi, dagfest 27. febr. 2004, sent mær avrit av skrivi teirra til A, sum er soljóðandi:

> „Víst verður til skriv, dagfest 27. februar 2003, frá Vinnumálaráðnum viðvíkjandi kæruavgerð í málinum um frítíðarløn av barsilspeningi til B. Í nevnda skrivi varð boðað frá, at kæran ikki varð komin á møti.
>
> Síðani hevur Løgtingsins Umboðsmaður (j.nr. 20030010) viðgjørt málið, og er hansara niðurstøða, at Barsilsskipanin hevur

> skyldu at rinda frítíðarløn afturat barsilspeninginum, og at frítíðarlønin skal rindast út smbrt. løgtingslóg um frítíð við løn, og heitti Umboðsmaðurin á Vinnumálaráðið at taka kærumálið uppaftur.
>
> Sostatt hevur Vinnumálaráðið aftur viðgjørt málið, og hevur avgjørt at broyta avgerðina, sum Vinnumálaráðið áður hevur tikið í kærumálinum, og avgjørt at koma kæruni á møti…“

Eg geri tí ikki meira við hetta málið.

## 28.3. Klaga frá Magistarafelag Føroya um setanina av landsfornfrøðinginum og um almenna setanarpolitikkin

*Magistarafelag Føroya hevur vegna ein av limum sínum, A, sent umboðsmanninum eina klagu í sambandi við málið um setanina av landsfornfrøðinginum í febr. 2003 og um almenna setanarpolitikkin. Eftir, at ein setanarnevnd í tveimum umførum hevði mælt til at seta A í starvið, valdi landsstýrismaðurin sjálvur at hava setanarsamrøður við A og ein annan kvalifiseraðan umsøkjara, F. Landsstýrismaðurin gjørdi síðani av at seta F í starvið.*

*Umboðsmaðurin hevur í niðurstøðu síni sagt, at hann ikki heldur nakað ósamsvar vera millum lóggávuna og ávikavist almenna setanarpolitikkin og setanarpolitikkin hjá Mentamálaráðnum. Starvið var fyrst lýst leyst í føroysku bløðunum og uml. 3 vikur seinni á donskum í Magisterbladet. Vísandi til, at ein týðandi munur var á teirri føroysku og donsku útgávuni av lýsingini, segði umboðsmaðurin, at tað hevði verið rættast, um starvið beinanvegin var lýst leyst av nýggjum, soleiðis at samsvar var millum føroysku og donsku lýsingina. Undir tilvísingarsamrøðunum hevur setanarbólkurin fingið nøkur negativ ummæli av umsøkjarunum, men umboðsmaðurin helt ikki, at tey notatini, sum vóru gjørd frá hesum samrøðum, luku treytirnar, sum mugu setast slíkum notatum. Setanarbólkurin hevði heldur ikki lagt hesar upplýsingarnar fyri umsøkjararnar til ummælis. Umboðsmaðurin hevur tí givið Mentamálaráðnum eina átalu fyri, at setanarbólkurin ikki hevur hildið notatskylduna og partshoyringsskylduna. Umboðsmaðurin helt seg ikki vera føran fyri at meta um, hvørt tað var rætt ella skeivt av landsstýrismanninum at seta F í starvið heldur enn A. Hann vísti á, at tað ikki var vanligt, at ein landsstýrismaður gekk ímóti einari samdari setanarnevnd, men at tað var landsstýrismaðurin, sum sambært lógini hevði setanarmyndugleikan, og at ongar reglur vóru, sum forðaðu honum at hava setanarsamrøður við umsøkjararnar, eins og tað er landsstýrismaðurin, sum ger av, um hann metir seg hava eitt nøktandi grundarlag til at taka avgerð. Umboðsmaðurin metti seg sum sagt ikki kunna taka støðu til, um avgerðin hjá landsstýrismanninum var røtt ella skeiv, og burtursæð frá givnu*

*átaluni til Mentamálaráðið fyri, at notatskyldan og partshoyringsskyldan ikki vóru hildnar, ger umboðsmaðurin ikki meira við hetta málið. (J. nr. 200300021)*

## Klagan

Magistarafelag Føroya hevur við skrivi, dagfest 25. mars 2003 vegna A sent umboðsmanninum eina klagu um málið viðvíkjandi setanini av landsfornfrøðingi. Klagan, sum er móttikin 31. mars 2003, er soljóðandi:

„Magistarafelag Føroya loyvir sær vegna lim felagsins, A, at kæra málið um setan av landsantikvari til løgtingsins umboðsmann.

Uttan á nakran hátt at vilja at leggja seg úti ella avmarka umboðsmannsins viðgerð av málinum, heitir Magistarafelagið á umboðsmannin um, deils at viðgera sjálva málsgongdina og deils at viðgera almenna setanarpolitikkin, soleiðis sum hann er lýstur í almennum skjølum, og herundir serliga tann serstaka setanarpolitikkin, ið Mentamálaráðið hevur lýst, og siga sína hugsan um hvørt málið um setan av landsantikvari kann geva grund til nýggja viðgerð og orðan av almenna setanarpolitikkinum.

Málsgongdin er lýst í tí reiðiliga umfatandi skjalatilfari, ið er til skjals í málinum, bæði í Mentamálaráðnum og á Løgmansskrivstovuni, men av tí at Magistarafelagið bert hevur fingið lutvíst innlit í hesi skjøl, halda vit tað vera beinari ikki at senda nøkur skjøl til umboðsmannin saman við kæruni, av tí at umboðsmaðurin sjálvandi fær øll skjøl frá umsitingini uttan at skjala atgongdin hjá umboðsmanninum verður avmarkað av atlitum til tagnarskyldu, eins og tey skjøl ið Magistarafelagið hevur fingið innlit í.

Saman við kæruni verður tí bert sent umboðsmanninum ljósrit av brævaskiftinum millum Magistarafelagið og Mentamálaráðið, eins og brævaskifti felagsins við løgmann.

Viðvíkjandi sjálvari málsviðgerðini, soleiðis sum Magistarafelagið sær hana, verður víst til bræv felagsins til landsstýrismannin í mentamálum dagfest 14. februar 2003, har fleiri av teimum spurningum, ið felagið tá helt, og framvegis heldur, tykjast ógreiðir, eru settir fram. Eftir okkara tykki finnast fá konkret svør til hesar

spurningar í brævinum frá setta landsstýrismanninum til felagið, dagfest 12. mars 2003.

Í brævinum frá Mentamálaráðnum til Magistarafelagið dagfest 10. februar 2003, endar tásitandi landsstýrismaðurin í mentamálum við at heita á Magistarafelagið um at kæra málið til løgtingsins umboðsmann.

Grundin til at felagið ikki valdi at gera tað tá, var tann, at felagið metti ikki at tað var rætt at inndraga umboðsmannin inn í málið, áðrenn tað mátti metast at vera endaliga avgreitt umsitingarliga sæð. Felagsins støða var at hetta ikki hevði verið í tráð við endamálið við umboðsmannsskipanini, og at ein kæra tá hevði ført við sær, at umsitingin hevði steðgað viðgerðina av málinum.

Eftir at sitandi landsstýrismaðurin endaliga hevur staðfest, at eingin broyting verður gjørd í avgerð Mentamálaráðsins um setan av nýggjum landsantikvari, metir felagið at tíðin er komin at leggja málið fyri løgtingsins umboðsmann. Í hesum sambandi leggur felagið bæði dent á gongdina í hesum konkreta málinum og tær avleiðingar fyri almennan setanarpolitikkin, ið málið má metast at kunna fáa í framtíðini.“

## Málsgongdin

Starvið sum landsfornfrøðingur varð 28. sept. 2002 lýst leyst í føroysku bløðunum við soljóðandi lýsing:

**„Landsantikvarur**

Við hesum verður starvið sum landsantikvarur lýst leyst at søkja til setanar frá 1. januar 2003.

**Uppgávur**

Høvuðsuppgávan hjá landsantikvarinum er at vera stjóri á Føroya Fornminnissavni, sum er stovnur undir Mentamálaráðnum og m.a. hevur til endamáls:

- at skráseta, kanna og hava eftirlit við jarðføstum fornminnum, sum lýst er í løgtingslóg um friðan av fornminnum og bygningum,
- at fyrireika og standa fyri útgrevstri av toftum, fornum búplássum og søguligum lendum,

- at savna, skráseta og framsýna fornlutir og lutir frá nýggjari tíð, sum lýsa livihátt, starvslíkindi og mentan føroyinga til ymsar tíðir ella eru knýttir til søguligar hendingar,
- at hava eftirlit við friðaðum bygningum,
- at hava eftirlit við bygdasøvnum og veita teimum hjálp og leiðbeining.

Harumframt hevur fornminnissavnið so við og við fingið álagt at umsita ávísar friðaðar ognir landsins. Eisini er ráðgeving í sambandi við fornminni ein týðandi uppgáva savnsins.

**Faklig førleikakrøv**

Sett verður sum krav, at umsøkjari, fyri at verða settur í starv, hevur lokna akademiska útbúgving frá lærdum háskúla í arkæologi, etnologi, søgu – ella aðra akademiska útbúgving. Tað er ein fyrimunur, at umsøkjari hevur leiðsluroyndir, kunnleika til arbeiði á fornminnissavni og granskingarroyndir. Tann, ið settur verður í starvið sum landsantikvarur má kunna góðtaka broytingar í setanar- og starvsviðurskiftum sínum í sambandi við komandi bygnaðarbroytingar á savnsøkinum.

**Persónlig førleikakrøv**

Umsøkjari skal hava góð leiðslu- og samstarvsevni, vera ágrýtin, tænastuhugaður, miðvísur, kunna arbeiða sjálvstøðugt – og vera til reiðar at royna nýggjar avbjóðingar.

**Lønar- og setanarviðurskifti**

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Magistarafelagið. Lønin er í løtuni kr. 36.150,18. Talan kann møguliga verða um, at starvið verður áramálssett, t.d. í 5 ár, við einum lønarískoyti uppá 20%.

**Vit kunnu bjóða**

Eitt fakliga krevjandi starv við nógvum avbjóðingum og samstarvi við aðrar stovnar og myndugleikar.

**Nærri upplýsingar um starvið**
Umsøkjarar kunnu seta seg í samband við B, deildarstjóra, (tel. 355050) fyri at fáa meira at vita um starvið.

**Umsóknir**
Umsóknir við avritum av prógvum o.ø. skjølum, upplýsingum um royndir og førleika v.m. skulu sendast til Mentamálaráðið … Umsóknir skulu vera Mentamálaráðnum í hendi í seinasta lagi 11. november 2002."

16. okt. 2002 varð soljóðandi lýsing á donskum máli at finna í Magisterbladet:

**„Landsantikvar**
Stillingen som landsantikvar på Føroya Fornminnissavn (Færøernes Nationalmuseum) opslås hermed til besættelse fra 1. januar 2003.

**Føroya Fornminnisavn**
Landsantikvaren er leder af Føroya Fornminnissavn, som sorterer under Mentamálaráðið (Færøernes Kulturministerium). Føroya Fornminnissavns opgaver består hovedsageligt i:

- at registrere, undersøge og føre tilsyn med jordfaste fortidsminder, som angivet i lagtingsloven om fredning af fortidsminder og bygninger
- at forberede og forestå udgravning af ruiner, gamle bopladser og historiske steder
- at indsamle, registrere og udstille genstande fra ældre og nyere tid, som belyser færingernes kultur og livsbetingelser til forskellige tider eller har tilknytning til historiske begivenheder
- at have tilsyn med fredede bygninger
- at have tilsyn med de anerkendte lokalmuseer og yde dem hjælp og vejledning

Føroya Fornminnissavn har i tidens løb fået tildelt administrationen af visse af landsstyrets fredede ejendomme og bygninger. Derudover er rådgivning i forbindelse med fortidsminder generelt en af Museets betydningsfulde opgaver.

**Faglige kvalifikationskrav**
Ansøgeren skal have afsluttet akademisk uddannelse i arkæologi, etnologi, historie – eller anden samsvarende universitetsuddannelse, der kan anses for at give ansøgeren faglig kompetence til stillingen. Det er en fordel, hvis ansøgeren har ledelseserfaring, kendskab til antikvarisk og musealt arbejde – samt forskningserfaring. Den, der tiltræder stillingen som landsantikvar, må være indstillet på at acceptere forandringer i sine ansættelses- og arbejdsforhold i forbindelse med forestående strukturforandringer på museums- og forskningsområdet.

**Personlige kvalifikationskrav**
Ansøgeren skal besidde gode ledelses- og samarbejdsevner, være målrettet, selvstændig, resultatorienteret, have lyst og vilje til at gå nye veje, tackle nye udfordringer – og at lede arbejdet på en sådan måde, at institutionen fortsat har en faglig og forskningsmæssig profil både i det færøske samfund og uden for Færøerne.

**Løn- og ansættelsesforhold**
Stillingen besættes i henhold til aftale mellem det færøske finansministerium og Færøernes Magisterforening. Lønnen er for nærværende 36.150,18 DKK om måneden. Der er mulighed for tidsbegrænset stillingsbesættelse, f.eks. 5 år. I påkommende fald ydes der et særligt løntilskud på 20%.

**Der tilbydes**
En fagligt krævende stilling med mange udfordringer og samarbejde med andre institutioner på og uden for Færøerne.

**Nærmere oplysninger om stillingen**
Nærmere information fås ved henvendelse til afdelingschef B (tlf.: + 298 355050).

**Ansøgninger**
Ansøgninger med eksamenspapirer, cv og andre relevante oplysninger sendes til …

Ansøgninger skal være Mentamálaráðið i hænde senest den 11. november 2002.“

Til at viðgera umsóknirnar til hetta starvið, varð sett ein setanarnevnd við hesum limum: C, aðalstjóri, form., B, deildarstjóri, D, løgfr. og E, starvsfólkaumboð.

Sambært teldubrævi frá formanninum, ið er sent til hinar limirnar 14. nov. 2002, er uppgávan hjá nevndini m.a.

- at skipa fyri einum forfundi, har
- stig verða tikin til at senda umsøkjarunum móttøkuváttan og fráboðan um, nær málið væntandi verður avgreitt,
- umsóknirnar verða gjøgnumgingnar og støða tikin til, hvør skal kallast inn til setanarsamrøðu,
- gjørt verður av, nær setanarsamrøðurnar verða framdar, og
- hvat spurt eigur at vera um undir samrøðunum, og hvør tekur sær av hvørjum
- at fremja setanarsamrøðurnar og gera eina innstilling, sum skal verða væl grundgivin, um hvønn nevndin heldur vera best egnaðan til starvið
- onnur viðurskifti, sum nevndin heldur hava týdning.

Víst verður í hesum sambandi til setanarpolitikkin hjá Mentamálaráðnum.

8 umsóknir komu til starvið sum landsfornfrøðingur. Setanarbólkurin hevur 10. des. 2002 latið landsstýrismanninum soljóðandi setanartilmæli:

> **„Innstilling til starvið sum landsantikvarur**
> Starvið sum landsantikvarur er lýst leyst at søkja í føroyskum bløðum, Magisterbladet og á heimasíðu Mentamálaráðsins. Hetta er gjørt á formligan rættan hátt við neyvum atliti at teimum reglum, sum eru galdandi í landsins fyrisiting í sambandi við lýsing av størvum. Átta umsóknir komu inn rættstundis, nevniliga frá:
>
> 1. …
> 2. …
> 3. …
> 4. …

5. F
6. …
7. …
8. A

Minsta formliga ásetta kravið í lýsingini er hægri útbúgving í fornfrøði, etnologi ella søgu.

Í tráð við almenna setanarpolitikkin var ein setanarnevnd sett, sum hevði hesar limir:

C, aðalstjóri, sum er formaður,
B, deildarstjóri,
E, starvsfólkaumboð, og
D, løgfrøðingur.

**Fyrireikandi fundur**

Nevndin hevði fyrireikandi fund, 18. november 2002, har umsóknirnar vóru gjøgnumgingnar. Eftir eina gjølliga gjøgnumgongd av hvørjum einstøkum umsøkjara, har dentur varð lagdur á fakligan førleika, kunnleika til fornminnaarbeiði, granskingar- og leiðsluførleika, var semja um at biðja F og A koma til samrøðu, fríggjadagin 22. november 2002.

Grundgevingin fyri at hesir báðir vóru valdir var, at teir høvdu størri fakligan førleika og fleiri leiðsluroyndir enn hinir umsøkjararnir.

**Setanarsamrøður**

A varð innkallaður til samrøðu 22. november 2002 kl. 10.30 og F sama dag kl. 13.

A, 54 ár, cand.mag í miðaldarfrøði, exam.art í europeiskari etnologi.

Starvsroyndir: Settur landsantikvarur, savnsvørður

Annað: Leiðsluroyndir, nevndararbeiði, luttøka í ráðstevnum, fyrilestrar, undirvísing o.a.

A greiddi frá uppvøksturinum í Havn. Hann hevði sum heilt ungur havt áhuga fyri handilslívinum, og hevði arbeitt í ávísum tíðarskeiðum í handlinum hjá pápanum. Hann greiddi síðani í stuttum frá ungdómsárunum og frá tíðini, hann var í Århus og las. A er giftur og hevur tvey børn.

Um arbeiðsplássið segði hann frá, at stovnurin síðan 1988 hevur verið rikin sambært bygnaði, sum ikki var tíðarhóskandi longur. Starvsfólkasamrøður høvdu teir ikki havt á stovninum enn, men ætlanir vóru um tað. Hann helt, at stovnurin skuldu gerast sjónligari í almenninginum og at antikvariska virksemi skal styrkjast. Tørvur er á yvirskipaðum skráðum í tí sambandi, serliga við atliti at mentanararvinum í landslagnum og planlegging hjá øðrum myndugleikum. Hann vísti á, at savnið saman við MMR er í ferð við at dagføra friðingarlóggávuna, har fyrilit eisini eru tikin fyri hesum.

Viðv. bygdasøvnunum vísti hann á tørvin á fakligari samskipan, hetta kortini soleiðis, at rúm eisini skal vera fyri eldsálunum, sum í lokalsamfeløgunum virka fyri bygdasavnsarbeiði. Í sambandi við friðingina legði A dent á, at Fornminnissavnið eigur at verða uppá forkant við menningina í samfelagnum soleiðis, at fornminnamyndugleikin altíð veit, hvat er á vási í sambandi við bygging o.a. Hann vísti á, at hetta gerst við samstarvi við kommunalar og aðrar planleggingarmyndugleikar. Uppá fyrispurningin um, hvussu taklað verður, tá tey fáa eitt friðingarmál, segði hann, at man eigur ikki at vera fundamentalistiskur, man skal argumentera sakliga umaftur og umaftur og við dialogi forklára, hvussu spurningarnir í sambandi við málið standa. Tá spurt var, hvussu A kundi ávirka støðuna hjá stovninum, metti hann, at ábyrgdin ofta hevur verið løgd meira og meira út á deildarleiðararnar, at stovnurin átti at verið latin meira upp og at tað skuldi verða informerað meira um alt tað, sum fer fram á stovninum. Eftirútbúgvingar og skeið skuldu verið betur skipað. Ein yvirskipað strategi skal gerast, tí sum nú er, verður stovnurin „bumbaður“ við uppgávum, ið taka mestu orkuna, stovnurin ræður yvir.

Uppá fyrispurningin um, hvat nútímans leiðsla er, svaraði A, at tað er at hava greiðar mannagongdir um, hvør hevur ábyrgdina av hvørjum. Hann nevndi, at hann sum fyribils settur leiðari hevur roynt at skapa samstarv tvørtur um fakmørk, fyri at fáa stovnin at virka sum best hóast trongar játtanir. Við atliti at bygnaðarbroytingum, sum MMR hevur skotið upp, segði A, at hann góðtekur broytingar í setanarskeiðinum, men vísti á, at neyðugt er at fremja hesar við atliti at støðu stovnsins í dag, og at

nýggj savnslóggáva er neyðug. A var spurdur: „Um tú fært starvið sum landsantikvarur, vilt tú so setast í fast ella tíðaravmarkað starv?“ Hann svaraði, at hann tók tíðaravmarkaðu starvssetanina framum, men var annars opin fyri hinum møguleikanum.

Um spurningin at geva eitt dømi um okkurt mál, sum ikki hevði gingið so væl, nevndi hann Múrmálið, og av máli, sum hevði gingist sera væl, nevndi hann útgravingarnar heima á Sandi. Sum ein av sínum sjónum nevndi A at skipa fyri framsýningum um nýggjari tíð, t.d. lívið í 1920'unum ella 1960'unum ella 1980'unum. Hann metti annars, at samskiftið millum Mentamálaráðið og stovnin ikki hevur verið nóg gott, og at alneyðugt er at fáa hetta í rættlag. Hann metti seg sjálvan sum ein opnan, erligan og loyalan samstarvsmann. Hann metti seg sum demokratiskan leiðara, men hann hevði eisini royndir í at taka illa umtóktar avgerðir, t.d. í sambandi við starvsfólk við rúsdrekkatrupulleikum og starvsfólk, sum annars vóru ómøgulig. Til spurningin um øki, har hann heldur seg skara fram úr, nevndi hann fakligan førleika, demokratiskan hugburð og góð evni at samskifta. Hin vegin helt hann, at tað demokratiska kanska í ein ávísan mun kundi tulkast sum, at hann var linligur ella for fittur, men hetta metti hann ikki sjálvur at vera nakran trupulleika. Sjálvt um hann hevur verið á skeiðum, helt hann seg hava tørv á at fáa styrkt ávís øki enn meira, t.d. innan fíggjarstýring og leiðslu.

**F, 47 ár, mag.art i forhistorisk ærkiologi**

Starvsroyndir: Ymiskt viðkomandi innan økið.

Annað: Leiðsluroyndir, fyrilestrarhaldari, limur í ymiskum feløgum.

F, sum var komin til samrøðu úr Keypmannahavn, greiddi í stuttum frá sínum persónligu viðurskiftum. Hann vildi ikki koma so nógv inn á familjuviðurskifti og onnur áhugamál, men hevði meira hug at tosa um fakligu viðurskiftini.

Hann legði fyri við at vísa á, at manglar vóru við einum parti av fornminnalóggávuni, og at hetta átti at verið rættað sum skjótast. Hann vísti eisini á, at ein partur av arbeiðinum hjá Fornminnissavninum var at vegleiða og lána út lutir. F hevði ávísar trupulleikar við at koma inn í samrøðuna. Hann svaraði

stutt uppá fyrispurningarnar og hevði fleiri mótspurningar til spyrjararnar. Hann tosaði nakað um kulturturismu og at kunstiga skaptar fornminnisumstøður høvdu tað við sær, at tær krakkelera fyrr ella seinni. Hann vísti á, at ofta eru dupultfunktiónir í sambandi við ein part av tí, sum friðingarmyndugleikarnar og aðrir myndugleikar gera.

Uppá fyrispurningin um hvussu nútíðar søvn skuldu skipast, segði hann, at tey skuldu skipast sum øll onnur søvn. Hann hevði ilt við at svara konkret uppá konkretar spurningar og vildi sleppa undan konfrontatión. C spurdi í sambandi við bygnaðarbroytingarnar, hvat hann metti um at leggja søvnini saman. Hann var nakað disorienteraður um henda spurning. C greiddi frá, hvat politiska ætlanin var við at leggja saman, men F svaraði aftur við fyrispurningi, hvat man kundi spara við at leggja saman, um tað vóru EDV-funkur ella onnur ting.

Í sambandi við leiðsluspurningarnar segði hann, at hann vildi vera tann, sum vildi ganga á odda og lurta eftir fólki og fáa tað besta burturúr. Um sínar sjónir segði hann, at føroyingar áttu at luttikið í fleiri internationalum verkætlanum, at lógarøkið innan bygging o.a. átti at verið lagað til fornminnalóggávuna og at samstarvsmøguleikarnir við onnur ráð átti at verða útbygt. Hann segði seg annars hava arbeitt konkret við sjónum í øðrum arbeiðsuppgávum.

Um sínar persónligu eginleikar segði hann, at hann hevði havt lætt við at leiða onnur og at hann var lættur at umgangast og at seta onnur í arbeiði. Hann hevði eisini royndir við at uppsiga fólki. Um sínar sterku síður legði hann dent á, at hann var ein dynamiskur, opin og framfúsin persónur. Um sínar veiku síður segði hann, at hann hevði tørv á at seta fartin niður og umstilla seg eitt sindur.

### Tilvísingarsamrøður

C bað um tilvísingarpersónar í sambandi við báðar samrøðurnar. F uppgav 3 tilvísingar úr ávikavist Danmark, Hetlandi og Írlandi. Úr setanarsamrøðuni gjørdi setanarnevndin hesa stuttu lýsing av F: Hann er fakliga sterkur, hevur eitt høgt ambitiónsniveau, kanska ov høgt til tíðir, serliga í mun til samstarvsfólk sítt. Hevur góð leiðsluevni í feltinum, men hevur havt ávísar trupulleikar í summum verkætlanum.

A uppgav 4 tilvísingar úr Noregi og Danmark. Niðurstøðan úr samrøðunum var positiv. A er væl kvalifiseraður fakliga og hevur góð leiðaraevni. Hann er nærlagdur í sínum arbeiði, onkur helt kanska ov nærlagdur til tíðir. Fyrikomandi maður, sum dugir væl at bera seg og hevur góð evni at skipa fyri heimligum og altjóða tiltøkum.

**Fundur í setanarnevndini 1. desember 2002 kl. 14.30**
Á fundi vóru C, E og D. Telefonfundur var við B, sum var staddur í Keypmannahavn.

Setanarnevndin viðgjørdi báðar umsøkjararnar við støði í skjølum, setanarsamrøðum og tilvísingarsamrøðum. Semja var um, at nevndin ikki hevði nóg greiða mynd av persóninum F fyri at kunna taka eina fullgóða avgerð í setanini. Ynskiligt var at fáa eina greiðari fatan av hansara persónligu og leiðsluligu eginleikum. Nevndin vildi eisini royna at útvega tilvísingarpersónar úr Grønlandi og Íslandi, har hann hevur starvast nógv, tí nevndin hevði fatan av, at tað hevði stóran týdning fyri heildarmyndina av honum. Ein samd setanarnevnd gjørdi tí av, at C og B skuldu hava samrøðu nr. 2 við F í Keypmannahavn.

**Frásøgn 2. setanarsamrøða við F**
Tíð: 03.12.02 kl 16.30-18.00
Stað: Viðskiftastovan, Kbh.
C og B

C beyð vælkomin og segði nøkur orð til innleiðing. Síðan fór samrøðan sum heild fram yvir 6 høvuðstema:

1. Leiðsluførleikar/royndir
2. Persónligir eginleikar
3. Onnur viðurskifti
4. Visjónir fyri FMS
5. Accept hjá medarbeiðarum fyri avgerðum/strategi
6. Takling av evt. medarbeiðaramótstøðu v. broytingum

**Ad 1:**
Spurdur um 3 týðandi leiðsluuppgávur nevndi F Toftanesút-grevsturin, Gilleleje museum og Hetlandsprojektið. Hann hevði í

hesum sambandi havt leiðslu av umsiting, starvsfólki og vísindaligu rannsóknunum. Undir útgrevstrinum á Toftanesi hevði hann havt upp til 20 fólk undir sær – alt íroknað. Viðv. Gilleleje var eitt lítið savn, men hann hevði havt fulla leiðsluábyrgd, eisini mótvegis ríkisantikvarinum. Orsøkin til at hann fór, vóru strukturbroytingar, sum gjørdu, at hann knappliga sat í tveimum ½ størvum. Í Hetlandi hevði hann verið leiðari av útgrevstri.

**Ad 2:**
Var biðin um at karakterisera sínar persónligu leiðslueginleikar: Hann vísti til respekt fyri stovninum, starvslýsingum, vildi leiða so eingin misti andlit, vera opin og bert áhugaður í, at øll høvdu tað gott og trivust. Hann kom ikki nærri inn á sínar persónligu leiðslueginleikar og tyktist hava trupult við at meta um seg sjálvan ella at fara ov djúpt við sær sjálvum.

Spurdur um hann hevði upplivað truplar konfliktir í sínum arbeiði/leiðslu, svaraði hann ikki greitt. Var farið nærri inn á evnið, nevndi hann royndir úr Grønlandi og Íslandi, men var ikki sinnaður at fara í detaljur, nevndi nakað um kultursjokk, men hetta skal nokk ikki takast bókstavligt. Hann var ikki ein „Her bestemmer jeg“ typa, men tað kundu koma situatiónir, har man mátti skilja seg av við fólk. Men hann var ikki so avgjørdur, helt hann, og helt at man eisini mátti „justere sine ambitioner“.

Hevði havt eina konflikt í Hetlandi, og hon kom av, at ein kollegi „opererede med andre strategier“. Hann upplýsti ikki, hvussu hann loysti konfliktina og var sum heild trekur at fara inn í detaljur. Spurdur um hann onga konflikt hevði havt í Grønlandi ella Íslandi, svaraði hann, at tað var ein styrki, „at man havde set flere systemer sammen“ og: „Jeg har lært af de andre miljøer“. Meiningin er eitt sindur ógreið og hann var týðiliga ikki áhugaður at fara nærri inn á sítt virksemið í Grønlandi og Íslandi.

**Ad 3:**
Undir hesum var komið inn á evnið sum samstarvstrupulleikar, alkoholtrupulleikar og hvussu hann helt donsku kollegarnir meta hann.

Her varð sveimað víða. Fornfr. vóru „en broget flok, som passer deres job“, nøkur høvdu størri ambitiónir enn onnur og kappingin

var ómetaliga hørð: kamp om midler, alle er konkurrenter. (Vil hann her siga, at hevur nakar sagt nakað negativt um meg, so stavar tað frá hesum umstøðum??)

Hevur ikki stórt alkoholforbrúk, sigur hann.

**Ad 4:**

Biðin um at kommentera FMS við atliti at museumsfunktiónum sum formidling, gransking, úrgrevstri, og lóggávu og friðingaraspektinum.

Vildi satsa uppá útstillingar, tourismu, ark, survey og kravt at „der skal forskes". Mælti til lógarboytingar viðv. útgrevstrum, prioritera útgrevstrar.

**Ad 5 og 6:**

Hann vildi farið varliga fram og sæð tíðina an.

Partarnir skiltust uppá, at F skuldi senda C tilvísingar (referansur) úr Grønlandi og Íslandi og møguliga úr Danmark(?) umvegis teldupost, helst mikudagin tann 5. desember, sum setanarnevndin kundi seta seg í samband við.

**Samantak:**

F kláraði seg betri til hesa samrøðuna enn undir samrøðuni, sum var í Føroyum, tann 22. november 2002, svaraði betri og greiðari, men trupult var at koma inn á persónin. Hann royndi at „glíða av" upp á teir meira nærgangandi spurningarnar. Tað virkaði, sum um F ikki vildi koma inn á viðurskiftini, sum B og C royndu at „bora í". Trupult var at fáa F at „góðtaka", at hann skuldi útvega okkum tilvísingar úr Grønlandi og Íslandi.

F er fakliga væl fyri innan økið, hann fæst við, men hansara persónligu eginleikar virka ikki til at verða serliga væl mentir. Á leiðsluøkinum hevur F so at siga bert royndir frá feltinum (fornfrøðiligur útgrevstrar), umframt eitt sindur av royndum frá fakfelagsarbeiði. Innan fyrisiting tykist F ikki serliga royndur.

**Niðurstøða**

Setanarnevndin hevur viðgjørt báðar umsøkjararnar sera gjølla við støði í upplýsingunum, sum við loyvi umsøkjaranna hava

verið til taks. Báðir umsøkjararnir eru kvalifiseraðir til uppgávuna sum landsantikvarur.

F hevur viðurkendar fakligar førleikar á altjóða støði. Hann hevur stórar ambitiónir og er førur fyri at gjøgnumføra tær. Hóast nógvar royndir undir tveimum setanarsamrøðum og tveimum tilvísingarpersónum eydnaðist tað ikki nevndini at fáa eina nóg greiða mynd av persóninum. Tað eydnaðist ikki at fáa hann at geva frá sær tilvísingar úr Íslandi og Grønlandi, har hann hevur arbeitt í nógv ár. Nevndin er tí av teirri fatan, at hetta skapar ein so stóran ótryggleika, at hon ikki kann mæla til at innstilla F til starvið.

A er fakliga væl fyri. Hann hevur leitt stovnin í fleiri ár, og hevur stuðul millum starvsfólkið, og er væl dámdur av samstarvsmonnum í útlondum. Føroya Forminnissavn hevur ikki ment seg nóg væl seinastu árini, men eftir nevndarinnar meting, stava hesi viðurskifti helst frá tí ótrygd honum hevur verið fyri sum fyribilssettur leiðari, og at ein fastari setan kann broyta hesi viðurskifti.

**Við støði í omanfyri nevndu grundgevingum mælir ein samd nevnd landsstýrismanninum til, at seta A í starvið sum landsantikvarur í eitt fimm ára tíðaravmarkað starv.“**

Landsstýrismaðurin ynskti at fáa nøkur viðurskifti meira útgreinað, og hevur í hesum sambandi gjørt soljóðandi notat:

**„Innstilling til starvið sum landsantikvarur.**
Báðir umsøkjarnir eru, sum tit siga: **kvalifiseraðir til uppgávuna sum landsantikvarur.**

Tá ið støðan er soleiðis, má setanarnevndin greidliga grundgeva fyri, hví teir báðir, A og F, eru kvalifiserðir. Grundgevast má eisini fyri, hví tann eini umsøkjarin er betur skikkaður enn hin.

Royni við hesum at siga, at eg má og skal kunna grundgeva fyri tí, sum verður settur og vil eisini kunna grundgeva fyri tí, sum ikki verður settur.

Niðurstøðan er ikki nóg greið og fer ógvuliga lætt um grundgevingina fyri A. Gundgevingarnar mótvegis F eru eisini rættuliga veikar. Tær byggja ikki á tær fortreytir, starvslýsingin setur.

Eg kann ikki út frá niðurstøðuni í innstillingini taka avgerð, ið

greidliga grundgevur fyri, hví tann instillaði verður settur í starvi. Grundgevingarnar gera í alt ov lítlan mun greitt, hví tað skal verða A og ikki F.

Tá innstillingin verður løgd inn á mítt borð, er tað mín ábyrgd, at innstillingin er av slíkum slagi, at eg til ein og hvørja tíð kann grundgeva fyri setanini. Tað meti eg meg snøgt sagt ikki kunna í løtuni.

Umráðandi er eisini, at setanin ber boð um, hvat vit ætla og vilja við Fornminnissavninum og hvør framtíðar uppgávan og avbjóðingin verður hjá tí komandi landsantikvarinum.

Eg skal eisini tryggja, at báðir umsøkjarnir fáa ein javnbjóðis møguleika í innstillingini, sum eisini má verða trúgv mótvegis starvslýsingini.

Tað lýsir ræ tuliga væl ígjøgnum í innstillingini, at tað ikki er tann fakligi førleikin ivi er um, tískil má tað verða tann persónliga førleikan, tit hava bygt tykkara støðutakan á. Í lýsingini eftir landsantikvari er greidliga sett upp, hvørjir persónligar eginleikar umsøkjarin skal hava.

„Ansøgeren skal besidde gode ledelses- og samarbejdesevner, være målrettet, selvstændig, resultatorienteret, have vilje og lyst til at gå nye veje, tackle nye udfordringer-og at lede arbejdet på en sådan måde, at institutionerne fortsat har en faglig og forskningsmæssig profil både i det færøske samfund og uden for Færøerne“.

Eg vil fegin hava ein lýsing av teimum báðum A og F, við atliti at teimum fyritreytum, sum settar eru í starvslýsingini. Vil fegin hava, at hetta verður sett soleiðis upp, at tað ber til at samanmeta teir báðar.

Hetta fyri at kunna taka avgerð og velja millum tveir kvalifiseraðar umsøkjarar.“

Við grundarlagi í hesum notatinum hevur setanarbólkurin 14. jan. 2003 latið landsstýrismanninum soljóðandi ískoyti til fyrra setanartilmæli:

**„Setan av landsantikvari (ískoyti til setanartilmæli, dagf. 10. des. 2002)**

Setanarnevndin var boðin til fundar hjá landsstýrismanninum, fríggjadagin 20. desember 2002, til at umrøða innstillingina til

starvið sum landsantikvarur, sum setanarnevndin hevði latið landsstýrismanninum, tann 10. desember 2002. Landsstýrismaðurin vildi, eftir at hava lisið innstillingina frá nevndini, hava ymisk viðurskifti nærri útgreinað. Á fundinum var tilmælið frá nevndini gjøgnumgingið. Landsstýrismaðurin vísti á, at nevndin í tilmæli sínum sigur, at báðir umsøkjararnir eru kvalifiseraðir til uppgávuna. Men tað framgongur ikki nóg greitt, hví teir eru kvalifiseraðir og hví annar er betur kvalifiseraður enn hin.

Nevndin tók orð landsstýrismansins til eftirtektar og tók í samráð við landsstýrismannin avgerð um at gera eitt ískoyti til innstillingina. Eftir avtalu við landsstýrismannin skuldi ískoytið gerast við støði í t-brævi, hann skuldi senda nevndini seinni sama dag.

Ískoyti til innstilling, dagf. 10. des. 2002, til starvið sum landsantikvarur.

Í t-brævinum ynskir landsstýrismaðurin niðurstøðuna í innstillingini útgreinaða soleiðis,

- at til ber hjá henni at sammeta báðar umsøkjararnar, sum hava verið til samrøðu.
- at persónligu eginleikar umsøkjaranna verða útgreinaðir við støði í orðingini í starvslýsingini, at „umsøkjarari skal hava góð leiðslu- og samstarvsevni, vera ágrýtin, tænastuhugaður, miðvísur, kunna arbeiða sjálvstøðugt – og vera til reiðar at royna nýggjar avbjóðingar", og harumframt, „at lede arbejdet på en sådan måde, at institutionen fortsat har en faglig og forskningsmæssig profil både i det færøske samfund og uden for Færøerne", eins og lagt er aftur at í donsku starvslýsingini.

Eisini ynskir landsstýrismaðurin, at setanin skal bera boð um, hvat MMR ætlar og vil við Fornminnissavninum, og hvør framtíðar uppgávan og avbjóðingin verður hjá tí komandi landsantikvarinum.

Við atliti at hesum fer setanarnevndin niðanfyri at útgreina niðurstøður sínar.

Í útgreiningini verður í stuttum mett við støði í hesum førleikakrøvum:

1. Fakligur førleiki.

2. Leiðslu- og samstarvsevni.
3. Evni at starvast sjálvstøðugt og miðvíst.
4. Vilji at ganga nýggjar leiðir og taka ímóti nýggjum avbjóðingum.
5. Evni at leiða arbeiðið á slíkan hátt, at Føroya Fornminnissavn framhaldandi hevur ein fakligan og granskingarligan profil í føroyska samfelagnum og uttan fyri Føroyar.

**Niðurstøða**

**Viðv. A.**

Ad 1. A er cand. mag. og hevur høvuðsgreinaútbúgving í miðaldarfornfrøði og hjágreinaútbúgving í fólkalívsfrøði. Faksamansetingin er sera viðkomandí fyri at virka innan antikvariskt virksemi og savnsvirksemi í Føroyum. Harumframt hevur A drúgvar leiðsluroyndir – hevur síðan 1980 verið deildarleiðari á Fornfrøðideild Føroya Fornminnissavns, og í tíðarskeiðunum 1988-1990, 1998-2001 og 2001-2002 fyribils settur sum landsantikvarur.

Ad 2. Sum deildarleiðari hevur A havt rakstrarligu ábyrgdina av øllum fornfrøðiligum útgrevstrum í Føroyum seinastu 22 árini og teim flestu eisini fakligu ábyrgdina. Tilvísingarpersónar, hann hevur uppgivið, hava givið honum góð skotsmál í sambandi við hetta.

Setanarnevndin hevur í umráðingum sínum serliga havt fyri eygað leiðslueginleikar hansara í starvinum sum settur landsantikvarur, serliga tí misljóð í nøkur ár hava verið í samskiftinum millum Mentamálaráðið og Føroya Fornminnissavn og A ein part av hesum tíðarskeiðinum hevur myndað stovnin. Setanarnevndin er tó vitandi um, at A hevur havt trongar ræsir at starvast eftir sum fyribils settur leiðari. Hon metir tí, at misljóðini, sum hava verið, ikki eiga at geva honum mismun í verandi setanarstøðu. Eftir nevndarinnar meting kann ein føst setan av honum broyta hesi viðurskifti.

Setanarnevndin hevur fingið fatan av, at A verður virdur sum starvsfólkaleiðari og hevur við hepnari hond fingið í lag samstarv millum fakbólkarnar á stovninum og millum stovn og bygdasøvn og áhugabólkar, ið virka fyri bygdasavnsvirksemi.

Setanarnevndin hevur upplivað A sum ein fyrikomandi persón, ið er lættur at samskifta við. Nevndin fatar hann sum ein persón í javnvág, erligan og við rættvísiskenslu. Ummælarar, hann hevur

víst til, lýsa hann sum ein, ið hugsar seg væl um og vil hava stundir at taka støðu. Hetta er í flestu førum ein dygd.

Ad 3. Setanarnevndin metir, at A í yrki sínum higartil hevur sýnt evni at starvast sjálvstøðugt og miðvíst.

Ad 4. Undir samrøðuni hevur A víst á fleiri vegir at ganga, bæði viðv. menning av fornminnaumsitingini, kunningarvirkseminum og bygdasøvnunum. Eisini sigur hann seg vera til reiðar at taka ímóti nýggjum avbjóðingum, bæði við atliti at persónligari menning sum leiðari og menning av stovninum í sambandi við møguligar bygnaðarbroytingar.

Ad 5. Er fakliga væl fyri og í útheiminum viðurkendur sum serfrøðingur føroyinga í fornfrøðivísindaligum viðurskiftum viðvíkjandi Føroyum. Hann er væl umtóktur í fakumhvørvum, bæði í Føroyum og uttanlands, og setanarnevndin metir, at hann hevur evni at leiða arbeiðið á Føroya Fornminnissavni á slíkan hátt, at Føroya Fornminnissavn framhaldandi hevur ein fakligan og granskingarligan profil í føroyska samfelagnum og uttan fyri Føroyar.

**Viðv. F**

Ad 1. F er mag. art. í forsøguligari fornfrøði og hevur gjøgnum vísindaligt virksemi vunnið sær førleika innan miðaldarfornfrøði. Í 4 ár var hann leiðari á Gilleleje museum. Annars hevur hann bæði áðrenn og aftaná havt tíðaravmarkað størv, m.a. sum undirvísari, og rikið vísindaligar verkætlanir í Grønlandi, Íslandi og Hetlandi.

Ad 2. Setanarnevndin hevur roynt at fáa til vega upplýsingar um leiðslueginleikar hansara. Tað hevur eydnast í ávísan mun, nevniliga úr Hetlandi. Eftir at nevndin fleiri ferðir bað um tilvísingar til stovnar ella persónar, sum kenna til virksemi á Gilleleje museum, í Grønlandi og Íslandi, hevur hann treyðugt latið henni hesar. Við loyvi frá F hevur setanarnevndin sett seg í samband við fornfrøðiligar myndugleikar í Grønlandi og Íslandi. Harumframt hevur setanarnevndin tikið samband við nýggjar tilvísingar í Danmark. Sum heild kann sigast, at stórt sæð allar eru samdar um, at fakligi førleiki hansara er góður; men trupult hevur verið, at fingið tilvísingarnar til at siga nakað um hansara leiðslu og

persónligu eginleikar. Í einum føri varð hetta tó gjørt, men var skoðsmálið ikki serliga gott.

Í umsókn síni vísir F á, at grevsturin á Toftanesi í Leirvík hevur verið ein av størstu uppgávum hansara. Við atliti at hesum, undrast setanarnevndin á, at F ikki hevur víst til onkran, sum kennir til virksemi hansara har.

Setanarnevndin hevur upplivað F sum ein fyrikomandi persón. Hann tykist at hava trupulleikar at tosa opið um eym viðurskifti, bæði á persónliga og yrkisliga økinum. Við atliti at uppgávuni, sum starvið sum landsantikvarur ber við sær, m.a. at samskifta við og bera fram áhugamál tess almenna fyri áhugabólkum á savnsøkinum og í friðingarmálum, har eymar støður lættliga taka seg upp, er setanarnevndin ikki sannførd um, at persónligu eginleikar hansara eru nóg hollir til at taka hana upp við heppnari hond.

*Ad 3.* F hevur meginpartin av starvstíð síni verið verkætlanar-settur. Nevndin gongur tí út frá, at hann hevur evni at starvast sjálvstøðugt og miðvíst. Setanarnevndin hevur tó frá ummælarum hansara fingið fatan av, at hann eisini hevur lyndi at starvast ráðaríkt.

*Ad 4.* Tað hevur ikki eydnast setanarnevndini at útvega sær nakra greiða mynd av vilja umsøkjarans at ganga nýggjar leiðir. Hann hevur ambitiónir, men hevur svarað víkjandi og uttan serligar hugsjónir, tá ið spurt hevur verið um støðu hansara til bygnaðarbroytingar, sjálvt um hann í umsókn síni hevur víst til nakrar visjónir, men hevur tí ikki verið førur fyri at útgreina hesar.

*Ad 5.* Av tí at setanarnevndin hevur havt trupult við at fingið váttað ella avnoktað varðhugan av, at samstarvstrupulleikar vóru í sambandi við virksemi F's í Gilleleje, Grønlandi og Íslandi, hevur hon heldur ikki fingið útvegað sær nøktandi støði at meta um spurningin, um SSH hevur evni at leiða arbeiðið á Føroya Fornminnissavni á slíkan hátt, at Føroya Fornminnissavn fram-haldandi hevur ein fakligan og granskingarligan profil í føroyska samfelagnum og uttan fyri Føroyar.

**Tilmæli**
Meginuppgávan hjá landsantikvarinum er at umsita løgtingslóg nr. 19 frá 16. september 1948 um friðan av fornminnum og bygningum (seinast broytt 1972), løgtingslóg nr. 17 frá 9. mai 1972 um bygdasøvn við mentunarsøguligum týdningi (seinast broytt 1986), og løgtingslóg nr. 32 frá 2. mai 1952 um fornminnissavn (seinast broytt 1964). Mentamálaráðið ætlar í komandi árum at fáa í lag dagføringar av øllum hesum lógum, og landsantikvarurin skal hava ein leiðandi leiklut í hesum. Harumframt hevur Mentamálaráðið ætlanir um dagføringar á savnsøkinum sum heild.

Við atliti at hesum er setanarnevndin komin fram til, at A er tann av umsøkjarunum, sum er best egnaður til at røkja starvið sum landsantikvarur, sæð út frá tí sum starvið fevnir um og ætlandi fer at fevna um framyvir.

Eftir at setanarnevndin hevur røtt um málið av nýggjum og sett seg í samband við fleiri tilvísingar, er støðan vorðin uppaftur greiðari. A er sum heild betri egnaður, tí hann hevur góðar fakligar fortreytir, hevur fleiri og meira viðkomandi leiðsluroyndir og hevur betri persónligar eginleikar.

Setanarnevndin er samd um at mæla landsstýrismanninum til at seta A í starvið sum landsantikvarur."

Sunnudagin, 19. jan. 2003 sendi landsstýrismaðurin aðalstjóranum soljóðandi teldubræv:

„Havi í vikuskiftinum sitið við setanini av landsantikvari. Eg meti meg framvegis ikki hava møguleika at taka eina avgerð har eg klárt og týðiliga kann grundgeva fyri støðutakan míni.

Tí vil eg fegin hava møguleika at kalla báðar umsøkjarnar inn til enn eina samrøðu, har eg saman við 2 skrivarum royni at nærkast tí vit hava sett sum fortreyt fyri starvinum. Eisini vil eg fegin hava møguleika at spyrja nærri um okkurt av tí tit nema við í setanartilmælinum.

Hetta skal skapa mær møguleika at taka eina avgerð.

Eg mæli tí til:

- at G og H verða skrivarir til samrøðurnar
- at aðalstjórin og mentanardeildin gera spurningarnar til samrøðuna, ið taka støði í t-brævinum eg sendi tykkum
- at A verður kallaður inn mikudagin 29. januar kl 8.30
- at F verður kallaður inn mikudagin 29. januar kl. 11.00

Kanst tú skipa soleiðis fyri at hetta verður gjørt
Endaliga niðurstøða verður tikin eftir hesar samrøður…“

Við teldubrævi 21. jan. 2003 hevur aðalstjórin svarað landsstýrismanninum soleiðis:

„Sum fyrisiting hava vit sjálvsagt skyldu at fylgja boðum frá landsstýrismanninum um at gera ávísar uppgávur, men samstundis hevur fyrisitingin eisini skyldu til, at vísa á, hvørjar avleiðingar o.a. boðini frá landsstýrismanninum kunnu hava við sær.

Gjørt skal verða vart við í hesum føri:

Eftir setanarpolitikki landsins skal ein setanarnevnd setast við ávísum umboðum. Nevndin sum landsstýrismaðurin skjýtur upp niðanfyri líkur ikki hesi krøv, m.a. tí at ein setanarnevnd hevur verið, eingin leiðari er í setanarnevndini og einki starvsfólkaumboð er í „nýggju“ setanarnevndini.

Tað er óvanligt og so vítt eg veit ikki komið fyri fyrr (í nýggjari tíð), at ein landsstýrismaður hevur tikið eina setanarnevnd av ræði og sjálvur tikið yvir.

Málið verður drigið so mikið langt út, væl út um ásetingarnar í setanarpolitikki landsins um, nær ein umsøkjari eigur at hava fingið svar (uml. 3 vikur eftir umsóknarfreistina).

Sum málið liggur nú, kann roknast við, at fakfeløg ella umsøkjarar kæra um málsgongdina til løgmann (ovasti starvsfólkaleiðari) ella Løgtingsins Umboðsmann við teimum fylgjum tað kann fáa.

Eg skal staðiliga mæla landsstýrismanninum frá, at fara inn í málið á tann hátt, landsstýrismaðurin hevur ætlað sær. Sum málið er háttað, so eigur landsstýrismaðurin at taka støðu til ta tilfar

o.a., sum liggur í málinum og taka støðu út frá tí (velja millum umsøkjararnar ella lýsa starvið leyst av nýggjum). Verður seinasti møguleiki valdur (lýsa starvið leyst av nýggjum), so kann roknast við, at trupulleikar standast av hesum (misnøgd millum umsøkjarar, fakfeløg, grundgevingar fyri hví lýst verður leyst aftur, tá ið 8 umsøkjarar eru til starvið o.a.).

Eg skal tí vinarliga heita á landsstýrismannin um, at umhugsa sína støðu av nýggjum. Heldur landsstýrismaðurin fast við sítt upprunaliga ynski, so má eg sjálvsagt sum loyalur embætismaður líða boðini, men eg havi gjørt mína skyldu, at upplýsa landsstýrismannin um avleiðingarnar."

Við teldubrævi 23. jan. 2003 hevur landsstýrismaðurin svarað aðalstjóranum soleiðis:

„Haldi at tú hevur misskilt endamálið við fundinum, tað er ikki ætlanin at gera eina nýggja setanarnevnd. Eg vil bara hava møguleika at spyrja nærri um nøkur ting. Havi hugsað eitt sindur um tað. Tað rættasta er væl at tú eisini verður við á fundinum. So eg vil einaferð enn heita á teg, um at kalla teir báðar F og A til fundar mikudagin.

Vil fegin hava G til skrivara á fundinum, møguliga eisini H. Teir hava bara til uppgávu at skriva og hava onga aðra uppgávu í hesum sambandinum.

Vil fegin hava uppskot til spurningar, geri eisini sjálv teir spurningar sum eg haldi verða umráðandi og so samskipi eg teir til samrøðuna.
Tað má ringjast til teir báðar í morgin og tað gangi eg út frá at tú orðnar beinanvegin í morgin."

Fyrrapartin 24. jan. 2003 hevur landsstýrismaðurin í mentamálum sent løgmansstjóranum soljóðandi teldubræv:

„Vísandi til okkara prát mikudagin, vil eg fegin bara lata tykkum vita, at eg havi valt at kalla báðar umsøkjarnar inn til samrøðu mikudagin. Endamálið við hesum samrøðum er at fáa til vega neyðuga grundarlagið fyri eini støðutakan.

Vildi fegin hoyrt aftur, um tit meta at hetta er í stríð við galdandi setanarpolitikk ella aðrar reglur/siðvenjur á økinum.

Við til samrøðuna verður landsstýrismaðurin, aðalstjórin og 1 skrivari.

Lat meg endiliga frætta aftur."

Seinnapartin sama dagin hevur løgmansstjórin svarað landsstýrismanninum aftur við soljóðandi teldubrævi:

„Tað er ikki beinleiðis í stríð við setanarpolitikkin.

Okkum kunnugt, er tað ikki siðvenja, at landsstýrismenn eru við til setanarsamrøður. Hinvegin er neyvan nakað til hindurs fyri hesum.

Tað er gott, at tú tekur umboð fyri setanarbólkin við, í hesum føri aðalstjóran, tí á henda hátt verður tryggjað, at kontinuitetur er í tilgongdini.

Hetta er varisligt svar, ið skal takast við tí fyrivarni, at vit ikki kenna ítøkiliga málið og ta tilgongd, ið hevur verið í hesum sambandi."

Skrivararnir, sum landsstýrismaðurin ynskti at hava við á fundinum við teir báðar umsøkjararnar, hava gjørt hesar frágreiðingar frá fundunum:

**„Fundarfrásøgn 29. januar 2003**

Samrøða við A byrjar umleið kl. 8.45. Til staðar vóru I, landsstýrismaður og C, aðalstjóri. H og G luttóku sum skrivarar.

Lsm.: tað áliggur mær at taka støðu til tilmælini grundað á greiðar niðurstøður. Geva báðum, ið eftir eru, javnbjóðis møguleikar og skal tilmælið verða trúgvt ímóti starvslýsingini. Ynski at leggja dent á framtíðina í FMS, fornfrøðina og vísindini.

Hvussu sært tú støðuna hjá fornfrøðiliga arbeiðinum í dag?

A: Hetta er stórur spurningur. Arbeiðið er annað enn fornfrøði, og starvið sum landsantikvar er at vera leiðari fyri tjóðsavn Føroya. Stovnurin er samansettur av nógvum ymiskum uppgávum, nógvar uppgávur eru lógarfestar. Samla inn, viðgera, varðveita, granska og formidla. Uppgávan er at útfylla hetta og prioritera ymiskt til ymsar tíð.

Lsm.: Hvussu formidlar tú hesi tingini?

A: Sjónliggera arbeiðið, gera stovnin viðkomandi fyri samfelagið, tí hevur formidlingin stóran týdning. Fastar framsýningar umframt skiftandi serframsýningar, so at fólk allatíðina koma.

Lsm.: Vísindaliga aspektið. Eru vit væl fyri?

A: Vil venda aftur til stovnin. Vit gera fornfrøðiligar rannsóknir, men FMS er eisini fyrisitingarstovnur sbrt. fornminnalógina, td. friðing av jarðfrøðislendi og bygningum. Fornfrøðiligi parturin – antikvariska arbeiðið tekur seg upp, tá okkurt arbeiðið, t.d. vegagerð, fer í gongd – um vit ikki eru tað uppá forkant. Staðfestast skal, um tað er fornminni, ið er friðað sbrt. § 1 í lógini, og um arbeiðið so skal steðgast. Fornfrøðilig rannsókn er dokumentatión fyri tað, sum var á staðnum. Ideologiin tey seinnu árini hevur verið at varðveita fornminni á staðnum. Fornminni ella mentaminni finnast víða hvar, og eru heimildir til søguna á staðnum, hon sigur ikki seg sjálva. Vit mugu hava best møguliga bakgrund fyri at kanna og varðveita hesi mentaminni. Møguligt at koma aftur á staðið. Umráðandi at rannsaka heildir heldur enn bert einkulta objektið, hetta gevur eitt margfaldni og hóming av umhvørvinum, vit eru vaksin upp í. Heimildir til vísindina, men gevur eisini samleika og tilknýti, gleði fyri eftirkomararnar og trivnað.

Lsm.: Uppgávan hjá landsantikvarinum. Hvussu sært tú hana á stovninum, her í landinum og altjóða?

A: Tað eru møguleikar í fornfrøðini. Samfelagsliga er gróðrarbotnurin at betra virksemið at fáa fólkið at skilja virksemið. Fornminni eru mentaminni – eitt tilfeingi, ið ikki endurnýggjar seg. Vit síggja í dag, at vit sum antikvariskur stovnur standa einsamøll og ikki megna allar uppgávurnar. Í útlondum er hugburðsbroyting farin fram seinastu árini, har ið áhugin verður vaktur við at leggja uppgávur út á onnur. Tað eru aðrir sektorar í samfelagnum, ið skulu kenna ábyrgd av fornminnum. T.d. kundi landbúnaðurin tikið størri lut í at varðveita bygningar, sum eru farnir úr brúki, men sum hoyra til umhvørvið. Tað snýr seg um at aktivera gerandisdagin. Eg havi luttikið í norðurlendskum samstarvi og veit, at í t.d. Noregi verður veittur stuðul at varðveita slíkt. Í Vági t.d. er ørgrynna av mentaminnum relaterað til fiski-

vinnuna. Stóra Pakkhús t.d. Man kundi aktivera fiskivinnuna at lyfta uppgávuna. Tromsø-ráðstevna í september snúði seg um júst hetta. Her eru altso vegir at gjøta – aftur her er tað heildarsjónin.

Tryggir karmar hanga saman við figgjarligu karmunum. Uttan gerst ikki annað, enn tað sum verður gjørt. Gott samskifti millum politisku myndugleikarnar og stovnin er neyðugt.
Granskingin verður raðfest høgt, tí annars verður einki at formidla.

At skapa neyðugu umstøðurnar og fáa granskingartíð. Landsantikvarurin hevur ikki granskingartíð. Tað er torført í Føroyum at skapa fígging uttanífrá til gransking innan fornfrøði. Okkara arbeiði dettur burturímillum ta vinnuliga granskingina. Hvat er so at gera? Sum føroyskir granskarar hava vit eisini trupulleikar at fáa pengar heimanífrá til at fáa útlendskar pengar. Hetta eigur at verða tikið upp í áliti um mentanararv og søvnini.

Lsm.: Fer ov nógv orka til fyrisiting?

A: Eingin ivi um tað. Málið er 40% gransking og 60% fyrisiting, men heldur ikki. Praksis er, at Landsverkfrøðingurin betalir rannsóknir tá talan er um, at FMS skuldi loysa mentaminni úr friðing. Viðv. Toftanesi vóru vit tíðliga við í planleggingini, idealið er at vera uppá forkant. Tí eru vit eisini við í kommunalum byggisamtyktum. Tá friðing skal fasthaldast er tað FMS, ið skal gjalda. Tað, at FMS skal vera við sum náttúrligt lið í planleggini, má man taka hædd fyri í nýggju lógini.

Lsm.: Hvørjar sjónir hevur tú um stovnin?

A: Eg vil hava, at øll kenna seg heima á FMS. At fólk kunnu koma aftur og aftur við skiftandi framsýningum. Viðv. antikvariska arbeiðinum, so manglar eitt grundarlag – eitt yvirlit yvir, hvat vit hava av mentaminnum. Hava eina skrá at vísa planmyndugleikunum og veita samfelagnum trygga fakliga tænastu. FMS skal hava trúvirði. Eg søkti starvið, tí her eru uppgávur, eg vil sleppa at loysa í føstum rammum. Vil leggja dent á at gera strategiir fyri arbeiðið framyir, hetta er neyðugt. Eg eri demokratiskt innrættaður, og vera starvfólkini við í hesum. Farast skal ígjøgnum stovnin og saman við starvsfólkinum leggja heildarætlan.

Lsm.: Hvør er útbúgvingarliga bakgrund tín?

A: Etnologi var útgangsstøðið – materiel folkekultur. Hetta er

savnsrelatera, kannaði gripir. Ráðgevi mín í nógv ár Knud Krogh, og møtti honum fyrstu ferð í sambandi við útgrevsturin á Sandi 1970. Fak broytast, og í 1960/70-unum varð tað meira sociologiskt, og tað var ikki eg. Legði heldur dent á tað fornfrøðiliga og valdi miðaldarfornfrøði. Havi sostatt tvey bein at standa á -fólkalívsfrøðiliga og fornfrøðiliga. Havi arbeitt í Danmark og Grønlandi og havi arbeitt málrættað at vinna útbúgving til at brúka í Føroyum. Luttikið í verkætlanum saman við norðurlendingum, bretum og amerikanarum.

Lsm.: Tú hevur skrivað fleiri greinir. Kanst tú siga nakað samanfatandi um tína skriving?

A: Tað er trupult at finna tilfar til spesiali um føroysk viðurskifti. Sjálvur rótaði eg nokk so leingi við Kirkjubø, men trupult at koma ígjøgnum. Hetta var áðrenn bókina hjá Krogh, sum setti nøkur ting uppá pláss. Eg valdi elstu búsetingarnar. Tað er umráðandi at seta spurningar sjálvt um man vísindiliga ikki hevur svarini. Skapa rímuligar spurningar, metodur broytast. Náttúruvísindin havt áhuga í hesum – umhvørvisspurningar. Fornfrøðin er ung vísind í Føroyum sjálvt um áhugin var vaktur langt áðrenn. Nógv tilfar skal savnast. Víkingaøldin hevur stóran áhuga, men vit eru bert byrjaðið. Viðvíkjandi miðøldini eru holini enn størri. Kirkjubøur er a-typiskt kompleks, vit mangla rannsóknir fyri vanliga miðaldarbúsetingar.

Lsm.: Hvørjar vísindaligar høvuðslinjur í sambandi við starvið?

A: Landsantikvarurin er ikki granskingarstarv, neyðugt er at hava fakliga yvirlitið. Tað er munur á at vera landsantikvarur og at vera fornfrøðingur. Havi samlað tilfar til at gera yvirlit yvir føroyska fornfrøði, ynski at gera hetta. Eg veit meira enn nakar annar, hvat brúk er fyri fíggjarliga. Eg kenni tørvin á øllum økjum, vit hava brúk fyri fleiri fólkum, t.d. einum fornfrøðingi og arkitekti.

Lsm.: Hvørji krøv setur tú til leiðara av verkætlan?

A: Eg havi ikki verið leiðari av verkætlan, men liður í verkætlan. Krevur góðar eginleikar at samstarva, samskifta. Innlit í at arbeiða tvørvísindaligt. Vísindalig arbeiðið í dag er sera spesialiserað, at man skal kunna samansjóða persónar, fak og spesiali.

Lsm.: Hevur tú undirvíst?

A: Havi undirvíst á setrinum sum uttanseturslærari. Vit hava umhugsað eitt neyvari samstarv við Søgu- og samfelagsdeildina. Eg, J og E hava allir undirvíst, og hevur hetta verið til stóra gleði. Fornfrøðin kann skapað eitt breiðari høpi fyri tað søguliga og málsliga.

Lsm.: Er tað samstarvi við Setrið?

A: Nei, ikki formaliserað, men vit eru við í undirvísingarplanlegginini hjá Søgu- og samfelagsdeildini.

Lsm.: Hvussu metir tú fakliga støði á FMS?

A: Vísindaliga fært tú tað ikki betri í landinum.

Lsm.: Í altjóða høpi, eru vit væl fyri?

A: Ja, men man kann altíð ynskja sær tað betri. Eftir umstøðunum eru vit væl fyri. Støðið í Føroyum er ájavnt við tað í Norðurlondum. Undirvísingin hjá mær hevur altíð relaterað til Føroyar.

Lsm.: Vísindaliga arbeiðið, røkkur tað út og verður tað brúkt?

A: Ja, vit verða refereraðir og røkka út í tað altjóðaliga.

Lsm.: Er FMS ein virkin stovnur, hevur hann virðing og vælvild.

A: Kanska ikki nóg stóra virðing, men tað er mín visjón, at ein og hvør føroyingur kennur stovnin sum sín stovn. Eftir umstøðunum er hann virkin, vit hava úr at gera bæði hvat viðvíkur tí antikvariska arbeiðnum, kunningini og sambandi við skúlaverkið. Vit hava tætt samband við skúlarnar, nógvar floksvitjanir. Eisini er virksemi forbundið við ferðavinnuna. Um veturin kemur eingin vitjandi annað enn skúlar. Vit hava góðar afturmeldingar um framsýningar okkara. Vit hava roynt jólatiltak fyri familjum, sum var væl eydnað. Vit venda til ymsar bólkar.

Lsm.: Avbjóðingin, er tað at fáa savnið meira sjónligt?

A: Ja, og tryggjað í einum fíggjarligum karmi. T.d. taka vit atgongugjald, men í Svøríki fer man nú til fría atgongd. Hetta er alment rúm, men so mangla inntøkur.

Lsm.: Um tú verður settur, hvat verður tað fyrsta, tú fer í holt við?

A: Gjøgnumganga stovnin at leggja strategi saman við starvsfólkunum. Fólkini – 13 í tali – hava verið leingi á stovninum, útskiftingin verður tí kraftig, tá hon verður av náttúrligum orsøkum. Vit hava vikuligar leiðslufundir og mánaðarligar starvsfólka-

fundir. Tey skulu vita, hvat gongur fyri seg. Hurðin hjá mær er altíð opin, og ynski eg at fara í holt við regluligar starvsfólka-samrøður.

Lsm.: Fyrimunir, men eisini krøv til leiðsluna at menna stovnin og fólkið, sjálvt um tey hava verið har leingi?

A: Ja, og eg vil endurskoða bygnaðin, ið er frá 1988. Í praksis er hann broyttur nakað. Eg vil leggja dent á at arbeiða tvørturum deildirnar, at samla stovnin at loysa yvirornaðar antikvariskar uppgávur í felag.

Í norðurlendskum høpi eru vit perifer – eitt sindur isolerað, men vit brúka nógva orku uppá at menna okkum. Víðari- og eftirútbúgvingarmøguleikarnir eru nógvir, men tað er dýrt og avmarkar. Vit eru associerað við Nordisk Museumsforbund, men dýrt at senda fólk av stað, tí verða ferðir mest møguligt sam-skipaðar.

Lsm.: Hvussu betra virðingina?

A: Virðingin kann bert skapast við at vera opin og at tað er trúverdugt, ið tú fer út við. Fakliga støðið er haldgott. Kunningin hevur ótrúliga nógv at siga. Tað áliggur savnslæraranum at kunna breitt eisini um stovnin. Vit mangla tó eitt tíðarrit – t.d. eitt sum Mondul. Stovnurin má hava eitt rit – t.d. kombinerað ársfrá-greiðing og ársrit men manglar pengar til hetta. FMS hevur relatión til Fróðskaparfelagið, fíggjar Frøði sjálvt um tað er tungt, men Frøði má halda áfram. Frøði kemur út til almenningin, og skal lofta greinum í Fróðskaparritum. Mondul var fólkaogn.

Lsm.: Hvat er munurin á væleydnaðum og minni væleydnaðum arbeiði?

A: Vit hava ikki altíð fingið vind í seglini, sum vit kundu ynskt. Tað veldst eisini um, hvør stingur út í kortið og um man vil vera við undir teimum givnu treytunum.

Lsm.: Tora at siga frá út frá fakligum sjónarmiðum, men eisini fáa arbeiðið gjørt?

A: Ja, tað kann vera trupult, men tað má vera sakligt. Eg havi eisini bakkað út úr arbeiði, men eisini roynt at fingið nakað burturúr- taka støðu hvørja ferð. Eri tilvitaður um hetta.

Lsm: Hevur tú meira?

A: Nei, nær fellur avgerðin?

Lsm.: Seinasta lagi 1. februar. Eg vil yvir fyri báðum umsøkjarum vera 100% í grundgevingunum bæði fyri tí, ið fær starvið, og hinum. Eg tók avgerð um at tosa við báðar, sjálvt um hetta ikki er vanligt og kann skapa fordømi. Henda samrøðan hevur givið mær eina greiðari mynd.

A: Man verður ótryggur, skal seta seg upp til samrøðuna.

Lsm.: Ja, umstøðumar ávirka, hetta hevur drigið ov leingi út, keðilig støða, tað vita vit øll.

A: Starvsfólkini eru ónøgd, men úrslitið verður sera áhugavert. Fundurin lokin kl. 10.10."

**„Fundarfrásøgn 29. januar 2003**

Samrøða við F kl. 14.30. Til staðar vóru I, landsstýrismaður, og C, aðalstjóri. H og G vóru skrivarar.

Lsm.: Redegøre for samtalen, jeg har ansvaret for ansættelsen, og vil tage min afgørelse på grundlag af gode og tunge argumenter, som er i overensstemmelse med stillingsannoncen. Jeg vil gerne snakke om FMS som institution, det videnskabelige aspekt m.m. Hvordan opfatter du færøsk arkæologi i øjeblikket?

F: I bredere nordisk sammenhæng er den ikke særlig synlig. På Shetlandsøerne, Orknøerne og Island meget mere dynamisk og synlig. Den færøske lovgivning er ikke på højde med tilsvarende nordiske. Den rummer ingen bestemmelser for finansiering af udgravninger. Der mangler en overordnet diskussion omkring kulturarven, hvor arkæologien fremtræder på ligeværdig måde med f.ex. miljøet og naturvidenskab. Kulturlevn kan ikke genskabes – set ud fra en helhedsbetragtning skal man ikke altid grave. Man skal kortlægge kulturhistoriske genstande og områder, men lade det ligge i jorden. På Færøerne mangler en registrering af kulturminder, men det har man lang tradition for i Danmark. Dette er vigtigt i forbindelse med anlægsarbejde. Man må have overblik for at lave arkæologiske undersøgelser. Der skal en prioriteringsdiskussion ind i denne sammenhæng. Kysterosion må man gøre noget ved, f.ex. har man i Skotland lavet en kyst survey.

Lsm.: Hvordan ser du institutionen nationalt, samfundsmæssigt og internationalt?

F: Færøerne har ikke været så meget med i det nordatlantiske arbejde. Man må lægge vægt på at formidle, rapportere og publicere. Publicering for at gøre gennemskueligt og indgå i faglig diskussion. F.ex. blev der gjort for lidt ud af Vikingekongressen 2001. Kun et foredrag i Tórshavn, og der var for lidt. Man skal gøre det til hvermanseje.

Lsm.: Hvad er vigtigt, hvilke visioner har du for museet?

F: FMS skal optræde som central institution også i en nordisk sammenhæng og tiltrække folk udefra. Vise det med publicering og videnskabeligt arbejde. Jeg er åben for strukturomlægninger. Udførelsen af arkæologisk arbejde kan ligge i regionalt regi, men med landsantikvaren som central og overordnet myndighed. Det sikrer en lokal forankring, men kan give problemer med prioriteringen af udgravning i det ene sted frem for et andet. Derfor skal kompetencen ligge centralt.

Lsm.: På Færøerne har det stor betydning, at alt ikke centraliseres i Tórshavn.

F: Ja, men det må ikke bliver for splittet, for så bliver fagmiljøet for lille og isoleret. Dette burde ikke være et problem, for Færøerne er overskuelige.

Lsm.: Din videnskabelige baggrund, uddanelse?

F: Klassisk sproglig student. Arkæologi og historie. 9 års studium ved Københavns Universitet, hvoraf de to var studenterudgravningsarbejde på flere museer i Danmark. Kom så til Leirvík, som var en god og dejlig oplevelse, og som ledte mig ind i nordatlantisk arkæologi. Har deltaget i mange kongresser, rejser i Norden, søgt og arbejdet for forskningsfondsmidler. Har erfaringer hele vejen rundt. Stor forskel på britisk og nordisk arkæologitraditioner.

Lsm: Sammenfatning af dine videnskabelige hovedlinier i det, du har skrevet.

F: Begyndte med jernalderen, men de almindelige vikingebosættelser ændrede billedet. Forfulgte dette, at vikingerne også havde almindelig landsbyliv. Bekendt med Bjarne Stoklund og fik interesse for det arkitekturmæssige. Hvilken identitet der bliver båret med i arkitekturen. Keltisk/irske element, f.ex. er der indikatorer om, at Toftanes var kristent fra begyndelsen. Dette har med politik at gøre mht. ekspansionen i Nordatlanten.

Lsm: Hvilke af dine arbejder har betydning for udførelsen af stillingen?

F: Mit netværk i Nordatlanten, mit videnskabelige overblik over vikinge- og middelaldertid og min erfaring fra området, det er min faglige ballast.

Lsm.: Det faglige og økonomiske ansvar for projekter – hvilke krav stilles der til en projektleder?

F: Du skal have leveret varen for at få forskningsmidler. Dansk Forskningsråd imødekommer to procent af ansøgningerne. Der er ikke flere penge. Men de vurderer ansøgningerne. Er et projekt fundet støtteværdigt, kan man gå andre steder hen med ansøgningen, f.ex. Nordisk Forskningsråd, der er samlet for hele Norden. Man kan også opnå EU-støtte, men det kræver meget at nå gennem korridorerne. Det morer mig at rejse penge.

Lsm.: Kan FMS også skaffe forskningspenge til projekter?

F: Ja, men med samarbejdspartnere, og det vil jeg gøre, for det er en god måde at skaffe kompetence til Færøerne.

Lsm.: Du har lektorkompetence?

F: Ja, har undervist i nordatlantisk arkæologi. Herudover administrativt arbejde, vejledning.

Lsm.: Kunne du undervise her på Færøerne?

F: Ja, man kan også samarbejde med andre lande om undervisningen.

Lsm.: Samarbejde med Søgu- og samfelagsdeildin?

F: Ja, bestemt.

Lsm.: Hvilket kendskab har du til FMS?

F: Jeg kender flere af dem. Kender ikke K og E.

Lsm.: Arbejdsmæssigt kendskab til FMS?

F: Jeg kender ikke den daglige arbejdsgang, men har jævnligt haft kontakt med dem.

Lsm.: Hvad synes du om det faglige niveau?

F: Der mangler lidt aktivitet. Lidt reaktive holdninger. Bygge kompetencer op. I Leirvík var der stor velvilje, man kunne have oprettet et bygdemuseum, men muligheden blev forspildt, hvilket var synd.

Lsm.: Der er muligheder?

F: Ja, man skal gøde jorden.

Lsm.: Hvor synes du færøsk arkæologi er henne – også i nordisk sammenhæng?

F: Der er mangel på publikationer og beretninger over arbejde, der er foretaget. Mange gamle sager kunne samles op, der kun eksisterer på hukommelsesplan. Der bør laves en status, det skal komme op på overfladen. L har dog gjort noget mht. Kvívík. Et problem, at der bliver refereret til udgravninger istedet for rapporter.

Lsm.: Hvad er det første, du ville sætte ind, hvis du fik stillingen?

F: Stille og roligt finde forretningsgangen. Snakke med medarbejderne, motivere dem, få det bedste ud af dem. Putte visionerne ind efterhånden. Lave 4 års strategiplaner, som er almindeligt i Danmark.

Lsm.: FMS er ikke så synlig, respekten, hvordan skabe den?

F: For den brede befolkning altid svare på henvendelser, det er helt basalt, for ellers kommer de ikke igen. Udgravningsindsatsen skal spredes lidt for at vise flaget rund omkring på øerne. Gøre sig synlig for flere, f.ex. er der ikke gravet noget ud på Suðuroy siden Sverri Dahls dage. Et survey får inddraget alle – også befolkningen, amatører, arkæologer m.m.

Lsm.: Museumsfunktionen, f.ex. Reyni, der bor folk hellere end at flytte hele bydelen.

F: Det skal være levende. Der ligger også en diskussion om kulturarvens placering, tænke det ind i helheder.

Lsm.: Og forholdet til identitet?

F: Ja, den historiske interesse er der også hos de unge.

Lsm.: Ja, på Færøerne synger de unge også Kingo og kvæder, men med nyt udtryk. Hvis du bliver ansat, bliver du foretrukket fremfor A. Hvordan har du det med det – har du svært ved det?

F: Jeg har ikke problemer med A, men han har måske med mig. Vi ser anderledes på de faglige ting. Jeg vil gøre alt for at det skal gå. Jeg kunne forestille mig flere modeller, hvor det kunne lade sig gøre.

Lsm.: Situationen kan være svær, der er barrierer?

F: Jeg har tænkt over det, har respekt for det, men er ikke bange for det.

Lsm.: Vi arbejder med visioner. Jeg ser store muligheder for FMS – hvor stor del spiller forskning?

F: Det kommer an på så meget og mange ting. Der er 3-4 akademiske stillinger – de skal have videnskabeligt arbejde, f.ex. 1-3 artikler om året, et antal konferencer m.m. Der skal stilles målsætninger. Så kan der være tunge opgaver, der kræver, at man fredholder hinanden. Det gælder om at skabe rammer, hvor vi kan skaffe eksterne midler og bruge yngre akademiske medarbejdere med vejledning fra de ældre. Dels lave noget selv og dels få andre til også at lave noget for os med eksterne midler.

Lsm.: Hvad er vellykket projekt, hvad er mindre vellykket?

F: Jeg har begge dele, f.ex. på Shetlandsøerne. Jeg mødte op med penge og folk, men kulturmødet var i længden opslidende på grund af forskellem mellem nordiske og britiske traditioner. Jeg har godt samarbejde med Island, som i arkæologisk sammenhæng har vokset sig stort. Graverettighederne er i Island, men de er vant til folk udefra, og man er velkommen ind i det faglige miljø. Fornøjelse at arbejde med dem og der var klare spilleregler.

Lsm.: Der er tale om balancegang mellem det, man vil, og det, som kan lade sig gøre?

F: Det er da klart, det kan ikke undgås. Men jeg har gode erfaringer med små lokaliteter.

Lsm.: Man skal kæmpe for det?

F: Ja, men det er også måden at gøre det. Jeg har færøske venner, og regner med at kunne bruge MMR og personalet på FMS.

Lsm.: Vil du have det svært med at komme ind på et institut?

F: Jeg er vant til feltarbejde og at skaffe fondsmidler, men det slider. Jeg trænger til nogle rammer, og vil det være en god mulighed at få kanaliseret noget til forskningen og institutionen. Jeg vil stadig have noget feltarbejde en gang imellem, se andre landskaber og anden arkæologi, jeg vil ikke slippe mit faglige engagement.

Lsm.: Hvor lang tid vil der gå til at du kan kommunikere på færøsk?

F: Jeg regner med et intensivt kursus. I begyndelsen snakke dansk, men vil tage springet. Forstår færøsk.

Lsm.: Folk er meget glade for, når man prøver at snakke færøsk.

F: Ja. Hvor lang tid, det er svært at sige. Komme over tærskelen.

Lsm.: Formidlingen, har du tanker om det?

F: Siden Mondul har lukket mangler der noget. Der må komme noget efter. Det gælder også om at formidle foreløbige resultater. Vant til at bruge medierne meget også til at formidle til de lokale. Vigtigt at få målrettet fat i ungdommen, holder foredrag på Folkeuniversitet. Det er oplevelsen, giver et kick at formidle. Informationerne på lokaliteterne mangler – de må komme op også turistmæssigt. Jeg er ikke modstander af rekonstruktioner, det kan man godt overveje. Det giver oplevelser, men jeg vil ikke skabe sager ud fra turismehensyn. Hjemmesiden kunne liste op projekter, man er involveret i.

Lsm.: Har du noget at spørge om?

F: Briefing om praksis, forholdet til MMR.

C: Der lægges stor vægt på institutionernes autonomi. Vi prøver at være forbillede f.ex. mht. stillingsbeskrivelser. Lagmandskontoret hjælper også mht. normdannelse.

F: Hvordan mødes de krav?

C: Stillingsbeskrivelserne intet problem, nogen skepsis med personalesamtaler første gang. Ledelsesredskaber har dog vundet indpas.

F: Hvordan med strukturændringerne?

Lsm.: Man har ikke sluppet idéen, der snakkes om rationaliseringer, måske lave noget om i konceptet.

F: Hvordan reagerede personalet?

C: Man har diskuteret det med lederne og personalet. Vi er klar, når lederne er ansat. Når 2003 er omme skal der være ny lovgivning, således at alt det formelle er på plads i 1. januar 2004. Spørgsmål om rationalitet.

Lsm.: Afgørelsen om ansættelsen bliver truffet inden mandag. Det har været svært for mig, men jeg vil helgardere mig.

Fundur liðugur kl. 15.45."

Aftaná samrøðuna við báðar umsøkjararnar hevur landsstýrismaðurin gjørt soljóðandi notat um málið:

**„Setan av landsantikvari**

Endamálið við setanarpolitikki landsins er at tryggja, at umsøkjari verður settur, sum úr einum heildarsjónarmiði er best egnaður til

starvið. Setanarpolitikkurin skal eisini tryggja, at umsøkjarar, ið ikki fáa eitt starv teir hava søkt, kortini kunnu verða vísir í, at viðgerðin er farin fram á rættan og rættvísan hátt.

Starvið sum landsantikvarur varð lýst leyst á søkja á formliga rættan hátt. Inn komu átta umsóknir, og av teimum vóru tvær tiknar burturúr til nærri viðgerðar.

Hesar vóru umsóknirnar hjá A og F.

Setanarbólkurin hevur havt samrøður við hesar báðar umsøkjarar. Eina samrøðu við A og tvær samrøður við F.

Setanarnevndin gjørdu fyrstu innstillingina til starvið 10. desember. Eftir at hava fingið innstillingina, varð setanarnevndini boðað til fundar. Orsøkin var, at eg ikki metti tað vera møguligt, út frá niðurstøðuni í innstillingini at taka avgerð, ið greitt grundgav fyri, hví tann innstillaði skuldi verða settur í starv.

Á hesum fundinum bað eg setanarnevndina gera eina neyvari lýsing av teimum báðum A og F, við atliti at teimum fortreytum, sum settar vóru í starvslýsingini.

Setanarnevndin kom við ískoyti til setanartilmælið 14. januar.

Eftir at hava lisið umsóknirnar og setanartilmælini, varð avgjørt at bjóða teimum báðum umsøkjarunum til eina samrøðu. Til staðar vóru landsstýrismaðurin, aðalstjórin og tveir skrivarar. Endamálið við samrøðuni var at fáa eina greiðari mynd av umsøkjarunum, teirra hugsanum, hugsjónum og ætlanum í samband við starvið sum landsantikvarur.

Samrøðan snúði seg í høvuðsheitinum um:

Føroyska forfrøði í heimligum, norðurlendskum og altjóða høpi.

Umsøkjaranna visjón fyri fornminnissavnið og teirra vísindaliga ástøði

Skipan, innihald og samstarvsmøguleikar á økinum sum heild

Royndir sum kunnu verða við til at menna føroyska fornfrøði og fornminnissavnið

Framtíðarætlanir fyri savnið bæði bygnaðarliga, samfelagsliga og altjóða

Í innstillingini hjá setanarnevndini varð gjørt greitt, at báðir umsøkjararnir eru kvalifiseraðir til uppgávuna sum landsantik-

varur. Í tilmælinum metir setanarnevndin tó út frá ávísum fortreytum, tann eina umsøkjaran verða betri egnaðan til starvi.

Eftir at hava gjølla viðgjørt umsóknir, tilmæli, samrøður og fortreytirnar fyri starvinum er greitt, at mín heildarmetan av umsøkjarunum og teirra kvalifikatiónum er ein onnur enn tann hjá setanarnevdini.

Greitt skal verða nærri frá hesum her.

Eg meti í hesum sambandi, at umframt fortreytirnar í starvslýsingini eigur eisini at verða hugt at, hvørjar avbjóðingar Fornminnisavn Føroya hevur fyri framman. Hetta er neyðugt fyri at nágreina, hvørjir førleikar og eginleikar dentur eisini eigur at verða lagdur á, tá nýggjur landsantikvarur verður settur.

Ein landsantikvarur, ið skal møta hesum avbjóðingum og bera eitt enn meira virkið og sjónligt Fornminnisavn Føroya inn í framtíðina.

Fornminnisavn Føroya skal

- verða stovnur, ið dugir at síggja og nýta teir møguleikar, ið eru í fornfrøðiliga arvinum og gera hesar til ein part av okkara tilvitan.
- hava tætt tilknýti og samstarv við alt frá íbúgvanum í lokalsamfelagnum til granskaran í útlondum.
- geva gransking og vísindaligum arbeiði størri leiklut.
- við greiðum ætlanum vera í fremstu røð bæði í heimligum og altjóða fornfrøðiligum arbeiði.
- í størri mun gerast partur av altjóða granskingarverkætlanum og harvið gera Føroyar sjónligari í altjóða høpi.

Samanumtikið skal Fornminnisavn Føroya støðugt finna nýggjar mátar at varðveita okkara fortíð, í samsvar við okkara nútíð, men við framtíðini í huga.

F hevur:

- Greiðar visjónir fyri framtíðar fornminnisavn Føroya, er málrættaður og kemur við nýhugsan og nýggjum íblástri
- Drúgvar og fjøltáttaðar leiðslu- og granskingarroyndir og hevur avbera góðar fakligar kvalifikatiónir. Nógvu útgávurnar bera eisini boð um eitt umfatandi fakligt virksemi.

- Ein altjóða profil og verður mettur at kunna byggja brýr til útlond – persónliga, fakliga og fíggjarliga.

Vísandi til hetta og út frá einum heildarsjónarmiði verður F settur í starv sum landsantikvarur."

Hóskvøldið, 30. jan. 2003, hevur aðalstjórin sent landsstýrismanninum soljóðandi teldubræv:

„Løgmaður hevur ringt fleiri ferðir fyri at fáa fatur á tær. Hann bað so um at tosa við meg, tá ið hann ikki fekk fatur á tær og bað meg heilsa tær og siga: „Heilsa I og boða henni frá, at eg (løgmaður) havi ringt og sagt, at hon skal halda seg frá at tosa við umsøkjararnar til starvið sum landsantikvarur. Hon skal halda seg til starvsfólkapolitikkin og nýta tilmælið frá setanarnevndini."

Sum sagt so er talan um eina heilsan, sum eg var biðin um at bera víðari. So hervið gjørt.

Eg haldi at tað er best, at tú tosar við løgmann, tí tað er best at tit tosa beinleiðis við hvønn annan og ikki gjøgnum meg."

Við einum ikki-dagfestum skrivi, sum er handað A 4. febr. 2003, hevur landsstýrismaðurin latið honum avgerð sína. Skrivið er soljóðandi:

**„Viðv. setan av landsantikvari**

Setanin av landsantikvari hevur verið eitt ógvuliga trupult mál, sum eisini hevur tikið drúgva tíð at viðgjørt.

Neyðugt er í eini hvørjari setan, at seta tann umsøkjaran í starv, sum út frá einum heildarsjónarmiði er best egnaður til starvið.

Umframt tær fortreytir, ið settar eru í starvslýsingini, meti eg eisini at hugt eigur at verða at, hvørjar avbjóðingar Fornminnisavn Føroya hevur fyri framman. Hetta er neyðugt fyri at nágreina, hvørjir førleikar og eginleikar dentur eisini eigur at verða lagdur á, tá nýggjur landsantikvarur verður settur. Ein landsantikvarur, ið skal møta hesum avbjóðingum og bera eitt enn meira virkið og sjónligt Fornminnisavn Føroya inn í framtíðina.

Fornminnisavn Føroya skal

- verða stovnur, ið dugir at síggja og nýta teir møguleikar, ið eru í fornfrøðiliga arvinum og gera hesar til ein part av okkara tilvitan.
- hava tætt tilknýti og samstarv við alt frá íbúgvanum í lokalsamfelagnum til granskaran í útlondum.
- geva gransking og vísindaligum arbeiði størri leiklut
- við greiðum ætlanum vera í fremstu røð bæði í heimligum og altjóða fornfrøðiligum arbeiði.
- í størri mun gerast partur av altjóða granskingarverkætlanum og harvið gera Føroyar sjónligari í altjóða høpi

Samanumtikið skal Fornminnisavn Føroya støðugt finna nýggjar mátar at varðveita okkara fortíð, í samsvar við okkara nútíð, men við framtíðini í huga.

Eftir at hava gjølla viðgjørt umsóknir, tilmæli, samrøður og fortreytirnar fyri starvinum er greitt, at úr einum heildarsjónarmiði er annar umsøkjari, sum er betur egnaður til starvið.

Boðað skal tí hervið verða frá, at tú ikki hevur fingið starvið sum landsantikvarur hjá Fornminnisavni Føroya.

Tú er vælkomin til eina samrøðu ella kanst tú ringja um tú hevur onkran spurning í hesum sambandi."

Við tíðindaskrivi, dagfest 4. febr. 2003, hevur Mentamálaráðið boðað frá, at landsstýrismaðurin sama dagin hevur sett F í starvið sum landsfornfrøðingur. Tíðindaskrivið er soljóðandi:

**„Tíðindaskriv**

Landsstýrismaðurin í mentamálum hevur í dag sett F í starv sum landsantikvar.

F er 47 ára gamal. Hann hevur útbúgving sum mag. art. í forsøguligari fornfrøði og hevur gjøgnum vísindaligt virksemi vunnið sær førleika innan miðaldarfornfrøði.

F hevur verið leiðari á Gilleleje museum í 4 ár. Herumframt hevur F eina fjølbroytta vísindaliga starvsleið, hann hevur luttikið í fornfrøðiligum rannsóknum í Hetlandi í tíðarskeiðnum 1994 til 1997. Hann hevur eisini tikið lut í fornfrøðiligum rannsóknum

og verkætlanum í Grønlandi, Íslandi, Írlandi og í Føroyum. F hevur verið vísindaligur starvsmaður við lærda háskúlan í Keypmannahavn og Århus og hevur skrivað eina røð av vísindaligum ritgerðum um fornfrøðilig viðurskifti í Útnorði og aðrastaðir.

Meginuppgávan hjá landsantikvarinum er at vera stjóri á Føroya Fornminnissavni, ið er stovnur undir Mentamálaráðnum. Herumframt er landsantikvarurin føddur limur í fornminnisnevndini. Mentamálaráðið er farið undir at dagføra fornminnislóggávuna á savnsøkinum og undir at fyrireika bygnaðarbroytingar á savnsøkinum."

Aðalstjórin í Mentamálaráðnum hevur í telefonsamrøðu 5. febr. 2003 avtalað við F, at hesin skal byrja í starvinum 17. mars 2003.

Við skrivi, dagfest 5. febr. 2003, hevur løgmaður biðið landsstýrismannin um eina frágreiðing um málið. Skrivið er soljóðandi:

„Víst verður til mongu atfinningarnar, ið eru komnir í kjalarvørrinum av, at landsstýrismaðurin í mentamálum ikki fylgdi tilmælum frá einmæltum setanarbólki, tá hann tók avgerð at seta starvið sum landsantikvarur.

Samsvarandi § 33 í løgtingslóg um stýrisskipan Føroya heitir løgmaður á landsstýrismannin um at fáa eina nágreiniliga lýsing av málinum um at seta landsantikvar. Harafturat verður biðið um avrit av viðkomandi skjølum í málinum umframt skrásett skjalayvirlit í teimum málum, ið á nakran hátt hava við nevndu setan at gera.

Løgmaður tekur sum givið, at hetta verður gjørt við atliti at fyrisitingarlógini og lógini um viðgerð av persónsupplýsingum."

Við skrivi, dagfest 10. febr. 2003, hevur Magistarafelag Føroya sent landsstýrismanninum í mentamálum soljóðandi viðmerkingar og spurningar til setanarmálið:

**„Viðvíkjandi setan av landsantikvari**
Nevndin í Magistarafelagnum hevur í samráð við lim okkara, A, viðgjørt viðurskiftini í sambandi við avgerð landstýrismansins í

mentamálum at seta ein annan í starv sum landsantikvar, heldur enn at fylgja einmæltu tilmælunum frá setanarnevndini. Nevndin hevur grundað sína viðgerð m.a. á tey skjølini viðvíkjandi málsviðgerðini, ið A hevur fingið innlit í frá Mentamálaráðnum.

Nevndin vil við hesum gera vart við fylgjandi viðmerkingar og spurningar til málið, sum tilsamans skapa grundarlag fyri, at setanin eigur at verða gjørd til einkis.

**1. Starvslýsingin – mismunur í krøvunum til persónligan førleika í Føroyum og Danmark**

28. september 2002 var lýsing í føroysku bløðunum eftir nýggjum landsantikvari. Eftir avtalu við Mentamálaráðið hevði Magistarafelagið sæð og góðkent hesa lýsing frammanundan í tí líki hon hevði í bløðunum. Felagið varð tó ongantíð kunnað um, at ætlanin var eisini at lýsa starvið á donskum í *Magisterbladet* í Danmark, og fekk felagið heldur ikki donsku lýsingina til viðmerkingar.

17. oktober 2002 stóð lýst á donskum í Magisterbladet, men nú við tveimum ískoytum, sum ikki eru í føroyska lýsingartekstinum. Hetta varnast vit ikki í nevndini fyrr enn hon fær málið til umrøðu eftir at setanin er framd.

Hesi bæði ískoyti eru:

1) Undir yvirskriftini *Personlige kvalifikationskrav* varð tikið við í donsku lýsingina fylgjandi, sum ikki var í føroysku lýsingini:

*…og at lede arbejdet på en sådan måde, at institutionen fortsat har en faglig og forskningsmæssig profil både i det færøske samfund og uden for Færøerne*

2) Undir yvirskiftini *Vit kunnu bjóða/Der tilbydes,* er fylgjandi munur á føroysku og donsku lýsingarnar:

*Eitt fakliga krevjandi starv við nógvum avbjóðingum og samstarvi við aðrar stovnar og myndugleikar*

*En fagligt krævende stilling med mange udfordringer og samarbejde med andre institutioner <u>på og uden for Færøerne</u>* (okkara áherðsla).

Nevndin í Magistarafelagnum kemur til ta niðurstøðu, at munirnir eru so týðandi, at her er í veruleikanum talan um tvær ymiskar lýsingar til sama starv. Ein til føroyskar umsøkjarar og ein onnur til danskar og aðrar møguligar umsøkjarar. Hetta er

valla íkomið av tilvild í týðingini, tí sum tað framgongur av málinum leggur landstýrismaðurin í mentamálum serligan dent júst á fyrra av hesum ískoytum.

**2. Setanartilgongdin – skiftandi grundarlag fyri viðgerð**

Hesin mismunur millum føroysku og donsku lýsingarnar hevur frá byrjanini havt við sær, at umsøkjararnir hava søkt starvið og fyrireikað seg til setanarsamrøður undir ymiskum fortreytum.

Harumframt vísir setanartilgongdin, at fortreytirnar fyri setanina eru meira og annað enn tað, sum gongur fram av starvslýsingunum. Tað vísir seg, at landsstýrismaðurin sjálvur arbeiðir út frá nøkrum fortreytum, sum ikki eru orðaðar í starvslýsingunum, og sum ikki koma fram í ljósið fyrr enn eftir at avgerðin er tikin. Tær verða útgreinaðar í brævi frá landsstýrismanninum til A, tá hann fær boð um, at hann ikki hevur fingið starvið. Tað tykist eftir setanartilgongdini at døma, sum at setanarnevndin heldur ikki hevur verið kunnað um, hvørjar fortreytir og framtíðarætlanir landsstýrismaðurin hevur havt fyri starvið.

Tá ið landsstýrismaðurin tann 20. desember 2002 biðjur setanarnevndina um at útgreina sína innstilling frá 10. desember ynskir landstýrismaðurin, at setanin skal bera boð um, hvat Mentamálaráðið ætlar og vil við Føroya Fornminnissavni, og hvør framtíðar uppgávan og avbjóðingin verður hjá tí komandi landsantikvarinum.

Starvslýsingin, sum er grundarlagið undir arbeiðinum hjá setanarnevndini, lýsir uppgávurnar hjá Føroya Fornminnissavni sambært galdandi lógum á økinum í dag. Starvslýsingin gevur ongar ábendingar um, hvørjar framtíðarætlanir landsstýrismaðurin hevur fyri Føroya Fornminnissavn og hevur hetta heldur ikki verið grundarlag undir samrøðuni, A hevði við setanarnevndina tann 22. november 2002.

Í sínari útgreining dagfest 14. januar 2003 viðger setanarnevndin tey lýstu krøvini til fakligan førleika, leiðslu og samstarvsevni, evni at starvast sjálvstøðugt og miðvíst, at ganga nýggjar leiðir og royna nýggjar avbjóðingar. Harumframt tekur setanarnevndin, eftir serligum boðum frá landstýrismanninum, støði í tí persónliga førleikakravinum, sum lagt varð afturat í donsku lýsingini, nevn-

liga, „evni at leiða arbeiðið á slíkan hátt, at Føroya Fornminnissavn framhaldandi hevur ein fakligan og granskingarligan profil í føroyska samfelagnum og uttan fyri Føroyar."

Hóast A ikki kendi hetta krav tá hann søkti starvið, kemur setanarnevndin kortini til ta niðurstøðuna, at hann er „best egnaður til at røkja starvið sum landsantikvarur, sæð út frá tí, sum starvið fevnir um og ætlandi fer at fevna um framyvir." Ein samd setanarnevnd leggur afturat í niðurstøðu síni: „Eftir at hava røtt um málið av nýggjum og sett seg í samband við fleiri tilvísingar, er støðan vorðin uppaftur greiðari. A er sum heild betri egnaður, tí hann hevur góðar fakligar fortreytir, hevur fleiri og meira viðkomandi leiðsluroyndir og hevur betri persónligar eginleikar."

Tá A tann 24. januar 2003 fær munnliga fráboðan frá aðalstjóranum um at koma til samrøðu við landsstýrismannin tann 29. januar 2003, fær hann ikki greitt at vita frammanundan, at talan í veruleikanum er um eina nýggja setanarsamrøðu. Undir sjálvari samrøðuni við landsstýrismannin henda dag fær A heldur ikki greitt at vita, hvørjar framtíðarsjónir landsstýrismaðurin sjálvur hevur fyri Føroya Fornminnissavn.

**3. Grundgevingin – óupplýstar fortreytir fyri starvið**

Nevndin í Magistarafelagnum góðtekur ikki grundgevingina hjá landsstýrismanninum fyri, hví A ikki hevur fingið starvið. A hevur ikki fingið at vita í grundgevingini, hví førleikin hjá tí, ið settur er í starvið svarar betur til settu krøvini, enn førleikin hjá sær, eitt nú viðvíkjandi útbúgving, starvsroyndum, persónligum eginleikum og starvsvilja.

Grundgevingin hjá landsstýrismanninum verður sett fram í einum skrivi til A, ið er ódagfest, ikki journaliserað, ikki undirskrivað av einum embætismanni, og heldur ikki á alment brævpappír hjá Mentamálaráðnum.

Í hesum skrivi stendur, at umframt tær fortreytir, sum eru í starvslýsingini, eru aðrar fortreytir fyri virkseminum hjá Føroya Fornminnissavni, sum landsstýrismaðurin leggur stóran dent á, men sum hvørki hava verið við í starvslýsingunum, setanarsamrøðum ella alment kunngjørdar sum framtíðarpolitikkur hjá

landsstýrismanninum. Hesar nýggju fortreytirnar tykjast kortini so mikið ítøkiligar, at spyrjast kann, hví tær fyrst koma fram í ljósið eftir at sentanaravgerðin er tikin. Landsstýrismaðurin sigur í skrivinum til A at Føroya Fornminnissavn m.a. skal:

- geva gransking og vísindaligum arbeiði størri leiklut
- í størri mun gerast partur av altjóða granskingarverkætlanum og harvið gera Føroyar sjónligar í altjóða høpi

Slíkar raðfestingar hava við sær størri broytingar og avleiðingar fyri framtíðarskipanina av savnsvirksemi í mun til verandi støðuna, sum grundað er á galdandi lógir á fornminna- og savnsøkinum í Føroyum í dag.

Landsstýrismaðurin skrivar, at eftir gjølla at hava viðgjørt umsóknir, tilmæli, samrøður og fortreytir fyri starvinum er greitt, at úr einum heildarsjónarmiði er annar umsøkjari, sum er betur egnaður til starvið. Trupulleikin er, at heildarsjónarmiðið hjá landsstýrismanninum hevur týðuliga ikki verið grundarlagið í setanartilgongdini, men kemur fyrst til sjóndar eftir at avgerðin er tikin. A hevur ikki havt møguleikar at fyrihalda seg til hesi sjónarmiðini í heildarviðgerðini.

Síðani ynskir nevndin at gera vart við, at A hevur tey seinastu árini í fleiri tíðarskeið, tilsamans fýra ár og fimm mánaðar, virkað sum settur landsantikvarur. Hetta hevur verið ein sera trupul tíð fyri stovnin og setta leiðaran.

Orsakirnar til hesa støðu eru í høvuðsheitum at finna í eini vánaligari viðferð og umsiting av stovninum hjá tí til eina og hvørja tíð sitandi landstýrismanni í mentamálum. Nevndin sær ikki, at leiðsluroyndirnar, A hevur vunnið sær undir hesum viðurskiftum á nakran hátt eru komnar honum til góðar í heildarviðgerðini hjá landstýrismanninum, og ei heldur at tað alment verður roknað honum til fyrimun at hava leitt tann stovn, hann hevur søkt fast leiðarastarv á.

Í hesum sambandi verður víst á niðurstøðuna hjá setanarnevndini í fyrstu instillingini tann 10 desember 2002, har fylgjandi verður tikið fram:

*Føroya Fornminnissavn hevur ikki ment seg nóg væl seinastu árini, men eftir nevndarinnar meting, stava hesi viðurskifti helst frá*

*tí ótrygd honum [t.e. AJ hevur verið fyri sum fyribilsettur leiðari, og at ein fastari setan kann broyta hesi viðurskifti.*

Sum fyribilssettur landsantikvarur hevur A í longri tíð og fleiri ferðir gjørt vart við sítt ynski at viðgera viðurskiftini á fornminnissavninum saman við landsstýrismanninum í mentamálum, men uttan úrslit.

**Samanumtikið**

Grundleggjandi í endamálsorðingini í setanarpolitikki landsins er at tryggja, at viðkomandi stovnur setir umsøkjara, ið úr einum heildarsjónarmiði er best egnaður til starvið. Útgangsstøðið fyri at gera eina heildarmeting av umsøkjarunum er, at leiðslan frammanundan hevur gjørt sær greitt, hvat innihaldið í starvinum er, og hvørji krøv verða sett til tann, sum skal røkja starvið. Sum víst er á omanfyri, metir nevndin ikki, at politiska leiðslan í mentamálaráðnum, sum einsamøll hevur mett um umsøkjararnar av nýggjum, frammanundan hevur gjørt sær hetta greitt.

Við støði í nevndu viðmerkingunum, er niðurstøðan hjá nevndini í Magistarafelagi Føroya, at limur okkara A, ikki kann „vera vísur í, at viðgerðin/avgerðin er farin fram á rættan og rættvísan hátt“, soleiðis sum endamálið í setanarpolitikkinum er lýst.

Magistarafelag Føroya krevur tí at setan landstýrismansins av landsantikvari verður annullerað.“

Við skrivi, dagfest 10. febr. 2003, hevur landsstýrismaðurin svarað Magistarafelag Føroya soleiðis:

„Landsstýrismaðurin váttar móttøkuna av skrivi Magistarafelagsins, dagfest 10. februar 2003, viðvíkjandi setan av landsantikvari.

Landsstýrismaðurin takkar fyri nevnda skriv, og fer við hesum at royna at fáa burtur tær misskiljingar, sum tíverri eru komnar fram í sambandi við setanina av nýggjum landsantikvari, sum fór fram her fyri.

Vísandi til hetta eru hesar viðmerkingar at gera til skriv tykkara:

Viðvíkjandi fyrsta høvuðspunktinum **„Starvslýsingin – mismunur í krøvunum til persónligan førleika í Føroyum og Danmark“** er serliga at viðmerkja í sambandi við undirpunktini 1) og

2), at tað er ein lítil munur á føroysku og donsku lýsingini; men mett verður ikki, at hetta hevur tann týdning, sum førdur er fram í skrivi tykkara. Gjørt verður samstundis vart við, at limur Magistarafelagsins, A, hevur havt donsku lýsingina til kunningar og ummælis.

Nakrar av teimum viðmerkingum, sum A í hesum sambandi hevur sent Mentamálaráðnum í telduposti, áðrenn lýsingin varð send „Magisterbladet" hevur Mentamálaráðið tikið til eftirtektar. Um Magistarafelagið er áhuga fyri tí, er einki til hindurs fyri, at felagið fær fotoavrit av hesum samskifti millum A og Mentamálaráðið.

Av hesum samskifti kann Magistarafelagið verða sannført um, at A ongar viðmerkingar hevði til júst tann munin á føroysku og donsku lýsingini, sum Magistarafelagið førir fram í skrivinum frá 10. februar 2003 – og ger til eitt aðalpunkt í øllum hesum máli. A er kunnaður um hetta, og hann hevur ongar viðmerkingar gjørt til júst henda partin av orðingini í donsku lýsingini.

Sostatt hevur A ikki søkt undir skeivum fortreytum ella annarleiðis fortreytum enn F.

Við hesum verður vónað, at umrødda misskiljing er burturbeind.

Viðvíkjandi høvuðspunkti 2 **„Setanartilgongdin – skiftandi grundarlag fyri viðgerð"** er at siga, at tað sum er ført fram omanfyri, fyri ein stóran part tekur støðið undan tí, sum Magistarafelagið førir fram undir nevnda høvuðspunkti 2.

Tó er neyðugt at gera vart við, at landsstýrismaðurin sjálvandi ikki arbeiðir út frá duldum fortreytum – men við tí fyri eyga at seta seg so væl inn í málið sum gjørligt til tess, at setanin kann verða framd á tryggan hátt – og soleiðis, at allir umsøkjarar kunnu vera vísir í, at teirra umsókn er viðgjørd rættvíst. Alt er tí gjørt við støði í tí setanarpolitikki, sum var galdandi, tá setanin av landsantikvari var framd.

Tá ið aðalstjórin tann 24. januar 2003 boðaði A at koma á fund við landsstýrismannin tann 29. januar 2003, varð m.a. sagt, tá A spurdi um, hvussu hann skuldi fyrireika seg, at landsstýrismaðurin ynskti at tosa um starvið sum heild – og tí var tað skilagott at fyrireika seg út frá m.a. starvslýsingini, t.v.s. at fyrireika seg sum

um talan var um eina setanarsamrøðu. Tí má Mentamálaráðið vísa aftur, at A ikki var vitandi um, hvat samrøðan fór at snúgva seg um.

Viðvíkjandi høvuðspunkti 3 **„Grundgevingin – óupplýstar fortreytir fyri starvið"** er at siga, at ætlan landsstýrismansins bert hevur verið at fáa lýst málið so væl sum gjørligt, fyri at fremja eina haldgóða setan.

Viðvíkjandi skrivinum, sum landsstýrismaðurin handaði A tann 4. februar 2003, so sum nevnt er í skrivi felagsins, er at siga, at nevnda skriv er dagsett og journaliserað í málinum eftir, at A fekk tað handað av landsstýrismanninum.

Vísandi til omanfyristandandi verður hervið sagt frá, at landsstýrismaðurin í Mentamálum ikki kann ganga kravi Magistarafelagsins á møti um, at setanin av landsantikvari verður annulerað.

Samanumtikið er landsstýrismaðurin sera harmur um, at persónsmál verða viðgjørd í almenninginum, og serstakliga óheppið er tað, at einstøk skjøl í einum drúgt viðgjørdum máli, verða drigin fram alment og nýtt til niðurstøður, sum ikki kunnu byggja á eina heildarmeting av málinum.

Tí vil eg hervið heita á Magistarafelagið um at kæra málið til Løgtingsins Umboðsmann, soleiðis, at ein óheft meting, grundað á alla málsgongdina og øll skjøl í málinum, kann gerast."

Við skrivi, dagfest 11. febr. 2003, hevur Mentamálaráðið sent teimum umsøkjarunum, sum ikki vóru innkallaðir til samrøðu, soljóðandi fráboðan:

„Under henvisning til deres ansøgning om stillingen som landsantikvar på Færøernes Nationalmuseum skal der hermed meddeles, at stillingen er blevet sat til anden side af ansøger, som foruden de faglige kvalifikationskrav også har lang erfaring indenfor området.

Mentamálaráðið takker for Deres interesse."

Við skrivi, dagfest 12. febr. 2003, er setanarskriv sent F til undirskrivingar.

Við skrivi, dagfest 13. februar 2003, hevur landsstýrismaðurin sent løgmanni soljóðandi skriv:

> **„Frágreiðing frá landsstýrismanninum um viðgerð, grundgevingar og niðurstøður í málinum um setan av landsantikvari.**
> Vísandi til hjálagda skriv við lýsing av málsgongdini og tilhoyrandi skjølum, skal undirritaða hervið greiða frá og grundgeva fyri teimum stigum og avgerðum, sum landsstýrismaðurin hevur tikið í málinum um setan av landsantikvari.
>
> Samstundis vísi eg til viðmerkingarnar í hjálagda skrivi um ásetingarnar í fyrisitingarlógini um persónsupplýsingar og biði um, at hetta skriv verður viðgjørt samsvarandi teimum ásetingunum.
>
> **1. Saklig, grundgivin viðgerð og tagnarskylda**
> Við hesum skal verða sligið fast, at allar avgerðir og øll stig hjá mær í málinum hava bygt á atlitini til mína ábyrgd sum landsstýrismaður fyri fyrisitingini og fyri einum starvsetanarmáli sum hesum.
>
> Eg skilji og kenni tað sum mína fremstu ábyrgd, at umsøkjarar til størv kunnu kenna seg tryggar við viðgerð og avgerð, og at landsstýrismaðurin skal tryggja:
>
> - At ásetingarnar og grundreglurnar í fyrisitingarlógini verða hildnar og góður fyrisitingarsiður annars.
> - At saklig, grundgivin, óheft, gegnig og eins viðgerð fer fram við skjalfestan av málsgongdini og tagnarskyldu – og við høvuðsdenti á rættindi umsøkjaranna.
> - At leiðreglurnar í almenna setanarpolitikkinum hjá Løgmansskrivstovuni verða fylgdar. Hóast hetta ikki varð ásett, í galdandi setanarpolitikki, havi eg gjørt av at grundgeva mótvegis umsøkjara, sum avgerðin ikki gongur á møti – vísandi til fyrisitingarlógina § 21. Beint eftir, at avgerðin varð tikin um setanina av landsantikvari, varð dagførdur setanarpolitikkur kunngjørdur á heimasíðu Løgmansskrivstovunnar, sum eisini umrøður grundgeving mótvegis umsøkjara, ið ikki verður settur í starv. Eg hevði tó longu tikið hesa avgerð við støði í fyrisitingarlógini.

Løgmaður vísir í sínum skrivi til landsstýrismannin „til mongu atfinningarnar, ið eru komnar í kjalarvørrinum av, at landsstýrismaðurin í mentamálum ikki fylgdi tilmælinum frá einmæltum setanarbólki, tá hann tók avgerð at seta starvið sum landsantikvarur."

Við hesum sipar løgmaður helst til ta almennu umrøðuna, sum alt málið og tveir umsøkjarar til starvið hava fingið.

Til hetta er at siga, at undirritaða hevur fingið nógvar atfinningar og ákærur í almenninginum av hesum máli. Undirritaða hevur sjálvsagt lagt dent á ikki at viðgera persónsspurningar alment og hevur víst á sína tagnarskyldu og heildarmetingarnar í málinum.

Í sambandi við atfinningar og ákærur, skal eg nýta høvi at boða løgmanni frá skrivliga, at undirritaða ikki hevur nakran beinleiðis ella óbeinleiðis kennskap ella forhondskunnleika til nakran umsøkjara, og at eg sjálvsagt ikki havi lagt politisk, persónlig ella onnur óviðkomandi atlit til grund í míni viðgerð og avgerð í málinum.

Eg meti tað sera álvarsamt, at eitt slíkt mál, ið snýr seg um persónar og privat viðurskifti, verður viðgjørt í fjølmiðlunum og almenninginum við støði í ymsum upplýsingum og skjølum, sum verða nýtt til at gera ávísar niðurstøður um málið og um umsøkjarar til starvið.

Hetta er til stóran bága fyri rættartrygdina hjá persónum, ið hava søkt starvið við áliti á fyrisitingarligu mannagongdunum, og harundir ikki minst tagnarskyldu og verju av upplýsingum. Og tað er sjálvsagt til stóran bága fyri álitið á almennu fyrisitingina.

Eg harmist almikið um, at persónar, ið hava søkt starvið, á henda hátt eru drignir gjøgnum eina almenna viðgerð, ið ikki byggir á rættartrygd og integritet, sum øllum eigur at verða tryggjað. Eitt setanarmál byggir á eina fyrisitingarliga gongd og á eina heildarmeting – og tí kunnu slíkar almennar viðgerðir, við gitingum og umrøðu av staklutum, ongantíð elva til annað enn ótryggleika hjá øllum pørtum í málinum.

Eg havi tí tikið stig til at kanna, hvussu upplýsingar, ið eru fevndir av tagnarskyldu, eru komnir á skeivar hendur.

## 2. Byrjanin í málsgongdini

Sum lýst í uppritinum um málsgongdina, verður lýsingin og setanarviðgerðin av landsantikvari byrjað sum onnur mál av slíkum slag.

Landsstýrismaðurin og aðalstjóri tosa um, at tørvur er á at fáa sett landsantikvar í fast starv, so uppgávurnar hjá landsantikvarinum og Fornminnissavninum kunnu mennast undir greiðum kørmum.

Gjørt verður av at lýsa starvið leyst bæði í og uttanfyri Føroyar. Umsóknir koma inn, setanarnevnd verður sett, viðgerð og samrøður verða gjørdar o.s.fr.

Landsstýrismaðurin tekur ikki avgerðir í hesum parti av málsgongdini. Hann verður kunnaður um, at arbeiðið gongur sína gongd, og bíðar annars eftir, at málið er búgvið til støðutakan, tá setanarbólkurin er liðugur við arbeiði sítt.

## 3. Fyrsti leiklutur landsstýrismansins í málsgongdini

Fyrsti partur hjá landsstýrismanninum í setanartilgongdini er, tá aðalstjórin kunnar landsstýrismannin um, at tveir umsøkjarar eru kallaðir til samrøðu. Umsóknirnar við CV frá hesum báðum (A og F – hereftir A og F) verða vístar landsstýrismanninum. Eg meti tá, at báðar umsóknirnar vísa tveir kvalifiseraðar umsøkjarar, harav annar tykist at hava sera fjølbroyttar starvs-, granskingar- og útgávuroyndir at vísa á úr ymsum londum. Eg lati tá eitt orð falla um, at „henda umsóknin sær spennandi út".

Stutt eftir hetta, tá setanarnevndin hevur arbeitt víðari í viðgerðini, verði eg munnliga frá aðalstjóranum gjørd varug við hetta: Annar av umsøkjarunum (F), ið setanarnevndin metir hava góðar kvalifikasjónir til starvið, verður sagdur at hava alkoholtrupulleikar, ið gera hann ógnaðan til starvið og hartil, at ivasamt er við leiðsluførleika hansara.

Hetta skelkaði meg ikki sørt at hoyra, tí eg havi sum landsstýrismaður sjálvsagt ábyrgd av at tryggja øllum umsøkjarum fullgóða og sakliga viðgerð sambært fyrisitingarlógini. Og at slíkir upplýsingar vórðu givnir mær munnliga, áðrenn málsviðgerðin hjá setanarnevndini varð liðug og handað mær, gjørdu meg sera ótryggan við gongdina.

**4. Stig hjá landsstýrismanninum í málinum, atvoldir og grundgevingar fyri hesum.**

Eg gjørdi tí av at spyrja aðalstjóran, hvørjar upplýsingar ella skjøl í málinum lógu til grund fyri hesi meting. Aðalstjórin vísti til telefonsamrøðu við viðmælispersón (referencu) hjá umsøkjaranum. Eg bað tá um, at hoyra hesa skjalfestan, saman við øllum øðrum aktum í málinum, tá setanarnevndin varð liðug við arbeiði sítt. Sum sæst í skjølunum stóðst ávísur tvídráttur um hetta millum aðalstjóran og landsstýrismannin.

Grundgevingarnar hjá mær fyri hesum stigi vóru m.a.:

- at eg metti tað sum eina so álvarsliga ákæru fyrisitingarliga og setanarpolitiskt, at eg vildi tryggja mær, at grundgivnar, sakligar metingar og skjalfestan av slíkum lá til grund.
- at eg hevði grundaðan iva um, hvørt hetta kundi ávirka møguleikan hjá mær at taka eina grundaða, sakliga avgerð uttan at hava kannað øll skjøl og tilfar í málinum.

Tá tilmælið hjá setanarnevndini varð handað 10. december 2002 og eftir at hava havt møguleika at hoyrt telefonsamrøðurnar við viðmælispersónarnar (referencu), undraðist eg stórliga á grundgevingarnar og dokumentasjónina í tilfarinum. Eg kundi gera hesar niðurstøður:

- At telefonsamrøðan, sum víst hevði verið til sum grundarlag fyri ákæruni móti F, innihelt onki yvirhøvur, ið gav grundarlag fyri ivamálunum, sum vórðu reist um persónligu viðurskiftuni og leiðslueginleikarnar hjá F. Hinar referencurnar góvu heldur ikki grundarlag fyri øðrum enn góðum viðmælum til F.
- At umsóknirnar, CV, referencur o.a. framvegis vístu tveir fakliga væl kvalifiseraðar umsøkjarar. A hevði eitt nú góð viðmæli, ymsar royndir í gransking og royndirnar sum leiðari á Fornminnissavninum. F hevði góð viðmæli, fjølbroyttar arbeiðsroyndir í ymsum londum á okkara leiðum, stórt granskingar- og útgávutilfar at vísa á, arbeiðsroyndir í Føroyum og kunnleika til Fornminnissavnið. Á pappírinum metti eg heilt greitt, at F hevði bestu kvalifikasjónirnar.
- At setanarnevndin við serstakliga sparnum grundgevingum einmælt innstillaði A fram um F.

- At eg undrist stórliga á, at í eini innstilling hjá setanarnevndini, har tveir á pappírinum kvalifiseraðir umsøkjarar eru, er ikki grundgivið ella mett um ymiskar styrkir og fyrimunir hjá báðum umsøkjarum til tess at røkja uppgávurnar hjá landsantikvarinum og at menna Fornminnissavnið frameftir. Viðurskifti, sum eg meti sum heilt natúrligur partur av einum slíkum starvi, og sum er partur av eini heildarmeting um eginleikar og førleikar.
- At eg við tilmælinum frá setanarnevndini havi ongar møguleikar at taka eina grundgivna støðu sum landsstýrismaður um, hvør er best skikkaður. Tað tykir mær, sum at tilmælið hevur læst mínar møguleikar at viga og grundgeva fastar.
- At í málinum var ongin frágreiðing frá starvsamrøðunum, sum setanarnevndin hevði havt við umsøkjarannar – uttan ein stutt frágreiðing frá 2. samrøðu við F, sum fór fram í Keypmannahavn, har ikki allir limir í setanarnevndini tóku lut. Í hesi frágreiðing gongur fram, at beinleiðis varð spurt um áðurnevndu ákærur viðvíkjandi alkoholmisnýtslu. Fundarfrágreiðingin vísir eftir mínum tykki, at tað er sera ivasamt um ein objektiv og saklig meting verður gjørd, og frágreiðingin sigur onki um, hvørjar møguleikar umsøkjarin hevur at fyrireika seg ella svara slíkum álvarsomum spurningum.

Eftir hetta stendur tað mær greiðari enn áður, at eg standi við einum serstakliga truplum máli sum landsstýrismaður, har eg havi grundaðan iva um, at mismunur verður gjørdur á umsøkjarum uttan nakra sakliga grundgeving.

Sum ovasti fyristingarligi leiðari í Mentamálaráðnum meti eg tað sum mína skyldu at gera nakað við hetta, og at fáa staðfest, hvørt aðrar grundgevingar ella mær ókunnug atlit kunnu liggja í metingini hjá setanarnevndini.

Tí boði eg 20. desember 2002 frá, at eg ynski at fáa eitt munandi dyggari grundarlag at taka støðu út frá. Skrivliga vísi eg á, hvat eg ynski at fáa greiðari grundgevingar frá setanarnevndini um. Samstundis tryggi eg mær, at umsøkjararnir fáa boð um, nær avgerð kann væntast at vera endaliga tikin.

Eg havi eisini fund við setanarnevndina, har vit skifta orð um málið.

Tann 14. januar 2003 fái eg ískoytistilmæli frá setanarnevndini. Aftur er niðurstøðan, at setanarnevndin einmælt innstillar A. Men framvegis er ongin gjøllari viðgerð av styrkjum og fyrimunum hjá báðum umsøkjarunum. Og framvegis er onki í ískoytistilmælinum sum avsannar ella útgreinar, at óskjalfestu ákærurnar um persónligu viðurskiftini hjá hinum A eru komnar honum til ófyrimuns í viðgerðini.

Eg geri tí av, at til tess at rudda hetta ivamál av vegnum og at tryggja, at kvalifikasjónir og ikki óskjalfestar ákærur liggja til grund fyri eini starvssetan, geri eg av, at eg ynski sjálv at tosa við umsøkjararnar.

Eg eri greið um, at hetta er ikki vanligt stig, og fái eisini frámæli frá aðalstjóranum at gera hetta. Tí vendi eg mær til løgmansstjóran at spyrja meg fyri um setanarpolitikk, og hvørt eg fari út um nakra heimild sum landsstýrismaður. Niðurstøðan sæst í skjalatilfarinum.

Síðani fara samrøðurnar við báðar umsøkjararnar fram í Mentamálastýrinum. Eg leggi dent á, at fáa styrkirnar hjá umsøkjarunum fram, at spyrja um menningarætlanir fyri Fornminnissavnið og fornfrøðiliga arbeiðið og at fáa egna sjón fyri, um nakað grundarlag er fyri teimum ivamálum og ákærum, sum í viðgerðini uttan iva hava verið til ófyrimuns fyri annan umsøkjaran.

Fundarfrágreiðingar frá samrøðunum verða skrivaðar.

## 5. Niðurstøður og avgerð landsstýrismansins

Eg meti, eftir samrøðurnar framvegis, at báðir umsøkjarar eru kvalifiseraðir og koma væl frá samrøðunum. Eg meti, at A hevur styrkir við sínum royndum og kunnleika til stovnin og starvsfólkini. Og eg meti, at F hevur styrkir við altjóða samstarvi, gransking, útgávuvirksemi og hevur áhugaverdar hugsanir um menningarmøguleikarnar hjá Fornminnissavninum – eisini við atliti til samstarv við lokaløkini í landinum. Eg meti greitt, at ákærurnar um F kunnu ikki sakliga grundast – hvørki við støði í skrivliga ella munnliga tilfarinum.

Tí geri eg so mína heildarmeting, har skrivligt tilfar í málinum um kvalifikasjónir talar til fyrimuns fyri F og at samrøða og

meting um styrkir hjá umsøkjarum eisini tala til fyrimuns fyri F. Eg havi ikki lagt dent á nakað, sum talar til ófyrimuns fyri A.

Við hesum meti eg meg eisini at hava tikið neyðug stig til tess at viga upp ímóti tí ófyrimuni, ið F hevur havt í setanarviðgerðini. Eg eri í teirri heldur løgnu støðu, at næstu embætismenn eru limir í setanarnevndini, og tí skrivi eg sjálv mína niðurstøðu og grundgevingar, og velji eisini at skriva eina grundgeving til A við støði í § 21 fyrisitingarlógini.

**Eftirmeting**

**Eg havi valt at viðgera og avgreiða hetta málið sum eitt fyrisitingarligt mál fyri seg. Eitt sera trupult mál, har eg havi lagt dent á mína ábyrgd sum landsstýrismaður at tryggja eina fyrisitingarliga haldgóða viðgerð og at taka neyðug stig mótvegis álvarsomum skeivleikum.**

Men greitt er, at álitisviðurskiftini millum meg og næstu fyrisitingina eru skeiklað og at hetta málið krevur álvarsligar eftirmetingar av skeivleikum og óhepnum mannagongdum.

- Sum áður nevnt havi eg biðið um eina kanning av, hvussu tagnarskyldan er hildin í hesum málinum.
- Mannagongdirnar viðvíkjandi setanarnevndum, skjalprógvan, uppritsskyldu o.ø. skulu endurskoðast og styrkjast álvarsliga.
- Eg umhugsi í løtuni, hvørji onnur stig skulu takast fyrisitingarliga í málinum.“

Við skrivi, dagfest 14. febr. 2003, hevur Magistarafelag Føroya sent landsstýrismanninum í mentamálum soljóðandi svar uppá skriv hansara, dagfest 10. febr. 2003:

**„Viðvíkjandi svarinum frá landstýrismanninum um setan av landsantikvari**

Nevndin í Magistarafelag Føroya takkar fyri svarið frá landsstýrismanninum í mentamálum til bræv okkara tann 10. februar 2003. Svarið frá landsstýrismanninum er dagfest 10. februar og sent undirritaðu tann 12. februar.

Eins og landsstýrismaðurin, harmast nevndin í Magistarafelagnum eisini um, at eitt persónsmál av hesum slagi verður viðgjørt

alment. Nevndin hevur hvørki ætlanir ella ynski um at viðgera fakligan ella persónligan førleika hjá umsøkjarunum til starvið sum landsantikvarur.

Hinvegin metir nevndin, at málið hevur prinsipiellan týdning í mun til starvsetanarpolitikkin sum heild, ikki bert fyri tann einstaka limin hjá felagnum, men fyri allar limir felagsins. Sum fakfelag vilja vit sjálvsagt hava vissu fyri, at setanir á almenna starvsøkinum hjá okkum verða framdar á tryggan hátt. Vit loyva okkum framvegis at ivast í, at setanartilgongdin í hesum máli hevur lokið hetta grundleggjandi kravið. Nevndin er eisini ónøgd við, at landsstýrismaðurin ikki hevur svarað tí, sum vit halda er tað mest umráðandi í hesum máli.

Í hesum sambandi vísa vit serliga aftur á punkt 3 í okkara brævi frá 10. februar, har komið er inn á munin millum starvslýsingarnar (báðar) og grundgevingina hjá landsstýrismanninum til A fyri, hví hann ikki hevur fingið starvið. Landsstýrismaðurin tekur fram í sínum brævi til A, at egna viðgerðin av setanini byggir eisini á aðrar fortreytir, ið ikki vóru settar í starvslýsingini:

*„Umframt tær fortreytir, ið settar eru í starvslýsingini, meti eg eisini at hugt eigur at vera at, hvørjar avbjóðingar Føroya Fornminnissavn hevur fyri framman. Hetta er neyðugt fyri at nágreina, hvørjir førleikar og eginleikar dentur eisini eigur at verða lagdur á, tá nýggjur landsantikvarur verður settur…"*

Síðani eru hugsjónir landsstýrismansins fyri framtíðar virksemið hjá Føroya Fornminnissavni útgreinaðar í hesum fimm punktum:

- *verða stovnur, ið dugir at síggja og nýta teir møguleikar, ið eru í fornfrøðiliga arvinum og gera hesar til ein part av okkara tilvitan.*
- *hava tætt tilknýti og samstarv við alt frá íbúgvanum í lokalsamfelagnum til granskaran í útlondum.*
- *geva gransking og vísindaligum arbeiðið størri leiklut*
- *við greiðum ætlanum vera í fremsta røð bæði í heimligum og altjóða fornfrøðiligum arbeiði.*
- *í størri mun gerast partur av altjóða granskingarverkætlanum og harvið gera Føroyar sjónligari í altjóða høpi"*

Her er sostatt í roynd og veru talan um eitt heilt annað starv enn tað, sum lýst varð.

Grundgevingin hjá landsstýrismanninum og tilgongdin sum heild hevur fleiri spurningar við sær:

- Hví eru raðfestingarnar hjá landsstýrismanninum fyri virksemi savnsins ikki frammanundan útgreinaðar í starvslýsingini og tískil gjørdar til ein týðandi part av samrøðunum, sum setanarnevndin hevði við umsøkjararnar tann 22. november 2002?
- Tá ið landsstýrismaðurin kallar báðar umsøkjararnar innaftur til samrøðu tann 29. januar 2003, hví eru hesar ætlanir fyri savnið ikki gjørdar A kunnugar áðrenn samrøðuna? Sum tað framgongur av svarskrivinum tann 10. februar, fekk A at vita at tað var „…skilagott at fyrireika seg út frá m.a. starvslýsingini…“
- Hvør er fakligi førleikin hjá landsstýrismanninum at meta um granskingar- og vísindaligan førleika hjá nýggjum landsantikvari? Tað framgongur av skjølunum í málinum, at spurt varð á samrøðuni m.a. um útbúgving, undirvísingar- og granskingarroyndir.
- Tá ið landsstýrismaðurin ikki er nøgdur við fyrsta tilmælið hjá setanarnevndini frá 10. desember 2002, útgreinar setanarnevndin tilmælið av nýggjum við støði í teimum samrøðum, setanarnevndin hevði við umsøkjararnar tann 22. november 2002. Tá ið tað er vorðið landsstýrismanninum greitt, at atlit ikki er tikið í teimum fyrstu samrøðunum til alt grundarlagið fyri setanina, sum landsstýrismaðurin ynskir lýst, hví er starvið ikki lýst av nýggjum og ein nýggj setanarnevnd sett, sambært nýggju fortreytirnar hjá landstýrismanninum?

Framtíðar virksemið hjá savninum, sum landsstýrismaðurin leggur stóran dent á í sínari grundgeving til A, inniber m.a. at geva gransking og vísindaligum arbeiði størri leiklut, og í størri mun gerast partur av altjóða granskingarverkætlanum. Nevndin metir, at til tess at tryggja sær flest møguligar royndar umsøkjarar til leiðandi starvið á einum stovni við stórum framtíðarætlanum fyri menning av gransking á fornfrøðiliga økinum, hevði tað verið hóskandi at lýst starvið víða um, í minsta lagi í øllum norðurlondum og ikki bert í Danmark.

Men munurin millum lýsingarnar er ikki høvuðsmálið fyri nevndina. Sum víst varð á í brævi okkara tann 10. februar, framgongur tað av skjølunum í málinum, at setanarnevndin tók atlit at hesum muninum millum lýsingarnar í sínari útgreining av umsøkjarunum og kortini kom til somu niðurstøðuna.

Nevndin loyvir sær at ivast í tí, sum landsstýrismaðurin skrivar, at „mett verður ikki, at munurin hevur tann týdning, sum førdur er fram í skrivi tykkara." Tað er ikki nevndin í Magistarafelagnum, men landsstýrismaðurin sjálvur ið leggur dent á munin millum føroysku og donsku lýsingarnar, tá ið hon tann 20. desember biðjur setanarnevndina um eina útgreining av tilmælinum.

Nevndin skilir kortini framvegis ikki, hví munurin varð gjørdur yvirhøvur, og hví Magistarafelagið ikki fekk donsku lýsingina at síggja áðrenn hon varð lýst, hóast Mentamálaráðið gjørdi sær tann ómak í september 2002 at biðja um og viðgera í størstum álvara okkara viðmerkingar til ta føroysku lýsingina. Nevndin skilir heldur ikki, hví Mentamálaráðið ikki gjørdi A vart við munin millum lýsingarnar, serliga tá hugsað verður, at hann varð biðin um at viðmerkja donsku lýsingina í skundi longu sama dag, sum hann fekk hana til ummælis.

Høvuðsmálið fyri nevndina í Magistarafelagnum er, at tá ið ein landsstýrismaður metir um umsøkjarar til eitt starv út frá fakligum fortreytum, sum ikki er ein greiður partur av starvslýsingini frammanundan, er tað sera umráðandi at viðkomandi landsstýrismaðurin heldur seg til krøv og mannagongdir, sum eru galdandi í setanarpolitikkinum.

Vit taka fram aftur fylgjandi frá brævi okkara tann 10. februar 2003:

*Grundleggjandi í endamálsorðingini í setanarpolitikki landsins er at tryggja, at viðkomandi stovnur setir umsøkjara, ið úr einum heildarsjónarmiði er best egnaður til starvið. Útgangsstøðið fyri at gera eina heildarmeting av umsøkjarunum er, at leiðslan frammanundan hevur gjørt sær greitt, hvat innihaldið í starvinum er, og hvørji krøv verða sett til tann, sum skal røkja starvið. Sum víst er á omanfyri, metir nevndin ikki, at politiska leiðslan í mentamálaráðnum, sum einsamøll hevur mett um umsøkjararnar av nýggjum, frammanundan hevur gjørt sær hetta greitt.*

Landsstýrismaðurin hevur í svari sínum tann 10. februar 2003 ikki tikið støðu til høvuðsspurningarnar hjá nevndini, sum settir vórðu í brævinum tann 10. februar og sum eru útgreinaðir omanfyri.

Niðurstøðan hjá nevndini er framvegis tann, at rætt er ikki farið fram í setanini, tí at fortreytirnar fyri avgerðini hjá landsstýrismanninum um starvsøkini hjá landsantikvarinum eru so munandi broyttar eftir at starvið er lýst. Tí heldur nevndin fast við krav sítt um, at setanin verður annullerað.“

Við skrivi, dagfest 16. febr. 2003, hevur aðalstjórin í Mentamálaráðnum sent løgmanni hesar viðmerkingar til skriv landsstýrismansins, dagfest 13. febr. 2003 (avrit er latið landsstýrismanninum):

**„Viðmerkingar til „*Frágreiðing frá landsstýrismanninum um avgerð, grundgevingar og niðurstøður í málinum um setan av landsantikvari.*“, dagf. 13. februar 2003.**
Landsstýrismaðurin í mentamálum handaði undirritaða eitt avrit av omanfyri nevndu frágreiðing, tann 13. februar 2003, kl. 15.45, stutt eftir, at eg hevði undirskrivað skrivið til løgmann um málsgongdina í sama máli.

Biðið verður um, at hetta skriv verður viðgjørt sambært ásetingunum í fyrisitingarlógini um persónsupplýsingar.

Tá ið eg hevði lisið frágreiðing landsstýrismansins, var eg ikki sørt skelkaður, tí eg kendi ikki fleiri týðandi viðurskifti aftur, sum landsstýrismaðurin leggur stóra áherðslu á. Serliga verður hugsað um, at setanarnevndin skal hava gjørt mismun á umsøkjara uttan nakra sakliga grundgeving.

Eftir at hava umhugsað málið kom eg til ta niðurstøðu, at tað er ikki rætt at lata frágreiðingina hjá landsstýrismanninum so einvíst og ógrundað leggja setanarnevndina undir so ósakligar atgerðir. Vanligt er ikki, at ein aðalstjóri ger viðmerkingar til eina frágreiðing hjá landsstýrismanninum, men í hesum føri eri eg tíverri noyddur at gera tað, tí landsstýrismaðurin grundar alla sína frágreiðing á misskiljingar og ósakligar grundgevingar.

Ein onnur orsøk til at undirritaði hevur valt at fremja hetta óvanliga stig er, at sambært niðurstøðu á skeið um „politikkarar og embætisfólk“, sum Løgmansskrivstovan skipaði fyri á Hotel

Føroyum fyri nøkrum árum síðani, eigur ein aðalstjóri ikki bara men hevur beinleiðis skyldu til, at boða løgmanni frá, um álvarsamir skeivleikar eru í viðurskiftum hjá viðkomandi landsstýrismanni.

Skoytt kann verða uppí, at eg fekk ikki høvi at síggja frágreiðingina hjá landsstýrismanninum, áðrenn hon var undirskrivað og send.

Uttan at leggja meg út í sjálva frágreiðingina hjá landsstýrismanninum, skal eg bert gera viðmerkingar um tann partin, har ført verður fram, at „*… Annar av umsøkjarunum (F), ið setanarnevndin metir hava góðar kvalifikasjónir til starvið, verður sagdur at hava alkoholtrupulleikar, ið gera hann óegnaðan til starvið og hartil, at ivasamt er við leiðsluførleika hansara.*“ Tað, sum sagt verður í hesum sambandi, og tað sum bygt verður víðari á, er ikki í tráð við veruleikan.

Støðan hesum viðvíkjandi er í stuttum henda: Landsstýrismaðurin vísti hesum starvi stóran ans. Landsstýrismaðurin spurdi fleiri ferðir um umsøkjarar til hetta starv og greiddi eg honum frá, at talan var um 8 umsøkjarar og at setanarbólkurin hevði valt at kalla 2 umsøkjarar inn til setanarsamrøðu, í fyrstu syftu. Landsstýrismaðurin spurdi nakrar dagar seinni, hvussu gekk og greiddi eg honum frá, at setanarsamrøðurnar fóru at verða framdar tann 22. november 2002. Landsstýrismaðurin spurdi til hesar báðar umsøkjararnar, og greiddi eg honum eitt sindur frá umsøkjarunum. Landsstýrismaðurin helt, at tann eini umsøkjarin sá spennandi út (F). Eg nevndi fyri landsstýrismanninum, at setanarbólkurin var gjørdur varugur við, at annar av umsøkjarunum eftir sigandi skuldi hava alkoholtrupulleikar. Eg nevndi eisini, at setanarbólkurin mátti kanna eftir um so var ella ikki. Í hesum sambandi var einki nevnt um: „…ivasamt er við leiðsluførleika hansara.“, tí hetta var undan fyrstu setanarsamrøðuni.

Tá ið setanarbólkurin verður gjørdur varugur við slíkt álvarsmál, sum alkoholtrupulleikar, so hevur hann sjálvsagt skyldu til, at kanna um nakað er í hesum ella ikki. Spurt var um hetta til setanarsamrøðurnar (22. november 2002), sum altíð verður spurt um, tá ið talan er um leiðarastørv o.a. (sí skjal nr. 13, punkt nr. 8, seinasta petti í skrivinum, dagf. 13. febr. 2003 um málsgongd o.a.). Báðir umsøkjararnir fingu júst somu spurningar á hesum

øki til fyrstu setanarsamrøðu. Eftir at hava tosað við tilvísingarnar (referensurnar) hjá báðum umsøkjarunum var setanarbólkurin samdur um, at neyðugt var at hava eina setanarsamrøðu afturat við annan umsøkjaran (F), tí mett var ikki, at heildarmyndin var nóg greið. Undir næstu setanarsamrøðu við F var spurt og søkt eftir meira útgreinandi upplýsingum út frá vantandi upplýsingum frá fyrru setanarsamrøðu og tað sum setanarbólkurin hevði fingið út av samrøðunum við tilvísingarnar (referensurnar). Í skjali nr. 18 sæst, hvat spurt var um og hvat kom burturúr hesari samrøðu.

Setanarbólkurin kom skjótt fram til, eftir at hava gjørt tær kanningar, sum etiskt eru sømiligar, at hann dugdi ikki at finna nakað grundarlag fyri, at F hevði alkoholtrupulleikar. Limirnir í setanarbólkinum vóru allir á einum máli um at síggja heilt burtur frá hesum í víðari arbeiðinum. Í setanartilgongdini var hetta ongantíð havt á loftið aftur.

Sum tað sæst í setanartilmælinum, frá 10. desember 2002 (skjal 21), so hevur setanarnevndin als ikki tikið hetta við í sínum grundgevingum. Á fundinum við landsstýrismannin tann 20. desember 2002, har landsstýrismaðurin vildi hava meira útgreinaðar upplýsingar frá øllum í setarnarbólkinum, vóru alkoholtrupulleikar als ikki nevndir. Sama ger seg galdandi í skrivligu viðmerkingunum, sum undirritaði fekk seinni sama dag frá landsstýrismanninum (sí skjal 24). Í ískoytinum til setanartilmælið, dagf. 14. januar 2003 (skjal 25), ella undir samrøðunum, sum landsstýrismaðurin framdi við umsøkjararnar, tann 29. januar 2003 (skjal 30), er hetta heldur ikki nevnt.

Fyri at undirbyggja omanfyri nevndu lýsing havi eg heitt á hinar limirnar í setanarnevndini um at vátta, at upplýsingarnar um alkoholtrupulleikar hjá F ikki eru nýttir undir okkara støðutakan í sambandi við innstillingina til starvið sum landsantikvarur. Teirra váttan er hjáløgd, sum skjal 1 til hetta skriv.

Undirritaði er ógvuliga harmur um, at málið skal vera farið so langt av leið, tí undirritaði og 2 av limunum í setanarbólkinum hava verið við til nógvar starvssetanir og hava ongantíð upplivað nakað, sum ber brá av hesum. Setanarbólkurin hevur framt sítt arbeiði eins professjonelt sum altíð og hevur bert latið faklig fyrilit viga í sínari støðutakan. Tá ið setanarbólkurin hevur latið landsstýrismanninum sítt tilmæli, í hesum føri tvær ferðir, so

hevur hann gjørt sítt arbeiði, sum setanarbólkurin eigur at gera. Annars hevði setanarbólkurin ikki latið tað úr hondum.

At setanarbólkurin – og serliga undirritaði – skal verða drigin inn í málið á henda margháttliga hátt, haldi eg er óheppið og ógrundað. At reka framundir at setanarnevndin skal hava ósaklig motiv er at harmast um, og hví landsstýrismaðurin hevur valt at snara málinum á henda hátt, er heilt óskilligt.

Setanarmálið er frá setarnarbólkinum farið fram á fullgóðan og sakliga hátt. Talan hevur bert verið um objektivar og sakligar metingar. Talan hevur ongantíð verið um, at pástandir um persónlig viðurskifti hjá øðrum umsøkjaranum á nakran hátt eru komnir honum til ófyrimuns í viðgerðini.

Mannagongdirnar, sum nýttar verða í sambandi við arbeiðið hjá setanarnevndini, eru fult í tráð við galdandi setanarpolitikk og arbeiðshátturin, sum Mentamálaráðið nýtir í slíkum arbeiði, er so við og við mentur seinastu 5-6 árini.

At hetta mál eftir landsstýrismansins meting skal hava ført við sær, at „*…álitisviðurskiftini millum meg og næstu fyrisitingina eru skeiklað og at hetta málið krevur álvarsligar eftirmetingar av skeivleikum og óhepnum mannagongdum*“, er eftir mínari fatan ein ótrúlig niðurstøða, tí fyrisitingin hevur eftir bestu sannføring framt góðan fyrisitingarsið í hesum máli. Men ásannast má, at málið skeiklaðist av lagi, tá ið landsstýrismaðurin tók yvir.

E.S. Annars lá eitt skjal eftir (skjal nr. 84 í okkara journalskipan), sum eg haldi hevur týdning í hesum máli. Skjalið snýr seg um, hví aðalstjórin ikki vildi undirskriva skrivið til Magistarafelag Føroya, dagf. 10. februar 2003. Skjalið er hjálagt hesum skrivi. Orsøkin til, at skjalið ikki kom við millum hini skjølini, tann 13. februar 2003, er, at ein annar málsviðgeri hevði journaliserað skrivið og hevði ikki lagt tað fysiskt í málið. Tí kom skjalið ikki við.“

Við skrivi, dagfest 17. febr. 2003, hevur landsstýrismaðurin sent løgmanni hesar viðmerkingar til skriv aðalstjórans, dagfest 16. febr. 2003:

„Tá eg kom til arbeiðis sunnudagin 16. februar 2003, lá eitt bræv á skriviborðinum frá C. Hevði onki frætt frá aðalstjóranum um,

at hetta var ávegis, og tá eg fór til hús fríggjakvøldið, kendi eg enn einki til, at eitt slíkt bræv skuldi sendast løgmanni.

Vil fegin gera viðmerkingar til nakrar av skeivleikunum í skrivinum.

Fyrst av øllum vil eg gera púra greitt, at eg á ongan hátt havi hótt C við uppsøgn, um hann ikki skrivaði undir brævið til Magistarafelagið. Tað, sum eg segði, eftir at hann bar eg undan at skriva undir, var, at eg metti støðuna vera rættuliga álvarsama, tá aðalstjórin ikki metti, at landsstýrismaðurin, í málinum viðv. setanini av landsantikvari, hevði arbeitt við støði í setanarpolitikkinum.

Segði eisini við hann, at tað altíð var gott at vita, hvar tú hevði fólk og at eg metti, at hetta málið vísti tað rættiliga væl. Ongin hóttan lá í hesum, bert ein staðfesting.

Síðani gjørdi eg tær rættingar, sum skuldu gerast í brævinum til Magistarafelagið og legði síðani tvey eintøk av brævinum til aðalstjóran. Eitt har møguleiki var hjá aðalstjóranum at skriva undir, sum vanligt er, og eitt eintak, har landsstýrismaðurin sjálvur skrivaði undir brævið til Magistarafelagið.

Mikumorgunin 12. februar 2003 var brævið sent Magistarafelagnum, aðalstjórin valdi ikki at skriva undir.

Í brævinum til løgmann vil C verða við, at hann ikki fekk møguleika at síggja frágreiðing mína til løgmann, áðrenn hon var send, hetta er beinleiðis skeivt. Beinanvegin frágreiðingin var liðug, hósdagin 13. februar 2003, fekk aðalstjórin eitt eintak. Frágreiðingin var send løgmanni morgunin eftir.

Tað undrar meg stórliga, at aðalstjórin í Mentamálaráðnum velur at senda løgmanni bræv, uttan so frægt sum at bera hetta uppá mál við landsstýrismannin. Undrist eisini yvir grundgevingar aðalstjórans fyri at gera hetta og niðurstøður hansara.

Fari kortini ikki at gera fleiri viðmerkingar til skriv aðalstjórans, bert enn einaferð vísa á frágreiðing mína til løgmann.“

Við skrivi, dagfest 18. febr. 2003, hevur aðalstjórin í Mentamálaráðnum sent løgmanni hesar viðmerkingar til skriv landsstýrismansins, dagfest 17. febr. 2003:

**„Viðmerkingar til landsstýrismansins viðmerkingar, dagf. 17. februar 2003 til mítt skriv, dagf. 16. februar 2003, til løgmann.** Eg vil loyva mær at gera hesar viðmerkingar til omanfyri nevnda skriv.

Fríggjardagin, tann 14. februar 2003 uml. kl. 15.30, boðaði eg landsstýrismanninum frá, at eg var ósamdur við frágreiðing hansara, so landsstýrismaðurin var væl vitandi, at aðalstjórin ikki tók undir við frágreiðingini hjá landsstýrismanninum.

Landsstýrismaðurin vísir á nakrar skeivleikar í mínum skrivi, frá 16. februar 2003, men eg veri tíverri noyddur at vísa hesum aftur.

Tá ið landsstýrismaðurin hevði biðið meg skriva undir skrivið til Magistarafelag Føroya og eg sýtti fyri hesum, skrivaði eg beinanvegin hendingina niður. Eg bað næsta morgun vitnið, sum hevði sæð og hoyrt hendingina lesa mína frágreiðing ígjøgnum. Viðkomandi váttaði, at tað sum eg hevði skrivað var fult í tráð við tað, sum fór fram dagin fyri. Eftir hetta valdi eg at journalisera skjalið. Eg haldi fast við, at tað sum eg havi skrivað er rætt endurgivið.

Næsta morgun, t.v.s. mikudagin tann 12. februar 2003, lógu 2 einsljóðandi skriv á mínum skriviborði, sum landsstýrismaðurin hevði lagt. Einasti munur á skrivunum var, at annað skrivaði landsstýrismaðurin og undirritaði undir, meðan hitt skrivaði bert landsstýrismaðurin undir. Eitt fylgiskriv (hondskrivað) var við. Eg boðaði landsstýrismanninum frá í telduposti, at eg kundi ikki skriva undir hetta skriv, tí nú vóru uppaftur fleiri viðurskifti, ið eg ikki kundi taka undir við.

Tá ið eg fekk handað avrit av frágreiðingini, sum landsstýrismaðurin hevði skrivað til løgmann, dagf. 13. februar 2003, var hon undirskrivað av landsstýrismanninum. Um sama mundi var brævbjálvin latin aftur og frágreiðing landsstýrismansins við skjølum o.ø. var klárt at senda løgmanni. Orsakað av, at klokkan nærkaðist 16.00 og gjørligt ikki var at náa oman á Løgmansskrivstovuna fyri kl. 16.00 var gjørt av, í samráði við Løgmansskrivstovuna, at bíða til næsta morgun. Brævbjálvin við skrivinum hjá landsstýrismanninum fór oman á Løgmansskrivstovuna næsta morgun. Landsstýrismaðurin legði á ongan hátt upp til, at eg

skuldi gera viðmerkingar til frágreiðingina og tað fekk eg heldur ikki høvi til, tí frágreiðingin var farin oman á Løgmansskrivstovuna áðrenn landsstýrismaðurin kom á skrivstovuna næsta dag.

Eg skal ikki gera fleiri viðmerkingar, men haldi fast við, at tað sum ført er fram í mínum viðmerkingum til landsstýrismansins frágreiðing (skriv, dagf. 16. februar 2003) er rætt endurgivið."

Við skrivi, dagfest 12. mars 2003, hevur virkandi landsstýrismaðurin í mentamálum sent Magistarafelag soljóðandi svar uppá skriv teirra, dagfest 14. febr. 2003:

„Landsstýrismaðurin í mentanarmálum takkar fyri skriv frá Magistarafelagi Føroya, dagfest 14. februar 2003.

Sum settur landsstýrismaður í mentamálum eftir I, havi eg havt høvi at seta meg inn í alt setanarmálið og havi gingið ígjøgnum allar faktuellar upplýsingar í málinum.

Hetta svarskriv er grundað á mínar niðurstøður eftir gjøgnumgongdina av øllum málinum.

**Fyrst nakrar almennar viðmerkingar til skriv Magistarafelagsins frá 14.02.2003:**

Landsstýrismaðurin skilir væl sjónarmið Magistarafelagsins, tá sagt verður í nevnda skrivi, at nevndin metir málið at hava prinsipiellan týdning í mun til starvssetanarpolitikkin sum heild, ikki bert fyri tann einstaka limin hjá felagnum, men fyri allar limir felagsins, og at fakfelag magistaranna vil hava vissu fyri, at setanir á almenna starvsøkinum verða framdar á tryggan hátt.

Hetta hevur landsstýrismaðurin í mentanarmálum greitt havt fyri eyga í hesum setanarmáli. Men landsstýrismaðurin má vísa aftur pástand felagsins um, at „her er sostatt í roynd og veru talan um eitt heilt annað starv enn tað, sum lýst varð" (sí: ovast á síði 2 í skrivi felagsins frá 14. februar).

Landsstýrismaðurin hevur hvørki ætlað ella roynt at geva starvinum annað innihald. Heldur ikki hevur landsstýrismaðurin sagt seg hava fakligan førleika fyri at „meta um granskingar- og vísindaligan førleika hjá nýggjum landsantikvari".

Men, landsstýrismaðurin hevur ávíst, at allar avgerðir og stig landsstýrismansins í hesum máli, hava bygt á atlitini at egnari ábyrgd sum landsstýrismaður fyri einum starvssetanarmáli sum hesum og sum evsti fyrisitingarleiðari á økinum.

Samrøðan við báðar umsøkjararnar, sum setanarnevndin hevði sagt vera egnaðar til starvið, hevði til endamáls at geva landsstýrismanninum størri innlit og førleika fyri at taka eina avgerð, sum landsstýrismaðurin sjálvur, grundað á alt tað tilfar og allar teir upplýsingar, sum fyriliggja um báðar umsøkjararnar, skuldi taka. Øll gongdin er væl skjalfest og grundgivin.

Neyðugt er her at hava í huga, at tað er landsstýrismaðurin, sum hevur evstu ábyrgdina av setanini – ikki setanarnevndin. Setanarnevndin ger tilmæli, og slíkt tilmæli er ikki bindandi. Landsstýrismaðurin hevur sett tann persónin í starv, sum landsstýrismaðurin eftir eina neyva gjøgnumgongd og grundgeving helt vera tann best egnaði til starvið.

Tá umsøkjararnir møttu til samrøðu við landsstýrismannin, tann 29. januar 2003, var eingin munur gjørdur á teimum – teir komu inn at tosa við landsstýrismannin á líka føti. Endamálið við samrøðunum var ikki at geva starvinum nakað annað innihald. Hetta hevur ongantíð verið í huga landsstýrismansins. Heldur ikki hevur talan verið um at lýsa starvið av nýggjum.

Endamálið var, sum sagt, at gera landsstýrismannin betur føran fyri at taka endaliga avgerð í málinum. Hetta uttan at serligt atlit varð tikið at sonevnda muninum millum donsku og føroysku lýsingina. Hesin „munur“ er so lítil, at eitthvørt fakfólk, sum søkir starv, sum tað, ið tað her snýr seg um, má meta henda mun sum nærum týdningarleysan ella sjálvsagdan. Og hvussu er hevur ongantíð verið ætlanin at nýta henda „mun“ til fyrimuns fyri nakran umsøkjara – ella til at skaða nakran umsøkjara við. Og heldur ikki er tað gjørt.

A hevur sæð bæði føroyska og danska lýsingartekstin, og hann hevur gjørt viðmerkingar til báðar tekstirnar. Hetta kann skjalprógvast. A betraði við sínum viðmerkingum fyrst tann føroyska tekstin og síðani tann danska tekstin. Tað er beint, at A hevði stutta tíð til at viðgera tann danska tekstin; men hóast hetta, so viðgjørdi A tann danska tekstin væl og virðiliga og við stórari vælvild.

Mentamáladeildin hevði eisini rættiliga stutta tíð at orða danska tekstin. Orsøkin var, at freistin fyri at lata lýsingina til Magisterbladet var styttri enn roknað varð við. Áðrenn lýsingarteksturin varð sendur Magisterbladet, varð hann rættlisin av starvsfólki í Mentamálaráðnum, sum hevur danskt sum móðurmál. Hetta merkir, at Mentamálaráðið gjørdi sær stóran ómak fyri at fáa lýsingina so beina sum gjørligt – bæði fakliga og málsliga.
Landsstýrismaðurin skilir ikki, at nakað skeivt skal verða gjørt við, at A er kunnaður um lýsingartekstirnar – bæði tann føroyska og tann danska – og biðin um at gera fakligar viðmerkingar til hesar tekstir, fyri at gera innihaldið í tekstunum betur. At hetta skal vera nýtt ímóti honum seinni, er ikki veruleikin.

Landsstýrismaðurin vísir aftur, at ásetingarnar í starvsfólkapolitikkinum, sum eru at skilja sum leiðreglur og ikki lógir, og at formliga røtt mannagongd ikki eru hildin í hesum starvssetanarmáli. Landsstýrismaðurin hevur eisini spurt seg fyri hjá Løgmansskrivstovuni, sum hevur lýst starvsfólkapolitikkin, um mannagongdina og hevur fylgt vegleiðingini haðani. Harumframt verður gjørt vart við, at tað er ikki beint, tá sagt verður, at *hugsjónir landsstýrismansins* (síða 1 í skrivi felagsins) skuldu verið nýttar til at geva starvinum annað innihald enn tað, sum lýst varð. Landsstýrismaðurin hevur ikki broytt nakað innihald í starvinum.

Tað, sum landsstýrismaðurin hevur spurt umsøkjararnar um, kann í mesta lagi skiljast sum eitt supplement til starvslýsingina (sum landsstýrismaðurin hvørki hevur orðað ella góðkent) – og ikki sum verandi í stríði við hana. Tað kann einki skeivt vera í, at landsstýrismaðurin í perspektiverandi spurningum roynir at fáa nærri innlit í førleika og fakliga hugflog umsøkjaranna, tí sjálvandi skal Føroya Fornminnissavn (ella føroysk fornfrøði) *við greiðum ætlanum vera í fremstu røð bæði í heimligum og altjóða fornfrøðiligum arbeiði*. Hetta er eyðvitað, um tað stendur í einari starvslýsing ella ikki. Í teimum spurningum, sum landsstýrismaðurin setti fram, meðan samrøðan var millum landsstýrismannin og teir báðar umsøkjararnar, var eingin munur gjørdur millum umsøkjararnar.

Tað er ongin saklig orsøk til at ógilda setanina av tí persóni, sum settur er í starvið. Hinvegin vónar landsstýrismaðurin tó, at

álitið millum landsstýrismannin og Magistarafelag Føroya er komið í rætt lag aftur við hesum skrivi.

**Síðani nakrar ítøkiligar viðmerkingar til sama skriv:**
Fyrst skal gerast vart við, at hetta er eitt sindur trupult, tí hugsanarháttur og útgangsstøði í skrivi Magistarafelagsins eru rættiliga ymisk frá landsstýrismansins hesum viðvíkjandi. Hinvegin hevur Magistarafelagið krav uppá, at landsstýrismaðurin svarar spurningum felagsins so væl, sum til ber. Gjørt verður vart við, at ein avmarking í øllum hesum er, at tað ikki ber landsstýrismanninum til at útvega Magistarafelagnum upplýsingar um tann persónin, sum settur varð í starvið sum landsantikvarur. Magistarafelagið fær sostatt einki samanberingargrundarlag; men tað hevur Magistarafelagið heldur ikki kravt. Høvuðsuppgáva Magistarafelagsins er, sum framgongur av skrivi felagsins, sum fakfelag at tryggja sær, at starvssetanir á tí almenna økinum fara fram á rættan hátt, og at limur felagsins, A, hevur ikki fingið skeiva viðgerð í hesum setanarmáli.

***Landsstýrismaðurin svarar framhaldandi soleiðis:***
1) Landsstýrismaðurin og nevndin í Magistarafelagnum eru samd um, at tað er at harmast um, at persónsmál av hesum slagi verður viðgjørt alment. Landsstýrismaðurin tekur til eftirtektar, at nevndin hvørki hevur ætlanir ella ynski um at viðgera fakligan ella persónligan førleika hjá umsøkjarunum til starvið sum landsantikvarur.
2) Landsstýrismaðurin skilir væl, at nevndin vil hava vissu fyri, at setanir á almenna starvsøkinum hjá felagnum verða framdar á tryggan hátt. Hinvegin skilir landsstýrismaðurin ikki pástand felagsins um, at landsstýrismaðurin við síni handfaring av málinum hevur givið starvinum annað innihald, enn ætlað var við starvslýsingini? Tað, sum í skrivi felagsins verður nevnt *aðrar fortreytir* og *hugsjónir landsstýrismansins* broytir ikki starvið til *eitt heilt annað starv enn tað, sum lýst varð.* Landsstýrismaðurin hevur ikki broytt lýsingina, og tað er ikki brot á nakra lóg at søkja sær aðra vitan í máli sum hesum. Tá landsstýrismaðurin ikki var tryggur við tilmæli nevndarinnar, har bert ein umsøkjari varð innstillaður til starvið, samstundis sum nevndin skrivliga úttalaði,

at tveir vóru kvalifiseraðir, mátti landsstýrismaðurin, fyri at vera vissur í, at tann rætta avgerðin varð tikin tí landsstýrismaðurin hevur endaligu ábyrgdina av setanini – fáa til vega supplerandi upplýsingar og kunnleika, fyri at vera vísur í, at rætta avgerðin varð tikin. Tær supplerandi grundgevingarnar og teir spurningarnir, sum landsstýrismaðurin hevur víst á, eru at meta sum natúrligur partur av starvinum og av metingunum hjá einum setanarmyndugleika til leiðandi størv á hesum økinum.

3) Á síðu 2 í skrivinum hevur nevnd Magistarafelagsins 4 spurningar, sum verða svaraðir á henda hátt: Landsstýrismaðurin hevur ikki orðað starvslýsingina, og landsstýrismaðurin var ikki partur í teimum samrøðum, sum setanarnevndin hevði við umsøkjararnar tann 22. november 2002. Landsstýrismaðurin kann tí ikki svara hesum spurningi – uttan at siga, at landsstýrismaðurin ikki visti nakað um innihaldið í hesum samrøðum, fyrr enn nevndin gjørdi sítt tilmæli hesum viðvíkjandi. Landsstýrismaðurin hevði fund við A og hin umsøkjaran 29. januar 2002 – eftir at landsstýrismaðurin hevði fingið at vita frá Løgmansskrivstovuni, at tað ikki er beinleiðis í stríð við setanarpolitikkin, at landsstýrismaður er við til setanarsamrøður. Landsstýrismaðurin kunnaði hvørgan av umsøkjarunum frammanundan. Ætlan landsstýrismansins var, at teir skuldu møta á líka føti fyri landsstýrismanninum. Ætlanin var hvørki at geva starvinum annað innihald ella at leggja nýggjar ætlanir fyri Fornminnissavnið. Landsstýrismaðurin vildi hava eitt betri støði fyri endaligu støðutakan síni. Hetta var endamálið við fundinum 29. januar 2003, Landsstýrismaðurin hevur ikki sagt seg hava fakligan kunnleika á økinum. Landsstýrismaðurin hevur bert hugt at teimum faktuellu upplýsingunum í málinum og harundir at viðmælum (referensum) í málinum.

Tað hevur ikki verið upp á tal at lýsa av nýggjum ella seta nýggja setanarnevnd, tí landsstýrismaðurin ætlaði ongantíð at geva starvinum annað innihald. Tað er á ongan hátt brot á nakra reglu ella siðvenju, at landsstýrismaður ger nakrar supplerandi upplýsingar – fyri at gera seg sjálvan betur føran fyri at taka røttu avgerðina starvinum viðvíkjandi.

Mentamálaráðið sendi fyrst lýsingina til føroysk bløð. Føroyski teksturin (bæði viðvíkjandi landsantikvari og landsskjalavørði) varð sendur viðkomandi stovnum og Magistarafelagnum. Av-

gerðin um at lýsa í Magisterbladet varð tikin rættiliga seint – og er hetta gjørt fyri at fáa umsóknir frá føroyingum, sum búgva í Danmark, dønum og møguliga eisini øðrum norðurlendingum. Magisterbladet røkkur út um Danmark. Umhugsað varð ikki at lýsa í øðrum norðurlendskum tíðar- ella fakritum.

Í sambandi við orðingina av donsku lýsingini eftir *landsskjalavørði* kom fram tann hugsan í Mentamálaráðnum, at orða okkurt meira neyvt í einari danskari lýsing, sum hevði verið meira sjálvsagt ella íliggjandi í einari føroyskari. Mentamálaráðið valdi at presisera, at tað eisini snýr seg um, *at institutionen fortsat har en faglig og forskningsmæssig profil både i det færøske samfund og udenfor Færøerne.* Hetta varð endurtikið í donsku lýsingini eftir *landsantikvari.* Orsøkin var, at Mentamálaráðið kendi tað sum skyldu sína at sýna hesum báðum stovnum ta virðing at gera møguligum útlendskum umsøkjarum greitt, at talan er um at vera leiðari á tveimum tjóðsøvnum – og ikki tveimum provinssøvnum. Landsstýrismanninum vitandi liggur ikki meira í hesum – enn at gera vart við, at bæði Føroya Landsskjalasavn og Føroya Fornminnissavn eru landsfevnandi føroyskir mentanarstovnar. Hetta vita kvalifiseraðir umsøkjarar í Føroyum; men tað er ikki vist, at kvalifiseraðir umsøkjarar í øðrum Norðurlondum eru varir við júst hetta. Hevði lýsingin verði sett í amerikonsk ella bretsk faktíðarrit, hevði helst eisini verið neyðugt at gjørt onkra minni broyting í mun til eina føroyska lýsing í Føroyum – uttan at nakað stórvegis hóvasták hevði staðist av hesum.

Samanumtikið kann verða sagt, at landsstýrismaðurin ikki hevur gjørt nakað brot í hesum máli, ella hevur gjørt annað enn at tryggja eina javnbjóðis, væl grundgivna og skjalfesta viðgerð av umsøkjarum. Landsstýrismaðurin hevur setanarrættin og fyrisitingarligu ábyrgdina í hesum máli. Avgerðin varð tikin eftir at landsstýrismaðurin hevði sett seg so væl inn í málið sum gjørligt – fyri at taka røttu avgerðina.

Harafturat kann vera sagt, at landsstýrismaðurin metir tað vera ein stóran trupulleika í hesum máli og fyri starvsfólkapolitikk og trygd umsøkjaranna sum heild, at ein almenn viðgerð er farin fram av umsøkjarum, sum ikki kunnu verja seg, og har sjálvsagt ikki er møguligt at fáa allar faktuellar upplýsingar fram í einum

starvssetanarmáli. Summir upplýsingar, ið eru fevndir av tagnarskyldu, eru eisini lagdir fram í almenninginum, og landsstýrismaðurin hevur tikið stig til at kanna, hvussu hetta er hent.

Viðgerðin av hesum máli gevur eisini góða orsøk til at viðgera setanarpolitikk og mannagongdir sum heild, soleiðis at ongar misfatanir eru millum setanarmyndugleikan, fakfeløg, umsøkjarar og almenning.

Í hesum ítøkiliga máli kann undirritaði sum settur landsstýrismaður í mentamálum siga greitt, at undanfarni landsstýrismaður hevur eftir míni meting og neyvu gjøgnumgongd av málinum, handlað rætt og við greiðum grundgevingum í øllum málinum.

Annars er at siga, at Mentamálaráðið fegin frættir aftur frá Magistarafelagnum. Møguleiki er eisini fyri fundi partanna millum, um Magistarafelagið er áhugað fyri hesum. Vónandi letur hetta samskifti millum landsstýrismannin og Magistarafelagið upp fyri eini virðiligari loysn fyri allar partar í málinum."

## Partshoyring

Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna hetta málið nærri. Av tí, at klagan bæði snúði seg um ta konkretu setanina og um almenna setanarpolitikkin, varð klagan við skrivi, dagfest 31. mars 2003, send Mentamálaráðnum og Løgmansskrivstovuni til ummælis. Báðir myndugleikarnir vórðu bidnir um at lata umboðsmanninum øll skjølini viðvíkjandi hesum málinum til láns. Eisini varð Løgmansskrivstovan biðin um at lata umboðsmanninum eitt eintak av almenna setanarpolitikkinum, sum var galdandi, tá hendan setanin varð framd, og møguligar seinni broytingar í hesum politikki.

Við skrivi, dagfest 28. apríl 2003, hevur Løgmansskrivstovan latið umboðsmanninum hesar viðmerkingarnar til málið:

„Víst verður til bræv tykkara dagfest 31. mars 2003, har Løgmansskrivstovan verður biðin um at ummæla og at lata skjøl í málinum um at seta landsfornfrøðing.

Løgmaður tók upp málið um at seta landsfornfrøðing, orsakað av teimum nógvu atfinningunum, ið vóru í kjalavørrinum av, at

landsstýrismaðurin tók avgerð í málinum. Løgmaður heitti á landsstýrismannin um at lata sær eina nágreiniliga lýsing av málinum og viðkomandi skjøl umframt skrásett skjalayvirlit í teimum málum, ið á nakran hátt hava við nevndu setan at gera.

Løgmaður fekk skjøl og frágreiðing um málið umframt viðmerkingar til málið frá landsstýrismanninum í mentamálum og aðalstjóranum í Mentamálaráðnum.

Løgmansskrivstovan gjøgnumgekk skjølini til tess at meta um, hvørt ivi kundi vera um setanartilgongdina. Hetta var fyrst og fremst gjørt við støði í starvsfólkapolitikki landsins og við atliti at setanarpolitikkinum og góðum fyrisitingarsiði annars. Støða var ikki tikin til, hvør av umsøkjarunum, út frá einum heildarsjónarmiði, er best skikkaður til starvið.

Løgmansskrivstovan kom til ta niðurstøðu, at viðurskifti eru, sum benda á, at málið er ikki handfarið á nøktandi hátt. Hinvegin varð ikki mett, at hetta einsamalt var grundarlag fyri at taka fyrisitingarliga avgerð sum til dømis at taka aftur avgerðina um at seta landsfornfrøðing.

Hjáløgd eru skjølini í málinum og skjalayvirlit, umframt eintak av tí almenna setanarpolitikkinum, sum var galdandi, tá nevnda setan var framd og eintak av seinni broyting av setanarpolitikkinum. Harafturat eru hjáløgd inngangur løgmans og formæli løgmansstjórans til Starvsfólkapolitikk landsins og mannagongd viðvíkjandi starvsfólkapolitikkinum.“

Við skrivi, dagfest 7. mai 2003, hevur landsstýrismaðurin í mentamálum sent umboðsmanninum hesar viðmerkingarnar:

„Undirritaði landsstýrismaður fegnast um, at Løgtingsins Umboðsmaður hevur valt at taka kæruna frá Magistarafelagi Føroya til viðgerðar.

Í tí sambandi skal eg ummæla kæruna og gera ítøkiligar og prinsippiellar viðmerkingar til málið sum heild.

Sum Umboðsmanninum helst kunnugt, eru embætisfólk í fyrisiting Mentamálaráðsins, sum sótu í setanarnevndini, ikki samd við landsstýrismannin um alla lýsingina og niðurstøður landsstýrismansins í hesum máli. Eg havi tí gjørt av, at tey eiga at

fáa høvi at gera viðmerkingar til hesa frágreiðing frá landsstýrismanninum. Hesar verða sendar Umboðsmanninum saman við hesum ummæli frá landsstýrismanninum.

Í fyrsta lagi fari eg at vísa til frágreiðingina hjá I til Løgmans um setanina og setanartilgongdina og annars til øll skjølini í málinum. Sum eg havi boðað frá í brævi til Magistarafelag Føroya, so er mín niðurstøða, at I, landsstýrismaður, er farin rætt fram í málinum. Eftir míni meting hevur hon hildið seg fult til stýrisskipanarlógina, lóg um ábyrgd landsstýrismanna, fyrisitingarlógina og til setanarpolitisku atlitini, og hon hevur røkt sína skyldu við at gera eina sjálvstøðuga meting av arbeiðinum hjá setanarnevndini.

Í øðrum lagi skal eg í sambandi við orðaljóðið í kæruni hjá Magistarafelagnum, har dentur verður lagdur á spurningin um setanarpolitikk, vísa til svarið hjá undirritaða til skriv frá Magistarafelagnum. Setanarpolitikkurin er eftir mínum tykki fylgdur, og I hevur gjørt sær stóran ómak at spyrja seg fyri hjá Løgmansskrivstovuni um ivamál og annars at grundgeva og skjalfesta sínar avgerðir. Spurningurin um, hvussu setanarpolitikkurin hjá Løgmansskrivstovuni og setanarpolitikkurin hjá Mentamálaráðnum skal fremjast í verki, verður viðmerktur niðanfyri.

Síðani skal eg nágreina sjónarmið, grundgevingar og niðurstøður hjá mær um alt málið. Har fari eg at vísa á fylgjandi spurningar og viðurskifti, sum eg meti vera av stórum týdningi fyri málið sjálvt og av avgerandi týdningi fyri rættartrygd og góðan fyrisitingarsið frameftir:

- Setanarpolitikkurin í málinum um setan av landsantikvari
- Setanarpolitikkur og samsvarið við lóg um ábyrgd landsstýrismanna, fyrisitingarlóg og góðan fyrisitingarsið
- Setanarpolitikkur frameftir bygt á royndirnar í málinum um setan av landsantikvari
- Rættartrygd og góður fyrisitingarsiður í sambandi við setanina av landsantikvari
- Eftirlit løgmans við landsstýrismonnum og viðgerðin av hesum máli í mun til stýrisskipanarlógina, lóg um ábyrgd landsstýrismanna, fyrisitingarlógina og góðan fyrisitingarsið

Eg vóni, at Løgtingsins Umboðsmaður fer at viðgera og gera úrskurð um allar tættir og ábyrgdina hjá ymsu myndugleikunum og pørtunum í málinum.

**1. Setanarpolitikkurin í málinum um setan av landsantikvari**

Magistarafelag Føroya leggur í síni kæru høvuðsdent á setanarpolitikkin – ávikavist orðaða leiðbeinandi setanarpolitikkin hjá Løgmansskrivstovuni og orðaða setanarpolitikkin hjá Mentamálaráðnum.

Til hetta er at siga, at eg meti, at setanarpolitikkurin hjá Løgmansskrivstovuni og setanarpolitkkurin hjá Mentamálaráðnum eru fylgdir í málinum.

Setanarpolitikkurin hjá Løgmansskrivstovuni og hjá Mentamálaráðnum eru orðaðir til tess at tryggja eina eins og haldgóða fyrisitingarliga viðgerð av øllum umsøkjarum og at tryggja haldgóða skjalfestan og avgerðargrundarlag til setanarmyndugleikan.

Setanarmálið um landsantikvar verður fyrisitingarliga sett í verk sambært mannagongd í setanarpolitikkinum, og landsstýrismaðurin er ikki beinleiðis partur í hesum yvirhøvur.

I velur at fara inn í málið, tí hon metir seg hava sakliga grund at halda, at umsøkjarar hava ikki fingið eins og sakliga viðgerð, og at grundgevingar og skjalfestan vanta í málinum. Tí biður hon í fyrsta lagi um skjalfestan av ivamálum og nærri grundgevingar frá setanarnevndini. Og í øðrum lagi velur hon at hava samrøður við teir báðar kvalifiseraðu umsøkjararnar til tess at gera sína egnu meting av styrkjum og fyrimunum hjá umsøkjarunum og at greiða ivamál.

Hvørki setanarpolitikkurin hjá Løgmansskrivstovuni ella setanarpolitikkurin hjá Mentamálaráðnum siga nakað um, hvussu eigur at farast fram í slíkum ivamálum, har landsstýrismaðurin tekur stig í síni egnu fyrisiting og har setanarmyndugleikin ikki er nøgdur við avgerðargrundarlagið. Tí vendir I sær til Løgmansskrivstovuna og fylgir teimum ráðum, hon fær hiðani. Hon heldur seg til fyrisitingarlógina og góðan fyrisitingarsið og skjalfestur og grundgevur fyri allari viðgerðini.

Spurningurin kann sjálvsagt setast, hvørt landsstýrismaðurin átti at lýst starvið leyst av nýggjum og at sett eina nýggja setanar-

nevnd, og hvørt hetta átti at verið ráðini frá Løgmansskrivstovuni. Tað haldi eg tó ikki vera proporsjónalt, tí ongin ivi var um, at talan var um tveir umsøkjarar, ið báðir vórðu fakliga væl kvalifiseraðir. Ivamálið stóð um, hvørjar sakligar grundgevingar vóru hjá setanarnevndini fyri at velja annan frá og bert mæla til at seta hin. Tí haldi eg avgerðina vera rætta hjá I at krevja betri grundgevingar og skjalfestan, og síðani at útvega sær sakligt grundarlag til at viga millum tveir kvalifiseraðar umsøkjarar.

At landsstýrismaðurin sjálvur sá seg noyddan at fara inn í málið og at skriva grundgevingar, er grundað á, at hennara næstu í fyrisitingini sótu í setanarnevndini. (Í tí sambandi havi eg heft meg við tveir smærri feilir hjá landsstýrismanninum: Annar, at skrivið til A við grundgevingum fyri, at hann ikki varð settur, ikki var dagfest. Og hin, at I undir samrøðuni við F nevndi, at A eisini var uppá tal til starvið, til tess at kanna, hvørt samstarvstrupulleikar kundu koma fyri. Hvørgin av hesum smærri feilum hava tó eftir míni meting nakran sakligan týdning fyri málið og málsviðgerðina).

Sostatt er I eftir míni meting farin rætt fram. I er sum landsstýrismaður setanarmyndugleiki og hevur sambært lóg um ábyrgd landsstýrismanna evstu fyrisitingarligu ábyrgd. Hon er ikki farin út um setanarpolitikkin og hevur við nærlagni lagt dent á at fylgja fyrisitingarlógini, góðum fyrisitingarsiði og lógini um ábyrgd landsstýrismanna. Og hon hevur tikið neyðug stig, tá hon metti, at skeivt var farið fram í málsviðgerðini og hevur tryggjað sær neyðugt avgerðargrundarlag. Hon hevur tryggjað, at setanarmyndugleikin ger eina sjálvstøðuga meting av arbeiðinum hjá setanarnevndini, og hetta er eftir mínum tykki ein skylda sambært lóg um ábyrgd landsstýrismanna, fyrisitingarlógini og góðum fyrisitingarsiði.

### 2. Setanarpolitikkur og samsvarið við lóg um ábyrgd landsstýrismanna, fyrisitingarlóg og góðan fyrisitingarsið

Tað tykir mær, at tann almenna viðgerðin av setanarpolitikki og denturin, sum Magistarafelag Føroya leggur á setanarpolitikkin, hevur hug at gloyma ella seta til viks fyrisitingarlógina, góðan fyrisitingarsið og lógina um ábyrgd landsstýrismanna.

Setanarpolitikkurin hevur sambært míni fatan støðu sum leiðreglur fyri, hvussu fyrisitingarlógin og góður fyrisitingarsiður skal fremjast og samskipast í setanarmálum. Setanarpolitikkurin hevur stóran týdning fyri rættarkensluna, júst tí hann verður lýstur sum almennur setanarpolitikkur.

Men hann skal sjálvsagt fremjast við støði í og sum ein útgreining av fyrisitingarlógini og góðum fyrisitingarsiði. Setanarpolitikkurin kann ikki traðka í staðið hjá yvirskipaðu lóggávuni.

Í hesum máli, haldi eg, at hetta er sera týdningarmikið at halda fast um. Tá I velur at biðja um nærri grundgevingar og skjalfestan í málinum, so er tað ikki tí, at hon metir, at setanarpolitikkurin er brotin í fyrisitingini og í setanartilgongdini. Hon vísir hinvegin á, at sakligar grundgevingar, skjalfestan og niðurskrivingarskylda eru ivasamar í málsviðgerðini. Og tí ger hon vart við seg og fer inn í málið. Seinni vísir hon eisini á, at tagnarskyldan er brotin í málinum og biður um frágreiðing í tí sambandi.

I ger eisini vart við, at broytingar í setanarpolitikkinum hjá Løgmansskrivstovuni verða kunngjørdar beint eftir, at hon hevur tikið avgerð um at seta starvið. Hesar broytingar snúgva seg eitt nú um at grundgeva skrivliga mótvegis umsøkjarum, sum ikki fáa starv. I hevur kortini, áðrenn hetta er lýst, grundgivið skrivliga mótvegis A, vísandi til fyrisitingarlógina og góðan fyrisitingarsið.

Men í lýstu broytingini til setanarpolitikkin hjá Løgmansskrivstovuni stendur:

*„Noktandi svar skulu vera skrivlig og grundgivin.*

*Í grundgevingini skal verða kunnað um støði undir avgerðini, T.d. hví mett er, at førleikin hjá tí, ið settur er í starvið, svarar betur til settu krøvini, enn førleikin hjá tí, ið ikki er settur – eitt nú viðvíkjandi útbúgving, starvsroyndum, persónligum eginleikum og/ella samstarvsvilja.“*

Tað er eftir mínum tykki ikki í samsvari við fyrisitingarlógina at viðgera umsøkjara og hansara førleikar í skrivligum samskifti mótvegis øðrum umsøkjara. Serliga undrunarvert er tað, at nevnt verður sum dømi, at metingar um persónligar eginleikar og samstarvsvilja hjá einum umsøkjara skulu sendast til annan umsøkjara.

Sum heild haldi eg, at grundreglurnar í fyrisitingarlógini og allur andin í góðum fyrisitingarsiði, sjálvsagt er fyrsta og fremsta

grundarlagið, tá størv verða innstillað og sett. Ein setanarpolitikkur, sum er vegleiðandi og enn ikki lýstur sum rundskriv kann ikki seta fyrisitingarlóg og góðan fyrisitingarsið til viks, men eigur altíð at síggjast sum ein leiðregla við grundarlagi í yvirskipaðu lóggávuni.

### 3. Setanarpolitikkur frameftir bygt á royndirnar í málinum um setan av landsantikvari

Bygt á royndirnar av hesum setanarmáli og á grundgevingarnar omanfyri, havi eg tí eisini tikið stig til at orða og nágreina setanarpolitikkin hjá Mentamálaráðnum av nýggjum, soleiðis at ongin ivi skal vera um samsvarið við fyrisitingarlóg, góðan fyrisitingarsið og lóg um ábyrgd landsstýrismanna.

Eg havi givið boð um, at setanarpolitikkurin hjá Mentamálaráðnum (MMR) verður orðaður sambært hesum leiðreglum:

- Skiljast skal ímillum, nær øðrumegin talan er um at seta innanhýsis størv í ráðnum. Og hinumegin leiðandi størv í ráðnum og á stovnum, sum hoyra undir MMR.
- Landsstýrismaðurin eigur at seta tey leiðandi størvini á stovnum (stjórar, og, har tað er álagt sambært lóg, eisini onnur) umframt leiðarastørv í ráðnum.
- Aðrar innanhýsis starvssetanir eiga aðalstjóri og deildarstjóri at kunna avgreiða sambært setanarpolitikki landsins við kunning til landsstýrismannin
- Landsstýrismaðurin skal góðkenna lýsingar, og tosast skal um, hvar skal lýsast og hvørt lýsast skal við serligum førleikakrøvum (eitt nú málsligum, altjóða royndum, serligum leiðsluevnum ella tílíkt).
- Setanarbólkar/nevndir eiga at setast at gera fakligar metingar, umframt metingar um aðrar fortreytir, ið krevjast av umsøkjara. Setanarbólkar skulu setast saman soleiðis, at fakliga metingin er væl umboðað. Setanarbólkarir/nevndirnar eiga at ráðføra seg við landsstýrismannin/aðalstjóra/deildarstjóra, áðrenn bólkurin byrjar sítt arbeiði, um hvørt serlig viðurskifti eru, ið dentur skal leggjast á í viðgerðini. Frágreiðing frá øllum setanarsamrøðum skal gerast og skjalfestan av øllum arbeiði hjá setanarbólkum/nevndum.

- Setanarbólkur/nevnd skal grundgeva væl og virðiliga fyri metingunum av øllum umsøkjarum, sum lúka fakligu krøvini. Síðani skal setanarbólkurin innstilla og raðfesta umsøkjararnar út frá metingum og grundgevingum sínum.
- Landsstýrismaðurin skal ongantíð bert fáa eitt liðugt tilmæli um ein persón, men altíð hava møguleika at viðgera og viga, og gera sína sjálvstøðugu og grundgivnu meting við góðari ráðgeving frá fyrisitingini.
- Aðalstjóri og deildarstjóri skulu ikki vera í setanarnevndunum á økjum, sum teir varða av. Teir skulu ráðgeva landsstýrismanninum og viðgera innstillingar frá setanarnevndum saman við landsstýrismanninum.
- Ynskir landsstýrismaðurin sjálvur at tosa við umsøkjarar, so skal aðalstjóri/deildarstjóri og onkur annar nær í fyrisitingini taka lut í at fyrireika, avgreiða og skjalprógva slíkar samrøður.
- Fakliga kvalifiseraðir umsøkjarar, ið ikki fáa starv, eiga at fáa eina grundgeving, sum teir kunnu nýta í síni persónligu, fakligu og yrkisligu menning. T.e., sum leggur dent á styrkir og metingar um, hvat størri dentur kundi verið lagdur á hjá viðkomandi í setanartilgongdini.
- Tagnarskylda skal innskerpast og undirskrivast av øllum, ið hava við setanarmál at gera.

## 4. Rættartrygd og góður fyrisitingarsiður í sambandi við setanina av landsantikvari

Í sambandi við alla fyrisitingarligu viðgerðina av setanini av landsantikvari, er, eftir míni meting, ein sera avgerandi spurningur, sum hevur við rættartrygdina hjá umsøkjarunum at gera og við góðan fyrisitingarsið.

Talan er um viðgerðina av persónligu eginleikunum hjá umsøkjarunum og í hesum føri serliga hjá F.

I grundgevur í síni frágreiðing til Løgmans fyri, at hon valdi at fara inn í málið, tá hon gjørdist varug við, at uppáhald um alkoholtrupulleikar hjá F, vórðu viðgjørdir í setanarnevndini. Í tí sambandi bað hon um skjalfestan fyri, hví hetta varð tikið inn í málsviðgerðina.

Ongin skjalfestan finst í málinum um, hvaðani hetta uppáhald

er komið. Men staðfestast kann, at spurningurin hevur verið uppi, tí í frágreiðing frá samrøðu, sum limir í setanarnevndini hava havt við F í Keypmannahavn, verður staðfest, at umsøkjarin er spurdur um hetta.

Seinni hava umboðini í setanarnevndini skrivað undir uppá, at hetta ikki hevur havt ávirkan á viðgerð og tilmæli teirra.

Men hetta reisir undir øllum umstøðum fleiri spurningar:
*a) Ítøkiliga:* Sambært allari málsviðgerðini var F fakliga væl kvalifiseraður til starvið. Hann hevur drúgvar starvsroyndir í ymsum londum, góð viðmæli frá viðurkendum heimildarpersónum og eitt fakligt, vísindaligt útgávuvirksemi, sum er óvanliga stórt og viðkomandi fyri føroyskt forminnisarbeiðið. Hann hevur eisini leiðsluroyndir. Sostatt hevur hann sambært skjølunum í málunum fleiri fyrimunir framum hin umsøkjaran, A. Grundgevingarnar fyri, at hann ikki verður innstillaður til starvið mugu altso byggja á metingar av øðrum persónligum førleikum og eginleikum. Men hesar grundgevingar finnast ikki í tilfarinum frá setanarnevndini. Hinvegin finst skjalfestan av, at alkoholtrupulleikar eru viðgjørdir – men bert reistir mótvegis øðrum umsøkjaranum. Og metingin hjá setarnarnendini um persónligu eginleikarnar hjá báðum umsøkjarum tykjast sera ymiskar í tilmælunum.
*b) Viðvíkjandi niðurskrivingarskyldu:* At setanarsamrøður og samrøður við heimildarpersónar ikki eru skjalfestar, er eftir mínum tykki ikki í samsvari við fyrisitingarlóg og góðan fyrisitingarsið.
*c) Prinsippielt:* At illgruni um møguligar alkoholtrupulleikar hjá umsøkjara yvirhøvur er komin upp í viðgerðini og umsøkjari er spurdur um hetta, er eftir míni meting sera álvarsamt. Tað er ikki sakligt atlit. Í fyrsta lagi er onki skjalfest um hetta. Og í øðrum lagi eigur eitt slíkt uppáhald als ikki at kunna viðgerast í eini setan, har bert spurningurin um førleika at røkja starvið til fulnar kunnu leggjast til grund. Kunnu óskjalfestir illgrunar um persónligu lívsførslu umsøkjaranna koma upp á henda hátt í fyrisitingini, er rættartrygd og eins viðgerð av umsøkjarum prinsippielt í vanda.

Grundað á hetta, hevði I sera góðar grundgevingar fyri at fara inn í málið og at gera eina sjálvstøðuga meting.

Hevði hon ikki gjørt tað, hevði hon eftir mínum tykki átikið sær ábyrgd av skeivari fyrisiting í hesum máli.

### 5. Eftirlit løgmans við landsstýrismonnum og viðgerðin av hesum máli í mun til stýrisskipanarlóg, lóg um ábyrgd landsstýrismanna, fyrisitingarlóg og góðan fyrisitingarsið

Annar táttur í hesum máli er leikluturin hjá Løgmanni og Løgmansskrivstovuni, tá tey biða Mentamálaráðið um øll skjøl í málinum og fara undir at kanna málið um setan av landsantikvari.

Løgmaður hevur sambært stýrisskipanarlógini eftirlit við, at landstýrismenn fyrisita á fullgóðan hátt. Talan er um bæði eitt politiskt eftirlit og eftirlit við, at umsitið verður á lógligan hátt.

Í hesum sambandi reisir framferðin hjá løgmanni og fyrisiting hansara eftir mínum tykki nakrar sera álvarsligar spurningar, har eg niðanfyri skal greina mínar metingar:

*a) Politiska eftirlit Løgmans:* Var Løgmaður ónøgdur við politisku gerðir landsstýrismansins, so kundi hann antin loyst landsstýrismannin úr starvi uttan aðra grundgeving, ella hann kundi fyrst havt biðið landsstýrismannin um eina frágreiðing og síðani gjørt sær sína politisku niðurstøðu. Ongin ivi er um heimildir Løgmans í hesum sambandi. Tað er bert ein spurningur um politisku javnvágina og metingar.
*b) Løgliga eftirlit og fyrisiting Løgmans:* Í hesum máli valdi Løgmaður tó at reisa eitt fyrisitingarligt mál millum Løgmansskrivstovuna og Mentamálaráðið. Biðið var um øll skjøl frá Mentamálaráðnum í málinum og um eina frágreiðing frá landsstýrismanninum um fyrisitingina í málinum. Harvið gjørdist hetta eitt serstakt fyrsitingarligt mál hjá Løgmansskrivstovuni, har Mentamálaráðið gjørdist partur í málinum. Tað skal viðgerast sambært fyrisitingarlógini og lógini um alment innlit. Hetta seinna varð eisini gjørt, tá fjølmiðlar søktu um alment innlit frá Løgmansskrivstovuni og fingu játtað hesum.

Landsstýrismaðurin, I, gjørdi mótvegis Løgmanni og Løgmansskrivstovuni vart við, at hon sum partur í málinum tilskilaði sær

rættindi sambært fyrisitingarlógini. Hon vísti eisini á gegnisreglurnar í fyrisitingarlógini. Løgmansskrivstovan svaraði ikki brævinum sambært fyrisitingarlógini og ongin niðurstøða var send til partshoyringar sambært fyristingarlógini.

Eftir at Løgmansskrivstovan hevði viðgjørt málið fyrisitingarliga í rúma tíð, fekk I bræv frá Løgmanni um, at hon varð loyst úr starvi. Grundgevingarnar í brævinum eru partvíst politiskar, men viðgera eisini fyrisiting hennara sum landsstýrismaður.

Sostatt var fyrisitingarliga málið, sum Løgmaður og Løgmansskrivstovan høvdu reist og givið fjølmiðlunum innlit í, ikki avgreitt sambært fyrisitingarlógini, og er tað framvegis ikki.

Tað er undrunnarvert, at ein eftirlitsmyndugleiki sambært stýrisskipanarlógini, reisir eitt fyrisitingarligt mál um løgligt eftirlit, og fylgir síðani ikki fyrisitingarlógini.

Somuleiðis er tað undrunnarvert, at ein eftirlitsmyndugleiki, fer inn í eitt fyrisitingarligt mál, kannar málið, men ger onki við teir mongu týdningarmiklu spurningar um lógliga fyrisiting og góðan fyrisitingarsið, sum eftirlitsmyndugleikin hevur útvegað sær vitan um við síni kanning av málinum.

Spurningurin um, hvørt Løgmaður og Løgmansskrivstovan hava røkt sínar skyldur og fyrisitið rætt í hesum máli, er eftir mínum tykki sera týdningarmikil at fáa greiði á.

*c) Stýrisskipanarlógin og lóg um ábyrgd landsstýrismanna:* Í málinum kann staðfestast, at Løgmaður hevur lagt seg beinleiðis út í eitt fyrisitingarligt mál hjá landsstýrismanninum, áðrenn avgerð er tikin í málinum. Sambært stýrisskipanarlógini sita landsstýrismenn fyri sínum økjum hvør sær og hava rættarliga ábyrgd av síni fyrisiting, og hetta er nærri útgreinað í lógini um ábyrgd landsstýrismanna.

Um Løgmaður leggur seg beinleiðis út í fyrisitingina og málsviðgerðina hjá einum landsstýrismanni, so verður grundarlagið tikið undan rættarligu ábyrgdini hjá landsstýrismonnum. Somuleiðis verður grundarlagið undir eftirlitsskyldu Løgmans tikið burtur, tá hann hevur verið partur í viðgerðini av málinum frammanundan.

Í málinum gongur eisini fram, at beinleiðis samskifti hevur verið millum aðalstjóran í Mentamálaráðnum og Løgmansskriv-

stovuna, har aðalstjórin vísir aftur pørtum av frágreiðing landsstýrismansins til Løgmans.

Hetta er eftir mínum tykki heldur ikki í samsvari við stýrisskipanarlóg og lóg um ábyrgd landstýrismanna. Landsstýrismaðurin hevur rættarliga ábyrgd av sínum málsøki og síni fyrisiting, og tískil eigur alt samskifti í sambandi við eftirlit Løgmans at fara fram millum landsstýrismannin og Løgmann. Annars verður grundarlagið tikið undan møguleikanum at staðfesta ábyrgd landsstýrismanna.

Við hesum ummæli og viðmerkingum verður málið latið Umboðsmanninum. Eg eri sjálvsagt til reiðar at svara øllum spurningum annars, um Umboðsmaðurin skuldi havt tørv á tí."

Saman við skrivinum lá eisini ein frágreiðing frá teimum trimum embætisfólkunum í Mentamálaráðnum, sum vóru limir í setanarnevndini. Frágreiðingin er soljóðandi:

**„Viðmerkingar til ummæli landsstýrismansins viðv. kæru um setan av landsantikvari**

Landsstýrismaðurin hevur í t-posti (7. mai 2003, kl. 12.41) sent sítt ummæli til aðalstjóran, har embætisfólkini í setanarnevndi fáa høvi at gera viðmerkingar til ummælið hjá landsstýrismanninum.

Undirritaðu hava viðgjørt ummæli hjá landsstýrismanninum og hava hesar viðmerkingar:

Viðvíkjandi punkt 1 „Setanarpolitikkurin í málinum um setan av landsantikvari"

*Á síðu 2 verður skrivað síðst í 4. reglubroti:* „... og landsstýrismaðurin er ikki beinleiðis partur í hesum yvirhøvur." Hetta er ikki heilt rætt, tí á innanhýsis fundi í Mentamálaráðnum, tann 12. september 2002, verður eitt fundarupplegg til søvnini viðgjørt, herundir eisini lýsingarnar eftir landsskjalavørði og landsantikvari, og framferðarháttin í hesum sambandi. Landsstýrismaðurin tók undir við hesum.

Sagt verður, at landsstýrismaðurin sjálvur sær seg noyddan at fara inn í málið, tí hennara næstu í fyrisitingini sótu í setanarnevndini. Til hetta er at siga, at einki forðar nevndarlimunum í at ráðgeva landsstýrismanninum, hóast nevndin hevur tilmæli, sum

landsstýrismaður havnar. Hetta er ikki uttan so, at landsstýrismaðurin í forhond metir nevndarlimirnar sum illoyalar, tí teir hava aðra áskoðan enn landsstýrismaðurin. Eisini kundu onnur, t.d. málsábyrgdarhavandi fyri FMR og aðrir løgfrøðingar í MMR ráðgivið landsstýrismanninum, um so var, at hon kendi seg ótrygga við nevndarlimirnar.

Vit hava áður havt eitt mál, har landsstýrismaður setti tilmælið til viks, og tá gjørdi landsstýrismaðurin í samráði við setanarnevndina av at lýsa av nýggjum. (málið um setan av landsskjalavørði, fyrra umfar).

Í hesum sambandi kann verða mint á, at málið um setan av landsskjalavørði (annað umfar) var avgreitt um sama mundið sum málið um setan av landsantikvari. Hóast setanarproceduran við atliti at setanarnevnd og tilmæli var júst tann sama, hevur henda setan ikki givið høvi til atfinningar móti setanarnevndini av mannagongdini.

*Viðvíkjandi punkt 3 „Setanarpolitikkur frameftir bygt á royndirnar í málinum um setan av landsantikvari"*

Á síðu 4 grundgevur landsstýrismaðurin m.a. við: „*Bygt á royndirnar av hesum setanarmáli …*" og hevur tí valt at orða og nágreina setanarpolitikkin av nýggjum. Hetta hevur landsstýrismaður sjálvsagt sín fulla rætt at gera, men vit halda tað verða spell, at tað verður gjørt út frá einum einstøkum máli, tá ið setanarpolitikkurin í sjálvum Mentamálaráðnum hevur virkað framúr væl. Embætisfólkini í Mentamálaráðnum hava sitið í nógvum setanarnevndum og avgreitt stórt tal av setanarmálum. Øll hava virkað væl og hevur Mentamálaráðið fingið rós fyri handfaringina bæði frá settum og ósettum.

Undirritaðu eru av tí fatan, at tað hevði verið skilabetri at funni fram til, hvat veruliga gekk galið í hesum máli, tá ið setanartilgongdin í einari røð av setanarmálum hevur virkað sera væl.

Viðmerkingar til punkt 4

Viðvíkjandi alkoholtrupulleikum

Í frágreiðingini verður spurnartekin sett við, hví setanarnevndin fór undir at kanna alkoholtrupulleikarnar hjá F. Tað er fastur táttur at spyrja um alkoholnýtslu til allar setanarsamrøður (sí punkt 8 í skjalinum „Samrøðuevnir í smb. við setan av lands-

antikvari, tann 22. november 2002“), og hetta var eisini gjørt í sambandi við setanarsamrøðurnar hjá báðum umsøkjarunum. Nevndin varð undan og eftir samrøðurnar við F gjørd varug við, at F hevði havt ávísar alkoholtrupulleikar. Hesar upplýsingar komu frá starvsfólkaumboðnum í setanarnevndini og frá ráðgeva í Mentamálaráðnum, og komu fram í sambandi við umrøðu av málinum. Tað var alment kent, at F hevði søkt starvið, við tað at F sjálvur hevði boðað fleiri persónum, sum Mentamálaráðið hevur samstarv við frá hesum.

Nevndin metti, at hon hevði skyldu at kanna um nakað var í hesum uppáhaldum, ella um tey vóru leysir pástandir. Nevndin ynskti at fáa eina greiða fatan av hansara persónligu og leiðsluligu eginleikum og avgjørt var tí, at kalla F til eina setanarsamrøðu afturat. Tað kann í hesum sambandi nevnast, at tað ikki er óvanligt, at umsøkjari verður kallaður til tvær samrøður. Undir hesi seinni samrøðuni við F vóru pástandirnir um møguligar alkoholtrupulleikar viðgjørdir í beinleiðis samskifti við hann á sakligan og varisligan hátt. F var undir samrøðuni gjørdur varðugur við pástandirnar og fekk høvi at greiða nærri frá sínum viðurskiftum. Niðurstøðan í frágreiðingini frá 2. setanarsamrøðuni 3. desember 2002 vísa greitt, at setanarnevndin ikki metir hald vera í pástandunum og tað seinna útgreinandi tilmæli til landsstýrismannin hevur tí als onga umrøðu av hesum trupulleikum.

Tann 20. desember 2002 var setanarnevndin kallað inn til fundar við landsstýrismannin fyri at umrøða setanartilmæli frá 10. desember 2002. Hvørki á hesum fundi ella í notatinum frá landsstýrismaninum, sum hann sendi sama dag í t-posti, við boðum um nærri útgreiningum á ávísum økjum, var komið inn á alkoholtrupulleikar.

Viðvíkjandi a) Ítøkiliga

Setanarnevndin er samd við landsstýrismanni, M, um, at F var kvalifiseraður til starvið. Hetta ger nevndin eisini vart við í niðurstøðu síni, dagfest 10. desember 2002, har hon sigur *„Báðir umsøkjararnir eru kvalifiseraðir til uppgávuna sum landsantikvarur.“* Tað er tí lítil ivi um, at nevndin hevur mett, at báðir umsøkjararnir hava førleika til at røkja starvið, og at landsstýrismaðurin eftir tilmælinum kundi valt F. Hetta vísir aðalstjórin eisini á í

telduposti til I, dagfestur 21. januar 2003. Men líka greitt er tað eisini, at nevndin samanumtikið metir A betur egnaðan.

F hevði eitt størri útgávuvirksemi at vísa á enn A, men her skal ein hava í huga, at talan er fyrst og fremst um eitt fyrisitingarligt starv.

Við eini og hvørji setan verður ein heildarmeting gjørd av umsøkjarunum. Partsøkini í heildini eru m.a. ásett í lýsingini. Áðrenn fyrstu samrøðurnar við umsøkjarar ger nevndin ofta í samráð við landsstýrismannin sær greitt hvørjir eginleikar, ið eru neyðugir fyri at fáa í hesum føri ein góðan landsantikvar. Hesi partsøki kunnu vera leiðslumyndugleiki- og førleiki, menniskjaligir eginleikar, fakligir førleikar, samstarvsevni og mangt annað. Tað er latið nevndini upp í hendi at meta um, hvussu stóran týdning ymisku partsøkini hava í heildarmetingini. Nevndin hevur við grundarlagi í skjølum og samrøðum til uppgávu at meta um umsøkjararnar út frá sínum fakliga førleika og sannføring um, hvørja tyngd tey ymisku partsøkini eiga at hava og hvørja tyngd eftir nevndarinnar meting eru neyðug fyri at fáa ein góðan landsantikvar. Hjá A hevur nevndin m.a. lagt dent á fakligar kvalifikatiónir, leiðsluevni, nærlagni í arbeiðinum og dugnaskap at skipa fyri heimligum og altjóða tiltøkum. Tað kann ikki vera rætt at finnast at nevndini fyri ikki at koma til somu niðurstøðu sum landsstýrismaðurin. Landsstýrismaðurin hevur sjálvsagt rætt til at hava eina aðra fatan enn nevndin av, hvørjir partseginleikar eru neyðugir og at seta starvið sambært sínari sannføring. Hetta gjørdi nevndin landsstýrismanninum greitt eftir setanina, eins og nevndin tilsegði landsstýrismanninum fullan loyalitet, fyrisitingarligan og annan stuðul, um avgerðin skuldi givið landsstýrismanninum trupulleikar.

Viðvíkjandi b) niðurskrivingarskyldu

Setanarnevndin metir seg hava hildið niðurskrivingarskylduna sambært fyrisitingarlógina. Tað er ásett í § 6 í løgtingslóg um alment innlit, at tað, sum hevur týdning fyri avgerðina í einum fyrisitingarmáli, skal skrivast niður. Fyrisitingarmyndugleikin hevur sambært lógini ikki skyldu at gera fullfíggjaða fundarfrásøgn í tílíkum máli, men eftir meting skriva niður upplýsingar, sum lýsa málið. Undir setanarsamrøðunum skriva ein ella tveir limir í

setanarnevndini stuttorðaðar setningar, vegleiðandi orð, tøl ella tekn í sítt egna arbeiðsskjal, sum vanliga ikki verða skrásett. Beint eftir at setanarsamrøðurnar eru framdar, hevur setanarnevndin fund um setanina. Undir hesum fundum verður við grundarlagi í hondskrivaðum notatum, eftir gjøllari umhugsan og eftir umrøðu av samrøðuni og innihaldinum í øðrum skjølum, t.d. próvtøkuskjølum, gjørd felags frágreiðing, sum er grundarlag undir setanartilmælinum. Henda fyrsta frágreiðingin verður redigerað í sambandi við framhaldandi viðgerðina av málinum. Hesin framferðarháttur er nýttur í málinum um landsantikvarin, og nevndin metir, at hetta er í samsvari við ásetingarnar í lógini og í samsvari við góðan fyrisitingarsið.

Viðvíkjandi c) Prinsippielt

Nevndin kann vera samd við landsstýrismanni, M, í, at spurningar um møguliga alkoholmisnýtslu hjá umsøkjara til alment starv eru eymir og truplir at handfara á rættan hátt. Men, at spurningurin um alkoholtrupulleikar eftirfylgjandi fær eina so umfatandi viðgerð í málinum er óvanligt, og gitast kann bert um orsøkirnar til tað. Setanarnevndin kann bert staðfesta, at alkoholtrupulleikarnir fingu størri og størri rúmd í viðgerðini hjá fyrrverandi landsstýrismanni, eftir at landsstýrismaðurin hevði framt setanina, samstundis sum fokus var sett á málið og í hesum sambandi var størri og størri spurnartekin sett við leiklutin hjá fyrisitingini og setanarnevndini í tilgongdini. Tað er ikki upp til setanarnevndina at gera nakra niðurstøðu hesum viðvíkjandi.

Nevndin kann eisini vera samd við M í, at óskjalfestir illgrunar um persónliga lívsførslu kunnu seta rættartrygd umsøkjaranna í vanda. Nevndin umhugsaði gjølla, um hon skuldi gera meira við spurningin um møguligar alkoholtrupulleikar. Hon kom til ta niðurstøðu, at hon neyvan røkti sína uppgávu til fullnar, um hon royndi at skáka sær undan hesum ivamálinum, og ongin ivi var um, at hetta kundi koma aftur um brekku seinni. Hon avgjørdi tí av at samskifta beinleiðis við umsøkjaran um spurningin sum ein part av seinnu samrøðuni í Keypmannahavn. Samrøðan var eftir okkara meting góð og sannførandi. Hetta sæst av fundarfrásøgnini frá fundinum, har verður sagt: *„F kláraði seg betri til hesa samrøðuna enn undir samrøðuni, sum var í Føroyum, svaraði betri og*

*greiðari, men trupult var at koma inn á persónin.*" Lagt kann verða afturat, at F beint eftir samrøðuna í Keypmannahavn rósti báðum nevndarlimum, og segði seg hava fingið góða og professionella viðferð undir samrøðuni.

**Viðmerkingar til punkt 5**

Á síðu 7 (Eftirlit løgmans við landsstýrismonnum og viðgerðin av hesum máli í mun til stýrisskipanarlóg, lóg um ábyrgd landsstýrismanna, fyrisitingarlóg og góðan fyrisitingarsið) nevnir landsstýrismaðurin aðalstjórans leiklut í sambandi við, at aðalstjórin skrivar til Løgmann/Løgmansskrivstovuna.

Orsøkin til at aðalstjórin gjørdi hetta var, at hann føldi seg og embætisfólkini í setanarnevndini vera fyri órætti og hevði tí einki annað val. Nærri er greitt frá hesum í skrivum aðalstjórans til Løgmansskrivstovuna, dagf. 16. og serliga 18. februar 2003.

Setanarnevndin loyvir sær til endan at viðmerkja, at hon eftir bestu sannføring hevur hildið seg til tær mannagongdir, ið hava verið galdandi í MMR, síðan setanarpolitikkurin kom fram. Undirritaðu hava her afturvíst teimum ákærum, ið verða settar fram ímóti okkum, eitt nú við at vísa á, at ákærupunktini eru komin eftirfylgjandi t.d. sp. um alkoholmisnýtslu, tørvandi skjalprógvan v.m. Setanarnevndin fekk kenslu av at vera mótpólur hjá landsstýrismanninum eftir at fyrsta tilmæli var handað landsstýrismanninum, og hevur hon í eitt tíðarskeið kent seg kroysta út í verjustøðu ímóti sínum egna landsstýrismannni. Hetta kann ikki annað enn skapa trupulleikar fyri fyrisitingina, men vónandi er hetta saman við málinum farið aftur um bak. Nevndin hevur í sínum arbeiði ongantíð ivast í sínum loyaliteti mótvegis landsstýrismanninum og skyldu síni at vegleiða og ráðgeva objektivt, og tað vil hon eisini gera í framtíðini."

Við skrivum, dagfest 19. mai 2003, vóru hesi trý skrivini send ávikavist Løgmansskrivstovuni, Magistarafelag Føroya, landsstýrismanninum í mentamálum og aðalstjóranum í Mentamálaráðnum til ummælis.

Við skrivi, dagfest 10. juni 2003, hevur aðalstjórin boðað umboðsmanninum frá, at Mentamálaráðið ongar viðmerkingar hevur til skrivið frá Løgmansskrivstovuni.

Við skrivi, dagfest 18. juni 2003 hevur landsstýrismaðurin í mentamálum sent umboðsmanninum hesar viðmerkingarnar:

**„Ummæli av skrivum frá Løgmansskrivstovuni og frá aðalstjóranum í Mentamálaráðnum í sambandi við málið um setan av landsfornfrøðingi (tygara j. nr. 200300021/11).**
Vísandi til bræv tygara, dagf. 19. mai 2003, skal undirritaði gera viðmerkingar til skriv frá Løgmansskrivstovuni og aðalstjóranum í Mentamálaráðnum í sambandi við málið um setan av landsfornfrøðingi.

**1. Viðvíkjandi skrivinum frá Løgmansskrivstovuni.**
Í fyrsta lagi vísir Løgmansskrivstovan á, at Løgmaður tók málið um at seta landsfornfrøðing upp, orsakað av teimum mongu atfinninginum í kjalarvørrinum av, at landsstýrismaðurin tók avgerð í málinum.

Hetta tykir mær ikki sakliga grundgivið fyrisitingarliga. Heldur er talan um politisk atlit og metingar. Sum eg havi víst á mínum skrivi frá 7. mai 2003, so átti Løgmaður, um talan var um politisk atlit, at biðið um eina frágreiðing frá landsstýrismanninum. Nú váttar Løgmansskrivstovan, at hon valdi at reisa eitt fyrisitingarligt mál og at kanna fyrisitingarligu avgerð landsstýrismansins, orsakað av almennari umrøðu. Tað er so eitt val, men tað krevur at eisini hetta málið verður viðgjørt sambært fyrisitingarlóg og góðum fyrisitingarsiði.

Í tí sambandi undrist eg framvegis á, hví Løgmansskrivstovan ikki viðger spurningin um, hvussu eitt setanarmál og upplýsingar, sum eru fevndir av tagnarskyldu, eru vorðnir viðgjørdir í almenninginum. Sum I hevur víst á í síni frágreiðing til Løgmans, so er júst spurningurin um almennu viðgerðina av umsøkjarum og setanini tann mest avgerandi, tá tað snýr seg um fyrisiting, setanarpolitikk og rættartrygd umsøkjaranna. Hetta atlit tykist ikki at hava verið lutur í viðgerðini hjá Løgmansskrivstovuni.

Sum heild tykist alt grundarlagið fyri, at hetta mál verður fyri so drúgvari almennari viðgerð, sum endar við at ein landsstýrismaður verður settur frá, at vera fjølmiðlaumrøða. Tað kann so altíð vera ein politisk grundgeving hjá løgmanni at loysa

landsstýrismann úr starvi, men tað hevur eftir mínum tykki onki grundarlag í lóggávu og góðum fyristingarsiði.

Løgmansskrivstovan vísir á, at hon:

*„gjøgnumgekk skjølini í málinum til tess at meta um, hvørt ivi kundi vera um setanartilgongdina. Hetta var fyrst og fremst gjørt við støði í starvsfólkapolitikki landsins og við atliti at setanarpolitikkinum og góðum fyrisitingarsiði annars.*

*Løgmansskrivstovan kom til ta niðurstøðu, at viðurskifti eru, sum benda á, at málið er ikki handfarið á nøktandi hátt. Hinvegin varð ikki mett, at hetta einsamalt var grundarlag fyri at taka fyrisitingarliga avgerð sum til dømis at taka aftur avgerðina um at seta landsfornfrøðing“*

Í tí sambandi skal eg vísa til viðmerkingar mínar í skrivi frá 7. mai 2003 undir punkti 5: „Eftirlit løgmans við landsstýrismonnum og viðgerðin av hesum máli í mun til stýrisskipanarlóg, lóg um ábyrgd landsstýrismanna, fyrisitingarlóg og góðan fyrisitingarsið.“

Løgmansskrivstovan váttar, at hon hevur viðgjørt málið sum eitt fyrisitingarligt mál og hevur gjørt niðurstøðu í málinum. Niðurstøðan sigur, at har eru „viðurskifti, sum benda á, at málið er ikki handfarið á nøktandi hátt.“ Henda niðurstøðu gongur eisini aftur í uppsagnarbrævi løgmans til I.

Hetta váttar eftir mínum tykki mínar niðurstøður í ummæli mínum frá 7. mai 2003. Fyrisitingarliga vísir Løgmansskrivstovan ikki á nakrar sakligar og grundgivnar orsøkir til sína niðurstøðu yvirhøvur. Og I hevur ikki sum partur í málinum fingið partshoyring til hesa ógrundgivnu niðurstøðu.

Løgmansskrivstovan vísir á, at hon í síni viðgerð av málinum hevur tikið støði í starvsfólkapolitikki landsins og við „atliti at setanarpolitikkinum“ og góðum fyristingarsiði annars. Hetta tykir mær skeiv mannagongd, tí stýrisskipanarlóg, lóg um ábyrgd landsstýrismanna og fyrisitingarlóg áttu at verið sjálvsagt grundarlag undir viðgerðini og síðani mett í samsvari við góðan fyrisitingarsið, starvsfólkapolitikk og setanarpolitikk.

Sostatt kann eg bert endurtaka, at tá Løgmansskrivstovan setur sær fyri at reisa eitt mál fyrisitingarliga, sum snýr seg um at meta um fyrisitingina hjá einum landsstýrismanni, so er tað undrunnarvert, at Løgmansskrivstovan ikki tykist at fylgja lóggávu og siðvenju í síni egnu viðgerð av málinum.

Løgmansskrivstovan vísir á, at hon hevur mett um, hvørt grundarlag var fyri at taka avgerð landsstýrismansins um at seta landsfornfrøðing aftur.

Hetta váttar eftir míni meting, at stýrisskipanarlóg, lóg um ábyrgd landsstýrismanna og fyrisitingarlóg og góður fyrisitingarsiður ikki eru fylgd frá Løgmansskrivstovuni.

Eftir míni avgjørdu meting, hevur Løgmansskrivstovan ikki heimild at taka aftur avgerð hjá einum landsstýrismanni. Landsstýrismenn sita fyri sínum øki hvør sær og hava rættarliga ábyrgd av sínum fyrisitingarligu avgerðum. Løgmaður og Løgmansskrivstovna eru ikki kærumyndugleiki í fyrisitingarligum avgerðum hjá landsstýrismonnum og hava ikki heimild at leggja seg út í ítøkiligar fyrisitingarligar avgerðir hjá landsstýrismonnum ella at broyta tær. Verður tað gjørt, eru bæði landsstýrismannaábyrgd og rættartrygd í vanda.

Harafturat tykist Løgmansskrivstovan ikki at hava givið tí ans, at Løgmaður frammanundan viðgerð Løgmansskrivstovunnar – og innan avgerð landsstýrismansins – hevur verið uppi í málinum og sagt sína hugsan um, hvør avgerð skuldi takast í málinum. Løgmansskrivstovan hevur ikki gjørt eina meting av, hvørt hetta er í samsvari við reglurnar í fyrisitingarlógini og góðan fyrisitingarsið.

**2. Viðvíkjandi viðmerkingum frá aðalstjóranum í Mentamálaráðnum**

Samanumtikið skal eg vísa til frágreiðing mína, har eg havi bygt á øll skjøl í málinum – harundir frágreiðingina til Løgmans frá undanfarna landsstýrismanni, I. Har hevur I greitt frá, hví hon heldur tað verða neyðugt at fara nærri inn í málið, hvat tilfar, hon hevur saknað til sína støðutakan, og hví hon valdi at gera sína egnu meting eftir samrøðu við umsøkjararnar. Mín niðurstøða er framvegis, at landsstýrismaðurin hevur havt sakligar og góðar grundgevingar fyri sínum avgerðum og er farin rætt fram.

Tí er eisini neyðugt at sláa fast, at hetta málið – bæði almenna umrøðan, kæran frá Magistarafelagnum og úrslitið: at I varð koyrd frá – snýr seg fyrst og fremst um, hvørt I er farin rætt fram og hevur fyrisitið rætt mótvegis umsøkjarunum/borgarunum. Til tess at meta um tað, er neyðugt at hyggja at allari gongdini í

málinum og at grundgevingum, atlitum og ábyrgdum í allari málsviðgerðini.

Tí er eftir tað eftir mínum tykki at venda málinum á høvdið, tá aðalstjórin og setanarbólkurin tosar um „ákærur og ákærupunkt“ mótvegis embætisfólkunum. Skulu vit nýta orð sum ákærur, so meti eg, at ákærur og dómur er feldur mótvegis I – í almenninginum, frá Løgmansskrivstovuni og frá Løgmanni. Og til tess at viðgera metingarnar og avgerðirnar hjá I – t.e. hennara fyrisitingarligu ábyrgd – hevur verið neyðugt at hugt at øllum málinum og leiklutinum hjá øðrum í fyrisitingini.

Eg skal siga meg samdan við tí partinum av viðmerkingunum frá aðalstjóranum/setanarnevndini sum sláa fast: „Tað kann ikki vera rætt at finnast at nevndini fyri ikki at koma til somu niðurstøðu sum landsstýrismaðurin. Landsstýrismaðurin hevur sjálvsagt rætt til at hava eina aðra fatan enn nevndin av, hvørjir partseginleikar eru neyðugir og at seta starvið sambært sínari sannføring“.

Júst hetta hevur landsstýrismaðurin gjørt. Men tað er ikki nóg mikið. I hevur víst á, at avgerð hennara byggir á neyvar metingar, sakligar grundgevingar og greið ynskir um, hvørjar fyrimunir teir ymsu kvalifiseraðu umsøkjararnir hava. Í tí sambandi hevur I greitt frá málsgongdini og viðgerðini fram til hon gjørdi sína niðurstøðu:

- at hon valdi at kanna grundarlagið nærri, tá hon hoyrdi, at alkoholtrupulleikar hjá øðrum umsøkjaranum vórðu viðgjørdir
- at hon ynskti neyvari grundgevingar, men helt seg ikki fáa nóg góðar grundgevingar frá setanarnevndini um báðar teir kvalifiseraðu umsøkjararnar
- at hon tí ynskti sjálv at hava samrøður til tess at meta um umsøkjararnar og hoyra um framtíðarætlanir teirra
- at í hesi gongdini komu samskiftis trupulleikar og ósemjur upp millum hana og partar av fyrisitingni – sum eisini sæst á skjølunum í málinum.

Tað er so alt eitt mál, sum kann eftirkannast og metast um. At ein landsstýrismaður tekur eina avgerð, sum embætisverkið ikki er samt í, er ikki óvanligt ella nakað eindømi. Heldur ikki, at ein landsstýrismaður vil hava betri grundgevingar frá embætisverk-

inum ella er ónøgdur við arbeiðið, sum er gjørt. Spurningurin er, hvørt landsstýrismaðurin fyrisitur rætt og lógliga.

Tað løgna í øllum hesum málinum er tann almenna umrøðan og tað rokið og tær avleiðingar, sum avgerð landsstýrismansins skapar.

Annars skal eg gera hesar viðmerkingar til skrivið frá aðalstjóra/setanarnevnd:

**a) Viðvíkjandi samskiftinum millum I og aðalstjóra/setanarnevnd**

Aðalstjórin/setanarnevndin gera fleiri viðmerkingar til, hvat er sagt, ella hvat er farið fram í ikki niðurskrivaðum samskifti. Undirritaði kann ikki meta um, hvussu dagliga samskiftið er farið fram, og hvat er sagt og ikki. Eg havi bert hildið meg til tað, sum gongur fram av málinum, og har havi eg ikki síðani fingið nýggjar upplýsingar, ið broyta mínar niðurstøður. Um uppáhald eru um, hvat er sagt og ikki millum I og embætisfólkini, tá kann bert hon sum persónur svara tí.

**b) Viðvíkjandi setanarpolitikki frameftir**

Aðalstjórin/setanarnevndin harmast um, at hetta einstaka málið er grundarlag undir at broyta setanarpolitikkin. Til tað er bert at siga, at hetta málið hevur reist avgerandi prinsipiellar spurningar. Og tað er júst tá ið slíkir spurningar reisast, at neyðugt er at gera broytingar og nágreina praksis. Eg havi nágreinað setanarpolitikkin út frá teirri prinsipiellu meting, at tann sum er setanarmyndugleiki, skal gera eina sjálvstøðuga meting og skal grundgeva sjálvur fyri sínum niðurstøðum. Hetta haldi eg vera rætt og eitt krav sambært fyrisitingar og ábyrgdarlóg.

***c) Viðvíkjandi alkoholtrupulleikum***

Aðalstjórin/setanarnevndin gera vart við, at alkoholtrupulleikar hava fingið vaksandi viðgerð í hesum máli. Tað havi eg ikki vitað um – og tað hevur tíbetur ikki verið nøkur almenn viðgerð av tí yvirhøvur. Eisini verður víst á at „gitast kann bert um orsøkirnar til tað“ (s. 3, n.) Hesin setningur tykir mær illa grundgivin, og eg skal bert vísa til mína frágreiðing um henda spurning, sum eg framvegis meti sera prinsipiellan. Eg havi ikki sagt, at hetta er øll

orsøkin til at F ikki verður innstillaður. Eg kann bert staðfesta, at alkoholtrupulleikar eru viðgjørdir og at sera fáar grundgevingar eru fyri, at F ikki verður innstillaður. Og hetta tykir mær framvegis ikki trygt, uttan mun til um tað hevur havt avgerandi týdning ella ikki. Bert førleikar at røkja starvið eiga at verða grundarlag undir viðgerðini.

***d) Viðvíkjandi niðurskrivingarskyldu***

Eg haldi framvegis, at í einum máli, har landsstýrismaðurin er setanarmyndugleiki og skal taka avgerð út frá arbeiðinum hjá eini setanarnevnd og har stórur dentur verður lagdur á at meta um persónligu eginleikar hjá tveimum kvalifiseraðum umsøkjarum, at tað eru upplýsingar av týdningi í setanarsamrøðum og tí átti sjálvstøðugt notat at verið gjørt frá hvørjari."

Við skrivi, dagfest 27. juni 2003, hevur Løgmansskrivstovan sent umboðsmanninum hesar viðmerkingar:

„Í brævi, dagfest 19. mai 2003, biður Umboðsmaðurin um møguligar viðmerkingar frá Løgmansskrivstovuni til ummæli frá landsstýrismanninum í mentamálum og viðmerkingar frá aðalstjóranum í Mentamálaráðnum viðvíkjandi málinum um at seta landsfornfrøðing.

Við hesum verða viðmerkingar Løgmansskrivstovunnar lýstar.

Til punkt 1. Setanarpolitikkurin í málinum um setan av landsantikvari

Landsstýrismaðurin í mentamálum vísir í sínum viðmerkingum á, at setanarpolitikkurin hjá Løgmansskrivstovuni einki sigur um, hvussu farast skal fram, tá landsstýrismaðurin tekur stig í síni egnu fyrisiting.

Viðmerking okkara til hetta er, at setanarpolitikkurin er tilætlaður fyrisitingini og er orðaður *generelt,* tí hann vendir sær til alla fyrisitingina. Ætlanin var, at einstøku stovnarnir skulu tillaga setanarpolitikkin til teirra serligu viðurskifi, um hetta er neyðugt.

Vit skilja ikki rættiliga, hví I fór inn í setanarmálið grundað á, at hennara næstu embætisfólk sótu í setanarnevndini. Hon var við til at seta hesa nevnd.

Landsstýrismaðurin í mentamálum vísir til ráðgevingina frá Løgmansskrivstovuni. Viðmerking okkara til hetta er, at vit góvu varisligt ummæli, tí vit ikki kendu gongdina og smálutir í málinum. Hetta var eftir, at I í stuttum hevði umrøtt málið eftir ein landsstýrisfund, tó uttan at lýsa, hvørjar veruligar trupulleikar, hon metti seg at hava. Til staðar undir hesi umrøðuni vóru m.a. løgmaður, N og undirritaða. M var eisini til staðar í sama høli part av tíðini.

Landsstýrismaðurin í mentamálum setir í viðmerkingum sínum spurning við, um Løgmansskrivstovan átti at mælt til at lýsa starvið av nýggjum. Viðmerking okkara til hetta er, at Løgmansskrivstovan undir omanfyri nevndu umrøðu júst spurdi I, um tað ikki var vert at umhugsa at lýsa starvið av nýggjum. Tí tað tyktist, sum hevði hon ikki álit á tilgongdini. I helt tað ikki vera ráðiligt at lýsa av nýggjum, tí tilgongdin var komin so mikið langt. Hetta sjónarmið skiltu vit.

Landsstýrismaðurin í mentamálum vísir í sínum viðmerkingum á, at I tryggjar, at setanarmyndugleikin ger eina sjálvstøðuga meting, og at hetta er ein skylda sambært lóg um ábyrgd landsstýrismanna, fyrisitingarlógini og góðum fyrisitingarsiði. Hesa grundgeving skilja vit ikki heilt, tí Mentamálaráðið er fyrisiting landsstýrismansins. Høvuðsuppgáva tess er júst at fyrireika og veita landsstýrismanninum ráð um áleikandi mál. Løgmansskrivstovan fekk ta fatan, at einki álit var millum I og fyrisiting hennara. Vit kendu tó ongar smálutur í málinum og kundu tí einans meta um viðurskiftini út frá *generellum* viðurskiftum.

### Viðmerkingar til punkt 2. Setanarpolitikkur og samsvari við lóg um ábyrgd landsstýrismanna, fyrisitingarlóg og góðan fyrisitingarsið

Løgmansskrivstovan er samd við landsstýrismannin í mentamálum í, at setanarpolitikkurin ikki á nakran hátt setur til viks lóggávu. Hetta skilst eisini av formælinum til starvsfólkapolitikkin, har sagt verður, at starvsfólkaviðurskifti, sum eru ásett í lóg, sáttmála ella reglugerð eru ikki endurgivin í starvsfólkapolitikkinum, og ansast má tí eftir, at slíkar ásetingar eisini verða fylgdar, tá tað snýr seg um at fremja starvsfólkapolitikkin í verki.

Viðmerkjast skal, at broytingar í setanarpolitikkinum hjá Løgmansskrivstovuni vóru kunngjørdar beint eftir, at landsstýrismaðurin tók avgerð um at seta landsfornfrøðing. Hesi viðurskifti hava tó einki við hvørt annað at gera. Høvuðsbroytingin í dagførda setanarpolitikkinum snýr seg um at vegleiða setanarmyndugleikar um, hvussu noktandi svar skal grundgevast. Orsøkin til hesa nágreining av setanarpolitikkinum var m.a. grundað á, at royndir vístu, at fleiri setanarmyndugleikar „gloyma" at grundgeva fyri noktandi svari.

Harumframt hevði Løgtingsins Umboðsmaður í málinum um setan av landsverkfrøðinginum víst á, at tað er neyðugt at grundgeva. Vit skilja tí ikki, hví landsstýrismaðurin í mentamálum umrøður dagførda setanarpolitikkin í hesum høpi, ikki minst tá hann sjálvur frammanundan hevur sagt, at I grundgav skrivliga mótvegis A, hóast dagførdi setanarpolitikkurin ikki var kunngjørdur, tá setanin fór fram.

Landsstýrismaðurin í mentamálum vísir á, at tað samsvarar ikki við fyrisitingarlógina at viðgera umsøkjara og hansara førleikar í skrivligum samskifti mótvegis øðrum umsøkjara.

Okkara viðmerking til hetta er, at tað er góður siður, at nevndin fyrireikar seg serliga væl undan setanarsamrøðunum, eitt nú við at seta upp tey serligu evnini (førleikaevni og eginleikar) dentur skal leggjast á. Tá ið niðurstøðan verður gjørd og tey, sum ikki fáa starvið skulu hava svar, er umráðandi at orða seg positivt og vísa á tey serligu evnini, sum dentur varð lagdur á, tá avgerðin varð tikin. Hetta er ikki tað sama sum at viðgera umsøkjara og hansara førleika í skrivligum samskifti mótvegis øðrum umsøkjara.

Landsstýrismaðurin í mentamálum sigur víðari, at serliga undrunarvert er, at nevnt verður sum dømi, at metingar um persónligar eginleikar og samstarvsvilja hjá einum umsøkjara skulu sendast til ein annan umsøkjara. Løgmansskrivstovan heldur, at hetta man vera misskilt, tí tað snýr seg ikki um at senda persónligar niðurstøður viðvíkjandi einum umsøkjara til annan. Tað snýr seg um eina heildarmeting, sum tekur støði í teimum førleikum og eginleikum, sum dentur varð lagdur á, áðrenn starvið varð sett. Orsøkin til at persónligu eginleikar og samstarvsvilji verða nevnd sum dømi er, at hesi viðurskifti kunnu vera sera

torfør at meta um, og setanarnevndin eigur at fyrireika seg væl, fyri at kunna meta um hetta. Fakligi førleikin, royndir v.m. eru vanliga lættari at hava við at gera.

Setanarpolitikkurin er skipaður sum leiðreglur, ið løgmaður hevur sent út, eftir at tær hava verið viðgjørdar á landsstýrisfundi.

**Til punkt 3. Setanarpolitikkur fram eftir bygt á royndirnar í málinum um setan av landsantikvari**

Løgmansskrivstovan metir tað vera óheppið, at aðalstjóri og deildarstjóri ikki skulu verða í setanarnevndum á økjum, sum teir sjálvir varða av. Torført er sum annar persónur at ráðgeva triðja persóni um arbeiðið, sum fyrsti persónur hevur gjørt.

Í teimum førum, tá landsstýrismaður sjálvur ynskir at tosa við umsøkjarar, halda vit tað vera umráðandi, at persónar, sum frammanundan hava verið við í tilgongdini, eisini eru við til hesar samrøður. Hetta fyri at tryggja framhald og til tess at sleppa undan misskiljingum.

Sambært setanarpolitikkinum eiga allar umsóknir at verða viðgjørdar í trúnaði. Fyri tænastumenn verður tó víst til grein 5, stk. 3 í løgtingslóg nr. 31 frá 5. juli 1971 um tænastumenn landsins.

**Til punkt 4. Rættartrygd og góður fyrisitingarsiður í samband við setanina av landsantikvari**

Til a) Ítøkiliga: Landsstýrismaðurin í mentamálum nevnir, at sambært skjølunum í málinum, hevði F fleiri fyrimunir í mun til hin umsøkjaran, og at landsstýrismaðurin metir, at grundgevingar fyri, at F ikki verður innstillaður, mugu tískil byggja á metingar av øðrum persónligum førleikum og eginleikum.

Viðmerking okkara til hetta er, at hetta júst er kjarnan í einari og hvørjari setanarsamrøðu – metingar, sum taka støði í persónligum førleikum og eginleikum. Hetta er ein hin týdningarmesta orsøkin til at hava setanarsamrøðu.

Til b) Viðvíkjandi niðurskrivingarskyldu: Løgmansskrivstovan er samd við metan landsstýrismansins í hesum.

Til c) Princippielt: Landsstýrismaðurin í mentamálum metir tað verða álvarsamt, at illgruni um møguligar rúsdrekkatrupulleikar hjá umsøkjara yvirhøvur er komin upp í viðgerðina, og at umsøkjari er spurdur um hetta.

Løgmansskrivstovan er samd í, at slíkt er álvarsamt. Vit leggja dent á, at tað hevði verið enn meira álvarsamt, um slíkt var komið fyri oyra á limum í setanarnevndini, og setanarnevndin ikki hevði tikið tað upp. Annars er spurningurin um rúsdrekkamisnýtslu vanliga ein natúrligur partur av setanarsamrøðum, bæði í Føroyum og uttanlands.

**Til punkt 5. Eftirlit løgmans við landsstýrismanninum og viðgerðin av hesum máli í mun til stýrisskipanarlóg, lóg um ábyrgd landsstýrismanna, fyrisitingarlóg og góðan fyrisitingarsið**

a) og b) Politiska eftirlit løgmans og b) løgliga eftirlit og fyrisiting løgmans: Tá løgmaður heitir á I, landsstýrismann um at fáa eina nágreiniliga lýsing av málinum, um at seta landsfornfrøðing, vísir hann til § 33 í stýrisskipanarlógini. Hetta gjørdi hann orsakað av teimum mongu atfinningunum, ið komu í kjalavørrinum av, at landsstýrismaðurin ikki fylgdi tilmælum frá einmæltum setanarbólki, tá hon avgjørdi at seta starvið. Við hesum vildi løgmaður gera sína meting í málinum uttan mun til, um tað snúði seg um løgfrøði, góðan fyrisitingarsið og/ella politisk viðurskifti.

Í síni heild heldur Løgmansskrivstovan, at skjølini í málinum, ið Umboðsmaðurin hevur fingið, lýsa hvørjar metingar og í hvørjum høpi, arbeiðið hjá Løgmansskrivstovuni er gjørt, og hvørja støðu løgmaður hevði til málið, tá samanum kom.

c) Stýrisskipanarlógin og lóg um ábyrgd landsstýrismanna Landsstýrismaðurin í mentamálum nevnir, at tað í málinum gongur fram, at beinleiðis samskifti hevur verið millum aðalstjóran í Mentamálaráðnum og Løgmansskrivstovuna, har aðalstjórin vísir aftur pørtum av frágreiðing landsstýrismansins til løgmans. Løgmansskrivstovan skilir ikki, hvat landsstýrismaðurin í mentamálum sipar til her. Verður sipað til, at aðalstjórin í sínum viðmerkingum til málið vísir til evnisdag, ið Løgmansskrivstovan hevur hildið á Hotel Føroyum um sambandi millum politikkara og embætisfólk, so hevur landsstýrismaðurin í mentamálum misskilt skrivið. Tí tað var als einki samband millum Løgmansskrivstovuna og aðalstjóran um hesar viðmerkingar. At Løgmansskrivstovan stóð fyri nevnda evnisdegi, hevur als einki við málið at gera, og tað er ikki umrøtt millum Løgmansskrivstovuna og umboð fyri Mentamálaráðið.“

Við skrivi, dagfest 30. juni 2003, vóru viðmerkingarnar frá landsstýrismanninum og Løgmansskrivstovuni sendar ávikavist Løgmansskrivstovuni, Magistarafelag Føroya, landsstýrismanninum í mentamálum og aðalstjóranum í Mentamálaráðnum til ummælis.

Við skrivi, dagfest 3. juli 2003 hevur landsstýrismaðurin í mentamálum sent umboðsmanninum hesar viðmerkingar:

**„Viðmerkingar til skriv frá Løgmansskrivstovuni í sambandi við málið um setan av landsfornfrøðingi (tygara j. nr. 200300021/22)**

Vísandi til bræv tygara dagf. 30. juni 2003, skal undirritaði gera viðmerkingar til skriv frá Løgmansskrivstovuni í sambandi við málið um setan av landsfornfrøðingi.

Víst verður til tey fimm punktini í skrivinum frá Løgmansskrivstovuni (hereftir: LMS).

**Viðvíkjandi punkti 1**

Eri samdur og fegin um presiseringina hjá LMS av, at setanarpolitikkurin er at skilja sum generellar leiðreglur.

Hevði tað staðið øllum greitt, hevði hetta málið neyvan fingið slíkar avleiðingar fyri landsstýrismannin, tí hon fylgdi eftir mínum tykki bæði generellu leiðreglunum frá LMS og innanhýsis leiðreglunum hjá Mentamálaráðnum, og valdi at útinna sínar skyldur soleiðis sum gjørt varð.

LMS sigur seg ikki skilja, hví landsstýrismaðurin fór inn í málið, grundað á, at hennara næstu embætisfólk sótu í setanarnevndini, og tí hon hevði sjálv sett nevndina. Her má vera talan um eina misskiljing hjá LMS. Landsstýrismaðurin fer inn í málið grundað á onnur viðurskifti, og tí hon vil gera sína egnu meting – ikki tí hennara næstu fólk sita í nevndini. Landsstýrismaðurin samskiftir eisini og leitar sær ráðgeving hjá sínum næstu fólkum, sum sita í setanarnevndini.

Tað sum undirritaði síðani hevur broytt í setanarpolitikkinum er, at eg ynski, at landsstýrismaðurin skal hava síni næstu embætisfólk saman við sær at gera eina meting og eina niðurstøðu sum setanarmyndugleiki, *eftir* at setanarnevnd/bólkur hevur gjørt sínar metingar av fakligum og øðrum kvalifikasjónum.

Eri samdur í, at Løgmansskrivstovan hevur ráðgivið I generelt, men ta ráðgeving eg vísi til, er endurgivin í telduposti viðvíkjandi setanarsamrøðu hjá landsstýrismanni við umsøkjarar. Hetta hevur týdning, tá Løgmansskrivstovan seinni fer undir at meta um fyrisiting landsstýrismansins í júst hesum málinum. Serliga tá havt verður í huga, at Løgmaður alment og í fyrispurningi á tingi hevur svarað, at hann metir tað sera álvarsligt og brot á setanarpolitikkin, at landsstýrismaðurin sjálvur hevur havt setanarsamrøður.

LMS er ikki samd í míni meting viðvíkjandi setanarmyndugleikanum og skyldu landsstýrismansins at tryggja eina sjálvstøðuga meting. Til tað er at siga, at eg leggi dent á, at ein setanarnevnd ella innstillingarnevnd ikki er sjálvur setanarmyndugleikin. Og tí eigur landsstýrismaðurin at gera eina sjálvstøðuga meting og at útvega sær alt neyðugt tilfar til tess at taka sína avgerð. Tað hevur landsstýrismaðurin eftir mínum tykki gjørt.

**Viðvíkjandi punkti 2**

Eg fegnist um, at LMS er samd í flestu viðmerkingum mínum og presiserar endamálið við setanarpolitikkinum.

Viðvíkjandi uppískoytinum í setanarpolitikkinum um skrivligar grundgevingar fyri noktan, so tekur LMS undir við, at viðurskifti hjá einum umsøkjara ikki skulu viðgerast mótvegis øðrum umsøkjara, men LMS metir, at undirritaði hevur misskilt orðingina. Tá vildi eg mælt til, at umrødda orðing verður broytt, tí ilt er at skilja hana øðrvísi enn hon stendur:

*„Noktandi svar skulu vera skrivlig og grundgivin.*

*Í grundgevingini skal verða kunnað um støðið undir avgerðini. T.d. hví mett er, at førleikin hjá tí, ið settur er í starvið, svarar betur til settu krøvini, enn førleikin hjá tí, ið ikki er settur – eitt nú viðvíkjandi útbúgving, starvsroyndum, persónligum eginleikum og/ella samstarvsvilja.“*

Orsøkin til, at undirritaði hevur nevnt dagførda setanarpolitikkin er tí, at hann hevur verið framhildin í allari almennu viðgerðini av hesum máli og í kæruni til Løgtingsins Umboðsmann, og at eisini hevur verið víst til dagførdu útgávuna, sum varð broytt beint eftir, at avgerð varð tikin um landsfornfrøðingin.

**Viðvíkjandi punkti 3**

Undirritaði skilur ikki viðmerkingarnar hjá LMS um, at aðalstjóri og deildarstjóri skulu verða partar av setanarnevndum. LMS sigur, at *„torført er sum annar persónur at ráðgeva triðja persóni um arbeiði, sum fyrsti persónur hevur gjørt.“*

Undirritaði skilur ikki hetta sjónarmið, tí um tað er rætt, so er altíð torført hjá eini fyrisiting at ráðgeva sínum landsstýrismanni.

Avgerandi er eftir mínum tykki, at setanarnevndir ikki gerast setanar*myndugleiki*, men hinvegin burturav skulu útvega eitt *sakligt avgerðargrundarlag* til setanarmyndugleikan. Setanarmyndugleikin skal hava møguleika og hevur eftir mínum tykki skyldu at gera sína egnu meting og at viga tey ymsu atlitini hvør móti øðrum. Og har er eftir mínum tykki best, at landsstýrismaðurin kann meta um arbeiðið og niðurstøðurnar hjá setanarnevndum saman við aðalstjóra og deildarstjóra. Eg haldi hetta vera bestu loysnina í MMR, men harvið er ikki sagt, at onnur ikki skulu gera tað øðrvísi.

Annars eri eg samdur við LMS um, at gott er at hava kontinuitet og hava við persónar, sum frammanundan hava verið við í tilgongdini, um landsstýrismaðurin sjálvur ynskir at tosa við umsøkjarar. Hetta varð eisini gjørt í sambandi við samrøður til starvið sum landsfornfrøðingur.

**Til punkt 4**

Undirritaði er samdur við LMS um orsøkirnar til at hava setanarsamrøðu. Men tá krevur tað eisini eina góða grundgeving og skjalfestan til setanarmyndugleikan – og tað var hetta I saknaði og vildi hava útgreinað nærri. Og til tess at meta um ivamál viðvíkjandi framtíðar hugsjónum og persónligum eginleikum, valdi hon sjálv at tosa við umsøkjarar.

Undirritaði er samdur við LMS um at rúsdrekkatrupulleikar skulu kannast, um skjalfestan er um, at teir kunnu hava týdning fyri starvsligu førleikar umsøkjarans. Tá krevst eisini sera góð grundgeving og skjalfestan fyri, hvussu tílíkar upplýsingar verða viðgjørdar, og at allir umsøkjarar fáa eins viðgerð.

Tað er framvegis skeivt eftir mínum tykki, at óskjalfestar ákærur kunnu reisast og takast við í eini saksviðgerð. Skal slíkt takast upp

og viðgerast, so má tað byggja á haldgott og skjalfest grundarlag. Og eru ákærur kannaðar og afturvístar, tá átti tað at gingið týðiligari fram í niðurstøðunum hjá setanarnevndini og í skjalfestingunum í málinum.

Tað haldi eg saknast í hesum máli, og tí havi eg nevnt tað sum eitt prinsippmál og biðið um eina frágreiðing.

Sambært I var tað av ivamálum um tílíkan spurning, at hon av álvara valdi at kanna setanarmálið nærri og biðja um skjalfestan og grundgevingar.

**Til punkt 5**

Um politiska og løgliga eftirlit løgmans, sakni eg framvegis eina sakliga grundgeving fyri teirri fyrisitingarligu viðgerðini, tá LMS velur at biðja um alt málið, og harvið reisa eitt fyrisitingarligt mál. Viðgerðin hjá LMS er eftir mínum tykki ikki í samsvari við stýrisskipanarlógina, lóg um ábyrgd landsstýrismanna, fyrisitingarlógina og góðan fyrisitingarsið.

Um samskiftið beinleiðis millum aðalstjóran í MMR og Løgmansskrivstovuna, so er tað sum undirritaði sipar til, tann frágreiðing, sum aðalstjórin sendi til løgmann eftir at landsstýrismaðurin hevði sent sína frágreiðing til løgmann.

**Samanumtikið**

Undirritaði hevur sum er ikki meira at leggja afturat í hesum máli. Samanumtikið kann málið lýsast rættiliga stutt frá undirritaða sum landsstýrismanni í mentamálum:

Eg eri sannførdur um, at tann ógvusliga almenna umrøðan og tann veruleiki, at I varð loyst úr starvi, hava bygt á ta fatan, at setanarnevndir skulu vera setanarmyndugleiki, og at landsstýrismaðurin ikki kann gera sína egnu sakligu og grundgivnu meting. Brot á tagnarskylduna um niðurstøðurnar hjá setanarnevndini, hava styrkt hesa fatan í almenninginum, og navngivnir umsøkjarar hava harvið fingið eina almenna viðferð sum „vrakaðir“ ella „politiskt settir“, og tað harmist eg almikið um.

Fyrisitingarliga er landsstýrismaðurin farin rætt fram, og málið hevur síðani givið orsøk til at nágreina setanartilgongdina – harundir tagnarskyldu, grundgeving og niðurskrivingarskyldu –

og ikki minst leiklutin og møguleikanum hjá setanarmyndugleikanum at gera sína egnu meting.

Hinvegin er framferðin hjá LMS í víðari viðgerðini av hesum máli eftir mínum tykki grundleggjandi skeiv."

Við teldubrævi, sent 9. juli 2003, hevur nevndarlimur í Magistarafelag Føroya boðað mær frá, at felagið ongar viðmerkingar hevur til tey skrivini, sum eru send felagnum til ummælis.

Við skrivi, dagfest 14. aug. 2003, hevur O, adv. sent umboðsmanninum soljóðandi umbøn:

**„Viðv. málinum um setan av landsfornfrøðingi tykkara mál nr. 200300021/24**

Omanfyri nevnda mál er lagt fyri umboðsmannin av Magistarafelag Føroya vegna lim felagsins A. Umboðsmaðurin hevur við tveimum brøvum, ávíkavist tann 19. mai og 30. juni 2003, sent Magistarafelagnum ymiskt tilfar til ummælis.

Av ymiskum misskiljingum hevur felagið ikki svarað hesum brøvum, m.a. orsakað av, at formannsskifti hevur verið í millumbilinum og harafturat er summarfrítíð komin í millum.

Av tí at A fegin vil gera ávísar viðmerkingar til tað tilfar, sum sent er Magistarafelagnum, loyvi eg mær at spyrja umboðsmannin, um tað er ov seint, at hetta verður gjørt nú. Eg skilji, at umboðsmannskrivstovan er stongd vegna summarfrítíð til 18. august. A er burturstaddur inntil sama dag, og fari eg tí at loyva mær at seta meg í samband við umboðsmannskrivstovuna tann 18. august at vita, um tað ber til nú at koma við viðmerkingum."

Við skrivi, dagfest 15. aug. 2003, hevur aðalstjórin í Mentamálaráðnum sent umboðsmanninum hesar viðmerkingar:

**„Viðv. ummæli av skrivi frá Løgmansskrivstovuni, dagf. 27. juni 2003, í sambandi við málið um setan av landsfornfrøðingi.**

Víst verður til skriv tygara, dagf. 30. juni 2003, har avrit av skrivum frá á.v.v. landsstýrismanninum í mentamálum og Løgmansskrivstovuni eru fest við. Biðið verður um møguligar viðmerkingar til hesi skriv.

Undirritaði hevur ongar viðmerkingar til skriv landsstýrismansins, dagf. 18. juni 2003, út yvir tær, sum undirritaði áður hevur víst á í undanfarna skrivi.

Til skrivið hjá Løgmansskrivstovuni eru hesar viðmerkingar:

- Undir punkt 1 nevnir Løgmansskrivstovan: *„Løgmansskrivstovan fekk ta fatan, at einki álit var millum I og fyrisiting hennara."* Hetta kann skiljast, sum um talan var um vantandi álit í sínari heild, men so var ikki. Eftir mínari fatan so var tað bert í hesum máli, at landsstýrismaðurin ikki tyktist at hava nóg stórt álit á sína fyrisiting.
- Undir punkt 4 skrivar Løgmansskrivstovan: *„Til b) Viðvíkjandi niðurskrivingarskyldu: Løgmansskrivstovan er samd við metan landsstýrismansins í hesum".* Setanarnevndin hevur í viðmerkingum sínum til umboðsmannin 10. juni 2003 gjørt vart við, at niðurskrivingarskyldan sambært fyrisitingarlógini er hildin. Tað tykist, sum um landsstýrismaðurin ikki hevur hugt fysiska málið um landsantikvarin nóg væl ígjøgnum, og tí ikki hevur verið varugur við hesar niðurskrivingarnar, sum í nógvum føri ikki geva nakra meining. Løgmanskrivstovan fekk bert tey innjournaliseraðu skjølini til kanningar sínar, og tí eru teirra viðmerkingar til umboðsmannin hesum viðvíkjandi at skilja soleiðis. Viðmerkjast skal annars, at Mentamálaráðið hevur innjournaliserað størri part av setanarsamrøðum í sambandi við eftirfylgjandi setanarmál, tað er tó ikki semja um, hvussu langt farast skal."

Við skrivi, dagfest 19. aug. 2003, sendi Løgmansskrivstovan umboðsmanninum hesar viðmerkingar:

„Í brævi dagfest 30. juni 2003 biður Umboðsmaðurin um møguligar viðmerkingar frá Løgmansskrivstovuni til ummæli frá M, landsstýrismanni í mentamálum av skrivum frá Løgmansskrivstovuni og aðalstjóranum í Mentamálaráðnum í sambandi við málið um at seta landsfornfrøðing.

Viðmerkingar Løgmansskrivstovunar verða lýstar niðanfyri.

Tá ið løgmaður tók upp málið um landsfornfrøðing, heitti hann á landsstýrismannin í mentamálum um at fáa nágreiniliga

lýsing av málinum og viðkomandi skjøl og skjalayvirlit í samsvari við § 33 í løgtingslóg um stýrisskipan Føroya. Sambært hesi grein hevur løgmaður eftirlit við, at hvør einstakur landsstýrismaður situr fyri sínum málsøki á lógligan og fullgóðan hátt. Løgmaður vildi hava eina lýsing av málinum, áðrenn hann tók møgulig stig.

Tað var sostatt ikki Løgmansskrivstovan sum valdi at taka málið upp fyrisitingarliga, men løgmaður sum tók málið upp samsvarandi stýrisskipan Føroya. At hjálpa sær hevði hann m.a. fyrisiting sína Løgmansskrivstovuna. Í hesum sambandi gjøgnumgekk Løgmansskrivstovan frágreiðingina og skjøl til tess at meta um, hvørt ivi kundi vera um setanartilgongdina. Hetta var fyrst og fremst gjørt við støði í starvsfólkapolitikki landsins og við atliti at setanarpolitikkinum og góðum fyrisitingarsiði annars.

Mett varð ikki, at tyngdin í málinum var brot á lógir sum stýrisskipararlóg, lóg um ábyrgd landsstýrismanna og fyrisitingarlóg. Tó so at Løgmansskrivstovan í síni gjøgnumgongd eisini *noteraði,* at ábendingar vóru um, at lógarásett tagnarskylda og skylda at skriva upp vóru brotnar. Til at umrøða løgfrøðilig viðurskifti samstarvaði Løgmansskrivstovan við uttanhýsis løgfrøðingar.

Hvørki løgmaður ella Løgmansskrivstovan tóku fyrisitingarliga avgerð í málinum, og tí var partshoyring ikki áleikandi í hesum sambandi.

Hinvegin hevði málið við sær, at løgmaður tók politiska avgerð um at loysa landsstýrismannin úr embæti. Til hetta krevst ongin serstøk viðgerð ella grundgeving.

Landsstýrismaðurin í mentamálum nevnir m.a. í sínum skrivi, at tað, at Løgmansskrivstovan hevur mett um, hvørt grundarlag var fyri at taka aftur avgerð landsstýrismansins um at seta landsfornfrøðing, váttar, at Løgmansskrivstovan fylgir ikki stýrisskipanarlóg, lóg um ábyrgd landsstýrismanna, fyrisitingarlóg og góðan fyrisitingarsið.

Hetta skilir Løgmansskrivstovan ikki. Løgmansskrivstovan viðgjørdi nevnda spurning, tí løgmaður vildi vita, um málið var so háttað, at grundarlag var fyri at taka aftur avgerðina um at seta landsfornfrøðing. Tað var als ongantíð upp á tal, at Løgmansskrivstovan skuldi taka aftur avgerð hjá landsstýrismanninum í mentamálum.

Landsstýrismaðurin í mentamálum sigur víðari, at eftir hansara avgjørdu meting, hevur Løgmansskrivstovan ikki heimild at taka aftur avgerð hjá einum landsstýrismanni, og løgmaður og Løgmansskrivstovan eru ikki kærumyndugleiki í fyrisitingarligum avgerðum hjá landsstýrismonnum. Til hetta er at siga, at Løgmansskrivstovan viðgjørdi ikki málið sum kærumyndugleiki, men sum fyrisiting løgmans í sambandi við, at løgmaður framdi eftirlit sambært stýrisskipanarlógini.

Landsstýrismaðurin í mentamálum sigur í sínum viðmerkingum til viðmerkingar aðalstjórans, at m.a. Løgmansskrivstovan feldi dóm og setti fram ákærur móti táverandi landsstýrismanni í mentamálum I. Í hesum sambandi skal dentur verða lagdur á, at Løgmansskrivstovan metti ikki einans um leiklut landsstýrismansins í málinum, men eisini gjørdi vart við viðurskifti, ið fyrisitingin í Mentamálaráðnum hevði staðið fyri.

Um okkurt framvegis er ógreitt um leiklut Løgmansskrivstovurnar í hesum málið, eru vit altíð fús at svara spurningum ella at gera fleiri viðmerkingar.“

Við skrivi, dagfest 19. aug. 2003 hevur løgmaður latið umboðsmanninum hesar viðmerkingar:

**„Viðvíkjandi málinum um setan av landsfornfrøðingi**

Í skrivi dagfest 7. mai 2003 ger landsstýrismaðurin í mentamálum M nógv burturúr eftirliti løgmans við landsstýrismonnunum. Hann roynir í hesum sambandi at gera omanfyrinevnda mál til eitt fyrisitingarligt mál burturav. Hetta er heilt burturvið, og hetta gruggar málið óneyðugt.

Avgerðin um at siga I úr starvi sum landsstýrismaður varð tikin av mær, grundað á málið um fornfrøðingin og vánaliga stevið, ið stóðst av hesum. Eg metti ikki, at samstarvið kundi halda fram. Tað snýr seg tí um eina politiska avgerð, ið er tikin samsvarandi grein 29, stk 2 í stýrisskipanarlógini.

Landsstýrismaðurin í mentamálum leggur eisini løgmann undir at hava blandað seg í málsviðgerðina, áðrenn avgerð varð tikin. Hetta er heilt burturvið.

Eg var hjástaddur eftir landsstýrisfundin hin 22. januar 2003, tá I ráðførdi seg við Løgmansskrivstovuna um, hvørt hon kundi

hava setanarsamrøðu við umsøkjararnar, tí hon hevði ikki álit á tilmælinum frá setanarbólkinum.

Út frá einum politiskum heildarsjónarmiði ráddi eg henni frá at fara inn í sjálva málsviðgerðina, tí hetta kundi skiljast soleiðis, at málið nú var vorðið politiskt, og er tað nakað, ið starvsfólkapolitikkurin skal tryggja, er tað júst, at vit sum politikarar ikki kunnu ákærast ella misteinkjast fyri politiskar starvssetanir.

Tá eg nakrar dagar seinni, hin 27. januar, varð gjørdur varugur við, at I nú hevði biðið um skrivlig ráð frá P, løgmansstjóra, gjørdi eg av at tosa við hana, tí eg sá fyri mær tann politiska ruðuleikan, sum kundi standast av hesi mannagongd. Eg royndi tí fleiri ferðir at fáa fatur á I. Hetta eydnaðist ikki, tí hon var burturstødd. Eg bað tí aðalstjóran, C bera henni boðini. Dagin eftir tosaði eg við I í Løgtinginum um henda spurning og ráddi henni frá at handfara málið á henda hátt, tí tað kundi ikki annað enn skapa politiskar trupulleikar.

Tað sum fekk bikarið at flóta yvir var, at hóast løgmaður setti kanning av málinum í verk, hin 5. februar 2003, so staðfesti landsstýrismaðurin setanina við setanarbrævi dagfest 11. februar, áramálsett í 5 ár uttan royndartíð.

Hetta hendi eina viku eftir, at eg hevði tikið málið upp samsvarandi grein 33 í stýrisskipanarlógini. Millum annað hetta helt eg vera eina stóra politiska provokatión móti mær sum løgmanni. Haraftuat metti eg, at málið varð handfarið so, at landsstýrismaðurin setti trúvirðið á okkara umsiting í vanda, ið kann vera til stóran skaða fyri framtíðar setanir av almennum starvsfólki.“

Við skrivi, dagfest 10. sept. 2003 boðaði umboðsmaðurin O, adv. frá, at umboðsmaðurin vildi loyva honum at gera viðmerkingar til hetta málið, hóast Magistarafelag Føroya hevði boðað frá, at felagið ikki hevði fleiri viðmerkingar til málið. Omanfyri nevndu skrivini vóru samstundis send O, adv. til ummælis.

Við skrivi, dagfest 10. sept. 2003, vórðu viðmerkingarnar frá landsstýrismanninum í mentamálum, aðalstjóranum í Mentamálaráðnum, Løgmansskrivstovuni og løgmanni, sendar hinum til ummælis. Boðað var frá, at hetta ætlandi fór at vera seinasta ummælisumfarið, og at

møgulig komandi ummæli fóru at verða send Mentamálaráðnum til ummælis eina seinastu ferð.

Við skrivi, dagfest 23. sept. 2003 hevur O, adv. sent umboðsmanninum hesar viðmerkingar:

> **„Viðv. setan av landsantikvari – tykkara mál nr. 200300021/37**
> Víst verður til bræv umboðsmansins, dagfest 10. septembur 2003, har loyvi verður givið A og Magistarafelagnum at gera viðmerkingar til tað tilfar, ið komið er frá Mentamálaráðnum og Løgmansskrivstovuni í hesum málinum.
>
> Hóast í seinna lagi, fari eg at loyva mær fyrst at gera nakrar viðmerkingar til tað, sum Mentamálaráðið skrivar til umboðsmannin tann 7. mai 2003.
>
> Hesar viðmerkingar fara bert at snúgva seg um viðurskiftini hjá umsøkjaranum A, og ikki til tær ósemjur, ið hava tikið seg upp millum ymisk aðalráð um rættar fyrisitingarligar mannagongdir v.m.
>
> Fyrst er at minna á, at kærarin A søkti um eitt alment starv, ið varð lýst í bløðunum, nevniliga starvið sum landsantikvarur.
>
> Hansara umsókn og tað tilfar, ið sent var saman við umsóknini, tók sostatt av natúrligum grundum støði í lýsingini, og teimum fakligu krøvum, ið lýsingin setti umsøkjarunum.
>
> Tað, sum A og Magistarafelagið fyrst og fremst kærir um, er, at eftir teirra tykki hevur málsviðgerðin ikki svarað til lýsingina, og hvat má haldast at vera reiðiliga avgerandi, tey førleikakrøv, ið landsstýrismaðurin tykist at arbeiða við, hava millum nakað og einki við tey krøv, ið lýsingin setur til umsøkjaran at gera.
>
> Til omanfyri nevnda bræv frá Mentamálaráðnum, dagfest 7. mai 2003, skulu hesar viðmerkingar verða gjørdar:
>
> Á síðu 2, nakað niðanfyri miðjuna, verður skrivað, at „I velur at fara inn í málið, tí hon metir seg hava sakliga grund at halda, at umsøkjarar hava ikki fingið eins og sakliga viðgerð, og at grundgevingar og skjalfestan vanta í málinum …, og í øðrum lagi velur hon at hava samrøður við teir báðar kvalifiseraðu umsøkjararnar til tess at gera sína egnu meting av styrkjum og fyrimunum hjá umsøkjarunum; og at greiða ivamál“.

**Viðmerking:**
Tað, sum eftir kærarans tykki framvegis vantar í málinum eftir ta nógvu skriving, ið higartil hevur verið, er at fáa at vita, á hvørjum fakligum og sakligum grundarlagi landsstýrismaðurin helt seg vera føran fyri at koma til ta niðurstøðu, at umsøkjararnir ikki høvdu fingið eins og sakliga viðgerð, og á hvørja fakliga vegleiðing, ella eginkunnleika hon metti seg at vera føra fyri at gera sína egnu meting av styrkjum og fyrimunum hjá umsøkjarunum.

Somuleiðis vantar ein gjøllari grundgeving fyri, hvørji ivamál hon skuldi greiða við at fara inn í málið persónliga.

Víðari á somu síðu verður sagt, at hon (landsstýrismaðurin..) „skjalfestur og grundgevur fyri allari viðgerðini".

**Viðmerking:**
Kærarin er framvegis ikki vorðin varugur við hesa skjalfesting og grundgeving í tí, sum skrivað er, síðani kæran varð latin umboðsmanninum.

Niðast á somu síðu verður greitt frá ivamálinum, sum stóðst av, „hvørjar sakligar grundgevingar vóru hjá setanarnevndini fyri at velja annan frá og bert mæla til at seta hin".

**Viðmerking:**
Uttan at hann annars fer at leggja seg út í málsviðgerðina, loyvir kærarin seg at minna á, at hetta, eftir hvat hann hevur skilt, júst var mannagongdin, ið vald varð, tá landsskjalavørður varð settur um sama tíðarskeið, uttan at tað gav landsstýrismanninum høvi til ivamál ella at „fara inn í málið persónliga".

Á síðu 3 ovast, verður skrivað um „tveir smærri feilir" hjá landsstýrismanninum. Tann fyrri er, at brævið til A ikki var dagfest.

**Viðmerking:**
Tað hevði kanska minni at týða. Tá A fekk hetta brævið handað frá landsstýrismanninum persónliga, kann hann staðfesta, nær tað var „dagfest" Tað, sum verri er, eftir kærarans tykki, er tann

„feilur", at í hesum brævi finst als eingin grundgeving fyri, hví hann ikki var búgvin at fáa starvið, hóast hann tvær ferðir varð innsettur av eini samdari setanarnevnd.

Kærarin hevur enn einaferð lisið brævið aftur í sambandi við, at hesar viðmerkingar vórðu skrivaðar, og er framvegis ikki førur fyri at finna nakra reella grundgeving fyri, at hann ikki var búgvin at fáa starvið.

Hin „feilurin" er tann, at landsstýrismaðurin undir samrøðu við F hevði nevnt, at A eisini var uppá tal til starvið „til tess at kanna, hvørt samstarvstrupulleikar kundu koma fyri".

**Viðmerking:**

Undir teirri setanarsamrøðu, sum landsstýrismaðurin boðaði A til, varð einki nevnt um hesi viðurskifti, og ei heldur um, hvørt A metti seg fara at fáa samstarvstrupulleikar við F, um hann varð settur í starvið. Her hevur sostatt ikki verið jøvn viðgerð av báðum umsøkjarunum.

Eftir kærarans tykki, eru nógvir størri „feilir" við nevnda brævi frá landsstýrismanninum til hansara, enn teir ið her hava verið viðgjørdir.

Fyri tað fyrsta er brævið ódagfest, ikki skrivað á alment pappír, ikki journaliserað og ikki medundirskrivað av nøkrum embætisfólki.

Samanumtikið kann hetta ikki annað enn geva grundir til at meta hetta bræv sum eitt privatskjal, sum ikki hevur fingið ta vanligu viðgerð, ið mugu vera grundleggjandi fyrisitingarlig krøv til eitt almannaskjal.

Annars byrjaði landsstýrismaðurin samrøðuna við A við at grundgeva fyri, hví hon valdi hesa mannagongd. Høvuðsgrundin var tann, at hon var so nýggj í starvinum.

Á somu síðu, 3. petti, verður skrivað, at „hon (landsstýrismaðurin) hevur tryggjað, at setanarmyndugleikin gera eina sjálvstøðuga meting av arbeiðinum hjá setanarnevndini".

**Viðmerking:**
Kærarin er sjálvsagt samdur í, at ein setanarnevnd ikki er tann, ið skal seta eitt starv, men hinvegin vantar framvegis grundgeving og skjalfestan fyri, á hvørjum fakligum grundarlagi landsstýrismaðurin hevur valt at koma til eitt annað úrslit enn ein fakliga samansett setanarnevnd, sum landsstýrismaðurin sjálv hevur sett, er komin til tvær ferðir frammanundan.

Ovast á síðu 4 verður sagt, at „I hevur kortini, áðrenn hetta er lýst, grundgivið skrivliga mótvegis A, vísandi til fyrisitingarlógina og góðan fyrisitingarsið".

**Viðmerking:**
Víst verður til tað, sum frammanfyri er nevnt um vantandi grundgeving í brævinum til A frá landsstýrismanninum.

Ovast á síðu 6 verður víst til „eitt fakligt, vísindaligt útgávuvirksemi, sum er óvanliga stórt og viðkomandi fyri føroyskt fornminnisarbeiði", sum hin umsøkjarin hevur lagt fram í umsókn sínari.

**Viðmerking:**
Uttan at koma við nøkrum viðmerkingum til hetta tilfarið, ið eftir øllum at døma hevur ligið við umsóknini hjá hinum umsøkjaranum, skal enn einaferð verða víst á, at tað starvið, sum lýst varð leyst at søkja, var fyrst og fremst eitt umsitingarligt starv sum leiðari av stovninum Føroya Fornminnisavni.

Til eitt tílíkt umsitingarligt starv, áttu leiðsluroyndir umsøkjarans at talt munandi, tá ið metast skal um hvørjir umsøkjarar lúka tey settu krøvini.

A hevði tá ið hann søkti starvið, arbeitt sum deildarleiðari á Føroya Fornminnissavni síðani 1986, og sum settur landsantikvarur í meira enn 4 ár tilsamans.

Tað sæst ikki av tí tilfari, ið landsstýrismaðurin hevði lagt dent á í sínum metingum, at hetta hevur vigað til fyrimuns fyri kæraran.

Verða uppgávurnar, sum landsantikvarurin skal røkja sambært lýsingini, samanhildnar við uppgávurnar hjá Føroya Fornminnis-

savni, soleiðis sum tær eru lýstar av landsstýrismanninum í tí ódagfesta brævinum til A, sæst, at hetta er eitt heilt annað starv, ið verður sett, enn tað, ið lýst varð eftir.

Á somu síðu í brævinum verður nógv gjørt burturúr møguligum alkoholtrupulleikum, og ta vantandi rættartrygd, ið hetta mál hevur ført til.

Hertil er í stuttum at siga, at A varð eisini spurdur um síni viðurskifti til brennivín undir setanarsamrøðuni.

Til brævið frá Mentamálaráðnum til Løgtingsins Umboðsmann, dagfest 3. juli 2003, skulu hesar viðmerkingar verða gjørdar:

Miðskeiðis á síðu 1 í brævinum verður sagt, at „landsstýrismaðurin fer inn í málið grundað á onnur viðurskifti, og tí hon vil gera sína egnu meting".

**Viðmerking:**
Hvørji eru hesi „onnur viðurskifti", ið gera, at landsstýrismaðurin fór inn í málið?

Hvør er hennara egna meting, sum førdi til hetta, og hvørji faklig viðurskifti og upplýsingar grundaði hon hesa meting á.

Niðast á síðu 2 í sama brævi verður sagt, at „avgerandi er eftir mínum tykki, at setanarnevndir ikki gerast setanarmyndugleiki, men hinvegin burturav skulu útvega eitt sakligt avgerðargrundarlag til setanarmyndugleikan".

**Viðmerking:**
Í sambandi við viðgerð av umsóknunum varð ein setanarnevnd sett av landsstýrismanninum, A helt, at hendan setanarnevndin varð sett við fakligum kvalifikatiónum sum grundlagi, og at setanarnevndin hevði til uppgávu at útvega eitt sakligt avgerðargrundlag til landsstýrismannin at taka avgerð eftir.

A saknar grundgeving fyri, hvat var sakliga skeivt í tí grundarlagi, sum setanarnevndin kom fram til sum vegleiðing til landsstýrismannin.

Enn meira saknast upplýsingar um, hvat sakligt grundarlag landsstýrismaðurin sjálvur útvegaði sær, tá hann var farin per-

sónliga inn í málið, sum førdi til eitt annað úrslit enn tað, sum setanarnevndin tvær reisur var komin til.

Samanumtikið standa hesir spurningar framvegis ósvaraðir:

1. Grundin til, at starvið sum landsantikvarur, soleiðs sum tað varð orðað í almennu lýsingini, verður sett á einum heilt øðrum grundlag enn tað, sum søkt varð eftir, nevniliga tí sumført verður fram í tí ódagfesta brævinum frá landsstýrismanninum til A?
2. Hvat var fakliga grundin til, at landsstýrismaðurin vrakaði arbeiðið hjá setanarnevndini, og tók málið í egnar hendur?
3. Hvat var fakligi førleikin hjá landsstýrismanninum, ella fakliga ráðgevingin hjá henni fyri at koma til eitt annað úrslit enn tað, sum setanarnevndin tvær reisur var komin til í síni vegleiðing til landsstýrismannin.

Umframt tað, sum frammanfyri er ført fram um viðurskiftini hjá A, ynskir Føroya Magistarafelag at vísa til brævaskiftið millum felagið og Mentamálaráðið í tíðarskeiðnum eftir setanina av starvinum og inntil kært varð til umboðsmannin.

Felagið metir, at so stórur munur var á førleikakrøvunum í starvslýsingini og teimum krøvum, ið landsstýrismaðurin lýsir í brævinum til A, at tað í roynd og veru er talan um tvey heilt ymisk størv.

Tað einasta forsvarliga hevði tí verið, sæð út frá setanarpolitiskum og fyrisitingarligum grundreglum, at starvið varð lýst av nýggjum við hesum nýggju krøvunum tilskilaðum, og at ein nýggj setanarnevnd hevði verið sett, ið leyk tey fakligu krøvini, sum nýggja starvslýsingin setti.“

Við skrivi, dagfest 24. sept. 2003, hevur aðalstjórin í Mentamálaráðnum latið umboðsmanninum hesar viðmerkingar:

**„Viðvíkjandi málinum um setan av landsfornfrøðingi**

Í brævi, dagfest 10. september 2003, gevur Umboðsmaðurin Mentamálaráðnum høvi til at gera viðmerkingar til skrivini frá Løgmansskrivstovuni, løgmanni og fyrrverandi landsstýrismann-

inum í mentamálum, M. Mentamálaráðið hevur ongar viðmerkingar til skrivið frá løgmanni, men hevur bitið merki í, at Løgmanskrivstovan í skrivi sínum vísir á, at ábendingar eru um, at tagnarskyldan og niðurskrivingarskyldan ikki eru hildnar. M, fyrrverandi landsstýrismaður í mentamálum, vísir eisini á somu viðurskifti. Tað er neyðugt at gera viðmerkingar til hesi bæði punktini í nevndu skrivum.

**Um tagnarskylduna**

Tá eitt setanarmál verður viðgjørt í Mentamálaráðnum, verður í størst møguligan mun roynt at avmarkað persónsskarðan, sum fær innlit í málið. Umframt setanarnevndina hava bert fáir persónar atgongd til málið. Í viðmerkingunum frá Løgmansskrivstovuni og landsstýrismanninum verður nevndin, saman við øðrum persónum í fyrisitingini, løgd undir at hava brotið tagnarskylduna. Tær kanningar, sum eru gjørdar innanhýsis hava ikki avdúkað, at nakar limur í setanarnevndini hevur likið upplýsingar. Einstøku limirnir hava skrivliga váttað, at teir ikki hava latið upplýsingar út til almenningin ella til fjølmiðlarnar.

Vandin fyri at upplýsingar í einum setanarmáli leka út til almenningin er størstur, tá ein starvssetan, sum hevur stóran almennum áhuga, fær eina langa og trupla málsviðgerð. Setanartilgongdin í sambandi við hetta starvið vardi í útvið tríggjar mánaðir, og er hetta eitt alt ov langt tíðarskeið. Setanarnevndin er vitandi um, at umsøkjarar til starvið langt áðrenn innstillingin var gjørd, í almennum høpi hava sagt frá, at teir hava søkt lýsta starvið. Longu stutt eftir at umsóknarfreistin var úti, høvdu fólk við tilknýti til fornfrøðiyrkið í Føroyum og Danmark kunnleika til, at F og A høvdu søkt. Talan er um eitt lítið yrkisøkið, har øll kenna hvønn annan, so eitt opið orðaskiftið fór fram í yrkisbólkinum, um hvørjir møguleikar hesir báðir umsøkjararnir høvdu til at fáa starvið. Lagt kann verða afturat, at landsstýrismaðurin, I, í síni samrøðu við F, tann 29. januar 2003, sambært fundarfrásøgnini sigur: „Hvis du bliver ansat, bliver du foretrukket fremfor A.“ Hetta er m.a. ein staðfesting av, at landsstýrismaðurin gekk út frá, at umsøkjararnir høvdu kunnleika til umsóknina hjá hvørjum øðrum.

Mentamálaráðið hevur ikki bitið merki í, at persónlig viðurskifti hjá umsøkjarunum til landsfornfrøðingsstarvi hava verið frammi í almenninginum ella í kjakinum, sum var í fjølmiðlunum.

**Um niðurskrivingarskylduna**

Setanarnevndin vísti í fyrru viðmerkingunum, dagfestar 9. mai 2003, at setanartilmæli til landsstýrismannin var gjørt eftir eina nágreiniliga málsviðgerð í nevndini. Grundarlagið undir málsviðgerðini og tilmælinum var m.a. tað niðurskrivaða tilfarið, sum hvør einstakur nevndarlimur hevði gjørt í sambandi við setanarsamrøðurnar. Í fysiska málstilfarinum, sum er latið umboðsmanninum, er hetta niðurskrivaða tilfarið til skjals. Hetta tilfarið er so rúgvismikið, at setanarnevndin hevur ilt við at skilja pástandirnar um brot á niðurskrivingarskylduna. Ein orsøk til pástandin frá Løgmansskrivstovuni og landsstýrismanninum kann vera, at tað bert er tað lidna tilmæli, sum er skrásett í málinum. Havast skal í huga, at Løgmannsskrivstovan bert fekk tann skrásetta partin av málinum, og tí byggir teirra útsøgn um niðurskrivingarskylduna helst á manglandi kunnleika um, hvørji skjøl eru í fysiska málinum.

Landsstýrismaðurin hevði atgongd til fysiska málið, áðrenn Umboðsmaðurin fekk tað, men um hann ikki hevur gáað nóg væl um innihaldið ella bert brúkt skrásetta málið í síni málsviðgerð, eru vit ikki greið yvir.

Tað hevur ikki verið siðvenja í Mentamálaráðnum at skráseta alt tað, sum hvør einstakur nevndarlimur skrivar upp av vegleiðandi orðum, setningum o.ø. undir einari setanarsamrøðu. Uppskriftirnar hjá einstøku limunum verður nýtt sum metingargrundarlag í sambandi við setanartilmæli, sum verður skrásett í málinum, meðan avgerðargrundarlagið verður skrivað í tilmælinum til landsstýrismannin. Tá setanarmálið er avgreitt endaligt, verður fysiska málið ruddað. Eftir nevndarinnar fatan er hetta ein nøktandi málsviðgerð sbrt. fyrisitingarlógini.

Í hesum málinum kann manglandi niðurskriving av samrøðunum undir ongum umstøðum nýtast sum próvgrund fyri, at tilmælið fekk tað líki, tað hevur, tí niðurskrivingin var sera nágreinilig undir samrøðunum.“

Við skrivi, dagfest 25. sept. 2003, hevur Løgmansskrivstovan latið umboðsmanninum hesar viðmerkingar:

„Í brævi dagfestum 10. september 2003 biður Umboðsmaðurin um møguligar viðmerkingar frá Løgmansskrivstovuni til seinastu viðmerkingarnar frá landsstýrismanninum í mentamálum dagfestar 3. juli 2003 og aðalstjóranum í Mentamálaráðnum dagfestar 15. september 2003 viðvíkjandi málinum um at seta landsfornfrøðing.

Landsstýrismaðurin í mentamálum sigur, tað má vera misskiljing, at Løgmansskrivstovan sigur seg ikki skilja, at landsstýrismaðurin fór inn í málið grundað á, at hennara næstu embætisfólk sótu í setanarnevndini, tí hon hevði sjálv sett nevndina. Tað, sum Løgmansskrivstovan vísir til í hesum, er fyrsti setningur í næstovasta parti á síðu 3 í ummæli frá landsstýrismanninum í mentamálum, dagfest 7. mai 2003, harí stendur „At landsstýrismaðurin sjálvur sá seg noyddan at fara inn í málið og at skriva grundgevingar, er grundað á, at hennara næstu í fyrisitingini sótu í setananevndini".

Landsstýrismaðurin sigur, at Løgmansskrivstovan ikki er samd í hansara meting viðvíkjandi setanarmyndugleikanum og skyldu landsstýrismansins at tryggja eina sjálvstøðuga meting. Til hetta er at siga, at Løgmansskrivstovan heldur, tað er sjálvsagt, at landsstýrismaðurin ger eina sjálvstøðuga meting, tá hann tekur avgerðir. Ætlanin við hóskandi samansettum setanarnevndum var júst at skapa setanarmyndugleikanum, í hesum føri landsstýrismanninum, holla fyrireiking, so at setanarmyndugleikin fær eitt gott grundarlag at taka sína sjálvstøðugu støðu út frá. Men fortreytin er sjálvsagt, at setanarmyndugleikin hevur álit á teimum sum fyrireika málið. Annars gevur tað ikki meining. Í hesum føri hevði Løgmansskrivstovan varhugan av, at landsstýrimaðurin metti ikki, at hon einans kundi grunda sína avgerð á fyrireikingararbeiðið, ið setarnevndin hevði gjørt.

Landsstýrismaðurin í mentamálum skilir ikki viðmerkingarnar hjá Løgmansskrivstovuni um, at aðalstjóri og deildarstjóri skulu vera partar av setanarnevnd. Hann vísir til, at Løgmansskrivstovan sigur at *„torført er sum annar persónur at ráðgeva triðja persóni*

*um arbeiði, sum fyrsti persónur hevur gjørt.*“ Løgmansskrivstovan viðgongur, at hetta kundi verið orðað øðrvísi. Tað sum Løgmansskrivstovan meinar við her er, at tað, tá størv sum stovnsstjórar ella onnur týdningarmikil størv skulu setast, er vanligt, at persónar nær landsstýrismanninum eru við í setanarnevndini – oftast aðalstjórar, júst fyri at tryggja landsstýrismanninum, at alt er farið fram á nøktandi hátt. Her ganga vit sjálvandi út frá, at landsstýrismaðurin hevur stórt álit á sínum ovasta stjóra. Slík mannagongd er ikki serføroyskt fyribrigdi, men vanlig eisini í øðrum londum. Hinvegin er í princippinum onki í vegin fyri, at starvsfólk longur burturi frá landsstýrismanninum manna setanarnevndir. Tað gera tær í flestu førum, tá fulltrúa- ella skrivarastørv skulu setast. Tá er tað oftast tað starvsfólkið, ið tann setti vísir til, ið er formaður í setanarbólkinum.

Ætlanin við starvsfólkapolitikkinum hevur ongantíð verið, at setanarnevndir skulu gerast setanarmyndugleiki, men ein hjálp til tess at tryggja at alt fer fram á rættan og rímiligan hátt.

Samanumtikið tók løgmaður politiska avgerð um at siga landsstýrismanninum í mentamálum úr embæti, tí málið varð handfarið politiskt provokerandi og ikki nøktandi.“

Við skrivi, dagfest 9. okt. 2003, vóru viðmerkingarnar frá hesum umfarinum sendar Mentamálaráðnum til ummælis.

Við skrivi, dagfest 15. okt. 2003, sendi Q, landsstýrismaður í mentamálum umboðsmanninum nakrar viðmerkingar, sum undanfarni landsstýrismaðurin hevði skrivað, meðan hann enn umsat mentamál. Hesar viðmerkingarnar eru soljóðandi:

**„Viðmerkingar til skriv frá Løgmansskrivstovuni og frá Løgmanni í sambandi við málið um setan av landsfornfrøðingi.**
Við hesum skulu viðmerkingar gerast til seinastu skrivini í málinum frá ávikavist Løgmansskrivstovuni og frá Løgmanni.

Samanumtikið vísa bæði Løgmansskrivstovan og løgmaður nú á, at onki er at finnast at í málinum í sambandi við stýrisskipanarlóg, lóg um ábyrgd landsstýrismanna og fyrisitingarlóg.

Frammanundan hevur Løgmansskrivstovan víst á, at heldur ongin grundgeving er fyri at finnast at í sambandi við starvs-

fólkapolitikkin. Løgmansskrivstovan førir harafturat fram, at hon nú als ikki hevur havt nakað fyrisitingarligt mál, og at hon bert hevur verið „sekretariat“ fyri løgmann í einum politiskum máli.

Løgmaður vísir í sínum skrivi á, at orsøkin til, at landsstýrismaðurin varð loystur úr starvi, var, at løgmaður kendi seg provokeraðan, tí landsstýrismaðurin hevði staðfest sína avgerð og skrivað setanarbræv til tann umsøkjaran, ið fekk starvið.

Fyrigevið, um míni orð nú verða nakað bersøgin. Men mín fremsta viðmerking er, at her er hvørki høvd ella hali í framferðini og grundgevingunum hjá Løgmansskrivstovuni og Løgmanni. Ja, eg haldi veruliga, at tað er syndarligt og vandamikið fyri rættartrygdina, at tann myndugleikin í útinnandi valdinum, sum sambært stýrisskipanini hevur eftirlit við, at fyrisitið verður á fullgóðan og lógligan hátt, er so illa grundaður, ósakligur og mótsigandi í síni málsviðgerð. Um hetta skal verða fyrimyndin fyri fyrisiting í Føroyum, so er sera illa statt eftir mínum tykki.

Niðanfyri skal eg greina, hví eg nýti so hvøss orð um framferð og grundgevingar hjá Løgmansskrivstovuni og Løgmanni.

**1. Málið varð reist fyrisitingarliga, og tá eigur rættartrygdin hjá øllum pørtum í málinum at tryggjast. Fyrisiting kann ikki fjala seg við aftaná „at hetta er bara politikkur“.**

Sum eg áður havi lagt herðslu á, so kann Løgmaður velja at koyra landsstýrismenn frá uttan nakra nærri grundgeving. Løgmaður kundi eisini biðið um munnliga ella skrivliga frágreiðing frá landsstýrismanninum og so tikið sínar avgerðir eftir tí, sum ein politisk meting.

Men hetta mál varð reist fyrisitingarliga. Løgmansskrivstovan bað um at fáa alt málið og øll skjøl í málinum og málið varð formliga sent millum tveir myndugleikar. Hetta hevur Løgmansskrivstovan frammanundan viðurkent, tí hon hevur valt at geva fjølmiðlum innlit í skjølini í málinum, sum Løgmansskrivstovan hevur fingið. Hvussu kann tað gerast, um onki fyrisitingarligt mál finst? Og á hvørjum grundarlagi velur Løgmansskrivstovan at geva alment innlit?

Tí skal Løgmansskrivstovan sjálvsagt eisini fylgja fyristingarlóg, góðum fyrisitingarsiði og aðrari viðkomandi lóggávu og reglum,

tá hon hevur eitt fyrisitingarligt mál til viðgerðar. Her verða jú borgarar viðgjørdir í fyrisitingini og teirra rættindi skulu tryggjast.

Hvar er dokumentasjónin fyri hesi málsviðgerð? Og hvussu hevur Løgmansskrivstovan tryggjað sær, at rættindini hjá umsøkjarum og øðrum, verða vird og hildin í hesi viðgerð? Ella valdar fullkomin tilvild?

Men nú skriva so Løgmansskrivstovan og Løgmaður, at talan er als ikki um eitt fyrisitingarligt mál.

Løgmansskrivstovan hevur frammanundan víst á, at tey kannaðu, hvørt grundarlag var fyri at broyta avgerð landsstýrismansins. Tað er framvegis eftir mínum tykki í stríði við stýrisskipanarlógina, har landsstýrismenn sita fyri sínum øki hvør sær, og brot á lóg um ábyrgd landsstýrismanna, har landsstýrismenn eru undir persónligari revsiábyrgd fyri síni fyrisiting.

Um Løgmaður/Løgmansskrivstovan velja at biðja um mál frá ymsum aðalráðum við teirri grund, at tey møguliga ætla at broyta fyrisitingarligar avgerðir, men síðani broyta meining um tey onki finna at seta fingurin á og gera tað „til bara politikk", so hava vit álvarsligar trupulleikar í fyrisitingini.

Í uppsagnarbrævinum til I verður eisini sagt, at okkurt skuldi benda á, at viðgerðin í Mentamálaráðnum ikki hevur verið nøktandi. Tí er ongin ivi um, at Løgmansskrivstovan hevur reist málið sum eitt fyrisitingarligt mál, og at øll málsviðgerðin tí átti at verið grundgivin og dokumenterað. Men Løgmansskrivstovan/løgmaður gera hvørki. Ongin saklig grundgeving og ongin skjalfestan er fyri hesum uppáhaldi. Tí er fyrisitingarlógin og góður fyrisitingarsiður ikki hildin í hesum máli.

Kanska er hetta orsøkin til, at Løgmaður og Løgmansskrivstovan renna undan sínum fyrisitingarligu skyldum við at gera alt málið til eitt „politiskt mál" burturav.

Um hetta veruliga var støðan hjá Løgmanni og Løgmansskrivstovuni, hví søgdu tey so ikki tað í uppsagnarbrævinum og í teirra fyrru svarum til Umboðsmannin?

Og hví bóðu tey so um at fáa alt málið til viðgerðar á Løgmansskrivstovuni?

Sambært teimum, er nú als onki at finnast at fyrisitingarliga. Tað hevði verið áhugavert, um hetta hevði verið sagt beinanvegin, men tað framgongur ikki av nøkrum fyrri skrivum, enn hesum

sum nú koma. Tvørturímóti stendur eftir við uppsagnarskrivinum og við allari tí almennu viðgerðini av málinum, at Løgmaður og Løgmansskrivstovan hildu ikki, at rætt var farið fram fyrisitingarliga og viðvíkjandi starvsfólkapolitikkinum.

Løgmansskrivstovan og Løgmaður hava sjálvandi rætt til at meta, at her er onki at finnast at fyrisitingarliga, og tí velur Løgmaður so at brúka „tað politiska argumentið“ ístaðin og koyra landsstýrismannin frá.

Men hetta kann á ongan hátt frítaka Løgmann og Løgmansskrivstovuna fyri sum fyrisitingarmyndugleiki at halda seg til lógir og reglur, og at veita teimum persónum, ið verða viðgjørdir, sína rættartrygd. Tá eitt fyrisitingarligt mál er reist, so er ongin vegur aftur. Tá er tað burturvið – og serstakliga vandamikið fyri rættartrygdina og góðan fyrisitingarsið – knappliga bara at strika málið sum fyrisitingarligt mál og umdoypa tað til at vera „politiskt“.

Kunnu Løgmaður og Løgmansskrivstovan tildømis biðja um at fáa eitt heilt mál um eitt fiskiloyvi útleverað frá Fiskimálaráðnum við tí fyri eyga at broyta eina avgerð hjá landsstýrismanninum, uttan at viðgerðin á Løgmansskrivstovuni fylgir fyrisitingarlógini. Er tað eisini bara eitt „politiskt mál“, sum ikki skal dokumenterast og grundgevast, og har partarnir í málinum ikki hava rætt til partsinnlit ella partshoyring?

Verður slík viðgerð góðtikin og harvið knæsett sum siðvenja, er tað eftir mínum tykki sera vandamikið fyri rættartrygdina og eitt so mikið prinsippielt mál fyri føroyska fyrisiting frameftir, og tí havi eg valt at taka so harðliga til orðanna.

### 2. Andsøgnir hjá Løgmanni og Løgmansskrivstovuni

Seinastu skrivini frá Løgmansskrivstovuni og Løgmanni eru eisini beinleiðis í andsøgn við seg sjálvi.

Sum nevnt førir Løgmansskrivstovan fram, at talan var ikki um fyrisitingarligt mál. Men alment innlit er longu givið í málið. Og hartil skrivar Løgmansskrivstovan í uppsagnarbrævinum, at okkurt er sum bendir á, at málið ikki er handfarið á nøktandi hátt.

So her varður váttað, at málið hevur verið viðgjørt sum eitt fyrisingarligt mál.

> Løgmaður skrivar, at høvuðsorsøkin til uppsøgnina av I var, at hann kendi seg provokeraðan, tá hon skrivaði setanarskriv til umsøkjaran, ið hevði fingið boð um, at hann var settur í starv. Hetta kann bert skiljast soleiðis, at Løgmaður hevði ætlað at broytt avgerð landsstýrismansins og harvið at leggja seg út í fyrisitingarligu avgerðina hjá einum landsstýrismanni. Annars kann ikki verða talan um eina provokasjón.
>
> Hevði landsstýrismaðurin I drálað við at skrivað setanarbræv eftir at avgerðin varð tikin, so hevði hon eftir mínum tykki ikki hildið sínar fyrisitingarligu skyldur. Tí so hevði hon – av politiskum trýsti – sett fyristingarlóg og góðan fyrisitingarsið til viks.
>
> Løgmaður sigur eisini í sínum svari, at tað hevur ongan týdning, at hann frammanundan hevur verið partur í málsviðgerðini. Men tað hevur týdning í teirri løtu eitt fyristingarligt mál verður reist á Løgmansskrivstovuni."

Við skrivi, dagfest 21. okt. 2003 hevur aðalstjórin í Mentamálaráðnum boðað umboðsmanninum frá, at Mentamálaráðið ikki hevur viðmerkingar til skjalatilfarið, sum varð sent ráðnum 9. okt. 2003.

## Umboðsmansviðgerðin

Hetta málið snýr seg um eina klagu frá Magistarafelagnum, ið vil vera við, at ein av limum felagsins, ið søkti starvið sum landsantikvarur, hevur verið fyri órætti í sambandi við setanina.

Undir brævaskiftinum aftaná setanina og undir partshoyringini, ið eru endurgivin frammanfyri, eru onnur viðurskifti drigin inn í málið, m.a. viðvíkjandi leikluti løgmans við atliti til Stýrisskipanarlógina, serliga § 29, stk. 2 um at loysa landsstýrismann úr starvi og § 33, stk. 3 um eftirlit løgmans við, at hvør landsstýrismaður situr fyri sínum málsøki á lógligan og fullgóðan hátt.

Sambært § 6, stk. 4 í Umboðsmanslógini ger umboðsmaðurin sjálvur av, um ella í hvønn mun hann ger meira við eitt mál, sum klagað er um. Við støði í hesi reglu havi eg gjørt av, at viðgerð mín av hesum málinum einans fer at snúgva seg um sjálva starvssetanina og tey viðurskifti, sum hava beinleiðis tilknýti til hesa, herundir almenna starvssetanarpolitikkin. Samskiftið aftaná starvssetanina millum løgmann, landsstýrismannin í mentamálum, aðalstjóran í Mentamála-

ráðnum og løgmansstjóran er tí bert tikið við fyri at lýsa viðgerðina og avgerðina í sjálvum setanarmálinum.

Eisini spurningin um møguligt brot á tagnarskylduna havi eg valt at lata liggja, tí eg meti meg ikki innan karmarnar á einari umboðsmanskanning hava møguleika fyri at staðfesta, um brot er framt á tagnarskylduna, og hvør møguliga hevur framt slíkt brot.

Undir partshoyringini hevur spurningurin um, í hvønn mun fyrrverandi landsstýrismaðurin, I hevur borið seg skeivt at ella ikki verið nógv frammi.

Hertil er at siga, at Løgtingsins umboðsmaður sambært Umboðsmanslógini ikki hevur nakran leiklut sum ákæri, og at ein umboðsmanskanning tí fyrst og fremst skal staðfesta um viðkomandi fyrisitingarmyndugleiki – í hesum føri Mentamálaráðið – hevur framt órætt móti einum borgara ella ikki. Kanningin er tí vend ímóti Mentamálaráðnum og hvørki ímóti táverandi landsstýrismanni ella einstøkum embætismonnum í Mentamálaráðnum. Við tað, at landsstýrismaðurin hevur havt ein sera virknan leiklut í hesum setanarmáli, slepst tó ikki undan at fyrihalda seg til hendan leiklutin; men eg skal endurtaka, at málið prinsipielt ikki er vent ímóti landsstýrismanninum, men ímóti Mentamálaráðnum.

Í sambandi við viðgerðina av hesum máli havi eg biðið Løgmansskrivstovuna og øll aðalráðini um at lata mær til láns øll starvssetanarmál ájavnt 36. lønarflokki og hægri hjá tænastumonnunum, sum eru sett aftaná 1. januar 2001. Eg havi fingið og gjøgnumgingið tilsamans 25 setanarmál, harav frá Løgmansskrivstovuni 4, Vinnumálaráðnum 3, Fiskimálaráðnum 5, Mentamálaráðnum 5, Familju- og heilsumálaráðnum 6, Almanna-málaráðnum 1 og Oljumálaráðnum 1.

*Av tí, at talan er um eitt rættiliga rúgvusmikið og fløkt mál, havi eg valt at gera eina fyribilsniðurstøðu, sum eg við skrivum, dagfest 26. nov. 2003, havi sent Løgmansskrivstovuni, Mentamálaráðnum, O, adv. (umboðandi Magistarafelag Føroya og A) og I, fyrrverandi landsstýrismanni til ummælis. Ummælisfreistin varð sett til mánamorgunin 15. des. 2003. Tá ásetta freistin var úti, hevði eg fingið viðmerkingar frá Mentamálaráðnum, O, adv. og Løgmansskrivstovuni.*

Mentamálaráðið hevur í skrivi, dagfest 11. des. 2003 sent mær hesar viðmerkingar:

**„Viðvíkjandi fyribils áliti um klaguna frá Magistarafelag Føroya um setanina av landsfornfrøðingi og um almenna setanarpolitikkin**
Mentamálaráðið skal við hesum takka umboðsmanninum fyri møguleikan til at gera viðmerkingar til fyribils álitið. Í hesum sambandi fer Mentamálaráðið at nýta høvi til at gera viðmerkingar til umrøðu Umboðsmansins av notatskylduni, hoyringarskylduni og avgerðini um at geva átalu fyri hesi viðurskiftini.

**Viðvíkjandi hoyringarskylduni**
Átalan fyri brot á hoyringarskylduna er givin við grundarlagi í neiligu umrøðuni av F í ískoytinum til setanartilmælið til landsstýrismannin, dagfest 14. januar 2003. Orðingin í ískoytinum er henda: „Í einum føri varð hetta tó gjørt, men var skoðsmálið ikki serliga gott.“

Um samrøðurnar við tilvísingarpersónarnar er at siga, at tað er ofta trupult at fáa tilvísingarpersónar at umrøða ein umsøkjara í øðrum enn í „generellum orðingum“, og soleiðis var støðan eisini í hesum setanarmálinum. Umrøðan av báðum umsøkjarunum var í flestu førum generel og lítið sigandi, og lítið nýtt kom fram í sambandi við samrøðurnar. Í onkrum føri var hugburðurin frá tilvísingarpersóninum ikki positivur mótvegis umsøkjarunum. Talan var ikki um ítøkiligar útsagnir ella orðingar, men kanska heldur generellar vendingar ella ábendingar. Ein av tilvísingarpersónunum gav F eina heldur negativa umrøðu, men eisini í hesum førinum var talan um generellar orðingar, sum als ikki kundu verið nýttar í einum hoyringarskrivi til F. Orðingarnar vóru so lítið ítøkiligar, at nevndin ikki kundi seta nakrar pástandir fram í einum hoyringarskrivi við hesum grundarlagi. Um nevndin hevði gjørt tað, høvdu tilvísingarpersónarnir kent seg misbrúktar og skeivt endurgivnar.

Mentamálaráðið er samt við Umboðsmanninum í, at setan av starvsfólki er ein fyrisitingarlig avgerð, og at sambært § 18, stk. 1 í Fyrisitingarlógini eigur hoyringarskriv at verða sent umsøkjara, um so er, at upplýsingarnar ikki eru til fyrimuns hjá viðkomandi,

men tað er eisini ásett í § 18, stk. 1, at upplýsingarnar skulu „hava stóran týdning fyri avgerðina“. Eftir Mentamálaráðsins meting høvdu upplýsingarnar frá tilvísingarpersónunum ikki stóran týdning fyri avgerðina í málinum.

Eftir at setanarnevndin í fyrsta tilmælinum til landsstýrismannin hevði tikið støðu til innstillingina, komu ongar nýggjar upplýsingar fram undir framhaldandi viðgerðini, sum høvdu so „avgerandi týdning“, at tær fingu nevndina at umhugsa at broyta fyrru avgerðina.

**Viðvíkjandi niðurskrivingarskylduni**

Í fyribilsálitinum vísir Umboðsmaðurin á, at tað fyriliggja eingi notat viðvíkjandi samrøðunum við tilvísingarpersónarnar í málinum, og at Mentamálaráðið fær eina átalu fyri ikki at hava hildið notatskylduna.

Mentamálaráðið hevur gjøgnumgingið málið og kannað eftir, um notat frá tilvísingarsamrøðunum liggja í tí. Gjøgnumgongdin sýnir, at tað eru 7 A4-síður við hondskrivaðum frágreiðingum frá tilvísingarsamrøðunum. Tað er E, limur í setanarnevndini, sum hevur gjørt notatini undir sjálvum samrøðunum. Tað er Mentamálaráðsins fatan, at umboðsmaðurin ikki hevur gáað eftir, at hesi skjøl eru notat frá tilvísingarsamrøðunum. Skjølini hava ikki yvirskrift og eru ikki dagfest, men nøvnini á tilvísingarpersóninum og tann av umsøkjarunum, sum telefonumrøðan viðvíkur, er skrivað á skjølini. Skjølini eru heft saman við øðrum skjølum frá setanartilgongdini, og kunnu tí vera ring at kenna aftur úr rúgvuni. Eftir okkara fatan eru tey prógv um, at niðurskrivingin av samrøðunum við tilvísingarpersónarnar varð framd eftir reglunum.

**Niðurstøða**

Við grundarlagi í nevndu notatum frá samrøðunum við tilvísingarpersónarnar og omanfyri nevndu próvførslu um hoyringarskylduna fer Mentamálaráðið við hesum at heita á Umboðsmannin um at taka ætlanina um at geva Mentamálaráðnum átalu fyri handfaringina av málinum upp til nýggja viðgerð. Eftir okkara fatan er ikki grundarlag fyri átalu um hesi viðurskifti.“

Viðmerkingar mínar til hetta skrivið eru innbygdar í niðurstøðuna.

Við skrivi, dagfest 15. des. 2003 hevur O, adv. latið mær hesar viðmerkingar:

> **„Viðv. málinum um setan av landsfornfrøðingi tykkara mál nr. 200300021/24**
> Við brævi, dagfestum 26. november 2003, sendir umboðsmaðurin undirritaða vegna Magistarafelag Føroya fyribils álit í málinum um setan av landsfornfrøðingi við boðum um, at Magistarafelagið, um tað ynskir tað, kann gera viðmerkingar til uppskotið, sum skuldu verið umboðsmanninum í hondum í seinasta lagi mánamorgunin tann 15. desember 2003.
>
> Eftir at Magistarafelagið og A hava haft høvi til at gjøgnumganga uppskot umboðsmansins, skal eg vegna felagið og A gera hesar viðmerkingar:
>
> Fyrst er at minna á, at kæra felagsins til umboðsmannin var í tveimum, deils ein áheitan um viðgerð av sjálvari málsgongdini í setanarmálinum og deils ein viðgerð av almenna setanarpolitikkinum, sum umboðsmaðurin var biðin um at siga sína hugsan um, hvørt málið um setan av landsantikvari kann geva grund til nýggja viðgerð og orðan av almenna setanarpolitikkinum.
>
> Um vit taka seinna partin av kæruni fyrst, er felagið av teirri fatan, at eftir at umboðsmaðurin hevur gjørt eitt stórt arbeiði fyri at útvega sær starvssetanarmál frá øllum aðalráðunum viðvíkjandi størvum ájavnt 37. lønarflokki og hægri, sett aftan á 1. januar 2001, saknar felagið eina veruliga viðgerð av hesum setanarmálum og umboðsmansins niðurstøðu um, hvørt málið viðvíkjandi setan av landsantikvarinum kundi givið grund til tillagingar av almenna setanarpolitikkinum.
>
> So er tað sjálvt málið um setan av landsantikvari.
>
> Eftir at Magistarafelagið hevði havt høvi til at gera viðmerkingar til tað tilfar, ið umboðsmaðurin hevði sent til hoyringar, skrivaði felagið tann 14. februar 2003 til umboðsmannin.

Í hesum brævinum (síða 34 í álitinum) setir felagið fram 4 høvuðsspurningar, nevniliga:

- Vantandi útgreiningar í starvslýsingini av raðfestingunum hjá landsstýrismanninum fyri virksemi savnsins.

- Vantandi fráboðan til A um, at tann samrøða, hann var biðin um at koma til við landsstýrismannin, í veruleikanum var ein heilt nýggj setanarsamrøða uttan at A var gjørdur kunnugur við framtíðarvisiónirnar hjá landsstýrismanninum um virksemið hjá Fornminnissavninum.
- Hvørjar fakligar førleikar hevði landsstýrismaðurin til at meta um granskingar- og vísindaligan førleika hjá umsøkjarunum?
- Í fjórða lagi ger felagið vart við, at starvið átti at verið lýst av nýggjum og ein nýggj setanarnevnd sett sambært nýggju fortreytunum hjá landsstýrismanninum.

Tann fyrsti og tann fjórði spurningurin, ið settir vórðu og eru endurtiknir í stuttum omanfyri, kunnu í veruleikanum viðgerast undir einum. Felagið hevur merkt sær, at umboðsmaðurin metir, at starvið átti at verið lýst av nýggjum, serliga við atliti til ta ymisku orðingina í teirri føroysku og teirri donsku lýsingini. Hesum er felagið samt í, men tað eigur at verða lagt afturat, at soleiðis sum teir spurningar, ið settir vórðu A og hinum umsøkjaranum av landsstýrismanninum undir teirri samrøðu, hon hevði við umsøkjararnar, er tað týðiligt, at spurningarnir, ið settir eru báðum umsøkjarunum, eru ógvuliga ymiskir. Hetta átti eftir felagsins meting at verið gjøllari viðgjørt og mett um av umboðsmanninum, ikki minst við atliti at, at tað sæst av frágreiðingini, at landsstýrismaðurin hevur biðið aðalstjóran um at orða spurningarnar, vælsaktans við teirri grundgeving, at báðir umsøkjararnir skuldu fáa somu spurningar at svara.

Tað er eisini vert at leggja til merkis, at spurningarnir stórt sæð einans viðvíkja fornfrøðiligum viðurskiftum og framtíðarætlanum, sum bert er ein partur av starvinum, ið fyrst og fremst er eitt leiðslu- og umsitingarstarv.

Niðurstøða umboðsmansins um landsstýrismansins egnu samrøður við umsøkjararnar er, at tað ikki finnast reglur, ið forða hesum. Her heldur felagið at høvi kundi verið til nakrar viðmerkingar um almenna setanarpolitikkin. Umboðsmaðurin kundi kanska við sínum tilmæli verið við til at bøtt um trygdina hjá umsøkjarum til almenn størv.

A var av góðum grundum ikki vitandi um, hvørjar grundgevingar landsstýrismansins at seta hin umsøkjaran vóru, fyrr enn hann helt seg kunna lesa hetta av tí ódagfesta brævi, hann fekk handað frá landsstýrismanninum tann 4. februar 2003, har hann fekk boð um, at landsstýrismaðurin eftir gjølla viðgerð av málinum hevði samtykt at seta annan umsøkjara, sum var betur egnaður til starvið, enn hann.

Av hesum brævinum mátti A halda, at hin umsøkjarin leyk tey krøv, ið landsstýrismaðurin persónliga hevði til starvið, og sum luku hennara visiónir um Fornminnissavnsins leiklut, nevniliga:

- At vera stovnur, ið dugir at síggja og nýta teir møguleikar, ið eru í fornfrøðiliga starvinum, og gera hesar til ein part av okkara tilvitan,
- at hava tætt tilknýti og samstarv við alt frá íbúgvanum í lokalsamfelagnum til granskaran í útlondum,
- geva gransking og vísandaligum arbeiði størri leiklut,
- við greiðum ætlanum vera í fremstu røð bæði í heimligum og altjóða fornfrøðiligum arbeiði, og
- í størri mun gerast partur av altjóða granskingarverkætlanum og harvið gera Føroyar sjónligari í altjóða høpi.

Tað er reiðiliga eyðsýnt, at hetta starvið er eitt heilt annað starv enn tað, sum lýst varð eftir, bæði í teirri føroysku og teirri donsku útgávuni av lýsingini, og tí er Magistarafelagið enn meira sannført nú, enn tá ið kæran varð send umboðsmanninum um, at starvið avgjørt átti at hava verið lýst av nýggjum og nýggj setanarnevnd sett, sum hevði tann neyðuga fakliga førleikan til at meta um eitt starv av hesum slagi.

Her er eisini at hava í huga, at tað einasta, sum ikki er nevnt í hesum grundgevingum, er tað, sum søkt varð eftir, nevniliga hvørs høvuðsuppgáva skuldi vera „at vera stjóri á Føroya Fornminnissavni."

Eftir er so spurningurin um fakliga førleikan hjá landsstýrismanninum at meta um granskingar- og vísindaliga førleikan hjá nýggja landsantikvarinum.

Landsstýrismaðurin sigur beinleiðis, at hon var noydd at gera sínar egnu niðurstøður, av tí at innstillingin frá setanarnevndini

ikki gav henni nóg góða vegleiðing til at taka eina grundaða avgerð.

Sum felagið dugir at síggja, viðger umboðsmaðurin ikki hendan spurningin beinleiðis, men sigur tó, eftir at hann hevur kannað øll tey setanarmál, hann hevur fingið til gjøgnumgongd, at hann bert hevur funnið eitt dømi, har landsstýrismaðurin ikki hevur fylgt tilmælinum frá setanarnevndini, og tá var heldur ikki talan um eitt einmælt tilmæli. Umboðsmaðurin leggur afturat, at hetta má sigast at vera eitt óvanligt stig, serliga tá landsstýrismaðurin í hesum málinum, sum er til viðgerðar nú, hevur valt at ganga ímóti einmælta tilmælinum hjá setanarnevndini. Her kundi verið lagt afturat, at landsstýrismaðurin gongur ímóti tveimum einmæltum tilmælum frá teirri fakliga settu setanarnevndini, harav setanarnevndin í seinna tilmælinum sigur, at tann einmælta innstillingin eftir nýggja umhugsan er enn greiðari enn tann fyrra.

Um hetta sigur umboðsmaðurin, at tað er landsstýrismaðurin sum er setanarmyndugleiki, og hesum kann felagið sjálvsagt ikki vera ósamt í. Umboðsmaðurin leggur síðani afturat, at landsstýrismaðurin ikki kann seta einhvønn umsøkjara í starvið, men er bundin av skrivaðum og óskrivaðum fyrisitingarligum reglum og sostatt hevur skyldu til at seta best skikkaða umsøkjaran í starvið.

Av tí tilfari, sum er til skjals í málinum, kann Magistarafelagið ikki koma til aðra niðurstøðu, enn at annaðhvørt má landsstýrismaðurin sjálv hava ókendar fakligar kvalifikatiónir, sum ikki er gjøllari greitt frá í málinum, ella hevur hon ikki sett tann best skikkaða umsøkjaran í starvið. Hetta tykist enn týðiligari av teimum spurningum, sum landsstýrismaðurin hevur sett báðum umsøkjarunum, ið ikki tykjast at bera boð um serligar fakligar kvalifikatiónir.“

Viðmerkingar mínar til hetta skrivið eru somuleiðis innbygdar í niðurstøðuna.

Við skrivi, dagfest 15. des. 2003 hevur Løgmansskrivstovan latið mær hesar viðmerkingar:

„Víst verður til, at Løgmansskrivstovan hevur fingið fyribilsniðurstøðu Umboðsmansins dagfest 26. november 2003 til ummælis.

Løgmansskrivstovan hevur ikki viðmerkingar til viðgerð ella niðurstøðu umboðsmansins av málinum. Vit halda hinvegin, at fleiri av teimum viðurskiftum, ið umboðsmaðurin ger vart við, samsvara væl við ta gjøgnumgongd, Løgmansskrivstovan gjørdi av málinum.

Í áliti Umboðsmansins verður endurgivið bræv dagfest 15. oktober 2003 frá fyrrverandi landsstýrismanni í mentamálum, ið Løgmansskrivstovan hevur ikki sæð fyrr. Av tí at Løgmansskrivstovan longu hevur givið Umboðsmanninum viðmerkingar til flest øll viðurskifti, ið eru nevnd í hesum brævi, verður tað ikki viðgjørt í æsir her.

Tó leggja vit enn eina ferð dent á, at leiklutur Løgmansskrivstovunnar í málinum um landsfornfrøðingin var ongantíð annað enn sum fyrisiting løgmans í sambandi við, at hann framdi eftirlit við landsstýrismanni sambært Stýrisskipan Føroya. Tað var í hesum høpi, at landsstýrismaðurin í mentamálum varð biðin um at lata løgmanni frágreiðing og skjøl í málinum. Tað snúði seg ikki um at taka fyrisitingarliga avgerð innan málsøki hjá øðrum landsstýrismanni ella at viðgera málið sum kærumyndugleiki.

Harafturat leggja vit dent á, at málið hjá Løgmansskrivstovuni var og er fevnt av lógini um alment innlit, hóast málið var ikki viðgjørt við tí fyri eyga, at Løgmansskrivstovan skuldi taka fyrisitingarliga avgerð í setanarmálinum viðvíkjandi landsfornfrøðinginum.“

Hetta skrivið frá Løgmansskrivstovuni gevur mær ikki orsøk til at koma við viðmerkingum, tí sum nevnt frammanfyri er leikluturin hjá løgmanni og Løgmansskrivstovuni í hesum málinum ikki fevnt av kanning mínari.

## *Niðurstøða*

***Setanarpolitikkurin***

*Setanarpolitikkurin er partur av Starvsfólkapolitikki landsins, sum hesin er orðaður av Løgmansskrivstovuni. Í formælinum til Starvsfólkapolitikkin stendur m.a.:*

> *„Starvsfólkapolitikkur landsstýrisins setur karmar fyri tí høvuðspolitikki, sum er galdandi í almennu fyrisitingini.*
>
> *Starvsfólkaviðurskifti, sum eru ásett í lóg, sáttmála og reglugerð, eru ikki endurgivin í starvsfólkapolitikkinum, og ansast má tí eftir, at slíkar ásetingar verða fylgdar, tá talan er um at fremja starvsfólkapolitikkin í verki.“*

*Í tí partinum av starvsfólkapolitikkinum, sum snýr seg um setanarpolitikk, soleiðis sum hann var orðaður, tá setanartilgongdin fór fram, stendur m.a.:*

> *„Tað er ein týðandi avgerð fyri bæði starvsfólk og stovn, tá nýggj starvsfólk verða sett. Tað er tí av alstórum týdningi – fyri báðar partar – at setanin verður gjørd við nærlagni og eftir ásettari mannagongd.*
>
> *Endamálið er at tryggja, at stovnurin setur tann umsøkjaran, sum úr einum heildarsjónarmiði, er best egnaður til starvið. Setanarpolitikkurin skal eisini tryggja, at umsøkjarar, sum ikki fáa eitt starv teir hava søkt, kortini kunnu vera vísir í, at viðgerðin er farin fram á rættan og rættvísan hátt.*
>
> *Tá starvsfólk skal setast, skal leiðslan gera sær greitt, hvat innihaldið í starvinum er og hvørjum brúk er fyri. Skal starvið lýsast leyst, ella skulu innanhýsis broytingar gerast í staðin.*
>
> *Tá starv verður lýst leyst, skal tað verða gjørt eftir galdandi lóg, reglugerð og sáttmála.*
>
> *Starvið skal verða flokkað, áðrenn tað verður lýst leyst.*
>
> *Umsóknarfreist – minst 14 dagar.*
>
> *Lýsingin skal eisini greitt siga, hvat verður bjóðað og hvat verður kravt.*

*Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Fyri tænastumenn verður tó víst til § 5, stk. 3, í løgtingslóg nr. 31 frá 5. juli 1971 um tænastumenn landsins.*

*Setanarbólkur verður settur til at viðgera umsóknirnar sambært krøvunum til starvið.*

*Í setanarbólkinum skulu vera umboð fyri leiðslu, starvsfólk, umboð fyri t.d. ávísar bólkar, sum viðkoma starvsøkinum og t.d. álitisfólk. Setanarbólkurin velur út hvørjir umsøkjarar skulu til samrøðu.*

*Tíð skal verða sett av til at viðgera umsóknirnar nágreiniliga, og metast skal um førleikarnar. Limirnir í setanarbólkinum skulu síggja umsóknirnar í minsta lagi ein heilan dag, áðrenn ta fyrstu samrøðuna.*

*Setanarsamrøðan skal fara fram í góðum og friðarligum umhvørvi.*

*Setanarbólkurin skal vera væl fyrireikaður.*

*Ein persónur skipar samrøðuna.*

*Um umsøkjari, sum frammanundan er í starvi á stovninum, søkir starvið, og ikki verður settur í starvið, skal leiðarin tosa við umsøkjaran, áðrenn starvið verður sett.*

*Miðað skal verða ímóti, at umsøkjararnir skulu hava fingið svar tríggjar vikur eftir, at umsóknarfreistin er úti."*

*Setanarpolitikkur landsins er seinni broyttur og dagførdur pr. 01.02.03. Endurgivnu brotini úr setanarpolitikkinum eru óbroytt at finna í dagførdu útgávuni, men her er komið nakað aftrat, t.d. at starvssetanir eru at meta sum fyrisitingarligar avgerðir, og at tær tí eisini eru fevndar av ásetingunum í Fyrisitingarlógini um eitt nú grundgeving.*

*Hóast henda áseting ikki var í upprunaligu útgávuni av setanarpolitikkinum er tað eingin ivi um, at starvssetanir skuldu fara fram sambært galdandi lóggávu, eitt nú Fyrisitingarlógini, jbr. eisini tað, sum er nevnt omanfyri úr formælinum til Starvsfólkapolitikk landsins. Setanarpolitikkurin kann ikki broyta galdandi lóggávu, men er at meta sum eitt uppískoyti til lóggávuna ella útfylling av henni.*

*Mentamálaráðið hevur eisini evnað sín setanarpolitikk, og er ikki nakað ósamsvar millum henda setanarpolitikk og tann hjá Løgmansskrivstovuni fyri alt landið. Í setanarpolitikkinum hjá Mentamálaráðnum er omanfyri nevnda brot, um at starvssetanir eru at meta sum fyrisitingarligar avgerðir, við.*

*Við at samanhalda setanarpolitikkin hjá landinum og tann hjá Mentamálaráðnum við galdandi lóggávu, herundir serliga Fyrisitingarlógina, dugi eg ikki at síggja, at nakað ósamsvar er millum hesi.*

*Í viðmerkingum sínum til fyribilsálitið hevur O, advokatur, ført fram viðvíkjandi setanarpolitikkinum, at Magistarafelagið saknar eina veruliga viðgerð av teimum starvssetanarmálum, eg havi fingið til láns frá ráðunum.*

*Hertil er at siga, at gjøgnumgongdin av øðrum setanarmálum hevði til endamáls at geva mær eina mynd av, hvussu starvssetanarmál vanliga verða viðgjørd, og um landsantikvarmálið er viðgjørt øðrvísi enn onnur setanarmál. Viðvíkjandi hesum seinasta skal eg vísa til brotið: Viðgerðin hjá landsstýrismanninum í málinum, sum er umrøtt í niðurstøðuni.*

*Hvat setanarpolitikkinum annars viðvíkur, so havi eg samanborið tann almenna starvsfólkapolitikkin hjá Løgmansskrivstovuni og tann hjá Mentamálaráðnum við galdandi lóggávu, og skal eg hesum viðvíkjandi vísa til tað, sum er ført fram omanfyri, og sum er orðarrætt endurgivið frá fyribils niðurstøðu míni. Eg havi einki at leggja aftrat.*

*Viðvíkjandi einari møguligari kanning av teimum málum, sum eg havi fingið til láns frá aðalráðunum er at siga, at ein viðgerð av teimum einki hevur við landsantikvarmálið at gera, og geri eg tí ikki meira við tann spurningin her.*

***Lýsingin av leysa landsantikvarstarvinum***

*Sum nevnt frammanfyri undir málsgongdini varð starvið fyrst lýst leyst í føroysku bløðunum á føroyskum og knappar 3 vikur seinni í danska „Magisterbladet" á donskum. Tað er ein týðuligur munur á føroysku og donsku lýsingini, tí orðingin í donsku lýsingini undir* ***Faglige kvalifikationskrav:*** *„og at lede arbejdet på en sådan måde, at institutionen fortsat har en faglig og forskningsmæssig profil både i det færøske samfund og uden for Færøerne" og orðingin undir* ***Der tilbydes:*** *„på og uden for Færøerne" er ikki við í lýsingini í føroysku bløðunum.*

*Talan er sostatt ikki um nakra umsetingarvillu, men um ein týðandi mun viðvíkjandi settu persónligu førleikakrøvunum í føroysku og donsku útgávuni av lýsingini – ein mun sum tykist at hava havt rættuliga avgerandi týdning, tá landsstýrismaðurin seinni tók avgerðina um, hvønn hann skuldi seta í starvið.*

*Sambært setanarpolitikkinum hjá bæði Løgmansskrivstovuni og Mentamálaráðnum skal leiðslan frammanundan gera sær greitt, hvørji krøv verða sett til tann, sum skal røkja starvið, og er tað tí mín fatan, at Mentamálaráðið hevur brotið hesa áseting við ikki at hava gjørt sær hesi viðurskifti greið, áðrenn ráðið lýsti starvið leyst. At Mentamálaráðið hevur sent uppskotið til donsku lýsingina til virkandi landsantikvarin, A til ummælis, broytir einki í hesum sambandi.*

*Eftir mínum tykki hevði tað verið rættast, um Mentamálaráðið, tá tað var komið fram til endaligu førleikakrøvini til umsøkjararnar, soleiðis sum tey komu til sjóndar í donsku útgávuni, hevði lýst starvið leyst av nýggjum við einsljóðandi orðingum av donsku og føroysku lýsingunum. Hetta kundi verið gjørt uttan at seinka setanartilgongdina, tí umsóknarfreistin var sett til 11. november 2002. Stytsta umsóknarfreist sambært setanarpolitikkinum er 14 dagar. Tað hevði sostatt verið ríkilig tíð til at lýst starvið leyst av nýggjum í føroysku bløðunum og kortini yvirhildið umsóknarfreistina.*

***Setanarbólkurin og viðgerðin í setanarbólkinum***

*Til at viðgera innkomnu umsóknirnar, at meta um umsøkjararnar og hava setanarsamrøður varð sett setanarnevnd við hesum limum: C, aðalstjóri, B, deildarstjóri, og D, løgfrøðingur allir úr Mentamálaráðnum, og E, starvsfólkaumboð, Føroya Fornminnissavn. Samansetingin av nevndini var sostatt í samsvari við setanarpolitikkin, soleiðis sum hesin var orðaður tá – bæði hjá Løgmansskrivstovuni og Mentamálaráðnum. Henda samanseting kann kanska tykjast eitt sindur óheppin við tað, at tað kann tykjast at vera trupult hjá landsstýrismanninum at fáa óhefta ráðgeving frá sínum embætismonnum í einum setanarmáli, tá teir frammanundan hava luttikið í viðgerðini í setanarnevndini. Hinvegin kann ein siga, at støðan her ikki er stórt øðrvísi, enn tá mál annars verða fyriløgd einum landsstýrismanni. Tað er uppgávan hjá embætisfólkunum loyalt at kanna málið, at ráðgeva landsstýrismanninum, at siga sína hugsan og at koma við tilmæli. Ein setanarbólkur, sum allur ella næstan allur er mannaður við embætisfólki úr viðkomandi ráði, er í veruleikanum ikki annað enn ein fyriskrivað kollektiv viðgerð av einum setanarmáli, har tilmælið til landsstýrismannin kemur frá einari setanarnevnd og ikki frá einum embætismanni, sum leggur málið fyri landsstýrismannin.*

*Eftir at hava viðgjørt umsøkjararnar og havt setanarsamrøður við tveir av teimum, A og F, ger setanarnevndin tilmæli til landsstýrismannin. Í tilmælinum metir setanarnevndin báðar hesar umsøkjarar at vera skikkaðar til starvið. Eftir at hava nevnt, hvat talar til fyrimuns fyri hvønn teirra, kemur ein samd setanarnevnd til ta niðurstøðu, at A eigur at verða settur í starvið.*

*Landsstýrismaðurin metir seg ikki hava nóg gott grundarlag í tilmælinum fyri at taka støðu til, hvør av umsøkjarunum er best egnaður. Í einum notati, sum er endurgivið frammanfyri, vil hann vera við, at niðurstøðan er ikki nóg greið, at nevndin fer ógvuliga lætt um grundgevingina fyri at mæla til at seta A, og at grundgevingarnar mótvegis F eru rættuliga veikar. Í notatinum verður sagt:*

> *„Eg skal eisini tryggja, at báðir umsøkjarar fáa ein javnbjóðis møguleika í innstillingini, sum eisini má verða trúgv móti starvslýsingini.*
>
> *Tað lýsir rættuliga væl ígjøgnum innstillingina, at tað ikki er tann fakligi førleikin ivi er um, tískil má tað verða tann persónliga førleikan, tit hava bygt tykkara støðutakan á. Í lýsingini eftir landsantikvari er greidliga sett upp, hvørjir persónligir eginleikar umsøkjarin skal hava.*
>
> *„Ansøgeren skal besidde gode ledelses- og samarbejdsevner, være målrettet, selvstændig, resultatorienteret, have vilje og lyst til at gå nye veje, tackle nye udfordringer- og at lede arbejdet på en sådan måde, at institutionerne fortsat har en forskningsmæssig profil både i det færøske samfund og uden for Færøerne.“*
>
> *Eg vil fegin hava eina lýsing av teimum báðum A og F, við atliti at teimum fortreytum, sum settar eru í starvslýsingini. Vil fegin hava, at hetta verður sett soleiðis upp, at tað ber til at sammeta teir báðar.*
>
> *Hetta fyri at kunna taka avgerð og velja millum tveir kvalifiseraðar umsøkjarar.“*

*Setanarnevndin ger so eitt ískoyti til tilmælið, har hon førir fram, at hon eftir framhaldandi viðgerð av málinum er komin fram til, at støðan nú var uppaftur greiðari, og at A sum heild mátti metast at vera best egnaður at røkja starvið sum landsantikvarur við tað, at hann*

*hevði góðar fakligar fortreytir, fleiri og meira viðkomandi leiðsluroyndir og betri persónligar eginleikar. Viðvíkjandi F stendur í ískoytinum m.a.:*

> *„Setanarnevndin hevur roynt at fáa til vega upplýsingar um leiðslueginleikar hansara. Tað hevur eydnast í ávísan mun, nevniliga úr Hetlandi. Eftir at nevndin fleiri ferðir bað um tilvísingar til stovnar ella persónar, sum kenna til virksemi á Gilleleje museum, í Grønlandi og Íslandi, hevur hann treyðugt latið hesar. Við loyvi frá F hevur setanarnevndin sett seg í samband við fornfrøðiligar myndugleikar í Grønlandi og Íslandi. Harumframt hevur setanarnevndin tikið samband við nýggjar tilvísingar í Danmark. Sum heild kann sigast, at stórt sæð allar eru samdar um, at fakligi førleiki hansara er góður; men trupult hevur verið, at fingið tilvísingarnar at siga nakað um hansara leiðslu og persónligu eginleikar. Í einum føri varð hetta tó gjørt, men var skoðsmálið ikki serliga gott.“*

*§ 6, stk. 1 í Innlitslógini (løgtingslóg nr. 133 frá 10.06.1993) er soljóðandi:*

> *„Í málum, har avgerð fer at verða tikin av einum myndugleika, skal myndugleiki, sum munnliga tekur ímóti upplýsingum viðvíkjandi teimum veruligu umstøðunum, ið hava týdning fyri avgerðina í málinum, ella sum á annan hátt er kunnugur við sovorðnar upplýsingar, skriva upp innihaldið av teimum. Hetta er tó ikki galdandi, um upplýsingarnir annars síggjast í skjølunum í málinum.“*

*§ 18, stk. 1 í Fyrisitingarlógini (løgtingslóg nr. 132 frá 10.06.1993) er soljóðandi:*

> *„Má tað haldast, at ein partur í einum máli ikki er kunnigur við, at myndugleikin hevur ávísar upplýsingar viðvíkjandi teim veruligu umstøðunum, kann avgerð ikki verða tikin, fyrr enn myndugleikin hevur gjørt partin kunnugan við upplýsingarnar og hann hevur fingið høvi til at koma við einum ummæli. Hetta er tó bert galdandi, um upplýsingarnar ikki eru til fyrimuns fyri viðkomandi part, og hava stóran týdning fyri avgerðina í málinum. Myndugleikin kann áseta eina freist fyri, nær ummælið skal verða givið.“*

*Hóast tað ikki er setanarnevndin, men landsstýrismaðurin, sum tekur avgerð í einum slíkum setanarmáli, haldi eg vísandi til samansetingina av setanarnevndini og luttøku hennara sum ein integrerandi partur av setanartilgongdini, at reglurnar um notatskyldu í Innlitslógini og partshoyringsskyldu í Fyrisitingarlógini eru galdandi fyri viðgerðina hjá nevndini.*

*Av tilmælunum hjá setanarnevndini framgongur, at nevndin hevur fingið tilvísingar frá bæði A og F. C, aðalstjóri, hevur í skrivi til mín, dagfest 20. nov. 2003 upplýst, at setanarnevndin í sambandi við setan av landsfornfrøðingi hevði telefonsamrøður við fleiri tilvísingarpersónar, har spurt varð um øll viðurskifti, sum nevndin metti hava týdning fyri setanartilgongdina. Áðrenn telefonsamrøðurnar vórðu gjørdar, varð loyvi fingið til, at telefonhátalari varð settur til, so at hinir limirnir í setanarnevndini kundu hoyra samrøðuna. Ein av limunum í setanarnevndini var burturstaddur í arbeiðsørindum um tað mundi, tá samrøða skuldi gerast við ein part av tilvísingarpersónunum. Hesar samrøður vórðu tiknar uppá band og seinni spældar fyri liminum, ið hevði verið burturstaddur. Í skrivinum upplýsir aðalstjórin, at ætlanin er at nýta bondini til seinni upptøkur, tvs. at yvirspæla bandaðu upptøkurnar frá samrøðunum. Bandaðu upptøkurnar vóru ikki skrásettar í málinum.*

*Tað fyriliggja sostatt eingi notat viðvíkjandi samrøðum við tilvísingarpersónar, og trygd er ikki fyri, at bondini við telefonsamrøðunum verða varðveitt. C, aðalstjóri skrivar, at tað kom ikki nakað nýtt fram í bandaðu samrøðunum. Í tilmælinum hjá setanarnevndini viðvíkjandi F verður nevnt, at tilvísingarpersónur í einari telefonsamrøðu hevði givið honum ikki serliga gott skoðsmál. Eg haldi at ein tílík útsøgn í øllum førum átti at verið niðurskrivað og fyriløgd F samsvarandi oman fyri nevndu lógargreinum, soleiðis at hann fekk høvi til at vart seg, áðrenn nevndin lat tilmæli frá sær. Eg haldi tað vera átaluvert, at hetta ikki er gjørt.*

*Tað hevur verið gjørt rættuliga nógv burturúr spurninginum um møguligar alkoholtrupulleikar hjá tí eina umsøkjaranum, og at hetta skal hava verið av avgerandi týdningi fyri setanarnevndina, tá hon gjørdi tilmæli. Nevndin hevur avsannað, at so hevur verið, og eg havi einki grundarlag fyri at halda, at spurningurin hevur havt nakran týdning fyri tilmælið.*

*Alkoholtrupulleikar eru ein sera viðkomandi spurningur í setanarmálum. Í einum av teimum setanarmálunum, sum eg havi fingið til*

*láns, har fundarfrásagnir eru gjørdar frá setanarsamrøðum, framgongur, at allir umsøkjararnir, sum vóru til setanarsamrøður, vórðu spurdir um teirra viðurskifti til alkohol og royking. Í ongum føri varð mett, at hetta var nakar trupulleiki, og er spurningurin sum vera man als ikki nevndur í tilmælinum í tí setanarmálinum.*

*Í málinum viðvíkjandi landsantikvarinum hevur setanarnevndin reist spurningin, tí hon hevði hoyrt okkurt graml um, at har var okkurt viðvíkjandi tí eina umsøkjaranum. Hann var tí spurdur um hetta, men segði seg ikki hava nakran trupulleika. Setanarnevndin nevnir so spurningin í tilmælinum við hesum orðum: „Hevur ikki stórt alkoholforbrúk, <u>sigur hann</u>“ (mín undirstriking). Tað er eins og spurningurin verður hangandi í luftini. Eftir mínum tykki átti nevndin antin at latið vera við at tikið spurningin við í tilmælið ella beinleiðis at tikið støðu til hann.*

*Viðvíkjandi niðurskrivingarskyldu hjá setanarnevndum annars skal vera víst á, at bert í einstøkum av teimum setanarmálum, sum eg havi havt til láns, eru gjørdar frásagnir frá setanarsamrøðum. Tær eru leysliga endurgivnar í tilmælunum. Eftir mínum tykki er hetta í lagi. Endamálið við eini setanarsamrøðu er fyrst og fremst at gera sær eina mynd av viðkomandi umsøkjara heldur enn at fáa til vega próvtilfar viðvíkjandi hansara fakliga førleika. Hesin skuldi helst verið skjalprógvaður við umsóknini og møguligum skjalatilfari.*

*Mentamálaráðið hevur í viðmerkingum sínum til fyribilsniðurstøðuna ført fram, at nevndin hevur hildið reglurnar um notatskyldu og hevur víst á, at tað í málinum eru 7 hondskrivaðar A4 síður frá tilvísingarsamrøðunum, sum eg ikki skal hava gáað um.*

*Til hetta er at siga, at eg, áðrenn fyribilsálitið er skrivað, havi sæð og kannað hesar síðurnar, sum eru sera ringar at lesa. Hesi sokallaðu „notatini“ vóru heft saman við persónligu notatunum hjá E, men siga einki um, hvørt tey eru at meta sum hansara egnu, ella tað er setanarnevndin, sum stendur aftanfyri tey. Notatini nevna navni á tí persóninum, tosað hevur verið við, men siga einki um, hvør hesin persónurin annars er. Notatini eru hvørki dagfest, undirskrivaði ella journaliseraði.*

*Reglan um notatskyldu í Innlitslógini setir eingi formkrøv til notatini, men endamálið er at tryggja, at allar upplýsingar av týdningi fyri viðgerðina av einum máli skulu vera til skjals, bæði við atliti at sjálvari málsviðgerðini (fyri at tryggja røttu avgerðina) og við atliti at rættinum*

*til skjalainnlit. Eg haldi avgjørt ikki, at hesar 7 síðurnar eru nøktandi fyri at røkka hesum endamáli.*

*Eg fari tí at halda fast um niðurstøðu mína, at Mentamálaráðið ikki hevur hildið notatskylduna í hesum málinum.*

***Viðgerðin hjá landsstýrismanninum av málinum***

*Sambært § 3 í løgtingslóg nr. 32 frá 2. mai 1952 um fornminnissavn setur landsstýrið (tvs. landsstýrismaðurin í mentamálum) ein landsfornfrøðing til at standa fyri arbeiðinum hjá Føroya Fornminnissavni.*

*Eg havi kannað setanarmálini svarandi til 36. lønarflokk ella hægri hjá tænastumonnunum, sum eru sett í miðfyrisitingini aftaná 1. jan. 2001. Í hesum málum havi eg bert funnið eitt dømi, har landsstýrismaðurin ikki hevur fylgt tilmælinum frá setanarnevndini, men tá var heldur ikki talan um eitt einmælt tilmæli. Tað má tí sigast at vera eitt óvanligt stig, tá landsstýrismaðurin í hesum málinum hevur valt at ganga ímóti einmælta tilmælinum hjá setanarnevndini.*

*Hóast tað sum nevnt er óvanligt, at tilmælini hjá setanarnevndunum ikki verða fylgd, so er tað ein veruleiki, at tað er landsstýrismaðurin, sum er setanarmyndugleikin. Hetta merkir sjálvandi ikki, at hann kann seta einhvønn umsøkjara í eitt leyst starv. Hann er bundin av skrivaðum og óskrivaðum fyrisitingarligum reglum, og hevur sostatt skyldu til at seta best skikkaða umsøkjaran í starvið.*

*Eg dugi ikki at meta um, hvørt avgerðin hjá landsstýrismanninum um at seta F í starvið heldur enn A er røtt, men vísandi til, at dokumentatiónin frá setanarnevndini eftir øllum at døma ikki var fullfíggjað, haldi eg, at tað hevði verið rættast av landsstýrismanninum at kravt hesa dokumentatiónina ella at sett eina nýggja setanarnevnd til at mett um umsóknirnar. Landsstýrismaðurin velur í staðin sjálvur at hava samrøður við umsøkjararnar. Hetta er eisini eitt óvanligt stig, men eg dugi ikki at finna nakrar reglur, sum forða hesum.*

*Sambært notatinum frá landsstýrismanninum, har greitt verður frá, hví hann hevur tikið ta avgerðina, sum hann tók, sær tað út til, at landsstýrismaðurin hevur lagt størri dent á fakligu kvalifikatiónirnar og evnini til at byggja brýr til umheimin, enn á leiðslueginleikarnar. Eg sigi ikki, at hetta er skeivt ella ósakligt, men eg haldi hetta vera eina greiða ábending um, at samsvar ikki er millum starvslýsingina í føroysku bløðunum og avgerðina, og at tað tí kundi havt verið vert at umhugsa at lýst starvið leyst av nýggjum.*

*Fyrisitingarlógin fyriskrivar onga tíðarfreist fyri viðgerð av slíkum málum, og sambært setanarpolitikkinum er tað ikki eitt avgjørt krav, at setanin skal vera framd innan 3 vikur. Gjøgnumgongdin av øðrum setanarmálum hevur víst, at henda freistin ofta ikki verður hildin. Tað er eisini týdningarmiklari at taka eina rætta avgerð enn at halda nevndu freist.*

*Í notatinum hjá landsstýrismanninum um sjálva avgerðina verður gjølla greitt frá kvalifikatiónunum hjá F, men lítið og einki verður sagt um A. Hetta má metast at vera ein veikleiki við avgerðini, serstakliga tá hendan gongur ímóti einari samdari setanarnevnd.*

*Í viðmerkingum sínum hevur O, advokatur, ført fram m.a.:*

> *„Eftir at Magistarafelagið hevði havt høvi til at gera viðmerkingar til tað tilfar, ið umboðsmaðurin hevði sent til hoyringar, skrivaði felagið tann 14. februar 2003 til umboðsmannin.*
>
> *Í hesum brævinum … setir felagið fram 4 høvuðsspurningar, nevniliga:*
>
> *Vantandi útgreiningar í starvslýsingini av raðfestingunum hjá landsstýrismanninum fyri virksemi savnsins.*
>
> *Vantandi fráboðan til A um, at tann samrøða, hann var biðin um at koma til við landsstýrismannin, í veruleikanum var ein heilt nýggj setanarsamrøða uttan at A var gjørdur kunnugur við framtíðarvisiónirnar hjá landsstýrismanninum um virksemið hjá Fornminnissavninum.*
>
> *Hvørjar fakligar førleikar hevði landsstýrismaðurin til at meta um granskingar- og vísindaligan førleika hjá umsøkjarunum?*
>
> *Í fjórða lagi ger felagið vart við, at starvið átti at verið lýst av nýggjum og ein nýggj setanarnevnd sett sambært nýggju fortreytunum hjá landsstýrismanninum.“*

*Til hetta er fyrst at siga, at skrivið frá Magistarafelagnum, dagfest 14. februar 2003, ikki var til mín, men til landsstýrismannin í mentamálum (sí bls. 34 í álitinum). Eg kom ikki inn í málið fyrr enn 31. mars 2003, tá eg fekk klaguna frá Magistarafelagnum. Eg havi sostatt heldur ikki sent málið til hoyringar áðrenn 14. februar 2003.*

*Viðvíkjandi tí fyrsta og tí síðsta av nevndu høvuðsspurningum skal eg vísa til, hvat eg frammanfyri havi sagt um hesar spurningar, og eg havi einki at leggja aftrat.*

*Hvat høvuðsspurninginum um setanarsamrøðuna hjá landsstýrismanninum viðvíkur skal eg vísa til tað, sum eg frammanfyri havi nevnt um, at endamálið við einari setanarsamrøðu fyrst og fremst er at gera sær eina mynd av viðkomandi umsøkjara. Tað hevur ikki verið vanligt í øðrum setanarmálum, sum eg havi sæð, frammanundan at senda viðkomandi eina dagsskrá um, hvat ein setanarsamrøða skal snúgva seg um. Í hesum máli sær tað heldur ikki út til at vera gjørt, hvørki mótvegis A ella F. Tá havt verður í huga, at A hevur starvast á Fornminnissavninum í nógv ár, harav í fleiri ár sum settur landsantikvarur, skuldi hann havt minst líka góðar fortreytir fyri at komið væl frá einari setanarsamrøðu sum F.*

*Viðvíkjandi triðja høvuðsspurninginum, um hvønn fakligan førleika landsstýrismaðurin hevur til at meta um vísindaliga førleikan hjá teimum báðum umsøkjarunum er at siga, at eg havi ikki kannað hendan spurning, eins lítið og eg havi kannað førleikan hjá setanarnevndini til at meta um hetta. Eg loyvi mær at ivast í, um landsstýrismaðurin hevur serligan førleika í so máta. Hetta er tó ikki øðrvísi enn í nógvum øðrum málum, har ein landsstýrismaður tekur avgerð. Sum nevnt frammanfyri hevur hann eina fyrisiting, sum skal vera honum til hjálpar at taka røttu avgerðirnar. Eg loyvi mær eisini at ivast í, um setanarnevndin kann sigast at vera ein fakliga samansett nevnd, tá metast skal um vísindaliga førleikan hjá einum landsantikvari. Um ein slík meting skuldi verið avgerandi, hevði tað helst veri rættast at sett eina nevnd av sakkønum, møguliga eksternum sakkønum, til at meta um hendan spurning. Eina slíka mannagongd havi eg sæð í málum viðvíkjandi setan av yvirlæknum á Landssjúkrahúsinum.*

*Frammanfyri havi eg nevnt, at tað er óvanligt, at ein landsstýrismaður sjálvur hevur setanarsamrøður við umsøkjarar, men at eg ikki dugi at finna reglur, sum forða hesum. Tað er landsstýrismaðurin í mentamálum, sum hevur setanarmyndugleikan. Tað er sostatt eisini hann, sum má taka støðu til, um hann heldur seg hava haldgott grundarlag til at taka eina avgerð. Eg haldi tað tí vera ivasamt, um tað vil vera í samsvar við lógina, um tað í setanarpolitikkinum verður ásett, at landsstýrismaðurin ikki kann luttaka í setanarsamrøðum. Tað kundu verið góðar orsøkir til eina slíka reglu, t.d. fyri at forða fyri, at illgruni kann taka seg upp um, at politisk heldur enn saklig atlit hava verið avgerandi í setanarmálum. Tað er í øllum førum ein politisk avgerð, um*

*ein slík avmarking eigur at verða gjørd ella ikki. Eg fari tí ikki at gera nakað tilmæli hesum viðvíkjandi.*

*Ein kann undrast yvir, at fráboðanin til A um avgerðina ikki verður avgreidd av embætisverkinum. Hinvegin er tað ikki nakað, sum forðar landsstýrismanninum at avgreiða hetta sjálvur.*

*O, adv. sigur í viðmerkingum sínum, at A frammanundan skrivinum, sum landsstýrismaðurin handaði honum 4. febr. 2003, ikki visti, hvør grundgevingin fyri avgerðini var, og at tað einasta, sum ikki er nevnt í grundgevingunum frá landsstýrismanninum, er tað, sum søkt varð eftir, nevniliga einum stjóra til Føroya Fornminnissavn. Hesum eri eg ikki heilt samdur í, tí at í skrivinum til A sigur landsstýrismaðurin m.a.: „Umframt tær fortreytir, ið settar eru í starvslýsingini, meti eg eisini (mín undirstriking), at hugt eigur at verða at, hvørjar avbjóðingar Fornminnissavn Føroya hevur fyri framman. Hetta er neyðugt fyri at nágreina, hvørjir førleikar og eginleikar dentur eisini eigur at verða lagdur á, tá nýggjur landsantikvarur verður settur…“*

*Sum nevnt dugi eg ikki at meta um, um avgerðin at seta F í starvið sum landsantikvarur var røtt ella ikki. Burtursæð frá at geva Mentamálaráðnum eina átalu fyri ikki at hava hildið notatskylduna og partshoyringsskylduna geri eg tí ikki meira við málið.*

# *V. Skjøl*

## Skjal 1

**Løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000 um Løgtingsins umboðsmann**

**1. Partur**
**Umboðsmaðurin og Løgtingið**

§ 1. Løgtingið velur ein uttantingsmann fyri eitt 5 ára skeið at hava innlit við fyrisiting heimastýrisins.

*2. stk.* Doyr umboðsmaðurin í embætistíð síni ella er hann av øðrum orsøkum ikki førur fyri at røkja starv sítt, ger formansskapur Løgtingsins av, hvør skal røkja starvið, til Løgtingið velur ein nýggjan umboðsmann. Tað sama er galdandi, um umboðsmaðurin biður um at verða loystur úr starvi, ella um Løgtingið loysir hann úr starvi smb. stk. 3.

*3. stk.* Hevur Løgtingið ikki longur álit á umboðsmanninum, kunnu tveir triðingar av løgtingsmonnunum loysa hendan úr starvi.

§ 2. Umboðsmaðurin, ið ikki kann sita á Løgtingi ella í kommunustýri, skal so vítt gjørligt hava løgfrøðiliga útbúgving.

§ 3. Við løgtingslóg kunnu verða gjørdar almennar reglur fyri virksemi umboðsmansins. Annars er umboðsmaðurin í starvi sínum óheftur av Løgtinginum.

**2. Partur**
**Heimildir**

§ 4. Virksemið umboðsmansins fevnir um alla fyrisiting heimastýrisins (t.e. lands- og kommunalu).

*2. stk.* Lógin er eisini galdandi fyri feløg, stovnar, felagsskapir v.m., ið verða roknað við til almennu fyrisitingina sambært fyrisitingarlógini, lógini um alment innlit ella lógini um almennar skráir.

*3. stk.* Í meting sínari av kommunalari umsiting skal umboðsmaðurin vísa atlit til tær serligu umstøður, kommunufyrisiting virkar undir.

*4.stk.* Interkommunalir felagsskapir eru undirlagdir virksemi umboðsmansins.

*5. stk.* Virksemi umboðsmansins fevnir ikki um ríkismyndugleikar, Løgtingið og stovnar undir Løgtinginum.

§ 5. Umboðsmaðurin hevur eftirlit við, at tær í § 4 nevndu umsitingar-

eindir ikki gera mistøk ella vanrøkja skyldur sínar, og at almenna umsitingin ikki fremur órætt móti einstaka borgaranum.

## 3. Partur
## Kærumál og egin mál

§ 6. Ein og hvør kann senda umboðsmanninum klagu um tær í § 4 nevndu umsitingareindir.

*2. stk.* Tann, ið klagar, skal navngeva seg í klaguni. Klagan skal vera umboðsmanninum í hendi í seinasta lagi eitt ár eftir, at tey viðurskifti, ið klagað verður um, áttu sær stað.

*3. stk.* Klaga um avgerðir, ið møguligur hægri umsitingarmyndugleiki kann broyta, kann ikki sendast umboðsmanninum, fyrr enn viðkomandi hægri myndugleiki hevur tikið avgerð í málinum. Freistin, ið er nevnd í 2. stk., skal í slíkum førum roknast frá tí degi, hægri myndugleikin tekur avgerð sína.

*4. stk.* Umboðsmaðurin tekur støðu til, um grundarlag er fyri víðari kanningum í máli, ið klagað verður um.

*5. stk.* Umboðsmaðurin kann sjálvur taka eitt mál til viðgerðar og fremja neyðugar kanningar í hesum sambandi.

## 4. Partur
## Kanningar

§ 7. Ger umboðsmaðurin av at taka eina kæru til viðgerðar, skal hann beinanvegin kunna viðkomandi umsiting um innihaldið í kæruni, um ikki vandi er fyri, at hetta kann darva kanningini. Harumframt skal umsitingin biðjast um ummæli í málinum, áðrenn umboðsmaðurin tekur avgerð um at gera vart við meting sína av málinum smb. § 10, stk. 2. Umboðsmaðurin kann áseta tíðarfreist til ummæli.

§ 8. Tær í § 4 nevndu umsitingar hava skyldu at geva umboðsmanninum tær upplýsingar og at leggja fram øll tey skjøl, sum hesin embætis vegna krevur at fáa fyrilagt.

*2. stk.* Umboðsmaðurin kann stevna fólki í rættin at vitna um viðurskifti, ið eru avgerandi í kanningararbeiðinum. Í slíkum førum eru reglurnar í rættargangslógini galdandi. Rættarfundirnir eru ikki almennir. Tann, ið klagan viðvíkur, hevur saman við hjáseta rætt at vera hjástaddur, meðan slík vitnisførsla fer fram.

*3. stk.* Umboðsmaðurin hevur rætt til at vitja støð, ið kannað verða, og hann hevur fría atgongd til at gera kanningar í øllum neyðugum hølum.

§ 9. Umboðsmaðurin hevur tagnarskyldu um tey viðurskifti, hann í virksemi sínum fær kunnleika til. Tagnarskyldan stendur við, eftir at umboðsmaðurin fer úr starvi, og fevnir eisini um starvsfólk á umboðsmansstovninum.

## 5. Partur
## Niðurstøður

§ 10. Kemur umboðsmaðurin til ta niðurstøðu, at álvarsligt mistak ella vansketni er framt av einum av teimum í § 4 nevndu umsitingum, skal umboðsmaðurin boða formansskapi Løgtingsins, løgmanni og viðkomandi landsstýrismanni og /ella kommunustýri frá hesum og koma við tilmæli til teirra.

*2. stk.* Umboðsmaðurin hevur rætt til alment at finnast at, koma við tilmælum, og á annan hátt gera vart við meting sína av máli, hann hevur kannað.

*3. stk.* Umboðsmaðurin kann mæla viðkomandi myndugleikum til, at fríur rættargangur verður givin, smb. rættargangslógini §§ 330 -336c, í málum, sum hava verið viðgjørd eftir hesi lóg.

§ 11. Umboðsmaðurin letur Løgtinginum ársfrágreiðing um arbeiðið sítt. Frágreiðingin verður almannakunngjørd áðrenn 1. juli.

*2. stk.* Boðar umboðsmaðurin Løgtinginum, landstýrismanni ella kommunustýri frá einum máli, ella tekur hann eitt mál við í ársfrágreiðing sína, skal hann upplýsa um, hvat viðkomandi hevur ført fram til verju sína.

§ 12. Rakar umboðsmaðurin við lýti í galdandi lógum, fyriskipanum ella umsitingarligum avgerðum, skal umboðsmaðurin boða Løgtingi og viðkomandi landsstýrismanni frá hesum. Er talan um viðurskifti, ið viðvíkja kommunalari ella interkommunalari umsiting, skal umboðsmaðurin eisini boða viðkomandi kommunustýri frá.

§ 13. Um umboðsmaðurin krevur tað, kunnu dómstólarnir vísa frá sær privatmál móti umboðsmanninum vegna avgerðir, sum hann tekur við grundarlagið í hesi lóg.

## 6. Partur
## Lønar- og eftirlønarviðurskifti

§ 14. Lønarviðurskifti umboðsmansins, herundir eisini spurningin um eftirløn og bíðipening, verða ásett við løgtingslóg.

*2. stk.* Umboðsmaðurin kann ikki, uttan við loyvi Løgtingsins, vera í starvi hjá almennum ella privatum fyritøkum, virkjum ella stovnum.

*3. stk.* Møguligur spurningur um ógegni umboðsmansins í ávísari søk verður lagdur fyri formansskap Løgtingsins, sum, um mett verður, at talan er um ógegnið, útnevnir annan at viðgera hetta ávísa mál.

§ 15. Umboðsmaðurin kann krevja at verða loystur úr starvi við seks mánaða freist at galda frá seinasta degi í einum mánaði.

**7. Partur**
**Fyrisiting**

§ 16. Umboðsmaðurin setir og loysir úr starvi starvsfólk síni.

§ 17. Tær útreiðslur, ið standast av umboðsmansstovninum, verða játtaðar á Løgtingsins fíggjarlóg.

*2. stk.* Umboðsmaðurin ger roknskap fyri virksemi stovnsins, hesin skal vera grannskoðaður av grannskoðara Løgtingsins.

**8. Partur**
**Ígildisreglur**

§ 18. Henda lóg kemur í gildi 1. januar ár 2001.

*2. stk.* Klagur um viðurskifti í tíðarskeiðinum 1. januar 2000 og til henda lóg kemur í gildi, kunnu kortini leggjast fyri umboðsmannin til viðgerðar.

# Skjal 2

## Vegleiðingin um Løgtingsins umboðsmann

**Hvønn og hvat kunnu tygum klaga um**

Umboðsmaðurin hevur eftirlit við allari fyrisitingini undir heimastýrinum, tvs. bæði lands-, kommunalu og interkommunalu myndugleikunum.

Umboðsmaðurin kann viðgera klagur um avgerðir hjá myndugleikunum, eins og viðferð teirra av borgarum og málum.

Tygum kunnu t.d. klaga um eina noktan av einari umsókn, um tann valda viðgerðarháttin, um ta tíðina, sum hetta hevur tikið og / ella framferðarháttin hjá embætisfólkunum.

Umboðsmaðurin hevur eftirlit við, at myndugleikarnir ikki gera mistøk ella vanrøkja skyldur sínar, og at almenna umsitingin ikki fremur órætt móti einstaka borgaranum.

Dómstólarnir, Løgtingið, feløg og privatir persónar eru ikki almennir fyrisitingarmyndugleikar. Tí kann umboðsmaðurin ikki viðgera klagur um hesi. Donsku myndugleikarnir, sum t.d. løgreglan hoyra ikki undir heimastýrið. Tí kann umboðsmaðurin heldur ikki viðgera klagur um hesar. Um tygum eru í iva um, hvørt tygum kunnu klaga til umboðsmannin um ein ávísan myndugleika, kunnu tygum altíð spyrja okkum.

**Hvussu kunnu tygum klaga**

Um tygum ynskja at klaga, skulu tygum skriva til umboðsmannin og greiða frá, hvønn og hvat tygum ynskja at klaga um. Um tygum hava latið onkran annan klaga tygara vegna, skulu tygum leggja eina undirskrivaða fulltrú við klaguni. Tað lættir um málsviðgerðina, um tygum senda møgulig viðkomandi skjøl (brøv frá tygum, svar frá myndugleikunum osv.) saman við klaguni. Á hendan hátt fáa tygum eisini ofta skjótari svar, tí umboðsmaðurin vanliga hevur tørv á at síggja hesi skjøl.

**Hvat kann umboðsmaðurin gera**

Um umboðsmaðurin eftir at hava kannað málið kemur til ta niðurstøðu, at hann gevur viðkomandi viðhald, kann hann finnast at tí myndugleikanum, sum klagan snýr seg um. Umboðsmaðurin kann eisini heita á myndugleikan um at umhugsa málið av nýggjum og taka eina aðra avgerð. Leggið til merkis, at umboðsmaðurin ikki sjálvur kann broyta eina avgerð. Uppgávan hjá umboðsmanninum er sostatt at greiða myndugleikanum frá, at hesin eftir hansara fatan hevur gjørt eitt mistak.

Í hesum sambandi skulu tygum hava í huga, at umboðsmaðurin hevur

avmarkaðar møguleikar fyri at taka støðu til avgerðir, ið eru grundaðar á reinar metingar ella avgerðir, har tað krevst ein serligur førleiki (t.d. læknaligur).

**Hvat hendir, tá umboðsmaðurin fær eina klagu**

Umboðsmaðurin hevur 3 møguleikar at svara eini klagu:

1. Klagan verður kannað nærri.
2. Klagan verður avvíst, tí at umboðsmaðurin ikki kann viðgera hana.
3. Umboðsmaðurin velur ikki at kanna málið.

*1. Klagan verður kannað nærri.*

Heldur umboðsmaðurin, at ein klaga skal kannast nærri, sendir hann hana til viðkomandi myndugleika og biður um eina viðmerking. Samstundis biður hann eisini um at læna møgulig skjøl í málinum. Viðmerkingin frá myndugleikanum verður vanliga send viðkomandi, sum fær møguleika at gera sínar viðmerkingar.

Hann, ið hevur klagað, verður vanliga kunnaður um gongdina í málinum.

Tá myndugleikin og viðkomandi hava gjørt sínar viðmerkingar til málið, er hetta vanliga klárt til endaligu niðurstøðu umboðsmansins. Alt eftir, hvussu nógv mál eru til viðgerðar hjá umboðsmanninum samstundis, og hvussu skjótt myndugleikarnir svara umboðsmanninum, mugu tygum rokna við, at tað kann ganga umleið eitt hálvt ár, áðrenn málið er liðugt viðgjørt.

*2. Klagan verður avvíst.*

Løgtingið hevur í umboðsmanslógini (lóg nr. 60 frá 10. mai 2000) sett mark fyri, nær umboðsmaðurin kann viðgera eina klagu:

*„Klaga um avgerðir, ið møguligur hægri umsitingarmyndugleiki kann broyta, kann ikki sendast umboðsmanninum, fyrr enn viðkomandi hægri myndugleiki hevur tikið avgerð í málinum…“* (§ 6, stk. 3)

Um tað er møguligt at kæra eina avgerð til ein annan fyrisitingarmyndugleika, skal hetta sostatt verða roynt, áðrenn umboðsmaðurin kann viðgera málið. Avgerðir, sum verða fráboðaðar skrivliga, skulu geva eina vegleiðing um møguligar kærumøguleikar, áðrenn farast kann til umboðsmannin. Eru tygum í iva, kunnu tygum venda tygum til myndugleikan, sum hevur tikið avgerðina, ella møguliga til skrivstovuna hjá umboðsmanninum.

„…Klagan skal vera umboðsmanninum í hendi í seinasta lagi eitt ár eftir, at tey viðurskifti, ið klagað verður um, áttu sær stað.“ (§ 6, stk. 2)

Orðingin „viðurskifti“ fevnir um alt, sum klagast kann um til umboðsmannin, t.d. viðgerðina av einum

máli, málsviðgerðartíðina, avgerðina í málinum, atburðin o.s.v. Klaga tygum um eina avgerð, skal hendan sostatt verða tikin innanfyri tað seinasta árið.

Inniheldur klagan til umboðsmannin viðurskifti, sum myndugleikin ikki áður hevur tikið støðu til, sendir umboðsmaðurin næstan altíð klaguna víðari til myndugleikan og biður hendan taka støðu til hesi viðurskiftini. Samstundis verður viðkomandi kunnaður um hetta, og biðin um at bíða við at klaga til umboðsmannin til myndugleikin hevur tikið støðu í málinum. Kemur eingin nýggj klaga, ger umboðsmaðurin ikki meira við málið.

*3. Umboðsmaðurin velur ikki at kanna málið*

Í umboðsmanslógini stendur:

“*Umboðsmaðurin tekur støðu til, um grundarlag er fyri víðari kanningum í máli, ið klagað verður um.*” (§ 6, stk. 4)

Umboðsmaðurin hevur sostatt ikki skyldu til at taka allar klagur upp til viðgerðar. Hann kann nokta at viðgera klaguna sum heild ella bert at viðgera ávís viðurskifti í hesari.

Umboðsmaðurin kannar altíð eina klagu gjølla, áðrenn hann tekur avgerð um at avvísa hana. Í tílíkum metingum verður vanliga hugt at, um tað eru útlit fyri, at umboðsmaðurin kann hjálpa viðkomandi.

Ofta skrivar ella ringir umboðsmaðurin til viðkomandi ella til myndugleikan, fyri at hava eitt trygt grundarlag fyri avgerð síni. T.d. kann hann biðja um skjølini í málinum.

Ein avvísing av at viðgera eina klagu kann sostatt vera úrslitið av einari víðfevndari málsviðgerð hjá umboðsmanninum.

**Umboðsmaðurin kann sjálvur taka eitt mál til viðgerðar**

Umboðsmaðurin kann eisini kanna eitt mál, uttan at tað finst nøkur klaga hesum viðvíkjandi. Umrøða í fjølmiðlunum kann t.d. hava við sær, at umboðsmaðurin gerst varur við eitt mál, sum hann ynskir at kanna nærri. Onkuntíð kunnu klagur vera orsøk til, at umboðsmaðurin fer at kanna viðurskifti, sum tað ikki er klagað um.

Umboðsmaðurin kann sambært §§ 6, stk. 5 og 8, stk. 3 kanna stovnar og tænastustøð v.m., ið hoyra til virkisøki hansara.

**Um umboðsmannin og embætið**

Løgtingið velur fimta hvørt ár ein Løgtingsins umboðsmann. Hevur Løgtingið ikki longur álit á umboðsmanninum kunnu 2/3 av limunum loysa hann úr starvi.

Umboðsmaðurin setir og loysir úr starvi starvsfólk síni.

Tygum kunnu ringja á tlf. 35 85 00 ella venda tygum til skrivstovuna í Niels Finsens gøtu 39, Tórshavn, um tygum hava spurningar.

# *Lógaryvirlit*

Niðanfyri er eitt yvirlit yvir ta lóggávuna, sum er umrødd / nevnd í álitunum frá umboðsmanninum. Yvirlitið fevnir bæði um hesa og tær báðar undanfarnu ársfrágreiðingarnar. Yvirlitið vísir til einstøku málini, ið eru nevnd t.d. 03/10.1, og merkir hetta, at talan er um mál nr. 10.1 í ársfrágreiðingini fyri 2003.


| **Lóggáva, kunngerð v.m.** | **Mál:** |
|---|---|
| ALS-lógin (løgtingslóg nr. 113 frá 13.06.1997): | |
| - § 1 | 03/10.1 |
| - § 7 | 03/10.1 |
| - § 26, stk. 1, 2. pkt. | 03/10.1 |
| Ábyrgd landsstýrismanna (løgtingslóg nr. 90 frá 04.06.1996): | |
| - § 2 | 02/23.2 |
| - § 4 | 02/23.2 |
| - § 5 | 02/23.2 |
| Barsilsskipanarkunngerðin (kunngerð nr. 91 frá 31.05.2001): | |
| - § 6 | 03/20.2 |
| Barsilsskipanarlógin (løgtingslóg nr. 48 frá 03.04.2001): | |
| - § 5 | 03/20.2 |
| - § 12 | 03/20.2 |
| - § 18 | 03/20.2 |
| - § 25 | 03/20.2 |
| Býarskipanarlógin (løgtingslóg nr. 13 frá 21.05.1954): | |
| - § 12, stk. 1 | 02/21.1 |
| - § 15 | 02/21.1 |
| - § 17 | 02/21.1 |
| Europeiski mannarættindasáttmálin (kgl. fyriskipan nr. 136 frá 25.02.2000): | |
| art. 8 | 03/25.1 |
| Fornminnissavnslógin (løgtingslóg nr. 32 frá 02.05.1952): | |
| - § 3 | 03/28.3 |
| Forsorgarlógin (lógarkunngerð nr. 100 frá 02.03.1988): | |
| - § 9 | 03/20.1 |
| - § 17 | 03/20.1 |

Fólkaskúlalógin (løgtingslóg nr. 125 frá 20.06.1997):
- § 26 .......... 02/27.1
- § 26, stk. 1 .......... 02/27.1
- § 29 .......... 02/27.1
- § 29, stk. 5 .......... 02/27.1
- § 40 .......... 02/27.1
- § 41, stk. 1 .......... 02/27.1
- § 41, stk. 2 .......... 02/27.1
- § 46 .......... 02/27.1
- § 47, stk. 1 .......... 02/27.1
- § 47, stk. 3 .......... 02/27.1
- § 57, stk. 7 .......... 02/27.1
- § 59 .......... 02/27.1

Frítíðarkunngerðin (kunngerð nr. 14 frá 16.02.1987):
- § 3, stk.1, 1. pkt. .......... 03/20.2

Frítíðarlógin (løgtingslóg nr. 30 frá 07.04.1986):
- § 1 .......... 03/20.2
- § 10 .......... 03/20.2
- § 12 .......... 03/20.2

Fyrisitingarlógin (løgtingslóg nr. 132 frá 10.06.1993):
- § 1 .......... 02/27.2
- § 1 .......... 02/27.4
- § 3, stk. 1, nr. 5 .......... 02/21.1
- § 7, stk. 1 .......... 02/27.3
- § 9 .......... 02/28.2
- § 10, stk. 2 .......... 02/28.2
- § 18 .......... 02/28.2
- § 18, stk. 1 .......... 03/21.1
- § 18, stk. 1 .......... 03/28.3
- § 18, stk. 2, nr. 1 .......... 03/21.1
- § 19 .......... 02/28.2
- § 20 .......... 02/28.2
- § 21 .......... 01/11.2
- § 21 .......... 02/10.5
- § 21 .......... 02/11.1
- § 21 .......... 02/28.1
- § 21 .......... 02/28.2

- § 22 .......................................................... 02/28.2
- § 23 .......................................................... 01/11.2
- § 23 .......................................................... 02/10.5
- § 23 .......................................................... 02/28.1
- § 23 .......................................................... 02/28.2
- § 23, stk. 1 .................................................. 01/11.2
- § 23, stk. 2 .................................................. 01/11.2
- § 24 .......................................................... 02/28.2
- § 25 .......................................................... 02/28.2
Grundlógin:
- § 14, 2. pkt. ................................................. 01/28.1
- § 73 .......................................................... 02/21.1
HF-kunngerðin (kunngerð nr. 103 frá 17.07.1996):
- § 20, stk. 2 .................................................. 02/28.2
HF-lógin (løgtingslóg nr. 107 frá 29.06.1995):
- § 15 .......................................................... 02/28.2
- § 16 .......................................................... 02/28.2
- § 16, stk. 1 .................................................. 02/28.2
- § 16, stk. 4 .................................................. 02/28.2
- § 20 .......................................................... 02/28.2
Innlitslógin (løgtingslóg nr. 133 frá 10.06.1993):
- § 4, stk. 1 ................................................... 03/11.1
- § 4, stk. 1, 2. pkt. ........................................... 02/11.1
- § 4, stk. 3 ................................................... 01/11.2
- § 4, stk. 3 ................................................... 03/11.1
- § 5, stk. 1, nr. 2. ............................................ 01/11.1
- § 6 ........................................................... 02/28.2
- § 6 ........................................................... 03/10.2
- § 6 ........................................................... 03/21.2
- § 6, stk. 1 ................................................... 03/28.3
- § 7 ........................................................... 02/11.1
- § 11 .......................................................... 02/11.1
- § 13, stk. 1, nr. 6 ............................................ 02/11.1
- § 16, stk. 1 .................................................. 01/11.1
- § 16, stk. 1 .................................................. 03/11.1
- § 16, stk. 3 .................................................. 01/11.1
- § 16, stk. 3 .................................................. 03/11.1

Kommunulógin (løgtingslóg nr. 45 frá 29.06.1972):
- § 4 .......... 02/27.1
- § 41 .......... 02/21.1
Kommunustýrislógin (løgtingslóg nr. 87 frá 17.05.2000):
- § 12 .......... 02/27.1
- § 12, stk. 1 .......... 02/27.1
- § 13, stk. 1 .......... 02/27.1
- § 13, stk. 2 .......... 02/27.1
- § 14 .......... 02/27.1
- § 27, stk. 2 .......... 02/27.1
- § 55 .......... 02/21.1
- § 55 .......... 02/27.1
- § 55, stk. 1 .......... 02/27.1
Kommunuvallógin (løgtingslóg nr. 44 frá 19.06.1972):
- § 3 .......... 02/27.1
Kringvarpslógin (løgtingslóg nr. 22 frá 20.02.1998):
- § 5 .......... 01/11.2
- § 5 .......... 02/27.4
- § 5, stk. 1 .......... 02/27.2
- § 6 .......... 02/27.4
- § 6, stk. 1 .......... 02/27.4
- § 6, stk. 2 .......... 02/27.2
- § 6, stk. 2 .......... 01/11.2
- § 13 .......... 01/11.2
- § 13 .......... 02/27.4
- § 13, stk. 1 .......... 01/11.2
- § 13, stk. 2 .......... 02/27.4
- § 15 .......... 02/27.4
- § 17 .......... 01/11.2
- § 18, stk. 2 .......... 01/11.2
- § 20, stk. 2 .......... 03/27.1
- § 25 .......... 01/11.2
- § 25, stk. 1 .......... 01/11.2
Landsvegalógin (løgtingslóg nr. 51 frá 25.07.1972):
- § 5 .......... 03/21.1
Lærararáðskunngerðin (kunngerð nr. 46 frá 09.05.1997):
- § 7, stk. 2 .......... 02/28.2

Meirvirðisgjaldsfrítøka
(kunngerð nr. 136 frá 17. juni 1993): ............................. 02/22.1
Meirvirðisgjaldsfrítøka (kunngerð nr. 166 frá 3. des. 1992): ... 02/22.1
Meirvirðisgjaldslógin (løgtingslóg nr. 136 frá 08.09.1992):
- § 1 .......................................................... 02/22.1
- § 2 .......................................................... 02/22.1
- § 2, stk. 3 .................................................. 02/22.1
- § 2, stk. 5 .................................................. 02/22.1
- § 3 .......................................................... 02/22.1
- § 4 .......................................................... 02/22.1
- § 5 .......................................................... 02/22.1
- § 12 ......................................................... 02/22.1
Navnakunngerðin (kunngerð nr. 71 frá 29.06.2002):
- § 1-3 ........................................................ 03/25.1
Navnalógin (løgtingslóg nr. 41 frá 26.03.2002):
- § 2, stk. 3 .................................................. 03/25.1
- § 2, stk. 4 .................................................. 03/25.1
Ognartøkulógin (lov nr. 69 frá 07.05.1881):
- § 2 .......................................................... 03/21.1
Postgjøld (kunngerð nr. 134 frá 11.10.2001): .................... 02/27.4
Prótøkukunngerðin (kunngerð nr. 65 frá 27.04.2001):
- § 52, stk. 3 ................................................. 02/27.3
- § 53 ......................................................... 02/27.3
- § 67 ......................................................... 02/27.3
Sjónvarpsgjaldskunngerðin (kunngerð nr. 103 frá 20.12.2002):
- § 1 .......................................................... 03/27.1
Skattafyrisitingarlógin (løgtinglóg nr. 169 frá 30.12.1997):
- § 16 ......................................................... 02/10.1
- § 17 ......................................................... 02/10.1
- § 17, stk. 4 ................................................. 02/10.1
Skipaskráseting (løgtingslóg nr. 9 frá 05.03.1970):
- § 35 ......................................................... 02/23.2
- § 35, stk. 1 ................................................. 02/23.2
- § 36 ......................................................... 02/23.2
- § 36, stk. 1 ................................................. 02/23.2
- § 37 ......................................................... 02/23.2
- § 37, stk. 2 ................................................. 02/23.2
- § 37, stk. 3 ................................................. 02/23.2

Starvsskipan fyri kommunalar skattakærunevndir
(kunngerð nr. 48 frá 15.04.1998):
- § 5 ........................................................ 02/10.1
- § 8 ........................................................ 02/10.1
- § 9 ........................................................ 02/10.1
- § 11 ........................................................ 02/10.1
- § 13, stk. 2 ................................................ 02/10.1
Studentaskúlakunngerðin (kunngerð nr. 102 frá 17.06.1996):
- § 12 ........................................................ 02/28.2
Studentaskúlakunngerðin (kunngerð nr. 102 frá 26.06.2001):
- § 20 ........................................................ 02/27.3
- § 20, stk. 3 ................................................ 02/27.3
- § 20, stk. 4 ................................................ 02/27.3
- § 30 ........................................................ 02/27.3
Studentaskúlalógin (løgtingslóg nr. 106 frá 29.06.1995):
- § 9 ........................................................ 02/28.2
- § 10 ........................................................ 02/28.2
- § 10, stk. 1 ................................................ 02/28.2
- § 10, stk. 4 ................................................ 02/28.2
- § 13 ........................................................ 02/28.2
- § 13, stk. 1 ................................................ 02/28.2
- § 13, stk. 2 ................................................ 02/28.2
- § 13, stk. 3 ................................................ 02/28.2
Stýrisskipanarlógin (løgtingslóg nr. 103 frá 26.07.1994):
- § 29, stk. 2 ................................................ 03/28.3
- § 33, stk. 1 ................................................ 01/28.1
- § 33, stk. 3 ................................................ 03/28.3
- § 56 ........................................................ 02/27.1
Tænastumannaeftirlønarlógin (løgtingslóg nr. 32 frá 05.07.1971):
- § 2 ........................................................ 01/28.1
- § 10 ........................................................ 01/28.1
Tænastumannalógin (løgtingslóg nr. 31 frá 05.07.1971):
- § 29 ........................................................ 02/28.1
Umboðsmanslógin (løgtingslóg nr. 60 frá 10.05.2000):
- § 4 ........................................................ 02/27.2
- § 4 ........................................................ 02/27.4
- § 4 ........................................................ 03/10.1

- § 4 .......................................................... 03/21.2
- § 4, stk. 2 .......................................................... 01/11.2
- § 5 .......................................................... 02/27.4
- § 6 .......................................................... 02/27.4
- § 6, stk. 1 .......................................................... 03/21.2
- § 6, stk. 2 .......................................................... 03/21.2
- § 6, stk. 3 .......................................................... 02/10.1
- § 6, stk. 4 .......................................................... 03/28.3
- § 10, stk. 1 .......................................................... 03/11.1
- § 12 .......................................................... 01/11.2
- § 12 .......................................................... 02/27.2
- § 12 .......................................................... 02/27.4
- § 12 .......................................................... 03/20.1
- § 18 .......................................................... 02/21.1
- § 18, stk. 2 .......................................................... 02/23.1

Vinnuligur fiskiskapur (løgtingslóg nr. 28 frá 10.03.1994):

- § 7 .......................................................... 02/23.2
- § 8 .......................................................... 02/23.2
- § 8, stk. 4 .......................................................... 02/23.2

# *Leitorð*

Niðanfyri er eitt yvirlit yvir nøkur leitorð, sum eru umrødd / nevnd í álitunum frá umboðsmanninum. Yvirlitið fevnir bæði um hesa og tær báðar undanfarnu ársfrágreiðingarnar. Yvirlitið vísir til einstøku málini, ið eru nevnd t.d. 02/27.1, og merkir hetta, at talan er um mál nr. 27.1 í ársfrágreiðingini fyri 2002.


| **Leitorð:** | **Mál:** |
|---|---|
| Afturtøka av avgerð ................................................ | 02/27.1 |
| Akravegurin ......................................................... | 03/21.1 |
| Almannakunngerðing av kommunustýrisavgerðum ........... | 02/27.1 |
| Almannastovan ..................................................... | 02/10.2 |
| - ....................................................................... | 02/10.3 |
| - ....................................................................... | 02/10.4 |
| - ....................................................................... | 03/10.3 |
| - ....................................................................... | 03/20.1 |
| Almennur stovnur .................................................. | 02/27.2 |
| ALS ..................................................................... | 03/10.1 |
| ALS-kærunevndin .................................................. | 03/10.1 |
| Ársfundarætlan ..................................................... | 02/27.1 |
| Ársmet ................................................................ | 02/27.3 |
| Átala .................................................................. | 01/11.1 |
| - ....................................................................... | 02/10.1 |
| - ....................................................................... | 02/10.2 |
| - ....................................................................... | 02/10.3 |
| - ....................................................................... | 02/10.4 |
| - ....................................................................... | 02/23.2 |
| - ....................................................................... | 02/27.1 |
| - ....................................................................... | 02/27.3 |
| - ....................................................................... | 02/28.1 |
| - ....................................................................... | 02/28.2 |
| - ....................................................................... | 03/10.1 |
| - ....................................................................... | 03/10.2 |
| - ....................................................................... | 03/10.3 |
| - ....................................................................... | 03/10.4 |

- ........................................................................ 03/11.1
- ........................................................................ 03/20.2
- ........................................................................ 03/21.2
- ........................................................................ 03/28.1
- ........................................................................ 03/28.2
Ávísingarsøla .......................................................... 02/22.1
Avlamisbilur .......................................................... 03/10.3
Avrit av skjølum ...................................................... 01/11.1
Avtalubrot ............................................................ 02/23.2
Bandaðar útvarpsupptøkur ........................................ 02/27.4
Barsilspeningur ...................................................... 03/20.2
Barsilsskipanin ...................................................... 03/20.2
BLF-sáttmálin ........................................................ 01/28.1
- ........................................................................ 02/28.1
- ........................................................................ 02/28.3
Brekað barn .......................................................... 03/20.1
Broyting av ársmetum ............................................. 02/27.3
Bygdamenning ...................................................... 02/27.1
Bygnaðarbroytingar ............................................... 02/28.1
Deildarleiðari II ..................................................... 02/28-3
Deildarleiðari I ...................................................... 02/28.3
Diskretioner uppsøgn ............................................. 01/28.1
Endursetan ............................................................ 02/28.1
Fakfelagsbløð ........................................................ 02/27.4
Fakkombinatiónir .................................................. 02/28.2
FF-blaðið .............................................................. 02/27.4
Fíggjarmálastýrið ................................................... 01/28.1
- ........................................................................ 02/22.1
- ........................................................................ 02/28.1
- ........................................................................ 02/28.3
Fíggjarmálaráðið .................................................... 03/10.4
Fiskiloyvi ............................................................... 02/23.1
- ........................................................................ 03/10.2
Fiskimálastýrið ...................................................... 02/23.1
- ........................................................................ 02/23.2
Fiskimálaráðið ...................................................... 03/10.2
- ........................................................................ 03/11.1

Fjølmiðlaábyrgdarlóg ........ 02/27.4
Fjølmiðlanevnd ........ 02/27.2
- ........ 02/27.4
Flokking ........ 02/28.3
Fólkaatkvøða um niðurlegging av skúla ........ 02/27.1
Fráboðan til umsøkjarar ........ 02/28.2
Fráboðan um lógarbrek ........ 02/27.2
Frítíðarløn ........ 03/20.2
Fróðskaparsetur Føroya ........ 03/10.4
Fyribils fráboðanarskriv ........ 02/28.2
Fyrsti kommunustýrisfundur ........ 02/27.1
Føroya Kommunufelag ........ 02/27.1
Føroya Kærustovnur ........ 02/10.1
- ........ 02/10.4
Føroya Studentaskúli og HF-skeið í Hoydølum ........ 02/27.3
Garantiforskrift ........ 02/27.1
Góður fjølmiðlasiður ........ 02/27.2
- ........ 02/10.1
- ........ 02/28.1
- ........ 02/28.2
Grundgeving ........ 01/11.2
- ........ 02/10.5
- ........ 02/11.1
- ........ 02/28.1
- ........ 02/28.2
Heimild ........ 02/27.1
- ........ 02/28.2
Heimild umboðsmansins mótvegis ÚF ........ 02/27.4
Hjálpartólamiðstøðin ........ 03/10.3
Hósvíkar kommuna ........ 02/21.1
Hoyringsskriv ........ 02/28.2
Innanhýsis arbeiðsskjal ........ 02/11.1
Innlit ........ 01/11.1
- ........ 02/11.1
- ........ 02/28.2
- ........ 03/10.2
- ........ 03/11.1

Innlit í journalkort .................................................. 01/11.1
- ........................................................... 03/21.2
Innlit í tíðindahandrit .............................................. 01/11.2
Javnstilling av bløðum í ÚF ........................................ 02/27.4
Journalistiska virksemið hjá ÚF .................................... 02/27.4
Journalistiskar metingar ............................................ 02/27.4
Kappingaravlaðing .................................................. 02/22.1
Kappingarráðið ...................................................... 02/22.1
Kommunala eftirlitið ................................................ 02/27.1
Kommunustýrisfundir ............................................... 02/27.1
Konsignatiónsgoymsla .............................................. 02/22.1
Konsignatiónsvørur ................................................. 02/22.1
Kærumyndugleiki .................................................... 02/27.1
Kærunevndin í almannamálum ..................................... 03/20.1
Kærurætt ............................................................... 02/27.3
Landsfornfrøðingur ................................................. 03/28.3
Landsskattakærunevndin ........................................... 02/10.1
Landsrættardómur viðv. ALS ....................................... 02/27.4
Landsrættardómur viðv. FF ........................................ 02/27.4
Landsverkfrøðingurin ............................................... 02/28.1
- ........................................................... 03/21.1
Løgmansskrivstovan ................................................ 02/21.1
- ........................................................... 02/27.1
- ........................................................... 02/28.1
- ........................................................... 03/28.1
Løgmálaráðið ......................................................... 03/25.1
Lønarflokking ......................................................... 03/10.4
Lønar- og setanartreytir ............................................ 01/28.1
Magistarafelag Føroya .............................................. 03/28.3
Marknagilsvegurin ................................................... 03/21.2
Málsviðgerðartíð ...................................................... 02/10.1
- ........................................................... 02/10.2
- ........................................................... 02/10.3
- ........................................................... 02/10.4
- ........................................................... 02/10.5
- ........................................................... 02/21.1
- ........................................................... 03/10.1

- ............................................................ 03/10.3
- ............................................................ 03/10.4
- ............................................................ 03/20.2
Meirvirðisgjald av heimavirkaðum vørum........................ 02/22.1
Menningarstovan .............................................. 02/22.1
Mentamálastýrið .............................................. 02/27.1
- ............................................................ 02/28.2
- ............................................................ 02/28.3
- ............................................................ 02/27.3
Mentamálaráðið ............................................... 03/10.4
- ............................................................ 03/27.1
- ............................................................ 03/28.3
Metingarkostnaður ............................................ 02/21.1
Metingarnevnd ................................................ 02/21.1
Mikladals kommuna ............................................ 02/27.1
Mismunur ..................................................... 02/28.2
Morgunsendingar .............................................. 02/27.4
Mótrokning.................................................... 01/28.1
Munarløn ..................................................... 01/28.1
Navnanevndin.................................................. 03/25.1
Navnauppkalling............................................... 03/25.1
Niðurlegging av skúlum ....................................... 02/27.1
Norðuratlantsbólkurin ........................................ 02/27.2
Notatskylda .................................................. 03/10.2
- ............................................................ 03/28.3
Notatskylda, ikki-lógarfest .................................. 03/10.2
Nýggja stýrisskipanin ........................................ 02/28.1
Nývalt kommunustýri .......................................... 02/27.1
Ógegni........................................................ 02/21.1
Ógilding av kommunustýrisavgerðum ............................ 02/27.1
Ognartøka .................................................... 02/21.1
- ............................................................ 03/21.1
Ognartøkuendurgjald .......................................... 02/21.1
Óheftur tíðindaflutningur .................................... 02/27.4
Óhøviskur málburður .......................................... 02/27.4
Partshoyring ................................................. 02/28.2
- ............................................................ 03/28.3

Prísir fyri bond og fløgur frá ÚF og SVF ........................ 01/11.2
Programmábyrgdin í ÚF ........................................... 02/27.4
Programmvirksemið hjá ÚF ........................................ 02/27.4
Programmvirksemið hjá ÚF og SVF .............................. 01/11.2
Próvtøkubók ........................................................ 02/27.3
Redaktionel avgerð ................................................ 02/27.4
Ræðisavmarking .................................................... 02/23.2
Rætti myndugleiki ................................................. 02/28.2
Samanlegging av stovnum ......................................... 02/28.1
Samstarvsevni ....................................................... 02/28.1
Samstarvstrupulleikar ............................................. 02/28.1
Setanar- og lønarviðurskifti ...................................... 02/28.3
Setanarbólkur ....................................................... 02/28.1
- ....................................................................... 03/28.2
Setanarbræv ......................................................... 02/28.2
Setanarmyndugleiki ................................................ 02/28.2
Setanarpolitikkur ................................................... 02/28.1
- ....................................................................... 03/28.3
Setanarsamrøður .................................................... 03/28.3
Setursskrivari ....................................................... 03/10.4
Siðvenja .............................................................. 01/28.1
Sjónvarp Føroya .................................................... 01/11.2
- ....................................................................... 01/11.1
- ....................................................................... 03/27.1
Sjónvarpsgjald ...................................................... 03/27.1
Skattakærunevnd .................................................... 02/10.1
Skattur og avgjøld .................................................. 02/10.1
- ....................................................................... 02/22.1
Skipaskrásetingin ................................................... 02/23.2
Skrivligar uppgávur ................................................ 02/27.3
Skrivligt svar ........................................................ 03/10.2
Skúlamyndugleikar á staðnum .................................. 02/27.1
Skúlanevnd ........................................................... 02/27.1
Skúlaumdømi ........................................................ 02/27.1
Skúlaøki .............................................................. 02/27.1
Skúlin á Trøllanesi ................................................. 02/27.1
Starvsfólka- og arbeiðsmarknaðarmál ......................... 01/28.1

Starvsfólka- og arbeiðsmarknaðarmál v.m. .................... 02/28.1
Starvsfólkapolitikkur .................................... 02/28.1
Studentaskúlin og HF- skeiðið í Hoydølum .................... 02/28.2
Subjektivur tíðindaflutningur ................................ 02/27.4
Svartlisting ............................................ 02/27.4
Teldupostur ............................................. 02/11.1
Thorvald Stoltenberg .................................... 02/27.2
Tíðindabløð ............................................ 02/27.4
Tíðindaflutningur ....................................... 01/11.2
- ....................................................... 02/27.2
- ....................................................... 02/27.4
Tilmæli ................................................ 01/11.2
- ....................................................... 01/28.1
- ....................................................... 02/21.1
- ....................................................... 02/27.3
- ....................................................... 03/21.2
- ....................................................... 03/25.1
Tilmæli um setan í starv .................................. 02/28.2
Toll- og Skattstova Føroya ................................ 02/10.1
- ....................................................... 02/22.1
Tórshavnar býráð ........................................ 01/11.1
Tórshavnar kommuna ..................................... 03/21.2
Tænastumaður ........................................... 01/28.1
Tænastumannaeftirløn .................................... 01/28.1
Undirvísing og gransking v.m. ............................. 02/27.1
Undirvísingarárslok ...................................... 02/27.3
Undirvísingarhøli ........................................ 02/27.1
Uppsøgn ................................................ 02/28.1
Útoyggjafulltrúi ......................................... 03/28.1
Útoyggjanevndin ......................................... 02/27.1
Uttanfyristandandi klagari ................................ 02/28.1
Útvarp Føroya ........................................... 01/11.2
- ....................................................... 02/27.2
- ....................................................... 02/27.4
Útvarpsnevndin .......................................... 02/27.4
Vanbýti í tíðindaflutninginum hjá ÚF ........................ 02/27.4
Vegleiðing um uppafturtøku ................................ 02/27.3

Veiðuloyvi .......................................................... 02/23.1
Victoria .......................................................... 03/25.1
Viðtøkuføri kommunustýrisins .................................... 02/27.1
Vinnuframagrunnurin ............................................ 02/10.5
Vinnulívs- og Fiskivinnumál ...................................... 02/23.1
Vinnumálastýrið .................................................... 02/22.1
- .................................................................. 02/28.1
Vinnumálaráðið .................................................... 03/20.2
- .................................................................. 03/21.1
Virkandi skúli ....................................................... 02/27.1